# Álit um
# landbúnaðarviðurskifti Føroya

# Álit um landbúnaðarviðurskifti Føroya

*Álit frá nevndini, landsstýrið setti 30. november 1993 at gera uppskot til landsstýrið viðvíkjandi framtíðar landbúnaðarvinnu í Føroyum.*


Kjartan Kristiansen, stjóri á menningarstovuni
Peder T. Haahr, stjóri á royndarstøðini
Jóannes Dalsgarð, stjóri á jarðarráðnum
Jústines Olsen, djóralækni
Páll Patursson, bóndi
Maria Róin, fulltrúi



Tórshavn 1997

Álit um landbúnaðarviðurskifti Føroya
Útgevari: Nevndin, ið gjørdi álitið um landbúnaðarviðurskifti Føroya,
vegna Vinnumálastýrið
Umbróting og repro: Hestprent
Prent:
Innbinding:

ISBN 99918-

# INNIHALDSYVIRLIT


I. UM ARBEIÐI NEVNDARINNAR . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11

II. SAMANDRÁTTUR AV ÁLITINUM . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14

III. FØROYSK JARÐARLÓGGÁVA SØGULIGA LÝST . . . . . . . . . . . . . . . . . 15

A. Rættarviðurskiftini í Føroyum fyrstu tíðina aftaná landnámið . . . . . . 15

B. Tíðarskeiðið aftaná seyðabrævið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22

C. Tíðarskeiðið seinast í 18. øld fram til hagalógina frá 1866 . . . . . . . . . . 29

D. Landbúnaðarviðurskiftini eftir miðju seinastu øld . . . . . . . . . . . . . . . . . 37

IV. GALDANDI LANDBÚNAÐARSKIPAN . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 46

A. Geografisk lýsing av almennu og privatu jørðini í Føroyum . . . . . . . . . 46

1. Almenna og privata jørðin í Føroyum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 46

2. Hagtøl um landbúnaðarframleiðslu, – nýtslu og innflutning . . . . . . 48

B. Almenna búnaðarjørðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 49

1. Løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988 um landsjørð . . . . . . . . . . . . . . . . . 49

a. Reglur í lóg om jordbrugets fremme, sum eru farnar úr gildi . . . . 49

b. Støðið undir lógini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 50

c. Festiskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 51

d. Leigutraðir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 56

e. Søla av landsjørð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 57

f. Fyrisitingin av almennu jørðini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 57

2. Reguleringar eftir lóg om Jordbrugets Fremme . . . . . . . . . . . . . . . . . 59

3. Festikontoskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 59

C. Fíggjarviðurskifti landbúnaðarins . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 61

1. Jarðargrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 61

a. Grundarlagið undir grunninum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 61

b. Fyrisiting grunsins . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 63

c. Lán úr Jarðargrunninum sbr. lóg nr. 174 af 24.05.1937 . . . . . . . . 65

d. Studningur úr Jarðargrunninum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 71

e. Heildartøl um virki Jarðargrunsins . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 78

f. Uppsetan av roknskapi og grannskoðan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 78

2. Vakstrarhúsgrunnurin (skrivað áðrenn 1. des. 1996) . . . . . . . . . . . . . 79

3. Tollviðurskifti viðv. innflutningi av landbúnaðarvørum til Føroya . . 80

a. Gamla avgjaldsskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 80

b. Nýggja avgjaldsskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81
c. Tollviðurskifti viðv. innflutningi av landbúnaðarvørum til Føroya 82
d. Innflutningur av ymiskum landbúnaðarvørum . . . . . . . . . . . . . . . 84
4. Kappingaravlagandi tiltøk uttanlendis mótvegis Føroyingum . . . . . . 84
5. Mikroøkonomisk lýsing av fíggjarviðurskiftum hjá bøndrunum . . . 88
a. Almenna jørðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 88
b. Neytabrúk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 89
c. Seyðabrúk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 89
d. Neyta- og seyðabrúk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 90
e. Raksturin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 90
f. Avlopið (lønin til bóndan) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 92
g. Íløgan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 92
h. Privat jørð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 92
i. Serlig skattlig viðurskifti hjá festibóndum . . . . . . . . . . . . . . . . . . 92

D. Ognar- og grannaviðurskifti á landbúnaðarognum . . . . . . . . . . . . . . . 94
1. Lóg nr. 171 af 18.05.1937 for Færøerne om hegn og markfred . . . . . 94
a. Girðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 94
b. Um ábyrgd og upptøku av húsdýrum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 102
c. Ferðsla á annanmanns jørð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 105
2. Lóg nr. 172 af 18.05.1937 for Færøerne om haugers styrelse og drift 106
a. Grundarlagið undir lógini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 106
b. Stýrandi organini í haganum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 107
c. Áseyðurin v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 112
d. Ymsar reglur um hagaraksturin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 115
e. Hagans grasrættur hjá seyði innangarðs . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 116
f. Avmarkaði rættindi í haganum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 118
g. Viðlíkahald av varðagøtum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 119
h. Rættargangsháttur v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 119
3. Lóg nr. 170 af 18.05.1937 for Færøerne om grandestævne m.m. . . . . 120
4. Lóg nr. 84 af 31.03.1926 for Færøerne om Landvæsenskommisioner 124
5. Lóg nr. 169 af 18.05.1937 for Færøerne om indsøer og vandløb . . . . 129
6. Lóg nr. 147 af 27.03.1939 om udskiftning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 131
7. Løgtingslóg nr. 55 frá 16.08.1962 um tinglýsing . . . . . . . . . . . . . . . 131
8. Løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962 um matrikulering og sundurbýti . . 133
9. Løgtingslóg nr. 27 frá 09.09.1954 um fuglaveiðu v.m. . . . . . . . . . . . 135
10. Ymiskar gamlar rættarreglur sum enn hava formligt gildi . . . . . . . . 136
a. Lov af 04.03.1857 om Udstykning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 136
b. Lov af 19. januar 1863 om afhændelse af trøer . . . . . . . . . . . . . . 136
c. Lóg nr. 70 af 23.04.1897 angaaende Indførelse af en ny Skyldsætning 137
d. Lóg nr. 183 af 20.03.1918 om Mergelbane . . . . . . . . . . . . . . . . . 138
e. Lov om Lens, Stamhuses og Fideikommisgodsers
Overgang t. fri Ejendom . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 138
f. L. nr. 136 af 01.06.1929 om Begunstigelse for Mergelsselskaber . . 138

g. Lóg nr. 179 af 01.04.1921 om Afløsning af Vintergræsningsretten 139
h. L. nr. 87 af 31.03.1931 om salg af Aalekær . . . . . . . . . . . . . . . . 139
i. Lóg nr. 51 af 14.03.1931 om hesteavlens fremme på Færøerne . . . 139
j. Løgtingslóg nr. 3 frá 03.01.1950 um vraking av føroyskum ullvørum 140

E. Tænastur til landbúnaðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 141
1. Búnaðarráðgeving, royndarvirksemi, búnaðarskúlar o.t. . . . . . . . . . 141
a. Royndarvirksemi/undirvísing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 141
b. Ráðgeving . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 145
c. Húsdjóralógin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 146
2. Djóralæknaviðurskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 148
a. Veterinæra skipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 148
b. Lóg nr. 36 af 28.02.1908 om smitsomme sygdomme hos husdyrene 155
3. Plantusjúkur og skaðadýr . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 160
a. Galdandi lóggáva . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 160
4. Landbúnaðurin og apoteksverkið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 162

F. Umhvørvisreglur landbúnaðinum viðvíkjandi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 163
1. Lóg nr. 73 af 23.03.1932 til Bekæmpelse af Plantesygdomme m.m. . 163
2. Løgtingslóg nr. 53 frá 27.11.1952 um viðarlundir . . . . . . . . . . . . . . 164
3. Løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954 um byggi- og býarskipanir . . . . . . 165
4. Løgtingslóg nr. 48 frá 09.07.1970 um náttúrufriðing . . . . . . . . . . . . 166
5. Ll. nr. 77 frá 12.07.1984 um bann móti burturkoyring av mold . . . . . 169
6. Løgtingslóg nr. 134 frá 29.10.1988 um umhvørvisvernd . . . . . . . . . . 169

G. Royndir síðan 1937 at broyta búnaðar- og ognarlóggávuna . . . . . . . . . 173

V. UMMÆLI AV SKIPANINI, SUM ER . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 193
A. Hvat er endamálið, vinnuligt føroyskt jarðarbrúk eigur at miða ímóti . 194

B. Almenna búnaðarjørðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 200
1. Festiskipanin – ógreitt ábyrgdarbýti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 200
2. Leigutraðir og onnur leigumál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 202
3. Søla burturav almennari jørð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 202
4. Privatisering av almennu jørðini; ein gongd leið? . . . . . . . . . . . . . . . . 209
5. Jarðarfyrisitingin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 211

C. Ognarjørðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 214

D. Fíggjarviðurskifti landbúnaðarins . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 216
1. Tjóðbúskaparligt ummæli av studnings-, láns- og tollskipanini í dag 216
a. Hugleiðingar um búskaparviðurskifti í landbúnaðinum . . . . . . . 216
b. Búskaparligur setningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 217
c. Um marknaðarbúskap . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 218

d. Um marknaðarbúskap og demokratisk rættindi ............. 220
e. Luturin hjá landbúnaðarvinnuni í millumtjóða arbeiðsbýti ..... 222
f. Búskaparligar hugleiðingar í samband við ognarviðurskifti ..... 225
g. Hugleiðingar um hvussu stór jarðarbrúkini eiga at vera ....... 226
h. Ognarviðurskiftini undir framtíðar skipan ................. 227
i. Verandi skipan ................................ 228
j. Skipan við útleigan eftir marknaðartreytum ............... 228
k. Søla av landsjørðini ............................. 230
l. Inntøkuskapan í landbúnaði ......................... 231
m. Framleiðsluvirðið í landbúnaðarvinnuni ................. 232
n. Rávørunýtsla og virðisøking ......................... 236
o. Útgreining av búskaparviðurskiftum í neytahaldi og seyðahaldi . 237
p. Studningar .................................. 239
q. Um inntøkubýtið í landbúnaði ....................... 240
r. Inntøkuviðurskifti í landbúnaði í mun til aðrar vinnur ......... 244
s. Garðyrki .................................... 246
2. Studningsmøguleikar frá tí almenna ..................... 247
a. Framtíðar stuðulsskipanir ......................... 247
b. Verandi stuðulsskipanir í Føroyum ..................... 250
c. Stuðulsskipanirnar í øðrum londum – serstakliga í ES ......... 251
d. Framtíðar føroyskar láns- og stuðulsskipanir ............... 253
3. Møguleikar fyri størri lønsemi ......................... 254

E. Ognar- og grannaviðurskifti á landbúnaðarognum ............... 257
1. Lóg um hagastýri og røkt v.m. ......................... 257
2. Lóg um grannastevnu v.m. ........................... 259
3. Lóg um landbúnaðarstevnur v.m. ........................ 261
4. Útskiftingarlógin, matrikuleringslógin og tinglýsingarlógin ....... 261
5. Lóg um girðingar og friðing av lendi ..................... 261
6. Lógin um áir og vøtn .............................. 263
7. Fuglaveiðilógin ................................. 263
8. Ymsar gamlar lógir .............................. 263

F. Plantusjúkur og skaðadýr ............................ 263

G. Tænastur til landbúnaðin ........................... 263
1. Búnaðarráðgeving ............................... 264
2. Búnaðarroyndir ................................. 264
3. Aliarbeiði .................................... 264
4. Búnaðarskúli .................................. 264
5. Djóralæknaviðurskifti ............................. 265
a. Lógin um smittandi sjúkur ......................... 265
b. Djóralæknatænastan ............................. 265
c. Eftirlit við innflutningi ........................... 266

H. Umhvørvisreglur landbúnaðinum viðvíkjandi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 266

I. Landbúnaðurin, ferðavinnan og frítíðaráhugamál . . . . . . . . . . . . . . . . . . 266

VI. UPPSKOT NEVNDARINNAR . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 267
A. Almennar viðmerkingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 267
1. Tvær hugsaðar skipanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 267
2. Góðsskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 268
3. Avhending av almennu jørðini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 270

B. Uppskot nevndarinnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 271
1. Søla av almennu jørðini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 271
a. Sølupeningurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 271
b. Keypsprísurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 272
c. Hvat skal seljast . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 273
d. Treytir við sølu og á landsjørð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 274
e. Keypari . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 275
f. Fyrsta søla – herundir sanering . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 276
g. Jarðarfyrisitingin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 278
h. Búnaðarráðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 279
i. Búnaðargrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 279
2. Onnur viðurskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 281

C. Uppskot til løgtingslóg um landsjørð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 283

D. Heildarviðmerkingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 287

E. Útreiðslur av lógini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 289

F. Viðmerkingar til einstøku greinirnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 290

VII. STUTT UM LANDBÚNAÐIN Í ØÐRUM LONDUM . . . . . . . . . . . . . . 298

VIII. HEIMILDIR UM LANDBÚNAÐAR VIÐURSKIFTI . . . . . . . . . . . . . . 299

IX. SKJØL . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 300

# I. UM ARBEIÐI NEVNDARINNAR

Føroya landsstýri samtykkti 30. november 1993 at seta eina nevnd at gera uppskot til landsstýrið viðvíkjandi framtíðar landbúnaðarvinnu í Føroyum.

Arbeiðssetningur nevndarinnar er, at nevndin skal orða endamálsgreinina fyri vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum, við tí fyri eyga at umskipa lógarverkið hesum viðvíkjandi, herundir:

1) gera uppskot til at broyta núverandi jarðarlógina, so at Jarðargrunnurin verður skildur burtur úr, og at onnur øki verða skipað í einari lóg fyri alt vinnuligt jarðarbrúk í Føroyum. Uppskotið skal eisini innihalda uppskot til nýggjan bygnað í umsitingini av jarðarbrúksmálum.
2) Nevndin skal greina kappingarstøðið hjá føroyskum jarðarbrúki, herundir kappingaravlagandi studningsskipan her heima og í øðrum londum, sum ávirka hetta.
3) Umhugsa hvørjar tænastur eiga at vera til taks, og hvussu tær skulu fíggjast (landskassin, brúkaragjald etc.).

Í nevndina vóru sett:

*Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovu Landsins*
*Peder T. Haahr, leiðari á Royndarstøðini*
*Jóannes Dalsgarð, stjóri á Føroya Jarðarráð,*
*Jústines Olsen, djóralækni, og*
*Anna Maria Fosaa, fulltrúi, ið skal verða skrivari í nevndini.*

Í apríl 1996 tók Anna Maria seg úr nevndini, og í hennara stað kom Maria Róin í nevndina.

Við landsstýrisavgerð 1. november 1994 varð nevndin víðkað við Pálli Patursson, bónda, og Jákupi Eidesgaard, bónda, ið doyði 19. juli 1997, áðrenn nevndin var liðug við sítt arbeiði. Eingin er valdur í hansara stað.

Á fundi 12. oktober 1995, og við landsstýrisins samtykki, gjørdist Sjúrður Rasmussen, adv., løgfrøðiligur ráðgevi nevndarinnar. Hann tók seg úr hesum starvi 1. desember 1996, og í hansara stað varð Kári D. Petersen, adv., tilnevndur sum løgfrøðiligur ráðgevi.

Nevndin hevði fyrsta fund sín 15. desember 1993 og hevur tilsamans havt 72 fundir. Í oktober 1995 skipaði nevndin seg við Kjartani Kristiansen sum formanni.

Í sínum arbeiði hevur nevndin gjørt sær greitt, at arbeiðssetningurin

mátti byggja á eina neyva og gjølliga lýsing av galdandi skipan í landbúnaðinum í dag. Út frá hesum kundi eitt uppskot um endamál fyri vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum verða orðað, sum kundi liggja til grund fyri umskipan av lógarverkinum, har Jarðargrunnurin verður skildur burtur úr, og onnur øki skipað í einari lóg fyri alt vinnuligt jarðarbrúk í Føroyum.

Áðrenn Sjúrður Rasmussen tók seg úr starvi, var kapittul III – Føroysk jarðarlóggáva søguliga lýst – liðugt skrivað og herumframt var meginparturin av kapittul IV – Galdandi skipan landbúnaðinum viðvíkjandi – liðugur. Í sambandi við lýsingina hevði nevndin biðið Dánjal J. Bærentsen, gamla landsdjóralæknan, týtt lógirnar, nr. 171 af 18.05.1937 Om Hegn og Markfred, nr. 172 af 18.05.1937 Om Haugers Styrelse og Drift, nr. 170 af 18.05.1937 Om Grandestævne, nr. 169 af 18.05.1937 Om Benyttelse af Indsøer og Vandløb og nr. 84 af 31.03.1926 Om Landvæsenskommissioner. Hesar lógir eru bert galdandi í Føroyum og í sambandi við komandi viðgerð av teimum, hevur nevndin mett tað av týdningi, at tað í viðgerðini ber til at lýsa tær ásetingar, sum møguliga skulu broytast, á føroyskum. Týðingin var at kalla liðug fyri árslok 1996. Nevndin hevur eisini ætlað, at lóg nr. 147 af 27.03.1939 Om udskiftning, ið er vorðin ein samanvavstur av føroyskum og donskum somuleiðis átti at verið orðað, øll sum hon er, á føroyskum. Í stórum er hetta gjørt á Matrikulstovuni.

Setningurin at orða uppskot um endamálsgrein fyri vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum og umskipa lógarverkið soleiðis, at Jarðargrunnurin verður skildur burtur úr og onnur øki verða skipað í einari almennari lóg fyri alt vinnuligt jarðarbrúk í Føroyum, herundir at koma við uppskoti um nýggjan bygnað í umsitingini av jarðarbrúksmálum, hevur verið torførari enn upprunaliga mett, men nevndin heldur seg hava lokið henda setning við uppskoti hennara um løgtingslóg um landsjørð.

Við uppskoti nevndarinnar verða løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988 um landsjørð við seinni broytingum og Lov nr. 174 af 24.05.1937 Om Jordbrugets Fremme við seinni broytingum avloystar av nýggjari løgtingslóg um landsjørð, ið fevnir um somu viðurskifti sum tær gomlu lógirnar, men við greiðum skilnað millum Jarðargrunn og onnur viðurskifti í landbúnaðinum.

Afturfyri hevur nevndin ikki megnað at gjørt liðugt uppskot um broyting av hinum jarðarlógunum, sum komu í 1937 og 1926. Sum er fara nakrar av ásetingunum í hesum lógum í verandi líki at verða til bága fyri framtíðar vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum.

Heldur ikki hevur nevndin viðgjørt spurningin um, hvørjar tænastur eiga at vera til taks, og hvussu tær skulu fíggjast so væl, sum hon hevði ætlað.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt hesar fundir við fólk uttanfyri

nevndina: 16. mai 1994 við 3 dugandi bøndur, sum ikki umboðaðu felagsskapir, men sum við rættiliga ymiskum fortreytum livdu av garðinum burturav; 12. november 1996 við tvey umboð fyri føroysku sýslumenninar um leiklutin hjá sýslumonnunum í umsiting av fleiri landbúnaðarlógum og týdningin av hesum lógum og 14. november 1996 við Ólav Clementsen um útskiftingarlógina og framhaldandi útskiftingar. Í sambandi við liðuggerðina av fyriliggjandi áliti hevur nevndin tó ikki havt ætlaðar fundir við hesar somu aftur. Nevndin hevur herumframt fingið hesi skriv: dagfest 9. mai 1997 frá Felagnum Føroysk Ross (lagt við sum skjal 21) og dagfest 10. juli 1997 frá Føroya Sílaveiðifelag (lagt við sum skjal 22).

Nevndarlimirnir hava allir havt annað fulltíðar starv at røkt, og tað er tí avmarkað, hvat teir sjálvir hava kunna átikið sær at skriva. Tað hevði verið ein stórur fyrimunur í sambandi við eitt slíkt arbeiði, um landsstýrið, tá tað setti nevnd við so stórum setningi, samstundis setti skrivara, ið kundi taka sær av arbeiðinum burturav. Nevndin hevur tí heitt á uttanfyristandandi at gera arbeiði ella biðið um loyvi at nýta fyriliggjandi tilfar og nýtir høvi at takka hesum fyri hesa hjálp.

Kapittul II í álitinum er ikki gjørt. Kapittul III hevur Jógvan Andreassen, sorinskrivari, skrivað. Kap. IV.C.3. hevur Leivur Gregersen, gamli stjóri á Føroya Tollstovu, skrivað, Kap. IV,C.5, hevur Jógvan Amonson, løggildur grannskoðari, skrivað, og hann hevur eisini skrivað Kap V.D5. Skjalið, sum víst verður til í Kap. IV,D.6, hevur Ólavur Clementsen, gamli matrikulstjóri, týtt eftir upprunateksti hjá H. Olavus Danielsen, gamla matrikulstjóra. Kap. IV, E.4, hevur Heri Mørkøre, landsapotekari, skrivað. Kap. V,D1, hevur Per Nicolajsen, hagfrøðingur, skrivað. Nógv av kanningar- og upplýsingartilfarinum, sum er gjørt, hevur Gunnar Bjarnason, búfrøðingur, hjálpt nevndini við.

Nevndin viðmerkir, at í nógvum av tí, sum aðrir hava skrivað, koma sjónarmið fram, sum ganga beint ímóti uppskoti nevndarinnar. Nevndin heldur hetta vera ein fyrimun í álitinum og hevur ikki hildið tað verið rætt at roynt at víst hesum sjónarmiðum aftur. Tað heldur nevndin verður gjørt í sjálvum uppskotinum.

Tórshavn, 3. desember 1997

| | |
|---|---|
| Kjartan Kristiansen<br>formaður | Peder Haahr |
| Jóannes Dalsgarð | Jústines Olsen |
| Páll Patursson | Maria Róin<br>Skrivari |

# II. SAMANDRÁTTUR AV ÁLITINUM

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

# III. FØROYSK JARÐARLÓGGÁVA SØGULIGA LÝST

*Støðið undir greinini er útvarpsfyrilestrarøð á vári 1987. Jógvan H. Andreassen, sorinskrivari.*

## A. Rættarviðurskiftini í Føroyum fyrstu tíðina aftaná landnámið

Í hesi grein verður føroyska jarðarlóggávan lýst út frá einum søguligum støði. Harafturimóti er ikki ætlanin at geva nakað, sum líkist eini fullfíggjaðari mynd av tí stóra reglukompleksi, sum føroyskur bygdarættur er. Her verður serliga víst til verkini hjá Bjørk „Færøsk Bygderet I-III“ og hjá Poul Petersen „Ein føroysk bygd“.

Upp til seinasta aldaskifti var høvuðsvinnuvegur Føroya landbúnaðurin. Hetta kann lýsast við nøkrum tølum. Av einum samlaðum fólkatali í 1834 uppá 6.628 vóru 4.911 fólk knýtt at landbúnaðinum og 262 at fiskivinnuni. Í 1880, tá sluppirnar vóru byrjaðar at koma, var samlaða fólkatalið 11.220. Harav vóru 5.460 fólk knýtt at landbúnaðinum og 3.532 at fiskivinnuni. Í l901 var samlaða fólkatalið 15.230, harav 4.393 fólk vóru knýtt at landbúnaðinum og 6.119 at fiskivinnuni. Í l901 eru sostatt væl fleiri fólk knýtt at fiskivinnuni enn landbúnaðinum. Sambært ársfrágreiðingini hjá landsstýrinum og ríkisumboðsmanninum er talið av teimum, sum hava landbúnað sum vinnuveg burturav í dag undir 300, meðan talið av fiskimonnum er yvir 3.000. Henda mannagongd hevur eisini givið seg til sjóndar í framleiðsluni og útflutninginum. Umleið ár 1840 var útflutningurin av fiskavørum 5 % av samlaða útflutninginum, meðan hann í dag er 99 %. Sambært nevndu ársfragreiðing var partur landbúnaðarins av tí samlaðu tjóðarinntøkuni, ið er eitt mát fyri tí vinnuligu inntøkuskapanini í samfelagnum, í 1980 1,5 %, meðan partur fiskivinnunar var 22 %.

Tað er tí ikki løgið, at jarðarspurningar hava staðið frammarlaga, tá talan hevur verið um lóggávu í farnum øldum, meðan tað tey seinnu árini hevur verið fiskivinnan, sum hevur dominerað myndina.

Nær fólk hava búsett seg her á hesum oyggjum, vita vit ikki heilt fyri vist. Føroyingasøga nevnir Grím Kamban sum fyrsta mann, ið búsettist í Føroyum. Hetta halda menn hevur verið umleið ár 825. Um tað mundi høvdu norðmenn búsett seg í oyggjabólkinum sunnanfyri, í Hetlandi, Orknoyum, Hebridunum ella Suðuroyggjunum, sum Hebrid-

urnar eisini vóru kallaðar. Tilnavnið Kamban er helst keltiskt, og týðir tað uppá, at Grímur Kamban er komin sunnanifrá. Føroyingasøga greiðir víðari frá, at tá Haraldur Hárfagri ráddi í Noregi, flýddi mangur maður undan harðræði hansara. Summir settust í Føroyum og búðu har. Hetta hevur verið væl eftir, at Grímur Kamban setti seg niður her, tí Haraldur Hárfagri livdi frá umleið 860 til 940. Haraldur var sonur Hálvdan Svarta, sum hevði ræðið í Vestfold fylki á vestursíðini av Oslofjørðinum. Um hetta mundi var Noreg ikki eitt samlað ríki, men var býtt upp í smærri ríki, og høvdingar ella smákongar høvdu ræðið í teimum ymisku økjunum. Haraldur Hárfagri tók við eftir faðirinum, og tað eydnaðist honum við dugnaskapi, men eisini við harðskapi, at leggja fleiri og fleiri øki inn undir seg, og í einum sjóslagi á Havsfirði umleið ár 890 eydnaðist tað honum at vinna á sínum seinasta mótstøðumanni. Haraldur Hárfagri bleiv sostatt fyrsti kongurin yvir einum samlaðum Noregi. Sambært frásøgnir hjá íslendska søguskrivaranum Snorra Sturlasyni, sum livdi frá 1178 til 1241 fór Haraldur Hárfagri ikki fram við mýkindum móti bøndrunum. Hann tók jørðina frá teimum og kravdi inn jarðarskatt. Nógvir norðmenn rýmdu tí og leitaðu sær til fremmandar strendur. Summir av teimum komu, sum Føroyingasøga sigur frá, til Føroya.

Vit vita ikki, hvussu álítandi Føroyingasøga er. Plantukanningar tykjast at prógva, at fólk hevur búð her áðrenn 825. Vit hava eisini frásøgnina hjá írska munkinum Dicuil um, at írskir einbýlismenn hava hildið til í Føroyum í 700-talinum. Hetta nýtist tó ikki at vera prógv um, at frásøgnin í Føroyingasøgu í aðra mátar ikki er røtt. Í hvussu er og ikki, so tykist eingin ivi at vera um, at í hvussu er størstiparturin av tí fólki, sum býr í Føroyum í tí tíðarskeiði, Føroyingasøga umfatar, eru eftirkomarar av norskum niðursetumonnum.

Vit hava ikki skrivligar keldur, sum lýsa hvørjar rættarreglur vóru galdandi ta fyrstu tíðina aftaná landnámið. At rættarreglur hava verið galdandi, er eyðsæð. Í Føroyingasøgu lesa vit, at tingstaður Føroyinga var í Streymoynni, og har er havnin, teir rópa Tórshavn. Eisini stendur, at Brestir var vitur maður og lógkønur.

Aftaná at Einar Suðringur hevði sligið Eldjarn Kambhøtt í høvdið við eini øks inni hjá Havgrími í Suðuroy, stevndi Havgrímur Einari á Streymoyarting. Orðið løgting verður ikki nevnt í Føroyingasøgu, men Streymoyarting er óivað sami stovnur, sum seinni verður kallaður løgting.

Í Føroyingasøgu stendur um rættarmálið millum Havgrím og Einar Suðring hetta:

> „Tá stevndi Havgrímur Einari á Streymoyarting, og í tí skili skiltust teir.
> Brestir hevði beinanvegin, klandrið kom í, lýst fyri vitnum, at Kambhøttur hevði lagt á Einar fyrst. Nu koma báðir partar á

> ting og tað fjølmentir. Men tá ið Havgrímur gekk í løgrættina og ætlaði at hava sakina fram ímóti Einari, gingu teir báðir brøðurnir Beinir og Brestir, fram øðrumegin við miklum flokki, og Brestir gjørdi sakina ónýta fyri Havgrími og gjørdi Eldjarn óhalgan eftir fornari landslóg.“

Føroyingasøga vísir ikki, hvat her verður sipað til, og vit kenna heldur ikki annað skrivligt tilfar, sum lýsir rættarreglurnar í Føroyum tá í tíðini. Vit kunnu tí bert gita okkum til, hvørjar rættarreglur hava verið galdandi í Føroyum tá. Rættarreglurnar í Noregi og fyri ein part eisini í Íslandi eru betri kendar, og við tað, at tær kanska kunnu geva okkum eina hóming av okkara egnu rættarviðurskiftum, skal nemast eitt sindur við tær.

Eins og Noreg undan kongsræði Haralds Hárfagra var býtt upp í smáríki, soleiðis var landið eisini á rættarøkinum býtt upp í fleiri øki, og var hetta eisini so í fleiri øldir aftaná, at Noreg var vorðið eitt samlað ríki. Tað vóru fýra løgdømi hvørt við sínum løgtingi, sum útinti dómsvaldið. Eitt av hesum fýra løgdømunum var Gulatingið, sum hevði navn sítt eftir tingstaðnum á Gulanum í Sognefjordane. Hini vóru Frostating, Eidsivating og Borgarting. Gulating, sum helst er tað eldsta løgdømið, umfataði vestara partin av Suðurnoregi, og hevur serligan áhuga hjá okkum, tí niðursetumenninir í Føroyum eru helst serliga komnir úr hesum øki. Reglurnar í Gulatingslógini eru fyrndargamlar, ja so gamlar, at eingin rættuliga veit, hvussu gamlar tær eru. Tær elstu reglurnar stava frá tíðini, áðrenn nakað bókamál var til, og tær hildu seg livandi í munnligari traditión. Løgmaðurin á Gulanum framsegði eins og løgmenninir á hinum løgtingunum og løgsøgumaðurin á íslendska altinginum lógina á hvørjum ári, og henda framsøga løgmansins var galdandi rættur. Í 12. øld vórðu rættarreglurnar í Gulatingsøkinum uppskrivaðar. Tað eru tvær uppskriftir, ein eldri og ein yngri. Tann eldra uppskriftin lýsir Gulatingslógina, sum hon var fyri ár 1164, tá tað komu nakrar umfatandi broytingar. Henda uppskriftin verður kallað ólavsteksturin eftir Ólavi Heilaga, og sipar navnið til, at talan er um fyrndarrætt. Tann yngra uppskriftin verður kallað Magnusartekstur eftir Magnusi Erlingssyni, ið var kongur Noregs frá 1161 til 1184.

Í 1267 varð viðtikin nýggj Gulatingslógbók, sum Magnus kongur Hákunarson, eisini kallaður Magnus Lógbøtari, hevði sett saman, men longu 7 ár seinni ella í 1274 varð henda lógbok avloyst av landslóg Magnus Lógbøtara. Henda landslóg, sum partvís er ein samansjóðing av rættarreglunum úr teimum fýra løgdømunum og partvís nýlóggáva, verður roknað millum fremstu lógarverk, og var við ávísum broytingum galdandi til Kristian kongur fjórði, læt gera eina norska lógbok „Kong Kristian Den Fjerdes Norske Lovbog af 1604“. Hetta

var í veruleikanum ikki nøkur nýggj lógbók, men fyri ein stóran part bert ein umseting av landslógini hjá Magnusi Lógbøtara. Aftaná at Noreg og Danmark høvdu fingið felags kong, vóru nógvir av embætismonnunum í Noregi danir. Teir skiltu ikki tað forna málið, landslógin var skrivað á, og var tað tí neyðugt at umseta hana til danskt mál. Haraftrat kom, at eingin prentað landslóg var til, og lógin fannst tí bert í handritum, og vóru tey ikki øll líka álitandi. Henda lógbókin hjá Kristiani kongi fjórða var galdandi til Kristian kongur fimti lat gera nýggja lógbók fyri Noreg „Kong Kristian den Femtes Norske lov“ frá 1687.

Ár 930 var fólkainnflytingin í Íslandi um at vera av. Tørvur var á einum skipaðum rættarsamfelagi. Íslendingar settu tí alting á stovn og fingu sær lóggávu. Henda fyrsta íslendska lóggávan verður kallað Ulflotslógin. Søgnin sigur, at lógin hevur navn eftir manni Ulfljótur at navni, sum var sendur til Noregs at gera lóg fyri Ísland. Tað lógarverk, hann kom heimaftur við, Ulflotslógin var átøk lóggávuni í Gulatingsløgdøminum.

Eins og í Noregi og aðrastaðni við livdi eisini fyrsta íslendska lóggávan í munnligari traditión. Lógsøgumaðurin framsegði lógina á altinginum. Burtursæð frá tingskipanarreglunum, sum vórðu framsagdar á hvørjum ári, framsegði hann ein triðing av lógini um árið, og varð sostatt øll lógin lisin upp eftir trimum árum. Altingið hevði ikki bert dómsvald, men hevði eisini lóggávuvald. So við og við fekk Ísland sínar egnu lógarreglur, sum førkaðu seg meira og meira frá tí norsku lóggávuni. Tær íslendsku lógarreglurnar vórðu uppskrivaðar í fyrru helvt av 12. øld. Tað fyrsta av hesum arbeiði, sum ikki bert var uppskriving, men eisini fyri ein part nýlóggáva, varð kallað Haflidaskrá. Arbeiðið fór fram á garðinum hjá einum mætum høvdinga Hafliði Mársson, og fekk lógarverkið navn eftir honum. Arbeiðið helt fram og gjørdist rúgvusmikla lógarverkið „Grágás“. Í 1262 varð Ísland lagt inn undir Noregs kong, og stutt eftir, í árunum 1271-73, varð nýggj landslóg „Jarnsiða“ sett í gildi í Íslandi. Aftaná at Noreg hevði fingið landslógina hjá Magnusi Lógbøtara, fekk eisini Ísland í 1281 sína landslóg Jónsbók, sum í stóran mun var átøk norsku landslógini.

Eftir tí, her er nevnt, er tað nærliggjandi at halda, at tað í hvussu er ta fyrstu tíðina aftaná, at norðmenn settu seg niður í Føroyum, hava verið norskar rættarreglur, teir hava nýtt í rættarviðurskiftum, og helst reglurnar í Gulatingslógini. Eins og nevnt var um viðurskiftini í Íslandi, er tað ikki óhugsandi, at føroyingar so við og við hava gjørt serligar reglur á økjum, har serstøk viðurskifti gjørdu seg galdandi, og har hin norska lóggávan ikki hóskaði so væl, eitt nú á landbúnaðarøkinum. Tað er heldur ikki óhugsandi, at løgtingið umframt at útinna dómsvald eisini hevur havt eitt slag av lóggávuvaldi eins og íslendska altingið. Í Føroyingasøgu lesa vit, at Sigmundur aftaná at

hava tikið við kristnari trúgv stevndi bóndunum á ting í Streymoynni fyri, at teir eisini skuldu taka við kristnari trúgv. Hetta var sostatt eitt lógaruppskot um at seta kristnu læruna í gildi í Føroyum. Í Íslandi varð kristindómurin jú eisini innførdur við altingssamtykt.

Í Diplomatarium Færoense er prentað rættarbót Magnusar Hákunarsonar fyri Føroyar frá 1273, har tað m.a. stendur í føroyskari týðing hetta:

> „at her skulu ganga slíkar lógir, sum ganga um alt Gulatings samlagið, uttan tað at búnaðarbólkurin skal standa eftir, tí sum bók tykkara sjálvs vitnar".

Hetta tykist at vísa, at Føroyar fyri 1273 hava havt egnar lógskipanir á landbúnaðarøkinum. Dr. Jakobsen heldur, at fals kann vera uppií hesi rættarbót, ið er tilløgd Magnusi kongi. Í hvussu er heldur hann, at navnið á tí kanslara, ið skal hava sett innsiglið undir, kann ikki vera rætt. Sum nevnt, gjørdi Magnus Lógbøtari týðandi broytingar í Gulatingslógini í 1267. Tað tykist tí at vera ógvuliga trúligt, at hann í 1273 kann hava gjørt eina rættarbót fyri Føroyar í sambandi við at broytingar í Gulatingslógini hava verið settar í gildi í Føroyum. Tað finnst einki handrit av hesi rættarbót eldri enn umleið ár 1600, og tað kann tí vera, at okkurt er komið skeivt fyri í hesum handriti.

Landslógin hjá Magnusi Lógbøtara er helst sett í gildi í Føroyum onkuntíð millum 1274 og 1276. Hon var samtykt a Frostatingi í 1274, men vestan fjall og sunnan fjall eitt sindur seinni í 1275-76.

Týdningarmesta skjal Føroyum viðvíkjandi úr miðøldini er rættarbót Hákunar hertoga Magnussonar frá 1298, ella seyðabrævið, sum skjalið vanliga verður nevnt. Hákun hertogi var sonur Magnus Lógbøtara og hevði Upplondini t.v.s. økið um Osloleiðina og harumframt Hetland og Føroyar í len. Bróðir hansara, Eirikur, tók við kongsvaldinum aftaná faðirin, sum doyði í 1280. Aftaná deyða Eiriks í 1299 tók Hákun við kongsvaldinum í Noregi, men longu sum hertogi ráddi hann yvir teimum økjum, hann hevði í len, at kalla sum ein kongur. Seyðabrævið er nógv tað mest umfatandi av okkara fornbrøvum, og eisini tað elsta fullgylduga bræv, sum vit við vissu vita er staðfest av ríkisstjórnarmonnum. Tað er týdningarmiklasta kelda til upplýsingar um samfelagsviðurskiftini í Føroyum í 12-hundraðtalinum. Sum Føroyingasøga greiðir frá, hevur landið aftaná landnámið verið býtt sundur millum høvdingar ella stórbøndur, sum helst hava sitið hvør í síni bygd og við einbýttum høgum. Gjøgnum øldirnar er fólkatalið vaksið, og ognirnar hava verið skiftar sundur og eru í summum førum vorðnar smábýttar. So við og við hava tað ikki bert verið einbýttir hagar, men eisini hagar við fleiri ella nógvum eigarum. Tað tykist sum seyðurin hevur verið í kenning, men ikki nøkur verulig skipan, soleiðis at hvør slepti so nógvan seyð í hagan sum best. Tað er fyri at fáa skil á hesum

viðurskiftum, at Hákun Magnusarson fremur hesa lóggávu í Føroyum undir navninum seyðabrævið. Sum longu nevnt, er hetta skjal eisini ein týdningarmikil kelda í aðrar mátar at leita sær kunnleika um samfelagsviðurskiftini í Føroyum tá í tíðini. Soleiðis kann ein út frá lógartekstini m.a. lesa, at tað vóru stórir ognarmenn, smáir ognarmenn, leigulendingar ella festarar og ognarleys, sum vunnu sær til lívsins uppihald við at arbeiða hjá stórmonnunum.

Í tí fylgibrævi, sum Hákun hertogi sendir føroyingunum við seyðabrævinum stendur í føroysku týðing dr. Jakobsens m.a.:

> „Hákun við guðs miskunn Noregs hertogi, sonur Magnusar kongs hin krónaða, sendir øllum monnum í Føroyum, teim sum hetta bræv síggja ella hoyra kvøðu guðs og sína. Andiligi faðir og kærasti vinur vár, harri Ellindur biskupur í Føroyum, og harri Sjúrður, løgmaður í Hetlandi, sum vær høvdu til tykkara sent, gjørdu víst fyri okkum oyggjafólksins vegna um teir lutir, sum teim tókti skorta í búnaðarbólkinum, og tí lótum vær samanseta í hesi fýra bløð ta skipan, sum vær høvum hará gjørt við besta manna ráði, eftir tí, sum vit vænta, at fólkinum skal vera mest at gagni.“

Dr. Jakobsen sigur í Diplomatarium Færoense, at rætti høvuðsmaðurin til seyðabrævið er Ellindur biskupur. Um tað er grundarlag fyri at halda, at Ellindur beinleiðis er høvundurin at seyðabrævinum er eftir mínum tykki ivasamt. Rættari er helst at siga, sum tað verður gjørt í prýðuliga bókaverkinum um seyðabrævið, sum Fróðskaparsetrið gav út, at Ellindur biskupur og Sjúrður løgmaður hava lagt Hákuni Magnusarsyni lag á, hvussu skipanin fyri Føroyar átti at verða. Tað er tó einki at ivast í, at Ellindur, sum tá hevði sitið sum biskupur í Føroyum í 30 ár, og sum tí hevur havt hollan kunnleika til føroysk jarðarviðurskifti, hevur átt ein stóran lut í hesum lógarverki.

Umframt Ellind nevnir fylgibrævið Sjúrð løgmann í Hetlandi. Út frá hesum kemur dr. Jakobsen til ta niðurstøðu, at Føroyar og Hetland tá hava verið eitt rættardømi við felags løgmanni, sum sat í Hetlandi.

Dr. Jakobsen heldur, at hetta er hent í 1280, tá Hákun bleiv lensharri, og at Ellindur biskupur hevur havt ein fingur við í spælinum. Ellindur var ráðaríkur og virkaði við ágrýtni fyri at økja um vald kirkjunar. Væl kom tað tí honum við, at løgmaður sat í Hetlandi, tí á tann hátt kom Ellindur at verða ovasti maður í Føroyum. Um nakað hald er í hesi uppfatan, tykir mær at vera sera ivasamt. Um so var, hevði tað verið nattúrligt at kalla Sjúrð løgmann í Hetlandi og Føroyum. Eisini bendir eykasetningurin í fylgibrævinum „sum vær høvum sent til tykkara“ á, at Sjúrður hevur verið sendiboð hertogans, og ikki maður, sum frammanundan er løgmaður í Føroyum. Ein kann so

undrast á, hví Hetlandsløgmaður er nevndur og ikki nakar løgmaður í Føroyum. Bert kann komast við gitingum um henda spurning. Løgmansembætið er fyrndargamalt í Noregi, og Ísland fekk longu í 930 í sambandi við stovnsetanini av íslendska altinginum løgsøgumann. Íslendingar kenna nøvnini á øllum løgsøgumonnum frá ár 930 til 1271, tá embætið varð avtikið. Hvat Føroyum viðvíkur er okkara kunnleiki til løgmenn í víkingaøld og miðøld ógvuliga avmarkaður. Í Føroyingasøgu hoyra vit tó um ein løgmann nevndur Gilli. Hetta er nevnt í frásøgnini um Karl Mørska, sum Ólavur kongur sendi til Føroya at krevja inn skatt. Frá miðøldini er til eitt skjal frá 1412 viðvíkjandi Nikkajarðum á Sandi, har nevndur verður løgmaður, nevndur Haraldur Kálvsson, ið kann hava verið sonur hin tiltikna búrkroppin Kálv Lítla. Ein frágreiðing uppá, hví tað er Hetlandsløgmaður, ið er nevndur í seyðabrævinum, kann vera, at hann og Hákun hertogi hava verið serliga væl. Eisini hava viðurskiftini í Hetlandi tá í tíðini verið rættuliga lík teimum í Føroyum, og kanska hava hetlendingar staðið eitt sindur fremri enn føroyingar á búnaðarøkinum. Tað kann tí hava havt týdning at leita sær serkunnleika úr Hetlandi. Vit vita jú, at hetlendingar nógvar øldir seinni stóðu fremri enn føroyingar, og at føroyingar kundu taka við læru av teimum. Í hesum viðfangi kann verða víst til bókina hjá Pløyen um ferð hansara til Hetlands, Orknoyar og Skotlands á sumri 1839. Tað tykist í hvussu er ikki sannlíkt, at Føroyar og Hetland hava verið eitt rættardømi við felags løgmanni. Høvuðsuppgáva løgmansins var at vera rættarformaður í løgtinginum, og við tátíðar ferðasambandi hevur tað ikki verið lætt hjá sama manni at røkja starvið bæði í Hetlandi og Føroyum.

Til eru trý handrit av seyðabrævinum. Eitt handrit, sum helst er sjálvt upprunahandritið, finnst í eini skinnbók, sum er í varðveitslu á kongliga bókasavninum í Stockholm. Løgmansstólurin í Føroyum hevur átt hesa skinnbók, sum eisini inniheldur aðrar fyriskipanir. Eitt annað handrit finst eisini í eini skinnbók, sum er í varðveitslu á Universitetsbókasavninum í Lund. Hildið verður, at biskuparnir í Føroyum hava átt hesa skinnbók, sum eins og hin skinnbókin inniheldur aðrar fyriskipanir. Triðja handritið er nógv yngri og finnst í eini pappírsbók, sum er í varðveitslu á Universitetsbókasavninum í Keypmannahavn. Aftaná handritið í pappírsbókini stendur „Ende paa Sóuda breffet Anno 1600: G.M.“ G.M. kann standa fyri Gabriel Mitens, sum var sorinskrivari í Føroyum frá 1584 til 1620. Hann var av týskari ætt og er helst komin higar yvir Bergen.

Landslógin var framvegis galdandi. Seyðabrævið var ætlað sum eitt uppískoyti til landslógina fyri Føroyar, á økjum har landslógin ikki hóskaði við føroysk viðurskifti, javnber eisini tað, sum nevnt var úr fylgibrævinum til seyðabrævið, har tað m.a. stóð „um teir lutir, sum teim tókti skorta í búnaðarbólkinum“ í landslógini. Høvuðsinnihaldið

í seyðabrævinum snýr seg um seyðabrúkið. Har eru reglur um tann, sum fer inn á annans manns jørð og ger skaða við hundi ella á annan hátt, um hvussu viðurskiftini skulu vera hjá monnum, sum eiga seyð í sama haga, um seyðaskipan, um hvussu farast skal fram, tá seyður legst í annans haga o.s.fr. Onnur djór enn seyður eitt nú neyt og ross verða bert hendinga ferð nevnd. Hundar eru eisini nevndir, men tað er mest í samband við seyðabrúkið. Seyðabrævið hevur eisini reglur um onnur viðurskifti. Reglur eru um leiglendingar ella festarar, um fólk, sum rekast um landið uttan at hava fast arbeiði, um forboð móti at seta búgv við minni fæi enn trimum kúm, um part húskalla av hvali, teir finna til havs og skera av, um rekagrind, um vistargjald og um at skemma menn í orðum. Eisini er regla um vitniskyldu, um onkur er hjástaddur undir hendingum, sum elva til rættarmál.

Hvussu væl grundað og samansett og hóskandi til landsins tørv, seyðabrævið hevur verið, sæst av, at tað í 1637 varð staðfest og umsett til danskt mál undir Kristiani kongi fjórða. Tó eru tað bert greinirnar um seyð og tílíkt, sum eru tiknar við í hesi staðfestingini. Neyvan hevur bert verið talan um eina løggilda umseting, men helst hava føroyingar verið bangnir fyri at missa seyðabrævið, aftaná at Norska Lóg Kristian Fjórða var komin í 1604. Í innganginum til staðfestingina stendur eisini, at hetta hendir eftir áheitan frá

> „Vore kære Undersaatter paa Vort Land Færø underdanigst af Os haver begærendes.“

Reglurnar í seyðabrævinum hava hildið seg livandi gjøgnum nógvar øldir, og eru tær framvegis í ein avísan mun grundarlagið undir okkara jarðarlóggávu.

## B. Tíðarskeiðið aftaná seyðabrævið til og við gildissetingina av fyriskipanini frá 21. mai 1777 um m.a. avmarkingar at giftast hjá minni múgvandi.

Av samlaða markatalinum í Føroyum uppá 2.406 merkur 12 gl. og 5 sk. er stívliga helmingurin kongsjørð og prestajørð. Størstapartin av hesi jørð hevur kirkjan átt í teirri katólsku tíðini, men aftaná trúbótina ognaðist kongur hesa jørð. Ein part av tí jørð, sum verður nevnd kongsjørð, átti kongur tó frammanundan. Hetta var serstakliga jørð, sum var tildømd kongi í álvarsomum revsimálum.

Ovasti umboðsmaður kongsins í Føroyum var tá í tíðini fútin, sum

millum annað hevði umsitingina av kongsjørðini um hendi. Mestiparturin av hesi jørð var latin í festi. Støðan hjá festarum var upprunaliga ótrygg. Eftir gamlari norskari lóggávu vórðu garðar latnir í festi fyri stytri tíðarskeið í senn. Í veruleikanum sótu festarar í Noregi tó vanliga við festinum fyri lívið, hóast teir ikki høvdu krav uppá tað eftir lóggávuni. At støðan hjá festarum í Føroyum eisini áðrenn Gablatíðina var ótrygg framgongur av einum opnum brævi dagsett 2. november 1559 frá konginum Fríðrikki øðrum til „Undersaatterne paa Færø“ har tað verður nevnt, at kongur hevði fingið klagur um fútar, sum høvdu tikið festigarðar frá monnum, hóast teir høvdu røkt garðarnar til lítar og í aðrar mátar høvdu hildið sínar skyldur, fyri at lata garðarnar í festi til aðrar. Í brævinum verður ásett, at so skal ikki verða framyvir, tí

> „naar nogen af vore og Kronens Bønder og Tjenere paa Færø fæster nogen Gaard af vor Foged, som der sammesteds Befaling haver, da skal han den have, nyde, bruge og beholde, medens og al den Stund, han samme Gaard bygger, forbedrer og ved Magt holder og udgiver hans Landgilde udi tilbørlig Tid og vor Foged paa vore vegne lyder, og i alle Maader skikker sig, som en tro Undersaat bør at gøre.“

Eftir Norsku Lóg Kristian Fjórða frá 1604 gjørdist rættarstøðan hjá festibøndum frægari, tí nú verður ásett, at garður, sum verður latin í festi, hann hevur festarin og hjúnafelagin rætt til at sita við, so leingi tey liva. Tó høvdu arvingar teirra ongan frammíhjárætt til at taka við festinum aftaná deyða teirra.

At eingin frammíhjárættur var til at taka við festinum elvdi til misbrúk. Hin serliga illa lýddi fútin frá Gablatíðini Søren Pedersen Skougaard læt garðar í festi til teir, sum vildu rinda mest í festigjaldi. Av festigjaldinum førdi hann bert 1 gl. fyri mørkina í roknskapin, meðan hann koyrdi restina í egnan lumma. Hetta elvdi til stóra misnøgd í Føroyum, har tað eisini var stór misnøgd við einahandilin, sum hálvbróðir fútans stóð fyri. Ein oddamaður hjá teimum misnøgdu var presturin Lucas Jacobsen Debes. Hann ætlaði sær at fara til Danmarkar at klaga til Gabel um viðurskiftini í Føroyum; men tað vórðu lagdar honum forðingar fyri at sleppa av landinum. Á ólavsøku 1672 legði so Lucas Debes fyri løgtingið hópin av klagum um lógarbrot, sum fútin og hálvbróðurin, keypmaðurin skuldu hava framt. Aftaná vitnisfrágreiðingar samtykti løgtingið at velja tríggjar manns at fara til Keypmannahavnar at leggja klagurnar fyri kong. Hesir tríggir vóru Lucas Debes, Norðoya sýslumaður, Hans Hansen úr Gerðum, og Suðuroyar sýslumaður, Johannes Joensen úr Sumba.

Hesir tríggir fóru so til Keypmannahavnar, og løgdu teir í einum skrivi dagsett 18. oktober 1672 klagurnar fyri kong. 16. desember 1672

komu teir við einum øðrum drúgvum skrivi, har teir eisini høvdu uppskot um at bøta um viðurskiftini í Føroyum. Sett varð nevnd at kanna klagurnar, og tað vóru ógvuliga mætir menn, sum mannaðu nevndina. Teir vóru Henrik Bielke, sonur Noregs kanslara, Jens Bielke, Otto Powisch, generalkrígskommisserur, Peder Scavenius, generalprokurørur, Hans Peter Bladt, sum var ráðmaður í Keypmannahavn og ein av stjórunum í tí íslendska handilsfelagnum, Johan Christoph v. Kørbitz, rigsmarskálkur, Jens Juel, generaladmirálur, Johan Wandal, professari og biskuppur Sjællands, og Hans Nansen, assessor í Admiralskollegiinum.

Nevndin fór til verka. Christoffur von Gabel var stevndur at geva frágreiðing tann 9. januar 1673; men hann møtti ikki, tí hann segðist at vera sjúkur. Í staðin møtti sonurin Friederik Gabel, sum legði fram eitt drúgt skriv. Nevndin arbeiddi skjótt og læt álit frá sær, sum í stóran mun var Lucasi Debesi og hansara monnum til vildar. Grundað á hetta álit gjørdi kongurin, Kristian Fimti, fyriskipan fyri Føroyar frá 16. apríl 1673 „om adskilligt paa Færø“. Sum fyriskipanin nevnir seg, ásetir hon reglur um mangt og hvat. Eg skal bert nevna tað, sum hevur við jarðarlóggávuna og jarðarbrúk at gera. Ásett varð, at nú skuldi rindast 3 gl. í festigjaldi av mørkini, og at fútin til sín sjálvs bert mátti rokna sær ein dálara av hvørjum festibrævi. Tá festari doyði, og einkjan gifti seg ikki uppaftur, skuldi elsti sonur hava rætt at taka við festinum. Ásett varð eisini, at jørð ikki skuldi skiftast sundur ella festast burtur í smærri brúk enn 6 merkur, og at tað, har sum hetta longu var hent, skuldi miðast ímóti at savna jørðina aftur í brúk uppá í minsta lagi hesa stødd, tó uttan at gingið átti at verið nøkrum ov nær. Eisini eru reglur um náðinsgarðar og um rættin hjá prestabørnum at koma uppí part, tá garðar skuldu latast í festi, „dog saaledes at ingen derved prejudiceres, udstødes eller fortrykkes“, sum tikið verður til. Tað var óivað Lucas Debes, sum átti høvuðsheiðurin av hesum frægu úrslitum; men tað vóru eisini onnur viðurskifti, sum virkaðu til frama fyri føroyingarnar. Christoffur von Gabel hevði staðið ógvuliga høgt í metum hjá konginum Fríðrikki Triðja, men eftir deyða hansara í 1670 fall Christoffur von Gabel í ónáði. Tann maður, sum Lucas Debes og hansara menn stuðlaðu seg til, var tann máttmikli kanslarin Peter Griffenfeldt, sum helst eisini er tann, sum hevur orðað ella, í hvussu er, hevur góðkent orðingina av fyriskipanini frá 16. apríl 1673, áðrenn hon fekk kongsins undirskrift. Sjálvur gav Lucas Debes eisini Griffenfeldti heiðurin við at ogna honum bókina Færoe & Færoe Reserata. Henda bók er tó eisini ognað tveimum øðrum monnum, teirra millum Friederich Gabel, sum verður nevndur „Befalingsmand over Feroe Ambt: Min Gunstige Patron.“

Hin 30. mai 1691 kom kongalig fyriskipan „Om Handelen paa Færøe og andet Landet vedkommende“. Sum yvirskriftin til hesa fyriskip-

an lýsir, eru tað serstakliga viðurskiftini við einahandilin, sum har verða umrødd. Nakrar greinir umhandla tó landbúnaðarviðurskifti, men er tað fyri tað mesta endurtøka av reglunum í fyriskipanini frá 1673. Tó er nýggj regla um, at tað skuldi ikki vera loyvt at reka festigarðar við uppsitara.

Í 1687 gav Kristian kongur Fimti nýggja lógbók fyri Noreg „Chr. Den Femtes Norske Lov“, og varð henda lógbók sett í gildi fyri Føroyar við einum reskripti frá 12. mai 1688. Búnaðarreglurnar í hesi lóg hóskaðu ikki væl til føroysk viðurskifti, og tí skrivaði løgmaðurin J.H. Weyhe 19. februar 1696 til kong um at fáa eina nýggja staðfesting av Seyðabrævinum. Tað framgongur av hesi áheitan, at føroyingar óttaðust fyri, at Seyðabrævið fór at detta burtur, aftaná at Norska Lóg var sett í gildi í Føroyum. Seyðabrævið verður í skrivinum umtalað sum „en Forordning paa Færø, som er ganske umistelig“ og at „uden den bliver det Landets største Skade og Ruin.“ Skrivið varð sent gjøgnum Friederich von Gabel, sum gav tí hesa átekning: „Som dette er en speciel og umistelig Forordning for Færø, saa recommenderes denne Lavmandens allerunderdanigste Ansøgning til allernaadigste Bønhøring.“

Við skrivi frá 17. mars 1696 sendi kongur málið aftur til Gabel og biðjur hann heita á løgmann um saman við teimum lógkønastu monnunum í Føroyum at gjøgnumganga Seyðabrævið og koma við uppskotum um ábøtur. Sett varð nevnd at gera hetta arbeiðið, og sótu í nevndini m.a. løgmaðurin, J.H. Weyhe, og sorinskrivarin, Morten Mortensen Høyvig. Aftaná at nevndin var komin við áliti, og eisini aðrir høvdu sett fram sínar áskoðanir, eitt nú sýslumenninir, Hans Hansen úr Gerðum og Pouffel Jacobson á Sandi, kom „Forordning om Faar og Quæg samt des Græsning og VareTægt paa Færøe“ fra 2. april 1698. Fyriskipanin byggir á Seyðabrævið, men hevur eins og staðfestingin frá 1637 bert tær reglur við, sum viðgera seyðabrúk o.t. Tað eru tó onkrar nýggjar týdningarmiklar reglur við í hesi fyriskipan. T.d. verður í grein 9 „Om god Skik i Haugen“ viðvíkjandi skipan ásett hetta:

> „Der skal være saa mange Faar i Haugen, som af gammel Tiid været haver“

Undir grein 10 verður ásett, at seyðurin í haga, sum ikki er einbýttur, skal vera í feli, og har sum kenning framvegis er, skulu menn

> „holde god Skik, saa ingen opnører flere Faar end hand paa sin Anpart kand tilkomme.“

Eisini ásetur greinin, at har, sum menn eru ósamdir um fela ella kenning, skulu teir ráða, sum vilja hava fela.

Ikki hevur gingið heilt væl at fremja avtøkuna av kenning, tí 19. august 1757 sendir kongur stiftsbefalingsmand over Island og Færøerne, Rantzau greiva, reskript „angaaende adskillige Poster til at hemme den imod Forordning af 2. april 1698 dens 10 Artic. i Svang gaaende skadelige Misbrug med de saakaldede Kendings-Søjd eller Faars Afskaffelse.“ Í reskriptinum verður ásett, at tað í høgum, har kenning framvegis var, skuldi leggjast um til fela í seinasta lagi til jóla.

Í 1773 søktu fimm gøtumenn um loyvi til at hava seyð í kenning. Um sama mundi kom fram, at tað í Eysturoynni gingu ov nógv ross í høgunum. Í einum áliti viðgjørdu løgmaðurin, sorinskrivarin og fútin spurningin um kenning ella fela, og um teir fyrimunir og teir vansar, sum stóðust av hvørjum av hesum formunum. Eisini gjørdu teir uppskot til reglugerð um ross, sum varð sett í gildi í Føroyum við reskripti frá 11. mai 1775. Umsóknin frá gøtumonnunum um loyvi til at hava seyð í kenning varð sýtt.

Í seinnu helvt av 18. øld hendu úti í verðini stór framstig, hvat tí persónliga frælsinum viðvíkur. Í yvirlýsingini í sambandi við stovnsetanina av Sameindu Statunum í Amerika varð staðfest, at øll menniskju eiga ávís grundleggjandi rættindi. Hesir tankar komu eisini til Europa, har teir vórðu tiknir upp í sambandi við fronsku kollveltingina í 1789.

Í Danmark vórðu í seinnu helvt av 18. øld sett í verk týdningarmikil stig til frígerðing av bøndunum, sum gjøgnum øldir høvdu knógvað undir góðseigaraveldi, og hitt ómenniskjaliga stavnsbandið varð avtikið.

Eisini í Føroyum vórðu um somu tíð tikin nógv stig av donsku stjórnini fyri at styðja landbúnaðin og vinnulívið sum heild. Í 1772 kom Lund handilsforvaltari við einum uppskoti um at seta á stovn eitt „økonomisk Selskab“ í Føroyum, sum skuldi virka fyri at bøta um viðurskiftini hjá búnaðarmonnum, fiskimonnum og øðrum veiðimonnum. Peningurin til endamálið skuldi fáast til vega við at taka løgmansembætið av og selja løgmansgarðin á Steig. Kanselliið aftraði seg tó við at taka eitt tílíkt stig, og málið fall tí. Í 1773 kom Jens Christian Svabo við hugskotum um at gera fíggjarligar royndir í Føroyum. Hesi hugskot vórðu væl móttikin, og avgjørt varð, at skriftini hjá Svabo skuldu útgevast fyri kongsins rokning. Í 1781-82 gjørdi Jens Christian Svabo kanningarferð til Føroyar, har hann savnaði hópin av tilfari bæði av vinnuligum og mentunarligum slagi. Frágreiðingin um hesa ferð er ikki komin út í síni heild fyrr enn í 1959. Avgjørt varð eisini, at tveir føroyingar skuldu sendast til Noregs fyri at kunna seg um jarðarbrúkið har, og at ein norðmaður skuldi koma hendavegin at læra føroyingar at brúka plógv. Um nógv av teimum uppskotum, sum annars komu fram í hesi tíð, er tó at siga, at lítið kom burturúr.

Tað kann tykjast løgið, at vit tann 21. mai 1777 fingu hina tiltiknu fyriskipanina „angaaende adskilligt Agerdyrkningen og Tieneste Folk med videre paa Færøerne vedkommende“, tí henda fyriskipan sam-

svarar ikki við grundleggjandi mannarættindi, soleiðis sum vit hugsa okkum tey nú á døgum. Tí verða her gjørdar nakrar viðmerkingar til hesa fyriskipan, og um orsøkirnar til, at hon kom.

Í 1773 sendi løgmaðurin Hveding eina áheitan til „Det Vestindiske og Guineanske Rente- samt General-Toldkammer“, har hann vísti á tað óskil, sum hevði tikið seg upp í Føroyum, at fólk í stórum tali reikaðu landið runt og bóðu um ull í staðin fyri at arbeiða á gørðunum. Málið varð latið tí setta stiftsamtmanninum, assessori Bang, uppí hendi, og hann kom við einum rættuliga drúgvum áliti dagfestum 13. mars 1776. Frammanundan hevði hann leitað sær upplýsingar frá embætismonnum, prestum og øðrum. Í álitinum verða hesir spurningar viðgjørdir:

1. Hví var størri tørvur á innfluttum korni í Føroyum nú enn áður.
2. Var kornveltingin í Føroyum í minking, og um so var, hvørjar vóru orsøkirnar til tess.
3. Var tørvur á arbeiðskraft til kornvelting.
4. Tiltøk at seta í verk.

Hvat spurninginum um størri tørvi á innfluttum korni viðvíkti, varð víst á misvøkstur, felli, vánaligan fiskiskap, og at tað í nøkur ár hevði verið rættuliga sørt við grindum.

Hvat spurninginum um kornveltingini viðvíkti, varð víst á, at summir bøndur vóru ikki nóg dugnaligir, og haraftrat var tað trupult at skaffa nóg mikið av arbeiðsmegi. Nevndar verða hesar orsøkir til hesar trupulleikar. Fyri tað fyrsta fara bøndur ikki nóg væl við teirra arbeiðsfólki. Fyri tað annað eru nógv arbeiðsfólk sjálvráðin og stinga av fyri eitt gott orð. Fyri tað triðja er tað ein partur av almúguni, serstakliga í Havn, sum hevur tað fyri at halda børnini heima hjá sær, heldur enn at lata tey fara út at tæna. Fyri tað fjórða var tørvur á tvingsilsmøguleikum ímóti dovnum og ólýdnum arbeiðsfólki og ímóti foreldrum, sum lótu børn síni vaksa upp og ganga fyri einki. Fyri tað fimta var samsýningarhátturin móti arbeiðsfólki óhóskandi. Samsýningin var klæði og matur, og ofta meira matur enn teimum tørvaði. Harafturímóti fingu arbeiðsfólk næstan ongan kontantan pening. Fyri tað sætta gingu nógv ung fólk í hjúnalag og settu búgv uttan at hava nakran lógligan vinnuveg. Fyri tað sjeynda var tað alt ov stór tilflyting til Havnar ella, sum tikið verður til

> „Det unge Mands- og Kvindekøns frække frihed at sætte sig ned i Thorshavn, og just fornemmelig de, som vare mest bekvemme til at anvendes ved Landvæsenet.“

Longu tá á døgum hevur sostatt fyribrigdi bygdamenning verið til. Fyri

tað áttanda varð víst á tað óskil, sum hevði tikið seg upp við, at fólk reikaðu landið runt og bóðu um ull, sum tey virkaðu til pløgg og seldu í staðin fyri at arbeiða á gørðunum.

Í álitinum verður skotið upp at gera lógarreglur fyri at bøta um viðurskiftini. Hesar lógarreglur skuldu ganga út uppá, at áleggjast skuldi sýslumonnum at hava eyguni við, hvussu festigarðarnir vórðu røktir, og at koma við fráboðan til fútan um, hvussu støðan var. Arbeiðsfólk, sum sýndu ólýdni ella ikki gjørdu teirra arbeiði til lítar, skuldu setast í gapustokk ella varðhald. Somu lagnu skuldu tey fáa, sum rýmdu úr tænastu. Hinvegin kundu arbeiðsfólk rýma úr tænastuni, um húsbóndin ikki røkti sínar skyldur móti teimum, og hann kundi haraftrat koma undir sekt. Setast skuldu á stovn serstakir sýslupolitirættir, hagar bæði húsbøndur og arbeiðsfólk kundu venda sær í trætumálum. Avgerðin hjá sýslupolitirættinum skuldi kunna skjótast inn fyri løgtingið; men helt løgtingið avgerðina hjá sýslupolitirættinum vera í lagi, skuldi appellanturin dømast í sekt. Bann skuldi setast fyri, at arbeiðsfólk kravdu og at husbóndi læt meira kost enn tað, sum var vanligt hjá arbeiðsfólki, og áleggjast skuldi húsbónda at lata arbeiðsfólki løn í reiðum peningi. Fólk úr almúguni, sum ætlaðu at ganga í hjúnalag, skuldu prógva, at tey vóru før fyri at føða og klæða seg t.d. við at sita við festi ella eiga ogn uppá í minsta lagi eina hálva mørk, ella at tey høvdu annan lógligan vinnuveg. Uppfyltu tey ikki nakrar av hesum treytum, skuldi teimum tó verða loyvt at giftast, um tey bæði høvdu tænt á gørðum í 6 ár og høvdu fingið hampuligt umdømi. Áleggjast skuldi fútanum at hava eyguni eftir, hvat Havnarfólk tókust við, og at senda ungfólk, sum foreldrini ikki nýttust at hava heima, út á bygd at kunna seg við bygdalívið og venja seg at arbeiða. Bann skuldi setast fyri at flyta til Havnar, uttanso at viðkomandi hevði fingið skrivligt loyvi bæði frá fútanum og viðkomandi sýslumanni. Áleggjast skuldi sýslumonnunum at gera listar yvir arbeiðsfólk í sýsluni og yvir børn hjá almuguni, sum vóru heima hjá foreldrunum. Forboð skuldi setast fyri at reika runt landið at biðja um ull. Bert skuldi hetta loyvast, um viðkomandi hevði biddarapass t.v.s. eina váttan frá sýslumanni ella presti, um at hann veruliga uttan egna skuld var fátækur og leið neyð.

Uppskotið varð viðgjørt í danska kansellinum, men var har ikki serliga góður hugur at seta tað í verk í verandi líki. Ein av teimum voterandi, Luxdorph, helt m.a. fyri:

> „Mig synes dette er „beaucoup de bruit pour une omelette“, og at det bliver en vidtløftig Forordning om smaa Ting, samt Mengde af Tvangsmidler i de Poster, der ikke vel bringes i Orden ved Tvang. Imidlertid faar det vel ske, siden alle vedkommende ønske det.“

Ein annar voterandi, Stampe, helt fyri viðvíkjandi grein 8 í uppskotinum um hjúnalagsbannið:

> „Finder det helt betænkeligt, især i et Land, hvor der klages over Mangel paa Folk, og med Føje, at forbyde eller forhindre Ægteskab. Hertil kommer, at man ikke uden en Slags Ubillighed kan straffe dem for Utugt, som man forbyder at indlade sig i Ægteskab.

Bedre var det uden Tvivl, om de unge Folk, som ville gifte sig, blev anvist et Stykke Jord at dyrke, eller anden lovlig Næringsvej.“

Tilmælið fra kansellinum gjørdi, at uppskotið varð broytt eitt sindur. Tænastutíðin á gørðunum fyri at sleppa at giftast varð stytt úr 6 árum niður í 4 ár. Eisini varð nýtt petti sett í grein 8, sum var soljóðandi:

> „Saa ville Vi og saaviit muligt er, og Landets Lejlighed det tillader, allernaadigst være betænkt paa, at duelige og nygifte Folk, som ere trængende, enten forskaffes et Stykke Jord at dyrke, eller anvises en anden lovlig Nerings Vei.“

Bannið í grein 8 í fyriskipanini móti gifting hjá fátækrafólki var galdandi til 1846, tá tað varð avtikið við plakat frá 11. november 1846. Tað mesta av restini av fyriskipanini varð avtikið við Tyendelov for Færøerne frá 16. februar 1854, forboðið móti tryglarí varð ikki avtikið fyrr enn við lóg frá 3. mars 1860 „Om Straffen for Løsgengeri og Betleri“ og skyldan hjá sýslumonnunum til at hava eyguni við festigørðunum ikki fyrr enn við lógini frá 24. mai 1937 Om Jorbrugets Fremme.

## C. Tíðarskeiðið seinast í 18. øld fram til hagalógina frá 1866

Sum nevnt varð tað í eini fyriskipan frá 1673 ásett, at jørð átti ikki at skiftast sundur ella latast í festi í smærri brúk enn 6 merkur, og at tað, har, sum hetta longu var hent, átti at verða miðað ímóti at savna jørðina aftur í brúk av hesi støddd. Hóast hesa fyriskipan og seinni fyriskipanir, sum bóru á sama borðið helt sundurpettingin av ognarjørðini kortini fram.

Amtmaðurin F.F. Tillisch skrivar tí tann 22. mai 1832 til kanselliið um forboðini móti útstykking í ov smá brúk m.a.:

„Imidlertid ere disse Bestemmelser lige saa lidt blevne overholdte som Norske Lovs Bud i 5. bog 2. kapitel artikel 63 om Aasædesretten. Tværtimod ere Odelsjorderne ved Skifter som paa alle andre Maader udstykkede i en næsten utrolig Grad. Det hører derfor ogsaa nu næsten til Sjældenhederne, at en Mand ejer en hel Mark Jord, og endnu sjældnere er det, at denne Mark findes samlet pa eet Sted. Det almindelige er derimod, at en Mand ikkun ejer nogle faa Gylden, Skind eller endog dele af Skind Jord, eller ogsaa at hans Ejendomme ligge adsplittede omkring i alle Sysler i højst ubetydelige smaa Lodder."

Reglurnar í Norsku Lóg, sum Tillisch sipar til, gingu út uppá, at tá maður læt óðalsjørð ella aðra jørð eftir seg, skuldi elsti sonur hava rætt til at taka høvuðsgarðin í arvi, meðan hinir arvingarnir skuldu taka aðra jørð.

Saman við skrivinum til kanselliið legði Tillisch fram eitt uppskot, hann hevði gjørt „sigtende til at standse den alt for store Udstykning af det private Jordegods paa Færø". Eftir hesum uppskoti skuldi tað ikki verða loyvt at skifta sundur ella á annan hátt at lata samlaðar ognir fara smærri enn í brúk uppá í minsta lagi eina hálva mørk hvørt. Loyvt skuldi verða ognarmanni at seta sethús og aðrar bygningar á ta óðalsjørd, hann átti samlaða í eini bygd, og skuldi rættarvirknaðurin av hesum verða, at ognin var at rokna sum ásæti og høvuðsgarður. Sum slíkur skuldi garðurin falla í arv sum eitt samlað brúk. Hesin rættur skuldi tó vera avmarkaður á tann hátt, at hann ikki skuldi kunna nýtast til at leggja meira jørð t.d. við keypi inn undir høvuðsgarðar, sum frammanundan høvdu eina stødd uppá 6 merkur. Eisini skuldi tað verða loyvt at útstykkja stórar garðar, men tó ikki smærri enn í brúk uppá 4 merkur hvør. Tá skift varð, skuldi farast fram eftir reglunum í fyriskipan frá 26. mai 1752 „Om aasædes-Retten og Hovedbøllets tiltrædelse i Norge". Sat maður bæði við ognargarði í nevndu merking og festigarði, skuldi elsti sonur hava rætt til at velja millum garðarnar, og skuldi næstelsti sonur so fáa hin garðin. Smærri jarðarlutir, sum ómyndingar annars skuldu arva, skuldu seljast.

Málið varð av Kansellinum lagt fyri Rentukamarið, sum við skrivi frá 18. juni 1833 tók undir við uppskotinum hjá amtmanninum. Rentukamarið helt tó, at minstamarkið fyri sundurbýtið heldur átti at verið heil enn hálv mørk.

Málið fór síðani aftur til Kanselliið, har hin kendi danski løgfrøðingurin Anders Sandøe Ørsted skrivaði drúgt álit. Hann var ikki serliga hugaður fyri, at uppskotið varð gjørt til lóg. Hann ivaðist í, um fólk í Føroyum sum heild fóru at taka undir við, at ræði teirra yvir ognarjørð

fór at verða skert í so stóran mun, sum uppskotið miðaði ímóti.

Harnæst helt hann tað ikki vera serliga sannlíkt, at uppskotið, um tað varð gjørt til lóg, í sjálvum sær fór at føra við sær nakra savning av jørðini í Føroyum í brúk av hóskandi stødd. Royndirnar seinni vístu, at Ørsted hevði rætt í hesum sjónarmiði. Tað lýsir ígjøgnum álitið hjá Ørsted eins og í øðrum verkum hansara, at hann var argur mótstøðumaður av øllum tiltøkum, sum avmarkaðu ræði hins einstaka yvir ogn síni. Tí var hann eisini av heitastu talsmonnum fyri avtøku av óðalsrættinum, sum hann metti sum eina skerjing av ognarrrættinum og frælsi hins einstaka. Hesin óðalsrættur er fyrndargamal í Noregi og so rótfestur har, at hann er staðfestur í norsku grundlógini. Óðalsrætturin er ein ásannan av, at jørðin hoyrir ættini til. Ættin hevur frammíhjárætt til alla jørð, sum kemur undir óðal, t.v.s. at jørðin hevur verið í somu ætt eitt ávíst áramál. Ættin hevur tí rætt til innan ávísa freist at loysa óðalsjørð sína út aftur, um hon kemur á fremmandar hendur.

Aftaná viðgerðina í Kansellinum varð málið sent amtmanninum aftur, sum aftaná at hava fingið sær ummæli frá fútanum, Pløyen, sorinskrivaranum, Hunderup, sýslumonnunum og harafturat frá dannebrogsmonnunum, Dánjal Jacob Joensen úr Gerðum, og Poul Joensen á Látrinum, Eiði, sendi Kansellinum drúgt skriv, dagsett 28. april 1835, har hann m.a. førdi fram, at hann nú var enn meira sannførdur um, at uppskot hansara frá 1832 var á rættari leið. Umframt tað óhepna fyribrigdi, at ognarjørðin varð karvað sundur, nevndi hann tvey onnur óheppin fyribrigdi viðvíkjandi ognarjørðini, sum Pløyen hevði víst honum á. Annað av hesum fyribrigdum var, at tað kom fyri, at menn seldu ognarjørð, uttan at lunnindini fylgdu við jørðini, og at innangarðsjørð varð seld, uttan at uttangarðsjørðin fylgdi við. Hitt fyribrigdi var uttanbíggjajørðin, sum nógvir trupulleikar stóðust av.

Kanselliið var tó framvegis ikki hugað fyri at fremja uppskotið, og hóast nýggjar upplýsingar vórðu fingnar til vega frá amtmanninum í einum skrivi frá 18. september 1838, varð ikki gjørt meira við málið fyribils.

Í 1840 varð sett nevnd at koma við áliti, um einahandilin í Føroyum skuldi takast av, og fríhandil setast á stovn.

16. desember 1845 kom Rentukamarið við einum tilmæli til kong um, at tað beinanvegin, og uttan at bíðað varð eftir álitinum frá fríhandilsnevndini, vórðu tikin stig til at bøta um tey føroysku búnaðarviðurskiftini. Mælt verður til, at útskifting fer fram, soleiðis at jarðarfelagsskapurin kann avtakast. Hetta fór eisini at gera tað lættari at fara undir nýdyrking. Eisini átti at verða tikið til umhugsunar at lata festigarðarnar til ognar ella arvafesti. Kongur tók undir við tilmælinum, og í mai 1846 varð landmálari, Nyholm at navni, sendur til Føroya at taka sær av útskiftingar- og matrikuleringsspurningum. Ny-

holm fór í holt við uppgávuna og ferðaðist runt landið, men veðrið var sera ólagaligt hetta árið. Nyholm gjørdist álvarsliga sjúkur og doyði í august sama árið. So var einki gjørt við útskiftingarspurningin fyribils, men 23. august 1849 skrivaði Dahlerup amtmaður til innanríkisráðið og skeyt upp, at útskiftingar- og matrikuleringsspurningurin varð tikin upp aftur, og at annar landmálari varð sendur til Føroya. Við skrivi frá 13. oktober 1849 svaraði innanríkisráðið, at tað ivaðist í, um tað í løtuni tænti nøkrum endamáli at senda landmálara til Føroya.

Í ríkisdagssetuni 1850-51 varð á fólkatingi løgd fram ein áheitan frá fyrrverandi prestinum J.H.Schrøter, fyrrverandi handilsforvaltaranum Jákup Nolsøe o.fl. um at seta tiltøk í verk til frama fyri uppdyrking. Teir skutu upp, at tað skuldi vera ein beinleiðis rættur at leggja jørð inn til uppdyrkingar, har tað ikki var til skaða fyri seyða- og neytabrúkið. Harafturat skuldu innløgd øki stikast, soleiðis at viðkomandi brúkarar áttu brúkið av jørðini burturav móti at lata í endurgjaldi ígildis virðið av ódyrkaðari jørð. Málið varð víst til innanríkisráðið, sum við skrivi frá 20. mai 1851 bað amtmannin um ummæli. Innanríkisráðið vísti á eina fyriskipan fyri Ísland frá 1776 um niðursetumenn, og spurdi um henda fyriskipan kundi nýtast sum fyrimynd í Føroyum. Hvat uppdyrkaðum traðum viðvíkti helt innanríkisráðið tað vera ynskiligt, at traðarmenninir fingu traðirnar til ognar, og skuldi í so máta ikki verið nakrir trupulleikar, tá talan var um traðir, sum vóru innlagdar av reinum kongshøgum.

Traðarspurningurin førdi eisini við sær, at spurningurin um jarðarreformir í størri samanhangi í Føroyum varð tikin uppaftur. Innanríkisráðið setti seg í samband við fútan J.A. Lundahl, sum var ógvuliga kønur í føroyskum jarðarviðurskiftum, og sum í 1843 hevði skrivað áhugaverda ritgerð hesum viðvíkjandi. Lundahl varð biðin um at geva loyvi til útgávu av ritgerðini, og var svarið játtandi. Ritgerðin er seinni eisini prentað í tí rúgvusmikla uppískoytinum til álitið hjá tí føroysku búnaðarnevndini, sum varð sett eftir lóg frá 13. mars 1908.

Amtmaðurin svaraði skrivinum hjá innanríkisráðnum frá 20. mai 1851 við einum drúgvum ummæli frá 25. september 1851. Í ummælinum verður sagt, at tað ikki er so lætt sum at siga tað at skaffa jørð til uppdyrkingar. Hóast tað í fyriskipanini frá 21. mai 1777 var ásett, at miðast skuldi ímóti at útvega nýgiftum minni múgvandi jørð til uppdyrkingar, og hóast tað við einum reskripti frá 1780 varð sett ein nevnd at greiða henda spurning, var tað bert í ein avmarkaðan mun eydnast at útvega hesum fólkum jørð til uppdyrkingar. Í Føroyum funnust ikki eins og í Íslandi øki, sum eingin ognarrættur var til. Ein fyritreyt fyri at leggja jørð inn til uppdyrkingar í Føroyum var, at semja fekst við eigararnar um hetta. Var talan um at leggja inn av reinum kongshøgum vóru eingir trupulleikar, og skiftandi amtmenn

høvdu eisini, har talan var um blandaðar kongs- og ognarhagar, roynt at hjálpt til við at finna fram til skipanir; men settu ognarmenn seg ímóti ynskjum um at leggja inn, var einki at gera. Dahlerup kemur til ta niðurstøðu, at orsøkirnar til, at tað føroyska jarðarbrúki var á so lágum støði, vóru einahandilin, teir avmarkaðu møguleikarnir at útstykkja ognarjørðina og jarðarfelagsskapurin. Ein fyritreyt fyri at fáa nakað munagott burturúr føroyskum jarðarbrúki var, at útskifting varð framd. Áftaná eina útskifting fór tað eisini at verða lættari at útvega fólki jørð til uppdyrkingar.

Í einum skrivi frá 6. mai 1852 tók innanríkisráðið undir við, at møguleikarnir fyri útskifting í Føroyum aftur áttu at verða kannaðir, og longu í sama mánaði varð landmálari, Asmussen at navni, sendur til Føroya, har hann ferðaðist eina tíð fyri at seta seg inn í viðurskiftini. Hansara niðurstøða var ikki serliga hugalig. Hon gekk út uppá, at ein útskifting av øllum Føroyum fór at gerast so umfatandi og kostnaðarmikil, at hon helst aldri fór at verða framd, og longu sama heystið rýmdi hann aftur til Danmarkar.

Aftaná hetta steðgaðu aftur royndirnar at fremja umfatandi jarðarreformir í Føroyum fyribils, og roynt varð í staðin at seta smærri lógartiltøk í verk. 4. mars 1857 fingu vit tvær lógir viðvíkjandi teimum viðurskiftum, sum umrødd eru. Onnur lógin var lóg um „Udskiftning af Fælleshauger", og var tað Dahlerup, sum gjørdi uppskotið til hesa lóg. Ásannandi at ein umfatandi útskifting í Føroyum ikki var gjørlig, helt hann, at útskifting á ávísum økjum átti at verða roynd. Við hesi lóg var skaptur ein møguleiki fyri uttangarðsútskifting í Føroyum, og var lógin galdandi til 1926, tá vit fingu okkara fyrstu veruligu útskiftingarlóg, lóg nr. 125 frá 20. april 1926 um útskifting.

Hin lógin frá 4. mars 1857 var „Lov, hvorved udstykning af det private Jordegods paa Færøerne søges indskrænket". Uppskotið til hesa lóg hevði Dahlerup gjørt, men tað bygdi á tankarnar í uppskotinum hjá Tillisch frá 1832; men nú var lægstamarkið fyri útstykking ikki sett til eina hálva mørk, men til ein gyllin. Bann varð sett fyri at selja jørð, uttan at tey lunnindi, sum hoyrdu til jørðina, fylgdu við. Fyri at søla ella makaskifti av jørð skuldi fáa rættargildi, skuldi skrivligt skjal um hetta setast saman og tinglesast. Óðalsrætturin, sum í hvussu er formelt framvegis var galdandi í Føroyum, varð avtikin. Reglur vóru um, at ognarmenn, sum áttu jørð uppá millum 1 og 6 merkur samlaðar í eini bygd, skuldu kunna gera av, at jørðin framyvir skuldi verða eitt samlað brúk, og eisini vóru reglur um, hvussu skuldi farast fram við arvaskiftum í slíkum førum. Hesar reglur, sum framvegis eru galdandi, hava mær vitandi aldri verið nýttar. Reglan um, at avtala um søla ella makaskifti av jørð ikki skuldi hava nakað rættargildi, uttanso hon var skrivlig, er avtikin við løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing; men tað er sjálvandi ein fyritreyt fyri ting-

lýsing ella tinglesing av slíkari avtalu, at hon er skrivlig. Reglurnar um forboð móti útstykkking í smærri ognir enn 1 gyllin eru avtiknar, har matrikulering er farin fram, og matrikuleringslógin – løgtingslóg nr. 54 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbyti v.m – er sett í gildi. í hesum bygdum er als ikki loyvt at stykkja sundur uttan góðkenning frá Matrikulstovuni, og lógin ásetur, nær slík góðkenning kann gevast.

Síðani skal sigast eitt sindur um hagalógina frá 1866 og um forsøguna til hesa lóg.

Við skrivi frá 10. juli 1838 boðaði Pløyen amtmaður Rentukamarinum frá, at nakrir Eiðismenn høvdu søkt um loyvi til at hava nakað av seyði í kenning, tí fellið hevði verið, og áseyðatalið í haganum var komið langt undir vanligu skipanina. Rentukamarið svaraði, at tað fyri sítt viðkomandi einki hevði ímóti, at umsóknin varð játtað, men bað samstundis amtmannin um at koma við einum tilmæli, um galdandi bannið móti at hava seyð í kenning yvirhøvur átti at standa við ella ikki. Í svari sínum var amtmaðurin ikki fyri generelt at taka bannið av, men skeyt upp, at tað við lóg skuldi ásetast, at tá eigari í felagshaga ynskti at fara undir gerð av seyðahúsum og at fara undir aðrar ábøtur, eitt nú uppdyrking til frama fyri felagsseyðin, tá skuldu hinir eigararnir í haganum hava skyldu til at taka lut í hesum tiltøkum. Hann mælti samstundis til, at reglurnar í fyriskipanini frá 1698, sum í stóran mun var endurtøka av reglunum í tí gamla seyðabrævinum, vórðu tiknar til umhugsunar, og at nevnd varð sett til at gera hetta arbeiði. Í nevndini skuldu sita amtmaðurin, sorinskrivarin, landfútin, allir sýslumenninir og ein ella tveir skilagóðir bøndur úr hvørjari sýslu, sum fólkið sjálvt valdi. Rentukamarið tók undir við hugskotinum hjá amtmanninum, og boðaði honum frá við einum skrivi frá 13. juni 1840, at teir mest álítandi menninir úr hvørjari sýslu skuldu hava høvi til at seta fram síni sjónarmið, og at tað síðani skuldi setast ein nevnd til at viðgera spurningarnar. Nevnd varð sett og fór til verka. Hon gjørdi eitt uppskot í stívliga 100 greinum til eina nýggja hagalóg. Tað vóru teir tríggir nevndarlimirnir Pløyen amtmaður Lundahl landfúti og Georg Flemming v. Tillisch sorinskrivari, sum gjørdu uppskotið. Við skrivið frá 22. august 1844 varð uppskotið sent Kansellinum. Í skrivinum verður sagt, at umhugsað hevði verið at kalla uppskotið „Nýggja Seyðabrævið“, tí hetta heiti fór lógin óivað at fáa í fólkamunni, tá hon einaferð kom, men at teir høvdu valt at kalla uppskotið „Forslag til anordning om Havgebrug paa Færø“, sum teir hildu vera meira í tráð við innihaldið.

Uppskotið varð síðani prentað og sent út um landið til embætismenn og aðrar við áheitan til fólk um innan ávisa freist at koma við viðmerkingum og broytingaruppskotum. Tað komu rættiliga nógv broytingaruppskot, og málið varð síðani av Dahlerup amtmanni við

skrivi dagsett 16. mars 1853 sent innanríkisráðnum. Dahlerup sjálvur gjørdi drúgvar og rættuliga atfinningarsamar viðmerkingar til uppskotið. Summi av uppskotunum hjá Dahlerup vóru rættiliga radikal og víktu nógv frá teirri skipan, sum higartil hevði verið galdandi. Sum dømi kann nevnast, at Dahlerup ikki vildi góðkenna ta grundleggjandi regluna í føroyskum jarðarrætti, at yvirliggjandi hagi eigur vetrarbitið á undirliggjandi bøi. Dahlerup mælti til, at uppskotið varð lagt til viks fyri fyrst fyri at bíða eftir úrslitinum av fríhandilsspurninginum. Innanríkisráðið fylgdi ikki hesum tilmæli, men gjørdi av, at leggja uppskotið fyri løgtingið, sum var endurreist í 1852. Málið varð viðgjørt í eini løgtingsnevnd, sum 13. september 1854 læt álit frá sær. Í álitinum verður m.a. sagt:

> „Vi maa erkende, at det os forelagte Udkast har været udarbejdet med stor Omhu, og om vi end ikke kunne tiltræde det i alle dets enkelte Dele, have vi dog i Udkastet haft en Vejledning at følge os et Grundlag af bygge paa, hvorved det er blevet muligt for os at give Forslag til den Lov, som vi antage kunne passe sig for Landet.
>
> Ved de Forandringer, som vi have foreslaaet ved nogle af Forslagets væsentligste Paragraffer, have vi haft for øje at nærme os til det bestaaende, og vi have gjort dette for ikke at krænke nogen i hans Ret, og fordi vi have ment, at der ellers ville opstaa Forvirring de forskellige Steder.“

Uppskotið varð 2. oktober sama ár viðtikið á løgtingi og sent donsku stjórnini. Málið bleiv tó ikki lagt fyri Ríkisdagin beinanvegin, og við skrivi frá 30. apríl 1857 varð tað sent amtmanninum aftur við áheitan um at leggja tað fyri løgtingið av nýggjum til umhugsunar, nú lógin um útskifting av felagshøgum var staðfest. Harafturímóti segði løgmálaráðið seg ikki vera samt við amtmannin í, at nøkur orsøk hevði verið til at bíða eftir, at fríhandil var settur á stovn. Dahlerup varð eisini í skrivinum mintur á, at hann hevði gingið inn fyri meira radikalum nýskipanum enn teir tríggir Pløyen, Lundahl og Tillisch høvdu skotið upp, men at løgtingið júst hevði gingið øvugta vegin og hevði broytt uppskotið, soleiðis at tað var meira í tráð við galdandi reglur. Uppskotið varð síðani lagt fyri løgtingið, har tað varð viðgjørt í nevnd. So hendi ikki meira hetta árið, og hvørki í 1858 ella 1859 var málið á skránni hjá løgtinginum. Tað var á skránni í 1860. Tað varð ikki liðugt viðgjørt hetta árið, men í 1861 varð tað samtykt. Framvegis bygdi uppskotið í stóran mun á uppskotið hjá Pløyen, Lundahl og Tillisch. Málið varð síðani aftur lagt fyri ríkisdagin í setuni 1864-65. Tað var ikki sjálvt uppskotið, sum tað var viðtikið av løgtinginum, ið

varð lagt fram, men eitt uppskot í trimum greinum, sum heimilaði stjórnina at seta uppskotið í gildi við eini kongaligari fyriskipan. Ætlanin við hesi mannagongd var at fyribyrgja, at broytingar vórðu gjørdar í uppskotinum á ríkisdegi. Um hetta stendur í viðmerkingunum til lógaruppskotið hjá stjórnini m.a.:

> „Man tør derfor vistnok med Føje slutte, at Lovudkastet saaledes som det foreligger, baade er velovervejet og i det hele overensstemmende med Befolkningens Anskuelser om hvorledes Havgevesenet bør ordnes, og Ministeriet har derfor antaget, at der fra dens Standpunkt ikke er Anledning til i Realiteten at forandre Lovforslaget. Denne Antagelses Rigtighed turde formentlig ogsaa bestyrkes ved et Henblik paa Lovudkastets Indhold. Dels er dette saa specifik færøsk, at det er vanskeligt for den, der ikke er i Besiddelse af nøje Kendtskab til de lokale Forhold paa Færøerne, at have en fuldkommen begrundet Mening om Hensigtsmessigheden af de enkelte Bestemmelser i Udkastet, dels er dette i det hele nærmest at betragte som en Samling af de Regler, der i Tidernes Løb ved Sedvane haver dannet sig, i hviken Henseende bemærkes, at det af Lagtingets Betænkning af 1854 fremgaar, at Tingets Bestræbelser navnlig har gaaet ud paa at forandre Kommissionens Udkast i de Punkter, hvori dette havde fjernet sig fra det bestaaende.“

Landstingið, har uppskotið hjá stjórnini var til viðgerðar, var tó ikki sinnað at ganga við til hesa mannagongd. Talan var um týdningarmiklar reglur, sum áttu at verða settar í lóg og ikki í eina kongaliga fyriskipan. Ein partur av teimum minni týdningarmiklu reglunum kundi tó takast burturúr og setast í gildi við kongaligari fyriskipan; men grundreglurnar máttu hava lógarform. Uppskotið varð so beint aftur til stjórnina. Løgmálaráðið kannaði, um tað bar til at taka ein part av reglunum burturúr uppskotinum og seta tær í gildi við kongaligari fyriskipan, men ásannaði, at hetta ikki var gjørligt. Uppskotið var ein samanhangandi heild, og tað bar illa til at pilka við nakað av innihaldinum, uttanso at tað fekk órógvandi ávirkan á restina av uppskotinum. Løgmálaráðið kom til ta niðurstøðu, at rættast var at venda aftur til uppskotið hjá løgtinginum frá 1861. Tað var so enn einaferð lagt fyri løgtingið, har tað fekk nevndarviðgerð og var samtykt við smærri broytingum. Tað var síðani lagt framaftur í ríkisdegnum í setuni 1865-66, har tað varð samtykt og síðani staðfest sum „Lov om Ordningen af de til Haugevesenet paa Færøerne hørende Forhold“ frá 23. februar 1866. Henda lóg var galdandi, til vit fingu tað núgaldandi hagalógina frá 18. mai 1937.

# D. Landbúnaðarviðurskiftini eftir miðju seinastu øld

Av øðrum lógartiltøkum í 19. øld kunnu nevnast ein lóg frá 19. januar 1863 „Om Afhændelse af de Fæstegaarden Husegaard ved Thorshavn tilhørende Trøer“ og ein lóg frá 29. mars 1867 „angaaende en ny Skyldsætning af Jorderne paa Færøerne“. Eftir hesi seinnu lógini skuldi setast metingarnevnd at kanna virðið av øllum jarðum í Føroyum bæði innangarðs og uttangarðs. Arbeiði fór fram í árunum 1868-71 og er úrslitið til skjals í gerðabókini hjá nevndini, vanliga kallað „taxatiónsprotokollin“, og sum er útgivin. Hetta verk er av stórum týdningi, tá ein skal leita sær kunnleika um jarðarviðurskiftini í teimum einstøku bygdunum. 25. februar 1871 kom lóg „indeholdende nogle Bestemmelser om Adgang til Kongsfæste paa Færøerne“, sum ásetti, at tá festareinkja gifti seg uppaftur, skuldu synirnir í fyrru giftu framvegis hava frammíhjárætt til festið. 1. april 1891 komu tvær lógir um ávikavist grannastevnur og landbúnaðarstevnur, 12. apríl 1892 lóg um „Godtgørelse for udførte Grundforbedringer m.v. paa Statens Fæstegods paa Færøerne“ og 13. apríl 1894 traðarlógin „Om Afhændelse af Trøer og Grundstykker fra Statens Fæstegods paa Færøerne.“

Tað vóru tveir jarðarspurningar, sum vóru nógv frammi í 19. øld umframt spurningin um sundurpettingina av ognarjørðini. Annar spurningurin var, um festijørðin átti at verið latin til ognar. Hin spurningurin snúði seg um at útvega fólki jørð til uppdyrkingar. Hesir báðir spurningarnir hava eisini verið nógv frammi í sambandi við lógartiltøkini í 20. øld.

Longu í 1845 kom Rentukamarið við tilmæli um, at tað átti at verða tikið til umhugsunar at lata festarum festigarðarnar til ognar. Hetta hevði júst verið gongdin í Danmark aftaná jarðarreformirnar í 18. øld. Spurningurin varð eisini viðgjørdur í løgtinginum í 1876, 1877, 1879, 1880, 1899 og 1900. Tað vóru ymiskar áskoðanir í tinginum. Landbúnaðarráðgevarin Rasmus Effersøe var heitur talsmaður fyri at lata festigarðarnar til ognar, og eitt uppskot til lóg um „Afhændelse af Statens Festegods“ varð eisini viðtikið í løgtinginum.

Í 1896 varð sett fram uppskot í løgtinginum um „Lov for Færøerne om Værn i Indmarken“. Uppskotið gekk út uppá, at ein og hvør hevði skyldu til at halda síni egnu húsdjór inni á sínum egna. Uppskotið umfataði tó ikki spurningin um vetrarbitið hjá hagaseyðinum á bønum og heldur ikki neyt og ross, sum løgdust inni á bønum úr haganum. Her skuldi farast fram eftir reglunum í hagalógini. Uppskotið var á skránni hjá tinginum fleiri ár upp í slag; men varð ongantíð liðugt viðgjørt, og í 1902 varð tað útsett í óásetta tíð.

Í 1905 og 1906 viðgjørdi løgtingið eitt uppskot um broytingar í traðarlógini. Í sambandi við hesa viðgerð settu tingmenninir Mads

Andreas Winther og Johan Hendrik Poulsen fram eina áheitan um at taka jarðarlóggávuna sum heild til viðgerðar. Áheitanin fekk undirtøku í løgtinginum og varð samtykt. Hon varð send løgmálaráðnum 15. november 1906. Við lóg frá 13. mars 1908 varð so avgjørt at seta búnaðarnevnd at viðgera búnaðarmál, sum løgtingið ella løgmáláráðið vístu til nevndina. Eisini skuldi nevndin av sínum eintingum kunna koma við uppskotum og álitum um búnaðarviðurskifti. Løgmáláráðið skuldi velja tveir limir og ein tiltakslim í nevndina og løgtingið ein lim og ein tiltakslim úr hvørjum prestagjaldi. Løgmáláráðið valdi Chr. Bærentsen, amtmann, og Rasmus Effersøe, landbúnaðarráðgevara, sum sínar limir og Chr. Helms, sorinskrivara, sum tiltakslim. Løgtingið valdi Samuel Jacob Jacobsen, tilstundandi festara, Norðoyri, T.J. Petersen, sýslumann og løgtingsmann, Fuglafirði, Johan C.F. Dam, kongsbónda og løgtingsmann, Kollafirði, Jóannes Patursson, kongsbónda og løgtingsmann, Kirkjubø, D.P. Michelsen, óðalsmann, Miðvági, Johan Hendrik Poulsen, traðarmann og løgtingsmann, Skopun, og Hans Chr. Larsen, óðalsmann, Porkeri. Samuel Jacobsen doyði, áðrenn nevndin fór til verka, og í hansara stað kom tiltaksmaðurin Michel Fr. Olsen, tilstundandi festari, Svínoy. Chr. Helms, sorinskrivari, virkaði sum skrivari hjá nevndini. Sambært lógini skuldi nevndin hava lokið arbeiðið sítt innan 1. juli l910; men arbeiðið gjørdist sera umfatandi, og tað var tí ikki gjørligt at halda hesa tíðarfreist, sum tí varð longd.

Nevndin legði 25. mai 1911 fram álit við hesum uppskotum og tilmælum:

1. Udkast til Lov for Færøerne om Havgers Styrelse og Drift m.m.
2. Udkast til Lov for Færøerne om Hegn og Markfred.
3. Udkast til Lov for Færøerne om Udskiftning.
4. Udkast til Lov om ændring i Lov om de færøske Landkommuners Styrelse af 28. februar 1872.
5. Udkast til Lov for Færøene om Grandestevne m.m.
6. Udkast til Lov for Færøerne om Landvæsenskommissioner.
7. Udkast til Lov for Færøerne om Forandring i Udstykningslovgivningen m.v.
8. Udkast til Lov om Matrikulering af de faste Ejendomme paa Færøerne m.v.
9. Udkast til Lov for Færøerne om Vands Benyttelse m.m.
10. Udkast til Lov om Salg af de Præsteembederne paa Færøerne tillagte Ejendomme.
11.a. Udkast til Lov angaaende Statens Fæstegods paa Færøerne.
11.b. Udkast til Lov for Færøerne om Fæstegodsets Overgang til Selvejendom.
12. Udkast til Lov om Oprettelse af en Husmandsbank paa Færøerne.

13. Udkast til Ordning af en Landboskole.
14. Betænkning om Planteavlsforsøg paa Færøerne.
15. Udkast til Lov for Færøerne om Jagt, Fuglefangst m.m.
16. Betænkning om Kulbrydningen paa Suderø.

Umframt sjálvt álitið við uppskotum og viðmerkingum læt nevndin úr hondum eisini stórt uppískoyti við ørgrynnu av upplýsingum, serstakliga viðvíkjandi eldri jarðarlóggávu. Tað vóru serstakliga teir báðir amtmaðurin og sorinskrivarin, sum savnaðu hetta rúgvusmikla tilfar.

Viðvíkjandi høvuðssjónarmiðunum hjá nevndini stendur í innganginum til álitið hetta:

> „Med Hensyn til de Grundsætninger, som have været de ledende under Kommissionens Arbejde, bemærkes, at man i den almindelige Landbolovgivning overalt har søgt at holde sig for Øje, at den enkelte Ejer eller Bruger, saa vidt det er muligt, bør stilles selvstændigt, og at det fra ældre Tid endnu paa mange Omraader bestaaende Fællesskab bør indskrænkes saa meget, som Forholdene tillade. Paa den anden Side har man dog tilstræbt at undgaa alle stærke Brud med den historiske Udvikling, idet man har villet bygge det nye paa det gamles Grund, og man har i alle Tilfælde nøje søgt at prøve de bestaaende Landboforhold. Hvor Fællesskabet efter Kommissionens Skøn ikke kan eller dog ikke bør hæves (Saaledes i mange Udmarksforhold), har man foreslaaet indført nye Styrelsesformer, sigtende til at gøre Fælligets Drift lettere og nærme den til de frie erhvervs-Interessentskabers Driftsformer, hvorhos man har søgt at bestemme de enkelte Andelsejeres Retsstilling med større Sikkerhed og Klarhed og lette Adgangen til Ordning og Afgørelse af Retsforholdene. Ved nye Bestemmelser om Hegn og Ansvar for Husdyr har man søgt at værne Markfreden paa en virksommere Maade. Til Ordning af Indmarksforholdene foreslaar man endvidere indført fuldstændige Regler om Adgang til Udskiftning, hvorved den enkelte Ejers spredte Indmarkslodder kunne samles.“

Sum heild var nevndin rættuliga samd í næstan øllum málum. Bert viðvíkjandi tveimum spurningum – um at lata festigarðarnar til ognar og um vetrarfriðing av innmørk – var ósemja.

Rasmus Effersøe gekk, eins og hann hevði gjørt tað í tinginum, inn fyri at lata festigarðarnar til ognar. Bert hesin háttur var eftir hansara áskoðan egnaður til at menna landbúnaðin. Um garðarnir vórðu latnir til ognar, fór hetta í sjálvum sær at føra við sær, at bóndurnir fóru at fáa størri áhuga fyri teimum, og so við og við fóru tað bert at verða

teir dugnaligastu búnaðarmenninir, sum komu at sita við jørðini. Hann vísti eisini á gongdina í Danmark, Noregi og Skotlandi. Restin av nevndini kundi ikki taka undir við uppskotinum hjá Rasmusi Effersøe, í hvussu so er ikki í fyrsta lagi. Johan Dam, Hans Chr. Larsen, Michel Fr. Olsen og Jóannes Patursson hildu, at teir fyri teirra viðkomandi ikki høvdu eina so avgjørda støðu til spurningin sum Rasmus Effersøe, og at bæði ein ognarskipan og ein festiskipan kundu vera nýtilig í Føroyum. Tað avgerandi var, hvussu lóggávan hesum viðvíkjandi var. Um lóggávan tryggjaði festarunum brúkið av festinum í nóg góðan mun, var festiskipanin nýtilig í Føroyum drúgva tíð framyvir; men um hetta ikki var so, vildu teir í øðrum lagi taka undir við uppskotinum hjá Rasmusi Effersøe. Christian Bærentsen, D.P.Michelsen, T.J.Petersen og Johan Hendrik Poulsen hildu, at tað í løtuni ikki var skilagott at lata festigarðarnar til ognar.

Í spurninginum um vetrarfriðing gingu Christian Bærentsen og Rasmus Effersøe inn fyri, at vetrarfriðing skuldi kunna krevjast í øllum førum móti fullum endurgjaldi, men hesum kundi restin av nevndini ikki taka undir við.

Álitið varð lagt fram í løgtinginum í 1911, men hetta var stórur biti at fara undir. Málið var á skránni hjá løgtinginum á hvørjum ári, men striltið gekk at seta uppskotini í verk. Í árunum 1922-25 vórðu tó uppskotini til útskiftingarlóg og nýggja landbúnaðarstevnulóg framd. Nú var lógargrundarlag til steðar at fara undir innangarðsútskifting í Føroyum, og í 1927 varð sum ein roynd byrjað við innangarðsútskifting í Vestmanna. Í árunum frá 1928 til 1935 vórðu nakrar bygdir í Suðuroy útskiftar. Tær vóru Fámjin, Trongisvágur og Hvalba.

Í 1927 samtykti løgtingið uppskot til lóg um stuðul úr ríkiskassanum til uppdyrking í Føroyum. Landbúnaðarmálaráðið vildi ikki taka undir við uppskotinum í tí líki, tað fyrilá, og leggja tað fyri ríkisdagin, men gjørdi í 1930 av at seta nevnd til at viðgera spurningin, um tað var tørvur á eini serstakari lóggávu til frama fyri uppdyrkingina í Føroyum. Við skrivi frá 15. juli 1930 boðaði landbúnaðarmálaráðið amtmanninum frá hesi avgerð. Um arbeiðssetningin hjá nevndini stendur í skrivinum:

> „Med Hensyn til den Udvalget stillede Opgave skal man bemærke, at Spørgsmaalet om, hvorvidt der bør gennemføres en særlig Lovgivning sigtende til Fremme af Opdyrkningen paa Færøerne, efter Ministeriets Opfattelse bør behandles paa en bredere Basis end sket ved de af Lagtinget vedtagne, ovenfor nævnte Forslag. Ministeriet vil vel ikke stille sig afvisende overfor Tanken om at yde direkte Statstilskud til Opdyrkning, men da det med de nugældende Lovbestemmelser er meget vanskeligt for den enkelte Mand at komme i Besiddelse af Jord, som egner

> sig til Opdyrkning, maa Ministeriet anse det for rigtigst, at Udvalget særlig fæster sin Opmærksomhed paa Spørgsmaalet om en ny Lovgivning, sigtende til at skaffe Jord frem til Opdyrkning, dels ved Ændringer i Lov nr. 56 af 13. april 1894 om Afhændelse af Trøer og Grundstykker fra Statens Fæstegods, dels ved en ny Lovgivning vedrørende Odelsjorden".

I nevndini skuldu sita amtmaðurin, landbúnaðarráðgevarin og 3 limir, valdir av løgtinginum, ein úr hvørjum tingbólki. Teir tríggir tingbólkarnir vóru sambandsflokkurin, sjálvstýrisflokkurin og javnaðarflokkurin. Í valbólki saman við javnaðarflokkinum var Johan Hendrik Poulsen, sum í 1929 varð koyrdur úr sjálvstýrisflokkinum.

Málið varð lagt fram í løgtinginum, har tað varð viðgjørt í eini 7-mannanevnd. Nevndarmeirilutin, 3 sambandsmenn og 3 sjálvstýrismenn vóru í fyrstu syftu ímóti at tvinna studningsspurningin saman við spurninginum um nýggja lóggávu til útvegan av uppdyrkingarjørð. Bert javnaðarnevndarlimurin tók heilt og fult undir við, at nevnd varð sett, sum skotið upp av landbúnaðarmálaráðnum. Sambandsmenninir vildu tó eftir umstøðunum og vísandi til, at landbúnaðarmálaráðið hevði sýtt fyri at samráðast um studningsspurningin fyri seg, mæla til, at tingið valdi limir í nevndina, meðan sjálvstýrismenninir mæltu frá, at tingið valdi limir. Úrslitið gjørdist, at 19 av 23 løgtingsmonnum atkvøddu fyri at velja limir í nevndina. Valdir vóru Mikkjal Samuelsen úr Sambandsflokkinum, J.J. Matras úr Sjálvstýrisflokkinum, og Johan Hendrik Poulsen.

Nevndin fór til verka, og gjørdu nevndarlimir kanningarferðir til Íslands og Noregs. Nevndin kom við áliti í 1932. Tað var heft við gráari permu, og er tí best kent undir navninum „Gráabok". Nevndin gjørdi uppskot til „Lov for Færøerne om Jordbrugets Fremme". Eftir uppskotinum skuldi setast á stovn jarðarráð til at umsita kongsjørðina og haraftrat prestajørðina. Landbúnaðarnevndir við trimum limum hvør skuldu setast á stovn, og skuldi landið býtast upp í øki hvør við síni landbúnaðarnevnd. Jarðargrunnur skuldi setast á stovn. Í grunnin skuldi ríkiskassin rinda 100.000 kr. árliga yvir 10 ár, og landskassin 10.000 kr. árliga, somuleiðis yvir 10 ár. Ráðið skuldi kunna festa jørð burtur uppá lívstíð festarans ella uppá áramál, og tað skuldi kunna selja jørð til byggigrundir og lata jørð til uppdyrkingar, tó vanliga bert í smærri brúk. Eisini gjørdi nevndin uppskot til smærri broytingar í útskiftingarlógini og uppskotunum til hagalóg og garðalóg. Í innganginum til álitið stendur m.a.:

> „Udvalgets Medlemmer har paa en Række Punkter forhandlet sig til Enighed, men Lagtingsmændene J.J. Matras og M. Samuelsen ønsker udtrykkeligt fremhævet, at de ikke føler sig bun-

> det til politisk at stemme for de fremsatte Forslag i disses Helhed, idet Forslagene i en Række Tilfælde er af en saa omfattende Karakter, at Konsekvenserne ikke med Sikkerhed kan overses. De vil derfor forbeholde sig at forhandle med deres politiske Meningsfæller inden endeligt Standpunkt tages.“

Løgtingið hevði longu í 1930 samtykt uppskotini til hagalóg, garðalóg og grannastevnulóg; men stjórnin vildi ikki seta hesi lógartiltøk í verk, fyrr enn álitið frá „Gráubóka-“nevndini fyrilá.

„Gráabók“ varð løgd fram í løgtinginum í 1933, og saman við uppskotunum um lóg „Om Jordbrugets Fremme“ vórðu eisini løgd fram uppskot til hagalóg, garðalóg, grannastevnulóg og vatnalóg. Uppskotið til lóg „Om Jordbrugets Fremme“ elvdi til mikla mótstøðu. Serstakliga bøndurnir hildu, at uppskotið gekk teirra áhugamálum ov nær. Jóannes Patursson stóð á odda fyri mótstøðuni. Eftir hansara áskoðan var talan um eina beinleiðis kollvelting í føroyskum jarðarviðurskiftum, og var talan um ágang ikki bert móti bóndum, men eisini móti ognarmonnum og traðarmonnum. Sjálvstýrisflokkurin setti fram uppskot um, at løgtingið fekk lóggávuvald á vinnuøkjum, herundir landbúnaðarøkinum, men var tað ikki meiriluti fyri hesum. Í løgtinginum tá sótu 11 sambandsmenn, 2 javnaðarmenn og 8 sjálvstýrismenn.

Undir endaligu atkvøðugreiðsluni í løgtinginum vórðu øll uppskotini samtykt. Tey fingu allar atkvøðurnar hjá sambandsmonnunum. Fyri uppskotunum til lóg „Om Jordbrugets Fremme“, Garðalóg og Grannastevnulóg atkvøddu harumframt báðir javnaðartingmenninir Mourentsius Viðstein og Peter Mohr Dam. Fyri Hagalógini atkvøddi bert annar teirra, Petur Mohr Dam, og fyri Vatnalógini bert hin, Mourentsius Viðstein. Fyri Vatnalógini atkvøddi eisini sjálvstýrismaðurin Gunnar Winther.

Eisini aftaná, at uppskotini vóru samtykt í løgtinginum, helt mótstøðan fram, og Jóannes Patursson royndi til fánýtis at fáa málið uppafturtikið, og uppskotið til lóg um „Jordbrugets Fremme“ broytt.

Uppskotini vórðu síðani løgd fyri ríkisdagin, har tey vórðu samtykt. Lógin um „Jordbrugets Fremme“ var staðfest 24. mai 1937 til at koma í gildi 1. apríl 1938. Hinar lógirnar vórðu staðfestar 18. mai 1937 til at koma í gildi 1. juli 1938.

Í 1939 kom nýggj útskiftingarlóg í staðin fyri útskiftingarlógina frá 1926, sum hevði verið tíðaravmarkað, men sum varð longd fleiri ferðir.

Undir krígnum hendi einki serligt á jarðarlóggávuøkinum. Bert onkrar smærri broytingar vórðu gjørdar í galdandi lógum.

Við heimastýrislógini frá 31. mars 1948 og løgtingssamtyktini frá 13. mai sama ár um yvirtøku av sermálum, gjørdust landbúnaðarviðurskifti, herundir búnaðarlóggávan, føroyskt sermál, og løgtingið fekk

nú lóggávuvald á hesum øki. Tað er tó synd at siga, at løgtingið hevur gjørt stórvegis nýtslu av hesum valdi sínum á umrødda øki.

Í 1956 viðtók løgtingið tó at yvirtaka jarðargrunnin og kongsjørðina. Eisini varð hetta árið viðtikið at seta eina fimmmanna millumtinganevnd at eftirkanna jarðarlóggávuna og koma við møguligum uppskotum til broytingar. Eitt uppskot varð eisini sett fram í løgtinginum um uttanbíggjajørð, og varð hetta mál eisini víst til millumtinganevndina.

Millumtinganevndin kom við áliti, sum varð lagt fram í løgtinginum í 1960. Nevndin hevði gjørt uppskot til nýggja lóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum til frama. Í uppskotinum vóru reglur um, at festarar undir ávísum treytum skuldu kunna fáa festigarðar til ognar fyri ein lagaligan prís. Eisini gjørdi millumtinganevndin uppskot til lóg um uttanbíggjajørð.

So hendi ikki meira í málinum fyribils, men í 1964 setti landsstýrið fram uppskot um at seta nýggja millumtinganevnd at endurskoða uppskotini hjá tí fyrru millumtinganevndini. Nevndin skuldi gera álit, sum skuldi umfata bæði festi- og ognarjørð. Uppskotið fall, men varð sett framaftur árið eftir, og tá varð tað samtykt.

Eisini henda seinna millumtinganevndin kom við uppskoti um lóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum til frama, og líktist uppskotið rættuliga nógv uppskotinum hjá tí fyrru millumtinganevndini. Eisini gjørdi henda seinna millumtinganevndin uppskot til lóg um uttanbíggjajørð.

Álitið varð lagt fram í løgtinginum í 1967 og uppskotið til lóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum til frama fekk nevndarviðgerð. Tað kom aftur á tingborð í 1969 saman við einum uppskoti frá nevndini um broyting av reglunum í hagalógini viðvíkjandi vetrarfriðing; men hvørki av uppskotunum varð samtykt. Uppskotið um uttanbíggjajørðina kom ongantíð til realitetsviðgerðar.

So hendi ikki meira í nógv ár, men í 1984 legði landsstýrið fram uppskot til lóg um landsjørð. Hetta uppskot er mær vitandi ikki liðugt viðgjørt enn.

Av øðrum lógartiltøkum viðvíkjandi fastari ogn, og sum eisini hava týdning fyri jarðarbrúki, skal eg nevna, at vit í 1962 fingu eina tinglýsingarlóg og eina matrikuleringslóg, sum verða settar í gildi fyri tær einstøku bygdirnar, so hvørt fullfíggjað matrikulering er framd í teimum. Uppskotini til hesar lógir vórðu gjørd av eini nevnd, sum forsætismálaráðið setti í 1953 at kanna realkredittina í fastari ogn í Føroyum. Í dag er matrikulering framd í øllum landinum, og eru nú fyritreytir fyri at hava eitt ávíst tamarhald á útstykkingini, tí nú krevst loyvi frá Matrikulstovuni, og matrikuleringslógin ásetir treytir fyri, nær sundurbýti kann loyvast.

Sum nevnt tykist hugurin millum politikarar tey seinnu árini ikki at hava verið stórur at taka jarðarspurningin til viðgerðar í álvara.

Orsøkirnar til tess kunnu vera fleiri. Jarðarspurningurin er ein ógvuliga viðbrekin spurningur, og menn aftra seg tí kanska við at fremja lóggávu á hesum øki. Eisini munnu arrini aftaná orrustuna um „Gráubok“ framvegis vera sár. Neyvan er galdandi lóggávan so lýtaleys, at henni ikki tørvar ábøtur onkunstaðni. Í øllum førum er tað ein himmalvíður munur á liviumstøðunum í Føroyum í dag í mun til 1930ini, sum helst er ein tann ringasta tíð, vit vita um at siga. Tá vóru inntøkurnar lágar bæði hjá fiskimonnum og arbeiðsmonnum, um nakrir arbeiðstímar yvirhøvur vóru at fáa. Tað hevði tí stóran týdning fyri fiskimannin og arbeiðsmannin at hava trøð at velta sær nøkur epli og dyrka, so mikið, at hann var førur fyri at hava kúgv sum ískoyti í húsarhaldinum. Fiskimenninir vóru vanliga heima um veturin, og eisini hjá arbeiðsmanninum vóru nógvir dagar, tá einki arbeiði var. Hesar fyritreytir eru als ikki til steðar í dag. Fiskimaðurin er burtur alt árið, og arbeiðsmaðurin hevur vanliga arbeiði hvønn dag. Tað loysir seg í hvussu er ikki at leggja annað arbeiði niður fyri at velta. Tað er tí ikki sami tørvur at útvega jørð til uppdyrkingar, sum tað var í 1930unum. Tað er heldur ikki sami tørvur at leggja eftir festijørðini, tá talan er um at útvega øki til bygging. Í 1954 fingu vit lóg um byggisamtyktir og býarskipanir, og hava kommunur, har byggisamtyktir eru settar í verk, nú møguleika fyri at ogna sær tey øki til t.d. bygging, sum liggja best fyri og eru best egnaði uttan mun til, um talan er um festijørð ella ognarjørð. Tað er sostatt ikki longur í sama mun neyðugt at leggja eftir kongsbønum, sum ofta kanska er tann besti bøurin.

Tey seinastu árini hevur verið ein framburður í tí føroyska samfelagnum, sum okkara forfedrar aldri høvdu droymt um. Grundarlagið undir hesum framburði hevur verið fiskivinnan. Hóast henda vinna við stórum dugnaskapi hevur megnað at troyta teir møguleikar, sum hava verið og lagað seg til broyttar umstøður, er tað nógv sum týðir uppá, at tað er mark fyri, í hvønn mun fiskivinnan kann vera einasta álitið í framtíðini. Ræsurnar hjá okkara fiskimonnum treingjast við kvotaskipanum o.t. Tað er tí neyðugt at hugsa um at menna aðrar vinnuvegir, og verður tað sjálvandi eisini gjørt. Tá ein hevur í huga, at landbúnaðurin hevur verið høvuðsvinnuvegur Føroya í teimum 10 av teimum 11 øldunum, síðani Norðmenn settust niður í Føroyum, er tað nærliggjandi at spyrja, um jarðarbrúkið ikki eigur at geva størri ískoyti til samfelagshúsarhaldið, enn tað ger í dag.

Festijørðin er í dag álitið undir tí føroyska jarðarbrúkinum. Festiskipanin hevur nógvar øldir á baki, og eg haldi, at politikkarar eiga at hugsa seg fleiri ferðir um, áðrenn teir taka hesa skipan av. Umframt at vit kunnu takka hesi skipan fyri, at vit enn í Føroyum hava nakrar garðar eftir, sum við nakrari meining kunnu kallast jarðarbrúk, hevur skipanin eisini aðrar fyrimunir fram um eina ognarskipan. Festarin situr í dag við garðinum fyri eina leigu, sum er reint symbolsk. Burtur-

sæð frá íløgum og møguligum haldsskyldum hevur hann ikki tung lán at rinda rentur og avdráttir av. Tá festarin tekur við garðinum, noyðist hann ikki at útvega medarvingum teirra arvalut, sum hann hevði verið noyddur til, um talan var um ognargarð. Ein fyritreyt, fyri at festari hevur hug at leggja kreftir og fremja íløgur í ein festigarð, er tó, at hann hevur eina trygga rættarstøðu, soleiðis at hann hevur trygd fyri, at hann sjálvur og eftirkomarar hansara koma at heysta fruktirnar av hesum arbeiði og íløgum. Tá møgulig lógartiltøk skulu setast í verk á hesum øki, eigur tí eisini at verða hugsað um, at henda rættarstøða eigur at tryggjast best møguligt.

Knappliga helmingurin av allari jørðini í Føroyum er ognarjørð, og her er hugurin hjá politikarum at fremja lógartiltøk helst enn minni, enn tá talan er um kongsjørðina. Uttanbíggjajørðin hevur verið á lofti onkuntíð, men einki ítøkiligt er komið burturúr. Við teimum samferðslumøguleikum, sum eru í dag, er tað ein spurningur, um tað er grund til at skilja ímillum uttanbíggjajørð og aðra ognarjørð. Menn eru grammir at keypa jørð, og tað er ikki óvanligt, at ein gyllin av jørð fer fyri bæði 20.000 og 30.000 kr. Varð henda peningaupphædd í staðin fyri sett í peningastovn fyri hægstu rentu, kundi viðkomandi keypt sær bæði 3 og 4 hampulig lomb á hvørjum ári fyri rentuna og tað uttan nakað stríð. Tað er eyðsæð, at tað ikki er gjørligt at reka lønandi jarðarbrúk á jørð, sum verður keypt fyri slíkar upphæddir. Orsøkin til, at menn keypa jørðina fyri hesar prísir, er antin, at hugurin at eiga jørð er so stórur, ella at keyparin væntar sær vinning av henni seinni t.d. við spekulatión. Men burtursæð frá keypspeninginum kostar tað einki at hava jørð liggjandi, heldur ikki um hon liggur í órøkt. Ígjøgnum øldir hava myndugleikarnir roynt at avmarkað sundurpettingini av ognarjørðini, men til fánýtis. Hinvegin liggur jørðin har, og spurningurin er, hvussu frægast kann fáast burturúr henni. Uttangarðsjørðin verður nógvastaðni røkt í fela, og sum greitt er frá áður, var hesin formur hildin at vera tann besti fyri 300 árum síðani. Tað átti tí kanska at verið tikið til umhugsunar at rikið innangarðsjørðina sum felagsbrúk, soleiðis at teir einstøku eigararnir tóku seg saman í partafeløg ella aðrar felagsskapir, sum kundu rikið jørðina við løntari arbeiðskraft.

Í hvussu er og ikki, so er tað av avgerðandi týdningi fyri okkara samfelag, at tað, eisini hvat jarðarbrúkinum viðvíkur, fæst sum mest burturúr. Hin vegin eigur at verða havt í huga, hvussu nær føroyingurin altíð hevur følt seg knýttan at síni jørð, og mugu møgulig lógartiltøk serstakliga viðvíkjandi ognarjørðini gerast við fyriliti.

# IV. GALDANDI LANDBÚNAÐARSKIPAN

## A. Geografisk lýsing av almennu og privatu jørðini í Føroyum

### 1. Almenna og privata jørðin í Føroyum

Sum kunnugt er innangarðsjørðin í Føroyum við tilhoyrandi uttangarðsrættindum gjørd upp í eitt virði, eftir hvussu stór úrtøka kann fáast av ognini og ikki í einum arealmáti. Høvuðseindin er ein mørk, sum er 16 gyllin, har gyllinin er 20 skinn. Innangarðsjørðin verður harafturat vanliga serstakt gjørd upp í einum arealmáti við ávísum kvadratmetratali.

Nær Føroyar vóru máldar upp av fyrstan tíð, veit eingin.[1] Men ein sannroynd er, at merkurnar í Føroyum eru ójavnar. Hví so er, kunnu vit bert gita okkum til. Ein orsøk er, at vit í dag hava lyndi til bert at gera úrtøkuna á uttangarðsjørðini upp í, hvussu nógvan seyð hon ber, og at vit ikki longur taka við aðra úrtøku av ognini, eitt nú rekavið, bjargarættindi v.m. – tey sonevndu lunnindini. Onnur orsøk er, at har sum talan er um ein metingarspurning, og eitt heilt land skal metast og av fleiri persónum, so vil altíð ein ávísur ójavni verða. Hesin ójavni gerst helst enn størri, tá ið øldirnar fara, og metingarnar gjøgnum árini skulu tillagast teim ítøkiligu viðurskiftunum sum eru.

Eftir tí gamla markatalinum eru Føroyar mettar til 2.406 merkur 12 gyllin og 5 skinn. Hesin matrikul hevur frá elstu tíðum verið grundarlag fyri ásetingina av skattum, gjøldum og øðrum útreiðslum av jarðargóðsinum til ríkið, og hóast tað, at ein nýggjur matrikul varð tikin í nýtslu 29. juli 1899 sum skattagrundarlag (tær sonevndu „skattamerkurnar“ við útihýsing av gyllum og skinnum), verður tað gamla markatalið framvegis nýtt manna millum í keypi og sølu av jørð.[2]

Matrikulstovan hevur í nýggjari uppgerð frá november 1995, nú matrikuleringin av øllum Føroyum sbr. løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. nærum er at enda komin, uppgjørt samlaða markatalið í Føroyum til 2.368 merkur, 10 gyllin og 0 skinn við gamla markatalinum sum grundarlag. Samlaða innangarðsvíddin (íroknað grundstykki, vegir v.m.) verður av Matrikulstovuni leysliga mett til 7.827 ha.

[1] Poul Petersen, Ein føroysk bygd, Tórshavn 1968, (licentiatritgerð) bls. 226 har hann hevur ávísar gitingar um nær hetta er hent.

[2] Arnbjørn Mortensen, Fólkatalið og ognarbýtingin í Føroyum um 1600, við jarðabókini 1584 sum grundarlag. Fróðskaparrit, 3. bók 1954 bls. 7.

Tað er kanska misvísandi at gera hagtøl um uttangarðsjørðina í Føroyum við markatalinum sum grundarlagi, við tað at tær sum nevnt eru so ójavnar. Har er tó bara eitt alternativ, og tað er onga hagtalsuppgerð at gera, og tí verða merkurnar niðanfyri nýttar sum grundarlag, men tann, sum hyggur at tølunum, skal alla tíðina hava markaójavnan í huga og taka fyrivarni fyri hesum.

Hagarnir í Føroyum eru 409 í tali. Skjal 1 sýnir kort av høgunum í Føroyum. Skjal 2 sýnir, hvussu býti av høgunum er eftir stødd, og hvussu hagarnir býta seg í kongs- og ognarjørð.

Festini (kongs- og kirkjujørðin) eru 395 í tali pr. 26.10.1995 og eru í 442 pørtum uttangarðs. Tilsamans eru tey 1.286 merkur, 8 gyllin og 13 skinn. Skjal 3 sýnir, hvussu støddarbýti av festunum er. Harumframt eru leigutraðir av festunum, sum leysliga av jarðarráðnum verða mettar at verða góðar 800 í tali. Í norðoyggjum eru um 90 (harav um 30 á Viðareiði, um 20 í Klaksvík og um 15 í Hvannasundi). Í Eysturoynni eru um 350 harav um 125 á Toftum, í Leirvík o.u. 30 og á Strondum o.u. 25. Á Streymoynni eru góðar 170 traðir. (Flestar í Kvívík o.u. 50 og í Kollafirði o.u. 40). Í Vágunum eru umleið 65, tær allarflestu í Miðvági. Á Sandoynni eru umleið 55, flestar í Skopun. Í Suðuroynni eru um 40.

Ognarjørðin uttangarðs í Føroyum er 1.082 merkur, 1 gyllin og 3 skinn. Alment kann sigast um hana, at hon er smábýtt, men hetta er tó ringt at lýsa í tølum uttan eitt størri granskingararbeiði á tinglýsingarskrásetingini. Matrikulstovan hevur tó skrásett, hvussu nógvir privatir ognarlutir í tali eru av uttangarðsjørð í Føroyum við tilhoyrandi innangarðsrættindum, nevniliga 5.095 t.v.s at í meðal eru ognarlutirnir 3 gl. og 8 skinn.

At jørð á útoyggjum er ogn hjá fólki á stórplássunum hevur verið nógv umrøtt millum manna, og serliga eru vansarnir við hesum drignir fram. Tí er neyðugt at lýsa, hvussu ognarviðurskiftini eru á útoyggjunum: Sum útoyggjar verða í hesum sambandi roknaðar Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Nólsoy, Skúvoy. Stóra Dímun og Koltur hava í hesum sambandi ongan týdning, tí tær eru allar sum tær eru kongs. Á Skjali 4 sæst hvussu býtið av uttangarðsjørðini er í bygdum í nevndu oyggjum flokkað eftir kongsjørð, ognarjørð, sum fólk á staðnum eiga, og uttanbíggjajørð.

At meta um seyðatalið í Føroyum er heldur trupult. Vanliga hoyrist at 70.000 áseyðir eru, og at skurðurin er 50.000. Svabo nevnir í sínum inberetninger 1781/82, at tá var júst sett í verk nýggj skipan uppá 75.000 áseyðir, men nevnir samstundis, at skipanin hevur verið 96.000 frammanundan. Í einum riti um seyðarøkt frá 1921, útgivið av Føroya Bóndafelag, nevnir Jóannes Patursson, at áseyðatalið tá var mett til 100.000. Í álmannakkanum 1954 verður nevnt, at sbrt. seyðateljing fyri 1951 var áseyðatalið 65.845 og fyri 1952 66.326. E.A. Bjørk, Sorin-

skrivari hevur í bygdarætti sínum bd. 1 á bls. 62 sett upp eina strikumynd við áseyðatali og skurði.

Áseyðatalið fyri 1995 kunnu vit royna at meta út frá skamtunum, sum verða latnir til bøndir í Føroyum at koppseta fyri garnasótt. Djóralæknin hevur spurt ein stóran part av teim bíleggjandi, hvussu stórt áseyðatal teirra er, nevniliga teir sum umboða tilsamans 48.154 seyðir og eisini vita vit, at hesir hava fingið 11.435 skamtir av koppingarevni. Teir sum bert hava fingið skamtir, men ikki hava upplýst áseyðatalið eru 4.810 skamtir. Nýta vit sama lutfall sum í fyrra førinum, mugu vit rokna við, at teir, sum bert hava fingið skamtirnar, men ikki hava upplýst áseyðatalið, umboða 20.250 áseyðir.

Sostatt er áseytalið hjá øllum teimum, sum hava koppsett fyri garnasótt, góðar 68.400. Og roknað vit við, at nærum allir, sum hava seyð í Føroyum, hava koppsett fyri garnasótt, so er hetta áseyðatalið fyri 1995 fyri Føroyar. – Her er tó sjálvsagt ein óvissa, tí ikki kunnu vit rokna tað sum givið, at allir, sum hava seyð, koppseta fyri garnasótt, og ójavnt kann vera, hvussu nógvar skamtir menn bíleggja í mun til áseyðatal teirra.

Rokna vit við omanfyri umrødda áseyðatali, og siga vit, at lutfallið av skamtum fyri koppseting fyri garnasótt um alt landið svarar til lutfalstalið, so fáa vit við skamtunum fyri garnasótt sum grundarlag áseyðatalið fyri hvørja oyggj. Vit vita markatalið fyri hvørja oyggj, og kunnu tá seta upp Skjal 5 sum sýnir mett áseyðatal út frá skamtum útflýggjaðum fyri garnasótt, skinnatalið í oynni (hetta er lættast at rokna við), hvussu nógv skinn eru í meðal uppá seyðin, og hvussu nógvur seyður í meðal gongur á skinninum.

## 2. Hagtøl um landbúnaðarframleiðslu, – nýtslu og innflutning[3]

Á Skjali 6 eru sett upp hagtøl um landbúnaðarframleiðslu og nýtslu í Føroyum.

Sbrt. útflutningsskránni hjá Hagstovu Føroya var í álmanakkaárinum 1996 útflutt:

| | kg. | Virði |
|---|---|---|
| 1. Troyggjur | ikki innkomið | ikki innkomið |
| 2. Neyta- og kálvskinn | 2.730 | 36.400 |
| 3. 158.400 saltaði seyðaskinn | 180.606 | 3.363.913 |
| 4. Óvaskað ull | 46.573 | 82.746 |

Onnur landbúnaðarframleiðsla var ikki vinnuliga útflutt í 1996.

[3] Sett upp hevur Gunnar Bjarnason, cand. agro. Keldur: Hagstova Føroya/Føroya Jarðarráð 1997, har ikki annað er tilskilað.

# B. Almenna búnaðarjørðin

## 1. Løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995.

### *a. Reglurnar í lóg nr. 174 frá 24.05.1937 for Færøerne om Jordbrugets fremme, sum nú eru farnar úr gildi.*

Grundarlagið undir hesi lóg var hin sokallaða gráabók, sí um viðgerðina á tingi av hesi bók á bls. 42 ff.

Eftir hesi lóg § 4, var fyrisitingin av kongsjørðini løgd undir eitt jarðarráð við trimum limum. Ein valdur av danska landbúnaðarmálaráðharranum og tveir av løgtinginum. Við løgtingslóg nr. 28 frá 24.04.1957 var hetta broytt soleiðis, at í jarðarráðnum skuldi sita 3 limir, har Føroya Búnaðarfelag valdi 1 og landsstýrið 2. Landsstýrið valdi millum teir 3 formannin.

Embætisjørðin, t.v.s. jørðin sum var knýtt at prestaembætunum, fútaembætinum, amtslæknaembætinum v.m., var avtikin og fest sum vanlig festijørð.

Festini vóru latin uppá festarans ella einkju lívstíð, ella uppá áramál tó ikki yvir 70 ár.

Frammíhjárættur var til festini eftir § 18, stk. 2, soleiðis at fyrsta rætt til festið hevði elsti sonur føddur í hjúnalagi, og síðan eftir aldursrøð yngri synir í hjúnalagi og hereftir døtur í hjúnalagi í somu røð.

Sum nakað nýtt, so skuldi kæra um, at festiumsókn ikki var gingin á møti, ikki longur sendast donskum ráðharra. Nú var eftir § 18, stk. 4, ásett, at kærast kundi um festiskifti til landbúnaðarstevnu og yvirlandbúnaðarstevnu.

Eftir lógini fekk jarðarráðið eftir § 38 heimild til at selja burturav festi til byggigrundir, traðir, fiskapláss, lagurpláss o.t., hóast festarin mótmælti. Eftir § 39 kundi festarin skjóta avgerð jarðarráðsins inn fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti fyri yvirlandbúnaðarstevnu, var hann ónøgdur. Út frá eini – „enn meiri niðurstøðu“ – var jarðarráðnum somuleiðis heimilað at leiga av festi til somu endamál. Grundhugsanin er, at er jarðarráðnum heimilað at selja, verður hildið „enn meiri“ orsøk til at taka minni endalig stig, sum at leiga.

### *b. Støðið undir lógini*

Landsstýrið setti 13. september 1982 nevnd at kanna jarðarlóggávuna. Í nevndini skuldu sita Jóannes Dalsgarð, stjóri á Jarðarráðnum, Hanus Wardum, búnaðarráðgevi, Páll Vang, landsstýrismaður, og harafturi-

at ein limur frá hvørjum av hinum samgonguflokkunum. Skrivari hjá nevndini skuldi vera fulltrúin í búnaðarmálum á landsskrivsstovuni.

Nevndin fór til verka við hesum limum: Páll Vang, landsstýrismaður, Hanus Wardum, landbúnaðarráðgevi, Jóannes Dalsgarð, stjóri á Jarðarráðnum, og Sjúrður Rasmussen, fulltrúi á landsskrivsstovuni, sum var skrivari nevndarinnar. Samgonguumboðini vóru ongantíð tilnevnd.

Hon avmarkaði sjálv sín arbeiðssetning at gera uppskot til løgtingslóg, sum skuldi koma ístaðin fyri tann partin av lóg nr. 174 af 24.05.1937 for Færøerne om Jordbrugets Fremme, sum snýr seg um skipanina av almennu jørðini. Uttanfyri virkisøki nevndarinnar var sett starv jarðargrunsins sum lánsveitari.

Nevndin læt hin 30.09.1983 landsstýrinum uppskot til løgtingslóg um almenna jørð.[4] Við støði í uppskoti nevndarinnar gjørdi landsstýrið sítt egna uppskot, sum varð lagt fram, sum uppskot til løgtingslóg um landsjørð av Páll Vang, landsstýrismanni, hin 6. apríl 1984. Málið var beint landbúnaðarnevndini, sum 8. mai 1984 legði fram álit, har ein meiriluti mælti landsstýrinum til at leggja málið fram av nýggjum í komandi tingsetu.[5] Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, leggur so 21. mars 1986 uppskotið framaftur á ting, har málið verður beint búnaðarnevndini, sum 9. apríl 1986 mælir til, at hon gerst millumtinganevnd, og hetta samtykkir løgtingið.[6] Úr aftur millumtinganevnd kemur málið sum løgtingsmál nr. 144/1987,[7] har nevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við ávísum broytingum. Løgtingið samtykkir so 7. mai 1988 endaliga lógaruppskot, sum verður staðfest av løgmanni og kunngjørt sum løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988 um landsjørð.

Lógin sigur sjálv í síni 1. grein, at endamálið við lógini er, at tað fyrisitingarliga skulu skapast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini.

Lógin skuldi setast í gildi við kunngerð frá landsstýrinum, sbr. lógarinnar § 18, og hetta skuldi sbr. viðmerkingunum[8] til lógina henda, tá tær í lógini nevndu kunngerðir og skrásetingar vóru gjørdar. Av ókendari orsøk setti landsstýrið lógina í síni heild í gildi frá 1. juni 1989 at rokna, hóast tær kunngerðir og skrásetingar, sum lógin nevndi, ikki vóru gjørdar.

[4] Landsstýrisins j. nr. 1700-9

[5] Løgtingstíðindi 1983 A bls. 586 ff.

[6] Løgtingstíðindi 1985 A bls. 392 ff.

[7] Løgtingstíðindi 1987 A bls. 577 ff.

[8] Løgtingstíðindi 1985 A bls. 405.

### *c. Festiskipanin*

Til festijørðina verður eftir lógarinnar § 7 roknað øll almenn jørð, ið ikki verður fyrisitin av øðrum almennum stovni enn jarðarráðnum, heruppií kommununum.

Í § 10, stk. 1, í lógini um landsjørð er ásett, at tá ið festi verður leyst, skal jarðarráðið fyrst av øllum taka avgerð um, hvørt tað framhaldandi skal uppihaldast sum sjálvstøðugt festi, ella um tað skal leggjast saman við øðrum festi.

Lógin sigur ikki, hvørji atlit skulu takast, tá ið støða skal takast til, um festið framhaldandi skal verða sjálvstøðugt, ella um tað skal leggjast saman við øðrum. Í viðmerkingunum hjá nevndini sum tilevnaði uppskotið til § 10, stk. 1, verður sagt:

> „Fyri at hava møguleika fyri at fáa almennu jørðina í hóskandi brúkseindir er neyðugt at avmarka galdandi festirættindi hjá lívsarvingum, soleiðis at samanlegging av festum kann fara fram hvørja, ferð festir verða leys, uttan mun til um lívsarvingar eru til ella ikki“.

Hesar viðmerkingar eru endurtiknar av landsstýrinum í báðum førum, málið er lagt á ting. Sostatt gongur samanleggingarrætturin hjá jarðarráðnum fram um evt. framíhjárætt eftir lógini.

At fáa at vita hvørji atlit skulu takast, tá ið støða skal takast til, um leggjast skal saman, ella um festið skal uppihaldast sum sjálvstøðugt festi, fáa vit nakað av hjálp í álitinum frá landbúnaðarnevndini 5. mai 1988, har nevndin sigur:

> „Nevndin heldur, at samanlegging í ov stóran mun í smærru bygdunum kann føra til avtofting, og heldur nevndin, sum tíðirnar eru broyttar, at tað ikki í øllum førum gevur bestu samfelagsligu úrtøkuna at leggja brúk saman“

Tí eigur jarðarráðið, tá ið støða skal takast til samanlegging sbr. § 10, stk. 1, at meta um, hvørt samanlegging á smærri bygdum kann føra til avtofting, og tá ikki leggja saman, ella í øðrum førum meta um, hvørt ein samanlegging vil geva betri úrtøku sum heild, og tá leggja saman.

Lógin sigur onki um, hvørjum festi samanleggjast skal við. Tað vanliga vil helst verða grannafestið, men lógin setir ikki krav um, at tað skal verða hetta festið, samanlagt skal verða við. Lógin sigur heldur onki um ta støðu, tá ið tann, sum situr við festi, sum samanleggjast skal við, ikki gongur inn fyri hesum.

Eftir § 8, stk. 1 er tað jarðarráðið, sum í fyrsta umfari tekur støðu til, hvørjum festið, sum er leyst, skal latast. Onki er í lógini um, at

leys festi skulu lýsast alment, at tey eru leys at søkja, og í praksis hevur slík mannagongd heldur ikki verið fylgd. Teir, sum hava verið havdir í huga, eru bert teir, sum søkt hava, tí teir av tilvild hava fingið at vita, at ávísa festið hevur verið leyst.

Tey, sum kunnu taka við festi, eru sbr. § 10, stk. 2, bert tey, sum hava eitt minstamark av jarðarbrúkskunnleika, sum landsstýrið ásetir í kunngerð. Hetta minstamark er ásett í kunngerð nr. 122 frá 21.07.1992 um festi § 2, har sagt verður:

„Minstamarkið av jarðarbrúkskunnleika er lokið, tá umsøkjari til festi lýkur hesar treytir:

1) hevur arbeitt í minsta lagi 2 ár á tveimum ymsum gørðum, harav 1 ár skal vera á øðrum garði enn fedranna garði, og 1 ár við røkt av bø og kríatúrum í fjósi og haga og haraftrat

2) skal hava verið minst eitt 1/2 ára skeið á landbúnaðarskúla ella tílíkum skúla, sum Jarðarráðið hevur góðkent.

Stk. 2. Jarðarráðið kann veita undantak frá stk. 1. í hesum førum:

a) tá ið tað orsakað av persónligum orsøkum fær serliga tyngjandi avleiðingar fyri umsøkjaran at fara undir at uppfylla nevndu útbúgvingarkrøv, t.d. tí at umsøkjarin er komin til árs og hevur familju og hús at halda uppi,

b) tá ið tað snýr seg um smá festi í útjaðaraøkjum, sum tað í grundregluni ikki verður mett rætt at leggja saman við øðrum festi.“

Eru so fleiri umsøkjarar sum uppfylla hesi settu krøvini, so eru nakrir umsøkjarar – hóast teir kanska ikki hava bestu kvalifikatiónirnar av teimum sum søkja – sum hava ein frammíhjárætt fram um hinar. Hetta er í hesi røð hesir næstingar hjá seinasta festara:

1. Eftirsitandi hjúnafelagi,
2. elsta barn ella eftirkomari tess,
3. yngri barn ella eftirkomari tess.

Eftir lógarinnar § 10, stk. 4, missir tann, sum hevur framíhjárætt, henda rætt, um hann longu frammanundan situr við festi, sum er hóskandi brúkseind. Jarðarráðið hevur eftir § 10, stk. 5, heimild at síggja burtur frá framíhjárætti í teim førum, talan er um hóskandi brúkseind, um so er, at tann, sum ger henda rætt galdandi, ikki fyri ráðnum førir prógv fyri, at hann sum høvuðsvinnu ætlar at fáast við jarðarbrúk.

Lógin nevnir einki um, at festiskifti skulu tinglýsast, men tey verða tað øll eftir grundregluni í løgtingslóg nr. 55 frá 16.08.1962 um tinglýsing § 1.

Festarin hevur eftir § 12 ávísar skyldur. Hann skal hava bústað sín, har festið er, tó at jarðarráðið við landsstýrisins góðkenning kann veita undantak frá hesi reglu. Festið skal røkjast sum eitt væl umsitið jarðarbrúk, uttan at hetta verður nærri útgreinað, hvussu hetta skal skiljast. Eftir skráseting av hvørjum festi verður framleiðsluskyldan hjá hvørjum festi sær ásett. Eftir lógini skal landsstýrið í kunngerð áseta nærri reglur um framleiðsluskylduna og tey tiltøk, ið neyðug eru, fyri at bøndur kunnu lúka hesa skyldu. Hvørki skráseting ella neyvari reglur um framleiðsluskylduna eru ásettar. Í kunngerð nr. 122 frá 21.07.1992 um festi er í § 3 ásett, at:

> „Festari hevur skyldu at framleiða av festinum mest møguligt, sæð í mun til marknaðarviðurskiftini, og hvat annars má haldast at verða fíggjarliga ráðiligt.
> Stk. 2. Um so er, at Jarðarráðið metir, at á ávísum festi er framleiðslan eyðsýnd ov lítil sbrt. stk. 1, skal tað taka upp samráðingar við festara við tí í hyggju at fáa framleiðsluna á festinum upp.
> Stk. 3. Kemur tað fyri, at Jarðarráðið ferð eftir ferð hevur havt samráðingar við festara sambært stk. 2 uttan úrslit, kann Jarðarráðið, um allir ráðslimir eru einmælt samdir um hetta, áleggja ávísa minsta framleiðslu av festinum, men tá bert fyri eitt ár í senn.“

Henda regla má kallast tað, sum danir nevna ein „fanfarebestemmelse“, t.v.s lýsir meiri eitt endamál enn at verða ein regla við rættarligum innihaldi.

Festarin hevur skyldu at rinda leigu fyri festið eftir § 9 í lógini. Í § 9, stk. 2, verður ásett, at landsstýrið skipar í kunngerð fyri, hvussu leigan verður ásett. Landsstýrið hevur í kunngerð nr. 122 frá 21.07.1992 um festi § 1 ásett, at fyri hvørt festi sær verður leiga goldin sum higartil, til annað er ásett av landsstýrinum. Leigugjaldið er til skjals á jarðarráðnum. Leigan fellur til gjaldingar hvønn 1. desember fyri tað farandi álmanakkaárið. Jarðarráðið upplýsir, at tann festari í landinum, sum í dag rindar mest, rindar kr. 600,00 fyri festið árliga. Tann, sum rindar minst, rindar kr. 4,52.

Rættindini hjá festaranum eru lýst í § 12, stk. 5, í lógini. Har verður sagt:

> „Festarin hevur rætt til at nýta festið við lunnindum, ið hoyra tí til á ein slíkan hátt, sum samsvarar 1. stk. (eitt væl umsitið jarðarbrúk). Hann hevur veiðurættindi av festinum, rætt til at fiska í áum og vøtnum. Hann hevur torvskurðar- og kolanámsrætt til egna nýtslu. Meðan hann situr við festinum, hevur hann

> rætt til at leiga øðrum stykkið at velta í til húsbrúk, veiðurættindi, herundir fuglabjørg og urðar, og fiskirættindi, tó í mesta lagi fyri 5 ár í senn. Hann hevur eisini rætt til at selja grót, eyr, sand og tara o.t. við loyvi jarðarráðsins. Ráðið ásetir eisini sølutreytirnar.“

Hetta er grein, sum bert setir upp ytru karmarnar fyri rættindum festarans. Teir nágreiniligu smálutirnir í rættindum festarans eru at finna í siðvenjurætti, sum ikki nýtast at vera eins um alt landið. Hesar siðvenjureglur eru ofta torgreiddar og krevja stórt kanningararbeiði at lýsa, og verða tí ikki lýstar her. Tær hava ofta røtur sínar so langt aftur í tíðina, sum eingin veit longur at siga frá.

Eftir lógarinnar § 8, stk. 2, stendur festið við, so leingi festarin er á lívi, tó bert til hann hevur fylt 70 ár. Í ávísum førum kann í festibrævinum verða tilskilað ávíst áramál, festið skal vara. Sbr. viðmerkingunum hjá landsstýrinum, tá ið uppskotið var framlagt[9], so verður sagt:

„Áramálsfesti eigur bert at fara fram, tá ið:

1) møguleikar eru fyri samanlegging, sundurbýti ella umlegging av festum innan fyri nøkur fá ár,
2) roknast kann við, at jørðin um stutta tíð skal nýtast til annað alment endamál,
3) tá útbúgvin festari (m.a. barn) væntast at verða tøkur um stutta tíð.“

Tey óvanligu førini, har festið heldur uppat eru reglubundin í § 11, stk. 4, har ásett er, at verða treytirnar fyri bústaði, framleiðsluskyldu, festileigu og innstøðu ikki hildnar, ella kríatúr ella bygningar verða misrøkt, ella festarin ikki heldur sínar lániskyldur til jarðargrunnin, skal jarðarráðið taka støðu festarans til viðgerðar og áleggja honum at fáa viðurskiftini í rættlag. Verður áheitanin ikki fylgd, hevur jarðarráðið rætt til at siga festið upp, uttan tó at lógin nevnir, hvør uppsagnarfrestin er. – Helst er frestin í slíkum førum so stutt, at festarin skal av festinum so skjótt, sum hetta yvirhøvur letur seg gera í praksis.

Onki verður sagt í lógini um, hvør mannagongdin er, tá ið festari skal leggja frá sær. Av tí at festarin er tinglýstur, so má hann leggja frá sær skrivliga, og hetta verður so skrásett á tinglýsingini. Í teim førum, har jarðarráðið sigur upp vegna mishald, og tann uppsagdi festarin ikki vil góðtaka hetta, er spurningurin, um ráðið kann fara beinleiðis í fútarættin at fáa hann settan út, ella um neyðugt er fyrst at stevna honum við hesum kravi við sorinskrivaraembætið. Svarast má uppá hendan spurning, at eftir grundregluni í norsku lóg 6-14-6 og § 609 í rættargangslógini kann uppsagdur festari koyrast av fest-

[9] Løgtingstíðindi 1983 A bls. 598.

inum við beinvegis fútamáli, tá ið hann er uppsagdur. Tó er hugsandi, at tað meiri enn so fer at koma fyri, at fútarætturin fer at burturvísa málinum eftir rættargangslógini § 501, og krevja dómsgrundarlag í málinum í teim førum, tá ið neyðugt verður við gjøllari próvførslu fyri at vísa á, at uppsøgnin er lóglig ella ikki.

Í § 13 í lógini verður sagt:

> „Fráfarandi festari hevur rætt til endurgjald frá nýggja festaranum eftir meting fyri egnar íløgur, sum gjørdar eru á festinum, um so er, at íløgan verður mett at geva festinum eitt varandi virði. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um, hvussu endurgjaldið verður ásett.
> Stk. 2. Við festiskifti letur jarðarráðið brúkið kanna og meta, og tekur støðu til, um grundarlag er fyri endurgjaldskravi móti seinasta festara“

Samsvarandi hesum hevur landsstýrið í kunngerð nr. 122 frá 21.07.1992 um festi ásett í § 4 til § 7:

> „§ 4. Fráfarandi festari hevur rætt til endurgjald frá komandi festara fyri egnar varandi íløgur, sum gjørdar eru á fastar ognir sum hoyra festinum til, eitt nú á sethús, hjallar, fjós, maskinhús, neyst, seyðahús, í girðing, vegir og á sjálva landbúnaðarjørðina.

§ 5. Krav um endurgjald frá komandi festara skal skrivliga sundurgreitt verða latið Jarðarráðnum og komandi festara, um hann er kendur, innan eitt ár eftir, at fráfarandi festarin hevur lagt frá sær.

§ 6. Íløgur framdar við peningi, fingin til vega á henda hátt, verða ikki roknaðar sum egin íløga:

a) lán úr jarðargrunninum,
b) íløgur sum goldnar eru av festikonto,
c) studningur, sum er latin av tí almenna.

Stk. 2. Egið arbeiði, sum ikki er inntøkuført á ársroknskapi festarans, verður ikki roknað sum eginíløga.

§ 7. Um so er, at semja ikki fæst ímillum fráfarandi og komandi festaran um endurgjaldsupphæddina, verður hon ásett av metingarfólki, tilnevndum av sorinskrivaranum.
Stk. 2. Tá ið endurgjaldsupphæddin verður ásett, skal metingarfólkið meta, um íløgan er eginíløga, og leggjast skal dentur á, hvussu stórt virði í peningi samlaða eginíløgan hevur fyri festið í dag“

Sokallaða haldið, har nýggi festarin skuldi gjalda fráfarandi festara ávísa part av úrtøku garðsins, er við lógini um landsjørð avtikið.

Landbúnaðarnevndin, sum hevði lógaruppskotið um landsjørð til viðgerðar sigur í álitinum[10]:

> „Sum reglurnar um endurgjald til fráfarandi festarar eru orðaðar í § 13, stk. 1, í uppskotinum, fær fráfarandi festarin bert endurgjald fyri egnar íløgur, sum góðkendar eru av jarðarráðnum frammanundan. Nevndin skjýtur upp at broyta orðingina soleiðis, at endurgjald kann veitast eftir meting fyri íløgur, sum hava givið festinum eitt varandi virði.“

Tí verður í lógini einki nevnt um, at íløgurnar skulu verða góðkendar av jarðarráðnum frammanundan. Sostatt kann, tá ið virðismetingin skal gerast upp, ikki leggjast dentur á slíka góðkenning.

### *d. Leigutraðir*

Í § 14, stk. 1, í lógini verður sagt:

> „Jarðarráðið hevur burtur av landsjørð rætt til at leiga út traðir og traðarstykkir, stykkir til urtagarðsbrúk, grundstykkir til húsabygging, vinnu-, ítróttar- og frítíðarmál og almenn endamál v.m. fyri eitt ávíst tíðarskeið.“

Orðingin var ikki hin sama í upprunaligu lógini frá 1988, men er sett inn við løgtingslóg nr. 58 frá 26.03.1993. Sbrt. viðmerkingum landsstýrisins til hesa broytingarlóg[11] so vísti landsstýrið á, sum lógin tá var orðað, og sbr. yvirlandbúnaðarstevnuavgerð 26. mars 1992, at lógin ikki gav heimild til at leiga lendi til handilsendamál, havbúnaðarendamál, frítíðar- og ítróttarendamál, goymsluøkir hjá telefonverkinum og sendistøðir, havna- og keiøkir, ruskpláss, tyrlupallar, og at hetta ikki fór at bera til í verki. Tí var lógin víðkað til hesi øki.

Eftir § 14, stk. 2 og 3, skal, áðrenn leigusáttmáli verður gjørdur, festarin ella leigarin av trøð verða eftirspurdur, um hansara hugsan um leigumálið. Ráðið skal serliga ætla um, hvørt leigan av lendinum skaðar festið. Ráðið skal ansa eftir, at jørð ikki verður innløgd av haganum, so leingi innløgd jørð er, ið ikki verður nýtt, sum hon eigur at vera.

Um skyldur leigarans er lógin fáorðað. Sagt verður bert í § 14, stk. 4, í lógini, at tá ið lendið verður leiga út, so skal jarðarráðið seta treytir, sum fremja endamálið við lógini, sum sbr. § 1 er, at tað fyri-

[10] Løgtingstíðindi 1987 A bls. 577

[11] Landsstýrisins j. nr. 1700-2/90.

sitingarliga skulu skapast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini. Rættindi leigarans mugu avgerast út frá einari ítøkiligari tulking av tí leigusáttmálanum, sum nú einaferð er galdandi fyri lendið.

Mótvegis festireglunum er eingin avmarkaður frammíhjárættur til at taka við leigutrøð hjá næstingum, tá leigarin og einkja hansara er fallin frá. Børn teirra hava ongan slíkan rætt. Nakað annað er so, at jarðarráðið ofta leigar einum av børnunum leigutrøð, tá ið tey gomlu fella frá.

Nær leigusáttmálin heldur uppat, er fyrst og fremst ein tulkingarspurningur av sáttmálanum, men í § 14, stk. 5, í lógini er ásett, at:

„Leigusáttmáli sambært stk. 1 fellur burtur ella kann sigast upp, tá ið
1. leigari doyr og eftirsitandi hjúnafelagi ikki er,
2. felag stendur sum leigari, og felagið verður avtikið ella verður óvirkið,
3. leigarin ikki fylgir teim treytum, sum ásettar eru í sáttmálanum ella lóggávuni annars.“

### *e. Søla av landsjørð*

Eftir § 16 stk. 1 í lógini hevur

> „Jarðarráðið rætt til burtur av landsjørð at selja jørð til almenn endamál, handils- og ídnaðarendamál, grundstykkir til húsabygging, handils-, ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál v.m.“

Henda grein er sett inn í lógina við løgtingslóg nr. 58 frá 26.03.1993, og eru grundirnar tær somu sum fyri at broyta reglurnar um, hvat lendið kann leigast út til.

Av greinini kunnu vit taka týðulig øvugdømi (modsætningsslutning). Heimild er ikki at selja almenna jørð til traðir. Í viðmerkingunum til greinina verður eisini sagt, at eingin møguleiki er at keypa almenna jørð til traðarbrúk.[12] Enn minni gevur greinin jarðarráðnum heimild at selja festi (innan- við tilhoyrandi uttangarðsrættindum) til privatar.

Á sama hátt sum við leigumálum eiga at verða tikin somu áhugamál mótvegis festaranum, sum um talan var um leigu.

### *f. Fyrisitingin av almennu jørðini*

Jarðarráðið tekur á fyrsta stigi avgerðir í lógini um landsjørð eitt nú støðu til, um festi skal uppihaldast sum sjálvstøðugt festi, hvør skal

[12] Løgtingstíðindi 1985 A bls. 404.

taka við leysum festi, sundurbýti av festum, málum um leigu av lendum, og sølu av landsjørð.

Sbrt. upprunaligu orðingini av lógini um landsjørð í 1988 § 3 skuldu sita 3 limir valdir av løgtinginum í ráðnum, av hvørjum landsstýrið valdi formannin. Við løgtingslóg nr. 65 frá 12.06.1990, sum er tekniskt rættað við løgtingslóg nr. 49 frá 08.05.1991, var hetta broytt til, at í jarðarráðnum skulu sita 5 limir, harav løgtingið velur fýra, meðan landsstýrið velur 5. limin, sum skal verða formaður. Av løgtingsmálinum skilst, at broytingin varð gjørd fyri at fáa eina politiska kabalu av nevndarsessum sum heild at ganga upp.[13] – Hetta er nú eisini farið úr gildi.

Sum reglurnar nú eru í lógarinnar § 3, sbr. løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995 eru nú 5 limir valdir av landsstýrinum í jarðarráðnum. Ráðið velur sínámillum sín formann. – Broytingin er gjørd sum ein avleiðing av nýggju stýrisskipanarlógini.

Avgerðir, har festi skal niðurleggjast og leggjast saman við øðrum, ella avgerð um at lata festi til ávísan festara, kann av umsøkjara í málinum skjótast inn fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti av hesi avgerð til yvirlandbúnðarstevnu sbr. lógarinnar § 10, stk. 6. Tað er eftir orðing lógarinnar bert umsøkjari, sum hevur rættin. T.v.s. gamli festarin kann ikki skjóta avgerðina fyri landbúnaðarstevnu. Eftir § 14, stk. 2, kann festari ella traðarmaður, sum er ónøgdur við avgerð hjá jarðarráðnum um at leiga út lendi, skjóta hesa avgerð inn fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu. Onki verður nevnt um, at umsøkjari til lendi hevur sama rætt. Formliga skuldi tí kærumál um hetta verið sent landsstýrinum eftir vanliga kærurættinum sbr. § 7, stk. 2, men har verður nevnt eitt undantak um kærurætt til landsstýrið um leigu av traðum. Í praksis eru mál, har umsøkjari fær noktað at leiga lendi frá jarðarráðnum, skotin inn fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu og viðgjørd har.[14]

Avgerðir, sum jarðarráðið annars tekur sbrt. lógini um landsjørð, kunnu skjótast inn fyri landsstýrið sbr. § 7 har sagt verður:

> „Har, sum annað ikki er ásett, kunnu avgerðir Jarðarráðsins leggjast fyri landsstýrið, tó ikki um festiskifti og leigu av traðum. Slík kærumál skulu verða framkomin til landsstýrið í seinasta lagi vikudagin 6 vikur aftaná, at avgerð ráðsins er kunngjørd viðkomandi, ella er send honum á posthúsi, og seinni komin fram til móttakaran“

[13] Løgtingsmál nr. 80/1989.

[14] Dømi um hetta er jarðarráðsins 201-93-00-02 viðvíkjandi trøð í Leirvík.

Eftir lógarinnar § 7, stk. 3, skal jarðarráðið skila til, hvønn myndugleika ein avgerð hjá teimum kann kærast til.

Annars er fyri alt virksemi jarðarráðsins galdandi reglurnar í løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993 um fyrisitingarlóg.

Neyvari reglur um viðgerðina í landbúnaðarstevnu og yvirlandbúnaðarstevnu eru ásettar í lóg nr. 84 af 31.03.1926 for Færøerne om Landvæsenskommisioner sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995, og verður henda viðgerð nærri umrødd á bls. 123ff.

Her skal bert verða nevnt, at landbúnaðarstevna fer ikki undir viðgerð, fyrr enn kærarin hevur sett trygd fyri kostnaðin av viðgerðini (undantikið málskostnaða partanna) kr. 8.000,00, og yvirlandbúnaðarstevnan fer ikki undir viðgerðina fyrr enn deponeraðar eru kr. 20.000,00.

## 2. Reguleringar eftir lóg nr. 174 af 24.05.1937 for Færøerne om Jordbrugets Fremme, sum enn hava gildi fyri festarar, sum hava tikið við undir hesi lóg.

Lógin um landsjørð er heldur ullint orðað, tá ið tað snýr seg um skiftisreglur frá reglunum í lógini um „jordbrugets fremme“ til reglurnar í lógini um landsjørð. Lógin um landsjørð sigur í § 18, stk. 2, bert, at tá ið lógin um landsjørð hevur fingið gildi, fer úr gildi § 1 til og við § 7 og § 10 til og við § 27 í lógini um „jordbrugets fremme“. Tað, sum eftir er tá, eru § 8 og § 9 um virksemi jarðargrunsins, § 28 – 39 um keyp og sølu av jørð undir ávísum umstøðum, § 40 – 56 um treytirnar fyri at veita lán úr jarðargrunninum.

Sum lógin er orðað, so stendur onki um, at reglurnar í lógini um „jordbrugets fremme“ framvegis skulu hava gildi fyri festarar, leigarar v.m., sum hava tikið við undir hesi lóg, og skulu teir tí eisini fylgja reglunum í lógini um landsjørð. Tað kann tó ikki roknast við, at lóggávuvaldið í Føroyum hevur ætlað at taka frá festara ella leigara nøkur grundlógartryggjaði rættindi, og roknast má við, at gomlu reglurnar framvegis eru galdandi, uttan so, at ein má tulka nýggju lóggávuna sum eina ognartøku sbr. grundlógarinnar § 73 av vunnum rættindum sbr. lógini um „jordbrugets fremme“.

## 3. Festikontoskipanin

Á jarðargrunninum er stovnsett konto fyri hvørt festi sær, soleiðis at peningur, sum kemur inn á hesa konto, verður bókaður og er tøkur hjá festaranum undir rættiliga strangum treytum.

Lógin er merkiliga tigandi um henda partin av virksemi jarðarráðsins. Orðið festikonto fyrikemur ikki í lógini um landsjørð. Í viðmerkingum til lógarinnar § 12, stk. 5,[15] um rættindi festarans verður sagt, at har talan er um umfatandi sølur, sum t.d grót frá broti ella grevstur eftir sandi, er tað jarðarráðið, sum stendur fyri søluni, móti at innkomni peningurin verður settur á avvarðandi festikonto við vanligum treytum.

Í lóggávuni um jarðargrunnin, nevniliga tí, sum eftir er galdandi í lóg nr. 174 af 24.05.1937 for Færøerne om Jordbrugets Fremme, verður í § 9 sagt:

> „Jordfonden administreres af Landbrugsraadet efter nærmere af Landsstyret fastsatte Regler (jfr. § 6), hvori bl.a. optages Bestemmelser om Oprettelse af en Konto for hver Fæstegaard"

Seinasta liðið var ikki í greinini, tá ið uppskotið var lagt fyri ríkisdagin, men kom inn eftir uppskoti frá teirri tingnevnd, sum viðgjørdi uppskotið, har Andrass Samuelsen var formaður.[16] Eingin viðmerking er um, hví hetta lið er sett inn.

Í bekendtgørelse nr. 120 af 22.03.1938: Reglement for Landbrugsraadet, nedsat i Henhold til Lov for Færøerne nr. 174 af 24.05.1937 om Jordbrugets Fremme, sum enn er galdandi fyri jarðargrunnin sum peningastovn innan landbúnaðin, verður sagt í § 15:

> „For hver fæstegaard og andet jordbrug føres en konto over de beløb, der indgår i jordfonden for salg, leje, renter, afdrag m.v. fra vedkommende ejendom samt for fæstegårdes vedkommende over de ydelser, der tilflyder disse fra jordfonden"

Í praksis verður innkomin peningur fyri sølu av jørð, og fyri ávísar størri leigusáttmálar – grótbrot, smoltstøðir o.t – bókaður á festikonto hjá tí einstaka. Leigugjald fyri festini og vanligar traðir verður ikki bókað á festikonto, men fer beinleiðis í grunnin.

Grundhugsanin við festikontoskipanini er, at tey tiltøk, sum peningur verður latin fyri, hava tær fylgjur, at festið fær eitt minni virði, og at hetta má uppvigast við peningi, so grundarlagið undir festinum (um ikki annað fíggjarliga) verður hitt sama.

Útgjaldsreglurnar av festikonto eru ásettar í kunngerð nr. 164 frá 26.08.1993 um reglur fyri jarðarráðið. Í § 5 í hesi reglugerð er ásett:

> „Peningur fyri sølu av jørð v.m. verður goldin í jarðargrunnin og har bókaður á konto fyri hvørt festi sær.

15 Løgtingstíðindi 1985 A bls. 404

16 Rigsdagstidende 1936/37 spalta 1655.

> Stk. 2. Jarðarráðið kann veita fíggjarligan stuðul til íløgur á festinum við peningi av festikonto.
> Stk. 3. Umsóknir um fíggjarligan stuðul av festikonto verða viðgjørdar av ráðnum eftir somu reglum sum umsóknir um lán“

Orðini „til íløgur á festinum“ merkja, at peningur á festikonto bert kann nýtast til íløgur í fastognirnar í festinum t.e. eitt nú í sethús, hjallar, fjós, maskinhús, neyst, seyðahús, girðing, vegir og til velting v.m. Harafturímóti kann peningur á festikonto ikki nýtast til rakstur, eitt nú lønir, leysarakstrarlutir so sum traktorar v.m.

Festikontoirnar eru 321 í tali, og upphæddin, sum stendur á einstøku kontounum, er frá nærum ongum peningi til 6,5 mió kr.

Eitt slag av festikonto fyri ognarmenn er nevnt í lóggávuni. Í § 37 a í hagalógini um avloysing fyri vetrarbit er nevnt, at

> „senest 4 uger efter at erstatningssagen er endelig afgjort, skal erstatningsbeløbet af vedkommende ejer af det pågældende indmarksareal indbetales til Færøernes jordfond, hvorfra beløbet udbetales vedkommende haugeejer eller fæster, i fælleshauge haugestyret, når det for Færøernes landbrugsråd på fyldestgørende måde er godtgjort, at der i pågældende hauge er udført hensigtsmæssige og tidssvarende foranstaltninger til modernisering af haugens fårebrug“

Slíkar konti eru tó ongantíð stovnsettar á jarðaráðnum.

# C. Fíggjarviðurskifti landbúnaðarins

## 1. Jarðargrunnurin

### *a. Grundarlagið undir grunninum*

Í lóg nr. 174 af 24.05.1937 for Færøerne om Jordbrugets Fremme § 8, stk. 1 – 4, verður sagt:

> „Der oprettes en selvejende Jordfond for Færøerne til Fremme af Jordbrug, Havebrug m.v.
> Til fornævnte Jordfond yder den i henhold til Lov nr. 563 af 04. oktober 1919[17] oprettede Jordfond i 10 Aar et beløb af 100.000 kr. aarlig og Lagtinget i samme Tidsrum et Beløb af 10.000 kr. aarlig.

[17] Almenna heitið á lógini er lov nr. 563 af 04.10.1919 om lens, stamhuses og fideikommisgodsers overgang til fri ejendom. Sorinskrivarin hevur skrásett, at lógin er lýst at galda fyri Føroyar 19.11.1919.

> Som Grundfond overdrages til Jordfonden de til Stats-Laanefonden udstedte Obligationer for Laan til oprettelse af mindre Jordbrug paa Færøerne og Kapitalværdien af de i Lov nr. 63 af 12. april 1892 omhandlede Grundforbedringsgodtgørelser.
> Endvidere indgaar i Jordfonden al Indtægt af det i § 10 omhandlede Jordegods og alle Beløb for salg af saadant Gods.“

Frá byrjan komu sostatt í grunnin peningur úr danska grunninum frá 1919 – kr. 100.000 á hvørjum ári frá 1938/39 til og við 1947/48. Úr løgtingsins kassa komu í sama tíðarskeiði á hvørjum ári kr. 10.000,00. Peningaágóði hjá donskum stovnum í Føroyum sbr. § 8, stk. 3, sum fluttur varð í Jarðargrunnin, var í 1938/39 kr. 204.679,97. Sí yvirlitið á skjali 7.

Seinni eru so komnir afturat í grunnin studningar úr landskassanum, rentur av útlánum, leigupeningur fyri festi og traðir. Peningur fyri størri leigumál og søla av jørð hevur tó ikki verið at rokna sum inntøka fyri grunnin, tí at hesin peningur hevur verið bókaður á festikonto, og tí bert hevur verið ein gjaldførisligur ágóði hjá Jarðargrunninum.

Studningur úr landskassanum er fyri sovítt fallin í ymsum formum. Studningur uttan nakra viðmerking, t.d. sum sæst sbr. tí á skjali 7 nevnda yvirliti útgoldin í 1950/1951 við kr. 60.000,00.[18] Studningur hevur eisini verið veittur sum kompensatión fyri okkurt – t.d. í 1962/63 veitir landskassin á løgtingsfíggjarlógini kr. 10.000,00 í studningi til Jarðargrunnin við teirri viðmerking at:

> „Landskassin veitir á hvørjum ári rentustudning til tey útlán, Jarðargrunnurin letur av lánum eftir løgtingslóg nr. 23, 25. apríl 1960 so mikið, at hesi útlán ikki bera hægri rentu enn 3 % p.a.“[19]

Ella á somu fíggjarlóg verða veittar jarðarráðnum kr. 200.000 á somu lóg við teirri viðmerking at:

> „Við tí endamáli at bøta um líkindini til peningaílegging í landbúnaðinum verður í 10 fylgjandi ár á fíggjarlógini veittur studningur kr. 200.000 um árið. Føroya Jarðarráð umsitur studningin eftir teimum reglum, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri virki grunsins“.[20]

Av viðmerkingunum hjá teirri nevnd, sum skeyt upp at stovnseta Jarðargrunnin, framgongur, at:

18 Fíggjarløgtingslóg nr. 40 frá 28.03.1950 fyri fíggjarárið 1. apríl 1950 til 31. mars 1951 sigur tó í § 13 1. at jarðargrunninum eru játtaðar kr. 50.000.

19 Fíggjarløgtingslóg nr. 11 frá 27. mars 1963; viðmerking til 22.7.6.

20 Fíggjarløgtingslóg nr. 11 frá 27. mars 1963; viðmerking til 22.7.7.

> „adgangen til lån og tilskud, i stedet for at blive tilsagt ved årlige bevillinger, bør sikres ved oprettelsen af en fond, som ved passende tilgang af midler indenfor et bestemt afgrænset åremål kan komme til at hvile i sig selv.“[21]

og, at ætlanin tí upprunaliga ikki var, at Jarðargrunnurin skuldi fáa studning yvir fíggjarlógina.

Umframt omanfyri umrøddu inntøkur hevur so grunnurin fingið rentuinntøkur av teim útlánum, hann hevur veitt.

Inntøkur grunsins ígjøgnum árini er nærri útgreinaðar á yvirlitinum á skjali 7 og skjali 8.

Sbr. avtaluni millum landsstýrið og ríkismyndugleikarnar um yvirtøku av kongsjørðini, sí kunngerð nr. 37 frá 26.10.1956 um yvirtøku av Jarðargrunninum og kongsjørðini, so kann Jarðargrunnurin ikki niðurleggjast uttan í semju millum landsstýrið og ríkisstýrið.

### *b. Fyrisiting grunsins*

Sbr. lógini um „jordbrugets fremme“ er í § 9 ásett, at

> „Jordfonden administreres af landbrugsraadet efter nærmere af Landsstyret fastsatte Regler (jfr. § 6), hvori bl. a. optages Bestemmelser om Oprettelse af en Konto for hver Fæstegaard.“

Tær neyvaru reglurnar, sum verða umrøddar í § 9, vórðu settar út við bekendtgørelse nr. 120 af 22.03.1938: Reglement for Landbrugsraadet, nedsat i Henhold til Lov for Færøerne nr. 174 af 24.05.1937 om Jordbrugets Fremme. Upprunaliga var henda reglugerð galdandi bæði fyri jarðarráðsins virki sum fyrisitari av almennu jørðini í Føroyum og fyri virki ráðsins sum peningastovnur til frama fyri landbúnaðin. Reglurnar í hesi reglugerð um jarðarráðsins virki sum fyrisitari av almennu jørðini eru farnar úr gildi, eftir at nýggjar reglur á hesum øki eru komnar við kunngerð nr. 164 frá 26.08.1993 um reglur fyri jarðarráðið. Fyri virki ráðsins sum peningastovnur til frama fyri landbúnaðin er reglugerðin frá 1938 § 10 til og við § 36 formliga framvegis galdandi. Reglugerðin er tó brýnd ógvuliga nógv til, síðan hon fekk gildi; partvíst av lógarbroytingum, har reglugerðin ikki er broytt samsvarandi hesum, og at tað í roynd og veru bara er givist við at fylgja teim reglum, har standa, og at reglurnar tí eru burturfalnar eftir løgfrøðiligu desvetuto grundregluni.

Fyri virki jarðarráðsins sum peningastovnur innan landbúnaðin er, umframt lógina um landbúnaðarins frama, eisini galdandi løgtingslóg

[21] Betænkning afgivet af det af landbrugsministeriet under 15. juli 1930 nedsatte udvalg angående en særlig lovgivning, sigtende til fremme af opdyrkningen på Færøernme, Kbh. 1932 bls. 27.

nr. 132 frá 10.06.1993 um fyrisiting. Hetta framgongur av lógarinnar § 1.[22] Somuleiðis er galdandi løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993 um innlit í fyrisitingina.[23]

Øll samlaðu lán jarðarráðsins mugu eftir § 41 í lógini frá 1937 ikki fara upp um kr. 70.000 uttan samtykki frá landsstýrinum[24]. Landsstýrisins samtykki hevur seinastu mongu árini verið givið við einum ósøgdum samtykki, soleiðis at eingin hædd hevur verið sett á lánivirksemi Jarðargrunsins, og hetta hevur verið óbeinleiðis góðkent fyri hvørt árið sær við roknskapunum, sum eru góðkendir av landsstýri og løgtingi. Sbrt. § 52 í lógini frá 1937 er somuleiðis formligt loft fyri, hvussu nógvan studning Jarðargrunnurin tilsamans kann veita í einum ári, uttan so er, at landsstýrið veitir sítt samtykki. Hetta loft er nú á sama hátt sum lániloftið avtikið við ósøgdum samtykki landsstýrisins.

Lógin um landbúnaðarins frama nevnir einki um, at nakar kærumøguleiki er fyri avgerðum jarðarráðsins sum peningastovni innan landbúnaðin. Serliga er í hesum sambandi at viðmerkja, at generella reglan í § 7, stk. 2, í løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995 um, at avgerðir jarðarráðsins kunnu skjótast inn fyri landsstýrið, ikki kann nýtast í hesum føri, tí at henda lóg hevur sína týðuligu avmarking, at hon bert fevnir um virki jarðarráðsins sum fyrisitari av almennu jørðini í Føroyum.

Tí má lógin um frama landbúnaðarins ítøkiliga samanberast við vanligar fyrisitingarligar grundreglur fyri, at støða kann takast til, um nakar kærustovnur er fyri avgerðum jarðaráðsins sum peningastovni mótvegis landbúnaðinum.

Í teoriini verður sagt:

> „I dansk forvaltningsret antages det, at der i almindelighed er adgang til at påklage forvaltningsakter for højere Forvaltningsmyndighed, i sidste instans en minister"[25]

Víðari verður sagt:

> „Det er kun en hovedregel, at forvaltningsakter kan påklages for højere forvaltningsmyndigheder, i sidste instans for vedkom-

[22] Lógargreinin er avskrift av tilsvarandi donsku lógini lóg nr. 571 af 19.12.1985 har tað í kommentari í Karnovs lovsamling 1992 bls. 184 til hesa grein verður sagt at „inden for loven falder ... selvejende institutioner m.v der er oprettet ved lov".

[23] Karnov 1992 bl.s 194.

[24] Lógin nýtir orðini samtykki frá ministeren for landbrug og fiskeri, men hetta verður í roynd og veru síðan málsøkið er komið á føroyskar hendur tulkað til at verða landsstýrið. Sí um hetta lógbókin bd. 1 bls. 13.

[25] Poul Andersen, Dansk Forvaltningsret, almindelige emner, København 1969, bls. 522.

> mende minister. Undertiden er der ingen klageret, undertiden afviger instansfølgen fra den sædvanlige.“[26]

Aðrastaðni verður sagt:

> „I øvrigt kan opstilles den hovedregel, at nævnsafgørelser ikke kan påklages til ministeren eller en ham underordnet myndighed, med mindre dette er hjemlet.“[27]

Jarðarráðið má sigast at verða eitt sokallað „nævn“ – ella heldur óprecist umsett ein nevnd – tí at tað hevur verið valt av ymsum áhugabólkum privatum og almennum í felag; tó nú av landsstýrinum, alt sum tað er.

Tí er helst rættasta niðurstøðan, at jarðarráðsins avgerðir sum peningastovnur innan landbúnaðin ikki kunnu kærast til hægri myndugleika.

## *c. Lán úr Jarðargrunninum sbr. lóg nr. 174 af 24.05.1937*

Lán úr Jarðargrunninum sbr. lóg nr. 174 af 24.05.1937 for Færøerne om Jordbrugets Fremme, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988.

Í princippinum er óavmarkað hvørjir persónar, feløg v.m. kunnu læna úr Jarðargrunninum, men sjálvsagt skal endamálið, sum peningurin skal nýtast til, framganga av § 40 í lógini. Sostatt kunnu ognarmenn, traðarmenn og festarar fáa lán úr grunninum. Ein týdningarmikil avmarking er tó í skaranum, sum kann læna, nevniliga eftir § 42 skal umsøkjarin „ikke selv ved egne midler være i stand til at gennemføre det påtænkte“.

Lógin sigur í § 40, hvørji endamál lán kann veitast til, nevniliga:

Pkt. 1. *Oprettelse af mindre jordbrug*. Henda lániheimild er sjáldan nýtt í dag. Ikki verður vanliga veitt lán til keyp av jørð. Fígging til keyp av jørð verður bert veitt undantaksvís, tá brúkarin hevur tørv á meiri jørð, og henda er keypt bíliga. Serliga verður her hugsað um útoyggjar.

Pkt. 2. *Jordforbedring og opdyrkning af rå jord*. Hetta punkt var í roynd og veru høvuðsendamálið við lógini, nevniliga at stimbra at nógv varð velt upp úr nýggjum, sbr. eisini heitið á álitinum, sum lá til

[26] Sí notu 25 bls. 523.

[27] Bent Christensen, Nævn og råd, København 1958 bls. 214.

grund fyri lógina[28], sum var „betænkning ... angående en særlig lovgivning sigtende til fremme af opdyrkningen på Færøerne“.

Uppdyrkingarlán verða veitt sum rakstrarlán yvir 5 ár við 3% rentu p.a.. Tá veltingin er liðug, verður studningurin góðskrivaður láninum. Restlánið heldur fram, møguliga umskipað í langfreistaða fígging.

Pkt. 3. *Opførelse af nye bygninger m.v. på jord i offentlige eje*. Hetta er lán til festarar og traðarmenn (leigutraðir), og verður veitt til t.d. fjós, seyðahús, hjallar, úthús. Sethús verður sjáldan veitt lán til longur, tí aloftast so ynskir festarin at byggja sær egin hús á egnum grundstykki, sum hann keypir og fíggjar, soleiðis sum sethús í Føroyum annars verða fíggjað. Lán verður tó veitt sbr. hesi grein til sethús, sum hoyra til festið, tá sethús verða bygd í landbúnaðarøki, har grundstykkir ikki skulu býtast frá.

Pkt. 4. *Opførelse af avlsbygninger, møddinger m.v. paa mindre jordbrug*.

Nevndin, sum skeyt upp lógina um frama landbúnaðarins[29], sigur um hetta pkt.:

> „Punkt 4 gør det muligt at yde lån til opførelse af gode avlsbygninger m.m. på mindre jordbrug, der er i gang, og der haves erfaring bl. a. fra kommissionen for oprettelse af mindre jordbrug for, at der er betydelig interesse til stede hos mindre jordbrugere for at forbedre de dårlige forhold, hvorunder husdyr efter gammel skik har været holdt, samt de oftest yderst mangelfulde gødningsopsamlingssteder.“

Hetta svarar til pkt. 3 við víðari merking til eisini at umfata til ognarmenn.

Pkt. 5. *Driftslaan til mindre jordbrugere*. Henda heimild er til rakstrarlán til smærri brúkarar.

Í praksis hevur orðið „mindre“ verið tulkað rættuliga lagaliga, so størri jarðarbrúk eisini hava fingið lán sbrt. hesi grein.

Maskinlán úr Jarðargrunninum hava eisini sína heimild í hesi grein, tá ið keyp av maskinum hevur verið roknað sum rakstur í jarðarlógarinnar týdningi. Kanska er lógarheimildin pkt. 5 toygd nakað nógv í hesum sambandi. Her verður ofta veitt 100 % lán. Fyrstu 60 % verða veitt sum seriulán yvir 10 ár 3 % p.a. (smærri maskinur 5 ár). Harumframt verður veitt sokallað ískoytislán 8 % p.a. yvir 5 ár fyri resterandi 40 %.

28 Sí notu 21.

29 Sí bls. 42.

Pkt. 6. *Kommuner eller nybyggerforeninger til indkøb af jord*.

Nevndin, sum skeyt upp lógina um frama landbúnaðarins[30], sigur um hetta pkt.:

> „Ved bestemmelsen i punkt 6 gøres det muligt at yde lån til indkøb af jord udenfor det jordkøb, der bliver foretaget direkte for jordfondens midler. Udvalget tænker sig muligheden af, at særlig kommuner kan ventes at interessere sig for passende jordkøb, såvel med opdyrkning for øje som til byggepladser, industrielle anlæg o.l.“

Í reglugerðini fyri Jarðargrunnin er í § 26 sagt um viðgerðina av hesum lánum:

> „Ansøgningerne må bilægges fornøden købekontrakt, hvorhos det må godtgøres, at købesummen ikke overstiger, hvad der svarer til værdien af tilsvarende jord det pågældende sted.
> Forinden der ydes en kommune lån, vil det være at påse, at lagtingets[31] approbation foreligger.
> Ved kommuners erhvervelse af jord, der igen agtes afhændet, skal landbrugsrådet godkende prisansættelsen, ligesom lagtingets[32] samtykke til afhændelse vil være at indhente.“

Sbr. § 27 í somu reglugerð er ásett, at

> „Andragendet skal desuden være ledsaget af vejplan, udstykningsplan og afvandingsplan samt med oplysning om den påtænkte anvendelse af jorden“

Í praksis hevur henda grein verður tulkað soleiðis, at kommunan skal eisini leggja við evt. byggisamtykt fyri kommununa.

Við heimild í hesi grein er veitt kommunum kreditt samsvarandi keypspeninginum fyri festijørð, sum kommunan hevur keypt frá jarðarráðnum, møguliga verður avloysing fyri vetrarbit løgd afturat. Byggibúning av slíkum grundstykkum hevur jarðarráðið ikki fíggjað. Lánið er afturgoldið sum seriulán yvir 5 ár við 8 % rentu p.a.

30 Sí bls. 42.

31 Nú verður hetta tulkað sum landsstýrið, tá tað eftir løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1972 um føroysku kommunurnar, sum seinastu ferð er broytt við Ll. nr. 34 frá 29.05.1985 § 39 krevst loyvi frá landsstýrinum til at upptaka lán.

32 Sbr. teirri í notu 31 nevndu kommunulóg § 41 stk. 1 krevst nú samykki frá landsstýrinum til at selja kommunala fastogn, og løgtingið skal tí tulkast sum landsstýrið.

Pkt. 7. *Hønsehold.* Hetta pkt. og pkt. 8 og pkt. 9 vóru innsett við løgtingslóg nr. 24 frá 25.04.1960.[33] Greinin gevur heimild bæði fyri láni til íløgur og rakstur.

Sum kunnugt er einki størri vinnuligt høsnahald í Føroyum í løtuni.

Pkt. 8. *Mælkesalg*. Hetta er fyribrigdi, sum ikki er til her á landi longur. Mjólk verður sum kunnugt nú bert seld í pakkum.

Pkt. 9. *Mejerier*. Greinin gevur heimild bæði fyri láni til íløgur og rakstur. Í dag er bert veitt Mjólkarvirki Búnaðarmanna lán sbr. hesi grein. Lán hevur tó ikki verið veitt teimum til rakstur.

Pkt. 10. *Sammenslutning af landbrugere til investeringer i slagterier og fodervirksomheder. Bemyndigelsen omfatter ikke driftslån*. Hetta pkt. er sett inn við løgtingslóg nr. 63 frá 23.05.1986 og var sett inn orsakað av ítøkiligum umsóknum, sum Jarðargrunnurin ikki metti seg hava heimild til.[34]

Umframt lán, sum Jarðargrunnurin veitir við heimild í § 40, verður eisini veitt lán til girðing, sum ikki kann koma undir nøkur av teim punktum, sum nevnd verða har. Heimildin er ein „enn meiri“ niðurstøða frá studningsheimildini í § 51, nr. 3. Grundhugsanin er, at tá ið grunnurin hevur loyvi at veita studning til girðing, so má honum verða loyvt at gera tað minni útreiðslukrevjandi fyri grunnin at veita lán. Lán verður vanliga veitt til nýtt hegn. Slík lán verða veitt sum serielán yvir 10 ár við 3 % p.a.

Vakstrarhúsum hevur verið veitt lán eftir somu reglum sum fjósum. Heimildin tykist at verða eitt sindur ógreið eftir § 40, og kann helst ikki tulkast undir nakað av punktunum henda grein nevnir. Helst er heimildin rættarsiðvenja.

Um lánsupphæddina, sum heild, verður sagt í § 46:

> „Lånets størrelse fastsættes af landbrugsrådet og må i almindelighed ikke udgøre mere end 60 pct, og aldrig overstige 80 pct. af den låneværdi, hvortil det pågældende brug ansættes, når alle af landbrugsrådet krævede arbejder er udført, efter fradrag af eventuelle forprioriteter og grundbyrders kapitaliserede værdi. Til jordforbedring og opdyrkning af rå jord kan lån dog gives indtil 90 pct. af jordens værdiforøgelse.
>
> For jordfondens ejendomme fastsættes alle lån i forhold til værdiforøgelsen.
>
> Driftslån må i almindelighed ikke overstige 500 kr. til en

[33] Viðgerðin av málinum sæst í løgtingstíðindum 1959 bls. 155.

[34] Løgtingstíðindi 1985 A bls. 282.

> enkelt person og, for så vidt angår driftslåneforeninger, ikke overstige 80 pct. af den sum, for hvilke foreningen garanterer.
> Udbetaling sker, når det pågældende arbejde er godkendt.
> Til jordforbedring og opdyrkning af rå jord udbetales lån dog kun en gang årlig.
> For driftslån fastsættes tidspunktet for udbetaling i hvert enkelt tilfælde.
> Ved oprettelse af nye brug kan forskud på lån til jordkøb svarende til 75 pct. af jordværdien udbetales, når låneansøgeren har fået tinglæst skøde på jordlodden. Ligeledes kan der, når landbrugsrådet anser det forsvarligt, udbetales forskud, når bygningerne er under tag, dog ikke ud over 50 pct. af restlånet.
> Lånetilsagnet bortfalder, når det påbudte arbejde ikke er udført inden et år fra tilsagnets dato, og for jordforbedringer og opdyrkning af rå jord, hvis der i et år ikke er udført det af landbrugsrådet for dette år fastsatte arbejde.“

Henda grein sigur so nakað um hvørjar mestuupphæddir, grunnurin kann læna út. Upphæddin – kr. 500 mestalán – fyri rakstrarlán er tó í dag burturfallin eftir løgfrøðiligu grundregluni – desvetuto – t.e. sett til viks í verki við siðvenju, tí at hon ikki hevur verið brúkt.

Trygdin, sum setast kann fyri lánum úr Jarðargrunninum er umrødd í § 47, har sagt verður:

> „Lån kan kun ydes, når der i den pågældende ejendom kan gives første prioritets panteret, medmindre det drejer sig om jord i offentlig eje eller foranstående prioritets skyldes til jordfonden eller det drejer sig om mindre grundbyrder, hvis kapitaliserede værdi ikke overstiger 20 pct. af jordværdien.
> Driftslån kan dog ydes, selv om der ikke kan gives første prioritet panteret i ejendommen, men i så fald kræves det, at vedkommende kommune over for jordfonden garantere for halvdelen af det tab, som det pågældende lån måtte medføre.“

Tá ið umræður maskinlán, verður kravt uttanhanda veð í maskinuni. Alt, sum veðsett er, (og eisini allir bygningar sum hoyra til festið) skal verða tryggjað ímóti øllum vandum, sum kendir eru í Føroyum, sbrt. § 30 í lógini. Føroya Brunatrygging varð stovnsett til hetta endamál.

Tær vanligu treytirnar, sum umsøkjari skal uppfylla fyri at fáa lán úr Jarðargrunninum, eru hesar eftir § 42:

„For at kunne opnå lån i henhold til § 40 må vedkommende andrager:
a) have indfødsret,

b) være myndig, dog som regel ikke under 25 år og, for så vidt angår oprettelse af nye brug, ikke over 50 år gammel,
c) have ført en hæderlig vandel,
d) ikke have nydt fattigunderstøttelse, som ikke er tilbagebetalt eller eftergivet,
e) godtgøre at være en flittig og ædruelig og sparsommelig person, som kan antages egnet til at drive det landbrug, hvortil lån søges,
f) godtgøre at være ejer af de fornødne midler til, når lån ydes, at drive det pågældende landbrug på forsvarlig måde,
g) ikke selv ved egne midler være i stand til at gennemføre det påtænkte.

Endvidere må andrageren godtgøre, at hans plan er hensigtssvarende, herunder fremskaffe bekostningsoverslag og rentabilitetsberegning."

Formliga framferðin í samband við áseting av rentum og avdráttum er ásett í § 49 í lógini, soleiðis sum hon er broytt við løgtingslóg nr. 23 frá 25.04.1960, har sagt verður:

> „Udlånsrenten samt afdragstiden fastsættes af landbrugsrådet efter indhentet godkendelse fra landsstyret.
>
> For driftslån fastsættes afdragstiden i hvert enkelt tilfælde og må aldrig overstige 5 år.
>
> Lånet er uopsigelig fra kreditors side så den pågældende ejendom vedligeholdes efter sin bestemmelse.
>
> For ydelser til jordfonden haves udpantningsret."

Sbrt. viðmerkingina til lógarbroytingina í 1960 sigur landsstýrið í viðmerkingum sínum til uppskotið, sum seinni var samtykt, at neyðugt er at hava fleksibla rentu og avdráttartíð fyri um neyðugt at hava meiri pening tøkan til jarðarbrúkið, tá ið á stendur, og sigur tí, at[35]:

> „Landsstýrið hevur tessvegna skotið upp at broyta hesa reglu soleiðis, at jarðarráðið fyrisetur útlánsrentuna og eisini avdráttartíðina eftir góðkenning landsstýrisins, ið hvussu er fyri fyrst, til løgtingið hevur viðgjørt lógaruppskotið frá millumtinganevndini í búnaðarmálum."

Forfallsdagur fyri rentu og avdráttir er eina ferð árliga, hvønn hin 1. desember.

[35] Løgtingstíðindi 1959 bls. 197.

Nú kreppan av álvara tók dik á seg í byrjanini av 90' unum, hevur spurningurin verið settur, um Jarðargrunnurin hevur heimild til eftir umsókn frá lántakara at umleggja ella niðurskrivað lán. Serliga verður hugsað um føri, har dugnaligur búnaðarmaður er komin í klemmu av konjuktursvingningunum, soleiðis at tað í roynd og veru eru tíðirnar, sum hava skapt stóru lánibyrðuna, og at støðan er tann, at annar búnaðarmaður – sum ikki nýtist verða eins dugnaligur – kann keypa/yvirtaka íløgu hansara fyri munandi minni prís, uttan at Jarðargrunnurin hóast hetta fær síni lán goldin.

Svarið er, at lánið kann verða umlagt yvir longri áramál, og kanska fyri aðra serliga rentu, men tá má slík skipan hava góðkenning frá landsstýrinum sbr. § 49, stk. 1, í lógini um landbúnaðarins frama. Slík góðkenning kann gevast, antin ítøkiliga fyri hvørt málið sær, ella sum ein generell góðkenning. Fullkomiliga at strikað skuld, ella onga rentu at krevja av ávísum parti av skuldini, er ikki heimild fyri; tvørturímóti sýnist eitt øvugdømi (modsætningsslutning) av § 49, stk. 1, at føra til, at slíkt heimilar lógin ikki.[36]

## *d. Studningur úr Jarðargrunninum*

Reglurnar um studning úr Jarðargrunninum eru ásettar í lógini um landbúnaðarins frama §§ 51 – 56. Eitt sindur fløkjasligt er at skilja, hvussu árligu játtanirnar á løgtingsfíggjarlógini og játtanirnar í løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. skulu tulkast. Er hetta studningur, sum veruliga er landskassastudningur, og sum jarðarráðið bara fyrisitur landskassans vegna? Ella er hetta í roynd og veru bara studningur til Jarðargrunnin, sum kompensatión fyri studning, jarðarráðið letur øðrum.

Upplýst er, at á roknskapinum eru hesir studningar úr landskassanum bókaðir sum inntøka til Jarðargrunnin, og at sum útreiðsla eru so bókaðir studningar, sum jarðaráðið veitir við tí heiti, teir nú einaferð hava. [37]

Av tí at hesir studningar á landskassaroknskapinum ígjøgnum nógv ár hava verið bókaðir sum inntøka fyri grunnin, og at studningsveitingarnar hava verið bókaðar sum ein útreiðsla fyri grunnin, er helst rættast at skilja allar hesar studningar sum Jarðargrunsstudningar, ið veittir verða av jarðarráðnum við heimild í lógini um landbúnaðarins

[36] Í løgtingsmáli 191/1993, landsstýrisins j. nr. 1720-4, skeyt landsstýrið upp at seta eina nýggja § 50 a inn í lógina, soleiðis at heimild gjørdist hjá jarðarráðnum at umleggja og niðurskriva verandi lán úr grunninum, um mett verður, at raksturin framyvir kann bera seg. Uppskotið fall burtur, tí at uppskotið ikki var endaliga liðugtviðgjørd, áðrenn tingsetan endaði. Hetta tá sbrt. stýrisskipanarligari siðvenju, nú sbrt. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3.

[37] Sí yvirlitið í skjali 8.

frama § 51; kanska í ávísum førum rættarsiðvenju, sum kemur afturat § 51, og við javndømi av løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961. Tí eru almennu reglurnar í § 53 galdandi fyri allar studningarnar. Í § 53 verður sagt:

„For at kunne opnå tilskud i henhold til § 51 må vedkommende ansøger:

a) have indfødsret,
b) have ført en hæderlig vandel,
c) ikke have nydt fattigunderstøttelse, som ikke er tilbagebetalt eller eftergivet,
d) godtgøre at være en flittig, ædruelig og sparsommelig person,
e) bortset fra præmiering ikke være ejer af mere end værdier til et beløb af 15.000 kr. og ikke have en årlig indtægt over 3.000,00 kr.

Endvidere må ansøgeren godtgøre, at det pågældende arbejde er hensigtssvarende.“

Pkt. e), er ikki longur í gildi, tí at punktið er burturfallið eftir løgfrøðiligu desvetuto grundregluni.

Eftir § 51 hevur landsstýrið heimild at áseta nærri reglur um studningsveitanirnar. Núverandi av landsstýrinum ásettu reglur eru ikki lýstar alment, men sum reglur um studning til mjólkar- og kjøtframleiðslu, sum eru samtyktar á landsstýrisfundi 21.03.1995. Hesar reglur siga seg hava heimild sína í fíggjarlógini § 17 17901/343021 og 19901/343133. Helst er her misskiljing íkomin. Rætta heimildin er lógin um landbúnaðarins frama § 51. Av tí at reglurnar reglubinda studningsveitanir Jarðargrunsins, hevði verið best, um hesar ásetingar vóru lýstar í kunngerðarblaðnum sum ein formlig landsstýriskunngerð. Hetta hendi eisini fram til, at kunngerð nr. 11 frá 12.02.1992 um studning til mjólkar- og kjøtframleiðslu fór úr gildi.

Gjaldkomudagurin av studningunum er ásettur í § 56, soleiðis at studningurin vanliga ikki verður goldin, fyrr enn arbeiðið, sum studningur verður veittur til, er liðugt, men fyri uppdyrkingarstudning, nýbygningar v.m., kann jarðarráðið rinda upphæddina frammanundan.

Um studningarnar kann næstan uttan undantak sigast, at í fyribúgving lógarinnar (lovens forarbejder og motiver) finst ikki neyvari gjøllari grundgeving um, hví studningsheimild verður givin. Um hetta er av sosialum orsøkum, av tjóðbúskaparligum orsøkum, av teim orsøkum at ávís landbúnaðarframleiðsla skal verða møgulig at keypa her á landi, sum vanligt valagn ella aðrari orsøk, fæst ikki at vita. Í flestu førum má ítøkiligt git gerast um einstaka slagið av studningi.

Studningarnir á løgtingsfíggjarlógini hava til og við fíggjarløgtingslógina 1992 verið sundurgreindir. Á fíggjarløgtingslógini 1993 var byrjað

at seta av í blokkjáttan „landbúnaðarstudningar“ størra partin av studningunum, tó varð onkur serstakur studningur hildin uttanfyri. Á løgtingsfíggjarlógini 1996 er bert eitt rakstrarstað, sum eitur Vinnuframi 17898/343013 „landbúnaður“ við kr. 15.000.000 avsettum.

Jarðarráðið umsitur hesar studningar landsstýrisins vegna. Við átekning á løgtingsfíggjarlógina 1997 eru allir studningar til landbúnaðin treytaðir av, at umsøkjari er

a) bókhaldsskylgugur sbrt. § 1B, pkt. 27, í løgtingslóg nr. 75 frá 24. oktober 1978, og
b) meirvirðisgjaldsskrásettur sbrt. løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum.

Studningar, sum heimild er hjá jarðarráðnum at veita eftir § 51 í lógini um landbúnaðarins frama, løgtingslógini um húsdýraalingina v.m. og sbr. siðvenju sum avleiðing av fíggjarløgtingslógarjáttan, verða niðanfyri umrøddir evnisliga.

1. „Præmier for veldrevne brug“
Henda studningsheimild er nevnd í § 51 í lógini. Sbr. roknskapi ráðsins er slík peningalig virðisløn ikki latin tey seinastu nógvu árini.

Í kunngerð nr. 43 frá frá 30.06.1972 um studning til húsdýrhaldið v.m. verður sagt í pkt. G:

„Studningur til virðislønir.
1) Allur studningur og virðislønir verður goldin um Føroya Jarðarráð, sum heldur serligan roknskap yvir hesum.
2) Roknskapur fyri farið ár og fíggjarætlan fyri komandi ár verða send landsstýrinum 1. juli á hvørjum ári.“

Her verður sipað til virðislønir í samband við húsdýraalingina (djórasýningar).

Landsstýrið veitir sjálvt eina heiðursmedalju nevnd „Bóndi er bústólpi og búgv er landstólpi“. Við henni fylgir eingin peningaupphædd. Hon er síðstu ferð latin í 1984.

2. „Særlige nyttige indretninger“.
Studningsheimildin er í § 51 í lógini. Er ikki nýtt seinastu árini.

3. Veltistudningur, heruppií „ypperlig dyrkning“.
Henda studningsheimild er nevnd í § 51, nr. 1, í lógini, og er á sama hátt sum lániheimildin til hetta endamál, sí bls. 65, høvuðsendamálið við lógini.

Veittar verða í 1995 3 kr. fyri nýdyrking pr $m^2$, tó 4 kr. fyri størri

projekt. Týdningarmikið er, at ætlanin er góðkend av jarðarráðnum, áðrenn farið verður undir veltingina; annars verður ikki studningur latin. Upphæddin verður justerað, alt eftir hvussu stór játtan er á løgtingsfíggjarlógini í mun til væntaðar umsóknir.

4. Køstar.
Henda studningsheimild er nevnd í § 51, nr. 2, í lógini.

Vanliga verður latið í studningi 25 % av kostnaðinum av at gera ein køst.

5. Súrhoyggjabrunnar.
Henda studningsheimild er nevnd í § 51, nr. 2, í lógini. Afturat kemur kunngerð nr. 54 frá 03.10.1967: Reglugerð fyri studningi til súrhoybing.

Henda reglugerð er soljóðandi:
„Samsvarandi játtan á løgtingsfíggjarlógini verður veittur studningur til byggitilfar til súrhoybing, eftir umsókn og niðanfyri tilskilaðu treytum:

1. Umsókn um studning verður send Føroya jarðarráði, áðrenn farið verður undir at byggja og í so góðari tíð, at umsóknin og umstøðurnar kunnu verða kannaðar, áðrenn møgulig tilsøgn verður givin.
2. Áðrenn tilsøgnina vissar jarðarráðið seg um, m.a. at bingið verður bygt á høgligum staði nær við fjós ella seyðahús.
3. Tá ið bingið er liðugt gjørt eftir leiðbeining jarðarráðsins, verður arbeiðið sýnað og tilfarið virðismett í mun til fyriliggjandi tilfarsrokningar.
4. Endaliga sýnið og metingin av tilfarsútreiðslunum eru avgerandi fyri studningsgjaldinum, sum annars skal standa í mun til støðd og útgerð eftir fyriskipan jarðarráðsins.“

Latnar verða kr. 300 í $m^3$, tó ikki meiri enn tilfarskostnaðurin av at gera brunnin.

6. Girðing.
Henda studningsheimild er nevnd í § 51, nr. 3, í lógini.

Studningur hevur ikki verið latin sbrt. hesi grein í nógv ár.

7. Flutningsstudningur til búnaðarfeløg, og studningur til amboð hjá somu.
Henda studningsheimild er nevnd í § 51, nr. 4, í lógini.

Studningur hevur ikki verið latin sbrt. hesi grein.

8. „Nybyggere“
Henda studningsheimild er nevnd í § 51, nr. 5, í lógini.
Studningur hevur ikki verið latin sbrt. hesi grein.

9. „Driftslaaneforeningers Administrationsudgifter“
Henda studningsheimild er nevnd í § 51, nr. 6, í lógini.
Studningur hevur ikki verið latin sbrt. hesi grein.

10. Rættir
Studningsheimildin er helst givin við løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. § 1 D.
Í kunngerð nr. 43 frá 30.06.1972 um studning til húsdýrahaldið v.m. verður sagt í pkt. E:

„1) Studningur kann latast til gerð av vaskirættum upp í kr. 1.500,00 til eina rætt.
2) Studningur verður ikki goldin, fyrr enn arbeiðið er gjørt og góðkent av búnaðarráðgevaranum.
3) Umsókn um studning verður latin til jarðarráðið við frásøgn um, hvussu arbeiði skal gerast.“

Praksis er at veita kr. 5.000 pr. rætt, um so er, at vaskibrunnur er.

11. Keyp og fóðring av góðum tarvum og greðingum.
Grundarlagið fyri hesi studningsveitan er at finna í løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. § 1 pkt. A. Nærru reglurnar um hendan studning viðvíkjandi tarvum finnast í kunngerð nr. 43 frá 30.06.1972 um studning til húsdýrahaldið v.m. pkt. A.
Studningur til keyp av tarvum og greðingum hevur ikki verið veittur seinastu árini.

12. Rakstur av insemineringsstøð.
Grundarlagið fyri hesi studningsveitan er at finna í løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. § 1 pkt. B. Nærru reglurnar um hendan studning eru ikki ásettar við kunngerð.

13. Premieringar av alidýrum.
Hesin studningur er heimilaður í løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. § 1 C. Studningsheimildin er fyri sovítt samanfallandi við studningsheimildina pkt. 1 og verður víst til hetta pkt.

14. Mjólkarstudningurin.
Studningurin er ikki heimilaður í lógini um landbúnaðarins frama, men í rættarsiðvenju og við grundarlagi í studningi til jarðarráðið á løgtingsfíggjarlógini. Fyri 1995 eru reglurnar um henda studning ásettar í reglum um studning til mjólkar- og kjøtframleiðslu samtyktar á landsstýrisfundi 21.03.1995. Har verður sagt í pkt. 1, 2 og 4:

1) Søla um mjólkarvirkir. Neytaeigari, ið selur nýmjólk til mjólkarvirkir, fær 0,90 kr. fyri liturin í studningi fyri 1. floks mjólk.
2) Privat mjólkarsøla. Neytaeigarar, ið selja mjólk beinleiðis til brúkara, fáa 45 oyru í studningi fyri liturin, tó bert um prísurin, brúkarin rindar, ikki er hægri enn søluprísurin til mjólkarvirkið.
4) Flutningsstudningur. Flutningsstudningur verður latin við upp til 46 oyru fyri liturin fyri flutning av mjólk til mjólkarvirki.

Í reglunum eru ásettar góðskutreytir, fyri at mjólk kann koma í 1. flokk.

Studningurin verður avroknaður soleiðis av jarðarráðnum, at hann verður fluttur mjólkarvirkinum, sum so avroknar einstaka bóndanum.

Mjólkarstudningurin varð lagdur undir jarðarráðið at umsita í 1967. Áðrenn hetta, var mjólkarstudningur goldin beinleiðis úr landsstýrinum.

15. Stráfóðurstudningur.
Við skrivi 9. september 1983 boðar Føroya landsstýri jarðarráðnum frá, at landsstýrið og fíggjarnevnd løgtingsins hava samtykt at seta í verk studning til stráfóðurframleiðslu við heimild í løgtingsfíggjarlógini 1984/85; frá 1982 var stráfóðurstudningurin veittur av játtanini til veltistudning.

Treytirnar eru, at: 1) framleiðarar, ið hava framleitt minst 5000 kg av mjólk í farna árið og/ella 2) framleiðarar, ið hava framleitt minst 4 tarvaslakt eldri enn 15 mánaðar og/ella minst 4 kvígur. Undantiknir hesum treytunum í pkt. 2 eru framleiðarar í: Mykinesi, Gásadali, Koltri, Skúvoy, Dímun og Fugloy. Studningurin er kr. 33,-/m3 av hoyggi og kr. 100,- /m3 av súrhoyggi. Studningur verður ikki latin fyri teir fyrstu 2 m3, og síðan í mesta lagi fyri 12 m3 pr. kúgv. Umroknað er: 1 m3 av súrhoyggi tað sama sum 3 m3 av hoyggi. Ungneyt 1-2 ár verða roknað sum 2/3 kúgv. Ungneyt undir 1 ár verður roknað sum 1/3 kúgv. Mjólkarvirkini senda yvirlit yvir framleiðararnar, ið hava latið mjólk til virkið. Framleiðarar, ið hava selt mjólk privat, skulu hava váttan frá bygda-/býráð yvir framleiðsluna, og skal váttan fylgja við umsóknini. Fyri seldar kvígur skal keyparin vátta. Fyri tarvaslakt verða váttanirnar í sambandi við umsóknir um kjøtstudning nýttar sum grundarlag.

16. Avloysaraskipan til bøndur.
Skipanin er ólógásett og er gjørd sum ein avleiðing av játtan á løgtingsfíggjarlógini við viðmerking um, at slík skipan skuldi setast á stovn. Hetta var í 1986. Bøndur gjalda í skipanina kr. 0,05 pr. litur og mjólkarvirkið somu upphædd. Landsstýrið rindar til skipanina eina fasta upphædd; í løtuni (1995) kr. 480.000,00.

Jarðarráðið fær ein lista yvir innvigaða mjólk í árinum frammanundan, og upphæddin, sum bóndur, mjólkarvirkið og landsstýrið hava inngoldið fyri hetta ár + rentur fram til 01.05. árið eftir, verður so býtt út í mun til framleiðsluna og flutt einstøku bøndrunum av jarðarráðnum.

17. Neytakjøtsstudningurin.
Hesin studningur hevur ikki beinleiðis lógarheimild í lógini um frama landbúnaðarins, men heimildin er óskrivað og ein avleiðing av studningsjáttan til jarðarráðið á løgtingsfíggjarlógini.

Sbr. reglur um studning til mjólkar- og kjøtframleiðslu, samtyktar á landsstýrisfundi 21.03.1995, er studningurin soleiðis ásettur sbrt. pkt. 3

> „Kjøtstudningur.
> Fyri neytakjøt verður latin studningur 11,21 kr. pr. kg. til neytaeigara. Studningurin verður latin fyri kjøt av neytum ikki yngri enn 15 mánaðir, sum selt verður um sølubúð ella annan keypara. Á bygdum, sum av flutningstrupulleikum illa fáa selt mjólk við vinningi (Mykines, Gásadalur, Koltur, Skúvoy, Dímun, Fugloy), verður studningurin 25 kr. og einki aldursmark.“
>
> Ad 3) verður sagt:
> „Umsóknir um kjøtstudning skulu sendast Føroya Jarðarráð innan ein mánað frá tí at neytið er dripið. Aldur, kyn, slaktivekt og -dagur skal verða váttað av seljaranum, meðan keyparin skal vátta fyri móttøkuna.
>
> Fyri serframleiðslu av neyta/svínakjøti kann landsstýrið gera serliga skipan.“

18. Seyðakjøtsstudningur (MVG-afturbering).
Á fundi 19. september 1995 samtykti landsstýrið soljóðandi: „Broytingar í reglum um studning til mjólkar- og kjøtframleiðslu: Undir punkt 3) kjøtstudningur verður skoytt uppí: Fyri seyðakjøt verður latin studningur svarandi til 100% av goldnum meirvirðisgjaldi. MVG-avrokning verður nýtt sum grundarlag fyri útgjaldingini“, og legði landsstýrið henda studning undir jarðarráðið at umsita.

Bøndurnir senda jarðarráðnum uppgerð yvir, hvussu nógv seyðakjøt teir hava selt í ársfjóðringinum, og hvussu nógv meirvirðisgjald teir

hava kravt inn og goldið Toll- og Skattstovuni fyri hetta. Hetta verður endurgoldið teimum sum studningur.

19. Onnur endamál húsdýrahaldinum til frama.
Hesin studningur er heimilaður í løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. § 1 D.

Studningar hoyrandi til henda bólk er m.a. studningur til dýraframsýningar og seyðasýningar.

Slíkar sýningar hava ikki verið í fleiri ár.

Av øðrum studningum, sum latnir hava verið, kann nevnast, at maður árliga fær goldnar ferðaútreiðslur í samband við, at hann ferðast um landið at røkja klyvjarnar á neytum.

20. Til varðveitslu ella nøringar av fuglinum í haga og bjørgum.
Hesin studningur er heimilaður í løgtingslóg nr. 18 frá 04.05.1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. § 1 E. Studningur hevur ikki verið veittur sbrt. hesi heimild í mong ár.

21. Studningur til serkøna hjálp.
Landsstýrið hevur á fundi 21.03.1995 samtykt, at av samlaðu studningsjáttanini verða avsettar 900.000 kr. til serkøna hjálp. Hesa avgerð tók jarðarráðið til eftirtektar.

Studningur til egg og grísar, ásettur við landsstýrisreglugerð fyrstu ferð í 1984, verður ikki latin longur. Somuleiðis verður javningarstudningur til mjólk heldur ikki latin longur.

Á fíggjarlógini eru studningsjáttanir, sum jarðarráðið ikki hevur umsitið. Hesar eru:

1) stuðul til Fuglakanningarstøð, sum Fiskirannsóknarstovan fyrisitir. Hesin verður í løtuni nýttur til fuglateljingar,

2) stuðul til ull/ullaúrdráttir og ullavasking, har játtaðar vórðu í fíggjarárunum 1991, 92 og 93, ávikavist kr. 200.000, 600.000 og 600.000. Henda studning hevur landsstýrið fyrisitið.

## *e. Heildartøl um virki Jarðargrunsins*

Sum skjal 7 er viðfest hagfrøðiligt yvirlit yvir rakstrar-, fíggjaríløgu- og statuskonti 1938-1960, og sum skjal 8 sama yvirlit frá 1960 – 1996.

## *f. Uppsetan av roknskapi og grannskoðan*

Reglurnar fyri grannskoðan av roknskapi Jarðargrunnsins eru í løgtingslóg nr. 28 frá 24.04.1957 har sagt verður í § 6:

„Jarðargrunsins roknskapur verður grannskoðaður av grannskoðara løgtingsins, og løgtingið desiderar roknskapin."

Roknskapur Jarðargrunsins verður grannskoðaður av interna grannskoðara grunsins KPMG Pauli Ellefsen Pf., løggildur grannskoðari. Eftir at hann er samtyktur av ráðnum, verður hann sendur landsstýrinum og landsgrannskoðaranum.

Sbrt. løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.1994 um stýrisskipan Føroya § 45, stk. 4, sbr. stk. 1, so skal roknskapurin fyri Jarðargrunnin verða lagdur fyri løgtingið innan 1. juli fyri tað farna roknskaparárið.

## 2. Vakstrarhúsgrunnurin (skrivað áðrenn 1. des. 1996)

Grundarlagið undir grunninum er játtan á fíggjarløgtingslógini 1984/85 § 17 343117, sum hevur stutta heitið „vakstrarhús í grunn". Einki verður sagt í viðmerkingunum til lógina, hví grunnurin er stovnsettur, ella hvussu hann skal útinna sítt yrki.[38]

Landsstýrið hevur í november 1985 ásett eina interna reglugerð fyri Vakstrarhúsgrunnin, sum ikki er kunngjørd alment.

§ 3 í hesi reglugerð er soljóðandi:

„Fíggjarliga støði grunsins er:
- a) tøkur peningur av játtanum á fíggjarløgtingslógini í 1984/85 og játtanir, sum løgtingið tekur støðu til á hvørjum ári,
- b) endurgoldin givin lán og rentur,
- c) aðrar inntøkur."

Vakstarhúsgrunnurin verður sambært § 1 í internu reglugerðini fyrisitin av jarðarráðnum. Hetta má merkja, at reglurnar, sum umrøddar eru um viðgerð og kæru v.m. fyri avgerðir Jarðargrunsins, eru tær somu fyri Vakstrarhúsgrunnin.

Interna reglugerðin er eitt sindur ógreið í spurninginum um munur er á studnings- og lániheimild grunsins. Sbrt. § 2 kann:

„Stuðul .. veitast úr grunninum til:
- a) lán og/ella studning til nýbygging og ískoytisíløgu til vakstrarhús og grønmetisframleiðslu uttandura,
- b) rakstur av nýstovnaðum vakstrarhúsum og grønmetisframleiðslu uttandura,
- c) studning til orkusparandi tiltøk í vakstrarhúsum,

[38] Løgtingstíðindi 1983 A bls. 216.

d) hjálp til marknaðarføring,
e) hjálp til gransking og vørumenning."

Í § 4 í reglugerðini verður sagt:

„Fyri útlánum verður veitt tann trygd, sum jarðarráðið ásetir.
2. stk. Studningsveitan upp á meira enn kr. 100.000 til einstakt virki krevur góðkenning frá landsstýrinum."

Í § 5 í reglugerðini verður sagt:

„Av tí peningi, grunnurin hvørt ár hevur til taks, mugu samlaðu studningsveitanirnar ikki fara upp um 25 %."

Víðari verður sagt í reglugerðini § 6:

„Lán við veðrætti í føstum ognum og bygningum skulu rindast aftur í mesta lagi yvir 20 ár, og kann avdráttarskái tá gevast í upp til 5 ár. Lán, ískoytislán og studningur kunnu í mesta lagi vera 90 % av íløguvirði. Rentan er tann til eina og hvørja tíð galdandi fyri útlán Jarðargrunsins.

2. stk. Lán til maskinur og virkisgøgn skulu rindast aftur yvir í mesta lagi 10 ár.
3. stk. Rakstrarlán skulu rindast aftur yvir í mesta lagi 5 ár.
4. stk. Studningur kann veitast til orkusparandi tiltøk við upp til 75 % av kostnaðinum.
5. stk. Studningur og lán kunnu veitast til orkufremjandi tiltøk.
6. stk. Studningur kann latast til samskipan av marknaðarføringini og framleiðsluni úr vakstrarhúsum og aðrari grønmetisframleiðslu. Eisini kann veitast studningur til ráðgevandi hjálp. Studningur sambært hesum stykki kann treytast av viðmæli Garðyrkisfelagsins, áðrenn støða verður tikin."

Yvirlit yvir fíggjarligu viðurskifti Vakstrarhúsgrunsins síggjast á skjali 9.

## 3. Tollviðurskifti viðv. innflutningi av landbúnaðarvørum til Føroya

### *a. Gamla avgjaldsskipanin*

Fyri betur at skilja toll- og avgjaldsskipanina, soleiðis sum hon varð broytt í 1992 og 1993, er kanska ikki av leið at vísa á, hvussu skipanin var fyri broytingina.

Fram til 1992 var avgjaldið á innfluttum vørum, íroknað landbúnaðarvørum, skipað í 3 lógum, nevniliga løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950, løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl l961 um serligt innflutningsgjald og løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 um eyka innflutningsgjald.

Løgtingslógin frá 1950, sum uttan broytingar í bygnaðinum loysti av ta skipan, ið var galdandi fyri heimastýrislógina, fevndi um avgjald á serstøkum vørum sum t.d. njótingarvørum (tubbak, rúsdrekka, kaffi, te o.s.fr.), stáskendar vørur (skreyt, prýðislutir o.s.fr.) og ymiskar aðrar vørur, ið kundu veita landskassanum inntøkur (t.d. máling, tapet, ellutir og eltól), t.v.s. avgjøld, ið líktust tí, ið vanliga verður nevnt punktgjøld.

Lógirnar um serligt og eyka innflutningsgjald ásettu eins alment gjald á innfluttar vørur við undantaki av teimum vørum, ið vóru tilskilaðar í lógini (serliga einstakar neyðsynjarvørur og útgerð til fiskivinnu og fiskaframleiðslu).

Lógirnar um innflutningsgjald vóru í roynd og veru ein verjugarður fyri føroyskt framleiddar vørur, íroknað landbúnaðarvørur, tí einki samsvarandi innlendskt gjald var lagt á.

### *b. Nýggja avgjaldsskipanin*

Tingingar um ein handilssáttmála við ES byrjaðu í 1990. Tað var tá skjótt greitt, at ein megintreyt fyri einum slíkum sonevndum fríhandilssáttmála var, at føroyska toll- og avgjaldsskipanin fyri vørur skuldi vera sambærilig við vanligar alheims og ES reglur á hesum øki við atliti til, at mismunur ikki verður gjørdur í avgjaldsskipanini fyri føroyskt framleiddar vørur og vørur innfluttar úr ES.

Hesar treytir eru at finna í fylgiskjali II í handilssáttmálanum við ES, og samsvarandi treytir eru at finna í handilssáttmálunum við EFTA-londini.

Tí var neyðugt, at Føroyar fingu eina tolllóg, ið ásetur sama toll mótvegis øllum londum.

Tollurin skuldi vera á sama støði sum GATT-skyldurnar hjá Danmark, sum Føroyar vóru bundnar av síðani miðskeiðis í 1950-árunum, men ongantíð hevði tikið í nýtslu. Tollgarðurin mótvegis øllum londum ger tað møguligt í sambandi við handilssáttmálar at veita sáttmálapørtunum tollfyrimunir, ið ikki verða veittir londum, har eingin sáttmáli er.

Tá GATT-bindingar eru tengdar at alheims toll- og vøruskránni HARMONIZED SYSTEM (stytt HS), var neyðugt at fáa nýggja føroyska tollóg, ið byggir á hesa skipan.

Herumframt varð treytað, at onnur avgjøld skuldu vera eins fyri vørur framleiddar í Føroyum og vørur innfluttar úr ES, t.v.s. at avgjøldini máttu ikki vera kappingaravlagandi.

Hetta merkir soleiðis, at sonevndu punktgjøldini á serstøkum vør-

um skulu vera tey somu uttan mun til, um vøran verður innflutt ella, um hon verður framleidd í Føroyum.

Tollur – ofta nevndur GATT-tollur – og punktgjøld kundu ikki nøkta tørvin á inntøkum til landskassan, tá lógirnar um serligt og eyka innflutningsgjald vórðu settar úr gildi. Í staðin fyri hesi innflutningsgjøld varð í staðin sett í gildi ein meirvirðisgjaldskipan (MVG) eftir somu meginreglum sum í ES. Slík skipan virkar eins á innfluttar og innlendskt framleiddar vørur og er sostatt ikki kappingaravlagandi.

Lógarverkið viðvíkjandi nýggju toll- og avgjaldsskipanin er: Ll. nr. 120 frá 23. des. 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, Ll. nr. 12 frá 23. des. 1991 um toll og lóg nr. 136 frá 8. sept. 1992 um meirvirðisgjald.

MVG-skipanin kom í gildi 1. januar 1993, meðan tolllógin og lógin um punktgjøld komu í gildi í byrjan av 1992. Í skiftisbilinum í 1992 vóru gjøldini eftir lógunum um serligt og eyka innflutningsgjald, tilsamans 33%, løgd inn sum tollur umframt GATT-tollin.

## *c. Tollviðurskifti viðv. innflutningi av landbúnaðarvørum til Føroya*

Sum landbúnaðarvørur verða í alheims høpi roknaðar vørur í kapitli 1- 24 í HS (Harmonized System) og harvið eisini í føroysku toll- og vøruskránni eins og í handilssáttmálunum við ES og EFTA-londini.

Í hesum kapitlum eru vørur, ið ikki vera ella kunnu dyrkast ella framleiðast í Føroyum, men eisini vørur, sum ein hjá okkum vanliga ikki hugsar um sum landbúnaðarvørur, t.d. kap. 22: Drykkjuvørur, ethanol (ethylalkohol) og edikur, kap. 23: Leivdir og burturkast frá matvøruídnað; tilgjørt dýrafóður og kap. 24: Tubbak og framleiddir tubbakslíkar.

Um HS og harvið toll- og vøruskránna kann alment sigast, at hon er bygd upp í deildir, kapitlar, vøruflokkar og vørubólkar, ið eru skipaðir soleiðis: Deildir I -XXI, kapittul 01- 97, í hvørjum kapitli vøruflokkar í talrøð eftir tørvi, t.d. 02.01 – 02.10
og undir hvørjum vøruflokki vørubólkar t.d.:
02.01 Kjøt av hornfenaði, feskt ella kølt:
0201.10.00- Heil og hálv krov
0201.20.00- Aðrir lutir við beini
0201.30.00- Beinleyst

Allur innflutningur av landbúnaðarvørum og øðrum vørum verður skrásettur eftir uppbýtingini í vørubólkar (8 talstavir), og tilfarið verður latið Hagstovu Føroya, sum ger hagtøl um innflutningin.

Tollsatsirnir, t.v.s. GATT-bundni tollurin, fyri innfluttar vørur eru at finna í toll- og vøruskránni fyri hvønn vørubólk sær og eru ofta

eins fyri allar vørubólkar í einum vøruflokki. Avgjald á vørum (punktgjøld) eru at finna í Frumskjali 1 til toll- og vøruskránna, men fyri føroyskar landbúnaðarvørur hevur hetta ongan týdning, tí í kap. 01-24 er avgjald bert á góðgæti úr sukri (kap. 17), á góðgæti úr sjokulátu (kap. 18) og á drykkjuvørum (kap. 22).

Aftrat hesum kemur meirvirðisgjald (MVG), ið er galdandi fyri allar vørur, við teimum undantøkum, ið lógin tilskilar, uttan mun til um vørurnar eru innfluttar ella framleiddar í Føroyum.

Tollurin er galdandi fyri innflutning úr øðrum londum, uttan so at tollurin við sáttmála við onnur lond ella felagsskapir verður strikaður ella settur niður.

Í sáttmálunum við ES og EFTA er tollurin á øllum ídnaðarvørum í kap. 25-97 strikaður við undantaki av nøkrum einstøkum vørum, ið eru framleiddar úr landbúnaðarvørum, men hesar vørur hava ongan týdning fyri føroyskan landbúnað.

Í sáttmálanum við ES er tollurin á landbúnaðarvørum eisini strikaður, men tó ikki fyri mjólk og mjólkarvørur í Kap. 04 og fyri seyðakjøt og aðrar vørur úr seyði í kap. 02 eins og tilgjørdar vørur úr tilfari av seyði í kap. 16.

Í sáttmálunum við EFTA-londini eru treytirnar at kalla eins og við ES, tó hevur Ísland, við støði í søguligum samhandli, tollfrítt kontingent fyri kjøt og avroð av seyði, ið er sett til 700 tons av kjøti og 150 tons av avroðum, feskt ella fryst, og herumframt 100 tons av saltaðum, royktum ella meira tilgjørdum vørum úr seyði.

Verjutollur kann sum høvuðsregla ikki setast á í teimum londum, ið hava bundið seg til GATT-skipanina. Tó hava flest øll lond, eisini í GATT-høpi serligar skipanir viðvíkjandi landbúnaðarvørum (íroknað fiski).

Í sáttmálunum við ES og EFTA-londini, ið hava møguleika fyri serskipanum til tess at taka fyrilit fyri útreiðslumuninum á landbúnaðarframleiðslum, íroknað innlendis studningsskipanir o.s.fr., hava Føroyar eisini møguleika at seta slík tiltøk í verk, samb. frumskjal nr. 2 til handilssáttmálan við ES.

Fyri at hava møguleikan at áseta slíkt javningargjald er í toll- og vøruskránni sett „tollsatsur +L“ fyri eina røð av landbúnaðarvørum í kap. 02, 04, 06, 07, 16, 19 og 21 (L stendur fyri landbúnaðargjald). Eftir avgerð landsstýrisins kann javningargjald setast á. Higartil er hetta gjørt fyri mjólkarvørur í vøruflokkum 04.01 – 04.03, fyri bakstvørur í vøruflokki 19.05 og fyri matarís í vøruflokki 21.05.

Nevnast skal eisini, at aftaná tingingar í GATT-skipanini í sonevnda Uruguay-umfarinum var úrslitið, at nýggj handilssamskipan WTO (World Trade Organization) var sett á stovn. GATT- skipanin, sum nú verður nevnd GATT 1947, verður tó í gildi eina tíð framyvir, m.a. fyri tey lond, ið ikki hava staðfest nýggju skipanina.

Føroya Landsstýri hevur samtykt, at WTO-skipanin, sum kom í

gildi 1. januar 1995, uttan fyrivarni verður galdandi fyri Føroyar.

Umframt nýggju skipanina var úrslitið av Uruguay-umfarinum, at tollurin fer munandi niður yvir eitt 5 ára skeið við byrjan í 1995.

Í talvuni, skjal 10, er settur upp innflutningur av ymiskum landbúnaðarvørum. Tølini eru sett upp í ávikavist vøruflokkar (4 talstavir) og kapittul (2 talstavir). Vøruflokkar eru nýttir fyri vørusløg, sum í størri ella minni mun verða framleidd í Føroyum, meðan kapittul eru tikin við fyri vørusløg, ið kunnu hugsast at hava ávísan áhuga og í onkrum føri kunnu vera í kapping við føroyskt framleiddar vørur, t.d. niðursodnar vørur úr grønmeti í kap. 20.

Fyri hvønn vøruflokk er sett upp „tollur +L“, nøgd og virði, meðan tollur ikki er settur á fyri kapittul, men bert nøgd og virði.

Er áhugi fyri meira útgreinaðum tølum, ber til, sum longu nevnt, at fáa tøl fyri hvønn vørubólk (8 talstavir) frá hagstovuni, býtt upp á upprunaland.

### *d. Innflutningur av ymiskum landbúnaðarvørum*

Í skjali 6 eru sett tølini tey seinastu árini fyri innflutning av ymsum landbúnaðarvørum

## 4. Ójøvn kapping millum føroyskar og útlendskar landbúnaðarvørur

Tað er nógv ímillum at vera bóndi í Føroyum og at vera bóndi í Danmark, Onglandi ella Fraklandi. Búnaðarjørðin er so nógv betri enn hjá okkum, og velt til maskinnýtslu. Hon liggur í uppá seg størri eindum, veðurlagið er betri og heitari, so ikki krevjast eins dýrir bygningar sum hjá okkum. Marknaðurin fyri búnaðarvørum er størri, og á mangan hátt hava bøndur har skipað seg betur, tá tað snýr seg um at fáa framleiðsluna til brúkaran, enn vit.

Tað er sostatt nógv, ið talar fyri, at útlendskar búnaðarvørur eru bíligari at keypa hjá okkum enn okkara egna búnaðarframleiðsla. Dyggaru flutningsmøguleikarnir millum lond hava gjørt, at føroysk landbúnaðarframleiðsla er fyri vaksandi kapping.

Tað eru tó eisini aðrar orsakir til, at útlendskar landbúnaðarvørur eru so bíligar at keypa í Føroyum. Í flestu londum hevur landbúnaðarframleiðsla verið stuðlað so mikið, at londini ikki einans eru at kalla sjálvforsýnandi við flestu landbúnaðarvørum, men framleiða meira enn teimum sjálvum tørvar. Umframt at forkoma avlopsframleiðsluni royna tey eisini at selja hana uttanlands við at lata útflutningsstuðul. Gera mong lond tað sama, verða verðinsmarknaðarprísirnir lægri, enn teir annars vildu verið, til bága fyri fátøk lond, ið ikki hava aðra fram-

leiðslu at rinda fyri stuðul til framleiðslu og útflutning av landbúnaðarvørum.

Eftir Uruguay-umfarið í GATT-samráðingunum og við WTO eru flestu lond tó farin at minka um framleiðslu- og útflutningsstuðulin og royna heldur at stuðla landbúnaðinum á annan hátt, ið ikki beinleiðis ávirkar heimshandilin við landbúnaðarvørum. Enn eru verðinsmarknaðarprísirnir á landbúnaðarvørum tó ikki slopnir undan ávirkan av framleiðslu- og útflutningsstuðli.

### Prísir á útlendskum landbúnaðarvørum í Føroyum

Føroyska samfelagið hevur yvirhøvur fegnast um lágu prísirnar, ið tað hevur borið til hjá okkum at keypt landbúnaðarvørur fyri. Fram til 1992, tá handilssáttmáli varð gjørdur við Felagsmarknaðin og seinni við EFTA-londini, varð serligt og eyka innflutningsgjald, tilsamans uppá 33 %, lagt á allar innfluttar vørur, eisini landbúnaðarvørur (á epli, grønmeti og frukt tó bert 8 % og á korni, mjøli og sukri tó bert 6 %). Samsvarandi gjald varð tó ikki lagt á føroyskar landbúnaðarvørur. Innflutningsgjøldini vardu tískil í ávísan mun føroyska framleiðslu, samstundis sum summar vørur kundu keypast í Føroyum fyri verðinsmarknaðarprísir at kalla.

Við handilssáttmálunum í 1992 varð innflutningsgjaldsskipanin avtikin, og í staðin varð meirvirðisgjaldsskipan sett í gildi, ið virkaði fyri bæði útlendskar og føroyskar vørur. Tær innfluttu vørurnar, ið fyrr høvdu borið gjald upp á 33 %, sluppu nú inn fyri 25 %, meðan vørurnar, ið fingu álagt 6 og 8 % skuldu hereftir bera 25 %. Føroyskar vørur, ið einki gjald høvdu fingið álagt, fingu nú lagt 25 % oman á.

Í handilsavtaluni høvdu føroyingar treytað sær, at fyri seyðakjøt og mjólk kundu gjøld verða løgd á útlendskar vørur at verja føroysku framleiðsluna. Henda møguleika hava vit einans nýtt fyri mjólk, við tí úrsliti, at fesk mjólk ikki verður innflutt. Á innflutt seyðakjøt verður bert lagt gjald uppá 10 % á seyðakjøt úr ES, New Zealandi og øllum øðrum londum, uttan úr Íslandi, har einki gjald verður kravt av fyrstu 700 tonsunum.

Føroyskir bøndur hava borið upp á mál, at teirra framleiðsla eigur at verjast ímóti ójøvnu kappingini við útlendskar landbúnaðarvørur, tó higartil uttan at nýggj gjøld – verjugjøld – eru løgd á innfluttar landbúnaðarvørur. Trúliga fer tað heldur ikki at bera til.

Innflutningur av landbúnaðarvørum til Føroya kemur í høvuðsheitum úr ES, Íslandi og New Zealandi. Tað hevur tí týdning í hesari frágreiðing at royna at greina út, hvat ávirkar prísirnir á landbúnaðarvørunum, sum vit keypa úr hesum londum.

### Landbúnaðarvørur úr ES

Tann alra størsti parturin av innfluttum landbúnaðarvørum í Føroyum

kemur úr ES. Sum flest øllum kunnugt, eru prísirnir á flestu landbúnaðarvørum í ES hægri enn prísirnir á somu landbúnaðarvørum, tá vit keypa tær í Føroyum. Í Føroyum hava vit serliga lagt til merkis munin í prísi á smøri, kjøti og sukri.

Nevndin hevur tí roynt at fingið eina fullfíggjaða frágreiðing um stuðulsskipanirnar í ES, men hetta hevur víst seg ógjørligt, og kanska hevur hetta ikki stórvegis áhuga. Skipanirnar eru so fløktar og seinastu árini undir slíkum broytingum, at ongin, sum hevur roynt at tikið uppgávuna á seg, er komin so væl inn í sniðgongdirnar, at hann hevur latið nevndini nakað skrivligt.

Gunnar Bjarnason gjørdi tó eina frágreiðing til nevndina í 1994, ið bygdi á ymsar skrivligar frágreiðingar, og tó at henda frágreiðing ikki er nóg fullfíggjað, hevur nevndin hildið tað verið rætt at lagt hana við hesari frágreiðing sum Skjal nr. 12.

Í stuttum kann annars verða sagt, at skipanirnar eru eitt úrslit av landbúnaðarpolitikkinum hjá ES, ið, sum nevnt aðrastaðir í hesum áliti, hava til endamáls

- at økja landbúnaðarframleiðsluna og harvið
- tryggja landbúnaðarfólki sømulig livikor,
- fáa javnvág á marknaðirnar og tryggja, at vøra fæst, og
- tryggja nýtarunum sømiligar prísir.

Úrslitið hevur víst seg at verðið, at framleiðslan gerst størri og dýrari, enn hon annars kundi havt verið, og at prísirnir í ES á flestu landbúnaðarvørum gerast hægri enn prísirnir á somu innfluttu vørum. Til tess at sleppa av við ovurframleiðsluna, verður hon við hvørt forkomin, men annars verður hon goymd ella roynd seld við útflutningsstuðli, so vøran kemur niður á verðinsmarknaðarprísstøði. Afturímóti verður so samsvarandi gjald sum útflutningsstuðulin lagt á útlendskar landbúnaðarvørur, umframt møguligan toll.

Til tess at fáa eina mynd av, hvussu stórur útflutningsstuðulin er á ávísum landbúnaðarvørum, ið føroyskar landbúnaðarvørur skulu kappast við í Føroyum, hevur nevndin vent sær til Ministeriet for Fødevarer, Landbrug og Fiskeri, og biðið tað givið nevndini hesar upplýsingar. Vørurnar, ið nevndin serliga hevur hugsað um, eru:

- Seyðakjøt
- Neytakjøt
- Mjólkarvørur og feskur ostur
- Urtapottar og blómur
- Epli
- Kraftfóður

Í skrivi 1. juli 1997 frá Ministeriinum verður upplýst, at tá tað snýr seg um neytakjøt, er meginparturin av innflutninginum í Føroyum úr ES, 387 tons í 1996, feskt og kølt limað kjøt, og eisini malið, alt pakkað fyri seg. Restitutiónsupphæddin (útflutningsstuðulin) av hesum er uppgjørdur til 3,1 mió. kr., ið svarar til at í meðal verður hetta kjøtið stuðlað við 8 kr./kg. á henda hátt. Av øðrum viðgjørdum vørum við høvuðsinnihaldi av neytakjøti var innflutningurin í 1996 48 tons, ið vórðu stuðlað við 177.000 kr., ella hvørt kilo við 3,70 kr.

Korn í kraftfóðurblandingum varð í juni 1997 stuðlað við 10,16 Ecu/ tons, svarandi til u. 7 1/2 oyra/kg, meðan mais varð stuðlað við út við 27 oyrum/kg.

Stuðulin til útflutning av mjólk er vaksandi í mun til fitiinnihald. Vanlig mjólk í pakkum verður stuðlað í útflutningi við 17 1/2 oyra/ liturin, meðan rómi verður stuðlaður við upp til 1,25 kr./kg. Feitur, feskur ostur verður stuðlaður útfluttur við út við 2 kr./kg.

Epli, urtapottar og blómur fáa ongan útflutningsstuðul.

Niðurgreiðslustudningurin hjá ES verður sum nevnt veittur, fyri at tann landbúnaðarframleiðsla í ES, sum ikki verður keypt í ES, kann verða seld uttanfyri samveldið. Av teimum vørum, sum nevndin hevur spurt um, skarar stuðulin til útflutning av neytakjøti fram úr. Samanumtikið kann verða sagt, at stuðulin til reint, sundurlimað, feskt neytakjøt úr ES liggur um 10-12 kr./kg. Tað er væntað, at hesin stuðul fer at lækka í komandi árum, sbr. frágreiðingina um framtíðar landbúnaðarpolitikk í ES, sum Ministeriet for Fødevarer, Landbrug og Fiskeri legði fyri Fólkatingið í maj 1997. Frágreiðingin er løgd við sum Skjal 13.

Tað kann verða spurt, hví vit í Føroyum keypa neytakjøt úr ES, tá prísurin á neytakjøti úr ES ikki liggur lægri við útflutningsstuðli, enn prísurin á neytakjøti úr øðrum londum. Orsøkin er fyrst og fremst tann, at stytri er at flyta inn neytakjøt úr Danmark og Írlandi, haðan vit keypa tað mesta, enn úr øðrum londum, ið framleiða neyta- og oksakjøt. Men herumframt kemur, at vit við handilssáttmálanum við ES hava tikið av sonevndan GATT-góðkendan toll, ið vit leggja á neytakjøt úr londum, sum vit ikki hava handilssáttmála við. Í løtuni er hesin tollur 20%.

### Landbúnaðarvørur úr Íslandi

Nevndini kunnugt geva íslendingar í dag ikki útflutningsstuðul á landbúnaðarvørum. Roynt verður eisini har at minka um stuðulin til landbúnaðin. Tað skerst tó ikki burtur, at prísurin, ið íslendingar heima skulu gjalda fyri egna landbúnaðarframleiðslu, liggur hægri enn prísurin á somu vørum seldum í Føroyum.

Tað er tó ikki óvanligt fyribrigdi, at ymiskur prísur verður kravdur á ymiskum marknaðum. Størstur er munurin millum slíkar prísir, um

vørurnar á marknaðinum við lágu prísunum ikki kunnu ella verða fluttar til marknaðin við høgu prísunum. Talan nýtist ikki at verða um dumping.

Sum nevnt er tað serliga seyðakjøt, sum verður innflutt úr Íslandi, og sum eingin tollur verður lagdur á tey fyrstu 700 tonsini.

Landbúnaðarvørur úr New Zealandi
Føroyar hava ikki handilssáttmála við New Zealand. Tí verður sonevndi GATT-góðkendur tollur lagdur á allar landbúnaðarvørur úr hesum landi.

Landið er sum kunnugt landbúnaðarland og hevur sum tað fyrsta tikið av at kalla allan studning til landbúnaðarframleiðslu. Tað gevur heldur ikki útflutningsstuðul til landbúnaðarvørur. Tað seyðakjøt, sum vit flyta inn úr New Zealandi verður keypt til verðinsmarknaðarprísir, og omaná er lagdur tollur uppá 10 %.

## 5. Mikroøkonomisk lýsing av fíggjarviðurskiftunum hjá einstøku bøndrunum.

### *a. Almenna jørðin*

Við løgtingslóg nr. 75 frá 24. oktober 1978 um bókhaldsskyldu (Bókhaldsskyldulógin), komu allir bøndur í Føroyum undir vanliga bókhaldsskyldu. Í § 1, litra B, nr. 27 er ásett, at allir persónar, ið hava vakstrarhús ella jarðarbrúk sum vinnu, eru bókhaldsskyldugir frá 1. januar 1979. Við heimild í somu lóg, ásetti Føroya Landsstýri í Kunngerð um minstukrøv til bókhald (Kunngerð nr. 90 frá 8. november 1979), hvat bókhaldsskyldan umfatar. Samstundis sum bøndur vórðu bókhaldsskyldugir, komu teir eisini undir kunngerð frá 28. november 1978 frá Líkningarráð Føroya um minstukrøv til roknskap, sum skal fylgja við sjálvuppgávuni, og krøv til tað roknskaparliga grundarlagið. Henda kunngerðin hevur heimild í tágaldandi skattalóg.

Myndugleikarnir hava ikki víst serliga stóran áhuga fyri teimum fíggjarligu viðurskiftunum hjá bóndum. Tann einasti myndugleikin, sum hevur kravt at fáa upplýsingar um raksturin á bóndagørðunum, er skattamyndugleikin.

Áðrenn kunngerðin um bókhaldsskyldu varð sett í gildi, vórðu bøndur skattsettir eftir einum sokallaðum nettoroknskapi. Nettoroknskapurin varð settur upp á tann hátt, at vinningurin varð ásettur til eitt ávíst krónutal av hvørjum skornum seyði og til eitt ávíst krónutal fyri hvørja mjólkkúgv. Ein leivd av nettoroknskapinum er í gildi enn fyri teir persónar, sum hava landbúnað sum hjávinnu. Hesir persónar kunnu velja at verða settir í skatt av kr. 4.000 pr. mjólkkúgv og av kr. 450 fyri hvønn seldan seyð. Hesi tølini eru fyri árið 1994. Skattamynd-

ugleikarnir hava ásett, at landbúnaður verður roknaður sum vinna, um ein persónur hevur meiri enn 3 mjólkkýr og/ella selur fleiri enn 17 seyðir árliga.

Tað er so at siga ógjørligt hjá festibóndum at fáa lán frá banka ella sparikassa til fjós, seyðahús o.l., tí festibøndurnir eiga ikki ognirnar og hava sostatt ikki møguleika at veðseta ognirnar. Tí hava peningastovnarnir ikki sett nøkur krøv til bóndaroknskapirnar. Harafturat kemur, at Jarðargrunnurin letur lán til eina munandi lægri rentu enn peningastovnarnir vanliga lata. Jarðarráðið hevur rætt at krevja roknskapir frá bóndum, men hevur ikki nýtt henda rættin uttan í heilt serligum førum. Tí eru tað bara skattamyndugleikarnir, ið hava sett nøkur krøv til roknskapirnar hjá bóndum. Hetta hevur ført við sær, at bóndaroknskapirnir bert verða settir upp av skattligum orsøkum og ikki fyri at fáa eina neyva lýsing av hvussu raksturin hevur gingist. Hjá øðrum vinnum, verður bókhaldið og roknskapurin brúktir fyri at fáa eina neyva lýsing av rakstrinum, fyri á tann hátt at hava eitt so gott amboð, sum til ber at stýra rakstrinum við.

Tey fyrstu árini vóru nógv ivamál um, hvussu einstøk viðurskiftir skuldu viðgerast skattliga. Serliga trupult var at tosa um skattligar avskrivingar, tí ein grundleggjandi fyritreyt fyri at avskriva er, at viðkomandi hevur ognarrættin til ta avskrivaðu ognina. Festibøndur eiga sum kunnugt ikki allar ognirnar, sum brúktar verða á garðinum. Við rundskrivi nr. 1 frá 1991 frá Líkningarráð Føroya, vórðu hesi viðurskiftini broytt soleiðis, at lánsgjøld til Jarðarráðið viðvíkjandi lánum, sum latin eru til íløgur, sum festið eigur, verða mettar sum leiguútreiðslur, meðan lánsgjøld til ognir, sum festarin eigur, verða mett sum vanlig lán. Henda broytingin kom í gildi frá og við álmanakkaárinum 1990. Hetta sæst aftur í hagtølunum viðvíkjandi bóndaroknskapum.

Teir bóndaroknskapir, sum liggja til grund fyri hagtølunum, eru roknskapir, sum P/F Grannskoðaravirkið INPACT hevur sett upp. Tað hevur ikki verið gjørligt at fingið fatur á øðrum roknskapum. Hesir roknskapirnir eru allir fyri festibøndur, ið hava bæði neyt og seyð.

### *b. Neytabrúk*

Tað eru sera fáir festibøndur, sum bert hava neyt og als ongan seyð. Tað eru ongir roknskapir fyri slík festi í tí tilfarinum, sum er til taks.

### *c. Seyðabrúk*

Tað eru nakrir festibøndur, sum bert hava seyð. Men teir allarflestu hava onkra aðra inntøku umframt. Av ymiskum orsøkum havi eg mett, at grundarlagið fyri at gera niðurstøður út frá teimum fáu roknskapum fyri hesi festir er ov vánaligt.

## *d. Neyta- og seyðabrúk*

Tey hagtølini, sum eru til taks, eru frá roknskapum fyri Neyta- og seyðabrúk í tíðarskeiðnum 1986-1996. Her skal tó minnast á, at í 1990 setti Líkningarráð Føroya rundskriv nr. 1 frá 1991 í gildi. Tað merkti, at avdráttirnir á festilánum vórðu frádráttarbærir. Sostatt er festileiga munandi hægri frá 1990, enn hon var frammanundan. Tá hagtølini verða lisin, skal havast í huga, at tað ikki eru roknskapir fyri somu festir, sum eru við øll árini. Tó skal nevnast, at broytingarnar ikki eru so stórar, men tá grundarlagið er so lítið, kunnu sjálvt smáar broytingar fáa ávirkan á endaliga úrslitið.

Teir bøndurnir, sum roknskapirnir eru fyri, hava latið umleið 20% av allari mjólkini, sum L/F MBM hevur tikið ímóti. Tað eru umleið 100 limir í L/F MBM, meðan tað eru roknskapir hjá umleið 12 limum við í hagtølunum, ella umleið 10%. Tá hesi 10% av bøndunum hava latið 20% av mjólkini, merkir tað, at teir hava eina framleiðslu, sum er størri enn meðalgarðurin í Føroyum.

Av tí at tað ikki eru somu bøndur, sum eru við í yvirlitinum øll árini, er eisini eitt yvirlit sett upp fyri teir 6 bøndurnar, sum hava verið við øll 11 árini.

## *e. Raksturin*

Í fylgiskjølunum 11A – 11 K eru rakstrarroknskapirnir hjá teimum ymisku festunum samanhildnir fyri hvørt árið í tíðarskeiðnum 1986 – 1996. Í næstuttastu kollonnu til høgru eru teir einstøku roknskaparpostarnir samanlagdir, og uttast til høgru er meðalroknskapurin fyri árið settur upp. Meðalroknskapurin eru roknaður sum totalurin fyri allar roknskapirnar býttur við talinum á roknskapum sum eru við. Tvs. at tað er ongin roknskaparpostur, sum er vektaður á nakran hátt. Her skal vísast á, at einstakir bøndur hava lutfalsliga stóra „aðra“ inntøku. Henda inntøkan er vanliga leiga av lendi, grótbrót, arbeiðsinntøka við maskinu, veltistuðul v.m.. Har talan er um inntøku frá maskinum, kann roknast við, at útreiðslurnar til maskinrakstur eru hægri enn hjá øðrum bóndum. Tað er ikki tikið hædd fyri slíkum í hagtølunum, tí tað er ógjørligt at marka hesar útreiðslurnar heilt neyvt. Um slíkt skal gerast, má bóndin sjálvur gera tað beinanvegin, skjalið kemur.

Fylgiskjal 11 L vísir gongdina hjá meðalgarðinum hesi árini. Hetta vísir, at mjólkaframleiðslan á meðalgarðinum øktist fram til 1991 frá 86.600 litrum í 1986 til 130.600 í 1991. Síðani er meðalframleiðslan minkað til 102.500 litrar í 1995. Í 1996 øktist nøgdin uppí 106.500 litrar. Her skal viðmerkjast, at tann samlaða innvigingin til L/F MBM var størst í 1993. Frá 1994 hevur framleiðslan verið kvoterað. Av fylgi-

skjalið 11 L framgongur eisini, at bruttoinntøkan frá seyði eisini var hægst í 1991. Verður sammett við aðrar vinnur, so er gongdin tann sama. Tann stóra lækkingin í bruttoinntøkuni frá seyði í 1993 hongur óiva saman við, at meirvirðisgjaldslógin varð sett í gildi 1. januar 1993. Her skal tó nevnast, at bøndur nú fáa meirvirðisgjaldið á seyðakjøti aftur, men tað sær út til, at hetta ikki hevur munað nakað, tá hugt verður at tølunum fyri 1995 og 1996.

Verður hugt at útreiðslunum sæst, at hesar eisini eru størstar í 1991, men hóast tað, so er avlopið eisini størst í 1991. Niðast á øllum fylgiskjølunum er skuldin við ársenda sett upp. Hetta er tann samlaða skuldin hjá tí einstaka festibóndanum. Her sæst, at skuldin økist fram til og við 1991.

Í fylgiskjølunum 11 M – 11 W eru roknskapirnir umarbeiddir soleiðis, at teir vísa inntøkur og útreiðslur fyri hvønn litur av mjólk. Í fylgiskjali 11 X sæst gongdin hjá einum meðalgarði í tíðarskeiðnum 1986 – 1996. Á fylgiskjølunum 11 Y og 11 Z eru myndir, ið vísa gongdina í mjólkarrakstrinum.

Verða fylgiskjølini 11 L og 11 X samanhildin sæst, at tann stóra framleiðslan fyrst 90'unum var sera kostnaðarmikil. Kraftfóðurútreiðslan til hvønn liturin øktist upp til 2,15 kr. í meðal í 1990, og er síðani lækkað til 1,61 kr/l í 1993, men er økt aftur upp í 1,97 kr/l í 1996. Eisini sæst, at nógv hoyggj varð keypt í árunum 1991 og 1992. Henda útreiðslan er síðani minkað munandi fyri hvønn framleiddan litur. Eisini ein útreiðsla sum heilivágur og djóralækni var hægri fyri hvønn liturin, tá framleiðslan var størst. Hetta bendir møguliga á, at kýrnar vórðu pressaðar meiri enn tær toldu, hetta kann eg tó ikki úttalað meg um. Men her skal ein vera varin at gera niðurstøður, tí munurin er ikki so stórur. Ein partur av útsvingunum kemst av, at tað ikki eru teir somu roknskapirnir, sum eru við øll árini. Í fylgiskjali 11 BB sæst, at í teimum 6 roknskapunum, sum eru við øll árini, eru útsvingini ikki so stór.

Eitt løgið fyribrigdi er, at kostnaðurin til viðlíkahald var sera lágur í 1991, bæði í krónum og fyri hvønn litur mjólk. Tað skuldi annars verið beint øvugt, tí tá hevði bóndin ikki stundir at gera so nógv sjálvur, og tí var noyddur at fáa onnur at gera tað fyri seg. Men hetta bendir á, at tað eru ábøtur, sum hava ligið á láni, tí stundir hava ikki verið til tær.

Á fylgiskjali 11 AD eru hagtøl, sum vísa kraftfóðurnýtsluna hjá einum einstakum garði fyri árini 1989-1994. Serliga áhugavert er at síggja, at nýtslan av A-blanding økist pr. litur mjólk til og við 1992, síðani minkar hon aftur. Í 1994 er nýtslan pr. litur á sama støði sum í 1989. Havast skal í huga, at hetta er samlaða nýtslan á garðinum, tvs. eisini til ungneytini. Seyðafóður, verpifóður v.m. er tó ikki við.

### *f. Avlopið (lønin til bóndan)*

Á fylgiskjølunum 11 L og 11 X sæst, at hóast avlopið var størst í árunum 1990-1992 í krónum, so var avlopið fyri hvønn liturin hesi árini lægst.

Tá metast skal um avlopið, er neyðugt at kanna, hvussu stóran týdning studningurin hevur á raksturin. Um t.d. 1990 á fylgiskjali 11 X verður kannað nærri sæst, at samlaða avlopið var 2,04 kr. pr. litur mjólk (Tá er alt roknað um til litur mjólk, hóast eitt nú inntøkan frá seldum seyði pr. litur mjólk ikki sigur so nógv.) Tann beinleiðis stuðulin var 1,57 kr/l í mjólkarstuðli, 0,11 kr/l í stráðfóðurstuðli og 0,14 kr/l í avloysingarstuðli. Hetta gevur tilsamans 1,82 kr/l, ella 89% av avlopinum. Tá er ikki roknað við neytakjøtstuðli, rentustuðli í sambandi við lán úr Jarðargrunninum, óbeinleiðis stuðli mjólkarflutning v.m.

Tá samlaða avlopið, sum fellur í bóndans part, skal sammetast við aðrar inntøkur í landinum, er neyðugt at finna, hvussu nógv ársverk skulu til at vinna hetta avlopið. Vit hava ikki nakra skráseting í Føroyum, sum sigur, hvussu nógv eitt ársverk kann klára. Verður mett, at eini bóndahjún hava tilsamans 2 ársverk, skal samlaða avlopið býtast í 2. Sjálvt í 1991 lá vinningurin til hvørt ársverkið undir eina vanliga arbeiðsmannaløn.

### *g. Íløgan*

Á fylgiskjølunum 11 AA - 11 AC er úrslitið samanhildið við skuldina hjá tí einstaka bóndanum. Harafturat er víst, hvussu stór skuldin var fyri hvønn litur av mjólk, ið varð avroknaður til L/F MBM. Sum tað sæst er skuldin ógvuliga ymisk, men meðalskuldin fyri hvønn liturin liggur millum 10 og 14 kr/l í hesum tíðarskeiðnum hjá teimum festunum, ið eru við. Tað eru tó festir, sum hava munandi hægri skuld. Tølini eru ov fá til at gera nakra haldgóða niðurstøðu út frá.

### *h. Privat jørð*

Á P/F Gannskoðaravirkinum INPACT verður roknskapur bert gjørdur fyri ein privatan bóndagarð. Tann roknskapurin er tikin við undir almennu jørðina, tí ein roknskapur er ov lítið at gera nakrar niðurstøður út frá.

### *i. Serlig skattlig viðurskifti hjá festibóndum*

Ognarbøndur verða skattliga viðgjørdur á sama hátt sum øll onnur vinnurekandi, meðan tey serligu ognarviðurskiftini hjá festibóndum gera tað, at festibóndur ikki hava møguleika at avskriva skattliga av

teimum ognunum (íløgunum), sum festið (Jarðargrunnurin) eigur. Í tíðarskeiðnum frá 1979 til 1989, kundu festibøndur avskriva ájavnt við falnar avdráttir av lánum úr Jarðargrunninum. Tó vóru nakrar serligar avmarkingar í avskrivingarrættinum. Hetta var ein ótolandi støða hjá bøndrunum, og frá og við 1990, kom Líkningarráð Føroya við einum nýggjum rundskrivi, Rundskriv nr. 1 frá 1991, sum ásetur, at festibøndur kunnu útreiðsluføra rentur og avdráttir av lánum úr Jarðargrunninum, sum eru tikin til at fíggja íløgur, sum Jarðargrunnurin eigur. Tað vil siga lán til fjós, brunnar, seyðahús og aðrar fastar ognir. Tó kunnu avdráttir til sethús ikki dragast frá. Eitt „lán“ til eina slíka íløgu, verður skattliga mett sum lán hjá festinum og ikki hjá bóndanum (festaranum). Um so er, at bóndin hevur fíggjað ein part sjálvur, kann hesin parturin avskrivast eftir galdandi avskrivingarlóg. Vanliga er tað tó soleiðis, at Jarðargrunnurin fíggjar alla íløguna. Tankin aftanfyri hesa skattligu viðgerðina er tann, at tá bóndin ikki eigur ognina, men skal gjalda Jarðargrunninum eina upphædd, sum svarar til rentur og avdráttir av einum láni, verður slíkt gjald at meta sum leiguútreiðsla, sum er frádráttarbær. Hóast bóndin megnar at gjalda alt „lánið“ aftur, so fær hann ikki ognarrættin til tær ognirnar, sum lánið upprunaliga var tikið til at fíggja.

Um „lánið“ verður afturgoldið eftir upprunaligu avtaluni, er henda skipanin í lagi. Men trupulleikin kemur, tá bóndin ikki megnar at gjalda teir árligu „avdráttirnar“. Tí skattliga verða teir falnu, men ógoldnu „avdráttirnir“ mettir sum privat skuld. Tvs. bóndin fær frádrátt tað árið „avdráttirnir“ falla til gjaldingar, líka mikið um teir verða goldnir ella ikki, og ongan frádrátt tað árið skuldin verður goldin. Tað er sama prinsipp, sum er galdandi hjá øllum øðrum vinnurekandi persónum og feløgum. Teir bøndur sum koma í fíggjarliga trongstøðu, kunnu fáa Jarðargrunnin at umleggja tað falnu skuldina til eitt langfreistað lán, møguliga við at hækka verandi lán. Tá slík umlegging verður gjørd, verður tann falna skuldin flutt aftur frá bóndanum (festaranum) til festi (Jarðargrunnin), tvs. at bóndin hevur útreiðsluført ov nógv, og skal tí skattast av hesi umleggingini. Grundgevingin fyri at fáa slíkar umleggingar er ein fíggjarlig trongstøða, og tí eru hesir bøndurnir ikki førir fyri at gjalda tann skattin, sum tá verður álagdur. Tí kann sigast, at skipanin leggur stein oman á byrðu, tá umleggingarnar verða fluttar aftur til eitt langfreistað lán. Um skuldin verður løgd til eitt privat lán, t.d. rakstrarlán, so verður ongin skattur álagdur. Men sjálvsagt fær bóndin ikki frádrátt einaferð afturat, tá rakstrarlánið verður afturgoldið.

Tær ognirnar sum bóndin sjálvur eigur, kunnu avskrivast eftir vanligu reglunum í avskrivingarlógini. Í slíkum førum hevur tað ongan týdning, hvussu ognirnar eru fíggjaðar.

Í øllum øðrum viðurskiftum verða festibøndur skattliga viðgjørdir

sum ognarbøndur. Tað serliga fyri bæði festi- og ognarbøndur er, at so leingi ein kálvur er lítil, kunnu allar útreiðslurnar til kálvin dragast frá í skattskyldugu inntøkuni. Men tá eina kvíga kálvar fyrstu ferð, skal hon skattliga ognarførast. Tvs. at tað, sum mett er at tað kostar at føða ein kálv fram til eina kúgv, tá skal „inntøkuførast", og ikki fyrr enn kúgvin verður dripin, og kjøtið verður selt, verður henda upphæddin útreiðsluførd. Hetta er prinsipielt tað sama, sum hendir hjá øðrum vinnurekandi, men munurin er bert tann, at tá onnur vinnurekandi uppbyggja eina goymslu ella gera eitt arbeiði yvir eitt langt tíðarskeið, tá kunnu tey ongantíð útreiðsluføra nakað, alt skal ognarførast beinanvegin. Um tann fíggjarliga stýringin hjá bóndanum er góð, tá talið á mjólkkúm økist, er skipanin ein fyrimunur fyri bóndan, tí hann kann útseta skattin í eitt ella tvey ár. Men er tann fíggjarliga stýringin ikki góð, kann hetta viðføra, at tað gerst sera tungt at gjalda henda skattin.

# D. Ognar- og grannaviðurskifti á landbúnaðarognum

## 1. Lóg nr. 171 af 18.05.1937 for Færøerne om hegn og markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 17.03.1951

(sí skjal 14 – við føroyskari týðing).

### *a. Girðing*

(1) Alment.

Orðið girðing er komið úr donskum. Har er málsligi týdningurin:[39]

> „spærrende eller værnende skel (omkring mark, skov o.l.) bestående af en over jordoverfladen anbragt afspærring af forskellig art (dige, stakit osv.) hyppigt i form af (jordevold med) tætplantede buske eller træer"

Garðalógin sigur ikki ítøkiliga, hvussu girðing skal verða gjørd. Endamálið er sjálvsagt at tryggja, at ymisk sløg av dýrum ikki sleppa um girðingina. Girt kann verða fyri ymsum dýrum, eitt nú neytum, rossum, seyði, gásum, dunnum og høsnum. Hvussu girðingin skal verða gjørd, velst tí alt um, hvørjum girt verður fyri. Eisini velst um, hvussu leingi neyðugt er, at girðingin skal halda, ella um hetta bert verður fyri stutta tíð.

Girðing má skiljast í síni allar víðastu merking, sum øll tiltøk, sum

[39] Ordbog over det danske sprog 7. bd., Gyldendal 1925/1966.

forða at tað slepst yvirum og ikki bert girðing í trengri merking. Minst 90 cm. høgt fullgott stik við hóskandi meskum er í lagi sum lóglig girðing fyri øllum dýrum, og uttan mun til tíðarskeið, um ikki stórdýr eru. Sama er við fornum grótgørðum ella evt. betonggørðum við somu hædd. Skal garður vera framvið vegi, má roknast við, at vanligar bil-verjur – um stáltráður er spentur í neðra, og kanska eisini í erva, eisini er fullgóð girðing.

Píkatráður kann nýtast sum girðing, men við stórum varsemi. Í § 13 í garðalógini verður sagt:

> „Det er forbudt at benytte Pigtraad til Hegn paa saadan Maade, at Mennesker eller Dyr lettelig er udsat for at lide Skade. Overtrædelse af disse Bestemmelser straffes med Bøder.“

Áir, vøtn, hamrar og berg kunnu í ávísum førum vera ein náttúrlig girðing. Hetta sbr. garðalógini § 14 3. pkt. har sagt verður:

> „Elv, Klippe eller andet, der freder for samme Slags Husdyr, hvorfor Hegn skal frede, anses som lovligt Hegn.“

Í seinasta enda er tað eftir garðasýnislógini § 12 upp til garðssýnið at gera av, um girðing er lóglig út frá ítøkiligari meting á staðnum. Í § 12 verður sagt:

> „Om Hegn er lovligt, bestemmes i Tilfælde af Tvist af Hegns-synsmændene under Hensyn til, om Hegnet skal frede for Heste, Kvæg og Gæs eller tillige for Faar.“

Í § 14, 1. og 2. pkt., stendur at

> „Hegn sættes i Grænseskellet. Intet Hegn maa lægges længere ind paa Naboens end paa egen Grund og ikke over en halv Meter. Nabo kan ikke modsætte sig, at det hele Hegn eller Dele deraf lægges paa hans Grund, naar det er uomgængelig for-nødent, dog mod Erstatning.“

Um portur sigur garðalógin í § 15, stk. 1, síðsta pkt., at:

> „Led paa almindelig befaret Vej skal være saaledes indrettet, at det med Lethed kan aabnes og lukkes.“

Við almennan veg má onki portur uppsetast í girðing sbr. § 15, stk. 2, uttan so er, at kommunali myndugleikin á staðnum loyvir hesum. Eftir somu grein kann kommunali myndugleikin áseta treytir um, hvørja

breidd og hvussu portrið annars skal vera gjørt, og kann eisini seta slíkar treytir til verandi portur. Stk. 2 veitir eisini heimild til, at kommunali myndugleikin tekur avgerð um, at verandi portur, sum er í girðing út á almennan veg, verður tikið burtur, og girðing sett í staðin. Tó verður givið tí, sum fær boð um at beina burtur portrið í slíkum føri, heimild at skjóta avgerðina inn fyri løgtingið, innan 3 mánaðir eru farnir frá tí, at avgerðin var honum kunnug. – Løgtingið má nú tulkast sum landsstýrið, eftir at løgtingið við heimastýrislógini slepti sínum vanliga fyrisitingarliga starvi. Hevur ánarin av portrinum útreiðslur av at beina tað burtur, kann hann fáa endurgjald fyri hesar útreiðslur frá tí almenna eftir reglunum í 1881-ognartøkulógini.

Av tí at landsvegir ikki vóru kendir sum fyribrigdi, tá ið garðalógin fekk gildi, sigur hon einki um, hvussu § 15, stk. 2, skal tulkast fyri landsvegir. Einki er at ivast í, at javndømi eigur at verða tikið í hesi reglu, tá ið tað snýr seg um landsvegir, soleiðis at skilja, at myndugleikin tá er hjá landsverkfrøðinginum. Serligan stuðul fær slíkt javndømi við regluni í § 6, nr. 3, í løgtingslóg nr. 51 frá 25.07.1972 um landsvegir.

Um portur verður alment sagt í § 15, stk. 3:

> „Ethvert Led i Hegn om Indmarken skal være forsynet med forsvarligt Lukke og, bortset fra Led, der er bestemt til at passeres af Køretøjer, indrettes saaledes, at det, hver Gang det aabnes, falder tilbage af sig selv, og at det, for saa vidt det findes i Hegn mod haugen, aabnes ud imod denne.“

Ikki er kravt treytaleyst, at portur ella rulluportur skal gerast, um so er, at vegur fer um mark, tað verið seg markið millum innan- og uttangarðs ella millum hagapartar. Hetta er upp til garðssýnið at gera av alt eftir umstøðunum. Reglurnar um hetta eru í § 15, stk. 2, 3. pkt., sum er soljóðandi:

> „I Tilfælde, hvor det efter Kendelse af Hegnssynsmændene eller højere Instans er paakrævet til Fremme for Landbruget, at oprette Hegn over offentlig Kørevej, er vedkommende kommunale Forstanderskab pligtig til at oprette og vedligeholde de for den offentlige Trafik fornødne Laager. Over Trafikveje skal Rørrister altid anvendes. Overtrædelse af Bestemmelsen i dette Stykkes første Punktum eller af de af den paagældende Myndighed givne nærmere Forskrifter straffes med Bøder.“

Um portur ella rulluportur skal vera, er upp til garðssýnið at gera av, alt eftir hvussu stór ferðslan er eftir vegnum, og vegurin tí má roknast

sum ferðsluvegur. Reglurnar í § 15, stk. 2, 3. pkt,. mugu brúkast til javndømis, tá ið tað snýr seg um landsvegir.

Rulluportur við rørum verða nærum ikki longur nýtt, tí tey halda ikki í longdini. Í dag verða jarnbreytaskinnarar nýttir ístaðin fyri rør, og í førum verður eisini elgirðing sett niður ímillum skinnarararnar. Landsverkfrøðingurin[40] upplýsir, at kostnaðurin umleið fyri eitt rulluportur yvir landsveg (8-10 metur breitt) er um kr. 130.000,00. Landsverfrøðingurin ger ikki rullurportur við landsveg, uttan so er, at umstøðurnar uttan nakran iva krevja tað, ella at garðssýnisnevndin á staðnum áleggur stovninum at gera tað. Í løgtingslóg nr. 51 frá 25.07.1972 um landsvegir § 3, pkt. 4, eru reglur um, at kommunan á staðnum í ávísum førum skal bera ávísan part av kostnaðinum til rulluportur í landsvegnum.

(2) Garðsskyldan.
Garðsskylda merkir, at tann, sum hevur garðsskyldu, hevur skyldu at taka stig til, at girðing verður gjørd at halda hana viðlíka og annars at bera kostnaðin av henni. Um eigari og brúkarar av ognum ikki eru teir somu, er ásett í § 19 í garðalógini:

> „Hvor Ejer og Bruger er forskellige, hæfter de een for begge og begge for een for alt pligtigt Arbejde vedrørende Opførelse og Vedligeholdelse af hegn. Bruger af Jord i offentligt Eje regnes i denne Lov lige med Ejer, medmindre der i de enkelte Tilfælde af vedkommende Myndighed er truffet anden Bestemmelse.“

Garðalógin er av tí løgfrøðisliga slagnum, sum nevnt verður deklaraorisk. Tað merkir, at eru tveir partar, sum eru grannar, samdir um aðra girðingarloysn, enn ta, sum lógin ásetir, so kunnu teir frávíkja lógarreglunum og gera av annan hátt at girða uppá enn tann, sum lógin fyriskrivar. Heilt frían avtalurætt hava teir tó ikki. Í § 17 í lógini verður nevniliga fyriskrivað, at

> „Saafremt Naboer enes om, at deres gensidige Hegnspligt skal ophæves, indskrænkes eller udvides udover, hvad der i denne Lov er bestemt, skal saadan Aftale kunne træffes for indtil 10 Aar ad Gangen. Vedrører Aftalen Jord, som bruges af nogen anden end Ejeren, er den ikke gyldig, førend Ejeren har tiltraadt den.“

Innangarðs er høvuðsreglan, at eingin garðsskylda er hjá eigarum sínámillum. Frá 25. oktober til 14. mai árið eftir hevur yvirliggjandi hagi nevniliga rætt at lata sín seyð ganga á tilhoyrandi innangarðs

[40] Álvur Olsen, í telefonsamrøðu 26. februar 1996.

jørð, sbrt. hagalógini § 34, stk. 1, og seyðurin kann tí sleppa at ganga frítt hetta tíðarskeið. Undantakið er, at á einstøku ognini kann vera álagt ítak (servituttur) um garðsskyldu, ella at girt hevur verið millum ognir siðvenjuliga, ella sbrt. avtalu, ongin longur kennir til, ella sbrt. ósagdari avtalu. Krav kann eisini verða sett fram eftir § 1 í girðingarlógini, har sagt verður:

> „I Indmark kan Nabo af Nabo kræve Hegn for Heste og Kvæg."

Eftir hesi reglu kann bara setast fram krav um girðing fyri rossum og neytum. Til øvugdømis kann sigast, at ikki kann setast krav um girðing fyri seyði, gásum ella høsnum. Um útreiðslurnar í samband við slíka girðing verður sagt í § 7 í girðingarlógini:

> „Naar Nabo kan kræve Hegn af Nabo, skal de sammenstødende Ejendomme tage hver sin Halvdel deraf. Dog skal den, der ikke selv forlanger Hegn eller Forandring af bestaaende Hegn, og som godtgør, at denne Bestemmelse vilde uforholdsmæssig betynge ham, nyde saadan Formindskelse i sin Hegnspligt, som findes billig. Hvor Hegnspligten ved retsgyldig Overenskomst eller Afgørelse er ordnet paa anden Maade end i denne og foregaaende Paragraf bestemt, har det derved sit Forblivende."

Elstik er helst hóskandi at nýta í slíkum førum, tí ímóti stórdýrum verður helst bara girt í styttri tíðarskeið og um summarið orsakað av, at hagin eigur vetrarbitið á bønum eftir hagalógini § 34, stk. 1.

Sum kunnugt, so kann hagin krevja, at fullgóð girðing er ímillum millum bø og haga. Hetta sbrt. garðalógini § 2, stk. 1, har sagt verður at:

> „Imellem Indmark og Udmark kan Udmarkens Ejer kræve Hegn for Heste, Kvæg og Faar. Hegnspligten paahviler Indmarken."

Henda regla verður supplerað av § 16 í garðalógini, sum sigur:

> „Hegn i Indmark eller mellem Indmark og Udmark skal holdes i lovlig Stand til enhver Tid, hvori Jorden ikke efter de gældende Bestemmelser (derunder ogsaa Bestemmelse, som træffes for enkelt Vaar eller Høst i Henhold til Haugelovens § 35, 2det Stykke) skal ligge aaben for Græsning af den Slags Husdyr, for hvilke det skulde hegne. Hegn mellem Udmark og Udmark skal holdes i lovlig Stand i den Tid, der for ethvert enkelt Tilfælde bestemmes af Hegnssynsmændene, enten ved Hegnets Opførelse eller senere, om Tvist opstaar om Tiden."

Kostnaðin og skylduna at halda girðingina millum innan- og uttangarðs hevur í grundregluni tann, sum eigur tað einstaka matr. nr., sum liggur uppat markinum millum innan- og uttangarðs. Henda regla kann tó frávíkjast soleiðis, at tað við grannastevnu verður samtykt, at allir eigararnir innangarðs samtykkja ein lykil, sum teir skulu býta girðingarskylduna innangarðs eftir. Í § 2, stk. 2, í girðingarlógini verður nevniliga sagt:

> „Ved Vedtægt paa Grandestævne kan det (selv om Udmarkens Ejer ikke kræver Hegn) bestemmes, at Hegn mellem Indmark og Udmark skal være fælles for flere eller alle Indmarkslodder i Bygden.
>
> Stemmeberettigede ved Afstemning over Forslag til saadan Vedtægt er Ejerne af de paagældende Indmarkslodder. Er Forslag til saadan Vedtægt fremsat, men ikke endeligt vedtaget paa Grandestævne, kan enhver stemmeberettiget, som har stemt for Forslaget, føre Sagen videre til Behandling efter §§ 45-50. Ved Sagens Afgørelse vil det i Særdeleshed være at tilstræbe, at Hegnsforholdet ordnes paa den for alle Indmarksejerne hensigtsmæssigste og billigste Maade.“

Í flestu førum er als eingin ivi um, hvat er innangarðs, og hvat er uttangarðs. Í nógvum førum hava hagagarðarnir staðið uppi í øldir, og øll vita, hvar markið hevur verið innan- og uttangarðs; kanska sæst hetta eisini týðuliga í matrikulkortinum. Í førum kann tað tó vera heldur ivasamari. Um velt verður upp úr nýggjum í haganum, hvar liggur tá hagamarkið? Eisini kunnu føri vera, har sum landsvegur ella annar vegur ger tað praktiskt at lata landsvegin verða mark millum bø og haga, hóast markið annars eftir fyrndargomlum reglum hevur verið aðrastaðni. Um slíkar ivaspurningar ásetir hegnslógin § 5:

> „Om en Strækning efter denne Lov skal anses som Indmark eller som Udmark, afgøres af den Myndighed, som i det foreliggende Tilfælde har at afgøre den Sag, for hvilken Spørgsmaalet har Betydning.“

Hetta merkir, at í flestu førum gera garðssýnismenninir av, hvat er innangarðsjørð, og hvat er uttangarðsjørð, uttan tá ið spurningurin verður lagdur kærumyndugleikunum.

Garðalógin er rættiliga tigandi, tá ið tað snýr seg um spurningin um girðing fram við ferðsluvegi. Einki krav verður sett um, at vegaánarin – tað verið seg landsverkfrøðingurin, kommunan á staðnum ella privatur – hevur skyldu at girða framvið vegnum

soleiðis, at seyður og onnur dýr ikki fáa skaða í ferðsluni, ella hinvegin ferðsluskaði ikki stendst av, at seyður og onnur dýr koma á vegin.

Tá ið landsverkfrøðingurin er vegaánari, hevur mannagongdin ofta verið tann, at landsverkfrøðingurin út frá ítøkiligu umstøðunum hevur mett, um neyðugt hevur verið at girða fyri ferðsluni, og hevur so gjørt avtalu við eigaran, í flestu førum hagastýrið um, at landsverkfrøðingurin rindar og setir upp fyrstu girðingina í samband við vegagerðina, meðan hagastýrið hereftir rindar kostnaðin fyri viðlíkahaldi av evt. nýggjari girðing. – Men, eingin regla er í garðalógini um, at jarðaránarin, har vegurin liggur, kann leggja fyri garðssýnið spurningin, um neyðugt er at girða framvið vegnum orsakað av ferðsluni, ella um, hvør skal bera kostnaðin av girðing framvið landsvegi. Verður girt, so má í sambandi við girðingina millum ánaran og landsverkfrøðingin gerast avtala um, hvussu seyðurin og onnur dýr skulu sleppa tvørturum vegin; eitt nú um seyðasmogur skulu gerast ella um, at ikki verður girt á ávísum stað, so har slepst yvirum.

Har vegur fer um mark, har girðingarskylda er, vil ein og hvør kanska hugsa, at vegaánarin hevur skyldu at hava portur ella rulluportur á sama hátt, sum ánararnir annars har á staðnum hava girðingarskyldu. – So er ikki – Skyldan at gera portur ella rulluportur verður avgjørd av garðssýninum eftir einari ítøkiligari meting, um hetta er neyðugt til frama fyri landbúnaðin á staðnum, sbr. garðalógini § 15, stk. 2.

Tá ið garðssýnisnevndin ger av, at grannar skulu býta garðsskylduna sínámillum, verður ofta í úrskurðinum tilskilað, hvønn part av felagsmarkinum hvør einstakur av grannunum skal girða. Í hesum sambandi verður tikin hædd fyri, hvussu tað liggur at koma til at girða. Er partur av markinum, sum girðast skal, liggjandi langt burtur frá vegi og kanska høgt, so fær tann, sum skal taka sær av hesum, lutfalsliga minni strekki at girða enn tann, sum skal girða, har høgligt er at koma til við bili og lætt er at seta girðing upp.

(3) Girðingarmálsviðgerð.

Í hvørjari sókn – nú hvørjari kommunu – situr garðssýnisnevnd við trimum limum, sum valdir verða av kommunustýrinum, sbrt. girðingarlógini § 44. Tað er eftir somu grein borgarlig skylda at taka við vali sum garðssýnismaður (og heruppií eisini kvinna).

§ 44, stk. 2, í lógini um inhabilitet hjá garðssýnismonnum má nú haldast at vera farin úr gildi við reglunum í løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993 um fyrisitingarlóg § 3-6 um ógegnið, og fyri inhabilitet hjá garðssýnismonnum eru nú tær vanligu reglurnar fyri inhabiliteti galdandi. Í § 44, stk. 6 og 7, eru reglur fyri, hvørja løn sýnsmenninir skulu hava fyri starv sítt. Hesar mugu sigast at vera farnar úr gildi

eftir desvetuto grundregluni vegna ta høgu inflatión, sum hevur verið her á landi seinastu 50 árini, síðan reglurnar fingu gildi.

Garðssýnið røkir tað starv, sum litið er tí til eftir garðalógini, men hevur harafturat starv sum vatnsýnið eftir reglunum í lóg nr. 169 af 18.05.1937 for Færøerne om benyttelse af indsøer og vandløb, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995.

Eftir § 44, stk. 4, skipar garðssýnisnevndin seg sjálva við formanni. Mál, sum garðssýnisnevndin skal gera av, vera av einum av pørtunum byrjaði við, at send verður formanninum skrivlig kæra. Formaðurin ásetir so ástaðarviðgerð, sum ikki má fara fram fyrr enn 2 * 24 tímar eftir, at partarnir í málinum hava fingið fráboðan um viðgerðina. Á slíkum fundi roynir nevndin í fyrsta lagi at fáa semju í lag millum partarnar, sbrt. § 46, stk. 1, men um hetta ikki eydnast, tá verður úrskurður gjørdur av nevndini.

Í avgerðina skal eftir lógarinnar § 47 altíð koma fram:

> „Hvad enten Sagen afgøres ved Forlig eller Kendelse, maa den trufne Afgørelse i hvert af de nedenfor nævnte Tilfælde indeholde Oplysning om de for sammes Vedkommende fremhævede Punkter:
>
> 1. Naar nyt Hegn skal rejses:
>
> Om Hegnets Højde og øvrige Beskaffenhed, samt af hvem og inden Udløbet af hvilken Frist det foreskrevne Arbejde skal udføres, og hvorledes der bliver at forholde med Hegnets fremtidige Vedligeholdelse;
>
> 2. Naar et ældre Hegn skal forandres eller ombyttes med et nyt:
>
>    Om de under Nr. 1 ommeldte Punkter, samt hvorledes der skal forholdes med det ældre Hegns Forandring eller Borttagelse, hvem der skal iværksætte det herhenhørende Arbejde, og hvorvidt der herfor skal gives nogen Godtgørelse, og i bekræftende Fald af hvem Godtgørelsen skal ydes, samt dens Størrelse og Betalingstid;
>
> 3. Naar et brøstfældigt Hegn skal udbedres:
>
>    Hvorledes, af hvem og inden Udløbet af hvilken Frist det foreskrevne Arbejde skal udføres.“

Í § 48 í lógini er ásett, at sýnsmenninir í samband við úrskurð um ávíst mál eisini skulu taka støðu til, hvør av pørtunum skal bera málskostnaðin t.v.s. ferðakostnað, samsýning til garðssýnismenninar og evt. medhjálp hjá pørtunum, og skal tann parturin, sum avgerðin gongur ímóti, vanliga bera kostnaðin. Um semja verður partanna millum, skal semjan eisini innihalda avgerð um, hvussu málskostnaðurin skal být-

ast. Á fleiri støðum í landinum hevur kommunan á staðnum tó borið kostnaðin til sýnsmenninar, m.a. í Havn.

Avgerðir hjá garðssýninum kunnu skjótast inn fyri landbúnaðarstevnu við nýggjum kærumøguleika fyri yvirlandbúnaðarstevnu sbr. girðingarlógini § 49. Frestin at skjóta avgerðina inn fyri hægri myndugleika er 3 vikur, frá tí avgerðin hjá garðssýninum var gjørd kæraranum kunnug. Neyvari reglurnar um viðgerðina í landbúnaðarstevnu og yvirlandbúnaðarstevnu eru ásettar í lóg nr. 84 af 31.03.1926 for Færøerne om Landvæsenskommisioner, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995, og verður henda viðgerð nærri umrødd á bls. 123. Spurningar um viðlíkahald av girðing, kunnu skjótast inn fyri hægri myndugleika eftir § 49.

Avgerðir hjá garðssýnisnevndini verða fullgjørdar á tann hátt, at tá ið tað í úrskurði ella semju er ásett ávís frest fyri ávísum girðingararbeiði, og hetta ikki er framt, so tekur garðssýnisformaðurin sbr. garðarlógini § 50, stk. 1, og skipar so fyri, at arbeiðið verður gjørt fyri rokning hjá tí, sum skyldu hevur at gera arbeiðið. Eftir § 50, stk. 2, leggur kommunan á staðnum út fyri tilfar og arbeiðsløn og krevur so peningaupphæddina aftur frá tí, sum skyldu hevði at gera arbeiðið. Spurningar um at lata arbeiði gera fyri rokning hjá tí girðingarskylduga sbr. § 50 kunnu heldur ikki skjótast inn fyri hægri myndugleika. Men verður ikki goldið, er neyðugt hjá kommununi at stevna við vanligum rættarmáli, og tá kunnu dómstólarnir taka støðu til, um garðssýnisnevndin er farin út um heimildir sínar, men ikki um sjálva metingina hjá nevndini, um hvørt útreiðslan til hegnið var neyðug.

## b. Um ábyrgd og upptøku av húsdýrum

Eftir § 20 í garðalógini verður tann sektaður, sum uttan heimild, rekur ella tjóðrar húsdýr inn á annan manns ogn á tann hátt, at hann letur upp portur ella tekur niður girðing. Eftir § 20, stk. 2, verður tann revsaður á sama hátt, sum letur húsdýr síni út á almennan veg, tað verið seg kommunalan ella landsveg. Eftir § 21 verður eisini tann sektaður, sum rekur húsdýr av annanmanns ogn inn á sína egnu ogn. Eigarin verður bert revsaður, um brotið er tilætlað, men í førum, har brotið ikki er tilætlað, verður tó sektað í førum, har „dyret er vanefuldt“ t.v.s. ferð eftir ferð fer inn á annanmans ogn.

Endurgjaldskrøv ímóti ánaranum fyri skaða, sum húsdýr, komin av leið, gera á annanmans ogn, verða eftir reglunum í § 20, § 21, § 22 og § 23 avgjørd sbrt. vanligu endurgjaldsgrundregluni – hini sonevndu culparegluni.

Í § 25 í garðalógini er ásett:

> „I alle Tilfælde, hvor Husdyr har gjort Skade paa fremmed Ejendom, kan begge Parter kræve Skaden fastsat ved Skøn af Hegnssynsmænd (§ 44) ved Henvendelse til disses Formand (§ 51).“

Sýnsmenninir kunnu so meta um, hvussu stórur skaðin er. Einki verður nevnt um, hvussu farast skal fram, um so er, at annar parturin ikki rindar tað endurgjald, sum sýnsmenninir áseta. Lítið er at ivast í, at so má parturin, sum krevur endurgjald, stevna, og dómstólarnir mugu so frítt kunna meta um skaðan av nýggjum.

Skaði sum stendst av, at dýr kemur inn á annanmans ogn, er sjálvsagt ógvuliga torførur at gera upp, og tí er í § 25, stk. 2, ásett ein ábyrgdarbótskipan t.v.s., at tað frammanundan er ásett í føstum tølum, hvat minsta endurgjaldstalið skal verða. Upphæddirnar, sum nevndar eru, eru frá 1937, og upphæddirnar vóru tá stórar, men við tí stóra prísvøkstrinum, sum hevur verið seinastu 50 árini, so eru hetta ikki tøl, ein kann rokna við í dag. Ilt er tó at siga, um heimild er fyri hjá garðssýnisnevndunum at inflatiónsregulera hesi tøl, tá ið endurgjaldskrøvini verða ásett í dag.

Um seyð sum kemur av leið verður í § 26 sagt:

> „Kommer Faar, uden at dertil er Hjemmel, ind i fremmed Hauge, bør det, hvis det vides at høre hjemme i Nabohaugen, drives tilbage til den. Er dette vidnefast sket saa ofte, at Faaret deraf kan skønnes at gaa mere i denne Hauge end i den Hauge, hvortil det hører, enten af den Tid, Faarene gaar paa Vinterhauge, eller af den Tid, de gaar paa Sommerhauge, skal det bortskaffes til første almindelige Slagtetid, efter at dette vidnefast er krævet paa vedkommende Ejers eller Haugerøgters Bopæl, saa betids, at han har haft Tid til at afværge den ulovlige Gang. Bortskaffes Faaret ikke til den Tid, skal han erstatte Omkostningerne ved dets Transport til ham. Kommer saadant Faar tilbage til samme Hauge, er det forbrudt, saaledes at to Trediedele tilfalder det offentlige og en Trediedel Ejeren af den Hauge, i hvilken det har gaaet. Vildt Faar (vargur), som løber over Markeskel og forstyrrer Nabohaugens Faar, skal tæmmes eller bortskaffes til næste Høst, efter at det vidnefast er forlangt paa vedkommende Ejers eller Haugerøgters Bopæl; sker dette ikke, er Faaret forbrudt, som ovenfor bestemt.
>
> Under Vinterhauge i denne Paragraf indbefattes ogsaa Indmark, paa hvilken Faar har haft Græsningsret, jfr. Haugelovens § 34.“

Í § 27 verður sagt, at um so er, at seyðurin ikki hoyrir heima í granna-haganum, so hevur røktingarmaðurin í haganum, har seyðurin hoyrir heima, skyldu at heinta seyðin; í seinasta lagi tá ið næstu ferð verður farið á fjall.

Um seyð, har ivi kemur í, um hvønn haga hann hoyrir til, verður í § 28 í garðalógini sagt:

> „Hvis Strid eller Tvivl opstaar om, til hvilken Hauge et Lam hører, som træffes umærket ved Fjeldgang om Høsten, skal det tilfalde den Hauge, i hvilken det forefindes. Faar, som er umærket eller saa skødesløst mærket, at Sysselmanden og to af ham tilkaldte uvildige Mænd erklærer Mærket for ukendeligt, behandles, om Ejeren er uvis, som Hittegods."

Í § 28 eru reglur uppsettar um, hvussu farast skal fram, um so er, at ross kemur í fremmandan haga.

Í teim førum, tá ið tað eftir garðalógini er heimilað at krevja endurgjald fyri skaða, sum dýr veldur á annanmans ogn, kann dýrið eisini verða upptikið av jarðaránaranum sbrt. girðingarlógini § 31. Somuleiðis kunnu gæs, høsn og dunnur verða upptikin eftir nærri í greinini ásettum reglum.

Tann, sum upptekur dýrið, skal eftir § 32 í garðalógini alt fyri eitt boða eigaranum frá, at hann hevur tikið tað upp. Veit hann ikki, hvør eigur, skal hann innan 3 dagar seta uppslag í svørtutalvu í egnu bygd síni og í teirri bygd, hann heldur eigaran býgva. Meðan hann hevur dýrið í varðveitslu, skal hann á forsvarligan hátt røkta tað eftir árstíðini, men ikki brúka tað. Neytum hevur hann rætt at mjólka, men hendan inntøkan skal tó vera tikin við í uppgerðina, tá ið endurgjald verður kravt frá ánaranum fyri upptøkuna.

Tá ið eigarin sigur frá, hvør hann er, hevur upptøkumaðurin eftir § 33 rætt til at fáa pening goldnan fyri henda kostnaða: Útreiðslur í samband við lýsingar, røkt av dýrinum, fóður og endurgjald fyri skaða, sum dýrið hevur gjørt á ognina hjá upptøkumanninum. Eru partarnir ikki samdir, ger garðssýnisnevndin av, um endurgjaldið er rímiliga ásett. Einki verður tó í lógini sagt um, hvørji ráð eru til at taka, um onkur ikki rættar seg eftir avgerðini hjá garðssýnisnevndini. Helst má tá farast víðari við málinum til fútarættin, um upptøkumaðurin ikki flýggjar út dýrið, hóast tað er goldið, sum garðssýnisnevndin ásetir, ella til uppboðssølu eftir reglunum, niðanfyri nevndar, um eigarin ikki vil gjalda tað, sum garðssýnisnevndin ásetir.

Í § 34 í garðalógini eru reglur um uppboðssølu av upptiknum dýrum. Har er ásett, at tá ið ávís frest er farin, so hevur upptøkumaðurin rætt at selja upptikna dýrið á uppboðssølu, um so er, at eigarin ikki er komin eftir dýrinum, ella um gjaldið fyri ásetta gjaldið fyri

upptøkuna ikki er goldið. Eftir reglunum í § 35 skipar sýslumaðurin fyri uppboðssøluni í teirri bygd, har hann býr, annars verður hon hildin av einum av kommunustýrinum tilnevndum uppboðssøluhaldara, sum skal verða góðkendur av amtmanninum (nú helst landsstýrinum). Um so er, at dýrið hevur eitt so lágt virði, at politiið ella garðssýnið metir, at tað ikki loysir seg at hava uppboðssølu, gerst dýrið ogn hjá upptøkumanninum.

## *c. Ferðsla á annanmanns jørð*

Av § 40 í hagalógini framgongur, at ongin, uttan at hetta er neyðugt, ella hann hevur loyvi til tess frá ánaranum, hevur loyvi at ganga í bønum. Brot á hesa reglu kunnu verða sektaði. Loyvi kann verða givið ítøkiliga, men kann eisini framganga av siðvenju á staðnum ella hevd. Uttanfyri gróðrartíðina verður kanska tikið eitt sindur lagaligari, um onkur gongur í bønum. Eftir somu reglu mugu foreldur heldur ikki tolerera, at børn teirra undir 14 ár fara í bøin. Somuleiðis mugu portur, sum eru innangarðs, eftir § 40, stk. 2, altíð latast aftur, tá ið gingið hevur verið um tey.

Uttangarðs er høvuðsreglan tann, at eftir § 41 í garðalógini hevur tann, sum ikki er eigari, als ikki heimild at ganga, uttan so er, at hann gongur eftir bygdagøtuni. Eigur maður lut í haganum, hevur hann tó loyvi at ferðast uttanfyri bygdagøturnar, uttan so er, at serligar ferðslureglur fyri eigarar eru gjørdar á hagastevnu sbrt. hagalógini § 3, stk. 2.

Fremmandum í haga er eftir § 42 givin henda heimild:

„Gang gennem fremmed Hauge er tilladt i følgende Tilfælde:

1. Haugerøgter har Ret til at søge efter sin Hauges Faar, naar han hver Gang underretter en af den anden Hauges Røgtere derom saa betids, at de kan følges ad eller mødes ved Markeskel, og naar han fører sin Hund i Baand.
2. Enhver har Ret til om Dagen at søge efter sin Hest eller sit Kvæg, naar han forud melder det til en af Haugens Røgtere. I øvrigt kan Bestemmelser herom træffes ved Vedtægt af Ejerne af Bygdens Hauger i Forening paa Grandestævne (jfr. Grandestævnelovens §§ 1 og 12).
3. Enhver er berettiget til at hente sine Tørv; dog skal han gøre det om Dagen og gaa ad den almindelige Vej.
4. Gang til fjernereliggende Hauge, Fuglebjerg eller anden Udmark, som den paagældende eller den, i hvis Ærinde han gaar, ejer eller har Brugsret over, er tilladt, for saa vidt den hjemles ved det, som paa ethvert Sted er gammel Skik og Brug. Om saadan Færdsel i øvrigt skal være tilladt, afgøres

af Landvæsenskommissionen, saafremt Parterne ikke i Mindelighed enes derom eller bliver enige om Sagens Henvisning til Voldgift.

Dagen regnes i de i Punkt 2 og 3 anførte Tilfælde om Sommeren (det er fra den 14. April til den 31. August) fra Klokken 5 om Morgenen til Klokken 9 om Aftenen og om Vinteren (det er fra 1. September til 13. April) fra om Morgenen, naar Dagsskæret begynder, til om Aftenen, naar det ender."

Hund hevur ein í grundregluni als ikki loyvi at hava við í fremmandan haga, men í § 43 verður sagt:

„Gang med Hund gennem fremmed Hauge er tilladt, naar den sker ad ret Bygdevej, og naar Hunden føres i Baand. Naar en Flok Faar skal drives gennem fremmed Hauge, er det tilladt at bruge løse Hunde dertil, dog mod fuld Erstatning for den Skade, de afstedkommer i Haugen. Mod samme Erstatning kan ligeledes de til Røgt og Fjeldgang i fjernereliggende Hauge nødvendige Hunde føres løse frem og tilbage igennem fremmed Hauge. Hvorledes Haugerøgter i øvrigt skal føre sin Hund, naar han maa gaa gennem fremmed Hauge for at komme til sin egen, afgøres som fastsat i § 42, Punkt 4, sidste Punktum."

## 2. Lóg nr. 172 af 18.05.1937 for Færøerne om haugers styrelse og drift, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 19.06.1990

(sí skjal 15 – við føroyskari týðing).

### *a. Grundarlagið undir lógini*

Sbr. viðmerkingunum til lógina, tá ið hon var løgd fyri fólkatingið, verður sagt[41]:

„Grundlaget for nærværende lovforslag er et udkast, udarbejdet af den i henhold til lov af 13. marts 1908 nedsatte færøske landbokommission, hvilket udkast er optaget i forslag og betænkninger afgivet i 1911 pag. 7-43, hvor der ligeledes findes bemærkninger til udkastet.

Forslaget træder i stedet for lov af 23.02.1866 om ordningen af de til haugevæsenet på Færøerne hørende forhold."

[41] Rigsdagstidende 1935-36 Tillæg A sp. 4769.

### *b. Stýrandi organini í haganum*

(1) Alment.

Sum hjá einum og hvørjum øðrum vinnuligum virki, har fleiri persónar eiga eitt vinnuligt framleiðslutól saman, er neyðugt, at ein hagi við fleiri eigarum hevur eina leiðsluskipan, sum arbeitt verður eftir.

Slík skipan verður sett upp í lóg nr. 172 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um hagastýri og røkt v.m. – hagalógini. Stýrandi eru hagastevna, hagastýri, og røktingarmenn. Hetta kann sigast at verða lík stýri teimum, sum vanliga eru í einum vinnufelagi, sum er í felaga ella partafelagsformi, nevniliga aðalfundur, nevnd og stjórn, har aðalfundurin, sum umboðar eigarar felagsins, tekur sær av høvuðslinjum felagsins, nevndin av vanliga rakstri felagsins, meðan stjórnin tekur sær av dagliga rakstrinum. – Nakað djarvt er tó at koma til ta niðurstøðu, at allar partafelagslógarreglurnar beinleiðis kunnu nýtast til javndømis uppá viðurskifti hagans, sum hagalógin ikki umrøður. Bjørk umrøður tó, at ávísar reglur í partafelagslógini kunnu nýtast til javndømis.[42] Bjørk vísir á, at í landbokommissionens betænkning frá 1911 sigur nevndin, at partafelagslóggávan beinleiðis er fyrimyndin fyri skipanini av haganum.

Áðrenn hagalógin fekk gildi í 1938, vóru allar hægri fyriskipaðar avgerðir haganum viðvíkjandi tiknar á grannastevnu.

(2) Hagastevna.

Hagastevna skal haldast, er hagi ogn hjá 2 ella fleiri eigarum, sbr. hagalógini § 1. Er allur hagin landsjørð, men fleiri festarar eru, verður hetta roknað, sum um fleiri eigarar eru. Festararnir verða roknaðir sum eigarar í hagalógarinnar merking, sbr. hagalógarinnar § 2, síðsta pkt., og § 8 í grannastevnulógini.

Á hagastevnuni situr eitt umboð fyri hvønn eigara av jørð í haganum, sbr. hagalógina § 2 síðsta pkt., jbr. grannastevnulógarinnar § 7 a). Einki forboð er í lógini fyri, at møtt verður við fulltrú, og hetta ber tí til.

Málsræðið (kompetancan) hjá hagastevnuni er nevnd í einstøku greinunum í hagalógini. Soleiðis ásetir hagastevnan sbrt. hagalógini § 9, hvussu nógvir røktingarmenninir skulu verða, løn teirra og velur teir, og kann eftir hagalógini § 11 geva almennar reglur fyri virksemi teirra. Eftir hagalógini § 18 ásetir hagastevnan áseyðatalið, og kann loyva røktingamonnunum at halda ávíst tal av seyði í haganum sum løn fyri arbeiði. Hagastevnan ger av, sbrt. § 20, um kenning ella feli skal verða í seyðahaldinum. Umframt tekur hagastevnan avgerð um, hvussu nógv ross og gæs kunnu verða í haganum sbrt. § 25 og § 28

[42] E.A. Bjørk dómarafulltrúi, seinni sorenskrivari: Færøske bygderet, uppafturprent matrikulstovan 1984 1 bind, bls. 42.

og kann sbr. § 39 áseta nærri reglur um torvskurð. Harafturat kann hagastevnan áseta reglur um gongd í haganum sbrt. garðalógini § 41, og brúk og fiskiskap á vøtnum sbrt. § 3 og 4 í lógini um vøtn og áir.

Annars verður sagt alment um málsræðið hjá hagastevnuni í § 3, stk. 1, í hagalógini:

> „Haugestævnet kan træffe Afgørelse i ethvert Haugens Drift og Udøvelsen af de fælles Rettigheder vedrørende Anliggende, som ikke ved Lovgivningen er henvist til anden Afgørelse.“

Um formligu framferðina í samband við hagastevnu stendur í hagalógini § 2. Rætt at krevja, at hagastevna verður hildin, hava:

- hagastýrið
- røktingarmenninir (helst meirilutin av teimum, eru teir fleiri)
- 1/4 av eigarunum eftir tali
- 1/4 av eigarunum eftir gamla markatalinum.

Tann, ið hevur rætt til at krevja hagastevnu, vendir sær til hagastýrið, sum tekur sær av tí praktiska í sambandi við áseting av fundardegi og staði og innkalling. Hagastýrið kallar inn til hagastevnufundar við í minsta lagi 8 daga frest. Lógin sigur einki um, hvussu kallast skal inn. Roknast má við, at eru eigararnir fáir í tali, so kann verða fráboðað tí einstaka eigaranum munnliga ella skrivliga til fundar. Eru uppá seg rættiliga nógvir eigarar, kann fráboðast um fundin í lýsing í føroysku bløðunum ella við lýsing í svørtutalvu í viðkomandi bygd. Lógin nevnir einki um, at fundarskrá skal verða send út í sambandi við innkallingina til hagastevnuna, men hetta má haldast at verða kravt eftir ólógásettum reglum. Er einki stýri, so tekur tann, sum hevur rætt at kalla til hagastevnu eftir frammanfyri nevndu reglum, sær sjálvur av tí praktiska í sambandi við innkallingina til hagastevnuna.

Hagastýrið skal kalla saman hagastevnuna, tá ið týdningarmikil mál koma fyri, og skal altíð gera tað, tá ið tað velst um rættarmál fyri ella í móti felaginum og til góðkenningar av roknskapi hvørt ár.

Á hagastevnuni er sýslumaðurin fundarstjóri, sbr. § 2, um hann er til staðar í sambandi við grannastevnu í bygdini. Annars velja tey, sum hava rætt at møta á hagastevnu, ein fundarstjóra við atkvøðugreiðslu soleiðis, at tann persónur, sum fær flestar atkvøður – eftir grundreglini ein persónur ein atkvøða – er valdur fundarstjóri.

Avgerðir á hagastevnuni verða eftir hagalógini § 2 tiknar eftir reglunum í grannastevnulógini §§ 7 a, 8-11 og 13. Hetta merkir, at mál er bert samtykt, sbrt. grannastevnulógini § 9, um helvtin av teim á fundi møttu eftir tali atkvøða fyri og helvtin av tí á fundi umboðaða marka-

tali atkvøður fyri, og harafturat at ein triðingur av øllum markatalinum – umboðað á fundi ella ikki – atkvøður fyri. Serligar reglur eru uppsettar um gerðarrættarúrskurð, um so er, at atkvøðutølini standa á jøvnum og víst verður til bls. 121 um slíka gerðarrættarviðgerð.

(3) Hagastýrið.
Í § 4 í hagalógini er ásett, at eru fleiri enn fimm eigarar[43] um ein felagshaga, skal hann hava eitt stýri, samansett av trimum ella fimm limum, sum hagastevnan ger av. Hagastevnan velur stýrið, ávikavist verða tveir og tríggir limir valdir við atkvøðumeiriluta eftir markatali, meðan ávikavist ein limur og tveir limir verða valdir við atkvøðumeiriluta eftir talinum á teimum við atkvøðurætti. Vanliga fundarfrestin uppá 8 dagar er ikki galdandi í føri, har hagastýri skal veljast. Sbrt. § 4 skal stevna tá kallast saman við í minsta lagi 14 daga varningi. Lógin ásetir ongar reglur um ávíst minstatal av møttum fyri, at hagastýrisval kann fara fram, og valið fer tí fram uttan mun til, hvussu stórur partur av eigarunum í haganum eru møttir. Í § 4 er ásett, at valið fer fram við „stemmeflerhed", á føroyskum vildi ein helst sagt atkvøðumeiriluta. Í dómi sorinskrivarans 29.11.1954 er samsvarandi hesum fastsligið, at valið ikki skal fara fram sum lutfalsval.[44]

Á annan hátt kunnu vit siga, at tá ið valt verður hagastýri, fer valið fram í tveimum. Fyrst verða valdir 3 (ella 2 limir) soleiðis, at markatalseigararnir atkvøða við so nógvum atkvøðum uppsettum í lutfalli eftir, hvussu nógv teir eiga. Í øðrum umfari verða valdir 2 (ella 1 limur) soleiðis, at hvør eigari á fundi hevur eina atkvøðu, og tann ella teir, sum fáa flestar atkvøður, eru valdir. Ikki er greitt nærri frá, hvussu atkvøðast skal. Haldast má, at hvør skal hava útflýggjað tal av atkvøðuseðlum í mun til ta vekt, hann skal hava í atkvøðugreiðsluni, og at hann á seðilin skal skriva tað tal av valevnum, sum samlað skulu veljast í atkvøðugreiðsluni. Talt verður síðan upp, og tann, sum hevur flestar atkvøður, er fyrst valdur osfr., teir, sum leypa av, kunnu so í nummarøð verða varamenn, men hetta ger hagastevnan av.

Hagalógin er eitt sindur ógreitt orðað í spurninginum um, hvør er valbærur til hagastýrið. Helst eru ongar serligar avmarkingar fyri, hvør kann gerast limur í hagastýrinum. Hetta er upp til hagastýrið at gera av. Roknast má tó við, at kravt er, at tann, sum skal veljast sum hagastýrislimur, skal verða myndugur. Helst ber til, at persónur, sum ikki er eigari, gerst limur í hagastýrinum, persónur sum býr uttanbíggja gerst limur, og lógin nevnir sjálv í § 4, stk. 1, 6. pkt., at røktingarmenn í haga kunnu veljast í hagastýrið, hóast teir ikki eru eigarar. Neyvan er ta røtt niðurstøða at draga av regluni um røkting-

43 Hvør festari verður roknaður sum ein eigari. Sí Bjørk, nota 42, bls. 40.
44 Dómurin er refereraður í teirri í notu 42 heimild bls. 40.

armenn í hagastýrinum, at eitt øvugdømi av hesi reglu eigur at føra til, at ikki eigarar ikki kunnu gerast hagastýrislimir.

Skyldu at taka við vali sum hagastýrislimur hava ikki allir teir, sum eru valbærir til hagastýrið. Eftir § 4 stk. 1 hava einans hesir skyldu at taka við vali:

- eigari sum býr í teirri bygdini, hagin hoyrir til,
- brúkari av almennari jørð, bæði festari og traðarmaður, sum leigar frá jarðarráðnum,
- uppsitari fyri eigara, sum býr uttanfyri bygdina.

Av teimum, sum skyldu hava at taka við vali, hevur tann, sum hevur fylt 60 ár, loyvi at bera seg undan, og somuleiðis kann tann, sum hevur verið limur í fýra ár, bera seg undan at taka við vali tey næstu fýra árini, men hesar undantøkur galda tó bert, tá ið onkur annar er skyldigur at taka við vali. Ivi er um, hvussu skyldan at taka við hagastýrisvali skal tulkast fyri brúkara av almennari jørð. Lógin nevnir bert, at brúkari av almennari jørð hevur skyldu at taka við vali. Bjørk heldur[45], at henda regla má tulkast avmarkandi soleiðis, at talan er bert um festara í einstaka haganum, sum býr í bygdini.

Lógin nevnir einki um, at hagastevnan skal velja varamenn fyri hagastýrislimirnar. Lógin setir tó einki forboð fyri, at varamenn verða valdir, og av tí at hagastevnan sbrt. § 4 stk. 1 hevur heimildina at velja hagastýrislimir, má hagastevnan eisini hava heimild til at siga, hvør skal verða limur ístaðin, fær limur forfall, ella fellur frá í ótíð.

Valskeiðið hjá hagastýrinum er tvey ár. Sbrt. hagalógini § 4, stk. 1, skal regluligt val haldast annaðhvørt ár í tíðarskeiðnum frá 15. oktober til endan á desember. Tænastutíðin tekur við frá 1. januar. Stýrislimirnir standa hvør sær til svars fyri, at hagastevnan í tímiligari tíð verður kallað saman til stýrisval, og at valúrslitið innan 14 dagar verður boðað sýslumanninum, sum førir lista yvir tær móttiknu fráboðanirnar. Hetta sbrt. § 4, stk. 3. Um so er, at einki stýri er, eitt nú tí árini eru farin, uttan at stýrið er valt av nýggjum, og gomlu stýrislimirnir eru falnir frá, so sigur lógin, sama grein, at innkallingin til stýrisval liggur á tí í bygdini størsta lutaeigara ella brúkara av almennari jørð. Revsiábyrgd hvílir sbrt. hagalógarinnar § 48, stk. 1, á tí, sum eftir frammanfyri umrøddu reglum ikki kallar inn til hagastýrisval, tá ið hetta krevst.

Málsræði hagastýrisins er nevnt í § 5, og annars evnisliga í einstøku greinunum hesum viðvíkjandi. Týdningarmiklastu størv stýrisins eru, at tað skal varða um regluliga røkt av haganum og syrgja fyri, at hon fer fram soleiðis, at ansað verður í øllum føri eftir tørvi eigaranna.

[45] Sí teirri í notu 42 nevndu heimild á bls. 41.

Stýrið ger av um uppslepping og tøku av seyði. Tað syrgir fyri, at skorið verður upp, og at alt annað neyðugt arbeiði í haganum verður gjørt í tøkum tíma og á gagnligasta og sparsamasta hátt. Tað ansar eftir, at hvør avvarðandi ger sína skyldu, og kann fyri kostnað hjá tí vansketna lata bønarfólk gera arbeiðið. Í øllum førum skal tað ráðleggja við røktingarmenninar um málið.

Eftir hagalógini § 8 skal stýrið føra roknskap fyri fyrisiting sína av peninginum hjá haganum og halda skil og rættleika í hesum. Fyri hesum stendur hvør einstakur stýrislimur til svars. Roknskapurin skal leggjast fram fyri hvørt álmanakkaár, í seinasta lagi innan 1. februar árið eftir, og skal leggjast fram á hagastevnu innan 14 dagar eftir tað.

Sbrt. hagalógini § 6. kann stýrið í móti triðjamanni (herundir eisini einstøkum eigara, ið vil føra fram ein sær tilskilaðan rætt móti felaginum, ella øvugt) í øllum málum, sum viðvíkja haganum sum felag, standa fram tess vegna. Tað kann soleiðis í tílíkum málum stevna og verða stevnt felagsins vegna og yvirhøvur umboða felagið fyri rættinum eins væl og fyri sáttar-, útskiftingar-, landbúnaðar- og yvirlandbúnaðarstevnuni. Er einki stýri valt og fráboðað sýslumanninum, stendur tað til tann, sum vil stevna felaginum, frítt at stevna, hvønn hann vil, av hagaeigarunum felagsins vegna.

Eftir § 7 er stýrið í mun til hagaeigararnar at meta sum fulltrúi. Eins og stýrið tí eigur at rætta seg eftir fyriskipanum um røktina, sum hagastevnan samtykkir, soleiðis eigur tað at kalla hagastevnuna saman, tá ið týdningarmikil mál koma fyri, og skal altíð gera tað, tá ið tað velst um rættarmál fyri ella í móti felaginum.

Um formligu framferðina í hagastýrisviðgerðini er lógin rættiliga tigandi. Hon sigur bert, at stýrið skal velja ein formann og ein næstformann. Einki verður sagt um fundarfráboðanarfrestir og gerðabókaførslu, men hóast hetta so má krevjast, at allir hagastýrislimir fáa boð um hagastýrisfund við hóskandi frest, og at týdningarmiklar avgerðir verða førdar inn í gerðabók. Avgerðir hagastýrisins verða tiknar við kvalificeraðum meiriluta eftir § 5, t.v.s, at tað ikki er nóg mikið, at fleiri eru fyri enn ímóti, fyri at mál skal verða samtykt. Tað krevst, at meiri enn helmingurin av øllum hagastýrislimum er fyri, at málið er samtykt, t.v.s 3, um hagastýrið hevur 5 limir og 2, um hagastýrið hevur 3 limir.

(4) Røktingarmenn.

Í hagalógini § 9 er ásett, at fyri hvønn haga – uttan mun til eigaratal – skal í minsta lagi vera ein røktingarmaður. Fyri felagshaga ger hagastevnan av røktingarmannatal og løn teirra og velur teir. Valið fer fram við atkvøðumeiriluta av eigarum og brúkarum eftir markatali. Í § 9 er álagt hagastýrinum skyldu at avgera talið av røktingarmonnum, og hvør hann ella teir skulu verða, um so er, at hagastevnan ikki hevur

gjørt hetta, t.d. tí hetta er burturgloymt á hagastevnu, ella hagastevnan ikki hevur verið. Hetta kann eisini verða tí, at hagastevnan ikki hevur fingið tikið avgerð, tí at nóg nógvar atkvøður ikki hava verið fyri ávísum evni, sum krevst eftir hagalógini § 2, sbrt. grannastevnulógini § 9.

Í § 12 í hagalógini verður sagt, at røktingarmaður skal vanliga siga upp tænastu sína innan tann 1. september, men hann kann tó ikki fara úr starvi sínum, fyrr enn fjallgongan eftir brundseyði er gingin, uttan so at hann fer av bygdini, ella umstøðurnar gerast honum ómøguligar at halda fram í tænastu síni. Hagalógin sigur einki um, nær røktingarmaður vanliga skal taka við, men av § 12 skilst, at hetta vil vanliga verða, tá ið gamli røktingarmaðurin fór úr tænastu síni sbrt. hesi grein.

Sama forum, sum setir røktingarmann, má roknast við at hava heimildina at siga honum úr starvi, t.v.s. er røktingarmaður settur av hagastevnuni, hevur hagastevnan heimildina at siga honum upp, og er hann settur av stýrinum, hevur stýrið heimildina at siga honum upp. Einki er nevnt um frest fyri uppsøgnini, men tað má haldast at vera náttúrligt at uppsagt verður til ta tíð, sum nevnt í § 12. Í tænastubrotsføri er spurningurin, um ikki stýrið hevur einsamælt heimild at burturvísa røktingarmanni alt fyri eitt uttan frest, fyri vist vita vit hetta tó ikki.

Skipanarliga eru røktingarmenn undirlagdir fyriskipanum frá hagastevnuni og hagastýrinum, sbrt. § 11 í hagalógini. Røktingarmenninir standa annars í tænastu síni eigarunum til svars. Teir skulu, tá ið tann einstaki eigarin ella brúkarin krevur tað, greiða honum frá tali og standi á seyðinum, ið honum er litið upp í hendur, og eisini røktini í haganum v.m. Eftir hagalógini § 5 hevur stýrið eftirlit við, at røktingarmenninir gera skyldur sínar.

Um starvsøkið hjá røktingarmonnunum er greitt frá í § 10 í hagalógini. Røktingarmenninir skulu standa fyri seyðarøktini, fjallgonguni og markingini og eisini øllum øðrum arbeiði í haganum. Teir eiga at ansa eftir, at avgerðirnar um skipanina í haganum og avgerðirnar um frið í haganum sbrt. hegnslógini verða hildnar og øvugt, at ágongan í haganum ikki gongur inn á fremmanda ogn, soleiðis at av hesum stendst missur ella ábyrgd fyri hagaeigararnar. Teir gera av um uppslepping og tøku, tá ið eigari ella stýri ikki hava gjørt hetta.

## c. Áseyðurin v.m.

(1) Seyður.

(a) Marking av seyði.

Í hvørjum haga skal nýtast eitt ávíst mark til allan seyðin í haganum ella, um neyðugt, fleiri mark til ymisk seyðafylgir í haganum, um so

er, at kenningarseyður er, ella serligur tørvur er á, í haga har felags-seyður er, at merkja tey ymisku fylgini. Sama mark kann ikki nýtast í tveimum høgum á somu oyggj, sbr. § 13 í lógini, og er hetta sjálvsagt grundgivið við, at um seyður kemur av leið, so skal ikki bera til, at hann kemur í bland við annan seyð í øðrum haga. Er ikki talan um somu oyggj, so er hesin vandi ikki til staðar, og tó. Um so er, at deyðs-seyður – ella rættari rekaseyður er – so kann verða ivi um, hvør hagi á hvørjari oyggj hevur mist seyðin.

Hvør hagi kann ikki merkja við tí marki, sum best ber til. Í hagalógini § 14 er nevniliga ásett, at grannastevna skal gera uppskot til hagamarkið, og hetta uppskot skal latast sýslumanninum. Sýslumaðurin sendir landsstýrinum (áðrenn heimastýrislógin fekk gildi í 1948 amtinum) uppskotið, og landsstýrið ger so av, hvussu hagamark hagans skal síggja út. Landsstýrið ansar serliga eftir, at ikki er møguleiki fyri blandi við mark hjá øðrum haga. Landsstýrið gav út serligan bókling við øllum góðkendum hagamarkum í Føroyum í 1967, men sjálvsagt er hesin bóklingur ikki heilt dagførdur, tí at nýggir hagar eru frábýttir, sum hava nýtt hagamark.

Markini, sum eru fyri kenningarseyð, skulu hava vanliga hagamark-ið, men skal eisini harumframt hava eitt sermerki, sum skal góðkenn-ast av sýslumanninum sbr. § 20, 3, b.

Reglurnar um mark kunnu ikki frávíkjast við avtalu, men sjálvsagt er bert ein hagi í oynni, har seyðurin er í felag, býr í sjálvari støðuna, at ikki er neyðugt við marki. Seinastu árini hevur verið rættiliga vanl-igt, at seyðurin hevur fingið clips sett í oyrini við ávísum frámerki fyri hvønn seyðin sær til brúks í vanligu røktini í haganum. Slíkt frámerki ber altíð til at seta á einstaka seyðin, men hesi clips kunnu ikki koma í staðin fyri tey mark, sum kravd eru eftir hagalógarinnar § 13.

Skil má verða í markingini av seyðinum og ikki fer at bera til, at hvør maður í sínum lagi merkir. Tí er ásett í hagalógini § 15, at eingin annar enn røktingarmenn hagans kunnu av sínum eintingum fáast við at marka seyð. Tó má haldast, at clipsmerki, sum verða sett í oyrini á seyðinum, kann ein og hvør seta, tað er bert forna markið, sum røkt-ingarmenninir einsamallir kunnu seta.

(b) Brundseyðir.

Í § 17 eru reglur um, at røktingarmenninir skulu gera brundseyðir upp av teimum bestu, sum eru í haganum. Til hetta verða gjørd upp 1 veðurlamb fyri hvørjar 33 ella 1 veðrur fyri hvørjar 40 ærseyðir í hag-anum. Verða færri sleptir upp, skulu røktingarmenninir sum skjótast boða sýslumanninum frá, sum kannar, um nakar ber ábyrgd av hesum.

(c) Ognarviðurskiftini viðvíkjandi áseyðinum.

Áseyðatalið í haganum ger hagastevnan av. Allur seyðurin í haganum

er feli hjá øllum eigarunum í mun til eigaralutin eftir markatali. Seyðurin fylgir jørðini við avhending og arvi, og úttøka kann ikki serstakt gerast í seyðinum, men má gerast í tí lutfalsliga jarðarpartinum sum so. Hetta sbrt. hagalógini § 18.

Sjálvt um áseyðurin er feli, kann hagastýrið tó loyva røktingarmanni at hava eitt ávíst tal av seyði í haganum sum viðurgjald fyri arbeiði hansara, eins og hagastýrið kann loyva, at einstakir seyðir fyribils ganga í haganum fyri eitt av stýrinum ásett viðurgjald, ið legst til hagan. Hesa avgerð tekur hagastýrið eftir vanligum reglum, t.v.s, at meiri enn helmingurin av øllum stýrinum er fyri. Reglan dvínir tó fyri hagalógini § 2, soleiðis at skilja, at um hagastevnan tekur avgerð sbrt. hesi grein, so kann hagastýrið ikki taka egna støðu við heimild í § 19.

Kenning merkir, at hvør eigari hevur sín ávísa seyð í haganum. Ikki fyrr enn í miðjari seinastu øld tók hesin siður seg rættuliga upp.

Eftir hagalógini § 20 er kenning í seyðaskipanini ella pørtum av henni bert loyvd við fylgjandi treytum:

1. Viðtøka um hetta skal vera samtykt á hagastevnu, sum er kallað saman við í minsta lagi 3 mánaða varningi. Fyri at samtyktin fær gildi krevst, at hon er samtykt av so mongum við atkvøðurætti, ið tilsamans eru í minsta lagi:
   a) tveir triðingar av øllum við atkvøðurætti og
   b) helvtini av øllum markatalinum í haganum.
2. Í viðtøkuni skal vera skilað til, hvussu stór skipanin skal vera í øllum haganum, og um øll skipanin skal vera kenning ella bert ein partur av henni, og hvør.
3. Í viðtøkuni skal harafturat vera skilað til:
   a) at røktin verður umsitin av røktingarmonnum, valdir á hagastevnuni ella av stýrinum, sbr. § 9;
   b) at seyður hjá hvørjum eigara sær – umframt tað ávísa hagamarkið (§13) – skal hava frámerki, sum sýslumaðurin skal góðkenna, áðrenn tað verður nýtt;
   c) at brundseyðir skulu frammanundan takast úr og samsýnast eigaranum eftir meting.

Í § 21 verður sagt, at røktingarmenninir skulu beinanvegin boða sýslumanninum frá øllum, sum gongur í móti kenning í seyðaskipanini § 20.

Kenning kann eftir § 22 í hagalógini sigast úr gildi við viðtøku, samtyktari á hagastevnu, kallað saman við í minsta lagi 3 mánaða varningi. Fyri at samtyktin fær gildi krevst, at hon er samtykt av so mongum við atkvøðurætti, ið tilsamans í minsta lagi eru:

a) helvtin av talinum á øllum við atkvøðurætti og
b) einum triðingi av øllum markatalinum í haganum.

Tá ið kenning fellur burtur, skulu teir eigarar, sum ikki hava fulla skipan, keypa frá teimum, sum hava seyð til avlops, til allir hava seyð sambært markatali teirra. Tann seyður, ið soleiðis verður seldur og keyptur av hagaeigarum sína millum, verður goldin við fullum virði. Eru partarnir ósamdir um virðið, verður tað ásett við lógligari meting. Hetta sbrt. § 23.

Fyrr skuldi avgerð um kenning tinglesast, men henda regla er avtikin við tinglýsingarlógini frá 1962. Nú er í hagalógini § 24 bert ásett, at skeyti ella annað avhendingarskjal viðvíkjandi hagajørð, har ið kenning er, skal skila til, hvussu nógvur kenningarseyður fylgir við jørðini. Um so ikki er, skal tað við tinglesingini tilskilast skjalinum rættarummæli.

(2) Ross.
Í Hagalógini § 27, § 28 og § 29 verður sagt, at rossaskipanina í haganum ger hagaeigarin av ella, um tað er felagshagi, hagastevnan, kallað saman við í minsta lagi 1 mánaða varningi. Ger hagaeigarin (hagastevnan) av, at skipanin skal vera størri enn 1 ross upp á mørkina, skal avgerðin sum skjótast boðast sýslumanninum. Hesin sær til at kunngera hetta í næstu bygdunum við uppslagi ella á annan nýtiligan hátt. Hóast ta av hagaeigaranum (hagastevnuni) sambært fyrsta punktum tiknu avgerð kunnu hagaeigararnir í bygdini í felag við grannastevnuviðtøku gera av, at tað í bygdarhøgunum skal kunna frælsast upp til 1 ross á mørkina. Fyl undir 1 ár telja ikki við í undannevnda føri. Luteigari í felagshaga kann leiga út rætt sín til rossahald. Teir einstøku luteigararnir kunnu sjálvir gera av, um skipanin skal vera serogn ella samogn hjá nøkrum ella øllum luteigarunum. Sýslumaðurin skal hvørt ár á grannastevnu krevja frágreiðing frá bygdarmonnunum um, hvussu mong ross eru í bygdini, og í hvørjum høgum tey hava frælsi, og skriva um hetta í løgreglugerðabókina. Hvør tann, sum hevur ross í nøkrum haga í bygdini, skal tá, um nakar luteigari í tílíkum haga krevur tað, greiða frá, við hvørjum rætti hann hevur ross.

(3) Gæs.
Eftir § 28 í hagalógini ger hagastevnan av, um loyvt skal vera at halda gæs í haganum. Hagastevnan ger av, hvussu nógvar gæs skulu kunna frælsast í haganum, um gjaldast skal fyri hetta, og um rætturin bert skal vera fyri ánarar í haganum ella eisini onnur.

## *d. Ymsar reglur um hagaraksturin*

Í § 29 í hagalógini er ásett, at í felagshaga eigur hvør eigari samsvarandi markatali sínum nýtsluræ ttin til seyðahald, rossahald og gásahald í haganum eins og øll til hagan liggjandi rættindi, sum ikki annað í

lóggávuni er ásett um. Samsvarandi hesum verður inntøka og útreiðsla býtt av allari felagsnýtslu av haganum ella til hendan liggjandi rættindi eins væl og alt arbeiði, ið kemur fyri av hesum. Hetta merkir, at hagastevnan, hagastýrið og røktingarmenn í øllum virksemi sínum skulu hava fyri eyga, at allir úrtøkumøguleikar í haganum verða troyttir í mun til eigaralutfallið.

Í § 30 í hagalógini er ásett, at 10-inda hvørt ár skal sýslumaður skipa fyri á grannastevnu at velja menn at ganga um mark í bygdarhøgunum. Teir verða valdir av hagaeigarunum og brúkarunum teirra millum fyri hvønn haga við atkvøðumeiriluta eftir markatali. Verður einki val tilnevnir sýslumaðurin teir.

Menninir skulu síðan sum skjótast ganga um hagamarkini í samgongu. Er ósemja um tað, ger tann elsti av monnunum av, nær ið samgongan skal vera. Eftir marknagonguna skulu teir hvør sær siga teimum avvarðandi hagaeigarunum (í felagshaga stýrinum, um tílíkt er til) frá úrslitinum av marknagonguni; skuldi við hesum nakar ivi komið fram, hvar ið rætta markið er, kunnu menninir ikki taka avgerð um hetta. Útreiðslan av at seta mark og viðlíkahald skal býtast líka millum hagarnar við sama markaskili.

Eigarnir av haganum mugu haldast at hava skyldu at lata arbeiðstíð til arbeiði, sum hagin krevur, í mun til eigaralutfallið. Í § 31 verður sagt, at røktingarmenninir skulu við kvøldvarningi gera teimum avvarðandi boð til alt arbeiði í haganum, uttan so at hagastevnan hevur gjørt øðrvísi av; við sama varningi skulu teir gera avvarðandi grannum samgonguboð, uttan so at øðrvísi er samtykt teirra og hagaeigaranna millum.

### e. *Hagans grasrættur hjá seyði innangarðs*

Í § 34 í hagalógini er ásett, at rættin til bit hjá seyði á bøi ella aðrari innangarðsjørð eigur í tíðini frá 25. oktober til 14. mai eigarin av omanfyri liggjandi haga, uttan so at annað lógligt er fyrisett. Omanfyri liggjandi hagin eigur rættin, t.v.s. til øvugdømis kann sigast, at hagi, sum ikki er omanfyri liggjandi, t.v.s hevur mark at bønum niðanfyri, hevur ikki slíkan rætt. Hetta merkir, at hagi, sum ikki er omanfyriliggjandi hevur ikki rætt til vetrarbit, sjálvt um bøurin og hagin ognarliga eru knýttir saman. – Omanfyri liggjandi hagin hevur einarættin til bitið.

Vetrarbitsrætturin hjá omanfyri liggjandi haganum nýtist ikki at verða tinglýstur ella alment skrásettur á annan hátt. Er einki annað fyrisett, eigur omanfyri liggjandi hagin vetrarbitið.

Vetrarbitsrætturin fevnir ikki bara um bøin, men eisini um aðra innangarðsjørð eftir orðaljóðinum í § 34, stk. 1, t.d. rættin til tarabit í fjøruni.

Rætturin til vetrarbitið er ein einarættur til bitið hjá yvirliggjandi

haga, t.v.s, at tann, sum eigur einstakan lut innangarðs, ikki hevur rætt til at hava sín seyð á bønum saman við seyðinum hjá omanfyri liggjandi haganum. Meira óvist er, um eigarin av innangarðsluti kann hava onnur dýr, t.d. neyt, ross og gæs gangandi á bønum saman við seyðinum hjá omanfyri liggjandi haganum um veturin. Bjørk heldur, at siðvenja á staðnum reglubindir hetta, men kann siðvenja um vetrarbit hjá øðrum dýrum enn seyði ikki ávísast, so ber hetta ikki til.[46]

Í § 35, stk. 1, í hagalógini verður sagt, at um broyting av bittíðini er ynskjandi ella neyðug, verður málið, um ikki loyst í sátt og semju, at gera av á landbúnaðarstevnuni. Sátt og semju merkir við avtalu millum teir, sum hava málsræði á jørðini innan- og uttangarðs. Hvør støðan er hjá uttangarðsmonnum verður gjørt av á hagastevnu, hjá innangarðsmonnum á grannastevnu.

Í § 35, stk. 2, í hagalógini verður umrøddur spurningurin um fyribils broyting í bittíðini fyri einstakt ár orsakað av ítøkiligu umstøðunum t.d. veðurlíkindunum. Eftir hesi grein kann framleinging av bittíðini um várið fara fram við játtan frá so mongum, sum eiga ella brúka tveir triðingar av avvarðandi bøi (roknað eftir skattamerkrum) eins og stytting av tíðini bæði um várið og um heystið kann fara fram, tá ið so mangir játta, sum eiga ella brúka tveir triðingar av honum ella av høgunum við bitrætti (roknað eftir markatali). Tílík frávik galda tó bert tað eina várið ella heystið og ikki longri tíð enn 2 vikur. Skattamarkahugtakið verður nærum ikki longur nýtt í dag, nú allar bygdir eru matrikuleraðar, og í dag má roknast við, at lutfallið má roknast út eftir m2-talinum ella um skrásett bonitetstal er í bygdini, tá eftir hesum tali. Broyting í bittíðini sbr. § 35, stk. 2, kann fara fram á rættiliga óformligum grundarlagi við munnligum fyrispurningi millum eigararnar, og ikki á hagastevnu ella grannastevnu, tí hetta er mál, sum ikki hevur princippiellan týdning fyri framtíðina, men ítøkiligt mál sum hevur skund og bara virknað fyri hetta einstaka árið.

Í § 34, stk. 2, verður sagt, at hvør eigari, sum hevur kenning og eigur rætt til vetrarbit á bønum, hevur heimild at tilskila sær hendan á sínum bøi einans fyri egnum seyði ímóti at siga frá sær annan rætt til bit á bøi og ímóti í omanfyri nevnda tíðarskeiði at halda bø sín væl og virðiliga innstikaðan.

Eftir § 34, stk. 3, hevur hvør bøeigari ella brúkari heimild til í tíðini, sum bøurin liggur opin fyri seyðabiti, at stika inn og friða lendið, sum er sátt við grasfræi, í tvey fylgjandi ár eftir sáingina. Tó kann bert upp til 1/4 av bønum hjá avvarðandi eigara ella brúkara stikast inn. Hagastýrið skal í hvørjum einstøkum føri fáa boð um tílíkt stik.

Hetta vóru so vanligu reglurnar um vetrarbit og undantøk fyri vetrarbiti hjá omanfyri liggjandi haganum.

[46] Sí heimildina í notu 42, bls. 154.

Í 1943 vóru settar inn nýggjar reglur í hagalógini § 36 um avloysing móti viðurlagi, eitt nú í peningi, fyri vetrarbitsrætt omanfyri liggjandi hagans. Eftir hesi grein kann rætturin til bit á dyrkaðum traðum bæði av eigaranum og hagaeigaranum krevjast endaliga loystur av, um so er, at slík avloysing ikki forðar fyri vetrarbiti á teimum ikki vetrarfriðaðu lendunum. Harumframt kann avloysing á sama hátt krevjast, tá ið avvarðandi lendi ætlast nýtt til trægróðurseting ella nýgerð av urtagarði ella fiskaplássi ella tílíka við bit ósambærliga nýtslu. Avloysingin fer fram fyri fult endurgjald av virðinum á bitrættinum.

Er ósemja um, hvørt treytirnar fyri avloysing eru uppfyltar, ella hvussu stórt endurgjaldið skal verða, ásetir hagalógin § 37, at málið skal verða gjørt av við gerðarrætti av 2 monnum, ein valdur av hvørjum parti sær. Hevur annar parturin ikki innan 4 vikur aftaná, at heitt er á hann til tess, valt ein gerðarrættarmann, eigur hin parturin rætt at velja báðar menninar. Hesir velja ein ástøðumann, áðrenn teir fara undir viðgerðina; eru teir ósamdir um at velja hann, velur sýslumaðurin hann. Gerðarrættarúrskurðurin kann innan 4 vikur skjótast inn fyri landbúnaðarstevnuna.

Ikki er í dag óvanligt at endurgjaldið verður sett til 2,80 $m^2$ í avloysing fyri vetrarbit. Hetta er takstur, sum jarðarráðið vanliga heldur seg til. Men sjálvsagt umstøður kunnu verða á staðnum sum gera, at hóskiligt er at frávíkja hesum taksti.

Tað, sum tykjast kann løgið, er, at hagin ikki fær útgoldið endurgjaldið. Eftir § 37 a, sum eisini var innsett í lógina í 1944, so hevur jarðarráðið eina ávísa eftiransingarskyldu við, hvussu endurgjaldspeningurin verður nýttur, sjálvt um ikki ein einasta mørkin í haganum er kongsjørð. Eftir § 37 a skal í seinasta lagi 4 vikur aftan á, at endurgjaldsmálið er endaliga gjørt av, avvarðandi eigari av avvarðandi inngarðslendi, rinda endurgjaldið í Føroya Jarðargrunn, haðan gjaldið verður goldið avvarðandi hagaeigara ella festara, í felagshaga hagastýrinum, tá ið fyri Føroya Jarðarráði til fulnar er prógvað, at í avvarðandi haga eru gjørdar hentar og tíðarhóskandi atgerðir at bøta um seyðabrúkið í haganum. Við øðrum orðum, hagin hevur ikki frían dispositiónsrætt yvir endurgjaldsupphæddini, og kann ikki nýta pengingin til onnur endamál haganum viðvíkjandi enn seyðahaldinum. Vit kunnu siga, at hetta er eitt slag av festikonto fyri ognarmenn, sum jarðarráðið stovnsetir.

## *f. Avmarkaði rættindi í haganum*

(1) Summarbit fyri neytum.

Í hagalógini § 38 er ásett, at hagaeigarin – ella, um tað er felagshagi, hagastevnan – kann fyri hagan gera av, hvør ið kann lata neyt ganga á biti í haganum, og um viðurgjald skal latast fyri bitið, og tá taka tær gjøllari neyðugu avgerðirnar um støðd á viðurlagnum v.m. Tykir

onkrum rætt sín skerdan av tílíkari avgerð, kann hann skjóta hana inn fyri landbúnaðarstevnuna. Tað sama verður, um tveir ella fleiri trætast um heimildina til ella støddina á rætti teirra til bit í haga, tó at í tí føri skal hagaeigarin (í felagshaga stýrið) kallast inn sum partur.

(2) Torvskurður.
Reglurnar um torvskurðarrætt, hvussu skerast skal, um viðgerð av klagum um ólógligan torvskurð og um avloysing av torvskurði eru at finna í hagalógini § 39 til og við § 46. Torvskurður er sera sjáldsamur her á landi í dag, og verða reglurnar tí ikki gjøgnumgingnar her. Upplýst er[47], at í landinum í dag verður bert skorið torv í Svínoy, har maður sker torv mestsum fyri at halda traditiónina viðlíka, men á Sandi er maður, sum nýtir hetta sum einasta brennievni enn.

## *g. Viðlíkahald av varðagøtum*

Í § 47 í hagalógini er ásett, at løgtingið hevur heimild at áseta reglur um hald av varðagøtum. Eftir at heimastýrislógin er komin í gildi í 1948, og landsstýrið tekur sær av vanligari fyrisiting, má henda heimild nú tulkast at verða hjá landsstýrinum.

Reglurnar, við heimild í hesi grein, um varðagøtur eru samtyktar á løgtingi í 1940, og eru soljóðandi:[48]

„§ 1. Tað er skylda kommunanna, at varðagøturnar verða avmarkaðar við hóskandi grótvarðum í neyðturviligum tali og av neyðturviligari stødd, og at hesar gøtur eru í tílíkum skili, at tær eru væl gongdar.
§ 2. Eftirlit við hesum gøtum verður givið sýslumonnunum í hendi“

Fyritreytirnar fyri hesum reglum eru tó munandi broyttar í dag, har nærum koyrandi er millum allar bygdir, og ferðsla í haganum bert fer fram til landbúnaðin á staðnum, í ferðsluhøpi og til stuttleika.

## *h. Rættargangsháttur v.m.*

Í § 48 í hagalógini verður givin revsiheimild fyri brot á ávísar nevndar greinir í lógini, men ikki allar. Heimild er bert at sekta eftir lógini.

Í § 50 í lógini er ásett, at trætur viðvíkjandi teimum í lógini umrøddu rættindum og skyldum verða viðgjørdar eftir lógini um landbúnaðarstevnur. Her er bert talan um trætu millum partarnar um ymisk við-

[47] Óli Johansen, matrikulsstovan 22.04.1996.
[48] Løgtingstíðindi 1940 bls. 88.

urskifti, sum lógin ásetir serligan framferðarhátt um. Revsisøk, har kravd verður revsing eftir § 48 fyri brot á grein, sum § 48 vísir til, verður ikki dømd við landbúnaðarstevnu, men sum vanlig løgreglumál, har fútin ger av, um ákæra skal setast fram, og sorinskrivarin dømir.

## 3. Lóg nr. 170 af 18.05.1937 for Færøerne om grandestævne m.m.

(Sí skjal 16 – við føroyskari týðing).

Grannastevna er helst gamalt fyribrigdi í Føroyum. Bjørk[49] veit ikki at siga, nær hesar eru stovnsettar í Føroyum og í hvørjum líki.

Fyri 1891 hava grannastevnurnar bert virkað eftir óskrivaðum rættarreglum, men í 1891 kemur hin fyrsta grannastevnulógin, sum í 1937 verður avloyst av núgaldandi grannastevnulógini.

Mótvegis viðurskiftunum nú, var tað soleiðis, helst langt upp í okkara øld, at alt virksemi, sum fólk fekst við her á landi, fyrifórst innanfyri tann miðdepil, sum æt bygdin. Vanliga gerandislívið kundi livast, uttan at tað yvirhøvur var neyðugt at hava samband við aðrar bygdir, uttan tá ið okkurt neyðsent var.

Her var sostatt neyðugt, at hesin dagligi felagsskapur hevði eitt forum, har hann kundi skapa almennar reglur fyri virkseminum í bygdini. Nakað djarvt kunnu vit kanska siga eitt slag av lóggevandi tingi fyri bygdina.

Grannastevnurnar taka sær ikki av trætum. Hetta taka landbúnaðarstevnurnar og vanligu dómstólarnir sær av.

Grannastevnulógin sigur einki um, hvørji grannastevnuøkini eru, men hon hevur sum fyritreyt, at tað eru tey bygdasamfeløgini, sum fyrr hava verið roknað sum ein eind hvør sær. Í lógarinnar § 3 verður bert sagt, at grannastevna verður hildin í hvørjum grannastevnuøki sær. Broyting í tí verandi økibýtinum kann, um so er, at meiri enn helmingurin av húsbøndrunum í tí ella viðkomandi bygdum bera fram áheitan um hetta á grannastevnu, gerast av landsstýrinum (fyri yvirtøkuna av málsøkinum landbúnaður, av amtmanninum) eftir tilmæli frá sýslumanninum. Slíkt býti kann t.d. verða, um virksemi í niðursetubygd gerst so umfatandi, at hóskandi er at býta frá gomlu markatalsbygdini.

Í grannastevnulógini § 1 og § 2 verður nevnt, hvørji mál kunnu viðgerast á grannastevnu.

Í § 1 verður sagt, at á grannastevnu kunnu við atliti til reglur, sum eru í grannastevnulógini ella fyrisettar við aðrari lóggávu, gerast:

[49] E.A. Bjørk dómarafulltrúi, seinni sorenskrivari: Færøske bygderet, uppafturprent matrikulstovan 1984 1 bind, bls. 20.

1) viðtøkur um nýtslu av jarðarognum og lunnindum, sum eru feli, og sum tað ikki sambært lóggávuni skal takast avgerð um á hagastevnu ella á annan serligan hátt um nýtsluna av;
2) viðtøkur um, hvat ið skal latast til tarvahald í avvarðandi bygd;
3) viðtøkur um slík viðurskifti, sum annars við lóggávuni eru løgd til avgerðar á grannastevnu.

Tær viðtøkur sum eftir lóggávuni eru lagdar grannastevnu til avgerðar eru:
a) Hagalógin: § 25 um rossahald í haganum, § 30 um val av monnum at kanna hagamark.
b) Garðalógin: § 2 um felagsgirðing fyri innangarðslutir, § 39 um avtøku av felagsbiti á bønum, § 42 um gongd í haganum eftir rossum og neytum
c) Lóg um áir og vøtn: § 3 og § 4 um nýtslu av vatni, sum liggur í samogn, og um fiskiskap á somu ognum.
d) Lóg um fuglaveiðu v.m.: § 2 um útinning av veiðurættindum í felag og fulla ella partvísa friðing av veiðu innangarðs, § 5 um fuglaveiðu í bjørgum, urðum o.l.
e) Lóg um týning av yngli hjá ravninum: § 1 um val av eftirlitismonnum at hava eftirlit við, at lógin verður hildin uppi.
f) Útskiftingarlógin: § 6 um at taka støðu til, um farast skal undir útskifting innangarðs, § 78 um útskifting uttangarðs ella av lunnindum og brúksrættindum, sum eru feli.
g) Rossaalingsins frama: § 2 val av tveimum persónum, sum skulu hava fráboðanir um ryssur í økinum.

Tær undir punktum 1 og 2 nevndu viðtøkur eru bindandi fyri øll við atkvøðurætti í viðkomandi sak. Tær undir punkti 3 umrøddu viðtøkur eru bindandi í tann mum, sum ásett er í teim viðkomandi lógarásetingunum.

Somuleiðis kunnu eftir grannastevnulógini § 2 á grannastevnu gerast viðtøkur um skipan av slíkum innanbygdaviðurskiftum, sum hava almennan týdning fyri íbúgvarnar uttan tó at hoyra undir ta kommunalu fyrisitingina. Tílíkar viðtøkur hava kortini ikki bindandi gildi, fyrr enn tær eru góðkendar av landsstýrinum. At góðkenning skal fáast tilvega frá landsstýrinum er greitt, tí rættiliga lætt kann ivi stinga seg upp, um ikki slík viðtøka kemur inn á málsøki, sum av røttum eigur at gerast av kommunalum myndugleika, landsmyndugleika ella ríkismyndugleika.

Reglurnar um, hvør hevur rætt at møta, og hvussu atkvøtt verður á grannastevnu, eru rættiliga torgreiddar.

Í grannastevnulógini § 7 er ásett, at atkvøðurætt á grannastevnu eiga:
a) í teimum í lógarinnar § 1, nr. 1, umrøddu sakum, hvør í ognini luthavandi ánari (í lunnindum hvør parthavari í felagnum);

b) í teimum í lógarinnar § 1, nr. 2, umrøddu sakunum, hvør í bygdini búgvandi kúeigari;
c) í teimum í lógarinnar § 1, nr. 3, umrøddu sakunum, teir í teimum viðkomandilógarásetingum tilskilaðu persónar;
d) í teimum í lógarinnar § 2 umrøddu sakunum í tí einstøku sak áhugaði húsfaðir. (Hetta hugtak má helst tulkast í dag til eina atkvøðu uppá hvørt húsarhald).

Víðari verður í § 8 sagt, at tá ið tað snýr seg um almenna jørð, verður brúkari av almennari jørð javnmettur við ánara, uttan so at tað í einstøkum føri av avvarðandi myndugleika er tikin onnur avgerð. Annar brúkari kann bert atkvøða ánarans vegna, har ið tað er serliga ásett.

Annars kann eingin atkvøða fyri onnur uttan við skrivligari fulltrú.

Vanligi atkvøðuhátturin er: fleiri persónar við fundarrætti á grannastevnu fyri enn ímóti. Viðvíkjandi grannastevnuviðtøkum um nýtslu av jarðarognum og lunnindum, sum eru feli, geldur grannastevnulógarinnar § 9, har stendur, at mál er samtykt, tá niðanfyri nevndu partar av teimum við atkvøðurætt, eru fyri:

a) helvtartalið av teimum møttu við atkvøðurætti og
b) helvtin av markatalinum hjá teimum møttu við atkvøðurætti og eisini
c) ein triðingur av øllum markatalinum.

Eru partarnir hjá teimum við atkvøðurætti í felanum ásett við øðrum lutfalli enn markatali, verður viðkomandi lutfall samsvarandi brúkt.

Viðvíkjandi almennum viðtøkum eftir § 2 í grannastevnulógini, so er atkvøðuhátturin eisini fleiri fyri enn ímóti. Tó krevst, at í minsta lagi 1/3 av øllum húsfedrum í grannastevnuøkinum hava atkvøtt fyri.

Viðvíkjandi atkvøðugreiðsluni fyri at fara undir útskifting ásetur útskiftingarlógin serligar reglur, víst verður til bls. 111.

Í grannastevnulógini, § 10, er ásett, at standa atkvøðurnar, roknaðar eftir talinum (§ 9 a.) og atkvøðurnar roknaðar eftir markatalinum (§ 9 b. og c.), á jøvnum, er sakin fallin uttan so, at so mong við atkvøðurætti, sum nevnd í § 9 a. ella § 9 b. á sjálvari grannastevnuni krevja, at sakin skal avgerast við gerðarrætt. Í § 11 er ásett, at er gerðarrættur kravdur sambært § 10, skal á grannastevnu veljast 1 gerðarrættarmaður við atkvøðumeiriluta, roknað eftir talinum á teimum, ið atkvøða, og 1 gerðarrættarmaður við atkvøðumeiriluta, roknað eftir markatalinum hjá teimum, ið atkvøða. Gerðarrættarmenninir velja ein ástøðumann, áðrenn teir fara undir viðgerðina; eru teir ósamdir um valið, velur sýslumaðurin hann. Hvør í bygdini búgvandi jarðarbrúkari, sum ikki hevur fylt 60 ár, er skyldigur at taka við vali sum gerðarrættarmaður ella ástøðumaður.

Gerðarrættarúrskurðurin skal gerast innan 4 vikur eftir grannastevnuna og beinanvegin fráboðast sýslumanninum. Hesin hevur sama gildi sum ein grannastevnuviðtøka, tó bert fyri tíðarskeiðið til fýramánaðardagin eftir grannastevnu á tí næsta síðani fylgjandi álmanakkaári.

Ein og hvør sum hevur mál, hann vil hava fyri á grannastevnu, skal snúgva sær til sýslumansins við tí. Lógin sigur einki um, hvør kann skjóta upp mál til grannastevnuviðgerð. Helst kunnu bert almennir myndugleikar ella ein, sum hevur fundarrætt á grannastevnu, gera tað.

Eftir grannastevnulógini, § 4, verður grannastevna hildin í mánaðinum januar ella februar ella um veðurlíkindi ella líknandi skuldi hindrað hesum, tá skjótast møguligt eftir tað. Fyri at ein sak skal kunna avgreiðast á grannastevnu, skal hon vera fráboðað sýslumanninum innan 1. november árið frammanundan.

Sýslumaður eigur eftir § 5 at kunngera, hvørjar sakir eru boðaðar til hansara til viðgerðar á grannastevnu. Kunngerðin skal í minsta lagi 4 vikur undan grannastevnuni gerast almannakunnug í svørtutalvu. Í kunngerðini skal harumframt umleið skilast til, hvørjar dagar sýslumaðurin kann væntast at vera í teim ymsu bygdunum. Har ið samtykki frá jarðarráðnum skal umbiðjast, eigur sýslumaðurin í minsta lagi 4 vikur undan grannastevnuni at geva jarðarráðnum neyðuga frágreiðing um viðgerðina av sakini á grannastevnuni.

Sjálvan dagin, tá ið grannastevnan skal haldast, eigur sýslumaðurin at lata kunngera í avvarðandi bygdum við í minsta lagi kvøldvarningi á best hóskandi hátt á staðnum sbr. § 5. Í dag – við teim betri samferðsluviðurskiftunum – er tó vanligt, at grannastevna verður fráboðað við almennari lýsing í bløðunum t.d. í Dimmalætting rættiliga fitta tíð frammanundan.

Á grannastevnu hevur sýslumaðurin fundarleiðsluna. Fundarskipanin verður samtykt við vanligum meiriluta eftir lógarinnar § 6, stk. 1. Sýslumaðurin syrgir eftir § 6, stk. 4, fyri, at grannastevnuskipanin og tær samtyktu viðtøkurnar verða skrivaðar í eina grannastevnubók, sum er fingin til vega upp á kommununa, fyri avvarðandi øki. Viðtøkan verður skrivað í bókina innan 1 mánað eftir, at tað er endaliga gjørt av, at viðtøkan skal koma í gildi. Bókin skal liggja frammi á einum av sýslumanninum ásettum hóskandi staði.

Eftir § 13 hevur sýslumaðurin serligar eftiransingarskyldur við, at grannastevnuviðtøkur eru samsvarandi lóggávuni. Har verður nevniliga sagt, at metir sýslumaður eina á grannastevnu ella við gerðarrætti samsvarandi §§ 9-12 gjørda viðtøku vera ólógliga, leggur hann hana niður, sjálvt um eingin talar at ímóti henni, og síðani skal hann beinanvegin beina landsstýrinum spurningin til avgerðar. Hendan avgerðin stendur við, uttan so at sakin verður skotin inn fyri landbúnaðarstevnuna innan 8 vikur eftir, at avgerðin hjá landsstýrinum er kunngjørd í avvarðandi bygd.

Um annars nakar kennir seg órættaðan við slíkari viðtøku og tí ætlar at mótmæla gildi hennara, kann hann innanfyri 8 vikur eftir tann dagin, tá ið avgerðin er tikin (ella um sakin er gjørd av við gerðarrætti, innanfyri 8 vikur eftir tann dagin, tá ið gerðarrættarúrskurðurin er gjørdur) skjóta spurningin um hetta inn fyri landbúnaðarstevnuna. Viðtøkan verður í tí føri løgd niður, til sakin við úrskurði er endaliga gjørd av.

Avgerðir á grannastevnu verða útintar á tann hátt eftir grannastevnulógarinar § 15, at fyri hvørja av teimum á grannastevnu gjørda viðtøku skal sýslumaðurin syrgja fyri, at millum teirra við atkvøðurætti í sakini at velja ein ella fleiri í økinum búsitandi menn at hava eftirlit við, at tær í viðtøkuni ásettu avgerðir verða hildnar, og eisini boða sýslumanninum frá gjørdum brotum á viðtøkuni. Valið fer fram á grannastevnu við atkvøðumeiriluta, roknað eftir talinum á teimum við atkvøðurætti, fyri 4 ár í senn. Velja teir við atkvøðurætti ikki, velur sýslumaðurin ein ella fleiri eftirlitsmenn. Hvør, sum ikki hevur fylt 60 ár, er skyldigur at taka við valinum, sum honum er fallið í lut, men kann bera seg undan at taka við endurvali, áðrenn líka so long tíð er runnin, sum tann, ið hann hevur greitt tað umrødda starvi.

## 4. Lóg nr. 84 af 31.03.1926 for Færøerne om Landvæsenskommisioner, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995

(skjal 17 – við føroyskari týðing).

Við Danmarks Riges Grundlóg frá 1849, sum var lýst at galda fyri Føroyar 27. mars 1850,[50] var skipað so fyri, at hereftir skuldi valdið í danska (og harvið eisini føroyska) samfelagnum verða býtt soleiðis, at lóggevandi valdið skuldi geva lógirnar, útinnandi valdið útinna tær, og dømandi valdið døma í trætum sbrt. lógunum.

Hetta býtið er í teoriini nokk so greitt, men í praksis eru øki, serliga fyrstu árini eftir grundlógin fekk gildi, sum evnisliga eru soleiðis, at tey riða á markinum millum valdsbýtini, grundlógin setir upp.

Eitt av hesum vóru tær sokallaðu landbúnaðarstevnunar, sum í Danmark vóru av gamlari rót, helst frá forordning 15.05.1761 „om fællesskabets ophævelse.“[51]

Í Føroyum vóru landbúnaðarstevnurnar ikki kendar. Ikki fyrr enn við lov nr. 54 af 1. april 1891 om oprettelse af landvæsenskommisioner paa Færøerne komu tær til Føroya eftir donskum mynstri. Nú eru tær reglubundnar eftir lóg nr. 84 af 31.03.1926 for Færøerne om Landvæsenskommisioner, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995.

[50] Zakarias Wang, stjórnmálafrøði 1. útgáva 1988, bls. 156.

[51] Sí Flemming Tholstrup, Lærebog i landboret, København 1956, bls. 11.

Landbúnaðarstevnan og yvir henni yvirlandbúnaðarstevnan er, um hetta er lógásett, kærumyndugleiki í avgerðum, sum annar myndugleiki hevur tikið á landbúnaðarmálsøkinum.

Av røttum kanst tú spyrja, um hesar stevnur eru dómstólar ella fyrisitingarligir stovnar. Formligi framferðarhátturin, hesar stevnur nýta, minnir nógv um veruliga dómsstólsviðgerð, við stevning, vitnisførslu, procedure og avgerð (dómi?), og tað, sum støða skal takast til, er at loysa eina trætu millum tveir partar. Men tað, sum landbúnaðarstevnurnar taka støðu til, er í flestu førum ikki til eina rættarliga trætu á landbúnaðarøkinum, har lógarinnar bókstavur hevur eina loysn av trupulleikanum, men at gera eina meting av, hvør loysn best er frá einum landbúnaðarligum horni enn eftir, hvat lógarinnar bókstavur sigur. Ikki ber til at skjóta avgerðina hjá yvirlandbúnaðarstevnu inn fyri dómstólarnar eftir vanligu reglunum. Serlig mannagongd er nevniliga ásett viðvíkjandi dómstólsviðgerð av yvirlandbúnaðarstevnuavgerðum í lógini § 11. Har verður sagt:

> „Dog staar det den Part, der vil anke over, at Overlandvæsenskommissionen har afgjort Punkter, der ligger udenfor Landvæsenskommissionens Omraade, eller afvist Sager, der ligger indenfor dens Omraade, frit for inden 4 Maaneder fra Kendelsens Afsigelse af indanke denne for Højesteret, der da kun vil have at afgøre, om Overlandvæsenskommissionen har været kompetent eller ikke, og efter Omstændighederne helt eller delvis at ophæve Kendelsen og at afvise Sagen fra eller henvise den til Landvæsenskommissionen, men i øvrigt ikke at indlade sig paa Sagens Realitet.“

Í mun til grannastevnurnar kann landbúnaðarstevnan sigast at verða ein myndugleiki, sum út frá lóggávuni tekur støðu til rættiliga ítøkiligar spurningar av landbúnaðarligum slagi, meðan grannastevnan við sínum viðtøkum innan lógarkarmarnar skapar at kalla nýggjan rættarstand eftir ynskjum, sum fólkið á staðnum hevur.

Fyri 1891 vóru sum nevnt ongar landbúnaðarstevnur í Føroyum. Avgerðirnar, sum tær taka í dag, vórðu tá tiknar av teim sokallaðu politirættunum, vanligu dómstólunum, og av godsbestyrelsen (fútanum) við kærurætti til ráðharra í Danmark, sum hevði málsøkið undir sær.

Sum nevnt vóru landbúnaðarstevnurnar stovnsettar við lóg frá 1. apríl 1891, men henda lóg var avtikin við lóg nr. 84 af 31.03.1926 for Færøerne om Landvæsenskommisioner, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995, sum nú er tann lóg, sum er galdandi lóg landbúnaðarstevnum viðvíkjandi.

Lógin tekur bert støðu til bygnaðin av landbúnaðarstevnu og yvirlandbúnaðarstevnu og formliga framferðarháttin í samband við máls-

viðgerð í stevnunum, men ikki hvørji mál skulu avgreiðast á landbúnaðarstevnu. Hetta er ásett í ymsu serlógunum landbúnaðinum viðvíkjandi. Vit kunnu kanska kalla lógina fyri eina landbúnaðarstevnurættargangslóg.

Landbúnaðarstevnunar eru í Føroyum 6 í tali sbrt. landbúnaðarstevnulógini § 2. Ein fyri hvørja sýslu, sum tekur sær av málum, sum liggja innanfyri viðkomandi sýslu.

Í hvørji landbúnaðarstevnu sita sýslumaðurin, sum formaður, og tveir aðrir limir, sum sýslumaðurin tilnevnir av lista, hann hevur fingið sendandi frá landsstýrinum. Landsstýrið letur hvørt 6. ár lista við 6 monnum (nú eisini kvinnum, sbrt. løgtingslóg nr. 52 frá 03.05.1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn § 8) í einstøku sýsluni til hvønn sýslumann, sum eftir lógini § 2 skulu

> „være myndige, uberygtede, vederhæftige, i sysselet bosatte Mænd, der har indfødsret“

Eftir § 5 tekur sýslumaðurin, so vítt hetta ber til, stevnulimir til einstøku málini eftir røð. Er tað so, at allir 6, sum standa á listanum, hava forfall, so vendir hann sær til landsstýrið, sum vísir á annan sýslulista, sum hann í staðin skal taka nevndarlimir frá.

Tað er borgarlig skylda at verða landbúnaðarstevnulimur, og bert tann, sum fyltur er 60 ár, kann bera seg undan, ella tann, sum landsstýrið loysir frá skylduni.

Tann, sum ætlar at skjóta mál, sum tikið er av øðrum myndugleika, inn fyri landbúnaðarstevnu, skal skrivliga lata sýslumanninum eina áheitan um hetta. Hetta vil vanliga verða gjørt í sama formi sum í eini stevning, við tað at í skrivinum verður sagt frá, hvat málskravið er (t.v.s. hvørt ynski ein setur fram um, at niðurstøðan hjá landbúnaðarstevnuni skal verða) og hvør málsgrundgevingin í málinum er. Frestin fyri at skjóta mál inn fyri landbúnaðarstevnu, er vanliga nevnd, í teim serstøku landbúnaðarlógunum. Tó sigur landbúnaðarstevnulógin § 5, stk. 2, at er talan um at skjóta grannastevnuviðtøku inn fyri landbúnaðarstevnu, so er frestin 8 vikur frá grannastevnuviðtøkudegnum.

Í landbúnaðarstevnuviðgerðini luttaka bert upprunaligi myndugleikin, sum tók støðu, partur, sum fingið hevur „viðhald“, og kærararnir. Hevur onkur verið partur í málinum, men ikki fingið viðhald í málinum, men ikki hevur kært, luttekur hann ikki í viðgerðini, stendur upprunaavgerðin bara við mótvegis honum.

Mótvegis viðgerð, sum aðrar almennar nevndir veita t.d. náttúrufriðingarnevndir, er viðgerðin í landbúnaðarstevnu ikki ókeypis. Ómakslønin til landbúnaðarstevnulimirnar, ferða- og vistarhald teirra, og møguligi kostnaðurin av serkønum vitnum skal gjaldast av pørtunum sbrt. lógini § 13, og eftir § 14 kann sýslumaðurin krevja, at tann,

sum leggur mál fyri landbúnaðarstevnu, setur trygd fyri hesum kostnaði, sum stendst av málinum, og hetta verður vanliga altíð gjørt. Í løtuni er trygdargjaldið vanliga sett til kr. 8.000,00. Sbr. § 14 stk. 1, 2. pkt skal landbúnaðarstevnan í úrskurði sínum eisini áseta, hvussu málskostnaðurin í málinum skal gjaldast av pørtunum. Har vil so vanliga verða, at tapandi parturin skal gjalda áður nevnda kostnað, men eisini gjalda vinnandi partinum útreiðslur hansara til hansara sakførara og aðrar útreiðslur, hann hevur havt av málinum.

Í lógarinnar § 17 er tikin hædd fyri, at onkur, sum góða grund hevur at kæra, ikki skjýtur málið inn fyri landbúnaðarstevnu, tí at hann ikki hevur neyðugan pening til málsviðgerðina. Har er so ásett, at amtmaðurin (nú tulkað sum landsstýrið eftir, at málsøkið landbúnaður er komin á føroyskar hendur) hevur heimild at lata landskassan gjalda allar útreiðslur hansara – heilt ella partvíst – sum standast av málinum. Eitt slag av fríari rættargongu.

Sýslumaðurin ásetur, nær landbúnaðarstevnuviðgerðin skal verða. Málsviðgerðin „bør altid henlægges til den Bygd, hvortil sagen nærmest hører“ (lógarinnar § 5, stk. 1, síðsta pkt). Tað áliggur eftir § 6 tí, sum skjýtur málið inn fyri landbúnaðarstevnu, at alment fráboða dagin, sýslumaðurin hevur ásett, og skránna. Hetta skal henda við kunngerð í svørtutalvu í bygdini, og um landbúnaðarstevnan heldur tað vera neyðugt við almennari lýsing í fjølmiðlunum í Føroyum. Sýslumaðurin skal sjálvur boða jarðarráðnum frá fundinum, um so er, at tað er partur í málinum.

Tá so landbúnaðarstevnan er sett ávísa dagin og klokkutíman, so vil málsviðgerðin vanliga fara fram sum undir einum vanligum borgarligum máli. Eftir § 7 eigur málið vanligvís at halda áfram til enda sama dag ella í størri máli eftir samanhangandi dagaviðgerð.

Landbúnaðarstevnan vil vanliga byrja við, at landbúnaðarstevnan, um neyðugt, saman við pørtunum fer á staðið at skoða umstøðurnar.

Hereftir verður stevnan sett í onkrum nærliggjandi høli. Um sakførari er á landbúnaðarstevnufundinum, vil hann av landbúnaðarstevnuni oftast verða biðin um í stuttum at greiða frá, hvat málið snýr seg um, og hann lesur upp tey skjøl, sum týdning hava fyri at fáa yvirlit yvir, hvat málið snýr seg um. Eru fleiri sakførarar á fundinum, vil vanliga tann, sum hevur kært málið inn fyri landbúnaðarstevnu, geva hesa frágreiðing. Men er eingin sakførari á stevnuni, so biður landbúnaðarstevnan vanliga tann, hon heldur vera best egnaðan, sum er til staðar, geva hesa frágreiðing. Tá ið so frágreiðingin er givin, fær so mótparturin ella partarnir høvi til í stuttum at rættleiða og koma við ískoytandi upplýsingum.

Hereftir fer so vitnisførsla fram. Vanliga vil tann, sum skotið hevur málið inn fyri landbúnaðarstevnu, fyrst verða avhoyrdur, síðan mótparturin ella mótpartarnir og hareftir onnur vitni. Sýslumaðurin skip-

ar so fyri eftir § 6, at vitnini, sum innkallast skulu, fáa boð, og ásetur sjálvur, hvussu langa frest vitnini skulu hava.

Lógin nevnir einki um, at nakar hevur skyldu at møta sum vitni fyri landbúnaðarstevnu, og tí er neyvan heimild til at krevja hetta. Um revsivert er at siga ósatt fyri landbúnaðarstevnu er óvist, kanska kunnu slíkar ósannar frágreiðingar føra til revsing eftir borgaraligu revsilógini § 158 ella § 161.

Tá ið vitnisførðslan er at enda, verður procedura í málinum. Sakførarnir hjá pørtunum, ella partarnir sjálvir, argumentera, hví teir eiga at fáa viðhald í sínum málskravi.

Tá ið komið er at enda, roynir landbúnaðarstevnan semju í málinum sbr. § 7, stk. 4. Ber ikki til at fáa semju í lag, skal landbúnaðarstevnan innan 6 vikur gera úrskurð í málinum. Hon boðar á landbúnaðarstevnuni frá, nær úrskurður verður sagdur, men ber hetta ikki til, so boðar landbúnaðarstevnan frá í almennari lýsing, nær úrskurður verður sagdur.

Sum høvuðsregla er tað galdandi í eini landbúnaðarstevnu, at stevnan bert kann koma til eina niðurstøðu, sum ein av pørtunum í málinum hevur kravt, ella eina kombinatión av hesum. – Tó kunnu umstøður í undantaksføri vera, har landbúnaðarstevnan út frá almennum áhugamálum kann koma til aðra niðurstøðu, enn partarnir hava kravt. [52]

Reglur um tvingsilsfullgerð av landbúnaðarstevnuavgerðum eru at finna í § 15 í lógini.

Sum nevnt, áseta einstøku serlógirnar, hvørji kærumál skulu viðgerast á landbúnaðarstevnu. Eftir lógini um landsjørð § 10, skulu kærumál viðvíkjandi festiskifti leggjast fyri landbúnaðarstevnu. Sama skulu kærumál viðvíkjandi leigumálum og sølumálum av landsjørð, t.d. traðir grundstykki v.m.. Eftir garðalógini, § 49, kunnu avgerðir hjá garðssýninum skjótast inn fyri landbúnaðarstevnu, eisini tá ið tað virkar sum vatnsýni sbrt. lógini um áir og vøtn. Ávís grannastevnumál sbrt. grannastevnulógini § 13 kunnu skjótast inn fyri landbúnaðarstevnu. Í § 35, stk. 1, í hagalógini verður sagt, at um broyting av bittíðini er ynskjandi ella neyðug, verður málið, um ikki loyst í sátt og semju, at gera av á landbúnaðarstevnu. Somuleiðis er ásett í hagalógini § 37, at mál um avloysing fyri vetrarbit kunnu skjótast inn fyri landbúnaðarstevnu og sbr. § 38 í hagalógini um útrakstur í hagan. Í hagalógini, § 50, verður alment sagt, at ósemjur viðvíkjandi teimum í lógini umrøddu rættindum og skyldum verða viðgjørdar eftir lógini um landbúnaðarstevnur.

Avgerðir, sum landbúnaðarstevna tekur, kunnu av pørtunum í málinum verða skotnar inn fyri yvirlandbúnaðarstevnu. Í yvirlandbúnaðar-

[52] Sí nærri um hetta fyribrigdi „dispositonsmaxima“ mótvegis „officialmaxime“ í landbúnaðarstevnumálum Flemming Tholstrup, Lærebog i landboret, København 1956, bls. 27.

stevnuni sita sbrt. § 1 sorinskrivarin og 4 aðrir limir, sum sorinskrivarin tilnevnir av lista, hann hevur fingið sendandi frá landsstýrinum við 12 limum á. Teir verða valdir millum fólk úti um alt landið og skulu uppfylla somu treytir og hava somu skyldur sum landbúnaðarstevnulimirnir. Trygdarsetingin áðrenn yvirlandbúnaðarstevnuviðgerð verður byrjað, er vanliga kr. 20.000,00.

Frestin at skjóta mál hjá landbúnaðarstevnuni inn fyri yvirlandbúnaðarstevnu er sbrt. § 8, 3 mánaðir frá tí degi, landbúnaðarstevnan tók avgerð í málinum. Tó kann landsstýrið (áðrenn málsøkið kom á føroyskar hendur, amtmaðurin) loyva kærumáli, hóast frestin er farin, tó ikki tá 6 mánaðir eru farnir.

## 5. Lóg nr. 169 af 18.05.1937 for Færøerne om benyttelse af indsøer og vandløb, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 af 29.06.1995

(sí skjal 18 – við føroyskari týðing).

Uppskotið til hesa lóg gjørdi serliga landbúnaðarnevndin, sum læt álit frá sær í 1911.[53]

Lógin er eitt slag av rammulóg, sum bert setir upp høvuðsstevnumiðini fyri nýtsluni av vatni í áum og vøtnum. Í viðmerkingunum verður nevniliga sagt:[54]

> „Man har ment at kunne indskrænke sig til i selve loven at fastslå et ringe antal hovedregler og at henvise en stor del detailbestemmelser til at fastsættes ved stedlige vedtægter og ved forhåndsskøn af offentlig beskikkede skønsmænd under appel til landvæsenskommissionerne. Man har ment, at der på den måde bedst ville kunne tages hensyn til de mange lokale forskelligheder, som frembyde sig ved ordningen af disse forhold.“

Høvuðsreglan er eftir § 1 :

> „Hvor ikke særlige Retsforhold, Lov eller Sædvane medfører Afvigelse, har grundejeren som saadan Raadighed over det Vand, der findes i Indsø, Aa eller mindre Vandløb inden for Ejendommens grænser.“

Lógin tosar ikki um ognarrætt, men bert ræði, og hetta er nærum sjálvsagt við tí fleksibla formi vatn hevur. Er á ella vatn mark, er miðstreymslinjan nágreiniliga markið ognanna millum eftir § 1, stk. 2.

[53] Forslag og betænkninger afgivne af den færøske landbokommision. København 1911 bls. 174.

[54] Sí notu 53.

Tá ið fleiri eru eigarar av vatni ella á í samogn, kann ein og hvør, sum eigur í samognini, sbr. § 2, ráða yvir vatninum, tó við teirri treyt, at hetta ræði hansara ikki hindrar samánarum hansara eisini at gera brúk av sínum rætti til vatnið.

Er tað soleiðis, at samánarar, sum hava felags rættindi yvir áum ella vøtnum, ynskja at gera neyvari reglur um hetta, so kunnu slíkar viðtøkur eftir § 3 gerast á hagastevnu (um so er, at vatnið alt liggur innanfyri sama haga) ella á grannastevnu (um so er, at vatnið liggur um fleiri hagar). Viðtøkur um at turrleggja vatn, ella regulera vatnstandin kunnu tó ikki gerast uttan amtmansins loyvi (nú landsstýrisins eftir at málsøkið er komið á føroyskar hendur).

Í § 4 er ásett, á hvønn hátt viðtøkur um fiskiskap á vøtnum skulu gerast.

Eftir lógini um áir og vøtn, § 5, er ongum heimilað til skaða hjá øðrum manni at broyta ella steðga náttúruligu leguni, vatn rennur, sjálvt um hetta bert hendir á egnari ogn, tó kann vatnið beinast aftur á gamla leið sbr. § 6, eftir at náttúruorsøkir hava broytt vatnleiðina. Hetta skal tó henda innan eitt ár.

Í ivaføri ger vatnsýnisnevndin av, um vandi er fyri, at eitt ætlað arbeiði fer at gera skaða á annanmans ogn, og ásetir eftir § 7 nærri fylgistreytir við loyvinum. Sbrt. § 15 í lógini virkar garðssýnisnevndin á staðnum sum vatnsýnisnevnd, og kærumøguleikarnir fyri avgerð nevndarinnar sum vatnsýnið gongur eftir reglunum í garðalógini.

Um so er, at vatnsýnisnevndin hevur góðtikið ávíst arbeiði, og arbeitt verður samsvarandi loyvi nevndarinnar, so verður eftir § 7, stk. 2, endurgjald bert veitt fyri skaða, sum stendst av arbeiðinum, um so er, at skaðin er hendur tilætlaður ella av grovum ósketni. Í ongum føri verður veitt endurgjald, um 5 ár eru farin frá tí, arbeiðið var gjørt, og til skaðin hendir.

Í lógarinnar § 9 er regla – í dag vilja vit helst kalla tað umhvørvisregla – um, at spillivatn frá ídnaði, sjúkrahúsum o.l. ikki má leiðast inn á annanmans ogn uttan loyvi vatnsýnisnevndarinnar.

Í § 10 er ásett, at heimilað er hjá manni at føra skaðiligt vatn ella avlopsvatn yvir annanmans ogn, tá ið hetta kann henda uttan skaða. Í ivaføri ger vatnsýnisnevndin av, um hetta ber til, og kann áseta fylgistreytir og áleggja, at gjaldast skal ávíst árligt gjald fyri ampan. Eftir § 11 er rætturin til at føra vanligt vatn yvir annanmans ogn nærum fríur, tó ber hetta ikki til, um skaði stendst av hesum. Eftir § 14 skulu brýr v.m. um á verða gjørdar soleiðis, at vatnsins vanliga rás verður hindrað minst møguligt.

Í § 1, stk. 3, kann landsstýrið geva koncessión til nýtslu av vatni til elverk ella onnur verk. Slíkt loyvi hevur landsstýrið givið elfelagnum SEV við kunngerð nr. 76 frá 05.10.1963 um loyvi givið interkommunala ravmagnsfelagnum S.E.V. til nýtslu av vatnkraftini v.m. Hetta er

bert ein koncessión – og ikki ein einakoncessión – og onki er til hindurs fyri, at landsstýrið gevur øðrum koncessión til nýtslu av vatnkraftini. Í § 1, stk. 4, er ognartøkuheimild til tey neyðugu tiltøkini til koncessiónshavaran eftir reglunum í 1881 ognartøkulógini. Ánari fær tó ikki endurgjald fyri sjálvt vatnið, hevur hann ikki brúkt tað til nakað endamál frammanundan.

## 6. Lóg nr. 147 af 27.03.1939 om udskiftning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995.

Sum skjal 19 er sett inn grein hjá H. Olavusi Danielsen, i Landinspektøren, 30. Bd., 10. Hæfte. 1981. Udskiftningen på Færøerne, ið Ólavur Clementsen hevur týtt.

## 7. Løgtingslóg nr. 55 frá 16.08.1962 um tinglýsing, sum broytt seinast við Ll. nr. 39 frá 05.05.1987.

Í hesi lóg eru nógvar reglur av sera stórum týdningi fyri ognarviðurskiftini í landbúnaðinum, men ikki reglur sum serligar eru fyri landbúnaðin, hetta er um ognarviðurskiftini sum heild í Føroyum. Og nærri verður tí ikki komið inn á hesar reglur her, bert har landbúnaðarlóggávan verður serliga nevnd.

Í tinglýsingarløgtingslógini § 10, stk. 1, verður sagt:

> „Um privat skjal skal kunna tinglýsast, skal tað eftir sínum innihaldi fastseta, stovna, broyta ella taka av rættindi í ávísum føstum eigindómi ella í felagseigindómi, ið hoyrir til ávísan fastan eigindóm, og sýna sum útgivið ella viðtikið sambært grannastevnulógini ella hagalógini av honum ella teimum, sum eftir tingbókini – ella fyri pantibræv sambært flutningi – eru heimilað at ráða yvir viðkomandi rættindum, ella sum útgivið við samtykki hansara“

Í tinglýsingarløgtingslógini § 11, stk. 2, stendur:

> „Til strikingar av pantibrøvum krevst annaðhvørt skjalið sjálvt kvittað ella prógv fyri, at pantirætturin er burturdottin sambært dómsúrskurði. Pantibrøv til statskassan, landskassan, Føroya Jarðargrunn, Føroya Vanlukkutryggingarráð (peningaogn hjá tí føroysku avlamistryggingini), Tryggingarsambandið Føroyar, føroyskar sparikassar og teir realkreditstovnar, sum eru góðtikn-

ir av stati ella løgtingi, kunnu tó eftir avgerð sorinskrivarans verða strikað móti kvittan frá honum, sum rættindi hevur eftir tingbókini.“

Henda regla verður endurtikin í tinglýsingarkunngerðini § 15, stk. 2.

Í tinglýsingarløgtingslógini § 37 er ásett:

„Tá ið ein fastur eigindómur er gjørdur at nýta til eitt varandi vinnuligt virki, koma undir tinglýst pantibræv í eigindóminum, tá ið ikki annað er avtalað, eisini tað til virkið hoyrandi rakstrarinventar og rakstrarambоð – haruppi í maskinur og tekniskar innleggingar av øllum sløgum – og í landbúnaðareigindómi eisini eigindómsins innstøða, taðfall, grøði og onnur framleiðsla, um so er, at tey ikki verða latin burturav í eigindómsins vanliga rakstri.

Er ein eigindómur tryggjaður, kemur undir tinglýst pantibræv í eigindóminum, tá ikki annað er avtalað, tryggingarpeningur hansara. Sama regla er galdandi fyri tað í stk. 1 nevnda tilhoyr.“

Í § 47 b í tinglýsingarløgtingslógini er ásett:

„Undirpant í leysafæ kann ikki verða veitt í søvnum av eins ella til felags nýtslu ætlaðum lutum, ið nevndir verða við vanligum heitum, uttan so at annað fylgir av øðrum lógareglum. Tá ið eitt vinnuvirki verður rikið frá leigaðum eigindómi, kann eigarin hóast reglurnar í stk. 1 pantseta tað til virkið hoyrandi rakstrarinventar og rakstrarambоð – heruppi ímaskinur og tekniskar innleggingar av øllum sløgum – og í landbúnaðareigindómi eisini eigindómsins innstøðu, taðfall, grøði og aðra framleiðslu. Pantsetingin er ikki til hindurs fyri, at nevndu lutir verða latnir burturav í vanliga rakstri virkisins.“

Í tinglýsingarkunngerðini § 24 er ásett:

„§ 24. Bløð til felagseigindómar verða innrættað eftir somu meginreglu sum onnur eigindómsbløð, smbr. § 23. Í 1. deild verða tey matr. nr. førd, sum hava part í felagseigindómum við tilskilan av støddini á partinum, sagt í markatali ella á annan hátt. Í 2. og 3. deild verða sett tey tyngsl og heftingar, sum liggja á felagseigindóminum sjálvum. Hesi tyngsl og heftingar verða bert sett á eigindómsbløðini hjá teimum eigingómum, sum eiga part í felagseigindóminum, tá ið biðið er um tað við áriti á

> skjali, og tyngslið ella heftingin eisini viðvíkur viðkomandi eigindómi.
>
> Stk. 2. Á bygdabløðini verður fyrst sett navn og markatal. Síðani kemur 1. deild tey matr. nr., sum eiga í markatalinum í bygdini, og tilskilað verður, hvussu nógv hetta er. Í 2. deild verða sett grannastevnuviðtøkur, útskiftingar- og búnaðarstevnuúrskurðir og aðrar lógligar viðtøkur og avgerðir, ið sum heild viðvíkja øllum markatalinum í bygdini, men verður bert sett á bløðini hjá teimum einstøku eigindómunum ella felagseigindómum, um tær í stk. 1, seinasta punktum, settu treytir eru loknar."

Festibrøvini verða tinglýst sum rættindi yvir fastogn sbrt. tinglýsingarløgtingslógini § 1. Leigusáttmálar til traðir v.m. hava vanliga verið tinglýstir á viðkomandi matr. nr., men praksis er seinastu árini, at slíkir sáttmálar ikki longur verða tinglýstir.

## 8. Løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962 um matrikulering og sundurbýti

Í hesi lóg eru somuleiðis nógvar reglur av sera stórum týdningi fyri ognarviðurskiftini í landbúnaðinum, men ikki reglur sum serligar eru fyri landbúnaðin, hetta er um ognarviðurskiftini sum heild í Føroyum. Og nærri verður tí ikki komið inn á hesar reglur her, bert har landbúnaðarlóggávan verður serliga nevnd.

Eftir matrikuleringslógini § 1, stk. 2, verður

> „Til sama eigindóm verður roknað øll jørð innan- og uttangarðs við lutum og lunnindum hjá sama eigara í somu markatalsbygd, um jørðin ikki skilliga hoyrir til ymisk brúk."

Við øðrum orðum, sjálvt um fleiri lutir eru hjá sama eigara, sum spreiddir eru um alla bygdina, so hava teir sama matr. nr. og kunnu ikki sundurbýtast frá hvør øðrum, uttan at treytirnar í § 15 og § 16 eru uppfyltar. Í § 15 og § 16 verður sagt:

> „§ 15. Í matrikuleraðum umráði kann samlaður fastur eigindómur ikki býtast sundur, og partur av slíkum eigindómi ella ómatrikuleraðum luti kann ikki avhendast ella pantsetast fyri seg ella verða latin øðrum til brúks longur enn 10 ár, uttan so at matrikulstovan góðkennir sundurbýtið, so hesin partur verður frábýttur við egnum matr. nr.
>
> Ein samlaður fastur eigindómur er í hesi lóg tær jarðir innan- og uttangarðs við lutum og lunnindum, sum antin

a) í matriklinum eru førdar undir einum matr. nr., ella
b) í matriklinum eru førdar undir fleiri matr. nr., og hesi eftir tilskilan í matrikli og tingbók skulu hoyra saman, ella sum annars eftir lóggávuni eru ein samlaður eigindómur.“

„§ 16. Matrikulstovan kann geva ta í § 15 nevndu sundurbýtisgóðkenning í hesum førum:
a) tá ið eigindómsins lutir eru so spjaddir, at tað fyri røktina av jørðini er best, at hann, allur sum hann er, verður lagdur afturat øðrum eigindómum,
b) tá lutur, sum liggur fyri seg, verður ynsktur frábýttur til samanleggingar við grannalut, sum hoyrir til annan eigindóm,
c) tá allur parturin hjá einum eigindómi í einum felagseigindómi verður ynsktur frábýttur til samanleggingar við partin hjá øðrum eigindómi í sama felagseigindómi,
d) tá lutur ella partur í felagseigindómi verður ynsktur fluttur frá einum eigindómi til annan og eigindómanna eginleiki sum brúk av hesum ikki verður munanliga broyttur,
e) tá jørð verður ynskt frábýtt til urtagarðsbrúk ella viðalundir
f) tá jørð, ið er búgvin sum byggilendi, verður ynskt frábýtt til byggigrundir,
g) tá jørð verður ynskt frábýtt til almenna nýtslu,
h) tá tað eftir matrikulsstovunnar meting, sum skal góðkennast av landsstýrinum, eru serligar umstøður, ið tala fyri sundurbýti.“

Í matrikuleringslógini § 7 verður sagt:

„Tað í § 6 nevnda rættarmál verður havt í rætti allar vanligar tingdagar, frá tí stevningin fyrstu ferð er lýst, og til stevnufreistin er farin, báðar dagar viðroknaðar, og kann sorinskrivarin eisini viðgera málið á serligum rættarfundum. Fyrsta rættarfund verður matrikulin við tilhoyrandi skjølum framlagdur.

Mótmæli verða gjørd á rættarfundum og verða viðgjørd av sorinskrivaranum á rættarfundum, tá øll viðkomandi hava fingið tilsøgn. Matrikulstovan, Føroya Jarðarráð og viðkomandi sýslumaður og kommunustýri hava rætt til at leggja fyri rættin mál um servituttir av almennum týdningi.“

Í somu lóg § 30 og § 31 eru reglur um luttøku av garðssýnismonnum í sambandi við marknasetingarmál.

## 9. Løgtingslóg nr. 27 frá 09.09.1954 um fuglaveiðu v.m. seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 24.02.1989.

Av tí at veiðurættindi eftir lóggávuni eru knýtt til ognina, verða reglurnar um hesi eisini stutt nevndar her.

Í § 2, § 3, § 4 og § 5 í fuglaveiðulógini er ásett:

> „Uppi á landi eigur grundeigarin veiðurættin. Viðvíkjandi veiðurætti er hann, sum situr við embætisjørð ella kongsjørð, javnbjóðis grundeigara.
>
> Veiðurættin í vøtnum og áum hevur hann, ella hava teir, sum eftir galdandi lóggávu hava ræði á vøtnunum.
>
> Har felag er, og samtykt ella fyrndarrættur ger ikki avvik, hava eigararnir javnbjóðis veiðurætt. Samtykt um nýtslu av veiðurætti í felag kann gerast á grannastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiða bert kann fara fram í minni mun ella yvirhøvur ikki.
>
> Allir eigarar hava atkvøðurætt á grannastevnu um samtykt um veiðu í felag.
>
> Einsæris burturlating av veiðurætti kann bert fara fram fyri 10 ár í senn.
>
> Friðing yvirhøvur ella partvís innangarðs í eini bygd, har fleiri eigarar eru, kann bert fremjast á grannastevnu. Atkvøðurætt um samtyktina hevur einhvør eigari innangarðs ella kongsjørð. Til gilduga samtykt krevst yvir helmingur av atkvøðugevandi persónum, sum umboða minst helmingin av skattamarkatalinum, sum atkvøðurætt hevur.“

> „§ 3. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir í tí gamla, matrikuleraða bønum í tí bygd, har bjørgini liggja, fuglaveiðurættin í bjørgum, urðum og tílíkum fuglalandi, herundir rættin til omanfleyg.
>
> Rættin til at taka hellufugl hevur hvør maður í tí bygd, sum bjørgini eigur, men eingin uttanbíggjamaður.
>
> Sama rætt sum eigari til fuglaveiðu hevur hann, sum situr við embætisjørð, ella kongsbóndi.“

> „§ 4. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, verður landpartur av fuglaveiðu í bjørgum, urðum og líknandi fuglalandi býttur eftir markatali (§ 3).
>
> Á sama hátt verða útreiðslur av veiðuni býttar, herundir keyp og umsiting av tørvandi amboðum.“

> „§ 5. Samtykt um fuglaveiðu í bjørgum, urðum og tílíkum fuglalandi í felag kann gerast á grannastevnu samsvarandi reglunum í grannastevnulógini.“

Fuglabjørg, urðar, hólmar ella tílík lendi og æðuvarp kunnu eftir § 6 friðast fyri veiðu, sum annars er loyvd eftir lógini, eftir reglunum í § 14 í natúrufriðingarlógini, eftir at sýn er hildið, sum finnur lendið nýtiligt sum fuglaland ella æðuvarp.

Formliga framferðin fyri slík mál er lýst í fuglaveiðulógini §§ 7-12.

## 10. Ymiskar gamlar rættarreglur sum enn hava formligt gildi

### *a. Lóg af 04.03.1857 hvorved Udstykning af det private Jordegods paa Færøerne søges indskrænket, som senest ændret ved A. nr. 272 af 14.05.1986.*

Um hesa lóg verður víst til bls. 33.

### *b. Lóg af 19. januar 1863 om afhændelse af trøer*

Lov af 19. januar 1863 om afhændelse af de fæstegaarden Husegaard ved Thorshavn tilhørende trøer.

Í hesi lóg verður í § 1 sagt:

> „De Fæstegaarden Husegaard ved Thorshavn tilhørende, indhegnede og opdyrkede Trøer, som ere bortlejede til Indvaanere i Thorshavn, skulle gaa over til Selvejendom i Overensstemmelse med efterfølgende Forskrifter.“

Í lógarinnar § 2 verður so ásett, at amtmaðurin, tá ið lógin fekk gildi, skuldi bjóða hvørjum, sum hevði traðarstykki til leigu, trøðna til keyps uppá lógarinnar treytir. Tók hann ikki við tilboðnum helt leigumálið fram, men tá ið leigumálið var úti, skuldi trøðin seljast á almennum uppboði ella alternativt við undirhonds sølu, um lógarinnar prísur fekst við slíkari sølu.

Keypspeningurin fyri trøðina var ásettur til fimm og tjúgu ferðir árligu leiguna, sbr. lógarinnar § 3, og eftir § 4 er givin møguleiki fyri, at staturin kann veita lán til keypspeningin ímóti veði í trøðni.

Í lógarinnar § 5, seinasta pkt., er regla, sum kann hava týdning í dag. Hon umrøður nevniliga støðuna, har tveir ella fleiri í felag hava keypt trøð av Húsagarðsfestinum. Har verður nevniliga sagt, at:

> „Dersom den, der ejer en Del af en Trø, vil afhænde samme,

> skal den eller de, der eje den øvrige Del af en Trøen, være berettigede til at fordre sig Trøparten overdragen for den højeste Pris, som nogen anden vil give for den."

Lógarinnar § 6 ljóðar:

> „Paa ingen af de i nærværende Lov omhandlede Trøer, maa der uden Amtets Samtykke opføres Bygninger til Beboelse. Naar en Trø er bleven bebygget, skal Huset og Trøen forblive en samlet Ejendom, saa at særskilt Afhændelse af en af Delene ikke maa finde Sted."

Heimildin hjá amtinum at loyva bygging á trøðni má, nú málsøkið er komið á føroyskar hendur eftir heimastýrislógini, liggja hjá landsstýrinum. Um seinna pkt. í regluni enn hevur fult gildi, skal ikki støða takast til her, men vist er, at henda regla má berast saman við tær detailleraðu reglurnar fyri sundurbýti í løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. og støða má takast til, um tann niðurstøða eigur at verða drigin, at henda lóg setir gomlu reglurnar til viks.

Lógin inniheldur annars reglur um torvskurð, vetrarbit hjá hagans seyði á traðunum og eina revsiheimild fyri at bróta niður garðarnar um traðirnar. Hesar reglur hava mist týdning sín, nú býarmenningin hevur verið so øgilig serliga í seinastu helvt av hesi øldini.

Relevansurin av lógini í dag er rættiliga lítil – fyri ikki at siga ongin – tí at allar traðirnar, sum umrøddar eru í lógini, liggja innanfyri Stóragarð. Tó kunnu reglurnar møguliga hava týdning í rættarviðurskiftunum á ávísum traðum, sum liggja Yviri við Strond.

### *c. Lóg nr. 70 af 23.04.1897 angaaende Indførelse af en ny Skyldsætning på Færøerne m.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962.*

Bert lógarinnar § 1 og § 2 hava enn gildi.

Í § 1 stendur:

> „Den i henhold til Lov om en ny Skyldsætning paa Færøerne af 29de Marts 1867 § 8 udarbejdede ny Jordebog for Færøerne træder i Kraft Olaidag 1899."

Í § 2 stendur:

> „Fra Den nævnte Dag at regne bliver den i Jordebogen indeholdte Ansættelse af de enkelte Ejendomme til Normalmarker

> under Navn af Skattemarker at lægge til Grund ved beregningen af alle Skatter."

Lógin var í síni tíð grundarlagið fyri øllum ognarskatti, og eisini grundarlag fyri ásetingini av festileiguni. Nú er ongin ognarskattur av jørð longur, og festileigan verður ásett soleiðis, sum landsstýrið heldur verða rímiligt frá eini fríari meting. Týdningurin av lógini í rættarligum høpi er tí í dag eingin.

Manna millum hevur sokallað skattamarkagrundarlagið ongantíð verið nýtt, men gamla miðaldarvirðismátið merkur – gyllin og skinn verður framvegis á okkara døgum nýtt manna millum.

Í lóggávuni verður í ávísum førum víst til, at skattamarkatalið skal verða nýtt sum grundarlag, men í roynd og veru hevur í verki í nýggjari tíð ofta verið nýtt bonitetstal, sum ásett er sbrt. útskiftingarlógini, um slíkt hevur verið til.

### *d. Lóg nr. 183 af 20.03.1918 om Mergelbane*

Eftir lógini § 1 kann ráðharrin fyri almennum arbeiði geva feløgum loyvi til gerð av breytum til flutning av mergel (gødningskalk), torvi, brenni og øðrum vørum fyri 10 ár um ferðina.

Eftir § 2 í lógini skulu limur í feløgunum hava skyldu til ókeypis at lata jørð til breytirnar.

Í § 3 verður latin statinum heimild til undir nærri ásettum treytum at veita peningaliga hjálp til breytirnar.

### *e. Lóg nr. 563 af 04.10.1919 om Lens, Stamhuses og Fideikommisgodsers Overgang til fri Ejendom.*

Lógin er kunngjørd at hava gildi fyri Føroyar, hóast „Len, Stamhuse og Fideikommisgods" ikki eru fyribrigdi, sum kend eru her á landi.

Lógin hevur tó havt týdning fyri Føroyar, tí í § 2, stk. 3, verður stovnsettur grunnur, „hvis midler skal anvendes til jorderhvervelser eller udlån til mindre jordbrugere", og Føroyingum var veitt lán úr hesum grunni, áðrenn jarðargrunnurin varð stovnsettur í 1937. Sum umrøtt á bls. 61 var veiting úr hesum grunni ein partur av stovnsfæi jarðargrunsins.

### *f. Lóg nr. 136 af 01.06.1929 om Begunstigelse for Mergelsselskaber*

Lógin sigur í § 1:

> „Landbrugsministeren bemyndiges til at meddele Andelssel-

> skaber, hvis formaal er Anlæg og Drift af Spor til Befordring af Mergel (Gødningskalk), og hvis medlemmer er Forbrugere af Mergel (Gødningskalk) en bevilling, der omfatter følgende: .....“

Lógin heldur so á í 12 greinum og útgreinar, hvørjir fyrimunir eru slíkum feløgum, og hvørjar veitingar tey hava rætt til.

Sum kunnugt, er ikki kálk í undirgrundini her á landi, og lógin hevur tí ikki havt tann stóra týdningin. Men hon er hóast tað lýst her, kanska tí innfluttur „mergel“ kann fáa ávísar sømdir eftir lógini.

### *g. Lóg nr. 179 af 01.04.1921 om Afløsning af Vintergræsningsretten paa Trøer, indlagte fra Fæstegaarden Husegaard og fra Embedsgaarden Aalekær.*

Í lógini er ásett, at teir sum hava innlagda trøð av Húsagarðsfestinum (nú bæði vestara og eystara) og embætisgarðinum Álaker hava rættarkrav uppá at fáa vetrarbitsrættin avloystan ímóti peningagjaldi, sum í ósemjuføri verður at áseta av landbúnaðarstevnu. Í § 2 er nærri ásett, hvussu avloysingarpeningurin skal býtast millum stat og festara. Býarmenningin hevur tó nú helst gjørt, at lógin í dag er uttan rættarligan týdning.

### *h. Lóg nr. 87 af 31.03.1931 om salg til Thorshavn kommune af embedsgaarden Aalekær.*

Í hesari lóg verður í § 1 givin løgmálaráðharranum heimild at avhenda embætisgarðin Álaker til Tórshavnar kommunu, bæði innan- og uttangarðsrættindi. Keypspeningurin er nærri útgreinaður í § 1. Løgmálaráðharrin seldi seinni býnum garðin.

Í § 2 verður givin traðarleigarum av Álakershaganum heimild at keypa traðir sínar, og at fáa trøðna vetrarfriðaða móti gjaldi.

Í § 3 er ásett, at løgtingið fær heimild til at keypa Debessartrøð frá býráðnum, og at økið uttanum landssjúkrahúsið skal hava tinglýstar servituttar um, at eingin har má fáast við virksemi, sum ikki letur seg sameina við sjúkrahúsvirksemi.

Í § 4 er ásett, at kommunan yvirtekur allar skyldur amtmansins móti øðrum av garðinum eitt nú uppsitara.

### *i. Lóg nr. 51 af 14.03.1931 om hesteavlens fremme på Færøerne, som senest ændret ved L. nr 92 af 23.2.1988 og bekendtgørelse nr. 296 af 10.11.1931 om Færøernes inddeling i distrikter for hingstebedømmelser.*

Lógin ásetir nærri reglur um hald av greðingum.

Í lógarinnar § 1 er ásett, at Føroyar verða býttar upp í 10 umdømi fyri greðingametingar, og verður latið landbúnaðarmálaráðnum (nú

landsstýrinum eftir at málsøkið er komið á føroyskar hendur) upp í hendi at áseta umdømini. Við kunngerð nr. 296 frá 10.11.1931 eru Føroyar býttar upp í 7 slík øki, nevniliga Norðoya sýslu, Eysturoyar sýslu, Norðstreymoyar prestagjald, Suðurstreymoyar prestagjald, Vága sýslu, Sandoyar sýslu og Suðuroyar sýslu.

Í hvørjum grannastevnuøki í landinum skal grannastevnan velja 2 mans, sum skulu móttaka fráboðan um, hvørjir greðingar eru í grannastevnuøkinum. Í lógarinnar § 3 er ásett, at menn, sum eiga ein greðing, hava skyldu at fráboða hetta fyri umsjónarmonnunum í grannastevnuøkinum, sum so aftur fráboðar landbúnaðarráðgevanum hetta. Brot á hesa reglu verða eftir § 10 sektaði.

Í hvørjum greðingaumdømi situr serlig nevnd fyri greðingameting. Í henni sita 2 limir valdir av Føroya Búnaðarfelagi ímillum grannastevnuvaldu eftirlitismenninar í umdøminum og 1 umboði valdum av landbúnaðarráðgevanum. Harafturat sita sum fastir limir í nevndini landbúnaðarráðgevin og almenni djóralæknin í Føroyum.

Greðingaumdømisnevndin tekur eftir § 5 avgerð um, hvørjir greðingar kunnu haldast í umdøminum, og nær góðkendur aligreðingur aftur skal sýnast av nevndini.

Allir greðingar, sum ikki eru góðkendir av greðingaumdømisnevndini, skulu eftir lógarinnar § 9 geldast, og brot á hesa reglu kann eftir lógarinnar § 10 sektast.

Í verki hevur lógin ikki verið hildin uppi í mong ár. Hetta kemst helst av, at lógin hevur sum fyritreyt, at ross skulu nýtast sum arbeiðsross, og maskinur hava nú í allar flestu førum yvirtikið hetta starv.

Áhugafeløgini viðvíkjandi rossum kring landið hava sínámillum við innanhýsis reglum gjørt reglur um, hvør av limunum kann og skal halda greðingar.

Um maður uttanfyri hesar felagsskapir heldur greðing, seta vanligu ognarrættarligu reglurnar rættiliga greiðar reglur fyri hesum haldi.

### *j. Løgtingslóg nr. 3 frá 03.01.1950 um vraking av føroyskum ullvørum til útflutnings.*

Lógin er stutt, inniheldur bert 4 greinir.

Í § 1 verður sagt:

> „Ull, tógv, bundnir og vovnir lutir og skinn skulu fyri at kunna seljast út av landinum vera vrakaðir.“

Í § 2 verður givin landsstýrinum heimild til við kunngerð at skipa nærri reglur fyri vrakingini, og heimild verður givin til, at landskassin rindar tær útreiðslur, sum standast av lógini. Landsstýriskunngerðir hava havt gildi um ullvrakingina, men eru nú avtiknar.

Í § 3 og 4 eru reglur um revsing og gildiskomu.

# E. Tænastur til landbúnaðin

## 1. Búnaðarráðgeving, royndarvirksemi, búnaðarskúlar o.t.

### *a. Royndarvirksemi/undirvísing*

Við kgl. fyriskipan frá 28. februar 1774 verður norðmaðurin Knut Olsen Ellingsgaard sendur til Føroya (á Steigagarð í Sandavági) at læra føroyingar at brúka plógv og onnur amboð. Hetta er fyrsta almenna royndartiltak innan landbúnað í Føroyum.

Á seinna helmingi av farnu øld verður royndarvirksemi viðgjørt á løgtingi fleiri ferðir, og verður í 1892 samtykt at søkja statin um eina árliga játtan uppá kr. 1.500,- í 6 ár til royndarbrúk í Kirkjubø. Eisini varð skipað fyri, at ungir jarðabrúkarar kundu fáa upplæring í jarðarbrúki. Tiltakið í Kirkjubø helt uppat í 1898 – løgtingið metti ikki, at tað var ráðiligt at halda fram.

Á tingið verður málið um búnaðarskúla (saman við háskúlanum og/ella húsarhaldsskúla) lagt fram í 1900 og 1902. Eitt av úrslitunum av tí stóra nevndarálitinum frá 1911 verður, at gongd kemur á aftur viðgerðina av hesum málum, sum endar við, at løgtingið 5. september 1919 samtykkir:

I. At búnaðarskúli, húshaldsskúli og royndarstøð verða sett á stovn á fútagarðinum í Hoyvík.
II. At skúli og royndarstøð verða stjórnað av 5-mannanevnd, harav 3 úr Føroyum.
III. At royndarbrúk vera sett á stovn í Kirkjubø og á Sandi (Traðardali).
IV. At ferðalærarar vera settir at hava skeið í búnaðarfrøði.
V. At gera royndir innan seyðahaldið.

Í 1921 verða so 4 royndarbrúk stovnsett undir leiðslu av „Statens landbrugsførsøg på Færøerne“, seinni „Det færøske landbrugsudvalg“. Tey 4 royndarbrúkini vóru: høvuðsstøðin í Hoyvík, ein stór trøð (uml. 70.000 m$^2$) á Sandi, eitt urtagarðsstykki í Kirkjubø og ein hagapartur í Hvalvík.

Royndarbrúkini:
Royndarbrúkini í Hoyvík og á Sandi høvdu í høvuðsheitum hesar uppgávur:

At royna ymisk eplasløg, rótasløg, kornsløg og grassløg, at royna aðrar plantur, ið kundu hugsast at hava áhuga og týdning fyri jarðarbrúkið, at gera royndir við handils- og køstatøðum til gras, korn, eplir og røtur og at gera royndir, nær besta tíð er at sáa og seta niður.

Serliga tey fyrru árini var virksemið stórt, bæði á sjálvum brúkunum, men ikki minst úti um landið. Nevnast kann, at tað í 1927 vóru gjørdar 91 einkultroyndir. Royndir vóru ikki gjørdar við húsdjórum, tó skal nevnast, at undir heimsbardaganum varð gjørd svínaalistøð á støðini í Traðardali. Henda støðin var bert virkin stutta tíð, og fekk ikki nakran týdning. Metereologiskar kanningar vórðu gjørdar á royndarstøðunum frá byrjan av.

Brúkið í Kirkjubø var ætlað at taka sær av urtagarðsroyndum, so sum vakstrarroyndum við ymiskum plantum, at fyribyrgja plantusjúkum og -skaðadjórum, so sum svartaspillu, rótamaðki o.a. Av tí at Gazet Patursson, ið skuldi leiða royndirnar, gjørdist sjúkur, kom henda støðin ongantíð veruliga í gongd.

Seyðaroyndirnar í Hvalvík skuldu vísa, hvørt betri rakstrarúrslit fekst av at geva seyðinum um veturin, tá einki var at bíta, men annars í so stóran mun sum gjørligt lata hann bjarga sær sjálvum. Seyðaroyndirnar í Hvalvík vóru frá 1920 til 1937.

Sum frá leið lækkaðu játtanirnar til royndararbeiði, og var hetta helst høvuðsorsøkin til, at virksemið minkaði, og at støðirnar vóru í vánaligum standi við stríðslok. Áhugin fyri royndarvirkseminum var helst ikki stórur, tí í 1952 samtykti løgtingið, at tær báðar støðirnar, sum eftir vóru – á Sandi og í Hoyvík – skuldu niðurleggjast frá 1. januar 1953. Málið kom tó aftur á ting og varð 31. oktober 1953 samtykt, at royndarstøðin í Hoyvík skuldi halda fram – fyri fyrst – eftir fyriskipan landsstýrisins.

Reglugerð fyri royndarstøðina varð sett í gildi 31. august 1954. Sambært reglugerðini var endamál royndarvirkisins:

> „Fyrst og fremst at kanna og geva svar til fyrispurningar, sum hava jarðarbrúkarans áhuga í dagliga arbeiði hansara og serliga, hvussu hann kann fáa mest møguliga úrtøku av jørðini. Royndir skuldu serliga útinnast á teimum lendum, sum liggja til royndarstøðina, standandi børoyndir, men kunnu eisini havast í øðrum bygdum, einstøkum jarðarbrúkarum til leiðbeiningar“.

Nýggj reglugerð verður sett í gildi 14. juli 1958 uttan tó at broyta nakað við endamálsorðingini.

Í 1972 verður nýtt vakstrarhús – stórt 500 $m^2$ – bygt á royndarstøðini, og í 1973 byrja royndir við tomatum og agurkum. Hesar royndir hildu fram í nøkur ár.

Nýggj royndarstøð: Eisini áðrenn royndarvirksemið byrjaði í 1920 var drúgt kjak um, hvar støðir og bygningar skuldu vera, og eru fleiri tilmæli gjørd um hesar spurningar. Av teimum plássum, sum vóru uppá tal, kunnu nevnast: í Kirkjubø, á Kjalnesi, á Heyggi, í Skálavík, Streymnesi, Syðradali S. og í Hoyvík.

Á tingsetuni 1963/64 fekk landsstýrið heimild til at fara undir útbyggingar í Hoyvík, men tá komið var til at detailprojektara, steðgaðu ætlanirnar. Landsstýrið setir so 20. oktober 1972 nevnd við hesum arbeiðssetningi:

1. Hvørja bygd best hóskandi er at flyta støðina til.
2. Um partar av støðini eiga at vera eftir í Hoyvík.
3. Kostnaðar- og rakstrarætlan fyri ymiskar loysnir.

Eftir álitinum at døma hevur nevndin bert arbeitt við spurninginum, hvørt støðin, øll ella partvís, skuldi flytast til Kollafjarðar, ella um hon skuldi vera verandi í Hoyvík.

Í áliti, dagfest 6. september 1973, ræður nevndin til, at Royndarstøðin í Hoyvík verður flutt norður á Heygsgarð í Kollafirði. Tó mælir ein minniluti til, at ein partur av virkseminum verður verandi í Hoyvík.

Landsstýrið leggur málið um royndarstøð fyri tingið 14. apríl 1978 (løgtingsmál nr. 67/1978) og samtykkir løgtingið lóg nr. 96 frá 1. nov. 1978, sum ljóðar:

> „§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at byggja nýggja landbúnaðarroyndarstøð, sum eisini kann fyriskipa útbúgving innan landbúnað. Landsstýrinum er heimilað at taka neyðug lán til byggingina.
>
> § 2. Landstýrið tekur sær serkønt fólk at finna hóskandi øki at leggja tílíka støð og fremja projektering. Tá hetta er gjørt kann landsstýrið við góðkenning fíggjarnevndarinnar av kostnaði, fígging og rakstri fara undir byggingina.“

Sum serkønur kannar íslendski búfrøðingurin Sveinn Hallgrímsson garðarnar á Heyggi, í Dalsgarði í Skálavík og í Streymnesi í apríl/mai 1979. Hann metir Heygsgarð at vera væl egnaðan til skúla og royndarvirksemi, og metir, at hann hevur fyrimunir fram um hinar, av tí hann liggur sentralt. Fyrireikingarnar til bygging byrjaðu í 1976. Royndarstøðin í Kollafirði varð tikin í nýtslu september 1986.

Reglugerðin frá 23. sept. 1986 fyri royndarstøðina sigur um virksemið í § 1, 2. stk.:

> „Endamál og uppgáva royndarvirkisins er við tíðarhóskandi jarðarbrúki fyri eyga at kanna møguleikarnar fyri at økja um úrtøku, dygd og virkni, fyrst og fremst innan húsdjórahald og fóðurframleiðslu og at ráðgeva í bestu hættum hesum viðvíkjandi, men eisini at viðgera og svara spurningum, sum hava jarðarbrúkarans áhuga í dagliga arbeiði hansara.

Høvuðsumráðini eru fylgjandi:

1. Húsdjórahald og fóðring, herundir seyðaráðgeving.
2. Vakstrarvelting (plantudyrking), heruppií vakstrarhúsroyndir.
3. Jarðarbrúkstekniskar kanningar og royndir.
4. Veiting og jarðaruppdyrking.
5. Tænastuveitingar til landbúnað og myndugleikar, herundir ísáðing, neytaeftirlit, jørð- og fóðursundurgreiningar, jarðarbrúksbókasavn, bóndaavloysingarskipan og skeið- og eftirútbúgvingarvirksemi.
6. Vera ráðgevandi fyri at avmarka dálking frá landbúnaðinum og øðrum ídnaðarvirkjum við endurnýtslu fyri eyga.

> § 1, stk. 3, Royndir vera serliga at útinna á teim lendum, sum liggja til royndarstøðina, standandi børoyndir, men kunnu eisini havast í øðrum bygdum, einstøkum jarðarbrúkarum til leiðbeiningar“.

Nýggjar reglugerðir verða settar í gildi 21. juni 1988 og aftur 11. sept. 1991. Tað vera tó ongar broytingar gjørdar í endamálsorðingunum.
Við løgtingslóg nr. 46 frá 20. apríl 1995 verður ásett:

> „Landstýrinum verður heimilað at lata Búnaðardepilin reka bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði. Landstýrið ásetir treytirnar“.

Kunngerð nr. 156 frá 28. nov. 1995 sigur:

> „Reglugerð nr. 83 frá 11. sept. 1991 fyri Royndarstøðina verður avtikin“.

Um ætlanirnar við Búnaðardeplinum sigur landsstýrið í viðmerkingunum til lógaruppskotið m.a.:

> „Landsstýrið hevur á fundi samtykt at umskipa Royndarstøðina í Kollafirði. Meginreglan í hesi umskipan er, at Royndarstøðin í núverandi líki verður niðurløgd og umskipað til almennar royndir innan landbúnað. Royndarstøðin sjálv, bygningar og hentleikar, verða latin Búnaðardeplinum, sum miðsavnar høvuðstænastur, almennar og privatar, innan landbúnaðin. Landsstýrið metir, at henda umskipan, sum hevur fullan stuðul frá vinnuni, er eitt týðandi íkast til at skapa grundarlag fyri nýggjari menning innan landbúnaðin. Hetta verður gjørt soleiðis, at almennar tænastur, so sum royndarstjóri/landbúnaðarráðgevi, djóralæknatænasta, útbúgving og búskaparlig ráðgeving kunnu

> húsast saman við felagsskap hjá bøndrum, umsitingini hjá Mjólkavirkið Búnaðarmanna, Búrøkt o.ø. fyri at nýta teir hentleikar, sum eru á Royndarstøðini, og fyri at spara pening“.

Búnaðarskúli og onnur undirvísing:
Skeiðvirksemi við ferðalæraraskipan byrjaði í 1919 og helt fram eini 20 ár. Skeiðvirksemi í samstarv við háskúlan varð byrjað í 1973 og helt fram nøkur ár. Seinni er so skeiðvirksemi tikið upp á Royndarstøðini í Kollafirði. Næmingar hava verið á royndarstøðunum, frá tí tær byrjaðu í 1921.

Búnaðarskúli er ikki komin, men í 1952 gav Eyvind Dalsgaard, búfrøðingur, út bókina Búnaðarfrøði I, ið var ætlað „sum lærubók á Búnaðarskúla Føroya“, sum høvundurin tekur til í fororðinum.

## *b. Ráðgeving*

Búnaðarráðgevi: Fyrsti búnaðarráðgevin, Rasmus Effersøe, verður settur í 1885. Instruks for Landbrugskonsulenten verður sett í gildi 12. juni 1917. Sambært hesi reglugerð er arbeiðsøkið landbúnaðarráðgevans reiðiliga umfatandi. Aftrat tí arbeiði, sum lýst er í reglugerðini, varð hann, sum rímuligt er, eisini drigin inn í tað lívliga felagslívið, sum var innan landbúnaðin í fyrru helvt av 20. øld. Landbúnaðarráðgevin var formaður í sýningarnevnd, sum skuldi góðkenna tarvar og greðingar og skuldi døma á djórasýningum (neyt og ross). Hann var formaður í húsdjóranevndini sambært Lov for Færøerne om Foranstaltninger mod smitsomme Sygdomme hos Husdyr m.m. nr. 36 frá 28. februar 1908.

Av uppgávum, ið seinni vórðu lagdar undir búnaðarráðgevan, kunnu nevnast:

Sambært løgtingslóg nr. 3 frá 3. januar 1950 og kunngerð nr. 38 frá 21. mars 1950 verður vraking av føroyskum ullvørum sett í verk. Starvið sum vrakari verður lagt undir búnaðarráðgevan. Vrakingarskipanin vardi í nøkur ár og varð so avtikin uttan grundgeving. Eisini samskipanin av rottuoyðingini var løgd undir búnaðarráðgevan.

Búnaðarráðgevin er einsamallur í starvi til 1927, tá assistentur verður settur í starv. Tá búnaðarráðgevin doyr í 1942, verður aftur bert einsallur maður í starvi. Í 1969 ger landsstýrið av, at búnaðarráðgevin eisini skal vera settur royndarstjóri í Hoyvík. Í 1980 verða størvini aftur loyst frá hvørjum øðrum. Á 1991 verður ráðgevingarvirksemið lagt undir royndarstøðina í Kollafirði.

Seyðaráðgeving:
Seyðaráðgevi varð settur í 1943, men hetta arbeiðið var ongantíð fult starv. Uppgávur ráðgevans hava verið at geva bøndrum ráð um aling,

fóðring, røkt, húsabygging og annað í sambandi við seyðahaldið. Eisini hevur seyðaráðgevin staðið fyri seyðaroyndum, t.d. vórðu royndir gjørdar í fleiri ár á garði norðuri á Oyri. Seyðaráðgevin var eisini formaður í nevnd, sum stílaði fyri seyðasýningum. Tá seinasti seyðaráðgevin fór frá vegna aldur, varð arbeiðið lagt undir royndarstøðina í Kollafirði.

## c. *Húsdjóralógin*

Við lov nr. 129 frá 31. marts 1926, og sum varð avloyst við eini víðkaðari Lov nr. 20 frá 11. februar 1931 for Færøerne om Foranstaltninger til Husdyravlens og Husdyrbrugets Fremme v.m. – vanliga nevnd húsdjóralógin – verða møguleikar at veita almenna tænastu og studning til ymisk endamál innan húsdjórahaldið. Talan er um statsstudning, sum tey fyrstu árini verður umsitin av Føroya Búnaðarfelag eftir reglum, sum Justitsministeriið ásetir.

Ved Midlertidig Bestemmelse nr. 66 frá 30. desember 1941 og Regler for Anvendelse af det af Statskassen til Færøernes Jordfond ydede Tilskud i Henhold til Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Foranstaltninger til Fremme af Husdyrbruget nr. 67 frá 30. des. 1941, verða játtanirnar latnar í Jarðargrunnin til jarðarráðið at umsita.

Tænastur og játtanir sambært húsdjóralógina (1941) vóru:

A. Tilskud til Tyrehold og Indkøb af Tyre
B. Tilskud til Kontrol ved Malkekvæget
C. Tilskud til Kvægopdrættere
D. Tilskud til Afholdelse af Kvægskuer og til Udvalg af Tillægsdyr
E. Førelse af Stambog
F. Tilskud til Hesteavlen
G. Tilskud til Badeindretninger for Faar samt Faarefolde
H. Tilskud til Opdræt af Avlsfaar samt Præmiering af saadanne
I. Præmier for veldrevne Faarebrug
K. Tilskud til Gedeavl
L. Tilskud til Oprettelse og Vedligehold af Avlssvinestammer
M. Tilskud til Bevarelse og Forøgelse af Fuglebestanden

Galdandi reglur fyri húsdjóralógina eru ásettar í lóg nr. 18 frá 4. mai 1961 og við kunngerð nr. 43 frá 30. juni 1972.

Bólkarnir A, F og G eru viðgjørdir undir kap. C. Bólkarnir C, H, I, K, L og M eru ikki við í galdandi reglum frá 1972, meðan bólkur E nú er partur av ásetingunum um djórasýningar.

Djórasýningar:
Á 1926, tá húsdjóralógin kom í gildi, vóru djórasýningar víða um í

landinum. Seyðasýning var bert tann eina í Havn, men hesar duttu niðurfyri og vórðu ikki uppafturtiknar fyrrenn í 1945. Tá føst skipan kom á sýningarnar, kundi sýning vera á hvørjum stað triðja hvørt ár. Sýningarnar vóru á sumri, og vórðu øll kríatúr í bygdini, onkuntíð úr fleiri bygdum, savnaði á einum staði. Premiur – 1. 2. og 3. premia – vórðu latnar fyri útsjónd, og vórðu djórini bólkaði soleiðis: ungneyt undir 2 ár, kúgv og tarvur. Seinni varð eisini latin premia fyri skrásetta úrtøku sambært neytaeftirlitinum. Ross vórðu bólkaði í ryssu ella greðing, og var premiubýtið tað sama, tó kundi ungur greðingur verða sýndur og góðkendur. Seyðasýningarnar, ið sum áður nevnt vórðu uppafturtiknar í 1945, fóru í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, tó vórðu bert brundlomb og veðrar sýnd, og fór sýningin fram á heysti, tá brundseyðurin varð uppgjørdur. Aftrat teimum vanligu premiunum varð eisini latin úrvalspremia fyri stak vakran seyð. Síðan 1990 hevur eingin alment skipað djórasýning verið.

Neytaeftirlitið:
Neytaeftirlitið byrjaði eisini í 1926. Við reglugerðini frá 1931 verður eftirlitsarbeiðið skipað soleiðis, at útbúgvin eftirlitsmaður (kontrolassistentur) skal setast til arbeiðið. Hann skuldi so ferðast millum bygdir, viga og taka mjólkarprøvar og fitikanna mjólkina. Seinni varð farið yvir til skipan við eftirlitsfeløgum í hvørjari bygd (ella fyri fleiri bygdir). Fólk á staðnum vórðu so sett at viga mjólkina og taka mjólkarprøvar undan hvørjari kúgv morgun og kvøld. Prøvarnir vórðu sendir Føroya Búnaðarfelag til at kanna fitiinnihaldið. Helst skuldi vigast 12 ferðir um árið. Á nøkrum bygdum var eisini fóðureftirlit, har fóðrið til hvørja kúgv var vigað samstundis sum mjólkin. Seinni er skipanin so við og við broytt soleiðis, at tað nú so at siga allastaðni eru neytaeigararnir sjálvir, sum viga undan sínum egnu kúm.

Ísáðing:
Ísáðingin í Føroyum byrjaði á heysti 1958. Teir, sum stílaðu fyri føroyskum landbúnað, vóru komnir til ta niðurstøðu, at tað gekst ov seint við nakrari framgongd í neytahaldinum, serliga varð tá hugsað um mjólkarframleiðsluna. Keyptir vórðu tí tarvar av norska slagnum Sør- og Vestlandsfe. Høli til arbeiðsrúm (laboratorium) var innrættað á Royndarstøðini, har tarvarnir eisini stóðu. Tá arbeiðið var komið í gongd í 1959, varð byrjað at seta menn úti um bygdirnar inn í arbeiðsháttin, og kundu teir tá ísáða í bygdini ella á størri øki t.d. heilari oyggj, um vegasamband loyvdi tí. Sáð var tikið frá tarvunum 3 ferðir um vikuna. Eftir neyðuga viðgerð og tynning varð tað niðurkølt og sent teimum einstøku ísáðarunum. Í 1965 varð farið undir at keypa djúpfryst sáð úr Noregi, men vóru eisini smærri nøgdir av sáð – serliga undan kjøtneytum – keyptar aðrastaðni. Í 1967 varð avgjørt at

nýta sáð undan norska NRF-slagnum og hevur tað verið grundarlagið undir føroyskari neytaaling síðani. Tey fyrstu árini var ísáðingin fyrisitin av jarðarráðnum, men varð hon seinni løgd beinleiðis undir Royndarstøðina.

## 2. Djóralæknaviðurskifti

### *a. Veterinæra skipanin*

Tað fyrsta vit vita um, at djóralækni er umrøddur í føroyskari fyriskipan, er, at í 1870-árunum verður umrøtt á tingi at fáa í lag tiltøk, sum kunna stimbra føroyingum at læra til djóralækna og búfrøðing.

Tað er um sama mundi, at løgtingið tók stig til at fáa lóggávu at skipa viðurskiftunum við innflutningi av dýrum og eisini at gera reglur at fyribyrgja smittu í Føroyum. Hetta mál vann ikki frama í Danmørk.

Ein ungur Havnarmaður, Zacharias Djurhuus, av Húsagarði, fór eftir áheitan og við stuðuli frá løgtinginum at læra til djóralækna. Hann tók prógv í 1881. Eftir hetta hevur hann virkað í Danmørk. Ætlanin var at koma aftur til Føroyar; men um hetta mundi helt løgtingið ikki, at ráðini vóru at seta bæði búfrøðing og djóralækna og tók búfrøðingin fram um. Sum kunnugt tók R. C. Effersøe við hesum starvi.

Z. Djurhuus var 2 ferðir í Føroyum í arbeiðsørindum fyri veterinærdirektoratið í 1897 og í 1909 at kanna neyt fyri tuberkulosu.

Fyrsti djóralæknin, sum virkaði í Føroyum var Carl Johan Bech. Hann byrjaði sjálvstøðugt djóralæknavirksemi í 1918. Tað gjørdist honum rættiliga skjótt greitt, at umstøður vóru ikki at hava djóralæknayrkið sum sjálvstøðuga vinnu í Føroyum. Longu 1 ár seinni, í 1919, ætlaði hann at rýma av landinum aftur. Tá heitti justitsministeriið, haðani Føroyar vóru administreraðar, á hann at verða verandi og bjóðaðu honum eitt sokalla „ø-tillæg“, samsvarandi skipan á oyggjum í Danmørk, eitt nú Læssø og Endelave. Hetta gjørdi, at Carl Johan Bech varð verandi. Tó fekk hann ikki lívbjargað sær við hesum starvi, men fór undir aðra vinnu sum sølumaður og umboðaði í mong ár teir áður so væl kendu Solo-motorarnar og seinni eisini SKF, ella Svensk Kugleleje Fabrik.

Tann 9. december 1919 verður kunngjørdur „Instruks for den af Justitsministeriet ansatte dyrlæge på Færøerne“. Í grein 1 í instruksinum verður ásett, at djóralæknin skal hava bústað í Tórshavn, og at hann ikki uttan amtmansins loyvi kann fara av landinum. Djóralæknin skal fylgja forskriftum, sum justitsministeriið ásetir. Hann skal føra dagbók og á hvørjum ári geva ársfrágreiðing til løgtingið „om de mest bemærkelsesværdige sygdomme og epizootier“ og „angående de indtægter han har haft i det forløbne år.“

Djóralæknin hevur skyldu at gera 2 umreisur um árið. Annars eru reglur ásettar, sum verða endurtiknar í Instruksinum frá 1932 og verða nærri lýstar har.

Í 1932 verður djóralæknin fluttur frá at vera undir justitsministeriinum til landbrúksministeriið.

Samstundis verður kunngjørd „Instruks af 5. mars 1932 for den på Færøerne ansatte DYRLÆGE“.

Fyrsti parturin av instruksinum er um setanarviðurskiftini. Djóralæknin skal hava bústað í Tórshavn og kann m.a. ikki fara av landinum uttan loyvi frá amtmanninum. Eisini eru frítíðarviðurskiftini umrødd.

Í øðrum parti eru høvuðsskyldurnar ásettar:

Det påhviler dyrlægen

1) at have indseende med de i anledning af indførsel af husdyr påbudte foranstaltninger,
2) at foretage rejser og undersøgelser samt iværksætte de fornødne foranstaltningerved udbrud af sygdomme, der kan formodes at være af smitsom art,
3) i samarbejde med forsøgsvirksomheden på Færøerne at foretage undersøgelse til klarlæggelse af iktesygens forekomst på de forskellige øer og grundig sætte sig ind i de andetsteds foretagne undersøgelser og forsøg vedrørende denne sygdom samt at foreslå, eventuelt at lede de fornødne foranstaltninger til sygdommens bekæmpelse på de enkelte lokaliteter, hvor den måtte optræde,
4) at have opmærksomheden rettet på forekomsten af andre parasitære sygdomme (særlig skab, løbe – og lungestrongylose hos får),
5) at udføre almindelig dyrlægegerning for befolkningen.

Fyrsta og annað punktum eru skyldur eftir lóg nr. 36 frá 28. feb. 1908 um tiltøk móti smittandi sjúkum hjá húsdýrum v.m. Um 3. punktum kann sigast, at Royndarstøðin í 1937 gav út eitt serrit „Om fåreiktesygens udbredelse“. og er hetta óivað eitt úrslit av nevnda arbeiði. Um 4. punktið er ikki nógv at viðmerkja annað enn, at nevndu snúltidýr eru um alt landið og verða í dag viðgjørd miðvíst við heilivági. 5. punktið er tað, sum hevur tikið mesta av tíðini og hevur verið høvuðsumráðið í virki djóralæknans.

Djóralæknin hevði forskriftir at halda seg til í yrki sínum. Hesar eru ásettar í 3. punktum.

Djóralæknin skuldi rætta seg eftir forskriftum frá landbrúksministeriinum, amtmanninum og veterinærdirektoratinum. Hann skuldi føra dagbók og geva árliga frágreiðing um yrki sítt. Serliga skuldi greiðast frá, hvørji tiltøk vóru sett í verk í samband við skyldurnar eftir 2. punkti omanfyri.

Djóralæknin hevði skyldu at vitja í hvørja bygd eina ferð um árið í tíðarskeiðinum 15. september til 15. januar. Hann skuldi helst boða frá frammanundan. Vitjanin í Dímun og í Mykinesi kundu tó lagast eftir, hvussu umstøðurnar vóru.

Fyri árligu umreisuna fekk djóralæknin fasta samsýning, sum varð goldin 1. februar, eftir at umreisan var lokin. Upphæddin varð hækkað í 1935, og í 1940 varð hon aftur hækkað, men við teirri broyting at 2/5 av upphæddini vóru samsýning fyri umreisuna og 3/5 vóru samsýning fyri ferðir til fólk, ið ikki sjálvi høvdu ráð at gjalda.

Fyri vanligt djóralæknapraksisarbeiði kundi djóralæknin krevja gjald umframt, at djóralæknin kundi krevja flutningsgjald frá honum, sum hevði boðsent djóralæknan.

Við ískoyti til instruksin var gjaldið hækkað í 1938. Við skrivi frá amtmanninum í 1943 eru gjøldini fyri privatpraksis hækkað 50 %.

Umframt hetta vóru føst gjøld ásett fyri vitjan og viðgerð av dýrum eftir stødd og eftir, hvussu krevjandi viðgerðin var. Eisini var munur á gjøldunum fyri uttangarðs- og innangarðsvitjan, eins og serlig sunnu- og halgidagsgjøld vóru ásett.

Djóralæknin fekk fast gjald fyri kanning og heilsuváttan fyri inn- og útflutt dýr. Eisini her var gjaldið eftir tali og stødd á dýrunum.

At enda vóru eisini gjøld fyri minka- og revakanningar og -viðgerð og fyri viðgerð av luksusdýrum. Hetta mugu vit rokna við eru hundar og kettur o.t., við øðrum orðum kelidýr ella fragddýr.

Var ikki semja millum djóralækna og rekvirent um flutningsútreiðslur og gjald fyri veitingina, skuldi úrskurður gerast av amtmanni, og djóralæknin hevði skyldu at fylgja hesum úrskurði.

Fyri serligar kanningar og djóralæknahjálp, sum høvdu týdning at fáa gjørt, men sum vóru ov kostnaðarmiklar fyri rekvirentin, vóru møguleikar at fáa studning frá amtmanninum.

Gjørdi djóralæknin tænastuferðir fyri tað almenna, hevði hann rætt til dagpening eftir serligum reglum.

Heimildir vóru hjá løgtinginum at avgera, at djóralæknin skuldi gera tuberkulinroyndir á neytum og høsnum. Eisini kundi løgtingið áleggja djóralæknanum at hava eftirlit við mjólkar- og kjøtsølu fyri serliga samsýning.

Onki er til skjals um, at djóralæknin hevur gjørt tuberkulinroyndir eftir 1932; men í 1929 er frágreiðing um gjølliga tuberkulinkanning av neytum í Føroyum. Tuberkulinroyndin er ætlað at ávísa, um neyt hava tuberklasmittuna ella ikki.

Djóralæknin hevði skyldu uttan serliga samsýning annaðhvørt at vera limur í húsdýranevndini ella at ummæla tey mál, sum húsdýranevndin legði fyri hann. Djóralæknin hevði eisini skyldu í samband við tænastuferðir at vera við í almennum arbeiði til frama fyri húsdýraaling og húsdýrahald og at ráðgeva um húsdýrahald og húsdýra-

aling, tó var ikki krav um, at hann skuldi gera serligar ferðir í hesum sambandi.

Eftir at heimastýrislógin kom í gildi vóru djóralæknaviðurskifti yvirtikin sum sermál, samb. Lista A, 13. punktum og heimildirnar, sum amtmaðurin og veterinærdirektoratið áður høvdu, vórðu nú fluttar til landsstýrið. Eftir løgtingslóg nr. 16 frá 28. mars 1949 „om lønreguleringer for landets tjenestemænd“ § 7, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 22. dec. 1952, er djóralæknin vorðin tænastumaður.

Næsta broytingin í viðurskiftum djóralæknans er við kunngerð nr.1 frá 3. januar 1959, ið ber heitið „REGLUGER fyri djóralæknan“

Í § 1 stendur, at djóralæknin (landsdjóralæknin), sum landsstýrið setur, hevur bústað í Tórshavn.

Her kann tilskilast, at vit fyrstu ferð møta heitinum „landsdjóralæknin“.

Annars kann sigast sum heild, at reglugerðin er endurtøka av instruksinum frá 1932 við smærri broytingum og justeringum.

Undir skyldurnar hjá djóralæknanum er nú eisini at hava eftirlit við útflutningi av hvalatvøsti.

Fyri umreisuna er tann broyting, at áður skuldi hetta vera gjørt frá 15. sept. til 15. januar; men nú skal umreisan vera í tíðarskeiðinum 1. august til 1. november.

Av øðrum broytingum eru, at gjøldini eru broytt samsvarandi kostnaðarbroytingini í samfelagnum annars.

Carl Johan Bech fór frá sum djóralækni í aug. 1961. Ongin djóralækni virkaði í Føroyum í knappliga 1 ár, til D. J. Bærentsen tók við starvinum sum landsdjóralækni í juli 1962.

Við kunngerð nr. 53 frá 20. juli 1962 verður reglugerð fyri landsdjóralæknan lýst.

Hendan reglugerð er sum heild ein endurtøka av reglugerðini frá 1959 við smærri justeringum. Tó er ein munandi broyting viðv. gjaldi fyri ferðing. Áður var tað so, at flutningstakstur skuldi gjaldast av rekvirentinum, og harafturat var so gjald fyri sjálva vitjanina og viðgerðina av dýrinum, sum djóralæknin var boðsendur til. Við nýggju reglugerðini verður hetta broytt soleiðis, at djóralæknin ikki longur skal krevja gjald fyri ferðing frá rekvirentinum, og er hetta grundað á tað sjónarmið, at kostnaðurin skal vera tann sami fyri at boðsenda djóralæknanum, annaðhvørt ein býr eitt nú á Hvítanesi ella í Bø. Samstundis verður tann praksis innarbeiddur, at vitjað verður bert til dýr, sum ikki kunna koma til djóralæknan, t.v.s. í høvuðsheitum til neyt og ross. Tó eisini til onnur dýr, tá ið serligir trupulleikar tóku seg upp í eini skipan sum so.

Næsta broytingin í reglugerðini fyri landsdjóralækan er við kunngerð nr. 44 frá 28. august 1967.

Einastu broytingarnar eru, at takstirnir verða dagsettir við kostn-

aðarbroytingarnar, sum høvdu verið síðan 1962 og síðan okkurt smávegis afturat.

Í 1975 verður núgaldandi reglugerð fyri landsdjóralæknan lýst við kunngerð nr. 53 frá 7. juli 1975.

Frá at vera ein persónur, djóralæknin, ella landsdjóralæknin, verður nú ásett, at landsdjóralæknaembætið er stovnur undir landsstýrinum og at fyristøðumaðurin skal vera djóralækni. Hetta skal setast í samband við, at við løgtingslóg nr. 18 frá 6. mai 1975 verður Heilsufrøðiliga Starvsstovan sett á stovn, har ið tað í § 1, 2. stk ,er ásett, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan er undir landsdjóralæknaembætinum. Hendan skipan verðir tikin av við løgtingslóg nr. 23 frá 13. mars 1986 um Heilsufrøðiliga Starvsstovu, har ið tað í § 1, 1. stk, er ásett, at Starvstovan er stovnur undir landsstýrinum.

Í § 2 í reglugerðini fyri landsdjóralæknan eru, eins og áður, skyldur landsdjóralæknans ásettar.

Í § 2 er undir 5) fyrstu ferð ásett, at ein av skyldunum er at hava umsjón við øllum veterinervirksemi í landinum. Í 1975 var ein djóralækni settur afturat, og starvaðist hann á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni umframt, at hann hevði skyldu at virka sum praktiserandi djóralækni, tá ið hetta var neyðugt.

Seinni er djóralæknavirksemið munandi økt við djóralæknum á praksisøkinum, í fiskaalingini og á heilsufrøðiliga økinum. Her skal tilskilast, at landsdjóralæknin ongar beinleiðis veterinerar lógarheimildir hevur at halda seg til, tá ið tað snýr seg um umsjón við veterinerum virksemi í landinum.

Ongin lóggáva er um hesi viðurskifti.

Í § 2 er undir 7) ásett, at ein av skyldunum er at hava umsjón við aling av fiski á landi og undir landi. Hetta er í samband við, at fiskaalingin tekur seg upp, og neyðugt er við veterinerum innliti í hesa vinnu, tí krøvini til veterinerar váttanir um ymiskar sjúkur alsamt gjørdust størri. Eitt úrslit av hesum vaksandi aktiviteti er, at tann 30. apríl 1987 verður sett í gildi løgtingslóg nr. 26 um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum, sum verður broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 30. juni 1992. Eftir hesari lógini eru nógvar skyldur lagdar á landsdjóralæknan. Hendan lógin er á aliøkinum pendantur til lógina frá 1908 um smittandi sjúkur hjá húsdýrum v.m., sum við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 verður løgd undir landsdjóralæknan at umsita.

Ein av skyldunum, sum landsdjóralæknin hevði havt síðan byrjan, er nú avtikin, og er tað skyldan at gera árliga umreisu til hvørja bygd. Hetta kemst av broyttu búnaðar- og ferðaviðurskiftunum. Ein av aðaltáttunum í vanliga húsarhaldinum á bygd var nú broyttur munandi. Fyrr var kúgv í nærum hvørjum húsi; men miðskeiðis í sjeytiárinum er hetta fullkomiliga broytt. Endamálið við umreisunum

var næstan 100 % at veita neytahaldinum tænastur. Nú eru nógvar bygdir og enntá oyggjar, har ið ongin kúgv er, og endamálið við umreisunum er ikki tað sama. Samstundis verða ferðamøguleikarnir munandi bøttir, serliga miðskeiðis í sjeytiárunum við ferjum, brúgvum og bergholum. Neytahaldið broytist samstundis heilt nógv. Eindirnar fækka; men gerast størri. Kýrnar mjólka upp til ferfalt samanborið við 15 ár frammanundan. Trupulleikarnir økjast samsvarandi ella meira. Ferðingin heldur ikki uppat, men verður munandi økt og eftir øðrum mynstri.

Fyri djóralæknapraksis verður orðingin broytt frá, at djóralæknin skal vera fólki til handa við vanligari djóralæknahjálp til, at djóralæknin eftir umstøðunum og eftir førimuni skal vera fólki til hjálpar við vanligari djóralæknahjálp.

Fyri hetta arbeiði hevur landsdjóralæknin rætt at krevja samsýning, sum landsstýrið ásetur. Hendan samsýning verður nú ásett í serligari kunngerð, nevniliga kunngerð nr. 71. frá 30. november 1976.

Gjøldini verða eftir skipanini framman undan, men eru samsvarandi kostnaðargongdini annars.

Samb. § 7 í reglugerð fyri landsdjóralæknan frá 1967 hevði landsdjóralæknin skyldu at vera limur í húsdýranevndini. Hetta er broytt við § 6 í reglugerðini frá 1975, har tað er ásett, at landsdjóralæknin skal vera ráðgevi hjá landsstýrinum og øðrum myndugleikum.

Frá 1975 var landsdjóralæknaembætið mannað við 1 djóralækna fulla tíð og djóralæknin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni virkaði meira og meira sum praktiserandi djóralækni. Frá 1981 eru 2 djóralæknar fulla tíð undir embætinum. Í 1984 er djóralækni á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at taka sær av fiskasjúkum burturav.

Tá ið D. J. Bærentsen fór frá vegna aldur, var lýst eftir nýggjum landsdjóralækna. Í starvslýsingini var ásett, at hann burturav skuldi taka sær av fyrisitingarligum málum og bert í serligum føri, eitt nú vegna sjúku ella øðrum forfalli, hevði skyldu at vera tøkur til vanligt djóralæknaarbeiði. Um sama mundið verður djóralækni settur afturat til praksisarbeiði. Praktiserandi djóralæknarnir hava síðan virkað undir heitinum djóralæknatænastan. Í stuttum kann sigast, at arbeiðsøkið hevur verið eftir § 4 í reglugerðini fyri landsdjóralæknan, t.v.s. at vera fólki til hjálpar við vanligari djóralæknahjálp. Í 1987 vóru takstirnir fyri ymisku veitingarnar broyttar.

Fyrst í nítiárunum var ein arbeiðsbólkur settur at gera nýtt uppskot um veterineru skipanina. Í bólkinum vóru ein fulltrúi fyri landsstýrið, landsdjóralæknin, eitt umboð fyri djóralæknatænastuna, eitt umboð fyri fiskasjúkudeildina og eitt umboð fyri P/F Fiskarøkt, sum varð sett á stovn av privatum initiativi. Eitt uppskot kom frá bólkinum um ymisku tænasturnar á privatum grundarlagi við avtalu við landsstýrið um gjald fyri ymiskar veitingar. Eitt av endamálunum var at skipa hesar

tænastur soleiðis, at vaktar- og frítíðarskipan kundu tryggjast á rímiligum støði.

Djóralæknatænastan varð privatiserað eftir hesum uppskoti og síðan 1. januar 1994 eru praktiserandi djóralæknarnir loystir úr starvi hjá landsstýrinum og landsdjóralæknanum og virka á privatum grundarlagi. Eitt tað fyrsti, ið varð gjørt, var at økja um manningina soleiðis, at nú eru 3 djóralæknar.

Grundarlagið undir djóralæknatænastuni er ein avtala við landsstýrið um at røkja alt vanligt praksisarbeiði í landinum og hava eina vaktarskipan, so fólk altíð fáa samband við djóralækna. Fyri hetta verður veitt eitt árligt gjald. Í avtaluni liggur eisini, at djóralæknarnir skulu ferðast á bygd. Her er grundsjónarmiðið, at djóralæknarnir hava skyldu at fara til øll dýr, sum ikki kunnu koma til hølini, har djóralæknarnir halda til. Avgerðin, nær ið farast skal, verður tikin á veterinærfakligum grundarlagi. Í stuttum kann sigast, at djóralæknarnir vera boðsendir til stórdýr, t.v.s. neyt og ross. Neytahaldini eru so fá í tali nú, at tá ið farið verður til eitt øki, eitt nú Norðuroyggjar ella Sandoy, kunnu djóralæknarnir seta seg í samband við allar, sum hava neyt og boða teimum frá, at teir eru har á leið ella koma í næstum. Til vitjanir, sum ikki eru bráðneyðugar, ber eisini til at draga saman á einum bíðilista, so at tað, sum gerast skal, verður gjørt við næstu umreisu í økinum. Hesar vitjanir snúgva seg ikki bert um stórdýr, men eisini um seyð, hund og katt. Eitt av aðalmálunum við at koma regluliga til fjósini er, at djóralæknarnir á tann hátt fáa hollan kunnleika til støðuna í fjósinum, eins og teir sjálvsagt fáa persónligt samband við viðskiftafólkini. Hetta er so aftur grundarlagið undir, at tað ber til í telefonsamrøðu at greiða ymiskar sjúkutrupulleikar og avgreiða heilivágaforskriftir, uttan at djóralæknarnir persónliga nýtast at taka sjúkuavgerð á staðnum og viðgera dýrini persónliga í hvørjum einstakum føri.

Gjøldini fyri veitingarnar hjá djóralæknatænastuni eru eftir avtalu við landstýrið. Gjøldini eru tey somu fyri sama dýraslagið, um so dýrið kemur til djóralæknan, ella djóralæknin noyðist at nýta ein heilan dag fyri at koma til dýrið.

Gjøldini eru løgd eftir sokallaðari pointskipan, har ið 1 point er hálvur takstur fyri eina vitjan. Øll onnur veiting verður so umroknað eftir hesum. Hetta er skipan, ið er vorðin vanlig fyri djóralæknar á okkara leiðum.

Umframt at vitja og viðgera dýr er ein rættiliga stórur partur av arbeiðinun at ráðgeva fólki í veterinerum málum. Hetta verður gjørt uttan samsýning. Hetta arbeiði verður ikki beinleiðis skrásett.

Men leysliga mett eru einar 3-4000 áheitanir av slíkum slag árliga.

Á hvørjum ári skulu djóralæknarnir geva landsstýrinum/landsdjóralæknanum upplýsingar um virki teirra. Landsstýrið er ikki komið við ítøkiligum ynski um, hvørjar upplýsingar tað vil hava. Øll journal-

isering og bókhald er lagt inn á telduskipan, so til ber til eina og hvørja tíð at geva upplýsingar um, eitt nú tilburðir av ávísari sjúku fyri alt landið, eitt ávíst øki ella hjá einstakum neytahaldi.

At enda skal leggjast afturat, at í avtaluni við landsstýrið er eisini nevndararbeiði og tað arbeiði, sum verður gjørt í grinda- ella hvalakanningum.

Eisini skal skoytast uppí, at djóralæknarnir, sum arbeiða við alifiski, hava gjørt líknandi avtalu við landsstýrið um at gera tænastur fyri fast árligt gjald.

### *b. Lóg nr. 36 af 28.02.1908 for Færøerne om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme hos husdyrene m.m., som senest ændret ved Ll. nr. 110 af 29.06.1995.*

Hendan lógin verður sett í gildi og kemur í staðin fyri reglurnar í § 16 í lóg nr. 229 frá 23. februar 1866 om haugevæsenet på Færøerne. Í hesari grein 16 var fyrisett at:

> „Får måe ikke indføres til Færøerne fra andre steder, uden at der for sydselmanden er forevist attest fra øvrigheden på afgangsstedet om, at der ingen sygdom hersker blandt fårene. For hvert uden sådan attest indført får bødes 5 rd., hvorhos fåret strax dræbes."

Eftir hesari lóg eru bert heimildir at stýra innflutninginum av seyði og ikki øðrum dýrum. Í viðmerkingunum til lógina frá 1908 er eitt av høvuðsargumentunum fyri at fáa nýggja lóg á hesum øki júst hesin tvørrandi møguleiki at stýra innflutninginum og annars at seta tiltøk í verk at fyribyrgja smittu hjá húsdýrunum. Hetta mál hevði verið frammi í 1874 og 1875; men justitsministeriið helt ikki, at neyðugt var at gera serliga lóggávu á hesum øki. So við og við øktist trýstið frá føroyskari síðu, serliga eftir at skip vóru farin til Íslands at fiska og tóku seyð heim við til Føroya. Í 1905 tók smittandi eygnasjúka seg upp í seyðinum í Eysturoynni. Hetta gjørdi sítt til, at lógin var løgd fram og samtykt. Eitt av málunum, sum orðaskifti var um, var trupulleikin at umsita slíka lóg, tá ið ongin djóralækni var í Føroyum. Løgtingið helt, at tá einastu smittandi sjúkurnar vóru tuberkulosa hjá neytum og bráðsótt og eygnasjúka hjá seyði, bar til at halda skil á, sjálvt um ongin djóralækni var. Eisini var ført fram, at um onnur smittandi sjúka skuldi tikið seg upp, bar til at boðsenda einum ella kanska fleiri djóralæknum úr Danmørk. Eisini var ført fram, at sera lítil tørvur var á at innflyta dýr til Føroyar. Lógaruppskotið, sum at enda varð lagt fram og samtykt, var gjørt eftir donskum mynstri við smærri umsitingarligum justeringum.

Myndugleikin

Landsstýrið er hægsti myndugleiki eftir hesi lóg, samb §§ 1,2,3,4,5,6,8 og § 14, har tað er ásett, at

> „Landstyret skal være bemyndiget til at give almindelige instruktoriske forskrifter for husdyrkommissionens og politiets virksomhed i henhold til denne lov“.

Eftir § 1 hevur landsstýrið tó skyldu at fáa ummæli frá húsdýranevndini og møguliga øðrum myndugleika í sambandi við givin loyvi til innflutning av húsdýrum, gagnflogfenaði, húðum og skinnum.

Húsdýranevndin er samb. § 9 mannað av løgtingsins landbúnaðarráðgeva og 4 limum, sum landsstýrið tilnevnir saman við varalimum. Limir og varalimir skulu hava bústað í Tórshavn.

Orsøkin til, at hendan nevnd verður sett, er óivað, at ongin djóralækni er í landinum, tá ið lógin verður sett í gildi. Tí er natúrligt at velja landbúnaðarráðgevan, sum verður formaður hjá nevndini, og 4 limir til at umsita tey tiltøk, sum eru neyðug at seta í verk eftir lógini.

Í § 9 er eisini ásett, at løgreglan og kommunustýri, annaðhvørt beinleiðis ella við serligari nevnd, hava skyldu at veita húsdýranevndini hjálp at útinna tey tiltøk, sum eru neyðug at fyribyrgja sjúku.

Í § 13, sum snýr seg um tuberkulosu hjá neytum, er serligur myndugleiki hjá landfútanum.

Í § 1 og § 6 eru nevndir „eventuelle andre myndigheder“. Undir hesum er tað, at djóralæknin og seinni landsdjóralæknin er við í umsitingini av hesari lógini. Tó skal her tilskilast, at djóralæknin til 1975 hevði skyldu at vera limur í húsdýranevndini ella geva tilmæli til húsdýranevndina.

Við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 verður lógin broytt soleiðis, at húsdýranevndin verður avtikin, og í hennara stað verður landsdjóralæknin settur inn. Hetta merkir, at landsdjóralæknin nú einsamallur umsitur hesa lóg.

Løgreglan verður nógv umrødd sum myndugleiki eftir lógini. Er illgruni um smittandi sjúku, skal hetta samb. § 7 fráboðast til løgregluna. Eftir § 10 skal løgreglan, herundir eisini landfútin og sýslumaðurin, vera við at útinna tey tiltøk, sum skulu setast í verk. Løgreglan hevur eisini leiklut eftir § 11 í samband við endurgjald eftir lógini. Løgreglan hevur eisini skyldur eftir §§ 16 og 17 um sóttverju v.m. Ein orsøk til, at løgreglan hevur so nógvar skyldur eftir lógini, er óivað, at ongin veterinerur myndugleiki er í landinum, tá ið lógin kemur í gildi. Í londum við veterinerari lóggávu eru nógvar av slíkum skyldum lagdar hagar.

Um innflutning av dýrum v. m.
Reglurnar um innflutning eru ásettar í §§1-5, 15 og 16. Fyri allan innflutning av húsdýrum, gagnflogfenaði eins og húðum og skinnum er treytað, at loyvið er givið frammanundan av landsstýrinum, sum í hvørjum máli skal hava tilsøgn frá húsdýranevndini og evt. øðrum myndugleika. Innflutningurin er treytaður av, at ávísar reglur verða fylgdar fyri at fyribyrgja smittu. Loyvið til innflutning verður bert givið, tá ið roknast kann við, at ongin smittuvandi stendst av innflutninginum.

Í § 2 hevur landsstýrið heimild at avmarka ella sýta innflutningi úr ávísum londum ella plássum.

Í reglunum um innflutning eru ongar beinleiðis avmarkingar í innflutningi av dýrum sum so, bert reglur og treytir verða fylgdar. Vanliga fatanin millum manna hevur tó verið, at lógin bert heimilar innflutningi av dýrum í aliendamáli, og húsdýranevndin hevur av mongum verið hildin at vera myndugleikin, sum í evsta týdningi stýrir alingini. Ein av orsøkunum til hetta er, at tann 18. apríl 1927 var sett í gildi kunngerð nr. 86 „Om indførsel til Færøerne af husdyr".

Í § 1 í hesari kunngerð er ásett, hvaðani tey einstøku dýrasløgini kunnu innflytast, og eisini er ásett, at loyvi bert kann vera givið „når indførslen er påkrævet af hensyn til den pågældende races forbedring". Í kunngerðini vóru annars neyvar reglur um sóttverju og sóttreinsing v.m. Eisini vóru reglur um innflutning av ull, har serligur dentur var lagdur á at halda seyðaskrubb burturi. Hendan kunngerðin verður avtikin í 1983 við kunngerð nr. 55 frá 26. mai 1983 um innflutning av djórum og smittuberandi lutum, sum broytt við kunngerð nr. 136 frá 5. mai 1990.

Innflutningur til Føroya av dýrum sum heild hevur av góðum grundum verið sera restriktivur, og í mong ár hevur bert verið givið loyvi til innflutning í heilt serligum førum. Innflutningur av rossum hevur verið loyvdur úr Íslandi, haðani smittuvandin var sera lítil um nakar. Neyt hevur ikki verið neyðugt at innflutt, av tí at skipaður innflutningur av neytasáð, har ið smittuvandin eisini er sera lítil, hevur gjørt innflutningin óneyðugan. Av øðrum dýrum hevur tað næstan bert verið hundar, og her serliga seyðahundar og løgregluhundar, sum eru innfluttir. Leggjast skal afturat, at í sjeytiárunum var skipaður innflutningur í stórum av høsnum.

Við áður nevndu kunngerð frá 1983 verður í § 1 ásett, at allur innflutningur av súgdýrum og fuglum til Føroya er forboðin. Eftir § 2 kann landsdjóralæknin eftir ummæli frá húsdýranevndini eftirlíka undantaksloyvi at innflyta súgdýr og fuglar, tá ið áneyðir eru, eitt nú at bøta um slagið v.m. Við hesari orðing av kunngerðini kann tað aftur verða loyvt at innflyta dýr við øðrum endamáli enn til aling.

Hetta verður eisini praktiserað í dag. Fyrst dragnaði á tann hátt, at

fólk, sum høvdu verið búsitandi uttanlands og skuldu flyta til Føroya, fingu undantaksloyvi at taka hund ella kat sín við sær higar, tó treytað av sóttverjutiltøkum. Hesar reglur eru vorðnar alt linari, og í dag er loyvt at flyta hund og katt úr nógvum londum, tó treytað av fyribyrgjandi koppingartiltøkum og sóttverju í 10 dagar. Eisini er vorðið loyvt at senda dýr av landinum í avmarkað tíðarskeið og síðan fáa tað aftur, treytað av somu koppingartiltøkum.

Í omanfyri nevndu kunngerð eru í § 5, 1. stk., eisini nærri ásetingar um innflutning eftir § 4 í lógini frá 1908. Har er generelt forboð fyri innflutningi av øllum vørum, sum kunnu hava smittu við sær.

Í 2. stk er heimilað landsdjóralæknanum at geva undantak frá ásetingunum í 1. stk. Í § 6 er eisini meira generelt undantak frá forboðnum um innflutning. Hetta er galdandi fyri vørur úr Norðurlondum, Stórabretlandi og Írlandi. Við vørunum skal fylgja uppruna og heilsuváttan. Allar aðrar vørur, sum koma higar, skulu hava serligt undantaksloyvi eftir § 5, 2. stk., sum landsdjóralæknin umsitir.

Tá ið munn- og kleyvsótt hevur herjað í grannalondum okkara, t.v.s. í Danmørk ella Stórabretlandi og Írlandi, hava heimildir verið eftir § 4 í lógini at seta forboð fyri innflutningi frá slíkum londum ella pørtum av londum. Seinast hetta var nýtt, var tá ið munn- og kleyvsótt herjaði í Hálandi í 1984.

Eitt annað fyribrigdi, sum hevur tikið seg upp, er, at vit í 1990 fingu serligt ískoyti til kunngerðina frá 1983, sum setti forboð fyri innflutningi av kraftfóðri úr Stórabretlandi og Írlandi. Hetta var seinni aftur sett úr gildi. Eisini eru í kunngerðini frá 1983 serligar reglur eftir § 10, 1. stk., har tað er generelt forboð fyri innflutningi av hálmi, hoyggi, og tøðum av dýrum og fuglum. Eftir 2. stk. kann landsdjóralæknin geva undantaksloyvi fyri slíkum innflutningi eftir serligum treytum.

Ivi hevur verið um heimildirnar til innflutning av øðrum dýrum enn súgdýrum og fugli. Hesin ivi er komin í tí, at kungerðin frá 26. mai 1983 einans fevnir um súgdýr og fuglar. Í áttatiárunum tók seg upp ein innflutningur av skriðdýrum, herundir skjaldbøkum og slangum. Ongin ivi kann vera um, at heimildir eru í § 4 í lógini frá 1908 um at stýra hesum innflutningi.

Í § 15 eru ásetingar um dýr, sum koma til landið við fari og sum ikki hava innflutningsloyvi. Her er tað karantenumyndugleikin ella løgreglan, sum hevur heimild at áleggja tað, sum eru neyðugt, at fyribyrgja, at dýrini koma í land. Allar útreiðslur, ið standast av hesum, skulu berast av farinum.

Hendan grein varð nýtt, tá ið víðagitna neytaskipið lá á Kollafirði í 1978.

Innflutningur av rovdýrum, sum ikki eru húsdýr, er forboðin, samb. § 16. Tó er loyvt at innflyta rev og mink til loðdýragarðar og treytað av, at hetta verður gjørt á slíkan hátt, at serligur dentur verður lagdur

á trygdarviðurskiftini at fyribyrgja, at dýrini ikki sleppa leys. Loðdýrahald skal vera eftir løgtingslóg nr. 78 frá 21. mai 1982 um loðdýrahald og kunngerð nr. 93 frá 15. august 1986 viðv. loðdýrahaldi, har landbúnaðarráðgevin hevur eftirlitsmyndugleikan.

Í § 16 er eisini ásett, at forboð er fyri innflutningi av rottu og mús, og at heldur ikki er loyvt at flyta hesi dýr oyggjanna millum. Landsstýrið kann tó heimila innflutningi við vísindaligum endamáli.

Um smittandi sjúku í landinum

Í §§ 6, 7, 8 og 13 eru ásetingar um tiltøk, sum kunnu setast í verk, tá ið smittandi sjúka hevur tikið seg upp.

Í § 7, 2. punktum, er ásett, hvussu landsstýrið kann kunngera, at smittandi sjúka hevur tikið seg upp. Hetta hevur verið nýtt í sambandi við smittandi eygnasjúkuna í 1937, við høsnapestina í 1962, við garnasóttina í 1974 og ridluskriðan í 1984. Kunngerðin kann eisini innihalda áheitan á borgaran um uttan drál at boða løgregluni frá, um tey vita ella hava illgruna um, at smittandi sjúka er millum húsdýr teirra.

Heimild er eftir § 6 at seta forboð fyri flutningi av dýrum, har illgruni er um smittandi sjúku, av einari oyggj ella parti av einari oyggj, ella at seta onnur serlig tiltøk í verk at avmarka smittuna. Hetta varð gjørt í samband við eygnasjúkuna í 1937, við høsnapestina í 1962, garnasóttina í 1974 og fyri ridluskriðan í 1984, og forðingin fyri flutningi av seyði oyggjanna millum og eisini í einstakum oyggjum er framvegis í gildi orsakað av ridluskriðanum.

Serligar ásetingar eru um hundaøði (rabies) í § 8. Tíbetur hevur ikki verið neyðugt at nýta heimildirnar eftir hesi grein. Við innflutningi av hundum er eitt av vandamálunum júst hundaøði. Roynt verður við koppseting av innfluttum hundum at fáa trygd fyri, at henda sjúka ikki kemur inn á okkum.

Í § 13 eru serligar ásetingar um tuberkulosu hjá neytum. Landfútin og løgreglan hava heimild at fremja tey tiltøk, sum skulu setast í verk eftir hesari grein. Áður er nevnt, at tuberkulosan óivað var orsøkin til, at hendan lóg var sett í gildi. Tað seinasta vit vita um neyt og tuberkulosu er í samband við eina kanning, sum Carl Johan Bech gjørdi í 1929.

Um tiltøk í sambandi við fyribyrging og avmarking av smittandi sjúku og um útreiðslur og endurgjald v.m.

Í § 10 eru heimildirnar hjá húsdýranevndini staðfestar í samband við fyribyrging ella avmarking av smittandi sjúku. Heimildir eru at avbyrgja og reinsa smittaði eins væl og frísk dýr og dýr, har illgruni er um smittu. Eisini eru heimildir um fyribeining og sóttreinsing og niðurgraving, røkt v.m. Eisini er heimild at avlíva dýr, um hildið verður, at sjúkan er „ondartet „. Tó verður ikki tilskilað, hvussu hendan orð-

ing skal tulkast. Í øðrum londum eru reglur um, hvørjar sjúkur skulu roknast at vera „ondartede“ ella illkynjaðar. Óivað hevur verið hugsað um donsku reglurnar, tá ið hendan orðing er komin við í hesari lóg. Eisini er heimild at avlíva dýr fyri at fáa eina endaliga sjúkuavgerð.

Heimild er hjá løgregluni, fútanum og avvarðandi kommunustýri at seta átrokandi tiltøk í verk.

Í § 11 er ásett, at útreiðslur, sum standast av tiltøkunum eftir §10, ber eigarin. Tó verða útreiðslur fyri sóttreinsingarevni goldnar av tí almenna. Somuleiðis rindar tað almenna útreiðslur fyri nýgerð av rúmum og útskifting av timbri o.t.

Verður krav um, at dýr skulu avlívast, eru fastar reglur at ganga eftir um virðismeting av dýrunum. Fyri seyð hevur onnur mannagongd verið nýtt í samband við avtøku vegna illgruna um ridluskriða. Her hevur virðismeting av seyði, sum Føroya rættur og landsrætturin hava góðtikið, verið nýtt.

Reglur eru um endurgjald fyri lutir so sum húðir, fóður, hoyggj og hálm, fjósreiðskap v.m.

Eisini eru reglur um, at endurgjald skal veitast, um tiltøk eru sett í verk, og tað seinni kann prógvast, at ongin smittandi sjúka var.

Hevur ein eigari sjálvur í viðurskiftum sínum verið orsøk til, at tiltøk eru sett í verk, missir hann rættin til endurgjald frá tí almenna, sum hann annars átti at fingið.

Flutningsútreiðslur hjá landsdjóralæknanum, løgregluni og serkønum, verða bornar av tí almenna. Tað almenna ber eisini útreiðslur fyri serkøna hjálp, sum húsdýranevndin, við góðkenning landsstýrisins, heldur vera neyðuga.

Í § 12 eru reglur um gjald og endurgjald. Hesar reglur eru ógreiðar. Møguliga er refusiónin millum landskassan og statskassan?.

Í § 16 a eru serligar reglur um endurgjald fyri skaða sum dýr valda samb. §16. Her má havast í huga, at um slík dýr, eitt nú minkar, sleppa leys, kann skaðin, sum tey valda, verða óbótaligur.

## 3. Plantusjúkur og skaðadýr

### *a. Galdandi lóggáva*

1) L. nr. 55 af 27.03.1903 om foranstaltninger mod udbredelse af rustsvampe.
2) L. nr. 73 af 23.03.1932 om midler til bekæmpelse af plantesygdomme m.m. som ændret ved L. 447 af 22.12.1939.
3) L. nr. 370 af 21.12.1938 for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr.
4) MB. nr. 13 af 18.03.1942 om foranstaltninger mod kartoffelbrok.

> Kunngerð nr. 26 frá 26. mars 1996 um innfluting av eplum úr Hollandi.

Ad 1: Lógin setur bann ímóti, at berberisbuskar kunnu finnast onnur støð enn í „Botaniskum Havum“, hetta tí at berberis er vertur fyri sjúkuni svartrust, sum er sera vandamikil sjúka á korni.

Ad 2: Endamálið við lógini er at fáa til vega heimild, soleiðis at eftirlit kann havast við teimum evnum, ið verða nýtt til at vinna á plantusjúkum.

Ad 3: Landbúnaðarráðgevin reisti spurning yvirfyri løgtinginum um at innføra lóg ímóti plantusjúkum. Í álitinum hjá løgtingsins búnaðarnevnd var m.a. ført fram:[55]

> „Undertegnede udvalg mener, at det ikke er betryggende kun at indskrænke sig til at henstille til folk at undlade eksport af kartoffler fra de smittede steder, men vil anse det for nødvendigt at få gennemført lignende lovbestemmelser for Færøerne, som er gældende for den øvrige del af riget, således at eksport fra smittede steder kan forbydes. Kartoffeldyrkning er efterhånden blevet så omfattende, at udbyttet næsten dækker øernes behov for kartoffler. Det kan derfor blive katastrofalt for de færøske jordbrugere, ifald mulig eksport af syge eller smittede kartoffler skal medføre, at smitten bliver overført til andre pladser.“

Lógaruppskotið, sum verður framlagt, er næstan einsljóðandi við galdandi donsku lógina og verður samtykt. Lógin heimilar Ministeren for Landbrug og Fiskeri at seta tiltøk í verk, ið fyribyrgja, at plantusjúkur ella skaðadýr, sum eru vandamiklar fyri landbúnaðin, garðyrki, og skógarvøkstur, sum ikki áður eru ávístar, ella sum bert hava avmarkaða útbreiðslu, at verða innfluttar ella innsløddar. Herundir eisini at seta tiltøk í verk, sum forða, at plantusjúkan ella skaðadýrið breiður seg.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið „for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr“ stendur at lesa:

> „Da der konstateres Tilfælde af Kartoffelbrok og muligvis også Pulverskurv i Kvalbø og tilsyneladende også i Famien har Landbrugskonsulenten på Færøerne rejst Spørgsmål om Gennemførelse for Færøerne af lignende Bestemmelser som gælder for den øvrige Del af Riget med Hensyn til Indskriden mod denne Sygdom“

Í viðmerkingunum verður sagt, at sjúkan fyrstu ferð var staðfest í Sandavági í 1931, og at amtið hevði kunngjørt um at vísa varsemi, og lata verða við at nýta øki, ið eru fongd við sjúkuni, til epladyrking, ella bert nýta eplasløg, ið eru órin yvirfyri sjúkuni. Næstu ferð sjúkan bleiv ávíst, var í Hvalba og Fámjin í 1937, og amtið lýsti somuleiðis kunngerð fyri hesi øki.

Mett var, at sjúkan var so mikið álvarsom, at ikki var nokk bert at heita á fólk um at vísa varsemi og lata verða við at flyta epli til onnur støð í landinum, men neyðugt er at fáa lógarheimild soleiðis, at flyting av eplum frá smittaðum støðum kundi bannast.

Ad 4: Kunngerðin, sum verður lýst við heimild í lógini, áleggur øllum, sum hava eplir ella eplaplantur, ið eru fongdar við eplakreft, at boða amtinum frá. Harumframt er bert loyvt at dyrka eplir, ið eru órin yvirfyri sjúkuni, á økjum, ið eru smittað. Kunngerðin setur eisini forboð fyri flutningi av plantum og mold frá økjum, ið er smittað.

Ad 5: Í februar 1996 ger Peder T. Haahr, stjóri fyri almennum Royndum og Ráðgeving, landsstýrinum vart við álvarsomu eplasjúkuna Brúnbakteriosu, sum finst í hollendskum eplum, og bráðneyðugt er at lýsa kunngerð, ið heimilar landsstýrinum, at øll epli, ið verða innflutt úr Hollandi, skulu hava heilsuváttan. Soleiðis verður kunngerð nr. 26, frá 26. mars 1996 um innflutning av eplum úr Hollandi sett í gildi við heimild í „lov nr. 370 af 21. Desember 1938 for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr“.

Brúnbakteriosan bleiv staðfest í Hollandi í 1995 í 17 ymiskum eplasløgum. Í nov. 1995 setur Danmark forboð fyri innflutningi av eplum úr Hollandi, sum ikki hava dokumentatión fyri, at tey eru kannað í Hollandi og frí fyri brúnbakteriosu.

Í skjali 20 er greitt nærri frá mest vanligu plantusjúkunum o.ø. hjá okkum.

## 4. Landbúnaðurin og apoteksverkið

Apoteksverk Føroya er smb. Løgtingslóg nr 104 frá 5. september 1988, stovnur undir Føroya Landsstýri, sum hevur skyldu at tryggja tørvin á neyðugum heilivági bæði til fólk og fæ.

Í tíðini áðrenn Dánjal Bærentsen tók við sum landsdjóralækni, lá so gott sum øll søla av veterinerum heilivági, ið varð nýttur í teirri føstu fyribyrgjandi viðgerðini, hjá Búnaðarfelagnum. Hetta varð gjørt eftir avtalu við undanmann Dánjals, Carl Johan Bech. Apotekini avgreiddu stórt sæð bert forskriftir frá djóralæknanum í samband við heilivág til beinleiðis viðgerð av staðfestum sjúkum.



[55] Løgtingstíðindi 1937 bls. 125. ????????

Tá Dánjal Bærentsen varð settur, kom rættilig broyting í. Um hetta mundi gjørdist útboðið av heilivági til dýr í londunum kring okkum meira fjølbroytt. Neyðugt varð tí at seta seg væl inn í henda marknað, og velja út tað, sum hóskaði seg best til føroysk viðurskifti. Hetta varð gjørt í tøttum samstarvi millum landsdjóralæknan og landsapotekaran.

Sølan kom, sum fylgja av hesum, inn á apotekini. Í teimum førum har talan var um handkeypsheilivág, gjørdist hann tøkur í hondkeypssølunum kring landið.

Henda gongd gjørdi, at heilivágurin Búnaðarfelagið seldi, eftirhondini gjørdist ótíðarhóskandi. Landsstýrið tók í januar 1964 tað princippiellu støðu, at eisini heilivágur til dýr hoyrdi heima á apotekunum. Búnaðarfelagið skuldi gevast við søluni, tó varð loyvi givið at halda á í tí líki, sølan var tá. Koppingarevni fyri brádeyða hevur verið einasti heilivágur, ið eftir var hjá Búnaðarfelagnum. Henda søla er heldur ikki longur.

Í dag verður allur heilivágur til dýr, seldur gjøgnum apotekini. Hetta er eisini í tráð við oman fyri nevndu lóg. Tá talan er um veterineran heilivág sum kann keypast uttan forskrift, verður hesin seldur í handkeypssølunum kring landið. Heilivágur, ið verður seldur sambært forskrift, kostar tað sama, líka mikið hvar í landinum brúkarin býr.

Smb. § 21, stk. 3, í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág, kunnu djóralæknar í kommunum har onki apotek er, handla við heilivági ætlaður dýrum. Heilivágurin skal tó verða keyptur á føroyskum apoteki.

# F. Umhvørvisreglur landbúnaðinum viðvíkjandi

## 1. Lóg nr. 73 af 23.03.1932 om Midler til Bekæmpelse af Plantesygdomme m.m., som ændret ved lov nr. 447 af 22.12.1939.

Lógin snýr seg um evni ella blandingar av evnum, sum sigast virksom at berja niður plantusjúkur, illgresi ella dýr, sum eru til skaða fyri plantur í landbúnaði, urtagarði ella skógarbrúki. (Lógarinnar § 1).

Eftir § 2 skal ein og hvør, sum ger, innflytur ella útflytur slík evni, sum lógin snýr seg um, skrivliga boðað „Statens plantepatologiske Forsøg“[56], at hann ger, innflytur ella útflytur evnini, navnið á evninum og víðarigeva teir upplýsingar, sum skulu standa á merkisseðilinum á evninum sbr. niðanfyri. Eisini skal sami persónur ella felag føra bók um virksemi sítt sum heild við evninum.

56 Eftir at málsøkið er yvirtikið av heimastýrinum skal fráboðanin sendast føroyska myndugleikanum sum ækvivalerar við tann í lógini nevnda danska myndugleikan, helst Heilsufrøðiligu Starvsstovu.

Eftir lógarinnar § 3 skulu evnini verða koyrd í pakkar, sum innihalda ávísar nærri av landbúnaðarmálaráðnum[57] ásettar upplýsingar, eitt nú um vekt, procent av virksamum evnum, procent av fyllievnum, vatni, ella øðrum upploysingarevnum, navn á framleiðara ella innflytara og framleiðslustaði. Eftir somu grein kann verða ásett av landsstýrinum, at ávís evni bert kunnu seljast í upprunapakkanum, sum ikki má verða upplatin innan søluna.

Eftir lógarinnar § 5 liggur ábyrgdin fyri, at lógarreglurnar verða hildnar, hjá tí, sum framleiðir, innflytur ella útflytur evnini. Í § 6 er ásett, at príslistar, rundskriv, merkisseðlar ella líknandi ikki mugu innihalda villleiðandi nøvn, tekningar ella tekst. Tann, sum framleiðir slíkar príslistar v.m., hevur ábyrgdina av hesum.

Brot á lógina verða eftir § 8 sektaði, og í endurtøkuførum kann revsingin herðast til hefti í upp til 3 mánaðar.

Okkurt er tó, sum bendir á, at ivasamt er, um lógin hevur verið hildin uppi í verki tey seinastu nógvu árini.

Markið millum reglurnar í lógini og reglurnar í kongligari fyriskipan nr. 49 af 19.02.1934 for Færøerne om Gifte og andre for Sundheden farlige Stoffer er ógvuliga flótandi, tí at summi av evnunum ímóti plantusjúkum eru samstundis eiturevni fevnd av eiturlógini.

Landsstýrið hevur í dag heimild til við kunngerð sbr. løgtingslóg nr. 134 frá 29.10.1988 um umhvørvisvernd § 4, stk. 1, at

> „áseta reglur um burturkast, djórahald, skaðadjór, skaðaplantur og onnur viðurskifti, tá ið hetta er neyðugt við atliti til fyribyrgingar og basing av óheilsufrøðiligum viðurskiftum ella týðandi ampum fyri umhvørvið“

Hetta merkir, at í dag kann kunngerð skrivast út um sama evnið, sum lógin viðvíkur.

Í dag verður í landbúnaðinum stórt sæð ikki brúkt evni ímóti skaðadýrum; kanska eitt sindur í urtagarðsbrúkum. Viðvíkjandi illgresi verða brúkt hormonpreparatir, sum taka ymisk illgresi, eitt nú hømiliur, men ikki grasvøksturin.

## 2. Løgtingslóg nr. 53 frá 27.11.1952 um viðarlundir/om plantager, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995.

Eftir lógini kann lendi – helst lendi, sum annars frammanundan hevur verið landbúnaðarlendi – verða tinglýst sum skógfriðað eftir lógarinnar § 1.

[57] Eftir at málsøkið er yvirtikið av heimastýrinum liggur myndugleikin hjá landsstýrinum.

Slík skógfriðing hevur við sær, at eigarin av lendinum (og seinni eigarar) eftir lógarinnar § 3 hava skyldu at halda haldgott stik rundanum alt lendið, sum kann halda seyði og stórdýrum úti, líka mikið hvør garðskylduna í grundini hevur. Eisini er tað eftir somu lógargrein ein treyt, at lendið er vetrarfriðað og hevur hóskandi nógvar breytir. Tað er eigarans skylda at umsita breytirnar og forkoma tílíkum óruddi, sum kann lýta viðarlundina innan og eisini uttanum. Øll forstlig tiltøk eitt nú niðurseting, felling og tynning verða útinnt av skógfriðingarnevndini, sum hevur fult ræði á øllum vøkstri og dýralívi í viðarlundini.

Útreiðslurnar, sum standast av skógarfriðingini, ber eigarin, men hann kann fáa almennan studning til hesi tiltøk. Eftir lógarinnar § 1, stk. 2, er tað ein treyt fyri almennum studningi til niðursetingar ella rakstur av viðarlund, at friðingarváttan er tinglisin á viðkomandi lendi eftir lógini.

Tað stendur ikki greitt í lógini, at tað krevst loyvi frá skógfriðingarnevndini til at skógfriða eitt øki, men í praksis loyvir tinglýsingin ikki skógfriðing, uttan skógfriðingarnevndin hevur givið sítt loyvi. Her skulu vit minnast til, at eigarin, sum ynskir skógarfriðing, má frammanundan hava fingið vetrarbitsrættin avloystan, og hetta kann gerast trupult, um so er, at skógfriðingarnevndin ikki hevur tilmælt skógfriðing.

## 3. Løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954 um byggi- og býarskipanir

Í gomlu føroysku bygdini var at kalla alt lendið skipanarliga útlagt sum øki til nýtslu hjá landbúnaðinum, tá ið burtursæð var frá heimrustunum, sum avlagdar vóru at byggja sethús á. Sjálvt heimrustirnar kundu eisini sigast at verða avlagdar til landbúnaðin, tí á teimum vóru umframt sethúsini eisini fjós, úthús v.m. Heimrustirnar vóru ofta lendi, sum ikki vóru egnaði til dyrkilendi. Hetta principp – at alt økið, sum loypur av, er avlagt til landbúnaðarøki – er fyri sovítt galdandi enn í dag í einum moderniseraðum formi. Nú verða byggisamtyktir gjørdar fyri einstøku kommunurnar við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954 um byggi- og býarskipanir, har tað vanliga er, at økið í kommununi evnisliga verða býtt sundur t.d. ávíst til íbúðarøki, ávíst til ídnaðarøki, ávíst til frítíðarendamál osfr. Tað, sum loypur av, tá ið hini økini eru avsett, er vanliga avsett til landbúnaðarendamál. T.d. soleiðis:[58]

58 Byggisamtykt fyri Sunda kommunu 1986-97.

„1. Øki J. er tað sum eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu økini eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, vakstrarhús, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.
2. Loyvt er bert at byggja hús, ið neyðug eru til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í 1. stk. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í samband við vegahald.
3. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minnst gjørligt."

Í bygdini má ogn sbr. § 10, stk. 2, í býarskipanarlógini ikki verða nýtt, verða bygd við nýggjum húsum ella verða umbygd ella sundurbýtt uttan samsvarandi byggisamtyktini, sum er samtykt av bygdarráðnum og góðkend av landsstýrinum. Hetta merkir, at landbúnaðarins rættindi í bygdum við byggisamtyktum eru rættiliga væl tryggjaði.

Eru øki eftir byggisamtyktini útlagt til annað enn landbúnaða, men vera í roynd og veru nýtt til landbúnaða, so er slík nýtsla framvegis loyvd hóast orðaljóðið av áðurnevndu § 10 í býarskipanarlógini, tí vanliga er ásett í almennu reglunum í byggisamtyktini, at ein og hvør lógligur aktivitetur, sum hevur verið á økinum, tá ið byggisamtyktin fekk gildi, kann halda áfram ótarnaður, eftir at hon hevur fingið gildi, hóast aktiviteturin gongur ímóti byggisamtyktini.

## 4. Løgtingslóg nr. 48 frá 09.07.1970 um natúrfriðing/om naturfredning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995.

Henda lóg ger ávís inntriv í virksemi landbúnaðarins.

Týdningarmesta reglan í lógini er almenna reglan í § 1, sum er soljóðandi:

„ § 1. Øll skulu við fyriliti og varsemi fara um í náttúruni, einki gera, ið kann skaða ella skemma, gera nakrar ónáðir hjá øðrum.

Stk. 2. Øll dálking av náttúrini við pappíri, fløskum, plastikkíløtum, brotum o.ø. er forboðin.

Stk. 3. Gomul og ónýtilig før skulu høggast upp ella søkkjast á støðum, har tey ikki eru til bága fyri sigling ella fiskiskapi.

Stk. 4. Bilvrak, ymisk onnur akfør, maskinamboð og partar av teimum, ið ikki verður nýtt meira, mugu ikki kastast burtur á støð, har tey lýta ella eru til skaða ella ampa fyri onnur.

Stk. 5. Burturkast og brúktir lutir, ið verða lagdir so, at tað

> gongur ímóti reglunum í stk. 2-4, kunnu beinast burtur. Tann, ið hevur ábyrgdina av, at óruslið er komið har, skal gjalda kostnaðin. Kostnaðurin kann fáast inn við panting hjá tí avvarðandi.“

Í § 2, stk. 1, verður sagt um uttangarðsbygging:

> „Uttangarðs er ikki loyvt at byggja hús, búðir o.l. uttan loyvi frá friðingarnevndini. Undantiknir eru tó smærri bygningar, sum eftir gomlum siði vanliga hava verið bygdir uttangarðs í samband við landbúnaðin, tá ið teir ikki skemma náttúruna.“

Er sostatt t.d. eitt gamalt minni seyðahús uttangarðs niðurdottið, so kann tað uppafturbyggjast í sama sniði sum fyrr uttan serstakt loyvi.

Í § 2, stk. 2, verður sagt um innangarðsbygging:

> „Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:
> 1) Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá megin flóðarmálanum,
> 2) nærri enn 300 m. frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi,
> 3) nærri enn 300 m. frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum.“

Sum sæst, so kann ikki í ávísum førum verða bygt innangarðs uttan loyvi frá friðingarmyndugleikunum, á sama hátt sum uttangarðs. Tað krevst altíð loyvi, tá t.d. seyðahús v.m. skal byggjast á økinum nevnd í § 2, stk. 2, nr. 1) - 3).

Tá ið friðingarnevndin skal taka støðu til, um loyvast skal at byggja innan- ella uttangarðs, har hetta krevst, skal hon eftir § 2, stk. 5, ætla um:

> „... útsjóndin av ætlaða bygninginum, ella har ætlanin er at seta hann, fer at misprýða í landslagnum ella fer við, ella minkar um útsýnið hjá fólki...“

Um aðrar aktivitetir hjá landbúnaðinum enn bygging kunnu § 3 og § 4 í náttúrufriðingarlógini fáa týdning. Í § 3 verður sagt:

> „§ 3. Burturtøka ella nýtsla av mold, gróti, sandi, eyri, leiri ella torvskurður skal fara fram, so tað skemmir náttúruna sum minst og ger minsta skaða.

Stk. 2. Náttúrfriðingarnevndin kann seta forboð fyri slíka burturtøku ella nýtslu, um vandi er fyri, at sermerkt landslag ella leivdir av sermerktari náttúr fara fyri skeyti.

Stk. 3. Loyvi krevst frá friðingarnevndini at seta á nýtt steinbrot."

Í § 4 verður víðari sagt:

„§ 4. Kann tað ætlast, at arbeiðir koma at misprýða ella skemma náttúruna, skulu tiltøk setast í verk fyri at forða ella minka um skaðan.

Stk. 2. Vegagerð, setan av el- og telefonsteyrum og onnur arbeiðir, ið kunnu væntast at broyta sermerkt landslag munandi, ella at týna leivdir av sermerktari náttúr, mugu ikki verða gjørd ella byrjast uttan loyvi frá náttúrfriðingarnevndini. Hendir hetta kortini, kann nevndin nokta fyri, at arbeiðið heldur fram, og krevja, at avvarðandi ger alt aftur, sum tað var."

Fyri ávís sermerkt øki sbr. § 6 kunnu serfriðingar setast í verk viðvíkjandi:

„1) øki á landi, á vøtnum og áum, tá ið friðingin má haldast ynskjandi av vísindaligum ella søguligum orsøkum,

2) onnur øki, ið bera av í vakurleika, liggja væl fyri ella hava sereyðkenni í landslagnum, plantugróðri ella djóralívi, hava munandi týdning fyri fólk, har íroknað støð, har frítt útsýni er, niðursettar plantur, grótgarðar o.a.t., sum hevur tílíkan týdning,

3) einsæris landssløg, sum drangar, gjáir og gil, fossar, klettar, stórir steinar, áir, vøtn, trø og træhópar, tá ið friðingin tykist ynskjandi í mun til vísindalig ella søgulig virði, vakurleika ella sereyðkennir."

Friðingarnevndin á staðnum gera av eftir lógarinnar § 16 um eitt øki skal friðast sbr. § 6. Friðing av einum øki hevur rættiliga stórar avleiðingar fyri landbúnaðin. Økið skal tá, sbr. § 9, varðveitast í sínum náttúrliga líki og við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðisligum fyribrigdum varðveitast óbroytt, soleiðis serstakliga øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, ið kunnu misprýða, eins væl og tøka av gróti, mold, sandi eyri, leiri, plantum og djórum er forboðin.

Ikki bert øki kunnu friðast eftir lógini. Landsstýrið kann sbr. § 8 við kunngerð, eftir tilmæli frá yvirfriðingarnevndini, áseta, at sløg ella plantu- og djórasamfeløg eisini jarðfrøðilig fyribrigdi, hvørs varðveiting av náttúrvísindaligum ella søguligum orsøkum bera í sær munandi áhuga, skulu verða friðað í øllum ella pørtum av landinum.

## 5. Løgtingslóg nr. 77 frá 12.07.1984 um bann móti burturkoyring av mold til sjós/forbud mod at dumpe jord i havet.

Henda lóg er stutt. Í § 1 verður sagt, at tað er bannað at forkoma mold, leiri og øðrum tilfari frá útgrevstri, vegagerð og tílíkum við at koyra slíkt tilfar til sjós. Eftir § 2 hava øll býráð og bygdarráð skyldu til at ávísa øki, har mold og tilfar frá útgrevstrum og vegagerð o.t. kann leggjast. Í § 3 er ásett, at landsstýrið kann við kunngerð áseta aðrar reglur viðvíkjandi útinning av lógini. Í § 4 er ásett, at brot á lógina kunnu sektast.

Grundgevingin hjá uppskotssetaranum av lógini var:[59]

> „ Tíverri hevur verið og er enn tann siður nýttur kring landið, at tá grivið verður út til húsagrundir ella tílíkt, verður allur hesin útgrevstur koyrdur til sjós (á Bukkvald). Millum ár og dag snýr tað seg um nógv túsund tons, sum vit sostatt beina fyri. Verður hildið fram á hendan hátt, hava vit skjótt forkomið tí sindri av mold, sum okkara forfedrar við ómenniskjaligum stríði, strevi og knossi skaptu burturúr ringum hagalendi.“

## 6. Løgtingslóg nr. 134 frá 29.10.1988 um umhvørvisvernd

Reglurnar í náttúrfriðingarlógini eru settar í gildi fyri at verja náttúruna út frá einum sjónarmiði um, hvat fólk vanliga halda er vakurt ella ljótt fyri eygað. Umhvørvislógin er sett í gildi fyri at verja vistfrøðina t.v.s samanhangin og samspælið í náttúrini millum plantur, djór og jarðfrøði. Aloftast vilja áhugamálini hjá hesum lógum verða tey somu, men føri kunnu verða, har ikki báðar lógirnar dekka, men bert onnur.

Umhvørvislógin er fyri ein meginpart ein rammulóg t.e. ein heimildarlóg til landsstýrið at áseta nærri reglur við kunngerð um tey evni, lógin umrøður. Virkisøki lógarinnar er sbr. § 2:

> „Lógin fevnir um alt virki, haðani føst, flótandi ella luftvorðin evni, ristingar, geisling, ljós og óljóð kunnu elva dálking av luftini, jørðini, áum, vøtnum ella føroyska sjóøkinum.
>
> 2. stk. Lógin fevnir harumframt um virki, ið viðvíkir vandafullum tilgongdum umframt goymslu og flutning av evni við vandamiklum eginleikum, so at rakstrartarn ella óhapp kunnu føra við sær hóttandi vanda fyri dálking sum nevnd í stk. 1.“

[59] Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, løgtingstíðindi 1983 A bls. 417. Har uppskot er samtykt, og er galdandi rættarstandur er vanliga einki umrøtt um hetta her, men verður hetta umrøtt aðrastaðni.

Sostatt kemur nógv av virksemi landbúnaðarins undir reglurnar í umhvørvislógini, ella rættari sagt kunngerðum skrivaðar út við heimild í umhvørvisverndarlógini, tí, sum nevnt, umhvørvislógin sjálv inniheldur fáar rættarreglur, sum venda sær beinleiðis til borgaran. Hon er, sum nevnt, ein heimildarlóg fyri tað mesta.

Í § 26 í umhvørvislógini (undir kapittlinum 5 í lógini: Serliga dálkandi virkir v.m.) er ásett:

> „Fyritøkur, virki ella útbúnaður, ið eru at finna í fylgiskjalinum til lógina, mugu ikki verða gjørd ella farin undir, fyrr enn góðkenning er givin til slíkt. Nevndu fyritøkur, virkir ella útbúnaðir mugu ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend.
>
> 2. stk. Landsstýrið kann gera broytingar í fylgiskjalinum.
>
> 3. stk. Fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, sum í fylgiskjalinum eru merkt við eini stjørnu, kunnu av landsstýrinum verða undantikin skylduni til góðkenning, tá tað metir, at tann dálking, ið virkið, fyritøkan ella útbúnaðurin vil kunna elva, hevur minni týdning fyri umhvørvið.“

Í listanum, sum viðheftur er lógini, verður nevnt undir pkt. F.

„F. Tilvirking av rávørum úr djórum.

1. Sláturvirki og kjøtvirki *
2. Kjøtfóðurverksmiðjur (fyribeiningarstøðir) og beinmjølaverksmiðjur.
3. Garvarí og onnur skinnvirki. *
4. Virkir til reinsingar av djórafitievnum.
5. Mjólkavirkir, fyritøkur til framleiðslu av osti ella ostapulvuri umframt konsumísverksmiðjur og turrmjólkaverksmiðjur
6. .......“

Í listanum, sum viðheftur er lógini, er nevnt undir pkt. J.

„J. Djórahald og goymsla ella viðgerð av húsdjóratøðum.

1. Flogfenagarðar. *
2. Felddjóragarðar. *
3. Svínahald. *
4. Fiskaaling.“

Eftir orðing lógarinnar fevnir hon bert um nýtt virksemi, men eftir § 28 kunnu umhvørvisgóðkenningarkrøv setast verðandi virkjum, tá serligur tørvur er á tí. Eftir § 29 í lógini er tað landsstýrið, sum tekur

avgerð um góðkenning, men eftir § 35, stk. 2, í lógini kann hesin góðkenningarrættur leggjast til landsstovn, og hetta er hent við kunngerð nr. 54 frá 03.05.1994, soleiðis at Heilsufrøðiliga Starvsstova tekur sær av málinum. So sum lógin er orðað, krevja vanlig fjós ella stallar ikki umhvørvisgóðkenning eftir umhvørvislógini.

Í kunngerð nr. 186 frá 05.11.1993 um spillvatnsevju er í § 6 ásett:

> „§ 6. Ikki er loyvt at leiða spillvatnsevju út í áir, løkir, havið ella líknandi ella breiða hana út í bø ella haga.“

Í kunngerð nr. 53 frá 03.05.1994 um umhvørvisreglur, sum kemur ístaðin fyri tær lokalu heilsusamtyktirnar, sum vóru úti um landið, er í § 9 ásett:

> „§ 9. Dálking av vatnveitingarlendum. Ikki er loyvt at dálka vatnveitingarlendi, herundir koyra í ella á tey taðfall, so tað setir omaní, breiða ella grava niður ella goyma tílíkt so nær vatnveiting ella løkum, ella vaska á tílíkum støðum, so vandi er fyri, at vatnið verður dálkað av tí.
>
> Stk. 2. Alt vatn, sum rennur í vatnbrunnar, ið standa innangarðs, ígjøgnum bø ella annað velt ella taðað lendi, skal verða veitt gjøgnum rør.
>
> Stk. 3. Har, sum drekkivatn verður tikið, skal bý- ella bygda(r)ráðið seta upp skelti, sum týðuliga boðar frá, at øll dálking er bannað.“

Sama kunngerð nr. 53 frá 03.05.1994 um umhvørvisreglur sigur í kapittul 8: Húsdýrahald:

> „§ 23. Húsdýrahald. Í býum, býarlíkum bygdum og í meiri býarlíkum býlingum kann bý- bygda(r)ráðið gera av, at húsdýrahald ikki er loyvt uttan góðkenning frá bý- ella bygda(r)ráðnum.
>
> Stk. 2. Um so er, at húsdýrahald, sum ikki er umfatað av kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd, elvir til ampa, sum t.d. stink, gang, nógva flugu, nógva rottu, kann bý- ella bygda(r)ráðið geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk til at fyribyrgja hesum, og í førum, tá ið ikki verður gjørt eftir boðunum, seta forboð fyri dýrahaldinum.
>
> § 24. Fjós, stallar o.t. Gólv í fjósi til neyt, ross, seyð o.t. skal vera steinsett ella stoypt. Flórurin skal vera úr vatntøttum tilfari.
>
> Stk. 2. Frárensl frá fjósum, stallum o.t. skulu førast í køst, mykjubrunn ella tílíkt í tøttum leiðingum, jvb. eisini ásetingarnar í kapittul 7.

Stk. 3. Ikki er loyvt at hava fjós til neyt og ross í kjallarum uttan góðkenning frá bý- ella bygda(r)ráðnum. Góðkenning kann bert verða givin, um gólvið yvir fjósinum er úr betongi uttan lemm ella úr øðrum eins tøttum tilfari, og tað hevur ljóara 30 $cm^2$ til víddar pr. $m^2$ gólvvídd í fjósinum, og gongur 1 metur upp um mønuna ella har, sum húsini eru hægst. Skal tað, sum eftir er av kjallaranum, nýtast til matgoymslu, skulu tøtt og heil skilarúm vera ímillum.

§ 25. Køstar, mykjubrunnar, súrhoyggjabrunnar o.t. skulu verða vatntættir bæði í botninum og til veggirnar, hava tætt lok ella annað, sum forðar fyri avguvan og luktampum, og mugu ikki verða settir nærri enn 8 metrar frá sethúsi, skúla, kirkju ella almennum vegi uttan so, at bý- ella bygda(r)ráðið metir tað vera ógjørligt hjá viðkomandi at seta tílíkan bygning so langt burtur frá.

Stk. 2. Køstar, mykjubrunnar og súrhoyggjabrunnar o.t. skulu tømast so ofta, at eingin vandi er fyri, at teir flóta yvir.

Stk. 3. Tøð frá køstum og mykjubrunnum skal nýtast til tað-ing soleiðis, at hetta ikki elvir til dálking av áum ella er til ampa fyri fólk, ið búgva nærhendis.

Stk. 4. Bý- ella bygda(r)ráðið kann seta forboð fyri nýtslu av køstum, mykjubrunnum, súrhoyggjabrunnum o.t., tá ið nýtslan elvir til vanda fyri dálking ella heilsuvanda.

§ 26. Nærri ásetingar. Bý ella bygda(r)ráðið kann áseta nærri reglur um bygging og reinhald av fjósum, stallum, seyða-, høsna- og dunnuhúsum, køstum, mykju-, súrhoyggja- og land-brunnum o.t. Bý- ella bygda(r)ráðið kann geva boð um neyðug tiltøk og steðga byggingum, um reglurnar ikki verða fylgdar.“

Sum kunnugt er § 23 – § 26 í umhvørviskunngerðini týdningarmestu reglurnar mótvegis landbúnaðinum, tí størsti umhvørvisampin av landbúnaðinum eru køstarnir, súrhoyggjabrunnarnir og tæingin.

# G. Royndir síðan 1937 at broyta búnaðar- og ognarlóggávuna sum ikki hava vunnið frama.[60]

Løgtingstíðindi 1937:
Einki av týdningi.

Løgtingstíðindi 1938:
Løgtingstíðindi 1938 bls. 100: Løgtingsmál 82/1938: Í løgtingsmálinum var innkomið bræv, dagsett 16.11.1938 frá ymsum traðarmonnum í Gøtu um at broyta hagalógina frá 18. mai 1937 soleiðis, at vetrargrasningsrætturin verður avloystur. Innkomið var eisini bræv frá kongsbóndadeild Jarðamannafelags Føroya um at fáa í lag samráðing viðvíkjandi lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 „Om Jordbrugets Fremme".

Búnaðarnevndin fekk málið til viðgerðar og meinti,

> „at tað vil vera uttan skil at fara undir at broyta tær jarðarlógir, sum bert hava verið í gildi í nakrar mánaðir. Lógirnar hava í mong ár verið til umrøðu í tinginum og hava gingið eina tronga gongd gjøgnum allar instansir, og hevur maður havt høvi til at seta sína hugsan fram. Nú eru lógirnar komnar, og nú verða tær royndar í praksis, áðrenn tað við skili kann verða farið undir at broyta tær."

Jóannes bóndi Patursson skeyt upp, at forsætismálaráðharrin fekk heimild til við kongligari fyriskipan eftir tilmæli frá landsnevndini at gera fyribils broytingar í lógini um landbúnaðarins frama, hagalógini, garðalógini og grannastevnulógini. Uppskot meirilutans var samtykt, og uppskot Jóannes Paturssonar fall.

Løgtingstíðindi 1939:
Einki av týdningi.

Løgtingstíðindi 1940:
Einki av týdningi.

Løgtingstíðindi 1941:
Løgtingstíðindi 1941 bls. 82. Løgtingsmál nr. VII 7/1941. Studningur til stik. Maður í Leirvík søkir tingið um studning til stik, men løgtingið sýtir umsóknini. Áhugavert er, at jarðarráðsins ummæli er heldur óvanligt, tað er upp á rím og ljóðar:

[60] Har uppskot er samtykt, og er galdandi rættarstandur er vanliga einki umrøtt um hetta her, men verður hetta umrøtt aðrastaðni.

*Ger um trøðna grótgarð,*
*stóran stuðul tá tú fær,*
*men keypir tú tær útlendskt stik,*
*kalla vit tað landasvik.*
*Hald teg burt frá stikagentum,*
*pening tá tú fært við rentum.*

Løgtingstíðindi 1941 bls. 88. Løgtingsmál nr. VII 10/1941. Í málinum vendi Norðragøtu Búnaðarfelag sær til løgtingið við fyrispurningi um, at vetrarbitsrætturin hjá omanfyri liggjandi haga bleiv broyttur til tíðarskeiðið 11. november til 14. apríl. Búnaðarnevnd løgtingsins mælti frá, at broyta høvuðsregluna í lógini um vetrarbitstíðina, men vísti felagnum til at nýta undantaksheimildirnar í kapittuli 8 í hagalógini. Tilmæli meirilutans í búnaðarnevndini var samtykt.

Løgtingstíðindi 1942:
Einki av týdningi.

Løgtingstíðindi 1943:
Løgtingstíðindi 1943 bls. 109. Løgtingsmál nr. 3/1943 reglur um portur. Í málinum biður Føroya Búnaðarfelag um at fáa samtykt lóg, hareftir rist skal verða einasta lógliga grind á samferðsluvegum, har gæs ikki eru í høgunum. Slík lóg verður ikki samtykt. Ístaðin verður samtykt at kanna, hvussu vegastjórn Íslands ber seg at í slíkum málum.

Løgtingstíðindi 1943, bls. 111. Løgtingsmál nr. 5/1943 landbrúksskúli. Í málinum vóru tvey uppskot. Annað var umsókn frá Anton Kruse um at seta á stovn landbúnaðarskúla uppi í Líð undir Slættaratindi, hitt frá javnaðarflokkinum um at taka til viðgerðar málið um at stovnseta búnaðarskúla. Úrslitið av málsviðgerðini verður, at tingið samtykkir, at fyribils verða kr. 20.000,00 lagdar í ein búnaðargrunn at hava at taka til, tá búnaðarskúli verður settur á stovn í Føroyum.

Løgtingstíðindi 1943, bls. 115. Løgtingsmál nr. 8/1943 dyrkilendi. Javnaðarflokkurin skjýtur upp at gera yvirlit og plan yvir alla uppdyrkingarjørð í Føroyum og eina skipan, ið ger tað lætt og møguligt hjá arbeiðshugaðum monnum at fáa jørð til uppdyrkingar, so leingi ódyrkað nýtilig jørð er at fáa. Úrslitið verður, at tingið velur nevnd við sjey limum at koma við tilmæli í málinum.

Løgtingstíðindi 1943, bls. 116. Løgtingsmál nr. 8/1943 vetrarfriðing. Eftir uppskoti frá javnðarflokkinum tók løgtingið generelt til umrøðu spurningin um vetrarfriðing. Úrslitið gjørdist, at hagalógin fekk tað í dag galdandi orðing, sum hon hevur í § 36 og § 37a.

Løgtingstíðindi 1943, bls. 122. Løgtingsmál nr. 8/1943 seyðaráðgevi. Løgtingið samtykkir frá 1. apríl 1944 at seta ein seyðaráðgeva fyri hóskandi samsýning.

Løgtingstíðindi 1943, bls. 126. Løgtingsmál nr. 12/1943 Uttanbygdajørð. Javnaðarflokkurin mælir til, at borið verður soleiðis á, at jørð hvørki við arvi, gávu, sølu ella á annan hátt kann fara úr bygdini og annars at gera skipan soleiðis, at jørðin í smábygdum ikki fer á uttanbíggja hendur. Meirilutin (Djurhuus og Iversen) í búnaðarnevndini sigur, at einki ivamál er um, at tað er stórt spell fyri eina og hvørja bygd, har jørðin í meir og minni mun er á uttanbíggja hondum. Meirilutin er tó í iva um, hvørji tiltøk skulu setast ímóti hesum. Minnilutin (J.P. Davidsen) mælir til, at jørð, ið kemur til sølu, skal, um hon ikki fær keypara innanbygda, verða keypt av Føroya Jarðargrunni eftir almennari virðismetan, at jørð má ikki latast út av bygdini, hvørki við gávu arvaskifti ella á annan hátt og at uttanbygdajørð, ið nú er, skal við arvaskifti, um hon ikki kann makaskiftast, útbjóðast til sølu. Um hon ikki fær keypara í bygdini, har jørðin liggur, skal hon verða keypt av Føroya Jarðargrunni fyri registreringsvirði. Úrslitið av málsviðgerðini verður, at málið verður latið teirri í løgtingstíðindi 1943 bls. 115 settu nevndini til umhugsingar.

Løgtingstíðindi 1943, bls. 128. Løgtingsmál nr. 13/1943 Keyp av jørð. Javnaðarflokkurin mælir tinginum til at taka til viðgerðar spurningin um at lata eykapening til keyp av jørð. Ein minniluti í búnaðarnevndini J.P. Davidsen og Kr. Djurhuuus mælir til, at játtaðar verða kr. 20.000,00 úr amtsgrunninum til jarðargrunnin at seta niður jarðaleiguna hjá teimum, sum ráðið heldur sita við jørð til ov høga leigu, og at seta niður prísin av jørð, keypt er av óðalinum, men sum ráðið heldur vera ov dýra at selja fyri sama prís, sum tað hevur keypt viðkomandi jørð fyri, og um nakað so verður eftir av peninginum, kann tað verða nýtt til keyp av jørð. Ein minniluti Jóannes Patursson og Poul Petersen kann ikki undir teim núverandi viðurskiftunum tilráða tinginum at útreiða eykapening til keyp av jørð.

Løgtingstíðindi 1943, bls. 129. Løgtingsmál nr. 14/1943 Útrakstur. Í málinum noktar løgtingið at broyta landbúnaðarlóggávuna soleiðis, at um so er, at festari noktar øðrum bit hjá neytum í haganum, so skal jarðarráðnum verða heimilað at taka støðu í málinum.

Løgtingstíðindi 1944:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1945:
Løgtingstíðindi 1945 bls. 59. Løgtingsmál VII/ 2: Landbúnaður/seyðaráðgevi. Sjúrður Patursson, seyðaráðgevi, leggur fram uppskot um seyðaalistøð við nærri útgreinaðum bygnaði. Løgtingið játtar kr. 10.700,00 til stovnseting av slíkari og annars kr. 1.000,00 árliga.

Løgtingstíðindi 1945 bls. 62. Løgtingsmál VII/ 4: Landbúnaður/seyðaráðgevin. Løgtingið samtykkir eftir uppskoti frá javnaðarflokk-

inum at játta kr. 20.000,00 til bygging av búnaðarskúla og kr. 25.000,00 til búnaðarráðið til keyp av amboðum til uppdyrkingararbeiði.

Løgtingstíðindi 1946:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1947:
Løgtingstíðindi 1947 bls. 112. Løgtingsmál VII/ 1 Millumtinganevnd viðv. búnaðarviðurskiftum. Nevndin sett, sbr. løgtingstíðindum 1943 bls. 115 letur álit. Nevndarlimirnir greiða frá, at teir eru ógvuliga ójavnir á máli og seta bert fyribilsuppskot fram og við fyrivarni. Løgtingið samtykkir at beina málið í tað stýrið (landsstýrið), sum fer at verða stovnsett eftir nýggju stýrisskipanini (heimastýrisskipanini).

Løgtingstíðindi 1947 bls. 120. Løgtingsmál VII/ 4. Føroya Búnaðarfelag sendir løgtinginum bræv um at fremja búnaðarskúlamálið. Einki spyrst burturúr.

Løgtingstíðindi 1948:
Løgtingstíðindi 1948 bls. 273. Løgtingsmál 93/1948 Yvirtøka av jarðargrunninum. Poul Petersen, løgtingsmaður, skjýtur upp at yvirtaka jarðargrunnin. Málið verður skotið út til viðgerðar árið eftir.

Løgtingstíðindi 1948 bls. 292. Løgtingsmál 100/1948 Bygging av búnaðarskúla. Samtykt verður løgtingslóg nr. 34 frá 31.03.1949 viðvíkjandi lántøku til bygging av búnaðarskúla í Kollafirði, har landsstýrið fær heimild til at læna kr. 500.000,00 til hetta endamál.

Løgtingstíðindi 1949:
Løgtingstíðindi 1949 bls. 148. Løgtingsmál 35/1949 Løgtingslóg um uttanbíggjajørð.

Landsstýrið legði fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um uttanbíggjajørð. Landsstýrið sigur, at bøurin til uttanbíggjajørð stundum stendur ósligin í fleiri ár orsakað av, at uppsitari og ánari ikki kunnu koma ásamt. Mælt verður til at samtykkja lóg, ið tryggjar uppsitaran, sum skal búgva í bygdini, so hann ikki kann verða uppsagdur, uttan so at jørðin skiftir eigara við arvi ella sølu. Harumframt skjýtur landsstýrið upp, at jørð bert skal kunna fara í arv til 1. og 2. ættarlið, um arvingar ikki búgva í somu bygd, har jørðin liggur, og at tað ikki skal vera loyvt at selja jørð til uttanbíggjamann, um maður á staðnum býður fyri hana, tað jørðin verður mett til av almennum sýnis- og metismanni, ið rætturin útpeikar, og skal uppsitarin altíð eiga fyrsta rætt til keyp. Ein minniluti (Dam og Øregaard) tekur undir við uppskoti landsstýrins, tó soleiðis, at skiftir jørðin lógliga eigara, so kann uppsitarin skiftast út. Minnilutin P. Petersen og A. Sørensen taka ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men harafturímóti til at ganga sam-

an í einum uppskoti um at fyriskriva reglur, sum fastleggja uppsitaraskylduna og rættindi uppsitarans, og sum uppískoyti hartil gera lógarreglu um bygdamanna rættindi til loysingar – ella forkeypsrættindi av uttanbíggjajørð yvirhøvur. Øll uppskotini fullu á tingi.

Løgtingstíðindi 1949 bls. 170. Løgtingsmál 43/1949: Vraking av føroyskum ullvørum. Í málinum sendi Føroya arbeiðarafelag løgtinginum skriv við áheitan á tingið um at at seta í gildi tvungna vraking av føroyskum ullvørum. Jarðarráðið viðmælti áheitanini. Búnaðarnevndin mælir til, at løgtingslóg verður sett í gildi, hvareftir ull, tógv, bundnir og vovnir lutir og skinn skulu, fyri at kunna seljast út av landinum, verða vrakaðir. Í viðmerkingunum verður sagt frá, at tað tykist verða komin steðgur í útflutningin av ullvørum. Nevndin sigur, at hetta kemst kanska av, at tað nú eru fleiri ullvørur í útboði á útlendska marknaðinum, men eisini er at bera ótta fyri, at ikki allar heimavirkisvørur, ið útfluttar eru, hava verið eins góðar. Tí verður mælt til vraking, áðrenn útflutt verður. Lógaruppskotið verður samtykt og seinni staðfest og kunngjørt av løgmanni sum løgtingslóg nr. 3 frá 03.01.1950 um vraking av føroyskum ullvørum til útflutnings.

Løgtingstíðindi 1949 bls. 176. Løgtingsmál 46/1949. Bygging av búnaðarskúla. Málið um búnaðarskúla er aftur fyri á tingi. Serliga stendst tjak av, hvar hann skal verða lagdur. Øll uppskot í málinum falla.

Løgtingstíðindi 1949 bls. 353. Løgtingsmál 111/1949. Yvirtøka av jarðargrunninum og Kongsjørðini. Málið tikið uppaftur frá árinum fyri. Løgtingið samtykkir, at landsstýrið verður umbiðið at taka upp samráðingar við danska ríkisstýrið um yvirtøku av jarðagrunninum og kongsjørðini í Føroyum.

Løgtingstíðindi 1950:

Løgtingstíðindi 1950 bls. 16. Løgtingsmál 6/1950 Bygging av búnaðarskúla. Málið kemur aftur framaftur á løgtingið. Samtykt verður, at landsstýrið skal gera ávísar kanningar, hvørs úrslit skal leggjast aftur fyri løgtingið.

Løgtingstíðindi 1951:

Løgtingstíðindi 1951 bls. 257. Løgtingsmál 64/1951 Búnaðarskúlamálið. Landsstýrið leggur fyri løgtingið úrslit, sum nevnd við Hans J. Jacobsen, búnaðarráðgeva sum formanni og 5 øðrum, er komið til. Løgtingið samtykkir, at spurningurin um byggjan av búnaðarskúla verður lagdur niður fyri fyrst.

Løgtingstíðindi 1951 bls. 323. Løgtingsmál 71/1951 Royndarstøðirnar í Hoyvík og á Sandi. Eftir drúgva umrøðu verður samtykt, at royndarbrúkini í Hoyvík og í Traðadali á Sandi verða at leggja niður fyri fyrst frá 01.01.1953.

Løgtingstíðindi 1952:
Løgtingstíðindi 1952 bls. 5. Løgtingsmál 1/1952: Royndarstøðin í Hoyvík og á Sandi. Løgtingið umrøður aftur støðuna. Einki uppskot samtykt.

Løgtingstíðindi 1953:
Løgtingstíðindi 1953 bls. 37. Løgtingsmál 20/1953 Royndarstøðin í Hoyvík. Løgtingið samtykkir eftir uppskoti frá A. Sørensen og Poul Petersen at geva landsstýrinum upp í hendi at stíla fyri landbúnaðarroyndum til onnur skipan kemur.

Løgtingstíðindi 1953 bls. 42. Løgtingsmál 23/1953 Búnaðarskúli. Tingið viðger, um fíggjarligur styrkur skal veitast Anton Kruse á Eiði at stovnseta Føroya Búnaðarskúla á Eiði. Búnaðarnevndin mælir frá at játta, tí at kostnaðarætlanin fyri skúlans stovnseting og rakstur ikki er nóg trygg. Eingin tingsamtykt verður gjørd.

Løgtingstíðindi 1953, skjal 5. Frásøgn frá teirri av løgtinginum settu nevnd í máli VII-7/1943. Í nevndini sótu E. Húsgarð, kongsbóndi Syðrugøtu, Páll Patursson, kongsbóndi Kirkjubøur, Hans Iversen, ognarmaður, Kvívík, J. F. Øregaard, traðarmaður, Norðragøta, Kr. Djurhuus, sýslumaður, Tvøroyri, E. Dalsgaard, búfrøðingur, Tórshavn og sum formaður H. J. Jacobsen, búnaðarráðgevi. Nevndin skjýtur m.a. upp broytingar í lógini frá 1939 um samanlegging av jørð, lógini um landbúnaðarins frama frá 1937, hagalógini, at gjørd verður fyribils skipan fyri Føroyar um uttanbíggjajørð og broytingar verða framdar í lógini frá 1857 um sundurbýti av óðalsjørðini.

Broytingarnar viðvíkjandi sundur- og samanleggingarviðurskiftunum verða ikki umrøddar her, tí tær hava ikki stóran áhuga longur, nú lógin um matrikulering er gjøgnumførd í 1962. Broytingin í hagalógini hevur eisini samband við uppskot nevndarinnar á hesum øki.

Viðvíkjandi lógini um landbúnaðarins frama verður skotið upp, at tá ið selt verður burturav kongsjørð, so skal viðkomandi bóndi hava útgoldið 1/4 av tí brúksvirði, tann jørð seld verður, kann metast at hava. Skotið verður upp at broyta reglurnar um nýdyrkingarskyldu á traðum, so hon verður minst 5% árliga.

Uppskot nevndarinnar til fyribils skipan fyri Føroyar um uttanbíggjajørð ásetir í § 1, at til uttanbygdajørð er eftir lógini at rokna jørð, har ánarin býr í aðrari bygd enn har, ið jørðin liggur. Í § 2 er ásett, at tá ið ánari á slíkari jørð, sjálvur ikki er førur fyri at røkja hana bæði uttan- og innangarðs, skal hann hava skyldu til at halda uppsitara og við hann hava skipað uppsitarasáttmála, ið tryggjar uppsitaranum brúk av bønum fyri sína og um so verður – einkju hansara lívstíð sbr. tó § 3. Í § 3 er ásett at eigaraskifti á jørð, ið hevur uppsitaratreyt eftir § 2, er bert loyvt til persón, ið býr í tí bygd, har jørðin liggur, og hevur tá uppsitarin fyrsta keypirætt. Um so er, at uppsitarin

ikki ynskir at keypa, kann hansara uppsitarasáttmáli verða uppsagdur við mánaðar fyrivarni til at ganga út við árslok. Eigaraskifti til lívsarving í 1. ættarlið kann tó fara fram, hóast skipanina, um enn arvingurin býr uttanbygd. Í § 5 eru ásettar reglur um, hvussu metingin skal fara fram, tá ið eigari uttanbíggja hevur skyldu at selja til innanbíggjamann. Í § 5 stk. 2 verður sagt, at um einki innanbygdafólk hevur hug at taka við jørðini eftir tí meting, sum ásett verður, so kann uttanbýggjamaðurin selja til hvønn hann vil.

Løgtingstíðindi 1954-55:
Løgtingstíðindi 1954-55 bls. 195. Løgtingsmál 14/1955: Keyp av royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi. Samtykt verður uppskot til løgtingslóg, seinni staðfest og kunngjørd av løgmanni sum løgtingslóg nr. 18 frá 14.04.1955 um lán til keyp av royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi, har heimild verður givin landsstýrinum at læna upp til kr. 95.000,00 til at rinda fyri bygningar, amboð og innstøðu royndarstøðanna í Hoyvík og á Sandi.

Løgtingstíðindi 1955:
Løgtingstíðindi 1955 bls. 114. Løgtingsmál nr. 48/1955: Yvirtøka av jarðargrunninum og kongsjørðini. Tingið samtykkir at taka ímóti jarðargrunninum og kongsjørðini sum føroyskt sermál. Løgtingið samtykkir løgtingslóg nr. 17 frá 22.03.1956 at eftirkanna jarðalóggávuna, har sett verður nevnd at koma við uppskoti.

Løgtingstíðindi 1956:
Løgtingstíðindi 1956 bls. 99: Løgtingsmál 30/1956: Uttanbíggjajørðin. Javnaðarflokkurin skjýtur upp at gera ta neyðugu lógarreglu so uttanbíggjajørðin fellur aftur til bygdarmenn. Løgtingið vísir málið til nevndina, sum sett er sbr. løgtingslóg nr. 17 frá 22.03.1956 at eftirkanna jarðalóggávuna, geva álit og møguligt uppskot til broytingar.

Løgtingstíðindi 1956 bls. 190: Løgtingsmál 74/1956: Frágreiðing frá búnaðarnevndini. sett sambært løgtingslóg nr. 17 frá 22.03.1956. Í nevndini sótu D. P. Danielsen, løgtingsmaður, Tórshavn, Trygvi Samuelsen, løgtingsmaður, Tórshavn, Jóannes Stephansson, timburmeistari, Tórshavn, J. P.Davidsen, løgtingsmaður, Sandi og Dánjal Pauli Danielsen, bóndi á Velbastað, sum var formaður nevndarinnar. Nevndin sigur sjálv, at tað, hon letur frá sær, ikki er eitt fullfíggjað álit um jarðalóggávuna, men er ein fyribilsfrásøgn, og nevndin ynskir at fáa høvi at arbeiða eitt ár afturat. Nevndin mælir til, at tær sokallaðu landbúnaðarnevndirnar í lógini frá 1937 verða avtiknar, at grannskoðanin av roknskapi jarðargrunsins verður løgd undir grannskoðaradeild landskassans, at neyðugar redaktionnellar broytingar verða gjørdar í jarðarlóggávuni í samband við yvirtøkuna av jarðargrunn-

inum, og at jarðarráðið verður valt av nýggjum 1. apríl 1957, soleiðis at í ráðnum sita ein limur valdur av Búnaðarfelagnum og tveir valdir av landsstýrinum. Í sambandi við samansetingina av jarðarráðnum gera nevndarlimirnir tó vart við, at principielt hava teir serstøðu um, hvør eigur at sita í ráðnum, men kunnu tó ganga við til áður umrødda felagsuppskot. Løgtingið tekur undir við teim broytingum, sum nevndin mælir til, og broytingarnar verða seinni staðfestar og kunngjørdar av løgmanni sum løgtingslóg nr. 28 frá 24.04.1957 um fyribils broytingar í lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 um landbúnaðarins frama.

Løgtingstíðindi 1957:
Løgtingstíðindi 1957 bls. 247: Løgtingsmál 94/1957: Lóg um rætt at taka sand til bygningar. Í málinum var umrøtt, hvørjar reglur skulu verða galdandi fyri sandtøku, og hvussu landbúnaðarjørðin kann verjast í hesum sambandi. Eingin tingsamtykt verður gjørd í hesum sambandi.

Løgtingstíðindi 1958:
Løgtingstíðindi 1958 bls. 234: Løgtingsmál 51/1958: Uttanbíggjajørð. Í hesum máli legði Sigurð Joensen, løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin fram fyri løgtingið uppskot til lóg um uttanbíggjajørð. Í uppskotinum, sum er í 10 greinum, var m.a. ásett, at maður sum eigur uttanbíggjajørð skal hava uppsitara á staðnum, og ásetingar eru um, hvussu setanarviðurskifti uppsitarans skulu greiðast. Uppskotið fall á løgtingi vísandi til, at millumtinganevnd er sett at hugsa um henda og aðrar landbúnaðarspurningar, og tingmenn vilja hoyra hetta tilmæli fyrst. Helst er hetta nevndin sett sbr. løgtingslóg nr. 17 frá 22.03.1956 at eftirkanna jarðalóggávuna.

Løgtingstíðindi 1958 bls. 276: Løgtingsmál 68/1959: Forboð fyri gerð av og sølu av mjólk frá mjólkamaskinum. Menn vóru farnir at brúka jarnkúgv, t.e. maskinu, sum gjørdi mjólk úr innfluttum smøri og pulvuri. Løgtingið samtykti lóg – løgtingslóg nr. 25 frá 12.05.1959 um forboð fyri gerð og sølu av mjólk frá mjólkamaskinum – tí mett var, at slíkar jarnkýr kundu skaða hina føroysku mjólkarframleiðsluna so nógv, at neytatalið varð minkandi í staðin fyri vaksandi. Eftir lógini kann jarnkúgv bert nýtast, um loyvi til tess er fingið frá landsstýrinum.

Løgtingstíðindi 1959:
Løgtingstíðindi 1959 bls. 118 : Løgtingsmál 48/1959: Uttanbíggjajørð. Landsstýrið leggur fyri løgtingið frágreiðing og uppskot frá millumtinganevndini viðvíkjandi landbúnaðarlóggávuni sbr. løgtingslóg nr. 17 frá 22.03.1956 (Bert viðvíkjandi uttanbíggjajørðini). Meirilutin í nevndini (D. P. Danielsen, løgtingsmaður, Johs. Stephansson, J. P. Davidsen og D. P. Danielsen) mælir til løgtingslóg um uttanbíggjajørð.

Eftir uppskotinum kann eigaraskifti av ognarjørð bara fara fram til persón, sum býr í bygdini, ella í undantaksføri bygd nærhendis, har høgligt er at røkja jørðina. Ynskir eingin at keypa í bygdini fyri ásettan prís, so skal jørðin verða bjóðað jarðargrunninum, sum kann keypa fyri metingarprís; í ivaføri av gerðarrætti. Jarðargrunnurin má so selja ella festa til mann á staðnum. Ynskir jarðargrunnurin ikki at keypa, so kann seljast til hvønn sum helst. Við arvaskifti hevur jarðargrunnurin somuleiðis rætt at yvirtaka jørð til metingarvirði. Minnilutin Trygvi Samuelsen setir einki uppskot fram – Eingin tingsamtykt var gjørd uppskotinum viðvíkjandi.

Løgtingstíðindi 1959 bls. 121: Løgtingsmál 49/1959, ávísing til skjal 3: Frágreiðing frá millumtinganevndini í búnaðarmálum. Í málinum leggur nevndin, sum sett er sbr. løgtingslóg nr. 17 frá 22.03.1956, frá sær endaligt álit. Sum sæst omanfyri, hevur hon fyrr latið frá sær fyribilsálit um ymsar konsekvensbroytingar í lóggávuni orsakað av yvirtøkuni av jarðargrunninum og fyribilsálit um uttanbíggjajørðina. Í endaliga álitinum leggur hon fram uppskot til eina lóg at koma í staðin fyri lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 om jordbrugets fremme. Hinar jarðarlóggávurnar, t.e. hagalógina, girðingarlógina, landbúnaðarstevnulógina, grannastevnulógina, útskiftingarlógina og aðrar lógir ger hon ikki viðmerkingar til.

Nevndarlimirnir býta seg í ein meiriluta og í ein minniluta.

Minnilutin Trygvi Samuelsen og J. P. Davidsen halda ikki tørv verða á nýggjari lóg um almennu jørðina í síni heild. Teir vilja principalt bert gera umskrivingar í lógini frá 1937, sum samtyktin um yvirtøkuna førir við sær, og harumframt onkrar smærri broytingar í lógargreinum, sum ikki hava roynst eftir vild.

Meirilutin Dánjal Pauli Danielsen, Velbastað, Jóannes Stephansson og D. P. Danielsen, Tórshavn, halda, at lógin frá 1937 eigur munandi at verða broytt á fleiri økjum. Teir halda, at lógin frá 1937 hevur heilt aðrar fyritreytir enn tær, sum vóru, tá ið álitið varð lagt fram, tí at øll vinna í Føroyum í 1937 var soleiðis háttað, at hon var ein blandingsvinna. Maður fekst við jarðarbrúk umframt við aðra vinnu t.d. fiskivinnu og fekk soleiðis samlaðu inntøku sína. Í 1959 hildu teir, at støðan var vorðin soleiðis í Føroyum, at maður burturav fekst við eina vinnu t.d. fiskivinnu, og at henda vinna var nóg mikið til at fáa honum til vega alla inntøku, hann hevði fyri neyðini. Tí mæla teir til, at almenna jørðin verður savnað í størri brúk, soleiðis at búnaðarmaður kann liva av hesi vinnu burturav, men mæla tó til, at slík samanlegging fer fram við varsemi. Meirilutin mælir til, at rætturin til almenna jørð framvegis skal liggja til ávísa ætt, men ikki so ítøkiliga sum eftir lógini frá 1937 til elsta sonin, men soleiðis at festarin ger bindandi avtalu við jarðarráðið, um hvør av arvingum hansara tekur við eftir hann, soleiðis at tann, sum hevur sýnt besta hegni og áhuga, tekur við, og ikki altíð

hann, sum elstur er. Meirilutin mælir til, at leigan fyri festini verður hækkað, soleiðis at leiguupphæddin, sum ásett varð í 1899, verður prístalsregulerað, men hesum tekur D. P. Danielsen, Velbastað ikki undir við. Meirilutin mælir til, at jarðarráðið fær heimild at selja festara garðin, sum hann hevur í festi, undir ávísum nærri útgreinaðum treytum.

Tá ið tað snýr seg um fígging til landbúnaðarvinnuna, eru nevndarlimirnir rættiliga samdir. Teir halda, at jarðargrunnurin eigur at fáa eina ávísa árliga játtan á fíggjarlógini (J. P. Davidsen tekur tó ikki undir við hesum). Men í spurninginum um studnings- og lániheimildir grunsins eru teir púra samdir. Umframt seta teir samdir fram uppskot um skráseting og reglur um samanlegging og sundurbýti av jørðini, men hetta uppskot hevur ikki í dag áhuga, nú matrikuleringslógin frá 1962 hevur fingið skil á hesi viðurskiftum.

Ítøkiliga uppskotið, sum framlagt verður av nevndini, er í 7 bólkum.

Í 1. bólki eru reglur um jarðarráð og álitismenn. Her verður umtalað, at tríggir limir skulu sita í jarðarráðnum. Meirilutin í nevndini heldur, at landsstýrið skal velja 2 og búnaðarfelagið 1, meðan minnilutin heldur, at landsstýrið skal velja ein og løgtingið tveir. Samlaða nevndin heldur, at landbúnaðarráðgevin skal hava atgongd til fundir ráðsins. Annars verða í hesum bólki umrøddar almennar fyrisitingarligar reglur fyri virksemi ráðsins.

Í 2. bólki eru reglur um jarðargrunnin, m.a. at hann skal fáa árliga játtan av løgtingsfíggjarlógini í 10 ár. Heimilað verður grunninum at taka upp lán við landskassaveðhaldi, men lánini kunnu ikki fara upp um fimm ferðir samlaðu ognir grunsins á ársroknskapinum undanfarna roknskaparár.

Í 3. bólki eru reglur um jørð hjá tí almenna. Jarðarráðið skal umsita alla almenna jørð, sum er á føroyskum hondum, og avgerðir jarðarráðsins kunnu skjótast inn fyri landsstýrið, tó ikki um festiskifti, sum verða skotnar inn fyri landbúnaðarstevnu og møguliga yvirlandbúnaðarstevnu. Reglurnar um festitreytirnar og skyldur festarans og um mishald eru stórt sæð tær somu sum í 1937 lógini, tó við teirri broyting, at festið bert stendur við, til festarin ella einkjan er vorðin 70 ár. Viðvíkjandi festileiguni, er nevndin samd um at nýta skattamerkurnar sum grundarlag fyri leiguásetingini. D. P. Danielsen, Velbastað og J. P. Davidsen mæla til kr. 7,06 fyri skattamørkina, Trygvi Samuelsen kr. 10,00 fyri skattamørkina og Jóannes Stephansson og D. P. Danielsen, Tórshavn kr. 55,00 fyri skattamørkina. Um rættin til garðin eftir festara mælir meirilutin til, at ásett verður, at ættin eigur rætt til festigarðin. Sitandi festari hevur rætt til at gera bindandi avtalu við jarðarráðið um, hvør av arvingum hansara skal festa garðin eftir seg. Er eingin avtala gjørd, tá ið sitandi festari fellur frá, og arvingarnir ikki innan eitt ár eru samdir, um hvør skal taka við, ger jarðarráðið málið av. Minnilutin J. P. Davidsen og Trygvi Samuelsen mæla stórt sæð til,

at skipanin frá 1937 á hesum øki verður varðveitt. Leigureglurnar fyri traðir v.m. verða justeraðar tí, sum broytt verður viðvíkjandi festireglunum.

Í 4. bólki eru reglur um sølu av almennari jørð og keyp av ognarjørð. Reglurnar eru endurtøkur av 1937 lógini og praksis sum verið hevur. Í bólkinum er tó veitt jarðarráðnum heimild til at selja festara garðin, sum hann hevur í festi undir teim treytum, at keyparin og eftirmenn hansara verða sitandi á garðinum, at keyparin hevur umsitið garðin væl áðrenn yvirtøkuna, at garðurin hevur somu skyldu til at lata hagajørð til dyrkingar, sum hvílir á kongsgørðunum, at garðurin ikki verður býttur sundur, at einki verður selt burturav uttan við samtykki jarðarráðsins, at jarðarráðið hevur framíhjárætt at keypa aftur, um garðurin verður seldur, fyri tann prís, hægstbjóðandi annars vil geva og at enda, at keyparin ikki er vorðin 50 ár. Annars er ásett, at verður garðurin misrøktur aftaná søluna, ella heldur keyparin og eftirmenn hansara ikki treytirnar, kann jarðarráðið krevja at yvirtaka garðin fyri metingarprís. Prísurin, seljast skal fyri á fyrsta sinni, eru teir ójavnir á máli um. D. P. Danielsen á Velbastað mælir til 100 ferðir leiguna. D. P. Danielsen, Tórshavn og Jóannes Stephansson mæla til 25 ferðir leiguna. Trygvi Samuelsen og J. P. Davidsen taka als ikki undir við møguleikanum at selja festini.

Í 5. bólki verða settar reglur upp um lán úr jarðargrunninum. Tær eru í stórum líkar reglunum í 1937 lógini.

Í 6. bólki verða settar reglur upp um studning úr jarðargrunninum. Tær eru í stórum líkar reglunum í 1937 lógini, tó eru ávísar studningsheimildir eftir 1937 lógini burturúrlagdar.

Í 7. bólki verða ásettar reglur um jarðarskrá og aðrar reglur.

Málið varð beint í búnaðarnevndina eftir 1. viðgerð á løgtingi, men kom ongantíð aftur hagani, tí búnaðarnevndin læt ikki frá sær álit.

Løgtingstíðindi 1960:
Løgtingstíðindi 1960 bls. 204 : Løgtingsmál 47/1960: Uppskot til samtyktar um landbúnaðarmál. Í málinum legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður fram uppskot um at seta nevnd at kanna núverandi viðurskifti landbúnaðarins, bæði viðvíkjandi framleiðslu, rakstri, sølu, keypum, prísum og øðrum, sum haldast kann hava týdning fyri hesa vinnugrein, at seta fram tilmæli og uppskot um ábøtur á hesum og øðrum økjum við tí endamáli at fáa landbúnaðarraksturin í slíka legu, at størri úrtøka fæst burturúr føroysku jørðini. Limirnir í nevndini skuldu verða landbúnaðarráðgevin, seyðaráðgevin, 1 limur tilnevndur av búnaðarfelagnum, ein tilnevndur av bóndafelagnum og ein tilnevndur av traðarmannafelagnum. Uppskotið fall á løgtingi.

Løgtingstíðindi 1960 bls. 232: Løgtingsmál 59/1960: Broyting í lógini um landbúnaðarins frama. Í málinum legði búnaðarnevndin fram upp-

skot um at broyta jarðarlógina soleiðis, at í jarðarráðnum skuldu sita 3 limir tilnevndir av løgtinginum og ein av landsstýrinum. Uppskotið fall á tingi. Málið verður tikið uppaftur til viðgerðar á tingi sum løgtingsmál nr. 88/1960 løgtingstíðindi 1960 bls. 321. Eingin tingssamtykt verður gjørd í hesum øðrum umfari. Erlendur Patursson legði í málinum fram uppskot um at taka av Føroya Jarðarráð og at flyta landsstýrinum myndugleika jarðarráðsins. Hetta uppskot hansara fall eisini.

Løgtingstíðindi 1961:
Løgtingstíðindi 1961 bls. 218 : Løgtingsmál 68/1961: Við løgtingslóg nr. 18 frá 15.05.1962 um einarætt til innflutning av eplum verður heimilað landsstýrinum at geva Føroya Búnaðarfelag einarætt til innflutning av eplum.

Løgtingstíðindi 1961 bls. 220: Løgtingsmál 69/1961: Mjólkastudningur. Í málinum legði Hákun Djurhuus løgtingsmaður fram uppskot til løgtingslóg um mjólkastudning, hvarí var ásett, at landsstýrinum var heimilað at nýta upp í kr. 250.000,00 í mjólkastudningi árliga tey fyrstu fýra árini. Eftir uppskotinum skuldi landsstýrið í samráð við Føroya Búnaðarfelag gera av, hvussu peningurin skuldi nýtast, so hann verður mjólkaframleiðsluni til størsta bata. Uppskotið fall. Ístaðin var samtykt uppskot til samtyktar frá N. Holm Jacobsen, har álagt verður landsstýrinum at gera nýggja reglugerð mjólkastudninginum viðvíkjandi, so mjólkaframleiðarar í smábygdum, ið ikki kunnu avskipa teirra framleiðslu til meiðarí ella mjólkasølubúð, kunnu fáa studning fyri ta mjólk, ið verður seld í sjálvari bygdini.

Løgtingstíðindi 1961 bls. 256: Løgtingsmál 86/1961: Heimagjørdar ullvørur. Í málinum legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður fram uppskot um, at álagt verður landsstýrinum at seta reglugerð í gildi fyri Føroyar, sum miðar ímóti, at ansað verður eftir, at allar tær heimagjørdu ullvørur, ið verða at selja uttanlands, verða settar í ta góðsku, ið tær hava uppiborið, so ikki ein vøra, sum ikki er av nóg góðum slag, fær sama prís, sum tann vøra, ið er av bestu góðsku. Uppskotið var afturtikið.

Løgtingstíðindi 1961 bls. 270: Løgtingsmál 94/1961: Lóg til keyp av sleppingarlombum. Í uppskoti til løgtingslóg mælti Hákun Djurhuus, løgtingsmaður til at veitt var landsstýrinum heimild til at læna upp í kr. 100.000,00 til hagar, ið hava verið fyri stórum áseyðamissi. Greitt verður frá, at veturin frammanundan hevur verið serliga ringur, og at hetta tí er neyðugt. Uppskotið fall.

Løgtingstíðindi 1961 bls. 280: Løgtingsmál 100/1961: Útflyting av ull. Í málinum legði Hákun Djurhuus løgtingsmaður fram uppskot til løgtingslóg um forboð fyri útflyting av ull, uttan at loyvi landsstýrisins var fingið fyrst. Uppskotið fall.

Løgtingstíðindi 1962:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1963:
Løgtingstíðindi 1963 bls. 56: Løgtingsmál 19/1963: Landbúnaðarnevnd. Karsten Hoydal landsstýrismaður legði fram uppskot til løgtingslóg um setan av nevnd at kanna ymisk landbúnaðarviðurskifti, tí at nevndin, sum legði frá sær álit í løgtingsmáli 48/1959 og løgtingsmáli 49/1961, ikki hevði matrikuleringslógina frá 1962 sum fyritreyt, og at ávísar justeringar tí vóru neyðugar. Uppskotið fall á tingi.

Løgtingstíðindi 1964:
Løgtingstíðindi 1964 bls. 62: Løgtingsmál 17/1964: Landbúnaðarnevnd. Karsten Hoydal landsstýrismaður legði fram sama uppskot sum árið fyri at seta landbúnaðarnevnd at kanna ymisk viðurskifti. Uppskotið varð samtykt og gjørdist løgtingslóg nr. 17 frá 26.04.1965 um setan av landbúnaðarnevnd, har heimild var givin landsstýrinum at seta 5-mannanevnd at halda áfram við nevndararbeiðinum hjá teirri nevnd, sum sett var við løgtingslóg í 1956, serliga við atliti til tær broytingar í fyritreytunum matrikuleringslógin frá 1962 hevði gjørt.

Løgtingstíðindi 1965:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1966:
Løgtingstíðindi 1966 bls. 135: Løgtingsmál 18/1966: Jarðarlóggávan og skjal 2 í løgtingstíðindum. Varaløgmaður legði fyri løgtingið álit frá nevndini, sum sett var sbr. løgtingslóg nr. 17 frá 26.04.1965. Í nevndini sótu D. P. Danielsen, Velbastaður, Th. Joensen, Kollafj, Juul Poulsen, Tórshavn, Hanus Joensen, Hvalvík og H. O. Danielsen, Tórshavn. Skrivari nevndarinnar var J. H. Andreassen, sorinskrivarafulltrúi.

Nevndin leggur fram tvey lógaruppskot. Annað uppskot til løgtingslóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum at frama og hitt uppskot til løgtingslóg um ognarjørð, sum er um uttanbíggjajørðina.

Uppskotið til løgtingslóg um ymisk tiltøk landbúnaðinum at frama hevur uppskotið, sum serliga nevndin legði fram álit um í 1959, sum fyrimynd. 1. og 2. bólkur í lógaruppskotinum er so at siga tann sami sum í 1959 uppskotinum. 3. bólkur er so at siga eisini hin sami, tó tekur nevndin undir við, at leigan fyri festi skal verða kr. 7,06 fyri skattamørkina, og taka undir við uppskotinum hjá minnilutanum í 1959 álitinum um nærum at endurtaka arvarættindini til festi í 1937 lógini. 4. bólkur er nærum orðarætt endurtøka av 1959 uppskoti meirilutans við ávísum týdningarleysum justeringum. Í hesum sambandi endurtekur

nevndin uppskotið um møguleikan at avhenda festijørð. 5. og 6. bólkur eru nærum bert endurtøkur av 1959 álitinum, men 7. bólkur er broyttur, nú matrikuleringslógin frá 1962 hevur fingið gildi.

Í uppskoti nevndarinnar til løgtingslóg um ognarjørð skjýtur nevndin upp í § 2, at eigaraskifti er bert loyvt til persón, sum hevur fastan bústað í bygdini ella í grannabygd, hvørs bøur markar upp at bønum í teirri bygdini, har jørðin liggur. Í § 3 er ásett, at flytir jarðareigari úr bygdini ella úr grannabygd, haðani hann hevur loyvi at eiga jørð, og hann ikki innan 5 ár aftaná tekur bústað aftur í bygdini ella grannabygdini, hevur hann skyldu at selja jørðina til persón, sum hevur rætt til at sita við henni eftir lógini. Í § 4 eru reglur uppsettar um, at um so er, at keypari, sum rætt hevur at keypa, og seljari, sum skyldu hevur at selja, ikki koma ásamt um prís, so skal jarðarráðið ognartaka jørðina. Eftir § 5 skal jarðarráðið, tá ið tað avhendar jørð aftur, sum tað hevur ognartikið, miða ímóti at samla jørðina í sjálvstøðug brúk, so at húskið fær møguleika at liva av teimum. Eitt sindur ógreitt er eftir uppskotinum, hvussu verða skal, um ongin setir fram krav um, at uttanbygdamaður skal selja. Ikki er greitt tilskilað, um jarðarráðið tá hevur rætt til ognartøku.

Sum skjal til álitið hevur nevndin talvu um neyt í Føroyum í 1964, talvu viðvíkjandi eplum í 1964, talvu um innlagt og ábygt øki í Føroyum, yvirlit yvir talið av neytum í 1964 pr. neytaeigara í ávísum kommunum og yvirlit yvir, hvussu nøgdin av niðursettum eplum í 1964 býtir seg uppá fólkatal í ávísum bygdum.

Búnaðarnevnd løgtingsins fekk málið til viðgerðar, men gjørdist millumtinganevnd at lata álit frá sær árið eftir.

Løgtingstíðindi 1967:

Løgtingstíðindi 1967 bls. 319: Løgtingsmál 80/1967: Broyting í jarðarlóggávuni. Búnaðarnevndin legði fram álit í málinum um broyting í búnaðarlóggávuni frá árinum fyri. Meirilutin í nevndini (Trygvi Samuelsen, Tummas Joensen, J.P. Thomassen, Sigurð Joensen og J. Fr. Øregaard) tekur sum heild undir við uppskotinum. Teir leggja fram uppskot sítt sum skjal 3, sum er avskrift av uppskoti nevndarinnar. Okkurt týdningarmikið er tó lagt burturúr, eitt nú heimildin hjá jarðarráðnum at selja festið til festara. J. P. Thomassen, J. Fr. Øregaard og S. Joensen skjóta upp, at festileigan verður ásett til kr. 70,00 fyri skattamørkina. Minnilutin í búnaðarnevndini Vilhelm Nielsen og Poul Petersen seta einki uppskot fram.

Málið verður útsett til komandi tingsetu.

Løgtingstíðindi 1968:

Løgtingstíðindi 1968 bls. 158: Løgtingsmál 22/1968: Jarðarlóggávan. Uppskotið hjá meirilutanum í búnaðarnevndini frá árinum fyri var

framafturlagt av landsstýrinum. Minnilutin Vilhelm Nielsen og Poul Petersen seta fram broytingaruppskot m.a. uppskot til serstaka løgtingslóg um keyp av kongsjørð og jørð hjá tí almenna. Í uppskotinum er nærri útgreinað, hvussu slík jørð skal seljast, og at prísurin skal verða fastur, soleiðis at hann er eitt ávíst tal ferðir jarðarleiguna, uttan teir tó siga, hvør faktorur skal nýtast. Øll uppskot fullu við endaliga atkvøðugreiðsluna á tingi, og sostatt kom eingin samtykt burturúr.

Løgtingstíðindi 1968 bls. 230. Í málinum legði løgmaður fram uppskot um at broyta útskiftingarlóggávuna soleiðis, at bert markatalið, og ikki sum frammanundan eisini ávíst tal av eigarum í høgum skuldi gera av um útskiftast skal. Uppskotið fall á løgtingi.

Løgtingstíðindi 1969:
Løgtingstíðindi 1969 bls. 33: Løgtingsmál 3/1969: Jarðalóggávan. Í málinum roynir landsstýrið at tillaga uppskotið til løgtingslóg um tiltøk landbúnaðinum at frama til teir politisku veruleikar, sum viðgerðin á tingi vísti árið fyri. Uppskotið fall á tingi.

Løgtingstíðindi 1970:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1971:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1972:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1973:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1974:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1975:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1976:
Løgtingstíðindi 1976 A bls. 275: løgtingsmál 65/1976: Bygging av nýggjari royndarstøð. Í málinum legði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður, fram uppskot til løgtingslóg um bygging av nýggjari royndarstøð, har sagt verður í grein 1, at landsstýrinum verður heimilað at byggja nýggja royndarstøð og í samráð við fíggjarnevndina taka upp neyðug lán til byggingina. Av viðmerkingunum framgongur, at ætlanin

er at byggja á Heyggi í Kollafirði, og viðmerkingarnar lýsa rættiliga væl gongdina í royndarstaðarmálinum hesa øldina.

Uppskot landsstýrisins fall. Ístaðin var gjørd løgtingsssamtykt, sum sigur, at nýggj royndarstøð verður bygd og heitt verður á landsstýrið um at finna annað hóskandi øki at seta hana á, og tá hesin spurningur er greiður at leggja málið aftur fyri løgtingið.

Løgtingstíðindi 1977:
Løgtingstíðindi 1977 A bls. 405: løgtingsmál 82/1977: Nýggjur búnaðarskúli og Royndarstøð. Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður, leggur so at siga framaftur sama uppskot til løgtingslóg sum árið frammandundan. Málið verður ikki liðugtviðgjørt á løgtingi fyri tingsetulok, men beint í fíggjarnevndina sum millumtinganevnd.

Løgtingstíðindi 1978:
Løgtingstíðindi 1978 A bls. 206: løgtingsmál 69/1978: Nýggjur búnaðarskúli og Royndarstøð. Fíggjarnevndin leggur fram álit í búnaðarskúlamálinum frá árinum frammanundan. Fíggjarnevndin broytir orðingina í landsstýrisuppskotinum soleiðis, at landsstýrinum verður heimilað at byggja nýggja royndarstøð, sum eisini kann fyriskipa útbúgving innan landbúnað. Landsstýrið fær heimild til sjálvt at taka neyðug lán til byggingina, men eftir § 2 skal landsstýrið taka serkønt fólk at finna hóskandi øki at leggja støðina á og fremja projektering. Tá hetta er gjørt, kann landsstýrið við góðkenning fíggjarnevndarinnar av kostnaði, fígging og rakstri fara undir byggingina. Uppskot fíggjarnevndarinnar verður samtykt, og lógin seinni staðfest og kunngjørt av løgmanni sum løgtinglóg nr. 96 frá 01.11.1978 um nýggjan búnaðarskúla og royndarstøð.

Løgtingstíðindi 1978 A bls. 80: Løgtingsmál 3/1978: Broyting í lógini til jarðabrúksins frama. Í málinum skeyt sjálvstýrisflokkurin upp, at í jarðarráðnum skuldu sita 3 av løgtinginum valdir limir. Ein umboðandi almennu festijørðina, ein óðalsjørðina og ein traðarinnleggingina. Uppskotið var ikki endaliga viðgjørt á tingi fyri tingsetulok og fall tí burtur.

Løgtingstíðindi 1979:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1980:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1981:
Løgtingstíðindi 1981 A bls. 91: Løgtingsmál 10/1981: Uppskot til samtyktar viðvíkjandi nýggjari royndarstøð. Í málinum mælti Tórálvur

Mohr Olsen vegna javnaðarflokkin til við uppskoti til samtyktar at áleggja landsstýrinum at steðga øllum fyrireikingum til bygging av nýggjari royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum á Heygsgarði, og at fara undir fyrireikingar til at seta á stovn royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum á Sandoynni. Uppskotið fall á løgtingi.

Løgtingstíðindi 1981 A bls. 532: Løgtingsmál 123/1981: Broyting í „Lov for Færøerne om haugers styrelse og drift". Í málinum legði Karin Kjølbro, løgtingsmaður, vegna Ova Mikkelsen fram uppskot til nýggja § 34 a í lógini um hagastýri og røkt v.m. soleiðis, at bygdarráðið í matrikuleraðum økjum fekk heimild at gera undantaksreglur frá almennu reglunum í hagalógini, eitt nú at avmarka bitrættin hjá omanfyri liggjandi haga. Uppskotið fall á tingi.

Løgtingstíðindi 1982:

Løgtingstíðindi 1982 A bls. 38. Løgtingsmál 4/1982: Løgtingslóg um koppseting av sleppingarlombum. Eftir uppskoti frá Ova Mikkelsen viðger tingið uppskot til løgtingslóg um at eitthvørt sleppingarlamb skal koppsetast fyri garnasótt eftir leiðbeining og ávísing landsdjóralæknans. Uppskotið fellur á tingi. Meirilutin í landbúnaðarnevndini heldur, at hetta eigur at verða gjørt sum frammanundan eftir tilráðing og eftirliti frá landsdjóralæknanum.

Løgtingstíðindi 1983:

Løgtingstíðindi 1983 A bls. 586: Løgtingsmál 127/1983: Løgtingslóg um landsjørð. Í málinum varð framlagt uppskot til løgtingslóg um landsjørð. Uppskotið fall á tingi, men nevndin mælti landsstýrinum til at leggja uppskotið framaftur í komandi tingsetu.

Løgtingstíðindi 1984:

Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1985:

Løgtingstíðindi 1985 A bls. 392: Løgtingsmál 88/1985: Løgtingslóg um landsjørð. Landsstýrið leggur fram av nýggjum løgtingslóg um landsjørð. Málið verður latið í millumtinganevnd.

Løgtingstíðindi 1986:

Løgtingstíðindi 1986 A bls. 728: Løgtingsmál 142/1986: Løgtingslóg um landsjørð. Millumtinganevndin frá árinum fyri mælti til framhaldandi at verða millumtinganevnd.

Løgtingstíðindi 1987:

Løgtingstíðindi 1987 A bls. 577: Løgtingsmál 144/1987: Løgtingslóg um landsjørð. Millumtinganevndin, sum viðgjørdi lógaruppskotið um

landsjørð, legði fram álit, og nýggj løgtingslóg um landsjørð varð samtykt 07.05.1988, seinni staðfest og kunngjørd av løgmanni sum løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988 um landsjørð. Gongdin í málinum á tingi, og innihaldið í lógini er lýst á bls. 40.

Løgtingstíðindi 1988:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1989:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1990:
Løgtingstíðindi 1990 bls. 626: Løgtingsmál 80/1990: Menning av jarðarbrúkinum í Føroyum. Kristiligi Fólkaflokkurin leggur fram uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið at seta nevnd at kanna og koma við tilmæli um, í hvønn mun jarðarbrúkið her á landi kann mennast, og at heitt verður á landsstýrið at taka neyðug stig til, at mjólkaprísirnir koma á eitt støði, sum kemur barnafamiljunum til góða. Eingin samtykt verður gjørd á tingi.

Løgtingstíðindi 1991:
Einki av serligum áhuga.

Løgtingstíðindi 1992:
Løgtingstíðindi 1992. Løgtingsmál 117/1992: Menning av jarðarbrúkinum í Føroyum. Kristiligi Fólkaflokkurin leggur framaftur uppskotið frá 1990. Eingin tingsamtykt verður gjørd heldur á hesum sinni.

Løgtingstíðindi 1993:
Løgtingstíðindi 1993 bls. 886: Løgtingsmál 91/1993: Broyting í „lóg um jordbrugets fremme“. Landsstýrið skjýtur upp, at jarðarráðnum verður givin víðkað heimild at umleggja og niðurskriva lán. Málið fellur burtur, tí tað ikki verður liðugt viðgjørt áðrenn nýval.

Løgtingstíðindi 1994:
Løgtingstíðindi 1994 II bls. 417: Løgtingsmál 71/1994: Løgtingslóg um bygningar hjá Royndarstøðini í Kollafirði. Lógin verður samtykt av løgtinginum og seinni staðfest og kunngjørd av løgmanni sum løgtingslóg nr. 46 frá 21.04.1995 um bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði. Lógin hevur bert eina grein, sum sigur, at landsstýrinum verður heimilað at lata Búnaðardepilin reka bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði. Landsstýrið ásetir treytirnar.

Í viðmerkingunum sigur landsstýrið:

> „Landsstýrið hevur á fundi samtykt at umskipa Royndarstøðina í Kollafirði. Meginreglan í hesi umskipan er, at Royndarstøðin í núverandi líki verður niðurløgd og umskipað til almennar royndir innan landbúnað. Royndarstøðin sjálv, bygningar og hentleikar, verða latin Búnaðardeplinum, sum miðsavnar høvuðstænastur, almennar og privatar, innan landbúnaðin. Landsstýrið metir, at henda umskipan, sum hevur fullan stuðul frá vinnuni, er eitt týðandi íkast til at skapa grundarlag fyri nýggjari menning innan landbúnaðin.
>
> Hetta verður gjørt soleiðis, at almennar tænastur, so sum royndarstjóri/landbúnaðaráðgevi, djóralæknatænasta, útbúgving og búskaparlig ráðgeving kunnu húsast saman við felagsskapum hjá bøndrum, umsitingini hjá Mjólkarvirki Búnaðarmanna, Búrøkt o.ø. fyri at nýta teir hentleikar, sum eru á Royndarstøðini, og fyri at spara pening.
>
> Til at umsita ognirnar hevur landsstýrið sett eina húsanevnd við einum umboði fyri Mjólkarvirki, einum fyri Bóndafelagið og einum fyri almennar royndir og einum fyri landsstýrið.
>
> Teir stovnar og feløg, sum hava leigað seg inn í húsini, gjalda húsaleigu eftir takstum, sum landsstýrið hevur góðkent. Ætlanin er, at tann peningurin, sum kemur inn fyri húsaleigu, skal koma deplinum til góðar, soleiðis at hann verður brúktur til viðlíkahald og útbygging og annars til at útfylla endamálið við Búnaðardeplinum.
>
> Búnaðardepulin skal hvørki geva landskassanum inntøkur ella útreiðslur. Landsstýrið letur landbúnaðinum bygningarnar í Kollafirði í varðveitslu við teirri treyt, at landbúnaðurin heldur bygningarnar viðlíka, og at hetta ikki fer at kosta landskassanum nakað.“

Løgtingstíðindi 1994 II bls. 567: Løgtingsmál 113/1994: Miðvísan landbúnaðarpolitikk í Føroyum fram til ár 2001 og ár 2005 og tíggju ára ætlan í landbúnaðarøkinum. Uppskotið frá Kristiliga Fólkaflokkinum fall. Eftir uppskoti frá landbúnaðarnevndini samtykti løgtingið at heita á landsstýrið um at skunda undir arbeiðið hjá nevnd sett í 1993 av landsstýrinum at kanna ymisk landbúnaðarviðurskifti.

Løgtingstíðindi 1994 II bls. 555. Løgtingsmál 108/1994: Lækkan av prísinum á drekkimjólk. Miðflokkurin legði uppskotið fram á tingi. Tað fall.

Løgtingstíðindi 1995 (ikki útkomið):
Løgtingsmál nr. 133/1995: Broytingar í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. Samtykt á løgtingi og seinni staðfest og kunngjørd av løgmanni sum løgtingslóg nr. 110 frá 29.06.1995. Eftir lógini velur landsstýrið nú áður løgtingsvaldu nevndarlimir í ymisk ráð og ymsar

nevndir, eitt nú jarðarráðið, landbúnaðarstevnu, útskiftingarnevndir v.m. Ein tíðaravmarking fyri lógini um landsjørð, sum verður sett inn við hesi lóg, verður avtikin við løgtingslóg nr. 9 frá 29.03.1996.

Løgtingsmál nr. 112/1995: Miðvísur landbúnaðarpolitikkur í Føroyum – 5 til 10 ára ætlan í landbúnaðarøkinum. Í málinum leggur Kristiligi Fólkaflokkurin fram á ting uppskot til samtyktar við soljóðandi orðaljóði:

> „Heitt verður á landsstýrið um at leggja lógaruppskot um vinnuligan landbúnaðarpolitikk fyri Føroyar fyri løgtingið í seinasta lagi 1. oktober 1996 sum umfatar hesi øki:
>
> I.
> a) mjólkarúrdráttir,
> b) seyðakjøtframleiðslu,
> c) neytakjøtframleiðslu,
> d) eggjaframleiðslu,
> e) úrdráttir úr ull,
>
> II.
> f) stráfóðurframleiðslu til seyð og neyt,
> g) grønmetisframleiðslu av fruktum, sum eru egnaðar til framleiðslu í Føroyum,
>
> III.
> h) at koma við uppskoti um aðrar møguleikar á landbúnaðarøkinum.

Í viðmerkingunum sigur Kristiligi Fólkaflokkurin, at fyri nøkrum árum síðani setti landsstýrið nevnd niður at viðgera vinnuligan landbúnað í Føroyum við tí fyri eyga at menna landbúnaðin sum heild, men hóast hetta røkist einki fyri, at hetta arbeiðið fær ein enda, og at tað má metast óhóskandi fyri eitt so framkomið samfelag ikki at hava skipað viðurskifti á hesum øki, serstakliga tá hugsað verður um, hvørji virði fara fyri skeyti orsakað av tørvandi lóggávu á økinum, og tí má tað metast rætt, at Føroya Løgting ásetir karmarnar fyri hesum arbeiði soleiðis, at vissa fæst fyri, nær arbeiðið gerst liðugt. Vinnunevndin fær málið til viðgerðar og tekur undir við uppskotinum og vísir á, at viðgerð landsstýrisins eigur at fevna um teir tríggjar partarnar, sum uppskotsstillarin vísir á í uppskotinum, og við tað at vandi kann verða fyri, at hetta arbeiðið dregur út, er nevndin samd um, at heita á landsstýrið um at miða fram ímóti at fáa hetta arbeiðið liðugt 1. oktober 1996, soleiðis at tingið kann fáa eitt aðalorðaskifti um hesar spurningar, so skjótt arbeiðið er liðugt. Uppskot Kristiliga Fólkafloksins var við 2. viðgerð 08.05.1996 samtykt 23-1-0.

# V. UMMÆLI AV SKIPANINI, SUM ER

Frammanfyri hevur nevndin í Kap. IV lýst galdandi skipan fyri føroyskan landbúnað í dag. Í gjøgnumgongdini av verandi skipan, hevur nevndin lagt seg eftir einans at lýst, hvussu hon er, og hevur ikki ummælt hana sum so.

Í hesum kapitli fer nevndin at meta um skipanina, og hvussu hon roynist og kann roynast í framtíðini. Ein slík meting kann ikki verða gjørd, uttan at skipanin verður sett upp ímóti einum endamáli ella einari ætlan við skipanini. Annar vegur kann tó vera at meta um, hvussu føroyskur landbúnaður og jarðarbrúk fer at síggja út um nøkur ár, um ongar broytingar verða gjørdar í skipanini. Hvussu fer t.d. tvørrandi sanering av festum at ávirka jarðarbrúkið ?

Av tí at arbeiðssetningurin hjá nevndini er orðaður sum hann er, nevniliga,

*at nevndin skal orða endamálsgreinina fyri vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum, við tí fyri eyga at umskipa lógarverkið hesum viðvíkjandi, herundir*

1) gera uppskot til at broyta núverandi jarðarlógina, so at jarðargrunnurin verður skildur burtur úr, og at onnur øki verða skipað í einari almennari lóg fyri alt vinnuligt jarðarbrúk í Føroyum. Uppskotið skal eisini innihalda uppskot til nýggjan bygnað í umsitingini av jarðarbrúksmálum.
2) Nevndin skal greina kappingarstøðið hjá føroyskum jarðarbrúki, herundir kappingaravlagandi studningsskipan her heima og í øðrum londum, sum ávirka hetta.
3) Umhugsa hvørjar tænastur eiga at vera til taks, og hvussu tær skulu fíggjast (landskassin, brúkaragjald etc.)

hevur nevndin valt fyrst av øllum at orða eina endamálsgrein, ið verandi landbúnaður kann verða mettur út frá, og sum síðan kann verða grundarlag undir uppskotinum um at umskipa lógarverkið.

# A. Hvat er endamálið, vinnuligt føroyskt jarðarbrúk eigur at miða ímóti

1. Soleiðis sum nevndin hevur sett sær spurningin, rør hon samstundis fram undir, at vit hava jarðarbrúk í Føroyum, ið ikki er vinnuligt.

Nevndin heldur fyri tað fyrsta, at sum heild kann ognarjørðin í Føroyum ikki verða mett rikin út frá vinnuligum sjónarmiðum. Ognarmenn hava hana í hondum av fleiri orsøkum, ið ikki fyrst og fremst eru vinnuligar. Hvørt um annað kunnu hesar orsakir verða nevndar: tí jørðin er fallin teimum í lut sum arvur, tí hervið er band til nakað, teir kenna sum sín uppruna, tí teir hava góðan hug at takast við jørð, seyð og tað sum hoyrir hesum til, bæði sum ítriv og sum lítið íkast til aðra inntøku, tí teir rokna við, at jørðin ikki missir virði, tí jørð er ein partur av lívinum á tí staði, teir búgva, og tí ....

Nevndin hevur somuleiðis mett, at traðarjørð og smáfesti av landsjørðini heldur ikki kunnu verða viðgjørd sum vinnulig jarðarbrúk. Traðarbrúkið sum slíkt hoyrir tíðini fyri 1930 til; eingin kúgv verður í dag hildin við grasi av einari trøð, og yvirhøvur eru traðir í dag til seyð, ross og annað ítriv, og fleiri smáfesti eru á sama hátt bert til smávegis seyðahald.

2. Niðurstøðurnar í metingini hjá Per Nicolajsen (sí niðanfyri undir D 1) av heildar samfelagsbúskaparliga úrslitinum av føroyska landbúnaðinum í dag eru,

at føroyskur vinnuligur landbúnaður, t.e. tær landbúnaðarvinnueindir, ið burturav verða riknar vinnuliga við mjólkarframleiðslu sum meginframleiðslu, sum heild bert gevur bónda rímuligt avkast við tí studningi, ið verður latin. (Millum helvt og góðan triðing av bruttofaktorinntøkuni er studningur.)

at roknaða framleiðsluvirðið av seyðahaldinum er størri enn mjólkar- og neytakjøtsframleiðslan. Bert ein lítil partur av hesari framleiðslu kemur í skipaða sølu, t.e. undir meirvirðisavgjald, partvíst tí ein stórur partur fer til heimanýtslu ella sølan ikki er so stór, at seljarin nýtist at verða meirvirðisgjaldsskrásettur, og partvíst tí at ein partur av samsýningini fyri røkt, fjallgongu og fletting verður goldin í seyði. (Bert ein viðfáningur av roknaðu bruttofaktorinntøkuni er studningur.)

3. Meðan einki endamál er orðað viðvíkjandi ognarjørðini, er endamálið við løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð lýst í §1 at vera, „at tað fyrisitingarliga skulu skapast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini“. Henda endamálsorðing merkir ikki, at

landsjørðin í Føroyum ikki kann verða rikin sum vinnuligt jarðarbrúk, men soleiðis sum lógin og kunngerðir við støði í lógini eru orðaðar, og soleiðis sum lógin hevur verið umsitin, hevur størri dentur til tíðir verið lagdur á framleiðsluøking, út um hvat er vinnuliga ráðiligt. Í øðrum førum hevur so lítil dentur verið lagdur á at menna eina framleiðslu, at jørðin til vinnuliga nýtslu er fallin í órøkt.

Verður so stórur dentur lagdur á framleiðslu, at hon verður stuðlað á ymiskan hátt, fáa vit tey úrslit, sum vit kenna í dag, nevniliga ov stóra framleiðslu, enn marknaðurin vil keypa, ov stórar íløgur í fjós, neyt o.s.fr., ið framleiðslan og marknaðurin ikki ber, stóran innflutning av kraftfóðri til lágar verðinsmarknaðarprísir, stórar dálkingartrupulleikar av tøðum, ið graslendi ikki er til, náttúruoyðandi velting upp úr nýggjum, krav um studning til neytakjøtsframleiðslu, fyri at hon kann kappast við útlendskt neytakjøt o.s.fr. Tá slíkir trupulleikar sum frammanfyri nevndu taka seg upp, har summir ganga ímóti endamálum, ið vit eisini hava við jarðarbrúkinum, gera vit nýggjar stuðulsskipanir og reglur at basa teimum, við tí úrsliti, at tað gerst enn truplari og óhugaligari at vera bóndi.

Orðingin av endamálinum um at menna framleiðsluna av landsjørðini víkur ikki so nógv frá endamálunum, ið ES í mong ár hevði sett fyri landbúnaðin innan evropeiska samveldið, nevniliga,

- at økja landbúnaðarframleiðsluna og harvið
- tryggja landbúnaðarfólki sømulig livikor,
- fáa javnvág á marknaðirnar og tryggja, at vøra fæst,
- og tryggja nýtarunum sømiligar prísir.

Í ES hevur denturin, sum tað sæst, verið lagdur á framleiðsluna og viðurskifti framleiðarans (bóndans). V.ø.o. hevur tað verið kostnaðurin av framleiðslu, ið setti prísin, og marknaðarpolitikkurin hevði sostatt til endamáls at tryggja bóndanum, at hann slapp av við vøruna til rímuligar prísir. Nýtarin fekk landbúnaðarvøru til munandi hægri prísir, enn vøran fekst fyri á heimsmarknaðinum, og hann hevði næstan ikki møguleika at keypa aðra landbúnaðarvøru enn innan-ESska. Landbúnaðarpolitikkurin hjá ES hevur tryggjað bøndrunum høgar prísir, ið tínæst hava ført til eina størri framleiðslu, enn innlendis marknaðurin kundi keypa. Ovurframleiðslan mátti annaðhvørt goymast og forkomast ella stuðlast útflutt. Men høgu prísirnir førdu harumframt til størri íløgur í maskinur og tól, enn annars vildu verið framdar, og aftur til hægri prísir á landbúnaðarjørðini. Taðingin gjørdist í mongum landbúnaðarøkjum eisini eitt vandamál, og tað er komið har útí, at bøndur í dag fáa studning fyri ikki at framleiða, og um fylgisvein verður ansað eftir, at bøndur ikki framleiða meira, enn teimum er loyvt. Í Italia er stjórnin kroyst til at geva bóndum studning

og lagalig lán at gjalda bót fyri at hava framleitt meira av mjólk, enn ásett í mjólkarkvotu teirra. Nevndin heldur, at tá avtornar fáa bøndur sjálvir sostatt lítlan ágóða av landbúnaðarpolitikki sum honum, ið var galdandi í ES.

Í norðanlondum, og partvíst eisini í Føroyum, hevur landbúnaðarpolitikkurin verið merktur av hesum áhugamálum (endamálum), ið vit endurgeva á svenskum[61]:

a) att ge lantbrukarna en inkomst och levnadsstandard som är likvärdig med andra sektorer i ekonomin
b) att stimulera effektivitet och optimal resursallokering av jordbrukets resurser
c) att stimulera inhemska producentpriser för jordbruksprodukter
d) att säkerställa tillgången på livsmedel för inhemska konsumenter även i händelse av militär konflikt eller störningar i försörjningen
e) att garantera „rimliga“ konsumentpriser
f) att upprätthålla sysselsätningen i ekonomiskt svaga regioner och hålla landsbygden levande
g) att värna om naturresurser och miljö
h) att respektera jordbrukets sosiala struktur, exempelvis genom att värna om familjejordbruket
i) att underlätta jordbrukets anpassning till externa chocker

Tað slepst ikki undan at gera sær greitt, at vinnulig gagnnýtsla og røkt av jørðini í Føroyum kann ikki hugsast, uttan so at avkastið av jarðarumsitingini – ella betur jarðarbrúkinum – er so stórt, at tey fólk, ið velja sær hesa vinnu sum vinnuveg, fáa eina sámuliga inntøku burtur úr. Við hesum verður støða ikki tikin til, um inntøkan skal vera størri ella minni enn meðalinntøka hjá fólki annars. Eingin velur bóndaskap sum lívsstarv, uttan so at hann hevur hug til hetta arbeiði. Men inntøkan skal vera so stór, at hann, ið annars vil vera bóndi, ikki letur vera við at velja hetta starv, tí inntøkan er alt ov lítil. Men umframt inntøku til bónda og húski at liva av, skal jarðarbrúkið kasta so mikið av sær, at garðurin kann verða røktur og bøttur ár um ár.

Flest øll hava eina hugmynd av, hvussu bøur, ið er væl røktur skal síggja út, bæði á vetri og á sumri. Somuleiðis hava vit eina hugmynd av, hvussu ein garður skal síggja út og vera hildin. Í øðrum londum verður nógv gjørt burtur úr hugtakinum „kulturjord“. Tó at hetta ikki er so frammarliga hjá okkum, so er ikki sørt, at fleiri í Føroyum fegin vilja varðveita myndina av vælhildnum bøi, varðveittum kornakrum o.t. At rokna við at bóndi, sum í dag skal reka vinnuligt jarðarbrúk á

[61] tikið úr Jordbruks politiken i de nordiska länderne. Målen, medlen och konsekvenserne. Nordisk Ministerråd 1989.

sínum festi, vil halda seg til farnar framleiðsluhættir, er sjálvsagt óhugsandi. Peningaliga má hann hava serligar umstøður, um hann skal taka á seg røkt av gomlum bøi o.ø., ið bert ein eftirtíð fer at virðismeta í slíkan mun, at inntøka kann fáast av tí.

Samanumtikið heldur nevndin tó, at sjálvt um vit kunnu hugsa okkum eina røð av endamálum fyri føroyskum jarðarbrúki, eiga vit fyrst av øllum at miða eftir at leggja viðurskiftini soleiðis til rættis, at vit kunnu fáa vinnuligt jarðarbrúk, bygt á marknaðarbúskaparligar treytir. Slíkt jarðarbrúk er fortreytin fyri, at onnur mál kunnu verða rokkin, ikki øvugt.

4. Nevndin hevur við gjøgnumgongd av verandi lóggávu roynt at mett um, hvørjar ásetingar og reglur har kunnu forða bónda á 4 marka garði ella størri at reka garð sín á slíkan hátt, at garðurin gevur vinnuligt avkast og kann verða hildin.

Aftanfyri val av 4 marka garði, liggur eingin kanning ella meting um, at 4 marka garður kann verða rikin vinnuliga og geva ársinntøku til bónda, og nevndin er ikki óvitandi um, at markatal sigur alt ov lítið, tá mett skal vera um, hvat ein garður vinnuliga kann kasta av sær. Men vit hava einki annað nýtiligt mát í dag.

Vinnuligt jarðarbrúk kann uttan iva verða rikið væl á minni garði, tó summir menn vilja halda, at garður, sum bert er 4 merkur, er alt ov lítil til vinnuligt jarðarbrúk.

Við valinum av 4 marka garði er mett, at hjá honum vil innangarðs vanliga liggja saman, og bóndin kann tískil nýta innangarðslendið eftir tí, sum garðinum tørvar. Uttangarðs liggur ikki altíð í sama haga, men hann hevur ofta umstøður at fáa tað lagt saman, um bóndin heldur hetta tæna sínum og garðsins áhugamálum.

Tað skilst á hesum, at nevndin fyri at lætta um arbeiði hjá sær tekur útgangsstøði í teimum gørðum (festum), sum í dag mynda vinnuliga jarðarbrúkið í Føroyum, annaðhvørt festari burtur av hevur garðsrakstur sum vinnuveg ella ikki. Dastið av tí landbúnaðarframleiðslu, sum kemur til sølu vinnuliga í Føroyum í dag, kemur frá gørðum, sum eru 4 merkur ella størri. Skal størri vinnulig landbúnaðarframleiðsla verða í Føroyum, má tað fyrst gerast á almennu jørðini. Tað má tí fyrst snúgva seg um hjá nevndini at kanna, hvørjar forðingarnar eru, og hvørjir karmarnir eiga at verða, fyri at almenna jørðin – í 4 marka gørðum ella størri – kann standa fyri hesari framleiðslu í sunnum, vinnuligum rakstri.

Tað skilst eisini, at annað útgangsstøði hjá nevndini er, at garðurin er og verður rikin sum ein búskaparlig eind. Hetta merkir, at bóndi (festari) rekur garðin við langtíðar vinningi fyri eygað og ger tær ábøtur, íløgur, umskipingar og víðkanir, ið tæna garðinum – og harvið eisini honum – at gerast ein sterkari búskaparlig fyritøka. Talið á

gørðum, ið eru 4 merkur til støddar ella meira, er í dag 152. Varð tað gjørligt at skipa viðurskiftini soleiðis, at hesir garðar gjørdust 130 lívførar fyritøkur, møguliga við samanløgu og útskifting, heldur nevndin, at annað stig í setningi hennara kundi verið at kanna, hvussu hin parturin av almennu jørðini og ognarjørðin kundi verið eggjað við samanløgu, útskifting o.a. til at gjørst eindir, ið somuleiðis kundu verið riknar sum vinnuligt jarðarbrúk.

Yvirlitið yvir hagabýtið í Føroyum (sí frammanfyri undir IV A) vísir, at í 46 % av øllum høgunum er øll jørðin landsjørð, í 34 % er øll jørðin ognarjørð, meðan í 20 % av høgunum er blandað ognarjørð og landsjørð. Hagarnir eru tó rættiliga ymiskir til støddar, úr einari mørk upp í 22 merkur. Leysliga mett er samlaða markatalið á festum upp á 4 merkur ella meira u. 900, svarandi til u. 35 % av allari jørðini í Føroyum. Ognarjørðin fevnir um u. 50% av allari jørðini. Tað ber ikki til at siga, hvussu stórur partur av allari búnaðarjørðini í Føroyum liggur í høgum við einans landsjørð og við festum uppá 4 merkur ella meira, men við at halda viðgerð sína til 4 markagarðar ella størri, verður eftir tí frammanfyri sagda bert ein triðingur av jørðini viðgjørdur sum vinnuligt jarðarbrúk.

5. Sum nevnt frammanfyri er nevndin ikki ósamd við verandi endamálsorðing í lógini um landsjørð, um at menna framleiðsluna av landsjørðini. Men nevndin heldur hana ikki vera neyva, og at umsitingin av henni, lógarteksturin og reglugerðir, gjørdar við støði í lógini, hava ikki verið hepnar fyri føroyskt jarðarbrúk.

Í dag vil øll jarðarbrúksframleiðsla í Føroyum byggja á tað, sum kann vaksa í Føroyum sum grundarlag fyri framleiðsluni ella á tey ráevni v.m., ið verða innflutt til at fremja hesa framleiðslu. Nevndin heldur, at alt framleiðslugrundarlag í Føroyum er føroyska lendið og føroyska veðurlagið. Hesi viðurskifti seta avmarkingar fyri allari náttúrligari landbúnaðarframleiðslu í Føroyum. Tá tað snýr seg um lendið, heldur nevndin, at økt kann verða um framleiðsluna á lendinum á ymsan hátt. Tað kann t.d. henda við betri røkt av dyrkaða lendinum og skifti av framleiðslu á lendinum og við at vaksa um graslendið við velting upp úr nýggjum. Tað kann somuleiðis henda við samanlegging av hóskandi lendi til størri eindir og við friðing móti óynsktum biti. Tá tað snýr seg um veðurlagið, eru helst ikki størri møguleikar, men við at skapa møguleikar fyri lívd kann vøksturin fremjast, eins og tað kann vera til fyrimunar fyri bitdýrahald, eins og ból og seyðahús longu eru.

Verður allur denturin lagdur á framleiðslu, og um henda verður stuðlað, kann eitt nú meira mjólk verða framleidd við størri innflutningi av kraftfóðri. Spurningurin kann tá verða reistur, um nakað er vunnið í mun til, um mjólkarframleiðslan í Føroyum var avmarkað til

tað, sum tað við eitt nú djóraheilsuligum atliti verður mett rætt at framleiða við tí grasi, ið einstøku fjósini hava til neytini.

6. Nevndin er samd um at orða aðalmálsetningin fyri føroyskum vinnuligum jarðarbrúki soleiðis, at tað á marknaðarbúskaparligum treytum framleiðir tær vørur og tænastur, ið føroyska veðurlagið, føroyska lendið og føroyski kunnleikin og arbeiðsmegin kann gera kappingarførar, og sum samstundis lýkur vaksandi altjóða krøv um umhvørvis- og náttúrurøkt og hevur fyrilit við røkt og umstøðum hjá húsdýrum.

Í hesum málsetningi liggur m.a., at framleiðsla, ið ikki nýtir føroyska lendið og føroyska veðurlagið sum munandi part av sínari framleiðslu, eitt nú gras, sól o.t., verður ikki umrøtt í hesari frágreiðing. Hetta merkir t.d., at grísakjøtsframleiðsla, eggjarframleiðsla og pelsdýraframleiðsla í búrum verður ikki tikin við í viðgerðina.

Tað liggur eisini í hesari orðing av málsetninginum, at vinnuligt jarðarbrúk eigur at virka uttan studning, soleiðis at tað einans er marknaðurin, sum ger av, hvørja framleiðslu, eitt vinnuliga rikið jarðarbrúk hevur. Rættiliga fitt av studningi verður í dag latin til framleiðslu og til ábøtur í føroyskum jarðarbrúki; men – eftir tí vit duga at meta um, ikki so nógv, sum latið hevur verður donskum jarðarbrúki.

Við tí málsetningi, ið nevndin hevur sett upp, heldur nevndin, at tann framleiðsla av landbúnaðarvørum, sum í dag fer fram í Føroyum og kemur til sølu, lættliga kann framleiðast á almennu jørðini. Hugsað verður her um mjólk og mjólkarúrdráttir, um neytakjøt, sum mjólkarframleiðslan kann kasta av sær, seyðakjøt, sum summarhagin náttúrliga kann kasta av sær, og tað grønmeti, ið tað ber til at fáa at vaksa úti. Nevndin er somuleiðis samd um, at hetta kann gerast á teimum gørðum, ið eru í minsta lagi 4 merkur til støddar. Hesir garðar hava eisini eina slíka stødd, at tað almenna má hava eitt krav um, at teir verða riknir sum vinnulig jarðarbrúk. Ein 4 marka garður ella størri hevur eina stødd, ið ger tað møguligt at skipa hann sum eina vinnuliga eind og í makaskifti og umbýti við grannagarðar gera hann betur hóskiligan til tann rakstur, ið eindarleiðslan (bóndin) heldur geva frægasta lønsemi.

Sum longu nevnt kemur nógv tann størsti parturin av seldu føroysku landbúnaðarframleiðsluni frá almennu jørðini. Hugsað verður her um mjólk og mjólkarúrdráttir, um neytakjøt, sum mjólkarframleiðslan kann kasta av sær, seyðakjøt, sum summarhagin náttúrliga kann kasta av sær, og tað grønmeti, ið tað ber til at fáa at vaksa úti. Nevndin er samd um, at við burturtøku av forðingum og hóskandi karmum fyri samanlegging og umskiping av almennu jørðini, kann framleiðslan á hesari jørð verða meira fjølbroytt, størri og kapping-

arfør, samstundis sum hon lýkur treytirnar í uppsetta endamálinum. Tað er lættast at prógva hetta á teimum almennu gørðunum, sum hava eina stødd, ið ger tað møguligt at skipa teir í vinnuligar eindir og í makaskifti og umbýti við grannagarðar gera teir enn betur hóskiligar til tann rakstur, ið eindarleiðslan (bóndin) heldur geva frægasta lønsemi. Hesir garðar hava eisini eina slíka stødd, at tað almenna má hava eitt krav um, at teir verða riknir sum vinnulig jarðarbrúk.

# B. Almenna búnaðarjørðin

## 1. Festiskipanin – ógreitt ábyrgdarbýti

Tá tað snýr seg um lóg um landsjørð (festiskipanina), heldur nevndin, at størsta lýti við hesari lóg er, at orðingin av lógini og kunngerðum, gjørdum við støði í henni, og umsitingin av henni hava ikki eggjað til vinnuligt jarðarbrúk. Nevndin heldur, at tá bøndur (festarar) reka sín garð við langtíðar vinningi fyri eygað og gera tær ábøtur og íløgur, ið tæna garðinum, so er tað ikki skipanini fyri at takka. Hetta sæst kanska týðiligast á, hvussu leingi bøndur sleppa at sita á illa riknum garði, og at tað ikki eru framdar fleiri samanleggingar, víðkanir og umskipingar av gørðum, so festari á væl riknum festi fær betri møguleikar. Jarðarbrúkið verður í dag hildið uppi av alski, mentan og góðum vanum.

Í lógini og í umsitingini av henni er aldargamla festiskipanin varðveitt; hetta merkir, at festarin situr tryggari á garðinum, enn um hann var eigari. Hann hevur allan rakstur sjálvur undir hondum og rindar lítið og lætt fyri at hava garðin í hondum, men hann situr ikki sum eigari við endan við ábyrgdini. Misrøkir hann ikki garðin álvarsliga, er ikki vanligt at taka garðin frá honum, og tó at tað nú eru skaptir lógarligir møguleikar at gera broytingar í festunum við festiskifti, sbr. § 10, stk. 1 í lógini, man tað fara at vísa seg trupult at sýta soni festara at taka við festinum, um sonurin setur hart uppá at taka við tí. Hevur bóndi sína festitíð lagt nógv arbeiði í garðin og bøtt munandi um hann, fær hann ikki samsýning fyri hetta, tá hann sigur festið frá sær, uttan so at hann kann skjalprógva hesar ábøtur, sbr. §§ 4-7 í kunngerð nr. 122 frá 21. juli 1992. Tekur ein sonur við festinum, fær hesin og hansara familja ein betri garð at sita á og at bøta um, men ein slík arvauppgerð kenst í dag mongum avoldað.

Jørðin, framleiðsluhús og innstøða eru tó landsogn, umsitin av Føroya Jarðarráði, ið samstundis umsitur Føroya Jarðargrunn. Metir festari og Ráðið, at tað er rætt hjá bónda at gera íløgur í fjós, velting úr nýggjum ella annað, ið kann bøta um inntøkur garðs, kann bóndin

fáa lán frá Føroya Jarðargrunni til hesar íløgur (eingin annar kann í veruleikanum veita lán, tí bóndin kann ikki veita trygd í garðinum). Megnar bóndi ikki at gjalda lánið aftur, nyttar lítið hjá lánveitara at krevja fulnað fyri láninum í garðinum. Garðurin kann ikki verða settur á tvingsulssølu; tað hevur onga meining, tí eigari og lánveitari er sami. At krevja fulnað í møguligari privatogn hjá bónda við konkursviðgerð, hevur ikki verið gjørt. Vanligt hevur heldur ikki verið at sett bónda frá festinum, tí at garðurin ikki kann renta og afturrinda lán. (Eitt slíkt stig kundi eisini í mongum førum kenst í so ógvusligt, har tað eru tær ytru umstøðurnar – stórt fall í mjólkarsølu o.t., ið kanska eru høvuðsatvoldin til vánaliga gjaldførið; bóndin kann í allar aðra mátar vera dugnaligur.) Festið sleppur heldur ikki undan ógoldnu, gomlu skuldini, ið nýggjur festari eftir skipanini má taka við.

Tó at lógin hevur til endamáls at menna framleiðsluna av landsjørðini, og tó at tað í § 12 verður sagt, at „Festið skal røkjast sum eitt væl umsitið jarðarbrúk. Eftir skráseting av hvørjum festi verður framleiðsluskyldan hjá hvørjum festi sær ásett.“, so hevur landsstýrið ikki nýtt sína heimild til at „áseta nærri reglur um framleiðsluskylduna og tey tiltøk, ið eru neyðug fyri, at bøndur kunnu lúka hesa skyldu.“ Í fyrrnevndu kunngerð um festi verður í §3 einans sagt, at „Festari hevur skyldu til at framleiða av festinum mest møguligt, sæð í mun til marknaðarviðurskiftini, og hvat annars má haldast av verða fíggjarliga ráðiligt.“ Jarðarráðnum verður tó álagt at taka upp samráðingar við festara, um framleiðslan á hansara festi er eyðsýnd ov lítil, fyri at fáa framleiðsluna upp. Bert tá hetta uttan úrslit hevur verið roynt ferð eftir ferð, kann Ráðið áleggja festara ávísa minstu framleiðsluskyldu, tó bert fyri eitt ár í senn.

Frammanfyri nevnda samanborið við rættin hjá persóni, ið kann sigast at hava frammí hjá rætt at taka við festi at kæra um avgerð um, at hann ikki kann fáa tikið við festi, sjálvt um hann ikki kann føra prógv fyri, at hann sum høvuðsvinnu ætlar at fáast við jarðarbrúk, lýsir eftir tykki nevndarinnar væl páhald hennara um, at lógin ikki eggjar til vinnuligt jarðarbrúk.

Setningurin fyri arbeiðið hjá nevndini, har sagt verður m.a. „at Jarðargrunnurin verður skildur burturúr“, er tí eyðsýnt rættur, men nevndin dugir ikki at síggja, at frammanfyri umrøddu viðurskifti vórðu broytt einans við at skilja Jarðargrunn og Jarðarráð frá hvørjum øðrum. Trupulleikarnir hjá føroyskum vinnuligum jarðarbrúki eru meira grundfestir, enn at teir kunnu bøtast við at loysa mest ásýniligu brekini í verandi skipan. Hetta mundi verða ætlanin við lógini frá 1988, men tá saman um kemur, tykist úrslitið vera verri, enn um broytingin ikki varð framd.

## 2. Leigutraðir og onnur leigumál

Talið á leigutraðum og øðrum leigumálum av almennari jørð er í dag u. 800.

At leiga trøð var fyrsta stig til at fáa jørð til keyps frá Jarðarumsitingini, og vanliga varð søla framd uttan stórvegis hóvasták, um leigarin hevði lokið skyldurnar, ið fylgdu við leigumálinum, t.e. velting og girðing. Trøðin gav neyðugt grasfóður til kúnna umframt epli og annað grønmeti til húsbrúks. Á fleiri traðum var urtagarður við berjarunnum og rabarbum. Hevði traðarmaðurin ella festarin ikki kravt vetrarbitið avloyst, hevði hagaseyðurin tó rætt til vetrarbit á trøðni.

Nú eru mong ár síðan kúgv varð hildin við grasi av trøð, og tíðliga gjørdist søla av jørð av traðum til grundstykki ein táttur, ið ikki varð ætlaður við at lata ognarleysum jørð til dyrkingar. (Í roynd og veru er útstykking av traðum í grundstykki ímóti ætlanini við lógini um Jordbrugets Fremme, har Jarðarráðið fær serskilda heimild at selja kommununum jørð til grundstykki og onnur almenn endamál.) Við lógini um landsjørð frá 9. juni 1988 varð heimildin at selja leigutraðir so tikin av.

Nevndin heldur, at allar leigutraðir og onnur leigumál av landsjørð eiga at verða uppsøgd at fara úr gildi skjótast gjørligt. Hesi øki verða nýtt út frá øðrum ynski um nýtsluvirði enn jarðarrøkt, og tey fremja onki framleiðsluvirði av vinnuligum slagi. V.ø.o. samsvara slík leigumál ikki longur við ta ábyrgd, ið tað almenna hevur tikið á seg sum umsitari av landbúnaðarjørð í Føroyum.

## 3. Søla burturav almennari jørð

Lítið hevur verið selt burtur av almennu festijørðini uttan til almenn endamál, herundir til sethúsagrundir, tey seinnu mongu árini. Fyrr hevur verið selt burturav jørðini, t.e. av einstøkum festum, til traðir og til uppdyrkingar uttangarðs, í fyrstuni við kongligari fyriskipan í hvørjum einstøkum føri og tá festarin var samdur í søluni, og seinni við heimild í lóggávu, eitt nú við traðarlógini frá 1894. Størri partar, eitt nú sølan av Lítlu Dímun og av Flatnarhaga er farin fram við heimild í serligari lóggávu. Í traðarlógini frá 1894 var enntá ikki loyvt festara at keypa jørð av festinum, sum hann sjálvur hevði dyrkað upp, og bert í sambandi við broytta býti millum Eystara og Vestara Húsagarðsfesti í Havn í 1928 veit nevndin um, at festari hevur fingið stór lendi til ognar.

Málið um, at festijørðin átti at farið yvir til ogn, hevur annars verið borið upp á mál ferð eftir ferð, uttan at nakað hevur spurst burtur úr. Longu í 1787 skrivar rentukamarið:

„Da det i Almindelighed er en afgjort Sandhed, at Selvejere, som vide, at deres Børn og Efterkommere kunne høste Frugterne af deres Sved og Møje, kan formodes at gøre større Forbedringer paa deres Gaarde end Fæstebønder, saa tror man, at det vilde være fordelagtigt saavel for Kongens Kasse som især for Bondestanden paa Færø, om de Hans kgl. Majestæt dér tilhørende Bøndergaarde enten, naar de bleve fæsteledige, bleve bortsolgte til Ejendom, eller og de nuværende Fæstere paa billige Vilkaar forvandlede til Selvejere. Men forinden nogen endelig Beslutning udi denne Sag tages, ville vi fra Hr. Landfogden, efter den gode Kundskab, som De har om det færøske Jordbrugs lokale Beskaffenhed, forvente et bestemt Forslag og de Vilkaar, med hvilke Hensigten, som er Indbyggernes Velstands varige Befordring, forenet med Fordel for den kgl. Kasse, eller i det mindste uden noget Tab for samme, bedst kunne opnaas."

Í 1845 reisir rentukamarið aftur spurningin, og viðmerkir, at sjálvt um kongsjørðin, av tí at hon er sloppin undan at verða lutað sundur og í størri eindum kann verða rikin betur enn ognarjørðin,

„staar endnu meget tilbage at ønske i saa Henseende, og det vil næppe kunne betvivles, at jo Afhændelse til Ejendom eller Arvefæste, i Forbindelse med en Bestemmelse om passende Regler for Jordens Udstykning og andre til Landbrugets Fremme hensigtsmæssige Foranstaltninger, vilde hæve Jordbruget ogsaa paa dette Gods, og altsaa blive fordelagtig saavel for den kongelige Kasse som for Landet i det hele."

Í uppskotinum frá Den færøske Landbokommission (1908-1911) um Lov angaaende Statens Fæstegods paa Færøerne verður spurningurin um avhending av kongsjørðini nógv umrøddur. Av tí, at sjónarmiðini, ið tá vórðu førd fram, somuleiðis fara at verða førd fram í dag, verða tey endurgivin her:

„Et Mindretal (Effersøe) har den Anskuelse, at Selvejendom af principielle Grunde bør indføres paa Statens Fæstegods. Mindretallet mener, at fri Ejendom er den Besiddelsesform, der er bedst egnet til at fremme Landbruget; kun den er i Stand til at bibringe Besidderen den levende Interesse, der i Landbruget som i andre Erhverv er den bedste Drivfjeder, og kun fri Ejendom er i Stand til at bringe Jorden på den dygtigstes Haand. Mindretallet henviser til, at man andetsteds, navnlig ogsaa i Lande, der ligge os nærmest (Danmark, Norge, Skotland), af al Magt har stræbt og stræber at fremme Selvejendom i

Landbruget, og at denne Institution har vist sig at bidrage mægtigt til Landbrugets Opkomst. Mindretallet kan ikke skønne, at Forholdene paa Færøerne advare imod at følge andre Landes Eksempel; tværtimod mener det, at der paa Færøerne – med et køligt og fugtigt Klima, vanskelige Arbejds- og Afsætningsforhold og flere andre Hindringer for et lønnende Landbrug – er endnu større Grund til at tilraade Selvejendoms Indførelse i videste Omfang. Dette Mindretal tilslutter sig derfor i Princippet fuldstændig til det af Lagtinget i 1900 vedtagne Lovforslag.

Et andet Mindretal (Dam, Larsen, Olsen og Patursson) mener ikke at kunne tage et saa afgjort Standpunkt i Spørgsmaalet om Fæstes eller Selvejendom Fortrin. Dette Mindretal har den Opfattelse, at Landbruget paa Færøerne vel kan drives under begge Besiddelsesformer, og at det mulig endog kan have sine Fordele, at disse virke ved Siden af hinanden. Det kommer alt an paa, hvorledes disse Former benyttes, og – med Hensyn til Fæsternes Stilling – hvilket Indhold Lovene om Fæstegodset have, og hvorledes de udøves. Saafremt Lovgivningen indeholder tilstrækkelige Regler til at sikre Fæsteren i hans Brug, eller – selv uden saadanne Regler – saafremt Fæsterens Brug respekteres af Administrationen, da er efter Mindretallets Mening Fæsteforholdet meget vel brugeligt endnu en rum Tid. Skulde derimod enten Lovgivningen eller Administrationen ændres saaledes, at Fæsteren følte sig utryg i sin Brug af Fæstet, da vilde efter Mindretallets Mening den Tid kunne indtræffe, hvor – naar Sagen ses fra Bondestandens Synspunkt – det Spørgsmaal komme under Overvejelse, om det er nødvendigt at forlade den hidtilværende Besiddelsesform, Fæstet, og gaa over til en ny Form, Selvejendom. Dette Mindretal mener altsaa, at begge Besiddelsesformer i og for sig kunne egne sig for Landbrugsvirksomheden, men at Vægten maa lægges paa de nærmere Betingelser for disse Besiddelsesformer. Mindretallet finder det nemlig indlysende, at Spørgsmaalet ikke kan stilles saaledes; om Selvejendom eller Fæste er at foretrække, men at det ene og alene kommer an paa, hvilke Vilkaar Besidderen kommer til at arbejde under. Kan Fæsteinstitutionen ordnes saaledes, at Fæsteren under den faar trygge Arbejdskaar, da tale efter Mindretallets Mening vægtige Grunde for at lade denne gennem Aarhundreder hævdvundne Institution bestaa. Mindretallet har overhovedet den Opfattelse, at man bør være varsom med Forandringer i bestaaende Ordninger, saa længe disse ikke have vist sig at være utjenlige. Paa den anden side mener dette Mindretal, at Fæsteinstitutionen kan tænkes at udvikle sig saaledes, at

Fæsterens Kaar blive altfor lidet betryggede, og at Bondestanden derfor kan komme til at staa over for Valget imellem denne Fæsteordning og Selvejendom. Med hensyn til dette Valg mener Mindretallet, at Selvejendom har den Fordel, at Ejeren overfor Staten er stillet som enhver anden Ejer i Riget og derfor, naar Spørgsmaalet om Indgreb i hans Ret rejses af Hensyn til Samfundets formentlige Interesser, vil have den Betryggelse, der ligger i, at han kan vente at blive behandlet efter de i det øvrige Rige anvendte Grundsætninger og ikke efter mulige stedlige Stemninger, – med andre ord, at han vil nyde den Beskyttelse, som Bestemmelsen i Grundlovens § 82 om Ejendomsrettens Ukrænkelighed giver. Men til den anden Side er Ejeren selvfølgelig udsat for en Risiko, som Fæsteren er fri for; han kan, naar Uheld indtræffer, blive udsat for, at Ejendommen gaar tabt for ham, og hvis Betingelserne for Fæstets Overgang til Selvejendom stilles saaledes, at Erhvervelsen af Ejendomsretten bliver Byrdefuld, og navnlig hvis Købesummen for Fæstet sættes højt, er det for dette Mindretal et meget tvivlsomt Spørgsmaal, om ikke Ejendomsrettens Fordele købes for dyrt.

......

Et tredje Mindretal (Bærentsen, Michelsen, Petersen, Poulsen) tror, at Fæstegodsets Overgang til Selvejendom er en for Tiden utilraadelig Foranstaltning. Uden at komme ind paa nogen almindelig Undersøgelse af Spørgsmaalet: Fæste eller Selvejendom, skal dette Mindretal udtale, at efter dets Anskuelse kan hver af disse Besiddelsesformer være god under givne Forhold. Mindretallet tror imidlertid, at den færøske Fæsteinstitution har saa væsentlige Fordele, at den i alt Fald efter de Forhold, som man for Tiden kan overskue, er vel tjenlig. Landbrug paa Færøerne er af forskellige Aarsager, som det er unødvendigt at nævne, lidet lønnende og kan ikke bære høje Driftsudgifter, og derfor passer netop Fæsteinstitutionen med de lave Afgifter, der paahvile Fæsteren, efter Mindretallets Mening særdeles godt til Forholdene. Anderledes vil det derimod uundgaaelig blive, naar man gaar over til Selvejendom. Hvilke Bestemmelser end Loven træffer for at hindre Stigning af Ejerens Udgifter til Forrentning af Gæld, saa vil dog Forholdet mellem Ejerens Arvinger indbyrdes nødvendigvis føre med sig, at den Arving, som overtager Ejendommen, kommer til at tilsvare sine Medarvinger en Pris, der er nær dens virkelige Værdi i Handel og Vandel. Man kan vel i Loven om Fæstegodsets Overgang til Selvejendom søge at modvirke dette Resultat ved at bestemme, at Ejendommen af Staten skal overdrages for en lav Købesum, at Ejendommen i et vist Tidsrum ikke maa belaanes udover en vis Grænse o.l., at

den Arving, som overtager Gaarden, skal faa en vis Del af dens værdi forlods, – alle saadanne Bestemmelser ville dog kun kunne forhale det endelige Resultat, maaske for et Slægtled eller lidt længere, men aldrig forhindre, at det tilsidst indtræder. Forholdet vil derfor blive det, at Forskellen imellem den Pris, for hvilken Staten afhænder Ejendommen, og dennes Værdi i Handel og Vandel, udjævnes gennem Arv og altsaa i Virkeligheden tilfalder det første Slægtled. De Udgifter, som det næste Slægtled da vil faa at bære, ville efter Mindretallets Mening let kunne blive for tunge i Forhold til det Udbytte, som Ejendommen kan ventes at give. Når der da paa den anden Side spørges, hvilke Fordele det er, som opnaas ved Overgang til Selvejendom, maa Mindretallet fremhæve, at enhver Lov herom formentlig maa give Adgang til at tage meget vidtgaaende Forbehold til Sikring af den ubemidlede Klasses Adgang til at faa Opdyrkningsjord og Byggegrunde. Toges nemlig ikke saadanne Forbehold, vilde der begaas en stor Uret mod den ubemidlede Befolkning. Nu have vel alle de Forslag, som hidtil ere fremsatte om Fæstegodsets Afhændelse, indeholdt Bestemmelser, hvorefter der ved Salget kunde tages Forbehold med Hensyn til Arealer, som det i en eller anden Henseende kunde antages at være af Interesse for det offentlige at have Raadighed over; men hermed er jo ikke afgjort, hvad Forbeholdet i det enkelte Tilfælde bør gaa ud paa. Mindretallet antager nærmest, at man ved Salgene i Reglen for at være paa den sikre Side vilde undtage ret betydelige Arealer; men i saa Tilfælde vilde Fæsterens Fordel ved at blive Selvejer i høj Grad forringes. Sattes imidlertid Forbeholdet i det enkelte Tilfælde for snævert, saaledes at Erfaringen senere viste, at der var stærkere Trang til Jord for ubemidlede, end man ved Salget havde forudsat, vilde det føles som særdeles utilfredsstillende, og Mindretallet kan vel tænke sig den Mulighed, at det offentlige da blev nødt til, for at hjælpe den ubemidlede Klasse, at tilbagekøbe Jord, selvfølgelig for dennes fulde Pris. Fra hvilken Side Sagen end ses, vilde det efter Mindretallets Mening paa dette Punkt være en i mange Tilfælde næsten uløselig Opgave at ramme den rette Grænse. Endelig skal Mindretallet fremhæve, at der, saa vidt dets Erfaringer strække sig, næppe hos Fæsterne føles nogen Trang til at faa Fæsteinstitutionen ophævet, og end mindre næres der hos den almindelige Befolkning Ønsker herom.“

Í frágreiðingini frá millumtinganevndini í búnaðarmálum, løgtingsmál nr. 49/1959, mælir ein meiriluti í nevndini til, at lógin frá 1937 á fleiri økjum eigur at broytast munandi.

„Henda lógin var millum annað gjørd við tí endamáli fyri eyga at útvega monnum, ið ikki røkja landbúnaðin sum aðalvinnuveg, so mikið av jørð frammíhjá, at teir kundu føða eina kúgv. Aðalvinnan, fiskivinnan, var tá soleiðis háttað, at hon ikki gav fiskimonnum fult ársarbeiði. Men nú gongur alt meira á tann bógvin, at fiskivinnan er heilársvinna, ið ikki gevur monnum sínum høvi til frammíhjáarbeiði. Og ynski um eina kúgv sum sjálvsagdan lut í tí dagliga húsarhaldinum er nógv minkandi. Teir tríggir nevndarlimirnir seta tí uppskot fram, ið miðja ímóti at samla jørðina í størri brúk, yvirhøvur so mikið stórt, at búnaðurin við fjølskyldu sínari kann liva av brúkinum og vera búnaður burturav, eins og fiskimaðurin er alt meira fiskimaður burturav. ...“

Sami meiriluti hevur ta áskoðan,

„at festiskipanin í mongum førum er ótíðarhóskandi. Og teir vísa á, at slík skipan, ið áður var kend í øllum grannalondum, nú er mest sum horvin. Teir ásanna, at festiskipanin soleiðis sum hon nú verður umsitin hjá okkum, í flestum førum gevur festaranum fríari ræsur, enn upprunaliga tilætlað, og at festibóndin yvirhøvur meira kennir seg sum óðalsbónda enn sum leigutakara. Men júst hetta sjálvsræðið hevur ført við sær, at støða festarans ídag, rættarliga sæð, er vorðin ein millum støða og ógreið í mongum føri. Á mongum festigørðum er til dømis ivi um, hvat verunliga hoyrir festinum til, og hvat ið er ogn ættarinnar. Somuleiðis hevur roknskapurin hjá teimum einstøku gørðunum í jarðargrunninum viðvíkjandi ágóða fyri fráselda jørð reist mangar ivaspurningar. Og onnur dømi eru at nevna eisini. Teir tríggir nevndarlimirnir halda tað tí vera beint at seta fram uppskot, ið gevur festaranum atgongu til at yvirtaka garðin til ognar fyri seg og ættina. Treytirnar, ið lagdar verða á yvirtøkuna, miðja tí ikki ímóti at skerja virkisrætt bóndans sum hjá óðalsbónda, men ímóti at varðveita garðin sum sjálvstøðugt og heilskapað jarðarbrúk.“

Eisini landbúnaðarnevndin sbrt. løgtingslóg nr. 17 frá 26. apríl 1965 tekur spurningin fram og sigur:

„Nevndin tekur undir við, at festigarðarnir undir ávísum treytum skulu kunna latast til ognar. Nevndin hevur ta áskoðan, at hetta fer at elva bøndrum til at spenna seg meira út. Sum er hava teir onga trygd fyri, at tann peningur og tað arbeiði, teir leggja niður í garðin kemur teimum sjálvum til góðar, og tað

vil eisini gera tað lættari hjá monnum, sum hvørki hava hug ella evni til at røkja garðin, at sleppa sær av við hann til aðrar, sum eru betri egnaðir sum bøndur. Hinvegin er nevndin samd um, at tað má byrgjast fyri, at garðarnir eins og ognarjørðin verður pettað sundur. Viðvíkjandi søluprísinum eigur at vera havt í huga, at festirætturin er ogn ættarinnar, og at festileigan er lág, og tað er tí rímuligt, at søluprísurin verður hareftir. Annars heldur nevndin tað ikki vera rætt at lata menn yvirtaka garðarnar til ognar fyri lítið og einki fyri kanska beinanvegin at selja teir við stórum vinningi. Nevndin hevur tí gjørt broytingaruppskot um, at jarðarráðið hevur rætt til at yvirtaka garðarnar aftur eftir meting, um teir verða latnir øðrum enn hjúnafelaga ella lívsarvingum."

Sjónarmiðini frammanfyri – fyri og ímóti – at lata festigarðar til ognar kunnu samanfatast í hesi:

Fyri:
Børn og eftirkomarar heysta fruktirnar – tí mugu ognarmenn hugsast at gera meira við garðin – spenna seg meira út.

Tann frægasta áeggjanin hjá bóndum, og bert frælsur ognarrættur fær tí dugnaligasta jørðina í hond.

Verður festiskipanin ella umsitingin av henni ótrygg fyri festaran, so er best við sølu, tí tá hevur bóndin í hvussu so er somu trygd sum aðrir borgarar og ognarmenn.

Ímóti:
Við lóggávu og umsiting, sum tryggjar festaran, er festiskipanin best. Við sølu er vandi fyri, at bóndin og ættin missir garðin, tá óhapp koma fyri.

Rakstrarkostnaður, og serliga rentu- og avdráttarbyrðan í sambandi við arvauppgerð gerst ov tyngjandi. Fyrsta ættarliðið fer at fáa størsta ágóðan, so ella so.

Ognarleys fáa skerda atgongd til jørð til uppdyrkingar. Tað almenna má til tess endamál keypa jørðina dýrt aftur.

Sjónarmiðini um at selja jørðina hava ongantíð vunnið frama. Lógaruppskotið, ið løgtingið samtykti í 1900 datt niðurfyri, og allar aðrar royndir hava miseydnast. Nevndin ger tó vart við, at alt bendir á, at Lov nr. 174 af 24.05.1937 Om Jordbrugets Fremme ikki forðaði sølu av festigørðum, men hesin møguleiki hevur ikki verið brúktur. Sølan av garðinum á Heiðunum í Trongisvági var ikki søla av festigarði, men av garði, ið Jarðargrunnurin eftir lógarinnar heimild fyrr hevði keypt.

Vit hava sostatt ongar royndir, hvørki væleydnaðar ella miseydnaðar, av, hvønn týdning tað kann hava fyri jarðarbrúkið sum heild, føroyska samfelagið ella einstaka bóndan, at almenna jørðin verður latin bóndum til ognar.

Atlitið til tryggleika festarans at sita á garðinum saman við møguleik-

anum at lata jarðarstykki burturav festunum til uppdyrkingar hava gjørt, at tað almenna framvegis situr við meira enn helminginum av bestu landbúnaðarjørð í Føroyum uttan at hava ein greiðan politikk á hesum øki.

Nevndin heldur, at tíðin er farin frá traðarbrúkinum, og at heimildin at lata traðir og jarðarstykki til leigu í veruleikanum er burturdottin. Nevndin heldur harafturat, at atlitið til tryggleika festarans og hansara ætt at sita á almennari ogn er ov tunn grunngeving fyri, at tað almenna skal eiga helmingin av føroysku jørðini.

Hugsaðu vit okkum, at tað almenna ikki var ánari av landsjørðini og skuldi ognartaka hana fyri at gerast eigari, hevði verið kravt, sbr. grundlógina, at atlitið til almennu vælferðina gjørdi eitt slíkt stig umráðandi neyðugt at taka. Bar tað til at vísa á slík atlit, kann verða spurt, hví somu atlit ikki hava verið neyðug til at taka ognarjørðina, og hví hesin parturin av føroysku jørðini framvegis er á privatum hondum. Her hava tó verið røddir frammi um, hvussu skaðilig uttanbíggjajørðin er fyri livilíkindini á fleiri smábygdum, uttan at nøkur stig at skerja privata ognarrættin hava verið tikin.

Somu sjónarmið um ognartøku av jørð á privatum hondum eiga at vera galdandi, tá tað ikki er umráðandi hjá tí almenna at sita við jørð, sum tað av onkrari søguligari tilvild er vorðið eigari av.

Eins og tað eru stórir trupulleikar at áseta endurgjøld í sambandi við ognartøku, fara tað at vísa seg stórir trupulleikar, tá tað almenna skal sleppa sær av aftur við jørðina. Men nevndin heldur, at so nógv talar ímóti almennari ogn og umsiting av so stórum parti av jørðini, at landsstýri og løgting noyðast at samtykkja lóg um sølu og í hesum sambandi royna at loysa málið út frá bestu metingum um, hvat tænir samfelagnum og samfelagsbúskapinum sum heild best.

Tey sjónarmið, ið kunnu tala fyri, at almenna jørðin framvegis skal vera almenn ogn, fara at verða umrødd niðanfyri undir „4. Privatisering av almennu jørðini; ein gongd leið?“ men nevndin heldur, at hesi sjónarmið í flestu førum kunnu fremjast, sjálvt um almenna jøðin verður seld, og at nógvir trupulleikar í fremjingini fara at vera eins stórir, hvør loysn enn verður vald.

Tí hevur nevndin skotið upp, at almenna jørðin verður latin festarum og øðrum við áhuga og førleika í jarðarbrúksvinnu til ognar.

## 4. Privatisering av almennu jørðini; ein gongd leið?

Við lógini frá 1937 varð umsitingin av almennu jørðini (statens fæstegods og prestajørðin) løgd til Føroya Jarðarráð undir yvirumsjón amtmansins og løgmáláráðsins. Við formanninum valdum av Ministaranum fyri landbúnað og fiskivinnu og tveimum limum valdum av løgtinginum vóru almennu jarðirnar og jarðargrunnurin umsitingarliga í góðum hondum.

Í 1957, tá jarðargrunnurin og kongsjørðin eru flutt til føroysk sermál, og ásett varð, at jarðargrunnurin heldur fram sum sjálveigandi grunnur til frama fyri jarðarbrúk, havabrúk v.m., verður jarðarráðið samansett av tveimum limum valdum av landsstýrinum og einum av Føroya Búnaðarfelag, og yvirumsjónin øll løgd til Føroya landsstýri, ið eisini velur formannin millum teir 3 limirnar.

Politisk og vinnupolitisk sjónarmið fingu enn størri ávirkan á jarðarráðsins umsiting av lógini og jarðargrunninum, tá samansetingin aftur varð broytt; fyrst í 1988 soleiðis, at allir tríggir limirnir vórðu valdir av løgtinginum, og formaðurin tilnevndur av landsstýrinum millum ein teirra, og síðan í 1990 soleiðis, at ráðið fekk 5 limir, harav fýra skuldu veljast av løgtinginum, meðan fimti limurin og formaður varð valdur av landsstýrinum.

Við skilnaðinum millum lóggávuvald og umsitingarvaldið, ið varð ásett við nýggju stýrisskipanarlógini verður so øll umsiting av landsjørðini og Jarðargrunninum og ábyrgdin av hesum løgd til landsstýrið við beinleiðis ábyrgd hjá einum landsstýrismanni.

Nevndin heldur, at tað fer illa at bera til hjá einum landsstýrismanni at hava undir hond umsitingina av føroysku landsjørðini, og í seinasta enda standa við rakstrinum av henni, samstundis sum hann leggur virkisgrundarlagið hjá sjálveigandi jarðargrunninum til rættis og hevur ábyrgdina av føroyska jarðarbrúkspolitikkinum og landbúnaðarvinnupolitisku karmunum yvirhøvur.

Verður almenna jørðin ikki seld, og jarðargrunnurin skipaður sum eksternur grunnur, kann ein loysn vera at privatisera almennu jørðina og jarðargrunnin. Í hesum liggur, at almenna jørðin verður skipað í ein sjálveigandi stovn ella sum alment partafelag við tí endamáli at umsita jørðina og reka hana sum vinnuligt jarðarbrúk.

Tað hevur, sum frammanfyri víst á, verið ført fram, at føroyskt jarðarbrúk hevur sera ilt við at vera lønandi. Orsøkirnar til hetta eru fleiri; veðurlagið, arbeiðsligu umstøðurnar, sølutrupulleikar, brúksstøddir o.a.m.

Ein sjálveigandi stovnur, sum óheftur av dagligum politiskum áhugamálum og krøvum frá áhugabólkum innan vinnuna hevur alla almenna jørð í hondum, kann skipa hana og raksturin av henni eftir teimum møguleikum, sum jarðarviðurskiftini á staðnum eru og kunnu mennast til.

Mjólkarframleiðsla kann verða løgd hagar slík framleiðsla best kann verða framd og fingin til marknað, epla- og onnur grønmetisframleiðsla hagar, líkindini eru frægast at fáa hana at eydnast, og seyðahald og hald av øðrum dýrum og fenaði hagar, líkindini ikki eru fyri aðrari lønandi framleiðslu.

Sjálveigandi stovnurin kann gera ymiskligar avtalur við leigarar ella brúkarar av almennu jørðini alt eftir, hvussu hon skal verða nýtt.

Rættiliga bindandi avtalur millum báðar partar fyri mjólkarframleiðslubrúkum og minni bindandi fyri onnur brúk. Bindingarnar kunnu umfata brúksstøddir, uppsagnarfreistir, búskyldu, framleiðslumál, møguleikar fyri hjávinnu, røkt av lendi og velting upp úr nýggjum o.a.m., og sjálveigandi stovnurin kann hava eftirlit við, at sáttmálin partanna millum verður hildin og siga sáttmála upp. Stovnurin kann sostatt við leigu av jørðini á smábygdum lata jørðina verða nýtta av fleiri av teimum búføstu á staðnum, heldur enn samlað til ein, um hetta gevur størri avkast til grunnin ella betur tryggjar virðið á jørðini.

Stovnurin kann áleggja brúkara skyldu til at røkja og leggja hagagøtur, so áhugað trygt kunnu ganga í føroysku náttúruni uttan at órógva haga- ella bjargafugl og vinnuligu nýtsluna av jørðini, og skyldu til at røkja áir og vøtn, so áhugað kunnu koma til hesi og fiska síl og laks.

Jarðargrunnurin kann verða avtikin og fæ grunsins lagt til stovnin sum eginogn, sum stovnurin hevur skyldu til at nøra um eitt nú við, at almenna jørðin og tann ognarjørð, sum stovnurin keypir upp, støðugt kastar meira av sær og fær størri virði.

Ein slíkur stovnur gerst samstundis eigari av Mjólkarvirki Búnaðarmanna og teimum ognum og tí virksemi, sum Meginfelag Búnaðarmanna stendur fyri, og hann kann betur tryggja sær, at framleiðslan av almennu jørðini verður seld, eitt nú við enn dyggari at taka upp innflutning av landbúnaðarvørum og vørum til nýtslu í føroyska landbúnaðinum. Herumframt kann stovnurin skipa fyri djóralæknatænastu, royndum innan jarðarbrúk o.s.fr.

## 5. Jarðarfyrisitingin

Frammanfyri er víst á, at jarðarfyrisitingin í Føroyum at kalla er óbroytt síðan lógina í 1937 Om Jordbrugets Fremme. Eitt jarðarráð var valt at umsita lógina og jarðargrunnin, og við lógini í 1988 um landsjørð er lutur jarðarráðsins í stórum ikki broyttur.

Lógin frá 1937 hevði til endamáls at gera umsitingarligu mannagongdirnar smidligari, enn tær høvdu verið frammanundan. Settar vórðu 10 landbúnaðarnevndir runt landið, ið høvdu sum uppgávu at ráðgeva Jarðarráðnum og taka støðu í smærri málum. Landbúnaðarnevndirnar tryggjaðu, at avgerðir vórðu grundaðar í kunnleika og viðurskiftum á staðnum, og nevndirnar skuldu eisini sjálvar taka upp viðurskifti, ið tær mettu kundu bøta um jarðarbrúksviðurskiftini á staðnum.

Tey fyrstu mongu árini eftir 1937 virkaðu landbúnaðarnevndirnar eftir ætlan, men við løgtingslóg nr. 28 frá 24. apríl 1957 verða tær avtiknar og í staðin fær Jarðarráðið heimild til fyri Jarðargrunsins rokning at seta álitismenn runt landið. Hesir virka fram til áttatiárini,

tá teir verða avtiknir í sambandi við nýggju lógina um landsjørð.

Lov om Jordbrugets Fremme var fyrst og fremst ein effektivisering av umsitingini av viðurskiftum, sum høvdu mist sín samfelagsliga áhuga, longu tá lógin kom. Útstykking av almennari jørð til veltingar og til at stuðla uppihaldi hjá føroyingum við aðrari hálvársvinnu var longu í 1937 ein farin tíð, tó søla av leigutraðum fór fram eina góða tíð eftir hetta.

Men lógin hevði framvegis sum grundsjónarmið at savna jørð í størri brúkseindir og at lata jørð til vinnulig jarðarbrúksendamál. Undir krígnum og í árunum, tá landbúnaðarnevndirnar enn virkaðu, vórðu heimildirnar hjá Jarðargrunninum at keypa ognarjørð, ið fekst til keyps, til at skipa hóskiligari brúkseindir og til at lata ognarleysum til dyrkingar nýttar á størru plássunum. Heimildirnar síggjast ikki rættiliga nógv nýttar á teimum oyggjum og í teimum bygdum, har uttanbíggjajørð kendist sum ein trupulleiki, men aðalhugsanin tykist tó hava verið frammi hesi fyrstu árini. Somuleiðis sæst, at landbúnaðarjørð í størri eindum enn vanligu 1 – 2 kúfóður hevur verið seld í hesum árum.

Láns- og stuðulsheimildirnar, ið vóru givnar í upprunaligu lógini, snúðu seg fyrst og fremst um lán til traðarbrúk, tó eisini møguleikin at veita lán til at velta upp úr nýggjum og til nýggjar bygningar á festigørðum er til steðar. Tað er ikki fyrr enn við løgtingslóg nr. 24 frá 25. apríl 1960, at loyvt verður Jarðargrunninum at veita lán til høsnarhald, mjólkasølur og meiaríir. Fyrireikingin til hesa lóg var stutt, og tørvurin fyri hesari lógarbroyting sæst ikki væl lýstur í løgtingsviðgerðini. At so er, sæst skilliga í lóg nr. 23 frá 25. apríl 1960, ið varð uppskotin og samtykt í sama viðfangi. Her verður heimilað Jarðarráðnum jarðargrunsins vegna at læna upp í kr. 200.000,00 um árið í 5 ár at nýta til útlán eftir reglunum í lóg um landbúnaðarins frama. Í lóg nr. 24 verður orðingin í § 41 í Lov om Jordbrugets Fremme, „Uden samtykke af Ministeren for landbrug og fiskeri efter forhandling med finansministeren kan der ikke i et enkelt kalenderår udbetales et større samlet beløb i lån end 70.000 kr“, broytt soleiðis, at orðini „efter forhandling med finansministeren“ skulu ganga út. Men ongin tykist varnast ta andsøgn, sum er í lániheimildini í lóg nr. 23 og innihaldið í lóg nr. 24.

Nevndin heldur, at nevndu lógir eru eitt av fleiri dømum um, at vit ikki hava havt ein landbúnaðarpolitikk í Føroyum alla hesa tíð síðan Lov om Jordbrugets Fremme kom í gildi. Tað verður ikki umrøtt í málsviðgerðini, um hesar lánsheimildir eru ætlaðar í lógini og fyri virki Jarðargrunsins. Nevndin heldur, at hetta ikki eyðsýnt hevur verið ætlað í upprunaligu lógini, tí í roynd og veru hevur nýtslan av hesum lógum verið at seta virksemi á stovn, ið, tá samanum kemur, tað almenna eigur. Heldur ikki við næstu broyting av lánsheimildunum,

nevniliga í lóg nr. 63 frá 23. mai 1986, har heimild verður givin at veita lán til „Samtøkur búnaðarmanna til íløgur í sláturvirki og fóðurvirki. Heimildin fevnir ikki um rakstrarlán“, verða landbúnaðarpolitisk viðurskifti umrødd, tó henda lóg fekk nógva umrøðu í sambandi við møguliga kapping við privatar fyritøkur.

Lógargrundarlagið hevur ikki verið endurskoðað og broytt. Bert eru smávegis broytingar gjørdar, tá onkur beinleiðis tørvur hevur tykst á tí, sbr. fyrrnevndu lógir. At lógin framvegis hevur ásetingar, sum ikki kunnu verða hildnar, t.d. „Gebyret for sådan protokollation er 2 kr.“(§29,3.petti), „Driftslån må i almindelighed ikke overstige 500 kr.“(§46, 3.petti), og „bortset fra præmiering ikke være ejer af mere end værdier til et beløb af 15.000 kr. og ikke have en årlig indtægt over 3.000 kr.“(§53, 1.petti, e)), heldur nevndin vera týðuligt prógv um sítt páhald.

Nevndin tekur hesi viðurskifti fram, tí tað tykist vera ein afturvendandi andsøgn millum tað, sum lógin um Jordbrugets Fremme leggur upp til og politisku áhugamálini í tinginum. Talað verður m.a. nógv um trupulleikarnar við uttanbíggjajørðini, men amboðini í lógini at fáa keypt upp uttanbíggjajørðina verða lítið nýtt í fimti- og sekstiárunum og í 1988 verða tey so heilt tikin av.

Longu í 1937 sýnist tað greitt, at politiski áhugin fyri landbúnaðarpolitikki ikki er til staðar. Í uppskotinum til lógina varð víst á, at „Efter sædvanlige regler for offentlig administration må landbrugsrådet betragtes som en statsinstitution, hvorfor udgifterne ved rådets administration bør udredes af statskassen, medens landbrugsudvalgene må betragtes som amtskommunale institutioner, hvis administrationsudgifter naturligst udredes af Amtsrepartitionsfonden. Udgifterne ved de sagkyndiges arbejde er derimod sagsomkostninger, der bør udredes af Jordfonden.“ Undir viðgerðini varð hetta tó broytt til, at Jarðargrunnurin skuldi bera allar útreiðslur, helst tí at hann ikki bara kundi taka á seg at bera útreiðslurnar av virkinum hjá landbúnaðarnevndunum.

Samanumtikið heldur nevndin, at við ógreiðum ella rættari ongum samanhangandi landbúnaðarpolitikki hevur føroyska jarðarfyrisitingin higartil virkað. Tað ber ikki til at meta um hennara góðsku, tí einki er at meta hana út frá. Tá tað snýr seg um at umsita teir mongu studningarnar, ið myndugleikarnir tíð um aðra hava samtykt, hevur hon virkað væl, og tá hon hevur umsitið láníheimildirnar, ið góvust í sekstiárunum, og sum kravdu munandi íleggingar í fjós og nýggjum graslendi, hevur hon ikki virkað verri enn aðrir almennir stovnar í áttati-árunum.

Umsitingarliga eru umstøðurnar til staðar og eiga at verða varðveittar í einari nýggjari landbúnaðarpolitiskari skipan, men fyrisitingarliga mugu viðurskiftini, í hvussu so er, verða broytt. Sum longu

nevnt krevur nýggi bygnaðurin í almennu umsitingini, at landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum ikki samstundis situr við fyrisitingini av helvtini av føroysku landbúnaðarjørðini, veitir studningar av løgtingsfíggjarlógini til rakstur av hesari jørð og veitir rakstri og íløgum hjá hesi jørð studning og lán úr Jarðargrunni.

## C. Ognarjørðin

Ognarjørðin er í dag so smábýtt, at bert tær fæstu av eindunum hava meirvirðisgjaldsskyldu, v.ø.o. liggur sølan frá teimum undir 20.000 kr. Tær mugu tí gjalda og sjálvar bera meirvirðisgjald á vørum, ið skulu verða nýttar í rakstrinum.

Ognarjørðin verður í dag seld til so høgar prísir, at tað avkast, ið jørðin gevur í árligum rakstri, á ongan hátt kann geva eina sámuliga renting av íløguni. Siga vit, at ein gyllin kann verða keypt fyri 30.000 kr., og at hon í besta føri netto kann geva ognarmanninum eitt krov, ið hann annars kundi keypt fyri 750 kr., er árliga rentan av íløguni 2,5 %.

Sum nevnt frammanfyri er øll jørðin í 34 % av høgunum í Føroyum ognarjørð, og í 20 % av høgunum er jørðin ognarjørð og landsjørð. Í fyrru høgunum verður sum nevnt ikki roknað, at jarðarbrúk verður rikið á marknaðarbúskaparligum treytum, t.e. vinnuliga. Men hagarnir verða kanska eins væl røktir, sum teir hjá landsjørðini yvirhøvur verða.

Nevndin heldur, at nógvar av teimum reglum og lógarásetingum í hagastevnulóg, lóg um girðing og friðing av lendi o.s.fr., sum nevndin annars fer at skjóta upp avtiknar, frameftir eiga at vera í gildi fyri ognarjørðina og fyri teir hagar, har bæði ognarjørð og landsjørð eru. Tá og um tørvur verður á at broyta hesar og aðrar lógir, tí at ognarjørðin í roynd og veru fellur burtur ella verður samanløgd til vinnuligt jarðarbrúk, kunnu hesar lógir verða tiknar upp aftur til viðgerðar.

Serligur trupulleiki við ognarjørðini er, umframt at hon er smábýtt, at ein stórur partur av ognarmonnunum býr ikki á oynni ella í bygdini, sum ognarjørðin er partur av. Samanlagt fyri útoyggjarnar er samlaða skinnatalið 104.600. Av hesum eru 46.495 skinn kongsjørð, og av eftirverandi ognarskinnunum, býr eigarmaður av íalt 29.838 skinnum á oynni, meðan 28.267 skinn eru á hondum hjá eigarmonnum, ið ikki búgva á staðnum.

Sama lutfall, ella kanska verri, er í ognarjørðsbygdum á størri oyggj ella oyggj, har koyrandi er til frá aðrari. Betraðu samferðslumøguleikarnir við vegum í kalla hvørja bygd gera kanska, at spurningurin um avbygdajørð er ikki so frammarliga í almenna kjakinum í dag, sum hann var fyri 50 árum síðan. Men nevndin heldur, at skal vinnuligt

jarðarbrúk fáast av ognarjørðini, verður neyðugt at loysa spurningin um avbygdajørðina, uttan at heimafólkið skal hava fyri neyðini at keypa jørðina fyri teir prísir, ið henda jørð í dag kann seljast fyri millum serligar „liebhavarar“.

Men hetta krevur aftur slíkt lønsemi í vinnuliga jarðarbrúkinum, at tað fær eginogn at keypa fyri.

Í uppskotinum frá nevndini um nýggja løgtingslóg um landsjørð verður landbúnaðarskylda áløgd landsjørðini. Til landbúnaðarskylduna hoyrir góð røkt, sum m.a. er:

Innangarðs

- at bøur verður røktur og grøðin fingin til høldar
- at bøur, sum verður nýttur til beiti, ikki verður upptraðkaður av ov nógvum kríatúrum
- at veitir verða hildnar reinar
- at skaðar, sum kann standast av amboðum, verður afturbøttur
- at bøurin verður taðaður og hildin viðlíka, so hann ikki fer í forna

Uttangarðs

- at skipanin í haganum er hóskilig
- at bit og traðk í haganum ikki verður so stórt, at tað hevur við sær slit og moldrok
- at hagin verður skorin upp fyri at halda hann turran
- at ferðsla við amboðum og akførum ikki skaðar hagan og órógvar fenað og heiðafugl

Nevndin heldur, at tað fyri nógvar bygdir hevði verið ein stórur fyrimunur, um ognarjørðin í bygdini fekk líka framleiðsluskyldu, í hvussu so er innangarðs. Ognarmaður, ið ikki fær røkt sína skyldu, skal fáa álagt at gera sáttmála, sum ikki kann vera stytri enn 5 ár, við fólk í bygdini um røkt av jørð síni sbrt. treytunum um landbúnaðarskyldu. Við slíkari áseting kunnu bygdarfólk fáa alla grøðina av bønum.

# D. Fíggjarviðurskifti landbúnaðarins

## 1. Tjóðbúskaparligt ummæli av studnings-, láns- og tollskipanini í dag

### *a. Hugleiðingar um búskaparviðurskifti í landbúnaðinum*

Niðanfyri fara nakrar hugleiðingar at verða gjørdar um búskaparligan setningin í landbúnaðarpolitikkinum og um búskaparviðurskiftini í samband við landbúnaðarvinnuna.

Fyrst ein samanumtøka av tí sum verður umrøtt á teimum komandi síðunum:

Setningur verður orðaður, sum sigur at landbúnaðarpolitikkurin sum best skal fremja almennu vælferðina í landinum.

Almenna vælferðin væntast at veksa við veksandi realari inntøku. Tí eigur landbúnaðarpolitikkurin at verða lagdur til rættis soleiðis at hann, undir ávísum treytum, gevur grundarlag fyri størst møguligu realu inntøkuni.

Marknaðarbúskaparlig skipan, við so fáum reguleringum sum gjørligt, verður roknað fyri at vera tann skipanin sum skapar grundarlag fyri størstu realu virðisøkingini, hetta partvís tí at skipanin er so liðilig og partvís tí at „insitamentsstruktururin“ er rættur undir slíkari skipan.

Tó verður, vísandi til almennu vælferðina, talað fyri at skipanin í størst møguligan mun skal virka við atliti at demokratiskum rættindum og rættvísiskensluni í samfelagnum.

Hugleiðingar verða gjørdar um støðuna hjá landbúnaðarvinnuni í millumtjóða arbeiðsbýtinum.

Víst verður á politiski trupuleikan, sum stendst av at viga vælferðina hjá brúkarunum av at fáa stuðlaðar útlendskar landbúnaðarvørur upp ímóti virkismøguleikunum í innlendsku landbúnaðarvinnuni.

Í seinna parti verða ognarviðurskiftini í landbúnaðinum umrødd. Møguleikarnir hjá landinum fyri at ávirka býtið av ognarjørðini eru avmarkaðir, tí er ikki nógv røtt um hana í hesum sambandi.

Tá talan er um landsjørðina verða tríggir møguleikar nevndir:

at hildið verður fast um verandi skipan,
at fingin verður í lag skipan við útleigan av jørðini undir marknaðartreytum
at landið selur jørðina

Nevndir verða fyrimunir og vansar við øllum trimum skipanum. Tó verður talað fyri at skipan við útleigan undir marknaðartreytum er tann skipanin sum best tænir endamálinum við landbúnaðarpolitikkinum.

Búskaparligur setningur

*Landbúnaðarpolitikkurin eigur at verða lagdur til rættis soleiðis, at hann í størst møguligan mun fremur almennu vælferðina í landinum.*

Í búskaparfrøðini ber til ástøðiliga at arbeiða við einum hugtaki sum „vælferð“. Tó er eyðsýnt, at tað ikki er lætt at seta tøl á ella máta støddina av slíkum so lítið ítøkiligum hugtaki.

Í politiskum og búskaparteoretiskum samanhangi verður ofta tikið sum givið, at vælferðin veksur við veksandi materiellum livistøði, t.e. veksur við møguleikanum fyri nýtslu av vørum og tænastum. Nýtslumøguleikarnir eru beinleiðis knýttir at inntøkuni, og verður samlaða reala inntøkan tískil ofta roknað sum eitt mát fyri almennu vælferðina.

Fleiri orsøkir kunnu nevnast til, at hetta ikki altíð er rætt.

Millum annað kann nevnast, at inntøkan, sum hon er gjørd upp tjóðarroknskaparliga, kann veksa sjálvt um náttúruvirði, í vælferðarhøpi meira verd enn inntøkuvøksturin, kunnu fara fyri skeyti.

Ein inntøkuvøkstur kann á sama hátt vera ov dýrt keyptur við heilsuni hjá fólki, ið arbeiður í vinnuni.

Inntøkuvøkstur kann vera so vorðin, at hann avlagar inntøkubýtið meira, enn ynskiligt er.

Fleiri onnur dømi kundu verið nevnd um fyrivarni við at nýta inntøkuna sum mát fyri vælferð.

Fyrimunurin við at nýta inntøkuna sum vælferðarmát er tó, at tað gerst møguligt at seta tøl á og at sammeta viðurskiftini í landbúnaðinum við t.d. viðurskiftini í øðrum vinnugreinum ella viðurskiftini í samfelagnum sum heild.

Ein, eitt sindur avlagað, umorðing av búskaparliga setninginum kundi sostatt verið:

Landbúnaðarpolitikkurin eigur at verða lagdur til rættis soleiðis, at hann undir umhvørvisligum, heilsuligum, veterinerum,djóraetiskum o.ø. umhugsni og samstundis við atliti at demokratiskum og fíggjarligum rættindum hjá øllum borgarum, skapar umstøður fyri størst møguligari innlendskari realari inntøku.

Hendan orðingin av setninginum, at endamálið við búskaparpolitikkinum er tað snævurt politisktbúskaparliga at fáa inntøkuna so stóra sum gjørligt, undir ávísum treytum, er kanska tann, sum líkist mest tí, sum flestir politikarar og búskaparfrøðingar tykjast brúka sum mát fyri, um búskaparpolitikkurin er meira ella minni væleydnaður.

Um hesin setningur so sigur tað sama, sum tann upprunaliga orðaði setningurin omanfyri, er ein annar spurningur. Til dømis ber tað teoretiskt væl til at hugsa sær, at almenna vælferðin vaks av at arbeiðsvikan varð stytt, hetta sjálvt um inntøkan minkaði.

Tó er tað við hesari, sum við hinum nevndu treytunum, at tær

koma í sum úrslit av virðum/kenslum, sum laga seg við tíðini. Longdin á arbeiðsvikuni sum úrslit av samráðingum á arbeiðsmarknaðinum, onkur treyt sum úrslit av broytingum í almenna etiska og moralska støðinum í samfelagnum og aftur onkur onnur treyt lagar seg orsakað av broytingum í demokratiska medvitinum.

Tað ber tó til at vænta, at um samlaða inntøkan veksur, og øll tey viðurskifti, sum treytir eru lagdar á í búskaparliga setninginum eru órørd, tá er inntøkuvøksturin at rokna sum ein vælferðarvinningur. So, um so er, at hesi viðurskifti onkursvegna vera roknaði, sum útifrá givin, tá er meiningin í teimum báðum orðingunum av búskaparliga setninginum kanska ikki so ólík kortini.

Um seinnu orðingina ber til at siga, at setningurin er býttur upp í tann reint búskaparpolitiska setningin, at gera samlaðu realu inntøkuna so stóra sum gjørligt, øðrumegin, og hinumegin ein part um ymisk viðurskifti sum siður, ella kanska ósiður, hevur verið ikki at gera nógv burturúr í búskaparligum umráðingum.

Hetta kemst kanska av tí, at sjálvt um flest øll eru samd um, at hesi viðurskifti hava týdning fyri almennu vælferðina, er tað at máta henda týdning ikki altíð líka lætt at hava við at gera. Tað er til dømis ikki lætt at máta hvussu vælferðin ávirkast av, at inntøkan veksur og inntøkubýtið samstundis verður ávirkað skeiva vegin. Ella at meta um týdningin fyri vælferðina av einum inntøkuvøkstri, sum hevur við sær, at virðið á onkrum tilfeingi minkar.

Tað kann eisini vera ósemja um, hvat ið meinast við demokratisk og fíggjarlig rættindi hjá borgarunum, og hvønn týdning hesi rættindi eiga at hava, tá tey skulu vigast upp ímóti setninginum um størst møguligu inntøkuna.

## Um marknaðarbúskap

Ikki óvanlig hugsan millum búskaparfrøðingar er, at størsta virðisøkingin fæst undir eini skipan, har vinnan virkar undir marknaðartreytum.

Ein orsøk til hetta verður ofta mett at verða tann, at støðuga tillagingin til ein altíð skiftandi eftirspurning skjótast og bíligast fer fram undir slíkum treytum.

Í stuttum ber til at siga, at hetta helst fyrst og fremst kemur av, at tað sum á fakmálinum eitur „insitamentsstrukturin“ er rættur. Tað er innbygt í skipanina, at tað loysir seg hjá hvørjum einstøkum at sleppa sær uppí ta vinnuna, har sum avkastið av tí framleiðslufaktorinum, hann ræður yvir, er størstur. Tað er ein spurningur um lív ella deyð hjá tí einstaka virkinum støðugt at menna framleiddu vøruna, so hon svarar til krøvini hjá brúkarunum og samstundis at halda kostnaðinum niðri so at vøran klárar seg í kappingini við líknandi vørur.

Eitt av teimum evnunum, sum hava livað longst í búskaparligu teori-

søguni, er júst hugleiðingar um eitt slag av „hægri vísdómi“, sum er innbygdur í marknaðarbúskaparligu skipanina. Hesin umfatar ikki bara, at hvør einstakur, við at røkja síni egnu økonomisku áhugamál, kemur at fremja tað, sum tænir samfelagnum best. Men eisini at aðrir framleiðslufaktorar, jørð og framleiðslugøgn, av tí, at teir, sum eiga hesi, royna at fáa best møguliga avkasti, koma at virka í teimum vinnum, sum tænir áhugamálunum hjá brúkarunum best.

Ein eginleiki við marknaðarskipanini, sum nógv hevur verið gjørt burturúr, er, at tillutingingin av tilfeinginum, tað sera innviklaða pusli-spælið, sum er at seta teir ymsu framleiðslufaktorarnar til í rætt mát at virka í teimum ymsu vinnunum, leggur seg sjálvt. Hetta hendir í teoriini skjótt og liðiliga, tí at hvør einstakur er eggjaður til at syrgja fyri, at teir faktorarnir, hann ræður yvir, kasta sum mest av sær. Av tí at hvør einstakur sjálvur ræður fyri í hvønn mun hann luttekur í framleiðsluni, so fer tillutingin eisini fram við virðing fyri ynskunum hjá tí einstaka.

Verður teoriin um, at tillutingin av tilfeinginum skjótast og laga-ligast fer fram undir marknaðarskipanini góðtikin, so er ein niður-støða nærliggjandi, sum sigur, at teir prísir á vørum og tænastum, sum komið verður fram til, eru teir „røttu“ prísirnir undir teimum givnu umstøðunum. Tað er, rættir soleiðis, at teir annaðhvørt eru teir lægst hugsandi prísirnir, ella um teir ymsu marknaðarnir eru í onkrum slagi av ólíkavekt, so eru teir so passaliga av leið at teir hava við sær at yvirskots-/undirskotskapasitetur í vinnuni verður lagaður vekk.

Samstundis kann lønin til framleiðslufaktorarnar eftir somu kriter-ium sigast at vera røtt.

Í búskaparteoriini finnast eisini nógvar umrøður av „eksternalitet-um“ í markaðarskipanini, umstøður sum gera, at skipanin ikki er full-komin í øllum førum. Tað kann snúgva seg um viðurskifti, sum vit hava nortið við í orðingini av búskaparliga setninginum, Til dømis er onki í marknaðarskipanini, sum fær ein framleiðara, sum dálkar um-hvørvið, at merkja økonomiskar avleiðingar av síni framferð. Markn-aðarskipanin gevur ikki altíð – um prísirnar – signalir, sum eggja til røttu atferðina, tá ið tað snýr seg um umhvørvislig, heilsulig ella onn-ur viðurskifti nevnd í orðingini av búskaparliga setninginum. Tað ber við øðrum orðum til at siga, at tað í slíkum førum er soleiðis, at teir prísirnir, sum markaðurin kemur fram til, ikki altíð vísa heilt „sanna“ kostnaðin kortini.

Harafturat kunnu monopolstøður ella monopollíknandi støður taka seg upp av ymsum orsøkum. Til dømis kunnu kostnaðarviðurskiftini vera soleiðis, at stórdriftsfyrimunur er í onkrari vinnu, soleiðis at størri virki klára at framleiða vørur til ein lægri eindarprís enn tey smærru. Hetta kann hava við sær, at tað við tíðini bert verða fá ella bert eitt virki eftir í viðkomandi vinnu.

Sum mótatgerð ímóti hesum er vanligt við umsitingarligum tiltøk-

um. Kappingarlógir og monopollógir av ymsum slag eru til fyri at bøta um slíkar óynsktar avleiðingar av marknaðarskipanini.

Tað er vert at hava í huga, at marknaðarskipanin ikki í sær sjálvari syrgir fyri øðrum, enn at ynski brúkaranna í stóran mun verða fylgd. Skipanin hevur ikki í sær sjálvari annan moral innbygdan enn tann, sum keypararnir og seljararnir hava. Spyr brúkarin eftir vørum, ið kanska heilsuliga eru til ógagns fyri hann sjálvan, so fær hann tær vørurnar eins væl og aðrar, hann er førur fyri at gjalda fyri. Er eftirspurningur eftir tænastum av brotsligum slag, er onki í marknaðarskipanini sjálvari, ið forðar, at slík tænasta verður veitt.

Um brúkararnir hinvegin eiga okkurt slag av djóraetiskum medviti, soleiðis at teir til dømis bert vilja keypa egg frá eggjaframleiðarum ella mjólk frá bóndum, sum eftir teirra fatan fara væl við kríatúrunum, so kann hetta – um markaðarskipanina – fáa stóra ávirkan á, hvussu dýrini verða viðfarin.

## Um marknaðarbúskap og demokratisk rættindi

Undir øllum umstøðum ber til at siga at marknaðarskipanin er ein sera liðilig skipan. Gjøgnum støðuga kapping á marknaðum fyri øll sløg av framleiðslufaktorum: marknaðum fyri øll sløg av arbeiðsmegi, marknaðum fyri realkapitali og marknaðum fyri framleiðslujørð, verður arbeiðsbýtið í landinum alla tíðina lagað til skiftandi umstøður.

Henda støðuga tillagingin skal sum longu nevnt tryggja, at ynskini/eftirspurningurin hjá brúkarunum verður nøktaður í besta samsvari við tey, til eina og hvørja tíð, galdandi viðurskiftini á arbeiðsmarknaði, marknaðum fyri rá- og hjálpievnum og liðugtvørumarknaðum.

Tað mann vera lítil ósemja um, at tað er gott ,at samfelagið er ført fyri at framleiða tað sum borgararnir hava fyri neyðuni á besta og mest lagaliga hátt.

Øll munnu tó kenna til vansar við marknaðarskipanini. Arbeiðsloysi og skeivt inntøku- og ognarbýti tykjast í onkran mun at vera til í øllum londum við marknaðarbúskaparligari skipan, og kortini velja tey flestu demokratisku londini at halda fast um rættiliga fríar marknaðarskipanir. Hetta tó soleiðis at tað almenna ávirkar marknaðarbúskapin í stóran mun, partvís við onkrum slagi av aktivum almannapolitikki og partvís við at tað almenna eftirspyr vørur og tænastur til almenna nýtslu.

Tað er pláss fyri nógvum hugleiðingum og meiningum um rættvísi og moral, har sum demokratiski grundtankin um, at vælferðin hjá hvørjum einstøkum borgara hevur líka nógv at siga, møtir teoriini um býtið av góðunum undir eini marknaðarbúskaparligari skipan.

Tað er til dømis vert at hava í huga, at tá tosað verður um vælferðina hjá brúkarunum, verður ofta hugsað um brúkararnar undir einum. Í veruleikanum verða tær vørur og tænastur, sum í búskap-

arligu teoriunum veksa um vælferðina, ikki býttar javnt ímillum brúkararnar, men heldur býttar í mun til krónurnar, tann einstaki brúkarin hevur at lata, og harvið verður tann parturin av vælferðini, sum er orsakaður av vøru- og tænastunýtsluni eisini býttur ójavnt ímillum brúkararnar.

Kemur hetta, at summir brúkarar hava møguleika fyri størri nýtslu enn aðrir, av tí at teir hava havt arbeiðsinntøku, so merkir hetta í teoriini bert, at teir hava fingið eina uppiborna løn fyri at økja um vælferðina hjá øðrum.

Tað rættvísi, sum er í skipanini, er sostatt ikki eitt slag av rættvísi, sum tryggjar hvørjum einstøkum borgara okkurt frammanundan givið mát av vælferð, men heldur eitt, sum tryggjar, at hvør einstakur verður løntur eftir, hvussu nógv og hvussu hegniga hann hevur arbeitt fyri áhugamálini hjá teimum røttu brúkarunum.

Henda skipanin sampakkar helst hampuliga væl við rættvísiskensluna hjá nógvum, at arbeiði er sína løn vert, og at betri gjørt arbeiði verður lønt betri enn minni væl gjørt arbeiði. Betri gjørt arbeiði skal ikki neyðturviliga skiljast soleiðis, at dygdarverk í vanligari merking verður framleitt, men heldur skiljast sum tað arbeiði, sum best tænir eftirspurninginum, sum han er í løtuni. Tað er helst eisini so, at um tað í eina avmarkaða tíð er so, at stórur eftirspurningur er eftir onkrum slagi av arbeiði, sum bert fá eru før fyri at gera, so verður rættvísiskenslan hjá teimum nógvu helst ikki stórvegis rørd av, at hetta arbeiði verður betri lønt enn annað.

Eitt, sum hinvegin ikki altíð verður hildið at vera líka rættvíst, er, at fólk fáa inntøku av kapitalvinningum av t.d. jørð. Tað, at onkur selur jørð, sum hann hevur havt liggjandi órørda í eitt áramál, og sum er vaksin nógv í virði orsaka av t.d. búskaparligu gongdini í samfelagnum, og harvið kanska fær nakrar ársinntøkur í vinningi, er eitt, sum tá tað kemur til rættvísiskenslu, býður teimum flestu ímóti.

Tey flestu vildu helst eisini hildið at tað var í lagi, og ikki órættvísi, at onkur hevði lága inntøku, um tað var talan um, at viðkomandi sjálvur hevði valt at klára seg á einum lágum materiellum støði, fyri í staðin at njóta so mikið meira av frítíð. Tey flestu vildu helst hildið at hetta bert var at vísa nattúrliga virðing fyri persónliga frælsinum hjá tí einstaka borgaranum.

Er harafturímóti talan um, at onkur hevur lága inntøku orsakað av óarbeiðsføri, so eru tey flestu helst samd um, at her eigur umsitingarliga/politiska skipanin í onkran mun at sleppa at taka marknaðarskipanina av ræði. Allir politiskir flokkar eru meira ella minni samdir um, at tey, sum ikki hava nakran møguleika fyri at vinna sær inntøku innan rammurnar av marknaðarskipanini, ikki heilt skulu sleppast uppá fjall.

Hvørji demokratisk og fíggjalig rættindi ber tað so til at tosa um undir marknaðarbúskaparligaru skipanini?

Skuldu øll verið eftirspurd, so vóru sjálvsagt nógv uppskot til náttúrlig demokratisk rættindi, øll áttu at havt rætt til, men tað høvdu kanska ikki verið so nógv uppskot, øll vóru samd um.

Til dømis at siga, at inntøkan skal vera javnt býtt ímillum borgararnar, ber illa til, partvís tí at nógv høvdu hildið tað verið órættvíst, um lønin ikki stóð mát við arbeiðið, og partvís tí at møguleikin at betra sær lønina helst er tann fremsta drívmegin í allari marknaðarskipanini.

Tvær treytir kundu tó kanska verið nevndar sum viðvíktu demokratisku rættindum hjá øllum borgarum, og sum tey flestu helst vóru samd um:

Fyrst, at skipanin virkaði soleiðis, at tað almenna gav hvørjum einstøkum líka góðan møguleika fyri at sleppa uppí vinnuna, soleiðis at skilja at tað var marknaðarmekanisman einsamøll, sum avgjørdi, hvør ið slapp at gera seg galdandi í vinnuni. Tað er, so nógv sum møguligt fingu møguleika fyri at royna seg.

Næst, at skipanin var løgd til rættis soleiðis, at tey sum arbeiddu í vinnuni fingu løn fyri sítt arbeiði, og at kapitalvinningar ikki ávirkaðu hvørki lønina ella „insitamentsstrukturin" í vinnuni annars.

Keypur ein bóndi til dømis nakað av jørð, og brúkar hana í nøkur ár, og síðani leggur frá sær, og selur hana aftur. Tá verður ein partur av vinninginum, hann hevur fingið burturúr at rokna sum løn til bóndan og ein partur at rokna sum okkurt slag av faktorinntøku til jørðina. Tað kundi tó meiri enn so hent, at bóndin hevði stóran kapitalvinning ella stórt kapitaltap í sambandi við, at hann seldi jørðina aftur.

Nærri umrøða av hvørt marknaðarbúskapurin er ein rættvís skipan ella ikki, fer tó ikki at verða gjørd her.

Tað skal bert nevnast, at flest øll eru samd um, at ein búskapur, sum virkar undir marknaðartreytum er ein sera effektivur framleiðari, og at flest allir politikarar her á landi ganga inn fyri onkrum slagi av marknaðarbúskaparligari skipan.

Tískil verður útgangsstøðið fyri teimum komandi hugleiðingunum og metingunum at landbúnaðurin eigur at virka undir marknaðartreytum.

### Luturin hjá landbúnaðarvinnuni í millumtjóða arbeiðsbýti

Eitt úrslit av samlaðu tillutingini av tilfeinginum undir marknaðarskipanini er, at framleiðslan hjá landbúnaðarvinnuni finnur eina legu, og at vinnan finnur eina stødd sum úrslit av kappingini við aðrar vinnur í landinum.

Hetta at tillutingin av tilfeinginum, í búskaparfrøðiligum teorium, best fer fram undir skipanum við fríari kapping er, í okkara parti av heiminum, vanliga viðurkent at vera galdandi bæði í tí einstaka landinum og í búskaparliga samskiftinum ímillum lond.

Undirstøðið undir altjóða handilsavtalum sum GATT, og nú WTO, hevur í stóran mun verið júst tað at vøruframleiðslan undir fríhandli væntast at verða løgd har, sum hon bíligast og best kann fara fram. Eitt millumtjóða arbeiðsbýti undir slíkum treytum skuldi eftir hesum verið til frama fyri brúkararnar í øllum londum.

Støðan í dag er, tá talan er um landbúnaðarvørur, at stórur partur av nýtsluni er útlendskt framleiddar vørur, og størsti parturin av hesum kemur úr londum, sum geva stóran stuðul til sína landbúnaðarvinnu.

Tað er ivaleyst, at hesar útlendsku stuðlaðu vørurnar hava tikið marknaðarpartar frá innlendsku landbúnaðarvinnuni, og harvið havt við sær, at landbúnaðarvinnan arbeiðir á einum lægri støði enn hon hevði, vóru studningarnir ikki til.

Tað hevði tí verið nærliggjandi at sagt, at skulu marknaðartreytirnar vera galdandi í innlendsku framleiðsluni, má landbúnaðarvinnan, eisini í kappingini við útlendskar framleiðarar, sleppa at virka undir treytum, so hon kappingarliga hvørki er verri ella betri fyri enn útlendska landbúnaðarvinnan.

Verður ein sovorðin skipan fingin í lag, ber til at siga, at landbúnaðarvinnan framleiðir á einum støði, sum hon náttúrliga eigur í einum millumtjóða arbeiðsbýti.

Hetta at neutralisera allar útlendskar studningar kann vera ein sera torfør uppgáva at loysa. Verður fyrst hugt eftir heimamarknaðinum, so koma tær ymsu landbúnaðarvørurnar úr ymsum londum hvørt við sínum samansettu og ofta torskildu studningsskipanum. Var talan um, at føroyskar landbúnaðarvørur vóru í kapping á heimsmarknaðinum, gjørdist myndin enn meira villingarsom, tí her eru uppaftur fleiri lond uppi í leikinum.

Miðað kundi verið ímóti, at tikið broddin av kappingaravlagingini uttaneftir við at lagt innflutningsgjøld á innfluttar vørur svarandi til tað metta studningsinnihaldið í tí einstøku vøruni.

Slík skipan hevði dýrkað útlendsku landbúnaðarvørurnar, og vildi verið at mett, sum eitt fall í realinntøkuni hjá brúkarunum, sum í dag fáa fyrimunin av tí inntøkuflytingini úr útlandinum, sum studningurin í teimum innfluttu landbúnaðarvørunum í síðsta enda kann sigast at umboða. Harvið vildi skipanin eisini verið í beinleiðis andsøgn til búskaparliga setningin.

Hinvegin ber til at siga, at tollintøkan av hesum vørum skuldi minka nakað um tørvin hjá landinum at krevja inn skattir og avgjøld, og tískil skuldu brúkararnir undir einum ikki verið nógv verri fyri enn frammanundan. Tó er tað ivaleyst, at nýtslan av útlendskum vørum hevði minka um tollur varð lagdur á, so tað hevði verið ringt at mett um tollinntøkuna av slíkum tiltaki, og í tann mun føroyskar vørur komu í staðin fyri tær útlendsku, var í øllum førum ongin tollinntøka av teimum.

Varð slíkt innflutningsgjald innført, hevði tað frá degi til annan økt um bæði søluvirðið og eitt hugsað leiguvirði á jørðini, av tí at væntaða faktorinntøkan til jørðina fór upp.

Stuðul og avgjøld á landbúnaðarvinnuna og landbúnaðarframleiðslu eru dømi um tiltøk, sum taka marknaðarskipanina av ræði. Tað almenna metur av onkrari orsøk, at marknaðarskipanin ikki fremur áhugamálini hjá tí almenna, og setur tiltøk í verk sum benda gongdini á eina meira ynskiliga leið.

Í londunum uttanum okkum verða nógv ymisk sløg av landbúnaðarstudningum givin. Oftani hava onnur enn reint búskaparlig argument fyri framleiðslufremjandi tiltøkum í teimum einstøku londunum verið førd fram.

Serliga hevur oftani verið ført fram, at landbúnaðurin hevur strategiskan týdning, at tað er neyðugt hjá einum landi at verja seg ímóti beinleiðis matvørumanguli í ófriðartíðum ella í tíðum, tá náttúran av onkrari orsøk vísur seg meira kørg enn annars.

Stuðul hevur verið givin til vinnur, sum framleiða ávísar strategiskar matvørur, soleiðis at slíkar, annars ikki rentablar vinnur, kláraðu seg. Soleiðis kann bera til, sum eitt slag av tilbúgving, at hava framleiðsluorkuna í landinum, um okkurt óvæntað skuldi borist á.

Henda grundgevingin hevur eftir førda politikkinum at døma ikki havt nógvar forsprákarar í Føroyum.

Her hevur støðan mestsum verið tann øvugta. Útlendskar stuðlaðar vørur hava fingið fría atgongd til føroyska marknaðin og hava uttan iva máað undan rentabilitetinum í føroyskari landbúnaðarvinnu soleiðis, at framleiðslan liggur á einum lægri støði, enn hon av „røttum“ átti.

Tó má sigast, at hvat mjólkini viðvíkur, er eitt slag av tilbúgvingarpolitikki førdur við beinleiðis nøgdarstuðli, soleiðis at mjólkaframleiðslan frá at vera í minna lagi, nú er komin á eitt støði, har ivaleyst er til av mjólk til tann innlendska marknaðin.

Tað almenna, politiska og umsitingarliga skipanin, kann í einum demokratiskum samfelag eisini uppfatast, sum umsitari av einum slagi av tí, sum á búskaparteoretiskum máli kundi verið kallað ein kollektiv nyttufunktión.

Áhugamálini hjá tí almenna kunnu umfata meira enn tað, at brúkaraynskini verða fylgd marknaðarbúskaparliga og at framleiðslufaktorarnir verða løntir eftir, hvussu væl teir tæna marknaðaráhugamálum.

Tí eigur tað at bera til hjá tí politisku skipanini at meta um almenna vælferðin, við framtíðini ella vælferðini hjá minni mentum í huga, kann tænast betri við ymsum tiltøkum, til dømis tiltøkum sum tryggja at tilbúgvingin er í lagi, og út frá slíkari meting taka politiska avgerð um at seta tiltøk í verk, sum kunnu ávirka marknaðin tann vegin, sum politiska ynskið er.

Tað ber til at siga, at serlig politisk ynski av slíkum slag kunnu vera góðar grundgevingar fyri almennum stuðli til ávísar partar av landbúnaðarvinnuni, men slík politiskumsitingarlig tiltøk eiga í minst møguligan mun at hindra at vinnan sleppur at virka undir marknaðarbúskaparligum treytum. Slík tiltøk eiga eisini at verða steðgað, tá ið politiska málið er rokkið.

Tað vil tó oftani vera talan um sera torførar metingar tá ið tað almenna skal velja um tað, kanska í onkrum slagi av faðirligari betrivitan, skal fremja tiltøk, sum gera, at onkrir borgarar verða betri fyri, meðan aðrir verða verri stillaðir.

Sum í hesum førinum við útlenskt stuðlaðu landbúnaðarvørunum. Eitt innflutningsavgjald á hesar vørur hevði beinleiðis minkað um realinntøkuna, kanska serliga hjá láginntøkunu-húsarhaldum og harvið hevði slíkt tiltak verið í beinleiðis andsøgn til búskaparliga setningin. Hinvegin kundi slíkt tiltak havt við sær, at inntøkuskapanin í landbúnaðarvinnuni vaks nakað, og at innlendski framleiðslukapasiteturin fekk betri møguleikar fyri at menna seg uppá sikt.

Búskaparligar hugleiðingar í samband við ognarviðurskifti

Góð helvt av landbúnaðarjørðini í Føroyum er landsjørð. Landsjørðin er í stóran mun skipað í eindum av somu støðd, sum tær vóru fyrr.

Óðalsjørðin er harafturímóti í stóran mun vorðin býtt sundur í smærri eindir við tíðini við arvi og frásølu.

Støðan í dag er tann, at tað fyrst og fremst eru festibøndirnur, ið virka sum bøndur burturav, soleiðis at skilja, at tað eru væl fleiri festibøndur enn óðalsbøndur, ið hava landbúnað sum høvuðsvinnu og hava hampuliga peningainntøku av sølu av mjólk, kjøti og øðrum.

Orsøkin til hetta er ivaleyst, at frásæð nøkrum fáum stórum óðalsgørðum eru tað bert festigarðarnir, ið eru nóg stórir til at geva grundarlag fyri eina hampuligari inntøku við teimum prísum á landbúnaðarvørum, á rá- og hjálpievnum, tí lønarlagi og, ikki at gloyma, tí studningi, sum er galdandi í dag.

Hetta at studningur er partvís í innlendsku framleiðsluni og partvís í innfluttum landbúnaðarvørum hevur nógv at siga fyri faktorinntøkuna í landbúnaðarvinnuni, tann innlendski studningurin ávirkar sjálvsagt beinleiðis inntøkuna, og studningurin í teimum innfluttu landbúnaðarvørunum trýstur prísin á vørunum innanlands niður og troðkar innlendsku framleiðsluna burtur og trýstur harvið ta innlendsku framleiðsluna niðurundir eitt støði, sum kundi verið roknað sum nattúrligt í einum millumtjóða arbeiðsbýti. Men tað er eisini væl hugsandi, at marknaðarliga tillagingin, høvdu studningarnir ikki verið, hevði havt við sær, at aðrar brúksstøddir høvdu kunna verið rentablar.

Hugleiðingar um hvussu stór jarðarbrúkini eiga at vera

Onkuntíð hevur verið nevnt, at miðað skuldi verið ímóti at samla jørðina í eindir, sum vóru passaligar brúkseindir. Soleiðis at tær góvu møguleika fyri, at eitt húski kundi klára seg á einum brúki.

Skuldi hetta verið gjørt, so var neyðugt at meta um eina hóskandi stødd av einum garði, tvs. eini stødd, sum hevði givið møguleika fyri einari hampuligari inntøku við galdandi prís-, studnings- og lønarviðuskiftum.

Tað ber til at spyrja, um tað yvirhøvur er gjørligt at áseta eina stødd á einum garði, soleiðis at inntøkan hjá einum bónda yvir longri tíð kemur at liggja á einum frammanundan fastsettum støði, t.d. á leið á hædd við eina handverkaraløn.

Útreiðslustøðið broytist meira og minni alla tíðina orsakað av prísbroytingum á ráevnum og skiftandi lønarlagi.

Inntøkan kann vera skiftandi, tí eftirspurningurin eftir framleiðsluni broytist meira og minni alla tíðina, viðhvørt kunnu ógvisligar broytingar fara fram um keypararnir t.d. fara at ivast í, um ávísar matvørur eru góðar fyri heilsuna. Feskt dømi um hetta er kreppan í bretskum landbúnaði orsakað av neytaøðini.

Hinvegin kunnu vørumennandi tiltøk oftani uppá stutta tíð ávirka inntøkuna rætta vegin. Tøkniligar broytingar koma ofta knappiliga á og kunna broyta bæði inntøkuviðurskiftini og útreiðsluviðurskiftini munandi.

Við øðrum orðum ber illa til undir eini marknaðarbúskaparligari skipan at áseta støddina av einum jarðarbrúki, soleiðis at inntøkan kemur at liggja á einum frammanundan fastløgdum støði.

Um ein festibóndi fekk eitt festi, ið tryggjaði honum í minsta lagi eina góða handverkaraløn, hevði so politiskur mótvilji tikið seg upp um inntøkan hjá bóndanum, kanska orsakað av broyting í prísviðurskiftum, vaks við einari helvt? Hvat hevði hent, um inntøkan hjá bóndanum, av onkrari líknandi orsøk, minkaði við eini helvt?

Kanska hevði tað eisini verið skeivt at miða ímóti eini brúksstødd, sum gav eina ávísa inntøku til eitt fólk. Tað er ikki óhugsandi, at tað av framleiðslutekniskum orsøkum var so, at eitt dupult so stórt jarðarbrúk var ført fyri at framleiða bíligari og harvið skapa eina inntøku, sum var yvir tað dupulta.

Tað ber soleiðis væl til at hugsa sær, at tann støddin av jarðarbrúki, sum økonomiskt var best hóskandi, kundi lønt einum hjálparfólki ella fleiri.

Tað er heldur ikki óhugsandi at einasti møguleikin fyri at okkurt slag av framleiðslu kundi farið fram, kanska tí at marknaðurin fyri viðkomandi vøru var so lítil, var, at onkur, við síðuna av einum øðrum arbeiði og kanska líka nógv av áhuga, sum fyri at vinna sær eina inntøku, vildi átikið sær eina slíka framleiðslu á einum lítlum jarðarstykki.

Hvør tann búskaparliga best hóskandi brúksstøddin er, velst um prísviðurskiftini og um tey framleiðsluteknisku viðurskiftini í tí framleiðsluni, sum ráða til eina og hvørja tíð á tí staðnum, har framleiðslan fer fram.

Tí átti tað at verið so at, um marknaðartillagingin fór liðiliga fram, so skuldi brúksstøddirnar laga seg við keypi og sølu til tær nærkaðust tí búskaparliga mest hóskandi støddini.

Hvør ein búskaparliga optimal stødd er, er sera torført at siga. Tað er ikki nógv í gongdini, sum hevur verið tey seinastu árini, sum gevur nakað eintýðugt svar uppá henda spurning. Støddin av festigørðunum lagar seg av náttúrligum orsøkum ikki. Ognarjørðin er í prinsippinum í fríum umsetningi og skuldi hon tí kunna verið uppkeypt og samlað í hóskiligar rakstareindir. Hetta er ikki hent í stóran mun, tí skuldi verið nærliggjandi, at trúð, at verandi støddir vóru hildnar at vera búskaparliga hóskandi. Hetta er tó heldur ikki givið, sum nevnt omanfyri er tað fyrst og fremst festibøndirnir, sum eru teir stóru framleiðararnir her í landinum.

Kanska er frágreiðingin heldur tann, at tað eru nógvar orsøkir, bæði av økonomiskum og øðrum slag, sum gera, at ognarmenninir ikki so fegnir selja jørðina hjá sær, og at umsetningurin av jørðini tí ikki fer líka liðiliga fram sum umsetningurin av øðrum góðum.

### Ognarviðurskiftini undir framtíðar skipan

Tað verður javnan tjakast um, hvørt tað er rætt, at landið er so stórur jarðareigari, ella um landsjørðin átti at verið á privatum hondum.

Tað hevur verið ført fram, at jørðin, hevði hon verið privatiserað, hevði verið umsitin betri í samsvari við marknaðarumstøðurnar.
Eisini hevur verið ført fram, at rætturin til at „arva“ landsjørð hjá børnum hjá festarum ikki tryggjar at jørðin er í hondunum á teimum, sum kanska høvdu fingið mest burturúr henni. Summi halda, at tað, at sleppa at umsita landsjørð, er ein frammihjárættur av slíkum slagi, sum ikki átti at fyrikomið í einum demokratiskum samfelagi.

Tríggir møguleikar fyri umsiting av landsjørðini fara at verða umrøddir her:

- verandi skipan har landið leigar jørðina út, í verandi eindum, til teir bøndurnar sum leiga jørðina í dag, og seinni til eftirkomarar teirra, fyri eina av Jarðarráðnum ásetta leigu.

- ein skipan har landið leigar jørðina út, soleiðis at tað fær sum mest inn fyri jørðina.

- ein skipan har landið sleppur sær av við landsjørðina við at selja jørðina, annaðhvørt til teir núverandi festararnar ella til hægstbjóðandi.

## Verandi skipan

Undir verandi skipan verður jørðin leigað út til festararnar til eina leigu, sum er ásett av Jarðarráðnum. Henda leigan má sigast at vera lág. Sambært roknskapinum hjá Jarðarráðnum var samlaða leiguinntøkan av allari almennu festijørðini í Føroyum 50 túsind krónur. Hetta man vera minni, enn hvat givið varð fyri at leiga haruhagar hetta sama árið.

Ivaleyst er tað eitt ynski frá almennari síðu um at skapa fortreytir fyri góðum rakstrarúrsliti, sum ger, at leigan er sett so lágt. Tað almenna hevur helst við hesum ynskt at stimbra innlendsku framleiðsluna soleiðis, at landbúnaðarvinnan skuldi hava møguleika at klára seg í kappingini við útlendska landbúnaðarvinnu. Kanska hevur tað eisini verið ein tanki, at um vinnan fekk góðar umstøður og bíliga jørð, so kundi raksturin kanska fíggja íløgur, og kundi vinnan harvið við tíðini ment seg.

Hesa tankagongd høvdu tó nógv hildið verið øvugta. Minst líka vanlig tankagongd hevði verið at hildið, at tað slagið av stuðli, sum lága leigan umboðar, ger, at vinnan kýtur seg minni, enn hon hevði gjørt, hevði hon verið undir onkrum slagi av trýsti.

Kanska eigur bíliga leigan tó ein part av æruni av, at festubøndurnir eru teir stóru framleiðararnir í landinum, sum er.

Sæð úr einum marknaðarbúskaparligum sjónarmiði er tó nógv, sum kundi verið betri í núverandi skipan. Skipanin er rættuliga stív í nógvar mátar. Umsitaraskifti fer næstan bara fram í sambandi við „arv“. Vinnan á landsjørðini er stórt sæð afturlatin fyri øll uttan tey gott og væl fýrahundrað fólkini, sum nú einaferð sita á jørðini. Støddin á teimum einstøku eindunum verður ikki lagað eftir, hvat ið er búskaparliga hóskandi, tí ongin búskaparlig eggjan er til at fremja slíka tillaging.

## Skipan við útleigan eftir marknaðartreytum

Tað er uttan iva rætt at tað onki er í verandi skipan sum tryggjar, at tey sleppa at umsita jørðina, sum kund fingið mest burturúr.

Verandi skipan samsvarar í so máta illa við búskaparliga setningin, sum er hann orðaður omanfyri.

Umstøðurnar fyri størst møguligu virðisøkingin verða skaptar, tá ið jørðin verður umsitin av teimum, ið gagnnýta jørðina, so hon búskaparliga kastar sum mest av sær.

Eftir hesum átti kanska at verið neyðugt at tikið støðu til, um landsjørðin í Føroyum eigur at vera sett av til landbúnaðarjørð, sum hon er í dag. Hevði jørðin møguliga kastað meira av sær í aðrari vinnu? Tað fer ikki at vera tikin støða til henda spurning her. Í tí komandi fer at vera roknað við, at landsjørðin er ætlað til landbúnaðarjørð burturav.

Royndirnar við ognarjørðini benda á, at tillagingin av støddini av

teimum privatu jarðarbrúkunum við keypi og sølu er heldur trek, tá havt verður í huga, at tað er minni parturin av ognarbóndunum, sum hava t.d. mjólkaframleiðslu av týdningi. Møguliga kemst hetta av, at tað hevur verið ringt við galdandi jarðarprísum at fáa landbúnaðarvirki at bera seg. Í so føri kundi hugsast, at leigan á landsjørðini er lægri, enn hon hevði verið, hevði hon verið marknaðarásett.

Hetta er tó eisini ilt at siga, tað er eisini hugsandi, at partur av landsjørðini, um hann hevði verið boðin út til leigu til hægstbjóðandi, ikki kundi fingið ta leiguna inn, sum verður kravd í dag.

Um so var, so var hetta at líkna við ein eykaskatt ella eina eykaútreiðslu, ið landið legði á bóndan. Tó skuldi man trúð, at bóndin segði frá sær festið, helt hann, at tað hann fekk burturúr at hava garðin ikki stóð mát við leiguútreiðsluna.

Hinvegin, um marknaðarásetta leigan hevði verið størri enn tann verandi leigan, ber eisini til at siga, at talan er um eitt slag av studningi til festibóndan, og tað ber til at spyrja hví landið skal eiga framleiðslufaktorar og ikki fáa ta faktorinntøkuna, sum hesir kundu fingið undir eini skipan, har leigan verður ásett undir fríari kapping.

Hvørjir fyrimunir vildi verið við at latið leiguna á festijørðini verið ásetta undir markanðartreytum?

Sum júst nevnt vildi landið fingi ta leiguinntøkuna, sum marknaðurin nú einaferð kundi givið. Við øðrum orðum hevði faktorinntøkan til landsjørðina verið marknaðarfastsett, og soleiðis verið, sæð sum úrslit av marknaðarligu tillutingini, ein „røtt“ løn til jarðareigaran.

Samstundis var faktorinntøkan til bóndan og hansara framleiðslutól eisini løgd føst fyri leiguskeiðið. Henda lønin vildi so eisini verið ein „røtt“ marknaðarløn til hesar faktorar, og tískil hevði marknaðarliga tillutingin av hesum faktorum kunna farið fram óávirkað av, at jørðin og arbeiðið bleiv lønt undir einum.

Eitt, sum tó ger, at ein skipan við marknaðarásettari leigu samsvarar væl við búskaparliga setningin, er, at hann, ið hevur hægsta boðið uppá jørðina, helst er tann sami, sum búskaparliga klárar at fáa mest burturúr, t.e. skapa størstu virðisøkingina. Annars hevði hann stutt sagt ikki ráð til at leiga jørðina.

Undir slíkari skipan vildi kappingin um jørðina ført við sær eina størri eggjan til at betra um framleiðsluháttin og at framleiða júst ta vøruna, sum marknaðurin spyr eftir.

Vinnan hevði verið meira opin fyri ungum fólki við hugi til landbúnað. Hjá fólki, har sum ongin jørð er í húsinum, sum vilja útbúgva seg í landbúnaðargreinum, hevði tað kanska verið hildið, at tað var lættari at sleppa inn í vinnuna við at leiga sær jørð enn at skula keypa ognarjørð.

Kanska kemur tann trekleiki sum sýnist at vera við keypi og sølu av privatari jørð í onkran mun av at nógv av teimum, sum eiga jørð ikki

vilja selja, tí tey meta jørðina sum eitt trygt virði og kanska í summun førum vænta tey sær ein vinning av vaksandi jarðarprísum. Hetta kann føra við sær, at jørðin ikki verður gagnnýtt í tann mun, hon kundi verið. Undir nevndu leiguskipan hevði slíkt spell ikki verið, av tí at landið átti jørðina.

Vinnan hevði í heila tikið verið meira opin fyri teimum hugskotum og tí virkishugi, sum finst í samfelagnum.

Tað hevði ikki borið til undir slíkari skipan, at lagt festibøndur undir at njóta frammihjárættindi við at festa jørðina.

Jørðin í útjaðaraøkjunum hevði helst verið nakað bíligari at leiga enn jørð á meginoyggjunum orsakað av verri flutningsmøguleikum og kanska eisini orsakað av minni kapping um jørðina. Studningsskipanir, sum hava til endamáls at javnstilla útjaðararøkini viðvíkjandi flutningstrupuleikum eins og øðrum vansum, høvdu verið óneyðugar, tí at slíkir vansar bert førdi við sær, at leigan kom at liggja í eini so mikið lægri legu.

Parturin hjá landinum hevði so verið at syrgt fyri at fingið sum mest inn fyri útleigan av jørðini, hetta við at gera útleigingarskipanina so liðiliga sum gjørligt. Tað vil siga partvís at syrgt fyri at støddin á teimum útleigaðu eindunum var býtt upp í eina passaliga samanseting av traðum og gørðum og partvís við at áseta longdina av útleigingarskeiðinum á teimum ymsu eindunum so liðiliga sum gjørligt.

Hetta kundi verið gjørt í samráðingum við komandi leigarar, og alla tíðina útfrá eini meginreglu um, at landið fekk sum mest inn í leigu sum gjørligt.

Harafturat átti skipan verið fingin í lag við onkrum slagi av endurgjaldi, um so var, at tann, sum leigar jørðina, hevur gjørt ábøtur, soleiðis at hann eftir endað skeið letur jørðina aftur í betri standi, enn hann tók við henni.

Varð avgjørt at fara yvir til slíka skipan kundi ein lagalig yvirgongd verið at avtikið „arvarættin“ á festijørðini, soleiðis at so hvørt sum festi vóru leys, komu tey undir nýggju skipanina. Samstundis kundi eisini verið skipað fyri, at festibøndur ella arvingar fingu møguleika fyri lagaliga at yvirtaka hús, sum familjan hevði serligt tilknýti til.

### Søla av landsjørðini

Ein møguleiki aftur er sjálvandi, at landið sleppur sær av við landsjørðina.

Skal landið selja jørðina, má tað vera til hægstbjóðandi.

Hetta partvís út frá einum marknaðarbúskaparligum sjónarmiði, sum sigur, at hann, sum gevur mest fyri jørðina, eisini má væntast at vera hann, sum fær mest burturúr, og partvís tí at søla av jørðini til undirprís vildi verið at givið burtur av ognum hjá skattaborgarunum, og hetta høvdu helst fáir politikarar viljað lagt rygg til.

Fyrimunir við at selja jørðina, sæð úr marknaðarbúskaparligum sjón-

armiði, í mun til verandi støðu, høvdu verið fleiri: jørðin kom í frían umsetning, og støddin av brúkunum slapp at laga seg nærri at eini búskaparliga optimalari stødd. Møguleiki var kanska fyri, at onkur, sum til dømis vildi framleiða stráfóður burturav, kundi keypt sær jørð, sum var góð til hetta endamálið. Harvið kundi jørðin verið býtt í betri samsvari við arbeiðsbýtið í vinnuni, hetta til frama fyri framleiðsluna.

Tað ber eisini til at ímynda sær, at hugurin til at gera íløgur í jørðina er størri, um tað er talan um ognarjørð.

Hinvegin, verður landsjørðin privatiserað, so er tað kanska í veruleikanum bara ein spurningur um tíð áðrenn hon fær somu lagnu sum ognarjørðin í dag. Arvur og frásøla kunnu petta jørðina sundur í stykkir ov smá til vinnuliga nýtslu. Verða garðarnir seldir í stórum eindum við klausuli um, at teir ikki kunnu býtast, so fer nakað av fyrimuninum við at privatisera jørðina. Nevniliga at jarðartilfeingið sleppur at verða umsett í marknaðarligu tillagingini, og at brúksstøddin sleppur at laga seg.

Ein annar vansi við sølu av landsjørðini er tann sami, sum sær út til at ávirka keyp og sølu av ognarjørðini. Tað er, at tær øgiligu virðisbroytingarnar, sum kunnu vera á jørð, helst eru við til at gera trekleikan í keypi og sølu av jørð so stóran.

Ein bóndi, sum ætlar sær undir jarðarbrúk og skal keypa sær jørð, verður samstundis noyddur inn í eina spekulatiónstankagongd, um hann vil ella ikki. Skal hann hava jørð, so hon gevur grundarlag fyri eini líkinda inntøku, kann kostnaðurin á jørðini verða so høgur, at tá hann selur jørðina aftur, kann ein broyting í prísinum uppá fá prosent svara til eina ársinntøku. Hetta kann sjálvandi vera bæði rætta og skeiva vegin, men hetta er kanska ein orsøk til, at nógvir keyparar eru sera varnir, tá tað kemur til jarðarkeyp.

Kanska er hetta eisini tann størsti vansin við at privatisera landsjørðina, at jørðin endar sum partur í einum spekulationsspælið har fáir, helst av góðum grundum, vága sær at gera annað enn at tvíhalda um sínar ognir.

Ein grund hjá landsmynduleikunum til at hugsa seg væl um, áðrenn stig verður tikið at privatisera landsjørðina, er, at í tí løtuni hetta er gjørt, hevur landið fyri alla framtíð slept sær av hondum eitt sera hent amboð til at ávirka framleiðsluviðurskiftini rætta vegin. Verður festijørðin seld, tá hevur landið á leið sama møguleika fyri at fremja liðiligt umsitaraskifti á tí selda jarðatilfeinginum, sum tað í dag hevur á liðiligheitina í marknaðarligu tillutingini av ognarjørðina.

Tað er, snøgt sagt, onga ávirkan.

### Inntøkuskapan í landbúnaði

Í talvu 1 finst ein varislig meting av bruttotjóðarúrtøkuni í landbúnaðarvinnuni fyri árini 1990 til 1994.

Uppí landbúnaðarvinnuna verða her roknaðar tær eindir, sum fáast við seyðahald, neytahald, velting av eplum, stráfóðurframleiðslu og tilíkt, sum í vanligari merking er landbúnaðarvirksemi.

Garðyrki er viðgjørt fyri seg niðanfyri hesa uppgerðina.

Mjólkavirkið og tøting av ymsum slag verður at rokna sum ídnaðarvirksemi og eru tískil ikki tikin við í hesi uppgerð.

Viðmerkingar til keldurnar og taltilfarið, sum liggur til grund fyri uppgerðini.

Grundarlagið undir hesi uppgerð er taltilfarið, sum finst aðrastaðni í hesum áliti, roknskapir hjá Jarðarráðnum, metingar av prísum og nøgdum, gjørdar av fólki við skili fyri landbúnaði og upplýsingum úr MVG-skránni.

Árligar seyðateljingar og eplateljingar finnast ikki fyri hetta tíðarskeiðið, tí eru nøgdartølini tey somu fyri øll árini, og bert prísbroytingarnar gera, at framleiðsluvirðini fyri epli og seyðakjøt broytast frá ári til árs.

Nøgdirnar av neyta- og svínakjøti eru roknaðar eftir givnum studningi, prísirnir eru mettir miðalprísir.

Prísurin á eplum er tann sami, sum prísurin á innfluttum eplum, nøgdin er mett út frá gomlum eplateljingum.

Gæs, egg, røtur, egin nýtsla av mjólk og øðrum er mett undir einum.

Studningar eru tiknir úr roknskapunum hjá Jarðarráðnum.

Rentustuðulin er roknaður sum munurin á tí, Jarðargrunnurin fær inn í rentu av lánum, og rentuútreiðsluna teir hava av sjálvir at læna hesar pengarnar.

Framleiðsluvirðini er uppgjørd uttan studningar, t.e. í hesum føri

Rávørunýtslan er fyrst og fremst mett útfrá MVG-skránni, sum ein samanteljing av skrásettum keypi hjá framleiðarum skrásettir undir landbúnaði.

Stráfóðurframleiðslan er ikki tikin við í framleiðsluvirðið, tí hon samstundis fer inn sum rávøra við somu upphædd. Studningurin til stráfóðurframleiðsluna er sjálvsagt við.

Tað er ikki greitt í hvønn mun íløguframleiðslan í sambandi við velting uppúr nýggjum og bygging av súrhoyggjabrunnum fer fram innan sjálva landbúnaðarvinnuna. Roknað verður við, at henda framleiðsla fyrst og fremst verður framd av eindum innan aðrar vinnur. Tí er framleiðsluvirði ikki roknað av hesum.

Tó er studningurin í sambandi við hesar íløgur nevndur niðanfyri útrokningina av bruttofaktorinntøkuni.

Framleiðsluvirðið í landbúnaðarvinnuni

Framleiðsluvirðið í marknaðarprísum liggur eftir hesi teljing ímillum 74 og 85 mió. kr.

## Talva 1: Meting av virðisøkingini í landbúnaðarvinnuni 1990-1994

| | 1990 | | 1991 | | 1992 | | 1993 | | 1994 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | kg | kr | kg | kr | kg | kr | kg | kr | kg | kr |
| Kjøtframleiðsla | | | | | | | | | | |
| av seyði | 837800 | 45.241.200 | 837800 | 45.241.200 | 837800 | 45.241.200 | 837800 | 36.192.960 | 837800 | 36.192.960 |
| av neytum | 92500 | 2.035.000 | 99948 | 2.317.794 | 109225 | 2.583.171 | 92056 | 2.058.372 | 112479 | 2.475.663 |
| studningur til neytakjøt | | 2.202.000 | | 1.266.000 | | 1.652.000 | | 1.119.000 | | 1.534.000 |
| av svíni | 121000 | 2.681.965 | 124740 | 2.628.272 | 204394 | 4.246.490 | | | | |
| studningur til svínakjøt | | 1.040.000 | | 700.000 | | 1.329.000 | | | | |
| Kjøt tilsamans | 1051300 | 49.958.165 | 1062488 | 50.187.266 | 1151419 | 52.070.861 | 929856 | 38.251.332 | 950279 | 38.668.623 |
| Avroð mett | | 2.450.000 | | 2.450.000 | | 2.450.000 | | 2.450.000 | | 2.450.000 |
| Mjólk | 5849000 | 25.139.002 | 6360000 | 26.750.160 | 6705000 | 28.643.760 | 6716000 | 29.879.484 | 6460000 | 29.393.000 |
| mjólkastudningur | | 13.448.000 | | 12.830.000 | | 11.656.000 | | 8.942.000 | | 8.622.000 |
| Eplir | 1200000 | 2.346.000 | 1200000 | 2.604.000 | 1200000 | 1.959.600 | 1200000 | 1.632.000 | 1200000 | 2.756.400 |
| Gæs.egg,røtur, eginnýtsla av mjólk oa. | | 2.000.000 | | 2.000.000 | | 2.000.000 | | 2.000.000 | | 2.000.000 |
| Framleidsluvirdi uttan vøru-studning | | 79.443.167 | | 81.541.426 | | 84.674.221 | | 71.762.816 | | 72.818.023 |
| Vørustudningar | | 16.690.000 | | 14.796.000 | | 14.637.000 | | 10.061.000 | | 10.156.000 |
| Framleidsluvirdi í marknaðar-prísum | | 62.753.167 | | 66.745.426 | | 70.037.221 | | 61.701.816 | | 62.662.023 |
| Mett søla | | 34.000.000 | | 34.000.000 | | 34.000.000 | | 34.000.000 | | 34.000.000 |
| lutfall F/R smb roknsk. | | 0,6859694 | | 0,6178903 | | 0,5880571 | | 0,5673572 | | 0,6221601 |
| Rávørunýtsla | | 23.322.963 | | 21.008.273 | | 19.993.942 | | 19.290.148 | | 21.153.444 |
| Virðisøking (BTÚ i markað-arprísum) | | 39.430.204 | | 45.737.153 | | 50.043.279 | | 42.411.668 | | 41.508.579 |
| ikki vørustudningar | | | | | | | | | | |
| Avloysingarstuðul | | | | | | | | 580.000 | | 480.000 |
| Rentustuðul | | 2.636.000 | | 1.836.000 | | 1.650.000 | | 1.471.000 | | 1.167.000 |
| Studningur til húsdjórahald | | 170.000 | | 110.000 | | 89.000 | | 80.000 | | 74.000 |
| Vørustudningar | | 16.690.000 | | 14.796.000 | | 14.637.000 | | 10.061.000 | | 10.156.000 |
| Studningur til stráfóður | | 842.000 | | 1.274.000 | | 1.284.000 | | 1.260.000 | | 1.366.000 |
| BFI | | 58.926.204 | | 62.479.153 | | 66.419.279 | | 54.603.668 | | 53.385.579 |
| Íløgustudningar | | | | | | | | | | |
| Studningur til nýdyrkingar | | 2.644.000 | | 3.313.000 | | 2.419.000 | | 1.658.000 | | 2.184.000 |
| Studningur til súrhoyggja-brunnar | | 745.000 | | 599.000 | | 318.000 | | 297.000 | | 77.000 |

Á mynd 1 sæst býtið av framleiðsluvirðinum ímillum høvuðssløgini av framleiddum vørum.

Seyðakjøtið og mjólkin eiga størsta partin av framleiðsluvirðinum. Minni parturin av framleiðsluvirðinum stavar frá framleiðslu av neytakjøti og øðrum.

Áhugavert hevði kanska verið at sæð frá hvørjum vørusløgum, virðisøkingin stavaði.

Av tí at rávørunýtslan ikki er útgreinað eftir hvørjari vøruframleiðslu, hon er knýtt til, er hetta ikki so lætt. Ein roynd at gera slíka útgreining fer tó at verða gjørd niðanfyri.

Mynd 1: Framleiðsluvirði eftir vøruslagi, uttan studningar, kr., 1994




Tað sæst, at hetta er heilt annað býti enn tað, sum framgongur av rakstrarligu roknskapunum, har inntøkan av seyði er nógv minni parturin av søluvirðinum.

Í hesi uppgerð er roknað, hvussu nógvan seyð bóndin hevur tikið til eginnýtslu, hetta framgongur ikki av vanligum rakstrarroknskapi.

Í uppgerðini av framleiðsluvirðinum hevur seyðakjøtsframleiðslan, í skeiðinum hugt verður eftir, meira at siga enn mjólkaframleiðslan. Hetta kemst sjálvandi av, at stórur partur av seyðakjøtsframleiðsluni ongantíð verður seld.

Verður hugt eftir søluvirðinum hjá landbúnaðinum, er hetta mett til at liggja um 37,9 mió. kr. Av hesum eru í 1994: 29,4 mió. kr mjólk og 2,5 mió. kr. neytakjøt. Sølan av seyðakjøti er mett til umleið 6 mió. kr. Hetta svarar til, at á leið 11000 krov vórðu seld í 1994, ella á leið sættihvør seyður.

Av hesum sæst at ein lítil helvt av roknaða framleiðsluvirðinum í marknaðarprísum ongantíð verður avroknað í peningi.

Hetta er ein orsøk til, at rakstrarroknskapir hjá bóndum ofta síggja

verri út, enn teir kanska í veruleikanum eru. Rakstrarroknskapir kunnu vísa eitt undirskot, hóast teir í eini rokning av virðisøking kundu víst eina positiva inntøkuskapan.

Hvat mjólkaframleiðsluni viðvíkur, er talan um keyp og sølu, tað vil siga, at bæði framleiðsluvirðið og rávørukeypið verða avroknaði í pengum. Øvugt er tað við seyðakjøtsframleiðsluni, har tað næstan bert er rávørukeypið, sum verður avroknað í pengum.

Seyðakjøtsframleiðslan er býtt ímillum teir einstaku bøndurnar í mun til, hvussu nógva jørð tann einstaki bóndin ræður yvir, antin sum eigari ella festari.

Á tí smábýttu ognarjørðini er tað meira ella minni nattúrligt, at seyðakjøtið verður í húsinum, og helst ber til at rokna við, at minni parturin av selda seyðinum kemur frá teimum smærri festunum og teimum smærri ognargørðunum. Ivaleyst eru tað tey stóru festini og teir stóru ognargarðarnir, sum standa fyri størsta partinum av hesi søluni, av tí at teirra framleiðsla helst er størri enn tað, teimum nýtist til eginnýtslu í húsinum.

Tann óselda framleiðslan er sjálvsagt ikki minni verd enn tann selda, hon verður framleidd og kemur til gagns sum privat nýtsla, og verður tískil roknað við í samanteljingini av framleiðsluvirði og virðisøking.

Framleiðslan av neytakjøti fyllur ikki so nógv í hesum bílætinum. Neytakjøtið kemur bæði frá oksum og mjólkineytum. Gongdin í framleiðsluni er hampuliga jøvn yvir hetta fimmára skeiðið.

Studningurin útgoldin til neytakjøt er kanska minni javnur. Í 1990 er svarar studningurin til ein stóran part av framleiðsluvirðinum, hini árini liggur hann um eina góða helvt av framleiðsluvirðinum.

Framleiðslan av svínakjøti steðgar í 1993, tá ið einasti svínabóndin í landinum gevst.

Mjólkaframleiðslan veksur støðugt fram til 1993, tá ið Mjólkavirkið sigur frá, at nú er ivaleyst av mjólk. Studningurin harafturímóti er fallandi í øllum hesum tíðarskeiðinum. Frá 1990, tá studningurin er góð helvt av framleiðsluvirðinum, til 1994, tá hann er fallin til undir ein triðing. Henda gongdin samsvarar hampuliga væl við einari spakuligari minking av studninginum so hvørt, sum hann hevur tænt sínum endamáli.

Kanska eru tað tó líka nógv fíggjarpolitiskar orsøkir til, at minni studningur er vorðin játtaður, sum ein medvitandi framleiðslureguleringing gjørd eftir galdandi framleiðsluviðurskiftum í landbúnaðarvinnuni.

Framleiðsluvirðið í marknaðarprísum svarar til samlaða marknaðin hjá landbúnaðarvinnuni. Tað er virðið, sum onnur, t.d. mjólkavirkið, handlar og húsarhald, keypa framleiðsluna hjá landbúnaðarvinnuni fyri. Sum nevnt verður stórur partur av hesi framleiðslu ongantíð beinleiðis seldur, men verður tó roknaður sum „keyptur" av landbúnaðarhúsarhaldinum sjálvum, tá ið bóndin sjálvur brúkar vøruna.

Framleiðsluvirðið í marknaðarprísum er tó ikki tað sama sum keypið hjá føroyskum húsarhaldum av føroyskari landbúnaðarframleiðslu. Á mjólkavirkinum fer meirvirking og pakking av mjólkini fram, sum leggur afturat virðinum á vøruni, Gjald fyri handilstænastu er eisini uppií prísinum á teimum vørunum, sum fara um handlarnar, áðrenn tær verða seldar til endaliga nýtslu. Hetta dýrkar aftur vøruna nakað, og ger munin á tí roknaða framleiðsluvirðinum í marknaðarprísum og tí sum endaligu brúkararnir gjalda fyri føroyskar landbúnaðarvørur størri.

Tað sæst á útflutningtølunum, at tað er millum nakað og onki av landbúnaðarframleiðsluni, sum fer av landinum, tó fer helst nakað av óskrásettum útflutningi fram, tá ið føroyingar, sum búgva uttanlands, sjálvir taka føroyskan mat við sær.

## Rávørunýtsla og virðisøking

Bruttotjóðarúrtøkan í marknaðarprísum liggur ímillum 49 og 60 mió. kr. Hetta er umleið 1 prosent av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni fyri allar vinnur í landinum.

Bruttofaktorinntøkan t.e. samlaða inntøkan til framleiðslufaktorarnar í landbúnaðarvinnuni liggur í hesum skeiðnum ímillum 64 og 78 mió. kr.

Rávørunýtslan er, sum nevnt omanfyri, mett útfrá MVG-keypinum hjá virkjum skrásettum undir vinnugreinini landbúnaði í vøruskránni hjá Hagstovuni. Tað er tó ivasamt, um allir framleiðarar av landbúnaðarvørum eru við her. Einstakir kunnu vera komnir í onkra aðra vinnugrein, av tí at teir eisini fáast við annað enn landbúnað. Onkrir hava so mikið lítla sølu, at teir ikki eru MVG-skrásettir. Tað eru helst ein hampuligur partur av teimum, sum eiga eitt sindur av jørð, sum antin onga sølu hava ella hava eina sølu, sum liggur undir teimum 20.000 kr, sum er tað mesta, ein kann selja uttan at skula vera MVG-skrásettur.

Tí er tað helst so, at ikki øll rávørunýtslan er skrásett her, sjálvt um øll framleiðslan er við.

Av tí sama er lagt upp fyri hesum í metingini av rávørunýtsluni, soleiðis at rávørunýtslan hjá teimum smærri framleiðarunum eisini er roknað við, tá nú framleiðslan hjá hesum er tald við.

Metingin av rávørunýtsluni er sjálvsagt líka avgerandi fyri rokningina av virðisøkingini, sum metingin av framleiðsluvirðinum. So óvissan í hesi meting sæst beinleiðis aftur sum óvissa í virðisøkingini.

Bruttotjóðarúrtøkan í marknaðarprísum liggur, sum nevnt, eftir hesi útrokning ímillum 49 og 60 mió. kr. Hetta er íkastið hjá landbúnaðarvinnuni í landsins samlaðu bruttotjóðarúrtøku, tá studningarnir eru hildnir uttan fyri. Munurin upp til bruttofaktorinntøkuna er studningarnir, hesir koma aðrastaðnis frá úr búskapinum. Bruttofaktorinntøkan er samlaða samsýningin til framleiðslufaktorarnar í vinnuni. Av

henni skulu lønir til arbeiðsfólk gjaldast og bruttorestinntøka. Bruttorestinntøkan fer so til at løna bóndanum fyri hansara arbeiði, at gjalda rentur og avskrivingar, gjalda festileigu og at forrenta pening, sum onnur, ella sum bóndin sjálvur, hevur sett í sítt virksemið.

Tað sæst av talvu 1, at lønarparturin, t.e. løn útgoldin til hjálparfólk, fer við einum lítlum parti av bruttofaktorinntøkuni, ímillum 1,8 og 2,7 mió kr. Verður roynt at rokna hetta um til heiltíðarstørv, ber til at meta ymiskar árslønir, men ringt er at fáa hetta til meira enn eini 20 fulltíðarstørv. Helst er tað eisini so at onkur partur av teimum sum fáa hesar lønir ikki arbeiða fulla tíð. Í 1994 vóru tað t.d. 34 fólk, sum fingu størsta a-inntøkuútgjaldið frá landbúnaðarvinnuni, t.e. høvdu bónda sum høvuðsarbeiðsgevara.

Studningsparturin av bruttofaktorinntøkuni er 28 prosent í hesi metingini í 1990 og liggur hini árini ímillum 21 og 25 prosent.

### Útgreining av búskaparviðurskiftum í neytahaldi og seyðahaldi

Tað ber væl til at býta framleiðsluna sundur í framleiðslu sum viðvíkur neytahaldi og ta sum viðvíkur seyðahaldi. Verri er við rávørunýtsluni.

Verður skeitt í roknskapirnar hjá mjólkabóndunum sæst, at verða postarnir „løn“ og „festileiga“ tiknir burturúr útreiðslusíðuni, til dømis í miðalroknskapinum í 1994, fyri at fáa rávørunýtsluna, verður rávørunýtslunan 396.633 kr., av hesum teljast „kraftfóður“ og „umsiting, fjós og tól“ saman til 235.203 kr, tað er longu størri parturin av rávørunýtsluni, sum kann knýtast til mjólkaframleiðsluna. Verða hinir rávørupostarnir hugdir ígjøgnum sæst, at teir flestu av teimum eisini meira og minni kunnu knýtast til mjólkarframleiðsluna.

Partvís av tí, at her er talan um stórar bøndur við mjólkaframleiðslu, og partvís tí at talan er um vanligar rakstrarroknskapir har seyðakjøtsframleiðslan bert sæst í tann mun, hon verður seld, ber illa til at ganga út frá, at býtið av rávørunytsluni ímillum seyða- og neytahald kann finnast í hesum roknskapum.

Verður hinvegin mett, at rávørunýtslan í sambandi við seyðahaldið fyrst og fremst er fóður, so ber til at kanna, hvussu stórur partur av samlaða fóðurinnflutninginum fer í neytahaldið, og harvið fáa eina meting av fóðurnýtsluni í seyðahaldinum. Verður, ógvuliga varisliga, mett, at kraftfóðurnýtslan er fastur partur av hvørjum lituri av mjólk, og at rávørunýtslan í seyðahaldi fyrst og fremst er kraftfóður, so ber soleiðis til, sum eitt slag av roknidømi, at býta vinnuna sundur í neytahald øðrumegin og seyðahald og annað hinumegin. Sjálvsagt er tað so, at har sum bæði seyðahald og neytahald eru á sama garði, stuðla hesi virksemi hvørt annað í onkran mun, t.d. um partur av kapitalapparatinum kann brúkast í báðum sløgum av framleiðslu. Tí er tað heldur ikki uttan fyrivarni, at slík sundurgreining verður gjørd.

Talva 1a: Meting av virðisøking í seyðahaldi og øðrum, 1000 kr.

| Framleiðsla | 1990 | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 |
|---|---|---|---|---|---|
| Seyðakjøt | 45.241 | 45.241 | 45.241 | 36.193 | 36.193 |
| Svínakjøt | 2.682 | 2.628 | 4.246 | | |
| Eplir,gæs,avroð o.a. | 6.796 | 7.054 | 6.410 | 6.082 | 7.206 |
| Framleiðsla tilsamans | 54.719 | 54.923 | 55.897 | 42.275 | 43.399 |
| | | | | | |
| Rávørunýtsla | 19.055 | 18.555 | 18.218 | 15.542 | 15.542 |
| | | | | | |
| BTÚ í marknaðar-prísum | 35.664 | 36.368 | 37.679 | 26.733 | 27.875 |
| | | | | | |
| Rentustuðul | 527 | 367 | 330 | 294 | 233 |
| Studningur til svínakjøt | 1.040 | 700 | 1.329 | 509 | |
| | | | | | |
| BFI | 37.231 | 37.436 | 39.338 | 27.536 | 28.091 |
| | | | | | |
| studningur í % av BFI | 3 | 2 | 3 | 2 | 0 |

Í talvu 1a sæst ein meting av virðisøking av tí partinum av landbúnaðarvinnuni, sum hevur við alt uttan neytahald at gera. Fortreytin fyri hesum roknidømi er, at tann parturin av vinnuni, sum fæst við neytahald brúkar 0,4 kg av kraftfóðuri pr litur av framleiddari mjólk gjøgnum alt tíðarskeiðið, og at restin av kraftfóðurnýtsluni er rávøra í samband við seyðahald o.a. Hetta er sjálvsagt ein ivasom meting í sær sjálvum, sum er gjørd omaná ta varisligu metingina av samlaðu rávørunýtsluni, tí skal hetta roknistykki eisini lesast við stórum fyrivarni.

Í hesi helvtini av vinnuni eru eingir studningar lagdir uttan studningurin til svínakjøt og 20 % av rentustuðulinum.

Eftir hesum eigur tann parturin av vinnuni, sum hevur við seyðahaldið o.t. at gera, størra partin av bruttotjóðarúrtøkuni í allari landbúnaðarvinnuni, 35,7 mió av 52,9 fyri alla vinnuna í 1990, og 27,9 mió av 51,3 mió kr í 1994. Hinvegin er parturin av tí samlaðu bruttofaktorinntøkuni ikki heilt so stórur. Studningsparturin av BFI er heilt lítil, 0-3 %, og hann viðvíkur, sum vera man, fyrst og fremst svínakjøtsframleiðsluni.

Talva 1b: Meting av virðisøking í neytahaldi, 1000 kr.

| Framleiðsla | 1990 | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mjólk | 25.139 | 26.750 | 28.644 | 29.879 | 29.393 |
| Neytakjøt | 2.035 | 2.318 | 2.583 | 2.058 | 2.476 |
| Framleiðsla tilsamans | 27.174 | 29.068 | 31.227 | 31.937 | 31.869 |
| Rávørunýtsla | 9.945 | 9.445 | 8.782 | 9.458 | 8.458 |
| BTÚ í marknaðarprísum | 17.229 | 19.623 | 22.445 | 22.480 | 23.410 |
| Studningar: | | | | | |
| til mjólk | 13.448 | 12.830 | 11.656 | 8.942 | 8.622 |
| til neytakjøt | 1.702 | 1.266 | 1.652 | 1.119 | 1.534 |
| til stráfóður | 842 | 1.274 | 1.284 | 1.260 | 1.366 |
| til húsdjórahald | 170 | 110 | 89 | 80 | 74 |
| til avloysing | 580 | 580 | 580 | 580 | 480 |
| til rentur | 2.109 | 1.469 | 1.320 | 1.177 | 934 |
| BFI | 36.080 | 37.152 | 39.026 | 35.638 | 36.420 |
| Studningur í % av BFI | 52 | 47 | 42 | 37 | 36 |

Hinvegin sæst, at tann parturin av vinnuni, sum hevur við neytahald at gera, eigur minna partin av tí samlaðu virðisøkingini í landbúnaðinum. BTÚ liggur úr 17 til 23 mió kr í skeiðinum.

Stóri parturin av inntøkuni í hesum parti av landbúnaðarvinnuni kemur frá studningum. Studningarnir, sum prosentpartur av BFI í hesum tíðarskeiði, kundu eisini eftir hesum sæð út til at verið fallandi, men eru tó øll árini útímóti eini helvt av samlaðu inntøkuni.

### Studningar

Tað er freistandi at lesa tølini soleiðis, at studningurin allur bert kemur landbúnaðarvinnuni til góðar, í krónutali verður studningurin goldin vinnuni, sum henda upstillingin vísur, men tað skal eisini havast í huga, at hevði studningurin ikki verið, hevði bæði eftirspurningurin hjá brúkarunum og framleiðsluhugurin hjá vinnuni broytst munandi.

Eftirspurningurin hjá brúkarunum kann vera meiri og minni elastiskur, sum tað nevnist á fakmálinum. Er eftirspurningurin príselastiskur merkir hetta, at eftirspurningurin í stóran mun ávirkast av prísbroytingum á vøruni. Hinvegin kann útboðið eisini vera meiri og

minni elastiskt, alt eftir hvussu framleiðsluumstøðurnar og kostnaðarviðurskiftini í vinnuni eru.

Hesi viðurskifti eru í teoriini avgerandi fyri, hvørt tað í síðsta enda eru framleiðararnir ella brúkararnir, sum fáa størsta fyrimunin av studninginum.

Vit vita ikki, hvussu útboðs- og eftirspurningsviðurskiftini eru fyri føroyskar landbúnaðarvørur, lítið er tó at ivast í, at bæði brúkararnir og framleiðararnir í onkran mun fáa fyrimun av studningunum.

Vert er tó framvegis at hava í huga, at studningarnir, sum verða útgoldnir, í síðsta enda eru fíggjaðir við skatti goldnum av húsarhaldum. Soleiðis hava teir eisini minkað nýtslumøguleikarnar hjá brúkarunum, við at minka um disponiblu inntøkuna hjá húsarhaldunum.

### Um inntøkubýtið í landbúnaði

Tað er longu nevnt, at ein partur av bruttofaktorinntøkuni lutast smáu jarðareigarum. Býtið av faktorinntøkuni annars er ikki umrøtt nærri. Tann bróðurparturin av framleiðsluvirðinum, sum umboðar framleiðsluna av seyðakjøti, kann væntast at vera býttur í mun til jørðina. Verður leysliga roknað at 25 kg av seyðakjøti kunnu framleiðast á eini gyllin um árið og hesi kunnu seljast fyri 44,80 kr./kg, so ber til at framleiða fyri 17.920 kr á eini mørk um árið.

Tað eru eftir yvirlitinum 399 festigarðar í landinum. Av hesum eru 12, sum eru 10 merkur ella størri, og sum sostatt skuldu kunna selt fyri einar 180 tús. kr.ella meira. Eftir yvirlitinum ber til at meta leysliga, hvussu stóra inntøku seyðakjøtið kann geva, um alt verður selt:

| | tal av festum | mett inntøka um allur seyðurin verður seldur |
|---|---|---|
| minni enn eina mørk | 159 | í mesta lagi 18.000 kr |
| 5 merkur ella minni | 323 | í mesta lagi 90.000 kr |
| 10 merkur ella størri | 12 | meiri enn 180.000 kr |

Tá hugsað verður um, at rávørunýtslan fer burturav hesi søluupphædd, áðrenn talan verður um eina inntøku, so er tað lítil partur av festibóndunum, sum kann skaffa sær høvuðsinntøkuna frá seyðahaldinum, og helst eru tað enn færri ognarbøndur, sum hava møguleika fyri tí.

Í talvu 2 er yvirlit yvir skrásetta sølu hjá MVG-skyldugum bóndum, t.e. tal av bóndum býttir eftir søluvirði í bólkum frá 0-100. tús., frá 100-200 tús. o.s.fr. Í virkisskránni hjá Hagstovuni eru 175 MVG-skyldugir bóndir skrásettir. Hetta er væl færri enn talið av framleiðandi eindum, men roknast má tó við, at allir teir størru bóndirnir eru við her.

Eftir hesum eru bert 70 bóndir, sum hava eina sølu, sum er størri enn 100 tús. kr. Hesir eru býttir hampuliga javnt ímillum bólkarnar upp til 700 tús.kr og 6 bøndur eru skrásettir við eini sølu størri enn 700 tús. kr. Hvar minsta inntøkumark skuldi verið sett, fyri at talt bøndur við einari hampuligari ársinntøku, er ringt at meta um, partvís tí at „inntøkan“ av óseldari seyðakjøtsframleiðslu ikki er við her, og partvís tí, at tað eru nógvar uppfatanir av, hvat ein hampulig ársinntøka er.

Verður hugt í roknskaparsamanlíkningarnar sæst at teir 11 bøndurnir, sum roknskapur er fyri í 1994, í miðal hava eina sølu, sum er størri 600.000 kr, og at hann við minstu søluni selur fyri yvir 300.000 kr, so hesir eru helst umboðandi fyri bólkin av á leið 70 bóndunum, sum hava meiri enn 100.000 kr í sølu, hesir kunnu helst allir sigast at vera fulltíðarbóndir.

Talva 2: Søla hjá MVG-skrásettum bóndum 1994

| Søla | Tal av bóndum |
|---|---|
| 0-99999 | 105 |
| 100000-199999 | 14 |
| 200000-299999 | 10 |
| 300000-399999 | 10 |
| 400000-499999 | 9 |
| 500000-599999 | 12 |
| 600000-699999 | 9 |
| 700000+ | 6 |




Viðmerking: Hetta eru sølur hjá teimum sum í virkisskránni hjá Hagstovuni eru skrásett undir vinnugreinini: Landbúnaður.
Ikki MVG-skrásettir bøndir eru ikki við her.

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 3: Roknað „MVG-virðisøking“ hjá landbúnaðarfyritøkum 1994

| Inntøkuinterval | Tal av bóndum |
|---|---|
| minni enn 0 | 32 |
| 0-99999 | 99 |
| 100000-199999 | 20 |
| 200000-299999 | 17 |
| 300000+ | 7 |




Viðm.: MVG-virðisøkingin er roknað sum samlaða sølan hjá bóndanum frátrekt rakstrarútreiðslur ið kunnu trekkjast frá eftir MVG-lógini
Myndin er ætlað til at vísa býtið ímillum inntøkubólkarnar, heldur enn inntøkustøddirnar

Sambært miðalroknskapinum fyri 1994 hava hesir eitt úrslit áðrenn avskrivingar uppá 271.190 kr. Besta úrslitið er 454 tús. kr og ringasta 99 tús. kr.

Í talvu 3 finst býtið eftir „MVG-virðisøking“, tað er skrásett søla frátrekt skrásett rávørukeyp. Eftir hesum eru 44 bøndur, sum hava „peningaliga virðisøking“ størri enn 100 tús. kr. Her skal framvegis havast í huga at ikki-seld seyðakjøtsframleiðsla ikki er roknað við. 24 bøndur hava størri „virðisøking“ enn 200 tús.kr og bert 7 koma uppum tær 300 túsund krónurnar.

Tað sæst eisini, at rávørunýtslan hjá 32 eindum er størri enn sølan. Hesir umboða helst eina samanseting av teimum, sum eru óhepnir við rakstrinum og teimum, sum framleiða til egnu nýtslu.

Tikið samanum sæst, at restinntøkan í landbúnaðarvinnuni er smábýtt. Fáar eindir eru, sum hava stóra inntøku, hesar eru fyrst og fremst mjólkaframleiðarar. Inntøkurnar til aðrar eindir eru líka ymiskar í støðd, sum jarðarstykkini eru.

## Inntøkuviðurskifti í landbúnaði í mun til aðrar vinnur

*Inntøkuviðurskiftini í landbúnaði í mun til inntøkuviðurskiftti í øðrum vinnum.*

Talva 4 vísir miðal A-inntøkur hjá fólki í ymsum útvaldum vinnugreinum. Her er hvør einstakur settur í ta vinnugrein, hann hevur fingið størsta útgjaldið frá. Øll A-inntøkan hjá fólkinum er við her, eisini tann sum tann einstaki hevur fingið goldna frá virkjum í øðrum vinnugreinum. Inntøka hjá fólki, sum ikki arbeiður fulla tíð, er eisini við. B-inntøkurnar eru ikki við her. Samlaða B-inntøkan í 1994 var 320 mió kr. Samlaða A-inntøkan var 3.814 mió kr.

Miðal A-inntøkan hjá fólki, sum hava vinnuliga inntøku var í 1994 141 tús. kr. Tá eru tey, sum fáa størsta útgjaldið frá Almannastovuni ella arbeiðsloysisskipanini, ikki eru roknaði við.

## Talva 4: Miðal A-inntøkur í ymsum vinnugreinum

| ISIC | Vinnugrein | kr |
|---|---|---|
| 13100 | Feskfiskaveiði | 159,086 |
| 13210 | Verksmiðjuskip | 320,313 |
| 13220 | Saltfiskaveiði | 267,684 |
| 13230 | Rækjuveiði | 188,857 |
| 13300 | Fiskiveiði til ídnað | 238,546 |
| 15120 | Kleking og aling av laksasmolt og sílayngli | 116,777 |
| 15130 | Laksa- og sílaaling | 152,452 |
| 31143 | Fiskasalting, saltfiskaturking og feskfiskaturking | 99,080 |
| 31144 | Virking av feskum og frystum fiskavørum | 110,747 |
| 31146 | Virking av vørum úr laksi og síli | 106,109 |
| 31147 | Virking av vørum úr skeljadýrum | 117,764 |
| 31149 | Onnur virking av fiskavørum | 99,451 |
| 31153 | Virking av fiskalýsi og -mjøli | 219,510 |
| 31174 | Bakarabúðir | 91,313 |
| 38280 | Smiðjur og maskinumvælingarverkstaðir | 107,385 |
| 38411 | Stálskipasmiðjur | 146,624 |
| 41010 | Ravmagnsveiting | 178,407 |
| 50110 | Alment byggingarvirksemi | 157,370 |
| 50121 | Byggifeløg | 137,824 |
| 50140 | Timburarbeiði (sniðhús íroknað) | 93,213 |
| 50160 | HVS-innlegging, blikksmíð og oljufýrstænasta | 129,897 |
| 50170 | Ravmagnsinnlegging | 127,106 |
| 61111 | Heilsøla við kolonialvørum | 137,853 |
| 61168 | Søla av timbri og øðrum byggitilfari | 151,851 |
| 61192 | Heilsøla við bensini, føstum, flót. og gassbrenni,smyrjiolju | 179,626 |
| 61312 | Fiskaútflutningur sum umboðssøla | 210,480 |
| 62111 | Sølubúðir | 35,201 |
| 62112 | Smáhandlar | 48,497 |
| 62113 | Stórhandlar | 113,382 |
| 62134 | Apotek | 160,663 |
| 62211 | Smásøla við motorakførum og lutum til teirra | 149,805 |
| 62213 | Smásøla við bensini, smyrjiolju v.m. – Bensinstøðir | 62,529 |
| 63101 | Matstovuvirki | 32,344 |
| 63201 | Gistihúsvirki | 81,838 |
| 71141 | Lastvognskoyring | 137,296 |
| 71211 | Farmaskipavinna og reiðaravirki innan farmaskipavinnu | 166,557 |
| 71213 | Strandfaraskip í almennari ogn | 164,584 |
| 72001 | Postur | 155,858 |
| 72002 | Fjarskifti | 179,799 |
| 81012 | Bankar | 213,498 |
| 81013 | Sparikassar | 192,158 |
| 82001 | Lívs- og skaðatrygging | 187,360 |
| 83220 | Grannskoðara- og bókhaldsvirksemi | 150,333 |
| 83230 | Dátuviðgerðarvirksemi | 185,552 |
| 91011 | Miðfyrisiting hjá danska statinum í Føroyum (ríkisumboð) | 158,741 |
| 91015 | Lønjavningargrunnurin (minstaløn,dagstudningur osfr.) | 76,329 |
| 91017 | Almannastovan og Arb.loysistr. (dagpengar og almannahjálp) | 44,182 |
| 91020 | Løgregla og rættur | 227,060 |
| 91030 | Verja og sivilverja | 217,334 |
| 91050 | Kommunufyrisiting | 88,317 |
| 93105 | Yrkisskúlar (tøkniskúlar, handilsskúlar o.a.) | 190,292 |
| 93311 | Sjúkrahús og aðrir heilsubótarstovnar | 170,428 |
| 93313 | Starvandi tannlæknar | 23,583 |
| 93319 | Aðrir stovnar og onnur starvandi innan fyri heilsuverkið | 129,153 |
| 93402 | Vøggustovur og barnagarðar | 120,487 |
| 93406 | Vælferðartænastur fyri sjúk og brekað | 151,470 |
| 93408 | Vælferðartænastur fyri gomul | 144,991 |
| 94130 | Útvarp og sjónvarp | 140,424 |
| 95131 | Bilverkstøð | 106,901 |

Viðmerking: Lønirnar eru her upptaldar uppá persónar, øll A-inntøka hjá tí einstaka er við her, og hvør er taldur við í tí vinnugreinini haðani hann hevur fingið tað størsta útgjaldið.

Talvan er ætlað til at geva eina hóming av, hvussu stórar arbeiðsinntøkurnar eru í samfelaginum annars. Talvan er ikki ætlað til at siga nakað um, hvørt nakað slag av rættvísi er í inntøkubýtinum. Tað er onki sagt um, hvussu nógvar tímar fólk hava lagt í fyri at fáa hesa inntøkuna, ella undir hvørjum umstøðum tey hava vunnið hana. Serliga í landbúnaðarvinnuni eru arbeiðstíðirnar aðrar og arbeiðstímarnir ofta fleiri enn í øðrum vinnum. Heldur onki er sagt um, hvussu arbeiðsumstøðurnar annars eru í teimum ymsu vinnunum. Onkrar av hesum inntøkum er vunnar á skrivstovu, onkrar á skipsdekki, onkrar á hospitali; allar undir meiri ella minni vinarligum umstøðum. Soleiðis fer arbeiðið í landbúnaðarvinnuni eisini fram undir øllum sløgum av umstøðum, tað veri seg í fjósinum, yvir roknskapi innandura ella eftir seyði í bakkanum.

Sambært roknskaparsamanlíkningunum fyri 1994 var miðalúrslitið hjá teimum størri mjólkabóndunum 271 tús. kr áðrenn avskrivingar. Ongin meting er av, hvussu stórar avskrivingarnar vóru. Tó er nevnt, at skuldin í miðal er 1,4 mió. kr. Verða árligu avdráttirnir uppá hesa skuld leysliga mettir til ein tjúgundapart av skuldini og brúktir sum eitt mát fyri avskrivingar, so liggur miðalúrslitið aftaná rentur og avskrivingar umleið 200.000 kr. Hetta er so nær tað ber til at koma einari persónligari inntøku hjá teimum størru bóndunum.

Verður roknað við, at allir hava eitt sindur av naturaliuinntøku afturat av seyðakjøtinum og øðrum óseldum vørum, ber til at siga, at tað neyvan eru fleiri enn einir hálvthundrað bøndur, sum liggja nógv omanfyri miðal A-inntøkuna í landinum.

## Garðyrki

Garðyrki er partur av landbúnaðarvinnuni, sum ikki er roknaður við higartil.

Vinnugreinin umfatar vakstrarhúsini og tey sum liva av at selja blómur, runnar og í minni mun ymisk sløg av grønmeti.

Í virkisskránni hjá Hagstovuni eru 6 størri og minni eindir skrásettar í hesi vinnugrein. Í talvu 5 finst uppgerð yvir inntøkuskapanina innan garðyrki.

Talva 5. Framleiðsla og virðisøking innan garðyrki, 1000 kr.

| | 1993 | 1994 |
|---|---|---|
| Framleiðsluvirði í marknaðarprísum | 4.498 | 3.982 |
| Rávøra | 2.900 | 2.618 |
| Bruttotjóðarúrtøka | 1.598 | 1.364 |
| Lønir | 665 | 549 |
| Restinntøka | 933 | 815 |

Ongir rakstrarligir studningar eru til hesa vinnu, tískil verður bruttotjóðarúrtøka og bruttofaktorinntøka tann sama. Tølini eru samanteljingar av søluvirðum og rávørukeypi úr MVG-skránni, onki er lagt upp fyri óskrásettari framleiðslu.

Hetta er, roknað í framleiðsluvirði og virðisøking, ein av teimum heilt smáu vinnugreinunum, við einum framleiðsluvirði uppá einar 4-5 mió. kr og eini virðisøking um 1,5 mió.

Hóast bruttofaktorinntøkan ikki er tann øgiliga, sæst at lønarparturin av BFI er væl størri enn í landbúnaði annars. So mikið at vinnan, hóast hon er lítil, er før fyri at løna nøkrum fólkum. Í 1994 vóru 11 fólk, sum fingu størstu lønarútgjaldingin sína frá hesu vinnugrein.

## 2. Studningsmøguleikar frá tí almenna

### *a. Framtíðar stuðulsskipanir*

Gongdin í heiminum í dag er merkt av fatanini av, at neyðugt er at minka um studningin til sonevndu primervinnurnar, herundir til landbúnaðin, serliga í teimum framkomnu londunum. Tó at fleiri týðandi orsakir liggja aftanfyri hesa fatan, eitt nú útpíning av jørðini, dálking av grundvatni, ovurnýtsla av grundvatni við vanda fyri oyðumarkargerð, ovurframleiðsla og harvið spell av búskaparligum tilfeingi, forðing fyri menning av búskapinum í tilafturskomnum londum o.s.fr., so er tað ikki sum at siga tað at finna gongda felags leið at avmarka studningarnar. Trupulleikarnir at finna semju í GATT-samráðingunum (sonevnda Uruguay-umfarið) eru týðuligt dømi um hetta. Einasta land, sum at kalla hevur tikið stigið fult og heilt, er New Zealand, men her tykjast umstøðurnar at reka landbúnað í stórrakstri at vera rættiliga góðir. Bráða yvirgongdin í New Zeelandi frá studningsriknum landbúnaði til studningsleysan landbúnaða í hevur verið rættiliga pínufull og ring at komið ígjøgnum hjá bøndum, men har hava teir so vón um, at hetta fer at geva bøndunum so mikið størri fyrimunir í framtíðini, tá onnur lond

skulu undir somu tillaging av landbúnaðinum til vinnu upp á marknaðarbúskaparligar treytir.

Samstundis er at leggja til merkis ta ørgrynnu av ábótum og framstigum, sum stava frá tøkni og gransking í hesi øldini. Eingin endi tykist vera á fyrimununum fyri brúkaran og tann bónda, sum kann gagnnýta hesi úrslit; betri úrkomu hjá framleiðaranum í víðastu merking og bíligari og heilsusamari kost til munandi fleiri fólk. Á gørðunum um allan heim er nógv broytt og nógv stendur enn til at broyta. Í USA t.d. var í 1920-unum 40 % av arbeiðsmegini nýtt á gørðunum har, meðan talið í 1995 var komið niður á 1,8%. Samstundis er framleidni í amerikanska landbúnaðinum vaksið uttan íhald. Vit hava ikki tøl fyri hesum í Føroyum, men gongdin her heima er einki undantak frá gongdini í USA. Um somu tíð hava tey støðugt batnandi samferðslu- og handilsviðurskiftini millum lond og kappingin gjørt, at framleiðslur, sum neyðug var í fjarskotnum og avbyrgdum oyggjalandi, ikki longur eru her. Vit velta t.d. ikki longur korn.

Royna vit at gita um broytingarnar í jarðarbrúki í framtíðini, bendir nógv á, at førleikin hjá fólki framhaldandi og í vaksandi muni verður lagdur inn í maskinur, útgerð og tól. Úrslitið verður, at landbúnaðurin verður alt meira automatiseraður, har bóndans virkið verður at leggja ætlanir, meta um úrslit og taka avgerðir. Garðarnir, ið kunnu nýta hesi framstig, fara at vaksa enn meira og fækkast í tali.

Onnur broyting fer helst at verða, at arvafrøðilig gransking fer at gera, at fleiri etandi plantur verða framleiddar. Sum er, verður talið á munnbærum plantum mett at vera 3.000, av hesum verða einar 300 etnar onkrastaðir í heiminum, einar 30 eru í handli, meðan 6 plantur veita 90 % av mannaføðini. Arvaligar broytingar kunnu broyta eyðkenni hjá stórum tali av teimum lítið brúktu plantunum, so tær lættari kunnu gerast partur av vanliga handlinum. Garðarnir, sum kunnu nýta hesi framstig, nýtast kanska ikki verða so stórir.

Gongdin, at fleiri gerast vegetarar, og kravið um vistfrøðiliga landbúnaðarframleiðslu, kann fremja ta seinnu av frammanfyri nevndu framtíðarútlitunum fyri jarðarbrúki. Vistfrøðiliga framleiðslan fer helst at seta munandi størri altjóða krøv um røkt av umhvørvi og skilvíst umskifti av, hvussu jørðin verður nýtt, eitt nú við at sama grøði verður ikki havd á sama øki ár um annað, og at jørðin eisini sleppur at hvíla, soleiðis at vit best møguliga varðveita teir møguleikar, jørðin hevur og kann hava fyri komandi ættir.

Afturundirgerðin sum kemur í støðuga rákinum at nýta arvafrøðilig granskingarúrslit og automatiseraða tøkni mennir um somu tíð áhugan fyri tí upprunaliga og fyri at varðveita og goyma teir eginleikar og ta fjølbroytni, sum enn er. Rætt atborið kunnu vit hava størri gagn av hesari afturundirgerð enn av skjóta rákinum, sum annars fer fram um allan heim.

Trúliga fara jarðarbrúk um allan knøttin at býta seg í fýra sløg; tey heilt stóru, sum vit ikki fara at kenna heima hjá okkum sjálvum, har stórrakstur annaðhvørt í kjøt- ella plantuframleiðslu fer at nýta teir fyrimunir í tøkniligari menning, ið hesar eru best fyri at gagnnýta. Hesar fyritøkur fara at framleiða dastið av teimum matvørum, ið heimurin tørvar. Annað slag verða húskisbrúkini, ið eisini fara at vaksa seg stór, og sum í stóran mun kunnu gagnnýta somu framstig, sum tøkniliga menningin og granskingin geva. Ein rættiliga stórur partur av jarðarbrúkunum verða garðar riknir saman við aðrari vinnu hjá húskinum. Hetta triðja slag fara vit kanska at síggja mest av í Føroyum. Fjórða slagið verður eitt slag av fragd ella dagdvøljugørðum. Her verður tað kanska bert undantakið, at garðurin ella brúkið kann roknast vinnuligt, soleiðis sum vit síggja hetta í dag í Føroyum.

Annaðhvørt vit vilja tað ella ikki, sleppa vit í Føroyum ikki undan at laga okkara jarðarbrúk og vinnuligan landbúnað eftir gongdini rundanum okkum. Eins og einki høpi er í at fara undir kornvelting í Føroyum til føðslu hjá fólki, er lítið skil í at halda fast við landbúnaðarframleiðslur, sum vit kunnu fáa bíligari og betri úr heimspørtum, ið eru munandi betri fyri at framleiða hesar, tá tað snýr seg um veðurlag, jørðildi og lendisliga. Tað er somuleiðis lítið skil í at petta framleiðslu, har vit í hvussu so er enn kunnu vera kappingarfør, út í dýrkandi og illa hóskiligar eindir.

Landbúnaðarpolitiskt verður neyðugt at skapa umstøður, so vinnuliga rikni garðurin sjálvur er førur fyri at finna sær virkisligt lønsemi í altjóða kapping. Hetta merkir, at vinnuligt jarðarbrúk í Føroyum má fyrst og fremst byggja á tey náttúrligu monopol, ið føroysku umstøðurnar geva fyri framleiðslu og tænastu, bæði til føroyska heimamarknaðin og tá tað ræður um útflutningsvinnu. Gongdin at framleiða tað sama, sum aðrir framleiða, heldur enn at framleiða tað, har vit hava allar fyrimunirnar, gevur okkum eitt studningsborið jarðarbrúk og eitt jarðarbrúk, ið er í andsøgn til altjóða krøv um umhvørvisrøkt.

Mjólkarframleiðsla er helst komin fyri at vera í Føroyum, men hon kundi verið munandi meira kappingarfør í prísi, í góðsku og tá tað ræður um nýtslu av grasfóðri, eisini við atliti til, hvussu neytini hava tað. Føroyski seyðurin og føroysk seyðarøkt gevur møguleikar, ið kunnu mennast til væl fleiri inntøkur, enn hann gevur í dag, og aðrastaðir í hesum áliti verður víst á, at serliga føroyska rossið, føroyska gásin og føroyska dunnan kunnu við skynsemi verða hildin á føroyska lendinum og geva landbúnaðinum fjølbroyttar inntøkur, um bøndur fata sín lut sum heildarveitarar heldur enn bert sum framleiðarar av rávørum. Og gomul føroysk set og røtur kunnu hava størri virði, enn vit halda.

### *b. Verandi stuðulsskipanir í Føroyum*

Uttan at hava kannað til botns, hvussu týdningarmiklar verandi stuðulsskipanir eru í Føroyum fyri landbúnaðin, heldur nevndin mangt benda á, at landbúnaðurin í Føroyum er ikki fult sama studningsvinna sum t.d. í ES, har studningurin tykist svara til faktorinntøkuna, v.ø.o. at alt arbeiði í vinnuni kann verða goldið av studninginum. Kortini er landbúnaðurin í ES í kreppu, ella kanska júst tí. Har eins og her hava landbúnaðarpolitisku endamálini verið ógreið og í mongum gingið ímóti hvørjum øðrum.

Eins og í ES eru føroysku stuðulsskipanirnar merktar av stirvni. Er ein stuðulsskipan einaferð komin, er at kalla ógjørligt at taka hana av aftur, og stuðulsskipanirnar eru í lítlan mun nýtiligar til at menna landbúnaðin til framtíðarviðurskifti, heldur eru tær eitt afturljóð frá verandi trupulleikum og teimum trupulleikum, ið hava verið.

Taka vit t.d. Jarðargrunnin, so kann hann

* veita lán til traðarbrúk, íløgur, bygging og rakstur
* geva kommunum og niðursetufeløgum gjaldskáa við keyp av almennari jørð
* veita høsnarhaldi, mjólkarsølum og mjólkarvirkjum lán
* veita sláturvirki og fóðurvirki lán til íløgur
* veita lán til festibygningar, fjós o.t. hjá festibóndum
* veita lán til velting úr nýggjum

Krøvini til lántakara eru partvíst formlig, partvíst stavandi frá aðrari tíð, tó tey eru skilagóð (íðin, raskur, edrúuligur og røkin), og partvíst sera viðkomandi, nevniliga at hann skal hava ávísa eginogn, at ætlanin er skilagóð, og at útlitini fyri, at hon gevur vinning, eru lýst við kostnaðarmeting, rakstrarætlan o.t.

Studningarnir, ið kunnu verða veittir beinleiðis úr Jarðargrunninum, eru somuleiðis fremst ætlaðir traðarbrúkinum. Men sum tíðin er farin frá traðarbrúkinum, eru hesir studningar ikki latnir, tað menn í dag vita um.

Herumframt verður og hevur verið latin rættiliga stórur rakstrarstuðul til landbúnaðin úr landskassanum. Talan er um

* mjólkarstudning – umframt mvg-endurgjald
* flutningsstudning av mjólk
* studning til avloysaraskipan fyri mjólkarframleiðarar
* studning til neytakjøt – við serligum íkasti til útoyggjar og øki, har mjólkneyt ikki lættliga kunnu vera havd
* studning til svínakjøtframleiðslu

* studning til eggjaframleiðslu
* stráfóðurstudning
* studning til gerð av súrhoysbrunnum
* studning til húsdýraaling
* studning til vaskibrunnar á rættum
* seyða- og neytapremiur
* íløgu- og rentustudningar
* veltistuðul
* studningar til køstar og landbrunnar
* seyðakjøtstudningur – mvg-endurgjald

Yvirhøvur tykist vinnan samd um, at neyðugt er at sleppa burtur úr tí stýring, ið umvegis verður løgd á vinnuna við studningsskipanunum. Hvussu væl hesar skipanir verða tilevnaðar, so umberst ikki, at tær ikki tæna tí endamáli einans, ið tær vórðu ætlaðar at tæna. Tá hugsað verður um, at studningarnir verða tiknir av felags ogn (landskassanum), og teir, ið bestir duga, fáa mest, kenst órættvísi størri, enn um tað var dugnaskapurin í einum marknaðarbúskapi, ið var atvoldin til ójavna í inntøku.

Náttúrligu fyritreytirnar og skipanirnar á landbúnaðarøkinum í okkara samhandilslondum og frælsi handilin við tey ávirka tó inntøkuviðurskiftini og møguleikarnar hjá landbúnaðinum í Føroyum. Og í samhandilssáttmálum okkara við ES og við EFTA-londini hava vit avtalað, at vit ikki vilja verja føroyska landbúnaðarframleiðslu, uttan tá tað snýr seg um mjólk og seyðakjøt.

Fyrrnevnda gongd í londunum rundanum okkum ger tó, at vit mugu umhugsa gjølla, hvussu vit best kunnu stuðla einari skjótari gongd fram í móti, at vinnan gerst stuðulsfrí.

### c. Stuðulsskipanirnar í øðrum londum – serstakliga í ES

Nevndin hevur roynt at fingið eina einfalda lýsing av stuðulsskipanunum í okkara samhandilslondum, men sum frammanfyri nevnt hevur hetta verið at kalla ógjørligt. Samstundis heldur nevndin, at slíkar lýsingar hava størri søguligan týdning enn týdning fyri, hvørjar møguligar stuðuls- og lánsskipanir skulu verða hjá okkum í framtíðini.

Tann samanrenning, ið nú fer fram í Europa, hevur gjørt, at nevndin hevur roynt at hugt at stuðulsskipanum í ES, sum tykjast verða undir stórum broytingum, ið tó fara at ganga seinni enn gagnligt fyri landbúnaðin sum framtíðarvinnu í samveldinum.

Í 1991 ásannaði ES-nevndin, at galdandi landbúnaðarpolitikkur hevði m.a. havt tey árin,

- at prís- og marknaðarstuðulin hevði framt ein vøkstur í framleiðsluni, sum lá 1,5 % hægri enn nýtsluvøksturin,

- at í kjalarvørrinum á framleiðsluvøkstrinum høvdu útreiðslurnar av útflutningi verið øktar,

- at økti útflutningurin hevði skatt handilspolitisku sambondunum hjá ES,

- at stuðulin hevði verið vendur ímóti framleiðsluni, ið var vorðin meira intensiv og tí havt umhvørvistrupulleikar við sær,

- at stuðulin var í høvuðsheitinum latin teimum størstu og dyggastu gørðunum, samstundis sum talið á fólki í vinnu í landbúnaðinum var minkað nógv, og

- at 80 % av stuðlinum var latin 20 % av gørðunum.

Frammanfyrinevndu viðurskifti saman við GATT-samráðingunum í Uruguay og nýggju WTO-skipanina og ætlaða víðkanin av ES eystureftir fara at krevja rættiliga stórar broytingar, skal víðkanin kunna fremjast, uttan at ES-búskapurin av landbúnaðarpolitiskum ávum missir ta orku, ið higartil hava fingið londini at leita inn í samveldið.

Enn er orðingin av ES-landbúnaðarpolitikkinum tó bert broytt til, at dentur verður lagdur á,

- at varðveita eitt nøktandi tal av gørðum á bygd, fyri at bygdirnar ikki skulu avtoftast,

- at varðveita húskisgarðin sum grundvøll í jarðarbrúkinum í ES og tryggja varðveitslu av náttúrliga umhvørvinum,

- at viðurkenna, at bøndur, samstundis sum teir standa fyri framleiðslu, umsita umhvørvið og menningina av landbúnaðarøkjunum, og

- at landbúnaðarpolitikkurin má skipast soleiðis, at tað aftur verður skapt javnvág á marknaðunum fyri landbúnaðarvørur.

Tað er sostatt enn langt eftir, til at landbúnaðurin í ES gerst burturav vinnuligur og óheftur av stuðli.

### *d. Framtíðar føroyskar láns- og stuðulsskipanir*

Á arbeiðsfundi 24. og 25. mars 1993 við heitinum Føroyskur Landbúnaður – Fortreytir og Møguleikar, og sum mundi vera ein orsøkin til, at arbeiðsbólkurin varð settur, varð í felagsniðurstøðuni frá fundinum dentur lagdur á hesar fortreytir

* Nátt framleiðsluloftinum, dømi: drekkimjólkin
* Krav um altjóða kappingarføri
* Studningsorka er ikki til í landinum

Studningsorka er ikki til í landinum, og tí er neyðugt at finna útvegir fyri at avmarka hann.

Tað má vera eitt aðalkrav til føroyskan vinnuligan landbúnaða, at hesin virkar uppá marknaðarbúskaparligar treytir. Ger hann ikki tað, kann hann illa virka vinnuliga; heldur virkar hann eftir teimum ábendingum, ið politiskt verða givnar, og hesar ábendingar vilja vera úrslit av krøvum frá búnaðarmonnum, ið hava truplast við at laga seg til nútíðar og framtíðar krøv. Allar royndir vísa eisini, at stuðul hækkar kostnaðarstøði og minkar tískil um kappingarførið.

At fyrireika føroyskan landbúnað, ið fær so stóran studning, sum hann ger í dag, til at virka uppá marknaðarbúskaparligar treytir krevur ein langsiktaðan og støðufastan politikk, og tað krevur, at landbúnaðurin viðurkennir hetta mál og roynir at tillaga seg eftir tí.

Mjólkarframleiðslan verður í dag stuðlað við
* mjólkarstudningi
* mvg-endurgjaldi
* gjaldi á útlendska mjólk
* studningi til flutning av mjólk
* studningi til avloysaraskipan fyri mjólkaframleiðarar
* studningi til neytakjøt
* stráfóðurstudningi
* studningi til gerð av súrhoyggjabrunnum
* veltistuðli
* studningi til køstar og landbrunnar
* lánum til mjólkarvirki
* lánum til fjós og til velting úr nýggjum

og kortini eru fleiri mjólkarbøndur húsagangsdømdir, meðan aðrir hava trupult við at klára seg.

Nevndin heldur, at annaðhvørt mett lívfør festi verða seld festarum, ella almenna jørðin verður „privatiserað“, er neyðugt at farið verður burtur frá øllum framleiðslu- og rakstrarstuðli til landbúnaðin. Bert

beinleiðis menningarstuðul, t.e. stuðul, sum hevur til endamáls at gera landbúnaðin kappingarføran og at lúka umhvørviskrøv uttan stuðul, eigur at verða nýttur. Nevndin heldur eisini, at tann mjólkarkvota, ið almennu garðarnir hava álagt sær sjálvum, eigur at verða avtikin.Til tess at menna kappingarføra framleiðslu av mjólk til føroyska heimamarknaðin skal Jarðargrunnurin hava heimild at veita bílig lán til uppdyrkingar og keyp av graslendi til teir garðar, ið leggja seg eftir mjólkarframleiðslu. Men eisini til nývelting og ábøtur á haga til seyðahald eigur Jarðargrunnurin at kunna veita lán.

Nevndin vísir í hesum sambandi á, at uttan tey stig, sum vórðu tikin í sambandi við Mjólkarvirki Búnaðarmanna, vóru vit ikki í teirri støðu, at mjólkarframleiðsla var týðandi partur av føroyskum landbúnaði í dag. Nevndin heldur, at tað í summum førum er neyðugt at menna sølu og samskipan av landbúnaðarframleiðslu upp á eitt støði, ið ger framleiðsluna lívføra og møguliga hjá bóndum at byggja eitt framtíðar virksemi.

Ávísar tíðir á árinum er einki sum í góðsku kann kappast við føroyska epla- og aðra grønmetisframleiðslu. Fyri umhvørvisliga røkt av jørðini hevur slík framleiðsla eisini týdning, men tryggleikin hjá bóndum at kunna sleppa av við slíka framleiðslu er í dag so lítil, at bert teir fæstu hætta sær undir hana. Í roynd og veru skal at kalla einki til at gera eitt árs avrik hjá bónda til einkis, og handilsliðið torir av tí sama ikki at líta á føroyska epla- og grønmetisframleiðslu.

Nevndin heldur tí, at tað hevur stóran týdning, at landsstýrið eitt ávíst áramál kann veita stuðul til uppbygging av sølu av epla- og aðrari grønmetisframleiðslu.

Seinni í álitinum hevur nevndin annars uppskot um økta almenna tænastu og stuðul til varðveitslu av týdningarmiklum framtíðar virkismøguleikum hjá føroyskum jarðarbrúki, t.e. av føroyska rossinum, seyðinum, gásini, dunnuni og, um hetta yvirhøvur gjørligt, føroysku kúnni, umframt av føroyskum eplasetum og rótum. Henda tænasta og stuðul roknar nevndin ikki upp í vanliga stuðulspartin, men sum týdningarmikil í varðveitslu av fjølbroytni og eginleikum í altjóða høpi, og sum so samstundis kunnu hava ikki ongan vinnuligan týdning.

## 3. Møguleikar fyri størri lønsemi

Møguleikarnir fyri so góðum lønsemi í føroyskum vinnuligum jarðarbrúki, soleiðis sum tað verður rikið í dag, at landbúnaðurin kann klára seg uttan studning, eru ikki lættir at síggja. At landbúnaður í Føroyum skal verða rikin uttan studning og kortini vera lønsamur, tá neyðug atlit eru tikin til umhvørvislig, heilsulig, veteriner, djóraetisk o.o. krøv, er kanska eitt stórt krav at seta vinnuni, men nevndin hevur

hildið, at neyðugt er at seta kravið so skarpt upp fyri at fáa lýst trupulleikarnar út í æsur.

Við kravinum um studningsleyst jarðarbrúk ber eisini betri til at umrøða, hvørjar framleiðslu og hvørjar „tænastur“, ið tað landspolitiskt eigur at verða lagdur so stórur dentur á, at tað kann kennast neyðugt at veita stuðul, og hvussu ein møguligur stuðul so eigur at verða veittur, at hann ikki fær ov óhepnar fylgjur.

Í mikroøkonomisku lýsingini av fíggjarviðurskiftunum hjá einstøku bøndunum, ið Grannskoðaravirkið INPACT hevur gjørt, sæst á fylgiskjali 11W, at í 1996 lá besta úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar og áðrenn inntøkur av neytakjøti, seyði og øðrum inntøkum, men tó við inntøkuførdum mjólkarstuðli, stráfóðurstuðli og avloysingarendurgjaldi uppá 2,86 kr. fyri liturin. 4 garðar høvdu eitt úrslit omanfyri 2,00 kr./liturin, nevniliga uppá kr. 2,86, kr. 2,34, kr. 2,24 og kr. 2,23 liturin. Inntøkurnar áðrenn avskrivingar hjá hesum 4 gørðunum, tá rentur vóru tiknar við og frammanfyri nevndu aðrar inntøkur vóru ávikavist kr. 3,33, kr. 2,56, kr. 2,88 og kr. 2,43 fyri liturin. Hugsaðu vit okkum fyri hesar garðarnar, at allur studningur fall burtur, hevði úrslitið verið ávikavist kr. 2,09, kr. 1,39, kr. 1,62 og kr. 1,20 liturin. Krevja vit 300.000 kr. í avlopi til avskrivingar og løn til bónda, skuldi mjólkarframleiðslan á tí fyrsta garðinum ligið upp í móti 150.000 litrar árliga, hjá næsta garðinum uppá 215.000 litrar, hjá triðja garðinum uppá 185.000 litrar, meðan fjórði garðurin hevði ikki klárað seg við minni enn 250.000 litrum. Frægasti garðurin hevði í 1996 eina mjólkarframleiðslu uppá knappar 130.000 litrar.

Verður sæð burtur frá, um garðarnir hava umstøður at hava so mikið av mjólkneytum, at teir kunnu framleiða meira enn 150.000 litrar um árið, (til tað krevst í minsta lagi 20 mjólkkýr umframt umstøður til viðseting o.a., og garðarnir mugu herumframt hava egið grasfóður svarandi til 15-20 ha av góðum, vetrarfriðaðum bøi) krevst, at teir eisini sleppa av við tað meira av mjólk, enn teir framleiða higartil. Við tí afturgongd, sum hevur verið í samlaðari mjólkarsølu í landinum og við teirri kvotaskipan, ið bøndur nú hava lagt á seg sjálvar, tykjast sostatt smáir møguleikar hjá bøndum at fáa líkinda vøkstur í inntøku síni við størri mjólkarframleiðslu, uttan so at aðrir bøndur leggja sína mjólkarframleiðslu niður.

Verður hugt at útreiðslunum, sæst at tølini fyri einstøku útreiðslurnar sum heild kunnu vera eitt sindur ivasom. Taka vit meðal fyri allar 8 garðarnar sæst, at høvuðsútreiðslurnar liggja á kraftfóðri, kr. 1,97 uppá liturin, meðan næstar teimum liggja umsiting, fjós og tól uppá 0,44 kr./l, traktorur, bilur o.a. uppá 0,36 kr./l, ravmagn og olja uppá 0,29 kr./l, handilstøð uppá 0,14 kr./l og løn uppá 0,14 kr./l. Uppi í kraftfóðurútreiðslunum eru eisini útreiðslurnar av kraftfóðri til seyðin, til viðseting v.m., men fekst kraftfóðurkostnaðurin lækkaður við

50 oyru liturin uttan minkaða framleiðslu, t.e. við meira av egnum stráfóðri, kundi neyðuga mjólkarframleiðslan verið knappar 30.000 litrar minni um árið. Tað er illa hugsandi, at umsitingin, fjós og tól kann lækka, meðan aðrar útreiðslur kanska kunnu lækka eitt sindur, tó helst ikki meira enn við nøkrum sum svarar til lækking í mjólkarframleiðsluni uppá u. 10.000 l. um árið. Vórðu hesar ábøtur gjørligar, hevði tað merkt, at frægasti av 8 gørðunum hevði havt meira enn 300.000 kr. til avskrivingar og løn til bónda uttan studning. Tá eru møguleikarnir fyri øktari mjólkarframleiðslu, sum uppskotna avtøkan av mjólkarkvotuni kann geva, ikki tiknir við.

Møguleikarnir fyri betri lønsemi hjá mjólkarbónda, ið eisini hevur seyð, tykjast sostatt at liggja í bøttari mjólkarkvotu, í størri stráfóðurframleiðslu (merkir í roynd og veru meira arbeiði hjá bóndanum) og í hækkaðum øðrum inntøkum av garðinum.

Nevndin hevur ikki fingið roknskapartøl, ið lýsa inntøkuna hjá bónda, ið meira burturav hevur seyðin sum álit. Trúliga eru møguleikarnir hjá honum ikki stórir. Siga vit, at inntøkan av hvørjum seyði, hann tekur, er um 700 kr., skal hann taka u. 425 lomb og seyðir um árið fyri at fáa eina inntøku uppá 300.000 kr. árliga. Tá tað í hesum einki er roknað til medisin, røkt, kraftfóður, seyðahús, fletting o.s.fr., skilst, at eingir garðar eru, sum kunnu liva av seyðahaldi burturav, gera teir ikki meira burturúr skurðinum enn lata hann sum rávøru. Nevndin hevur lagt til merkis, at fleiri bøndur eru farnir at fáa sær meira burtur úr seyðinum enn bert krov, men hevur eingi tøl fyri, hvussu hetta hevur vignast. At hesir bøndur ikki eru givnir við tí, kann tó benda á, at ikki einki liggur eftir.

Tó at frammanfyri standandi tøl og metingar siga, at tað fæst ikki slíkt lønsemi í føroyskt jarðarbrúk, at tað uttan stuðul og uttan eykainntøku til bónda stavandi frá aðrari vinnu kann geva bónda u. 300.000 kr. í inntøku um árið til sín sjálvan og til avskrivingar, hevur nevndin hildið, at tað eigur at bera til at fáa slíkt lønsemi. Nevndin heldur, at jarðarbrúkið í Føroyum er vorðið bundið í ónýtiligari umsitingarskipan og av gomlum nýtsluhættum, og at studningsskipanirnar hava í roynd og veru gjørt sítt til at læst hugsan bónda til kendar framleiðslur og frá at ganga nýggjar leiðir.

Nevndin ger somuleiðis vart við, at roknskapartølini fyri 1996 bert eru av 8 gørðum. Verða tølini fyri 1994 nýtt, er myndin yvirhøvur ljósari.

# E. Ognar- og grannaviðurskifti á landbúnaðarognum

Lógirnar, ið regulera ognar- og grannaviðurskiftini á landbúnaðarognum í Føroyum, forða í roynd og veru ikki álvarsliga fyri, at vinnuligt jarðarbrúk kann verða rikið í Føroyum. Men tær skunda heldur ikki undir, at eitt nútímans vinnuligt jarðarbrúk tekur seg upp í landinum. Mangar av lógunum eru gjørdar til heilt aðra tíð enn nútíðina, tak t.d. gjølligu reglurnar um torvskurð í hagastevnulógini, og stórur dentur er lagdur á at tryggja gomlum jarðarbrúks- og samfelagsskipanum ímóti broytingum, sbr. munin á atkvøðureglum við samtykt og avtøku av kenning.

Í summum førum eru lógarreglurnar tó beinleiðis til bága fyri jarðarbrúkara, ið ætlar at reka vinnuligt jarðarbrúk, men yvirhøvur eru lógarreglurnar bert avoldaðar og púra óneyðugar. Nevndin ger annars vart við, at í høgum, har bert landsjørð er, kunnu tær alraflestu reglurnar verða avtiknar, meðan tað í høgum við bert ognarjørð ella ognarjørð og landsjørð, verður helst neyðugt at varðveita fleiri av reglunum fyri at tryggja skipaðar mannagongdir at loysa ósemjur og halda skil á millum ymisku eigarararnar.

Nevndin hevur tó valt at meta lógarreglurnar út frá málsetninginum, hon frammanfyri hevur sett fyri vinnuligum jarðarbrúki fyrst og fremst.

## 1. Lóg um hagastýri og røkt v.m.

Størsti bágin fyri vinnuligum føroyskum jarðarbrúki er býtið millum innangarðs og uttangarðs, og at øll landbúnaðarjørð í grundini er at rokna sum hoyrandi til ein haga. Harnæst kemur, at meðan eigari kann fáa eyðmerkt, hvør hansara ogn er innangarðs, ber einans til í einstøkum førum at fáa eyðmerkt uttangarðsjørðina eisini, t.e. tá landsjørð er frábýtt í egnan haga.

Har sum útskifting fór fram í øðrum londum, og menn gjørdust ognarbøndur, gjørdist óneyðugt at skilja ímillum innangarðsjørð og uttangarðsjørð og hava serligar reglur um nýtslu av hesum pørtum av landbúnaðarjørðini. Tað lá hjá tí einstaka bóndanum at gera av, hvussu hann nýtti sína jørð. Sum ognarmaður ansaði hann eftir at nýta sína ogn best møguliga og tryggja, at hann varð einsamallur um hesa nýtslu. Í hesum sambandi gjørdi hann oftast av at flyta hús síni út á ogn sína, so hann enn betur kundi røkja hana.

Við teirri útskifting, ið longu er farin fram, og sum nevndin hugsar sær at fara at verða framd áhaldandi, soleiðis at 4 marka garður ella størri kann verða býttur í haga fyri seg, fær lógin um hagastýri og røkt v.m. ongan týdning fyri hesar garðar. Lógin ásetir reglur fyri

stýri, ið skal verða valt, um talan er um haga í samogn hjá 2 ella fleiri eigarum.

Har bert ein eigari er av haga, vilja greinirnar 1 – 12 verða óneyðugar. Grein 13 um mark til allan seyð í haga verður neyðug, men greinirnar 14 – 33 mugu somuleiðis haldast at fara at verða óneyðugar. (Tað má haldast vera upp til einstaka hagaeigaran at gera av, hvussu nógv ross, ið hann heldur á sínari ogn, um bert hann heldur tey inni á hjá sær sjálvum, og annars heldur ásetingarnar um bitsdýr, sum nevndin fer at skjóta upp í øðrum sambandi. Tí er ásetingin í grein 25, seinasta punktum, eisini óneyðug. Reglurnar í grein 30 um at ganga um mark, skuldu eisini verið óneyðugar, nú allar Føroyar eru matrikuleraðar.)

Skal hvør hagi (jarðarbrúksogn) vera og verða nýtt sum sjálvstøðug, samanhangandi eind eru greinirnar 34-37 eisini óneyðugar, og nevndin heldur, at tær eiga í øllum førum at verða strikaðar. Grein 38 um summarhaga er eins og greinirnar 39-46 um torvskurð óneyðugar. Eftir av lógartýdningi er so bert grein 47 um hald av varðagøtum.

Nevndini er sum longu nevnt greitt, at frammanfyri nevndu lógarstrikingar í fyrsta umfari bert kunnu fáa gildi fyri tann triðingin av høgum í Føroyum, har bert landsjørð er. Men nevndin hugsar sær samstundis, at eitt miðvíst arbeiði við útskifting v.m. fer fram, soleiðis at øll landsjørð í Føroyum verður savnað fyri seg, meðan ognarjørðin verður savnað í høgum fyri seg. Á henda hátt kann so í hvussu so er helvtin av føroysku landbúnaðarjørðini koma undir karmar, har tað er upp til hann, sum situr við henni at reka vinnuligt jarðarbrúk.

Ein serligur trupulleiki í føroyskum jarðarbrúki hevur altíð verið kenningin. Henda skipan ber øðrumegin boð um, at einstaki eigarin hevur hug at reka sína ogn so vinnuliga væl, sum umstøðurnar annars loyva honum, men hin vegin hóskar kenningin illa inn í ta jarðarlóggávu, sum er. Hagastevnan (aðalfundurin), hagastýrið (nevndin) og røktingarmaðurin (stjórin) fáa ikki heilt somu møguleikar at virka fyri haganum sum heild, tá felagsognin samstundis er fyri sjálvstøðugum virkis- og avgerðarhátti. Felagsskapurin, sum hagastýrislógin leggur upp til, gerst øðrvísi, har kenning er. Hetta sæst m.a. av, at røktingarmaðurin hevur skyldu at „melda“ brot á kenningina til sýslumannin.

Nevndini er greitt, at tað fer ikki at bera til at taka kenningina av. Hartil hevur hon verið so leingi og hevur so djúpar røtur. Men nevndin heldur, at stigið so heldur kann verða tikið fult út, soleiðis, at hagar, har kenning er samtykt og hildin uppi, verða útskiftir millum eigararnar. Eigarar, ið heldur vilja hava ogn sína í felag, kunnu undir útskiftingini biðja um at fáa ogn sína lagda til grannahaga, ið hevur fela.

Samanumtikið heldur nevndin,

at lóg um hagastýri og røkt v.m. frameftir bert skal hava gildi fyri ognarjørð, ið verður rikin í fela,

at ognarjørð, ið verður rikin í kenning, skal verða útskift. Røkt av hesari jørðini liggur á einstaka eigaranum einsamøllum,

at landsjørðin verður býtt frá ognarjørðini og løgd samlað – innangarðs og uttangarðs – í lutir, ið kunnu verða riknir vinnuliga, og

at jarðir kunnu verða útskiftar og samanlagdar tvørtur um gomul hagamørk og bygdarmørk til nýggjar sjálvstøðugar eindir.

## 2. Lóg um grannastevnu v.m.

Meðan lógin um hagastýri og røkt v.m. ikki forðar stórvegis fyri vinnuligum jarðarbrúki, tá sæð verður burtur frá greinunum 34 – 37, so er grannastevnulógin ein forðing. Her kunnu mál um útskifting, ið er fortreyt fyri vinnuligum jarðarbrúki, verða steðgað.

Sum víst á í gjøgnumgongdini av lógini, fór alt virksemið, sum fólk fekst við her á landi væl upp í okkara øld, fram innanfyri tann miðdepil, sum æt bygdin. Vanliga gerandislívið kundi livast uttan, at tað yvirhøvur var neyðugt at hava samband við aðrar bygdir. Hetta var bæði ein lívbjargnistreyt og viðurskifti, givin frá náttúrunar hond. Tað var undir hesum umstøðum neyðugt, at hesin dagligi felagsskapur, ið bygdin var, hevði eitt forum, har hann kundi áseta almennar reglur fyri virkseminum í bygdini.

Hesar eru ikki umstøðurnar í dag. Bygdin og bygdarlívið hava í dag als ongan týdning, hvørki sum samvirkandi samfeløg ella sum sjálvstøðugar eindir. Meðan mannfólkið fyrr, í hvussu so er, var heima um veturin og virkaði í bygdini tá, er nú størri parturin av fólkinum fluttur av bygdini, og tað sum eftir er, hevur annaðhvørt dagligt arbeiði av bygdini ella hevur lítla vinnuliga úrtøku. Jørðin, ið krevur dagliga røkt, liggur av somu orsøk í órøkt, tí røktin av henni skal gerast uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Tað tykist, sum um avbygdamaðurin, ið eigur jørð, ofta fer betri um hana, enn bygdamaðurin. Kanska kemst hetta av, at hann ikki røkir hana við vinnuligum endamáli, meðan bygdamaðurin er meira bundin av vanabundnum stirvni í bygdini.

Tó at sýslumenninir á fundi við nevndina vóru fegnir um ta forum, ið grannastevnan vísir seg at vera at loysa smærri trupulleikar, áðrenn hesir fáa vaksið seg stórar, og størri mál, ið eru løgd til grannastevnuna at loysa, heldur nevndin, at grannastevnulógin eigur at broytast, so hon ikki verður so forðandi fyri vinnuligum jarðarbrúki. Grannastevnan er, sum sýslumenninir siga, eitt frálíkt forum at loysa mál í einum statiskum samfelagi við lítlum og ongum framburði. Kanska

enntá bert á pappírinum, soleiðis sum hetta m.a. sæst á, hvussu trupult tað er at halda grannastevnuviðtøkum uppi. Sum lokaldemokratiskt forum er grannastevnan góð, og tí hevur nevndin valt ikki at skjóta upp, at hon verður heilt avtikin. Men nevndin heldur, at tað hevur týdning at greina betur, hvørji mál kunnu verða løgd til grannastevnu og avgerast har, og at gera avgerðarrættin meira knýttan at teimum fastbúgvandi.

Nevndin heldur t.d., at grannastevnuviðtøka eigur at verða gjørd millum teirra, ið persónliga møta upp á grannastevnu, og at samtykt t.d. ikki kann verða gjørd við fulltrú. Nevndin heldur, at hetta øðrumegin kann geva teimum fastbúgvandi størri møguleika at ávirka egnu viðurskifti síni – vónandi til frama fyri vinnuligum jarðarbrúki -, men hin vegin ber ein slík regla við sær, at tað er avmarkað, hvat kann verða samtykt á grannastevnu.

Trupulleikin er tó ikki so stórur. Á grannastevnu kunnu viðtøkur gerast 1) um nýtslu av jarðarognum og lunnindum, sum eru feli, og sum tað ikki sambært lóggávuni skal takast avgerð um á hagastevnu ella á annan serligan hátt um nýtsluna av, 2) hvat skal latast til tarvahald í avvarandi bygd, og 3) um slík viðurskifti, sum annars við lóggávuni eru løgd til avgerðar á grannastevnu. Hvat viðvíkur 1), heldur nevndin onga orsøk verða at gera serliga broyting, og 2) man ikki hava praktiskan týdning. Tá tað snýr seg um 3), hevur nevndin longu frammanfyri skotið upp, at reglurnar um at leggja mál, sbrt. grein 25 í lógini um hagastýri og røkt v.m. og grein 30 í somu lóg verða avtiknar. Á sama hátt vilja greinirnar 2 og 39 í lóg um girðingar og friðing av lendi v.m. gerast týdningarleysar, tá ræður um aðra jørð enn ognarjørð í fela. Nevndin heldur ikki, at tað eigur at liggja til grannastevnu at áseta reglur um leiting eftir rossi og neytum í haga, men at slíkar reglur eiga at verða samtyktar fyri landið sum heild – burtursæð frá, at nevndin ikki heldur, at tað eigur at fyrikoma, at fólki skal loyvast at leita eftir rossum ella neytum í haga, tey ikki hava bitsrætt í. Tá tað snýr seg um greinirnar 3 og 4 í lóg um áir og vøtn, heldur nevndin onga orsøk vera til at taka avgerð eftir hesum greinum frá grannastevnuni, heldur ikki grein 2 um útinning av av veiðurættindum í fela og heilt ella partvísa friðing av veiðu innangarðs, grein 5 um fuglaveiðu í bjørgum, urðum o.l. í somu lóg um fuglaveiðu, ella grein 1 í lógini um týning av yngli hjá ravninum um val av eftirlitsmonnum at hava eftirlit við, at lógin verður hildin uppi.

Men nevndin heldur hin vegin, at ásetingarnar í útskiftingarlógini, grein 6 um at taka støðu til um farast skal undir útskifting innangarðs og grein 78 um útskifting uttangarðs ella av lunnindum og brúksrættindum sum eru í feli, skulu kunna forðast á grannastevnu. Tískil heldur nevndin, at krav, undirskrivað av minst tíggjundapartinum av samlaða markatalinum av innangarðsjørðini í bygdini, skal verða gingið á

møti, um uppmøttir ánarar, sum í minsta lagi umboða fimtingin av gamla markatalinum av innangarðsjørðini í bygdini taka undir við tí á grannastevnu. (Talið av ánarum er, soleiðis sum bygdirnar í dag eru vorðnar og skipaðar, uttan týdning eftir tykki nevndarinnar).

## 3. Lóg um landbúnaðarstevnur

Landbúnaðarstevnur eru ikki kendar í Føroyum fyrr enn við lov nr. 54 frá 1. apríl 1891 Om oprettelse af landvæsenskommissioner på Færøerne. Í dag er eingin ivi um, at lógin er ein leivd frá einari tíð, har endamálið við jarðarbrúkinum í Føroyum var ógreitt, og har tað tí lá á landbúnaðarstevnuni og yvirlandbúnaðarstevnuni at taka dagar ímillum, um ein landbúnaðarlig avgerð hjá einum myndugleika var haldgóð ella ikki.

Nevndin heldur, at tey mál, sum sambært lóg um hagastýri og røkt v.m., lóg um grannastevnu v.m., lóg um girðingar og friðing av lendi, lóg um áir og vøtn og lóg um landsjørð kunnu verða løgd inn fyri landbúnaðarstevnu og yvirlandbúnaðarstevnu við uppskoti nevndarinnar til nýggja skipan í alra flestu førum eru burturdottin, og at eftirverandi mál og spurningar kunnu betur verða viðgjørdir í vanligum rættarmáli.

Nevndin skjýtir tí upp, at lógin verður avtikin, og at neyðugar rættingar samsvarandi hesum verða gjørdar í fyrrnevndu lógum.

## 4. Útskiftingarlógin, matrikuleringslógin og tinglýsingarlógin

Í framhaldi av tí, sum longu er sagt um grannastevnulógina, skjýtur nevndin upp, at § 6 í Lov om Udskiftning verður broytt soleiðis, at 3. petti fær hetta orðaljóð: „Um málið framvegis skal fáa frama, má málið á grannastevnu verða samtykt av ánarum, sum tilsamans eiga minst fimtingin (nú fjórðingin) av gamla markatalinum av innangarðsjørðini í bygdini.“ (strikað verður ásetingin um, „og sum í tali eru minst fjórðingurin av ánarunum av innangarðsjørðini.“)

## 5. Lóg um girðingar og friðing av lendi

Viðgerðin av lóg um girðingar og friðing av lendi hava sýnt, at ikki í øllum hevur verið gjørligt at komið til semju um broytingar í lógini.

Samsvarandi hagastevnulógini, 8. kapitul, eigur eigarin av omanfyriliggjandi haga rættin til bit hjá seyði á bøi ella aðrari innangarðsjørð, uttan so at annað lógligt er fyrisett. 4 marka garður, ið ætlar at

leggja seg eftir at nýta innangarðsjørðina intensivt, eitt nú til grønmetisvelting, eplavelting ella á annan hátt, verður noyddur at fáa avloysing av vetrarbitsrættinum hjá omanfyriliggjandi haga. Skal hann eisini verja frælsið ímóti biti, verður hann herumframt noyddur at hegna bøin ella innagarðsjørð sína fyri tí seyði ella øðrum kríatúrum, ið hava vetrarbitsrætt á grannabøi.

Møguleikarnir at fáa vetrarbitsrættin avloystan eru til steðar í Hagastevnulógini, men gongdin at fáa hetta framt kann verða long, og hon kann miseydnast á Yvirlandbúnaðarstevnu, kemur málið so langt. Garðurin kann eisini í samráð við Jarðarráðið fáa avloysingina av vetrarbitsrættinum goldnan av festikontoini, um nøkur er, og um Jarðarráðið er samt í, at tiltakið er til frama fyri garðin.

Við nýggjari útskifting tykist eisini møguligt hjá garðinum at fáa lagt til sín meira av innangarðs, ímóti at lata øðrum gørðum ella ognum afturfyri av tí uttangarðsjørð, ið liggur til garðin, um nakar av grannunum hevur áhuga fyri einum slíkum býti.

Tá tað snýr seg um upptøku av seyði, neytum, rossum, gæs o.ø., ið ólógliga er komið í haga ella inn á bø, heldur nevndin, at eisini her eiga at verða gjørdir lættar, so bóndi ikki hevur ov stórar búrokratiskar reglur at stríðast við, og nevndin heldur eisini, at krøvini um girðingar eiga at verða gjørd greiðari viðv. teimum girðingum, sum tað í dag eru náttúrligar at nýta.

Men nevndarlimirnir eru rættiliga ójavnir á máli í spurninginum um at venda girðingarskylduna við, ella rættari at taka garðaskylduna av, soleiðis at tað er eigarin av bitdýrum og fenaði, ið skal hava skylduna at halda hesi inni á teirri ogn, sum hann hevur bitsrætt á.

Nevndin er ikki ósamd um, at tað samsvarar best við vandaligt vinnuligt hald av húsdýrum og fenaði, at eigarmaður heldur hesi inni hjá sær sjálvum, har hann kann hava eftirlit við teimum og geva teimum ta røkt, ið samsvarar við tað vinnuliga jarðarbrúk, ið hann hevur valt, og teir møguleikar, ið uppskotnu broytingarnar annars geva fyri vinnuligum jarðarbrúki, serliga tá hugsað verður um ognarrættin.

Men ein broyting, ið leggur øllum bóndum á at hava seyð sín inni hjá sær sjálvum ella á øki, sum teir hava bitsrætt á, vendir so ógvusliga upp og niður í higartil kenda jarðarbrúkinum í Føroyum, at nevndin hevur ikki funnið rætta loysn á spurninginum. Ikki minst eru tað kostnaðirnir av ábyrgd av tí, ið kann standast av broti á skylduna at hava dýr inni á egnum øki, og kostnaðurin av at seta girðingar upp ímóti eitt nú landsvegum og mongu sethúsaognunum, ið eru ymsastaðir á innangarðsogn bónda, sum gera, at nevndin ikki setir nakað uppskot fram hesum viðvíkjandi.

So hvørt nýggja lógin um landsjørð, sum nevndin skjýtur upp at seta ístaðin fyri gomlu lógirnar um landsjørð og „jordbrugets

fremme“, fer at virka, heldur nevndin, at tað fer at verða lættari at finna loysn á hesum spurningi.

### 6. Lógin um áir og vøtn

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

### 7. Fuglaveiðilógin

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

### 8. Ymsar gamlar lógir

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

## F. Plantusjúkur og skaðadýr

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

## G. Tænastur til landbúnaðin

Nevndin hevur ikki greiniliga viðgjørt spurningin um almennar tænastur til landbúnaðin, og hvussu hesar skulu fíggjast, og verður tí bert í stuttum komið inn á spurningin.

Nevndin mælir til at málið verður tikið uppaftur við tí fyri eygað, at nýggjar reglur verða gjørdar um, hvussu hesar tænastur skulu skipast, og hvussu hesar skulu fíggjast.

## 1. Búnaðarráðgeving

Nevndin heldur, at besta samskifti og besta úrslitið av ráðgevingararbeiði fæst, tá vinnan hevur ábyrgdina av hesum, og hon eisini hevur ábyrgd av, hvussu tann fíggjarligi raksturin verður.

Tað er tó neyðugt, at almennur stuðul verður latin, og at hesin verður treytaður av, at fyrisettar reglur vera hildnar.

## 2. Búnaðarroyndir

Royndararbeiði eigur at vera ein almenn uppgáva og skal vera fíggjað sum slík.

Búnaðarroyndir í Føroyum kunnu ikki taka allar teir spurningar upp, sum koma fram, og er tað tí neyðugt við neyvari raðfesting av, hvussu og nær farast skal undir tær ymisku royndaruppgávurnar.

Tað almenna royndarvirksemi skal kunnu átaka sær at gera búnaðarroyndir fyri privatar, í tann mun hetta arbeiði ikki forðar fyri, at tær áður raðfestu uppgávurnar verða gjørdar sum ætlað. Hesar royndir skulu gjaldast av teimum, sum hava biðið um tær.

Nevndin heldur, at serligur dentur skal leggjast á, at royndararbeiðið stimbrar tað lívfrøðiliga margfeldi, soleiðis at vit kunnu halda lív í og menna grøði, sum hevur vaksið her á landi gjøgnum langar tíðir, t.d. eplir og røtur.

## 3. Aliarbeiði

Aliarbeiði miðar ímóti at gagnnýta teir arvfrøðiligu eginleikarnar best møguligt.

Nevndin metir, at hetta arbeiði skal verða fyriskipað av vinnuni, sum eisini ber kostnaðin av tí.

Almennur stuðul skal kunna veitast, treytað av at arbeiðið verður gjørt eftir ávísum reglum.

Nevndin heldur, at seyðaalingin skal ansa eftir, at føroyski seyðurin framvegis hevur sínar eginleikar, og at teir ikki verða oyddir við fyrilitarleysum innflutningi av seyði ella sáð. Seyðaaliarbeiðið skal stuðlast soleiðis, at størri dentur verður lagdur á at betra góðskuna á tí føroysku ullini. Nevndin metir, at tað aliarbeiðið, sum hevur til endamáls at varveita føroysk djóra- og plantusløg, t.d. ross, neyt, gæs, dunnur, eplir og røtur, skal gerast undir serligari skipan og fáa serstaka almenna játtan.

## 4. Búnaðarskúli

Nevndin heldur ikki at tað er nóg stórt næmingagrundarlag til at ser-

ligur búnaðarskúli, sum vit kenna teir úr grannalondum okkara, verður settur á stovn í Føroyum.

Hinvegin er tað greitt, at føroyskir bøndur hava eins væl brúk fyri skúling sum aðrir.

Førleikakrøv til at eiga garð ger tað enn meira neyðugt, at bøndur kunnu útbúgva seg, so teir eru førir fyri at lúka tey í lóg ásettu krøv.

Nevndin ræður tí til, at tann verkliga útbúgvingin í størsta mun fer fram á gørðum í Føroyum, og skulu hesir tá vera góðkendir av Búnaðarráðnum, um teir skulu teljast við sum førleikagevandi.

Tann ástøðiliga skúlagongdin verður tí at fara fram uttanlendis, tó skulu møguleikar vera fyri styttri ástøðiligum skeiðum í Føroyum.

Nevndin er samd um at búnaðarskúling, eins og onnur skúlagongd, er ein almenn uppgáva, og skal henda tí fíggjast av tí almenna.

Játtanin til búnaðarskúling skal eisini umfata teir næmingar, sum fara uttanlendis á skúla fyri at fáa ta neyðugu útbúgvingina, sum krevst, og sum teir ikki kunnu fáa í Føroyum.

## 5. Djóralæknaviðurskifti

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

### *a. Lógin um smittandi sjúkur*

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

### *b. Djóralæknatænastan*

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

### *c. Eftirlit við innflutningi*

Nevndin ger vart við, at stórur vandi er fyri smittu av ymiskum slag, bæði á djór og plantur, av innflutningi – bæði av rávøru til landbúnaðin og av matvørum til brúkara. Mælt verður tí til, at eftirlitið við tílíkum innflutningi verður hert.

## H. Umhvørvisreglur landbúnaðinum viðvíkjandi

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

## I. Landbúnaðurin, ferðavinnan og frítíðaráhugamál

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

# VI. UPPSKOT NEVNDARINNAR

## A. Almennar viðmerkingar

### 1. Tvær hugsaðar skipanir

*Nevndin er samd um, at aðalmálsetningurin fyri føroyskan vinnuligan landbúnaða má vera, at hann á marknaðarbúskaparligum treytum framleiðir tær vørur og tænastur, ið føroyska veðurlagið, føroyska lendið og føroyski kunnleikin og arbeiðsmegin kunnu gera kappingarførar, og sum samstundis lýkur vaksandi altjóða krøv um umhvørvis- og náttúrurøkt og hevur fyrilit við røkt og umstøðum hjá húsdýrum.*

Nevndin heldur ikki, at hesin málsetningur verður rokkin við verandi skipan, og hon trýr heldur ikki, at nakað, sum líkist hesum málsetningi, verður rokkið við einans at skilja jarðarumsitingina frá jarðargrunninum og so bøta eitt sindur um umsitingarreglur og tænastur til landbúnaðin.

Onnur skipan má finnast, har ábyrgd og ræði fylgjast, har marknaðurin fær ræði, soleiðis at framleiðslan verður mett eftir, hvat virði hon hevur fyri keyparan og ikki eftir, hvussu nógv arbeiði er lagt í framleiðsluna. Ognarrættur hevur við sær ábyrgd av ognini, serliga tá tað almenna hevur tikið á seg at røkja ognarrættin, heldur enn at lata hann liggja hjá tí einstaka. Verður ognarrætturin ikki nýttur og røktur, fer annar við honum, soleiðis sum tað í dag er hent við føroysku landsjørðini, har hon verður nýtt og í nógvum førum misnýtt av festarum og leigarum, sum áttu teir jørðina at gera við, sum teimum lystir, uttan at teir fáa ágóðan av góðari røkt ella sviðan av misrøkt.

Í 1769 komu í Danmark 4 lógarskipanir, sum eftir 150 árum og eftir nógvar seinni lógir og kunngerðir førdu við sær, at í 1905 vóru 95 % av gørðum í Danmark ogn bónda. Gongdin í Danmark hevði rættiliga stóra ávirkan á gongdina í Føroyum. Tó at kongsjørðin í Føroyum ikki lá undir góðsi sum festini í Danmark, royndu myndugleikarnir at fáa skipa føroysku kongsjørðina eftir nakað sama leisti, sum hevði verið nýttur í Danmark og í Norðanlondum yvirhøvur. Festijørðin í Føroyum mundi vera eldri enn góðsini í Danmark, og tey vóru skipaði eftir aðrari lóg enn danskari lóg. Royndirnar at fáa føroysku festijørðina til at gerast ognarjørð vóru nógvar í farnu øld og fram til miðjuna av hesari øld, men einki spurdist burtur úr hesum royndum. Somu lagnu fingu útskiftingarætlanirnar, og ikki fyrr enn aftaná sekstiárini í hesari øldini kom gongd á útskifting, ið nú er komin væl áleiðis um allar Føroyar. Bert tá tað snúði seg um traðarjørð, bar til

at fremja eitt slag av ogn, ið ikki fekk lítlan samfelagsligan týdning, men til menning av viðurskiftum bónda og av bóndastættini, fingu traðarlógirnar lítlan og ongan týdning.

Í 1880-árunum kom danski landbúnaðurin í stóra kreppu; tá var høvuðsframleiðsla hansara korn, ið Amerika og onnur burtursjóarlond kundu veita í stórum nøgdum og bíliga við góða guvuskipagongdini, ið var bygd upp. Eftir stuttari tíð broyttist danski landbúnaðurin frá kornframleiðslu til mjólkar- og grísaframleiðslu og mentist óført. At bøndurnir vóru ognarmenn, t.e. at á hvørjum garði sat bóndi, ið átti garðin og rak hann einsamallur, verður mett at hava havt avgerandi ávirkan á, at danskur landbúnaður kom so væl og so styrktur úr kreppuni.

Síggja vit burtur frá, at útskifting er farin fram seinnu árini í Føroyum, og at vit hava fingið mjólkarframleiðslu á fleiri gørðum, er ikki ov nógv gjørt av at siga, at føroyskur landbúnaður er ikki nógv broyttur seinastu 200 árini. Gamaní arbeiða eingi fólk á gørðunum í mun til fyrr, og bert ein partur av festarunum hevur ikki aðra inntøku at dúva uppá, men garðarnir hava, sum greitt frá, heldur onga inntøku av týdningi, uttan gjøgnum mjólkarsølu.

Nevndin hevur tí sett sær tann spurning, um tað tænir nøkrum endamáli at halda á fram við at royna ta gongd, ið hevur verið gingin í okkara grannalondum, nú so lítið hevur spurst burtur úr hesum royndum í Føroyum.

Einstaki festarin hevur rakstraravgerðina, men ikki ábyrgd av sínum rakstri og kann ikki vinna nakað serligt burtur úr honum. Jarðarráðið hevur lítla ávirkan á tað, sum fyriferst á gørðunum. Tað kann gjøgnum Jarðargrunnin veita lán, men verða lánstreytirnar ikki hildnar, hava Ráðið og Grunnurin lítlan møguleika at gera nakað við tann spurningin.

Í hesum viðurskiftum má tó koma broyting, og sum loysn sær nevndin bert tveir møguleikar. Annar er at selja jørðina til teirra, ið vilja brúka hana sum landbúnaðarjørð, meðan hin er at styrkja Jarðarráðið, soleiðis at tað hevur veruliga ávirkan á nýtsluna av landsjørðini.

## 2. Góðsskipan

Skal ræði og ábyrgd av landsjørðini fylgjast, samstundis sum landsjørðin verður verandi almenn ogn, gerst hetta best við eini skipan, har Jarðarráðið og Jarðargrunnurin verða umskipað til eitt „góðs“, sum hevur alla landsbúnaðarjørð undir hondum og rekur hana á marknaðarbúskaparligum treytum.

„Góðsið“ kann t.d. verða skipað sum eitt partafelag ella í øðrum líknandi formi, har krøv verða sett góðsinum samsvarandi roknskap-

arlógini og um rakstrarligt avlop. Talan er sostatt um eina „privatisering“ av landsjørðini, har „góðsleiðslan“ tekur avgerð um raksturin av einstøku eindunum (gørðunum) og setir fólk í starv á gørðum, ið kanska ikki hava sama innihald og skap, sum núverandi garðar.

„Avtalan“ (kontraktin) millum „góðsið“ og nýggju „festararnar“ verður ikki lógarfest, tí hana mugu partarnir sjálvir tingast og semjast um, men tað er illa hugsandi, at ikki partar av gomlu festiskipanini fara at ganga aftur. „Avtalan“ má sjálvsagt lúka vanlig krøv, ið eru sett í lóg at tryggja arbeiðs- og starvsfólki, men tað ber til at hugsa sær, at „avtalan“ fyrst og fremst lýsir, hvat partarnir vænta hvør av øðrum.

„Festarin“ (uppsitarin) kann t.d. lýsa, hvat slag av framleiðslu, hann vil leggja dent á, hvat úrslit, hann setir sær fyri at røkka, hvørjar íløgur, hann heldur verða neyðugar til at gjøgnumføra tað ætlaða, og hvat hann væntar av trygd og stuðli frá „góðsinum“.

„Góðsleiðslan“ kann t.d. lýsa, hvørjar fráboðanir, hon væntar av „festaranum“ og hvussu ofta, hvørja samsýning, hon vil veita og hvørja eykasamsýning, hvat skotbrá, hon vil geva fyri at náa mál, og hvussu hon fer at bera seg at, um hon metir tað neyðugt at broyta „avtaluna“.

Í einari slíkari skipan finna góðsleiðsla og festari í felag fram til, hvør framleiðsla og hvør marknaður kann geva lønsemi í einstøku eindunum, samstundis sum góðsleiðslan hevur endaligu ábyrgdina av, at jørðin, ið hon skal umsita, verður rikin á forsvarligan hátt og gevur rakstrarligt avlop.

Í sambandi við hvørja einstaka „avtalu“ mugu vit rokna við, at „góðsleiðslan“ ger eina nágreiniliga skráseting av hvørjum einstøkum garði og grannagørðunum, so hon kennir møguleikarnar fyri lønsomum rakstri við verandi skipan, samstundis sum hon kann gera sær metingar um, hvørjir framtíðar møguleikar eru á einstøku gørðunum.

Skal ein slík skipan eydnast, verður neyðugt hjá pørtunum at finna nýggjar vegir og framleiðslur at geva garðinum inntøkur. Slíkir møguleikar eru kanska ikki til staðar á øllum gørðum, men vit hava longu sæð, at nakrir garðar hava eyka inntøkur, ið ikki beinleiðis hoyra til garðin, men sum ikki høvdu verið møguligir uttan garðin.

Nevndini er greitt, at ein slík skipan kann ikki verða sett í gildi frá einum degi til annan. Sum er, eru festarar, ið sita lógliga við garðinum og reka og røkja garðin væl, lata hvørjum sítt og fáa eina rímuliga inntøku av garðinum. Hesir festarar hava kanska eisini son ella dóttir, ið hevur búgvið seg til at taka við garðinum eftir foreldur síni uppá somu treytir, ið tey hava havt garðin í hondum.

Kemur tað til skarpskeringar, kunnu løgfrøðisligu rættindi teirra helst ikki greiðast út frá verandi lóg um landsjørð, eitt nú tí at tey í fleiri ættarlið hava sitið við garðinum og hava rættindi, sum tað ikki

ber til at síggja burtur frá. Men eisini har garðurin kanska ikki verður so væl røktur og rikin, hava eftirkomararnir rættindi, ið tað ikki ber til at skúgva so einfaldliga til viks. Undir betri skipan enn henni, vit nú hava, hevði áeggjanin til at fingið meira burtur úr garðinum kanska verið til steðar, kunnug sum tey eru við garðin sum heild.

Nevndin heldur tó, at tað ber til í einari lóggávu um slíka privatisering av landsjørðini at tryggja verandi festarum eina yvirgongdsskipan, og nevndin heldur, at ein „góðsleiðsla“, ið kann geva góðum festarum og eftirkomarum teirra enn betri møguleikar at reka garðin við lønsemi fyri eyga, er betri fyri, enn um hon skuldi skipað alt av nýggjum. Nóg mikið av gørðum eru, ið munu hava tørv á umskipan og nýggjum „festarum“, og fleiri verandi festarar munu ikki vera so sárir um at sleppa burtur úr verandi skipan.

Í einari slíkari skipan, har Jarðarráðið og Jarðargrunnurin sum nevnt verða løgd sum ein heild undir nýggju „góðsskipanina“ við ogn og skuld, hevði verið gjørligt eftir ávísari uppgerð yvir skuld at funnið fram til, um neyðugt er at føra „góðsinum“ meira av eginpeningi. Í staðin fyri, at studningur verður latin til hvønn einstakan festara, kundi verandi studningsheild samlað verið latin „góðsinum“, tó við somu skipan um skjalprógv fyri útgjalding. Hesin studningur átti so eftir ávísari skipan at dottið burtur eftir nøkrum fáum árum, tá „góðsið“ hevði lagað føroyska landbúnaðin til sína framtíðar skipan.

Eitt ivamál í slíkari loysn kann vera, um tað skal bera til hjá „góðsinum“ at selja burtur av landsognini. Hetta vildi í øllum vanligum viðurskiftum verið náttúrligt, men tann prísur, ið føroysk ognarjørð verður seld fyri, stendur á ongan hátt í samljóði við tað, sum jørðin kastar av sær.

Undir hesum umstøðum tykist tað heldur ikki rætt at selja smá festi, sjálvt har eingi grannafesti eru at leggja saman við, tí slík seld jørð vildi ikki verið til frama fyri føroyskt vinnuligt jarðarbrúk. Heldur kundu slík festi verið leigað út fyri seg og undir treytum, ið kundi ment vinnuliga nýtslu av jørðini í nánd. Hinvegin skuldi tó einki verið til hindurs fyri, at „góðsið“ kundi keypt jørð. Hervið kundi „góðsið“ lættari skipað garðar og eindir, ið tað bar til at fáa lønsemi burtur úr.

## 3. Avhending av almennu jørðini

Hin hugsaða skipanin av landbúnaðarjørðini, ið lýkur aðalmálsetningin fyri vinnuligum jarðarbrúki, og har ábyrgd og ræði fylgjast, er sum nevnt, at einstøku festini verða seld festarum ella øðrum landbúnaðaráhugaðum sum vinnuligt jarðarbrúk.

Tá danska landbúnaðarjørðin gjørdist ogn, var landbúnaður enn høvuðsvinnan í Danmark. Í dag er høvuðsvinna í Føroyum í hvussu so er ikki landbúnaður. Sum nevnt í frágreiðingini hjá Per Nicolajsen er bruttotjóðarúrtøkuparturin hjá føroyskum landbúnaði umleið 1 % av bruttotjóðarúrtøkuni hjá øllum vinnum í landinum.

Nevndin er á einum máli um, at hvussu væl ein „góðsskipan“ sum tann omanfyri nevnda so fer at virka, fer hon at vísa seg ov stirvna og ov lítið eggjandi til at finna nýggja framleiðslu og menna verandi. Ein „góðsskipan“ kann vera ein bati og ein neyðug loysn, um annar møguleiki ikki er.

Nevndin heldur, at frægasta loysnin er at selja almennu jørðini. Niðanfyri verður tí greitt frá hesari loysn, og nevndin hevur út frá hesum gjørt uppskot um nýggja lóg um landsjørð.

Nevndin skal tó viðmerkja, at hvørgin av hesum hugsaðu skipanunum kann verða framd eftir heilt stuttari tíð. Rættindi hjá festarum o.ø. og aðrar bindingar, knýttar at festijørðini, eru so stórar, sum er, at uppbygging av einari „góðsskipan“ fer at taka langa tíð. Og áðrenn ein miðvís og væleydnað søla av landsjørðini í lívførum gørðum kann verða framd, liggur eitt stórt fyrireikingararbeiði, ið tað ikki við skili kann verða farið undir, fyrr enn politisk avgerð er tikin um at velja hesa loysn.

# B. Uppskot nevndarinnar

Við frammanfyri orðaða aðalmálsetninginum fyri framtíðar vinnuligt jarðarbrúk í Føroyum er nevndin samd um at skjóta upp niðanfyri standandi uppskot til at broyta núverandi jarðarlógina. Í lógaruppskotinum verður jarðargrunnurin, sum hereftir fer at bera heitið Búnaðargrunnurin skildur burtur úr jarðarfyrisitingini, ið verður løgd undir Føroya landsstýri.

## 1. Søla av almennu jørðini

### *a. Sølupeningurin*

Tá jørð sbrt. núgaldandi jarðarlóggávu verður seld, fer sølupeningurin í Jarðargrunnin, tó at landsjørðin er ogn landsins og ikki Jarðargrunsins. Jarðargrunsins ognir eru umframt reiðupening og útistandandi lán bert skrivstovuhúsið í R.C.Effersøesgøtu, prestajørðin og keyptar jarðarognir.

Nevndin er samd um, at við sølu av almennu búnaðarjørðini, sum eisini skal umfata prestajørðina og keyptu jarðarognir Jarðargrunsins,

ið verða fluttar til landið, eigur sølupeningurin at fara í landskassan. Fer komandi Búnaðargrunninum at tørva meira pening, eigur hesin at verða játtaður serskilt á fíggjarløgtingslóg ella onnur løglig heimild veitt at økja um grunsins fíggjarstøðu.

## b. Keypsprísurin

Truplari enn spurningurin um, hvar sølupeningurin skal fara, er spurningurin um, hvør keypsprísurin skal vera. Í flestu førum kennir festarin seg sum eigara av festinum. Faðir og abbi hava ofta sitið við festinum undan honum, og festarin veit um allar tær ábøtur, ið hann og hesir hava gjørt á festið, og hví hesar ábøtur eru gjørdar. At keypa sítt egna, sum tað mangan fer at verða fatað, vil kennast ringt. Og hvør skal so prísurin vera?

Sum nevnt aðrastaðir, verður ognarjørð keypt fyri prísir, sum einki samband hava við vinnuligt jarðarbrúk, og við tí lønsemi, sum er í vinnuligum jarðarbrúki í dag, studningur ikki íroknaður, er tað úr vón og viti at hugsað sær, at almennu garðarnir skuldu verða seldir fyri hesar prísir.

Hin vegin ber ikki til at selja almennu jørðina fyri lítið og lætt. Áðrenn jørðin verður seld, má hon verða sett í virði; eitt virði, sum er samanbæriligt frá garði til garðs. Tað ber teoretiskt til at siga, at fyrst eigur t.d. eitt festi at verða mett út frá einum handilsligum virði, og síðan eiga ábøtur, sum festari og undangongumenn hansara uttan samsýning hava gjørt á festið, at verða drignar frá hesum handilsliga virði. Hereftir er so komið fram til ein møguligan keypsprís.

Trupulleikin er tó, at einki handilsligt virði er at miða seg eftir, tá tað snýr seg um garðar av ávísari støðd. Sjálvt tá jørð í stórum verður keypt, verður hon ikki keypt við teimum treytum, sum nevndin ræður til verða lagdar á um bústaðarskyldu, um landbúnaðarskyldu og um, at jørðin ikki á nakran hátt kann verða býtt sundur uttan til landbúnaðarnýtslu (loyvt skal heldur ikki verða at býta grundstykki frá).

Tað ber sostatt ikki til á henda hátt frammanundan at rokna seg fram til ein keypsprís.

Ein hugsan um, at um garðarnir bert verða bodnir alment út til sølu, so ein og hvør kann bjóða tað, sum hann heldur er rætti prísurin, er heldur ongin gongd leið. Fyri tað fyrsta verða tað bert eitt lítið fátal av gørðum, sum á henda hátt kunna verða seldir. Flestu festarar sita við lógligum festibrævi fyri sína lívstíð, og teir røkja sín garð og sínar skyldur væl, tá hugsað verður um givnu korini, herundir landbúnaðarpolitiskt. Sjálvt teir, sum ikki sita við vælriknum og væl røktum garði, og sum eru komnir upp í so stóra skuld, at teir ikki megna at gjalda hvørjum sítt, hava rættindi, sum tað ikki uttan víðari ber til at síggja burtur frá. Skal eitt eljustríð um endurgjald fyri mist rættindi

og tikin virði ikki taka seg upp, verður neyðugt at bíða, til festarin til sína tíð leggur frá sær, og sjálvt tá verður endurgjaldsspurningurin kanska ikki so léttur at loysa.

At selja tað fátal av gørðum, sum liggja heilt í festiloysi, kann illa verða bindandi fyri framtíðar sølu. Vit mugu ikki koma í ta støðu, at garðar verða seldir fyri lítið og lætt og minni enn tað virði, teir í veruleikanum hava, ella so dýrt, at ein keypari kemur út í óføri, og serlig stig, sum ikki fara at tæna landbúnaðinum, verða tikin fyri at bøta tað gjørda aftur.

Men skal jørðin seljast, er neyðugt at finna fram til ein prís. Nevndin hevur valt at lata prísin verða ásettan út frá eini gjølligari metan av hvørjum einstøkum garði samanborið við meting av øðrum gørðum.

## c. Hvat skal seljast

Skulu vit halda okkum til málsetningin fyri vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum, er í fyrstu syftu bert gjørligt at selja ein lítlan part av almennu jørðini. Áðrenn jørð verður seld, má landsstýrið (seljarin) hava rímuliga vissu fyri, at tað selda kann og fer at verða nýtt sum vinnuligt jarðarbrúk.

Nevndin skjýtur upp, at áðrenn farið verður undir sølu av almennari jørð, verður fyri ein týdningarmiklan part av gørðunum skrásett støðd, bæði í merkrum og m2, inntøkumøguleikarnir, og hvussu hesir skiftast millum neytahald, seyðahald og aðrar inntøkumøguleikar. Nevndin heldur, at skrásetingin eisini eigur at lýsa, hvørji øki eru velt, og hvørji óvelt øki eru egnað og liggja høgliga til at velta, og støddina á teimum. Í skrásetingini eigur eisini at vera upplýst, hvussu festið er útgjørt við bygningum og amboðum, hvussu stór skuldin er hjá festinum, og um festarin býr á festinum. Skal vera møguligt at meta um framtíðar lívføri hjá festinum, er herumframt neyðugt at fáa upplýst, hvørjar ábøtur, festarin kundi hugsað sær gjørdar á festið, og hví.

Nevndin skjýtur herumframt upp, at henda skráseting verður gjørd av jarðarfyrisitingini undir eftirlitið av Búnaðarráðnum, ið er ráðgevandi nevnd, og sum kemur í staðin fyri Føroya Jarðarráð. Búnaðarráðið skal eisini góðkenna skrásetingina og krevja hana víðkaða, so hon kann tæna teimum endamálum, hon skal røkja, nevniliga

1. at vera grundarlag fyri støðutakan til sølu av gørðum til privata ogn, og
2. at vera grundarlag fyri meting og eftirliti við, um treytir fyri landsjørð í privatari ogn verða hildnar.

Av tí at nevndin hugsar sær, at eingin garður kann verða seldur, fyrr enn í hvussu so er 30 lívførir garðar eru skrásettir, roknar nevndin við,

at Búnaðarráðið í sambandi við skrásetingina av hesum 30 festum tryggjar sær, at grannajørð í almennari ogn ikki liggur í slíkari stødd og skapi, at søla av lívføra garðinum ikki seinni forðar fyri sølu av hesum grannaognum.

Nevndin hugsar sær, at skrásetingin av gørðunum fer fram í samstarvi við festararnar av hesum gørðum, so hon verður so neyv og væl egnað til endamálið við henni sum gjørligt. Út frá skrásetingini skal Búnaðarráðið so gera uppskot um samanbæriligt virðismetingargrundarlag fyri teir garðar, sum ráðið hereftir heldur, tað bera til at selja, og leggja tað fyri landsstýrið, ið má taka støðu til, um tað á hesum grundarlagi eigur at verða farið víðari við samráðingum um sølu av gørðunum, ella um neyðugt er at broyta lógina fyri at fremja málið. Nevndin roknar við, at Búnaðarráðið saman við virðismetingargrundarlagnum gevur landsstýrinum sína hugsan um, hvørja støðu landsstýrið eigur at taka.

Góðkennir landsstýrið virðismetingargrundarlagið, kann verða farið undir samráðingar um sølu av hesum 30 gørðunum. Hesir garðar hava sum festi roynst sum lívførir garðar, og roknað verður við, at teir verða keyptir við framhaldandi jarðarbrúksnýtslu fyri eygað.

Kortini eigur at verða tinglýst treyt um landbúnaðarskylda og bústaðarskylda í sambandi við søluna, og tað verður eisini neyðugt at tinglýsa ávísar ræðisavmarkingar í sambandi við søluna. Millum ræðisavmarkingarnar er at nevna, at ognarin hevur ikki loyvi at selja burturav tí selda annað enn til at leggja saman við aðrari landsjørð, ið er góðkend sum garður.

Nevndin ræður herumframt til, at av tí at tað snýr seg um sølu av jørð til landbúnaðarendamáls, skulu við ognini ikki fylgja rættindi til ráevni o.t. í undirgrundini, og at landsstýrið, áðrenn tað selur, í hvørjum einstøkum føri tekur avgerð um, hvat av ikki landbúnaðarligum týdningi á garðinum skal verða býtt frá sum sjálvstøðug ogn hjá landinum.

Tann frammanfyri nevnda skráseting skal annars fremjast av allari landsjørðini, og út frá henni skal jarðarfyrisitingin saman við Búnaðarráðnum finna fram til, hvørji festi ikki verða mett at vera lívførir garðar, og um møguleiki er við samanlegging við aðrari almennari jørð, tá hon verður festileys, ella møguliga við ognarjørð at skipa lívførar garðar.

## *d. Treytir við sølu og á landsjørð*

Nevndin heldur, at tað í sambandi við søluna er neyðugt at áseta ávísar treytir, sum skulu tryggja, at ætlanin við søluni verður framd, sjálvt eftir at jørðin er vorðin privat ogn.

Hon skjýtur tí upp, at tað við søluna verður tinglýst, at ognin ikki seinni kann býtast sundur, uttan við góðkenning landsstýrisins, og eftir

at Búnaðarráðið hevur tilmælt hetta. Talan kann tó bert verða um at býta jørð frá lívførum garði at leggja saman við øðrum garði, so teir verða báðir betri garðar. Talan kann eisini verða um at býta stóran lívføran garð sundur, men tá skal tað í viðmæli frá Búnaðarráðnum verða greitt tilskilað, at ráðið heldur, at báðir garðarnir verða betri sum garðar, enn gamli garðurin var. Er garðurin ikki lívførur, sum er, er tað sjálvsagt, at ráðið ikki kann mæla til frábýti.

Vanligt hevur verið, at kommunurnar til býarmenningina hava lagt seg eftir almennu jørðini. Nevndin heldur, at skulu kommunur ella tað almenna í framtíðini hava jørð til almenn endamál av landsjørð, kann hetta einans verða gjørt, um tað almenna kann bjóða aðra jørð, sum Búnaðarráðið kann góðkenna sum fullgott endurgjald, í býti við ta, tað vil hava. Í aðra máta verður neyðugt við ognartøku.

Vinnuligt jarðarbrúk treytar, at eigarin situr á garðinum. Nevndin setir tí bústaðarskyldu sum treyt fyri at eiga landsjørð, og nevndin skjýtur somuleiðis upp, at garðurin og eigarin hava landbúnaðarskyldu, t.e. krav um, at teir framleiðslumøguleikar, sum garðurin hevur, verða gagnnýttir, soleiðis at garðurin og náttúrutilfeingið á honum verður virðisøkt.

Brot á lógir um djórahald og um djóravernd og reglurnar í náttúrufriðingar- og umhvørvisverndarlógum verða revsaði eftir hesum lógum, men tað er herumframt ásett í lógaruppskotinum, at eigari av landsjørð hevur skyldu til at halda ásetingarnar í hesum lógum. Nevndin heldur, at tað eigur at verða skylda hjá føroysku jarðarfyrisitingini at taka neyðug stig ímóti eigara av landsjørð, um hann brýtur hesar lógir; sjálvt um hann er revsaður í samsvari við lógirnar.

Fyri festijørð hevur jarðarfyrisitingin eisini skyldu at taka neyðug stig, herundir at siga festara frá, um hann ikki rindar rentur og avdráttir av lánum í festinum.

Í sambandi við skrásetingina av allari landsjørð, sum nevnd er frammanfyri, og sum skal haldast viðlíka og byggjast út eftir tørvi, skal jarðarfyrisitingin ansa eftir, at ásettu treytirnar á landsjørð verða hildnar. Fyrisitingin skal sostatt kunna krevja, at eigari skal lata garð av hondum, um hann ikki eftir ávísari tíðarfreist hevur rættað brotið.

### *e. Keypari*

Forðingarnar fyri øktum vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum liggja fyrst og fremst í verandi skipan. Tað er, tá saman um kemur, bert ein partur av føroysku festigørðunum av lívførari støðd, sum hava stórar trupulleikar í rakstri og røkt, og sum eru so niðurundirkomnir í skuld, at teir av rakstrinum ikki kunnu svara hvørjum sítt.

Skal vinnuligt jarðarbrúk veruliga mennast, við at landsjørðin í lív-

førum gørðum gerst privat ogn, gerst hetta best við, at tað fyrst og fremst verða verandi festarar, sum gerast eigarar av gørðunum.

Nevndin hevur tí lagt dent á at skipa søluna av landsjørðini soleiðis, at tað eru verandi festarar og teirra lívsarvingar, sum hava fyrsta rætt til at ogna sær landsjørðina. Festari, sum hevur lívført festi í hondum, og sum er sinnaður at keypa garðin við teimum treytum, sum eftir tí frammanfyri sagda verða lagdar á landsjørð, lýkur flestu treytirnar, ið verða álagdar; uttan kanska tey førleikakrøv, sum verða skotin upp at galda. Men situr hann við festinum og rekur tað sum lívført festi, metir nevndin, at tað ber illa til at siga, at hann ikki lýkur førleikakrøvini.

Við sølu av festi til slíkan festara, eru flestu av teimum krøvum, sum fara at verða sett, tá annar vil keypa jørðina, longu lokin. Tó leggur nevndin so stóran dent á bústaðarskylduna, at hann ikki sleppur undan henni, og landbúnaðarskylduna hevur hann so framhaldandi.

Tá tað snýr seg um lívsarving hjá festara, sum ikki hevur keypt festið, áðrenn hann legði frá sær, hevur hesin rættin til at keypa fram um uttanfyristandandi, tó skal hann lúka somu treytir, sum ein uttanfyri standandi skal lúka.

Keypari skal sostatt vera fysiskur persónur, maður ella kvinna, sum hevur bústaðartilknýti til Føroya, er myndugur, hevur ella fær sær fastan bústað á garðnum, sjálvur rekur garðin, og hann/hon skal lúka tey førleikakrøv, sum eru neyðug fyri at sita við landsjørð. Nevndin hevur herumframt sett við sum eykatreyt, at hann/hon ikki frammanundan eigur landsjørð, sum landsstýrið kann góðkenna verður løgd saman við tí keypta. Við hesum ynskir nevndin at geva landsstýrinum møguleika at ansa eftir, at almenna jørðin ikki endar á ov fáum hondum. Við bústaðarskylduni ber ikki til at búgva á tveimum gørðum, og tað skal tí vera neyðugt at fáa góðkenning landsstýrisins til samanleggingar av landsjørð.

### *f. Fyrsta søla – herundir sanering*

Tá almenn jørð verður latin til ognar, vil tað almenna hava tann sjálvsagda áhuga, at tað fær sum mest fyri seldu jørðina. Vit mugu í fyrsta lagi rokna við, at fyri ein vælriknan garð, ið rindar festigjald, rentur og avdrátt av møguligum lánum til ásetta tíð, kann virðið á garðinum ikki vera lægri enn lánini í garðinum.

Men kann prísurin verða hægri enn tað? Talan vil her í flestu førum verða ein spurningur um samráðingar millum festaran (keyparan) og jarðarfyrisitingina. Vónandi enda samráðingarnar í eini loysn, sum báðir partar kunnu góðtaka. Festarin við sínum sakførara og øðrum ráðgevum hevur sínar metingar av, hvat hann kann megna at sita fyri. Verri er hjá jarðarfyrisitingini. Tí hevur skrásetingin so nógv at siga.

Gjørdu metingarnar av í minsta lagi 30 gørðum, ið klára sínar skyldur uttan trupulleika, fara at geva almennu myndugleikunum eitt betri støði at samráðast út frá, og ein betri møguleika at fáa prísin upp.

Semjast teir um hægri prís enn verandi lán í festinum, vil lán vanliga verða tikið til at gjalda henda mun. Eftir uppskotinum um nýggjan Búnaðargrunn verður tað hesin, sum so sjálvstøðugt viðger slíka láni-umsókn og bert fer at veita lán, um hann metir, at garðurin kann bera hesi.

Festigarðar, har festileiga, renta og avdráttir av lánum ikki verða goldin rættstundis, kunnu heldur ikki setast í lægri virði enn lánini í garðinum. Tey eru av tveimum pørtum mett at kunna verða goldin aftur av rakstrinum. Við nýggju lógini fær Búnaðargrunnurin ein møguleika at fáa lánini goldin við at krevja fulnað gjøgnum tvingsuls-sølu av garðinum, tó bert av landsjørð í privatari ogn. Tá tað snýr seg um festigarðar, liggur skyldan at fáa rentur og avdráttir á lánum goldin hjá jarðarfyrisitingini, sbr. frammanfyri sagda um treytir. Hugsaðu vit okkum, at Búnaðargrunnurin eisini kundi kravt ein slíkan garð seldan á tvingsulsuppboði, hevði tann spurningur reist seg, um verandi festari kundi bjóðað upp á garðin og á tann hátt fingið garðin fyri ein lægri prís, enn garðurin veruliga hevur, tí at eingin í bygdini fór at bjóða ímóti honum.

Nevndin skjýtur upp, at eru umstøðurnar so mikið broyttar, síðan lánini vóru tikin upp, at tað er eyðsýnt, at garðurin ikki kann bera so stór lán, eiga jarðarfyrisitingin og Búnaðargrunnurin í felag at taka upp samráðingar við festaran um, hvat hesin í mesta lagi vil keypa garðin fyri (t.e. hvussu stóran part av láni, hann vil yvirtaka). Síðan má Búnaðargrunnurin taka støðu til, um hetta er ein sámuligur prísur, eitt nú út frá upplýsingum um teir 30 garðarnar, sum, í hvussu so er, eru mettir í virði. Kann hesin prísur góðtakast, verður garðurin lýstur til sølu alment við hesi upphædd sum minstaboð.

Koma grunnurin og festarin ikki ásamt um prís, og festarin framvegis ikki innan ávísa heilt stutta frest rindar øll gjaldkomin rentu- og avdráttargjøld, biður Búnaðargrunnurin jarðarfyrisitingina seta festaran frá beinanvegin og lýsa garðin til sølu alment við ásettum virði sum minstaboð. Fæst heldur ikki tá nakað úrslit, mugu landsstýrið og Búnaðargrunnurin sínámillum finna fram til eina hóskiliga loysn, eitt nú, at lánini verða niðurgoldin til tað, sum partarnir meta rætt, at festið kann bera, til tað einaferð verður selt. Gjørd verður tíðaravmarkað festiavtala við nýggjan festara.

Fyri at trupulleikarnir av fíggjarliga niðurundirkomnum festum ikki skulu vera afturvendandi, meðan søla av landsjørðini og einstøku gørðunum verður fyrireikað, skjýtur nevndin upp, at Búnaðargrunnurin skal kunna gera avtalu við festara og landsstýrið um tíðaravmarkaða gjaldskipan fyri lán í festinum, tó so at lánið ikki má vaksa í hesum tíðarskeiði.

*g. Jarðarfyrisitingin*

Nevndin skjýtur upp, at lóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð við seinni broytingum og lov nr. 174 af 24. mai 1937 Om Jordbrugets Fremme við seinni broytingum verða avtiknar. Við hesum verður Føroya Jarðarráð bæði sum umsitari av almennu jørðini og sum fyrisitari av Føroya Jarðargrunni avtikið. Herumframt verður Føroya Jarðargrunnur avtikin.

Føroyska jarðarfyrisitingin verður hereftir løgd undir Føroya landsstýri, við verandi skipan Vinnumálastýrið, ið frameftir skal taka sær bæði av fyrisitingini av jørðini og av øllum landbúnaðarpolitiskum málum. Yvirordnaði landbúnaðarpolitikkurin liggur náttúrliga hjá Vinnumálastýrinum, meðan fyrisitingin av jørðini, fremjanin av søluni av jørðini og eftirlitið við, at landsjørð framhaldandi lýkur treytirnar, sum eru álagdar henni, illa kunnu liggja centralt.

Nevndin hugsar sær tí, at skrivstova Jarðarráðsins frameftir verður tann partur av føroysku jarðarfyrisitingini, sum serliga skal taka sær av landsjørðini umframt av teimum málsevnum, sum Vinnumálastýrið leggur til hana.

Jarðarfyrisitingin fær fyrst og fremst hesar uppgávur:

- at umsita verandi festiavtalur og leiga leys festi út uppá áramál, til hesi kunnu verða seld, sum ætlað við lógini,
- at gjøgnumføra skrásetingina, ið er neyðug fyri at kunna selja jørðina, sum ætlað við lógini,
- at halda skrásetingina við líka fyri festi og garðar av landsjørð og út frá henni at hava eftirlit við, at treytirnar verða hildnar, og
- at vera skrivstova hjá Búnaðarráðnum og fyrireika frágreiðingar og eftirmetingar ráðsins um lógina og hennara virki til frama fyri vinnuligt jarðarbrúk.

Útreiðslurnar av at umsita verandi festiavtalur, at halda skrásetingini uppi og at vera skrivstova hjá Búnaðarráðnum eiga ikki at verða størri, enn útreiðslurnar í dag eru av skrivstovuhaldi og virki Jarðarráðsins, men tær eiga ikki at undirmetast í yvirgongdstíðini. Nevndin leggur stóra herðslu á, at neyðug fígging og orka verður játtað fyrisitingini til fyrstu skrásetingina, serliga av teimum fyrstu 30 gørðunum, ið fara at verða megingrundarlagið fyri søluni av landsjørðini. Verður henda skráseting ikki gjørd so væl og neyv, sum gjørligt, er nevndin ikki í iva um, at úrslitið av søluni verður vánaligt og ein skomm fyri landsstýrið sum landsmyndugleika. Henda skráseting má taka ta neyðugu tíðina, og nevndin heldur, at hon í besta føri kann verða liðug eftir einum ári.

## *h. Búnaðarráðið*

Skrásetingararbeiðið krevur eitt fakligt forum av fólki, sum millum manna eru viðurkend sum skilafólk, hjá jarðarfyrisitingini at samstarva við. Hetta forum, sum nevndin skjýtur upp, skal verða tilnevnt sum eitt Búnaðarráð, skal eisini mótvegis landsstýrinum tryggja, at tá sølan av landsjørðini fer fram, verður hetta gjørt sambært lógarásetingunum og í lógarinnar anda.

Fyri løgtingið og landsstýrið er tað umráðandi at tryggja, at ongin ivi verður um, at landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum kann verða lagdur undir at lata almenna ogn av hondum uttan eftir greiðum tilmæli frá óheftum ráðgeva. Tað hevur tí týdning, at limir í ráðnum ikki eru undirmenn landsstýrismansins ella hjá hansara kollegum í landsstýrinum. Somuleiðis er tað umráðandi, at persónarnir, sum verða valdir í ráðið, hava neyðugan fakligan og menniskjansligan førleika at meta um skrásetingina, so hon tænir teimum mongu endamálunum, sum hon eftir lógini skal.

Nevndin hevur umhugsað, at áhugafeløg og onnur skulu tilnevna limir í ráðið ella skulu kunna skjóta upp limir í ráðið, men er komið til, at hetta ikki loysir trupulleikan. Tað ber heldur ikki til at seta í lógina, hvørjir persónarnir – sbrt. starv teirra – skulu sita í ráðnum, soleiðis sum hetta fyrr varð gjørt. Nevndin hevur eisini valt ikki at siga, hvønn fakligan førleika, ráðslimirnir eiga at hava, t.d. jarðarbrúkskunnleika, løgfrøðiligan, búskaparligan ella vistfrøðiligan førleika ella annað, sum kann hava týdning fyri útinnanina av starvinum. Ikki slepst undan, at ráðið í sínum starvi verður við til samráðingar við festarar og skal samstarva við festarar bæði við tí endamáli at fáa sannar upplýsingar til skránna, ið tó ikki skulu gevast øðrum, heldur ikki nøkrum í landsfyrisitingini, og fyri at eggja teimum til at keypa jørðina. Talan verður sostatt bæði um at hava mannafatan og pedagogisk evni.

Nevndin hevur tískil valt einki ítøkiligt førleikakrav at seta í lógina, men lata landsstýrismanninum sjálvum trupulleikan at velja Búnaðarráðið. Tó hevur nevndin hildið tað verið rætt, at ráðslimir ikki kunnu sita meira enn tvær ferðir 3 ár um ferðina.

## *i. Búnaðargrunnurin*

Við lógini verður Føroya Jarðargrunnur avtikin.

Yvirgongdin til vinnuligt jarðarbrúk á privatum hondum fer tó at krevja rættiliga góðar fíggingarmøguleikar hjá landbúnaðinum. Bæði hjá festarum, sum skulu nýta teir betri møguleikar, sum liggja í, at teir sjálvir undir fullari ábyrgd standa fyri framtíðar rakstri, men eisini tá nýggj fólk skulu nýta møguleikarnar at keypa sær garð.

Nevndin skjýtur tí upp, at ein Búnaðargrunnur verður skipaður sum lánistovnur burturav. Hesin skal yvirtaka ogn og skyldur hjá verandi Jarðargrunni uttan prestajørðina og keyptu jarðarognirnar, sum Jarðargrunnurin eigur. Hesar ognir skulu uttan viðurlag leggjast til festijørðina. Við skipanini verða festikontoirnar, sum í dag verða havdar fyri einstøku festini, og sum hesi kunnu søkja um rentu- og avdráttarfrí lán til íløgur á festinum, avtiknar. (Tær eru ogn Jarðargrunsins og ikki ogn festanna.)

Yvirgongdin av almennu jørðini til vinnuligt jarðarbrúk átti at borið við sær, at landsjørðin á privatum hondum fekk sína fígging frá privatum peningastovnum í framtíðini. Men tørvurin, í hvussu so er í yvirgongdstíðini, hjá landbúnaðinum fyri serligari fígging er so stórur, at nevndin heldur tað ikki verða ráðiligt, ikki at nýta teir møguleikar fyri fíggingarligum stuðli, sum liggja í Jarðargrunninum og skipa ein óheftan stovn, sum kann veita vinnuliga jarðarbrúkinum lán. Flestu ábøtur á garð, serliga velting upp úr nýggjum, eru íløgur, sum ikki fara at vera lønsamar uttan eftir fleiri árum, og keyp av festi uttan rættiliga stóra eginogn ella serligar lánimøguleikar til nýíløgur fer í mongum førum ikki at føra til vinnuligan landbúnaða á gørðunum. Aðrar ábøtur, eitt nú keyp av parti av grannafesti at bøta um møguleikarnar á egnum festi, kunnu kanska skjótari løna seg aftur. Herumframt krevur yvirgongdin, at onkur óheftur tryggjar eina objektiva, skipaða loysn á teimum lánum, sum tað ikki tykist møguligt hjá nøkrum gørðum at greiða.

Nevndin hevur hugsað sær, at Jarðargrunnurin verður umskipaður til ein banka, ein Búnaðarbanka, sum landsstýrið sum einasti partaeigari seinni selir partabrøvini í. Ein slíkur banki kundi so funnið ta leið, sum komandi partaeigarar hildu rætta.

Av tí at umskipanin av almennu jørðini fer at taka tíð, og at sjálv skipanin av bankanum krevur serliga fyrireiking, hevur nevndin í lógaruppskotinum valt fyribils at skipa Búnaðargrunnin sum lánigrunn við egnum stýri og fyrisiting. Nevndin hevur hildið tað verið av størsta týdningi at tryggja, at Búnaðargrunnurin nú verður skipaður soleiðis, at loysnin við Búnaðarbankanum ikki verður forðað, og at Búnaðargrunnurin ikki einans verður mettur sum eitt landbúnaðarpolitiskt amboð. Meðan jarðarfyrisitingin liggur undir landsstýrinum, hoyrir Búnaðargrunnurin ikki undir fyrisiting landsstýrisins, uttan at tað velur stýri, sum hevur førleika at umsita grunnin við sjálvstøðugari ábyrgd.

Búnaðargrunnurin skal eftir uppskoti nevndarinnar kunna veita lán til somu endamál, sum grunnurin upprunaliga í lov Om Jordbrugets Fremme kundi veita lán til. Sostatt skal grunnurin ikki kunna veita lán til onnur tiltøk, har tað ikki eru fysiskir persónar, sum standa fyri láninum, t.d. Mjólkarvirki Búnaðarmanna, Sláturvirki Búnaðarmanna

o.t. Verandi lán av hesum slagi verða ikki uppsøgd, men skulu gjaldast sbrt. galdandi gjaldsavtalu.

Nevndin hevur ikki hildið tað verið hennara uppgáva at reglugera út í æsur um Búnaðargrunnin í lógaruppskotinum. Hon hevur tí lagt til Grunsstýrið og landsstýrið at gera hetta í reglugerð, sum verður kunngjørd, eitt nú um solvenskrøv, grannskoðan, eftirlit, burturleggingar o.a.m. Heldur ikki um rentu, og nevndin ræður frá ov lagaligum lánum. Lagalig lán eru í roynd og veru at fata sum studningur, og sum allur studningur skeikla og broyta lagalig lán tær marknaðarbúskaparligu treytir, ið landbúnaðurin, skal hann yvirhøvur gerast vinnuligur í Føroyum, eigur at liva undir. Yvirgongdstíðin fer tó at vera trupul hjá landbúnaðinum, og tí hevur nevndin skotið upp, at grunnurin skal ikki rinda skatt (hetta kann verða broytt, tá hann verður umskipaður til banka) og, at við fyrstu sølu verður rentan 3 % p.a. eins og tey flestu lánini, sum festini hava, longu verða rentað við.

## 2. Onnur viðurskifti

Nevndini hevur ikki eydnast at gera seg lidna við uppskotini um broytingar av øðrum lógum, sum hava týdning fyri vinnuligt jarðarbrúk, eitt nú øll viðurskifti, sum eru ætlað umrødd í Kapittul V, E – I.

Nevndin ræður til, at landsstýrið skjótast gjørligt setir nevnd at halda á fram við arbeiðinum og koma við uppskotið um neyðugar og skilvísar broytingar, ið øðrumegin kunnu tæna vinnuligum jarðarbrúki, men sum eisini kunnu verða til gagns fyri ognarjørðina.

Nevndin vísir í hesum sambandi m.a. á, at galdandi lóg um hagagongd er ikki hóskilig í nútímans samfelagi, tó at hvørs mans rættur, soleiðis sum hesin rættur er kendur í øðrum norðanlondum, møguliga ikki eigur at verða settur í gildi fyri Føroyar. Tað má bera til at ganga um landið uttan serliga vælvild frá bónda ella hagastýri, og uttan í hvørjum einstøkum føri at hava biðið um loyvi til tess. Nevndin heldur eisini, at lógin um girðing og friðing av lendi verður endurskoðað, soleiðis at tað verður álagt bónda, ið setir girðing um garðin, at hava hóskiliga stórt tal á grindum og umgongdum um girðing.

Nevndin hevur ikki hildið seg til at gera uppskot til lóg um, hvat slag av jarðarbrúki vit skulu hava í framtíðini í Føroyum. Hon heldur, at fáa búnaðarfólk umstøður og møguleikar at reka sína egnu jarðarbrúksogn sum vinnuligt jarðarbrúk, fara tey sjálvi at finna tær leiðir, tey meta bestar.

Treytin um vinnuligt jarðarbrúk ger, at søla bert kann fara fram, har ávís trygd er fingin fyri, at selda jørðin vinnuliga verður nýtt sum jarðarbrúk. Við tí „lønsemi“, ið er í føroyskum landbúnaði í dag, kann

vanlig framleiðsluskylda tí ikki verða áløgd í sambandi við søluna, men nevndin hugsar sær, at eitt slag av landbúnaðarskyldu verður áløgd. Einstaki keyparin má sjálvur finna sær ta vinnuligu leið, ið kann forrenta keypið og tann rakstur, hann velur at fara undir.

Fleiri av teimum, sum keypa, fara ikki at hava stórvegis trupulleikar at finna sína leið ta fyrstu tíðina. Teir hava ein lønandi rakstur við mjólkarframleiðslu og seyðahaldi, og teir fara at halda á fram við hesum, so leingi henda vinna kann vera lønandi hjá teimum. Við avtøku av mjólkarkvotu og við burturfalli av mjólkarstudningi fara nakrir av teimum at falla frá, annaðhvørt, tí teir liggja so óhøgliga fyri, tá tað snýr seg um flutning av mjólkini á mjólkarvirki, ella tí teir ikki hava nóg góðar umstøður, eitt nú ov lítið graslendi ella annað. Teir, sum tá verða eftir, skuldu tá verið tað betur fyri at fingið lønandi mjólkarframleiðslu uttan studning; men ikki er óhugsandi, at garðar, ið annars vóru mettir noyddir at gevast við hesari framleiðslu, finna serframleiðslur á onkran hátt, ið ger, at teir halda á fram við mjólkarframleiðslu.

Nevndin heldur tað vera sera umráðandi at leggja áherðslu á, at ein treyt fyri einari og hvørjari broyting í føroyskari jarðarlóggávu og jarðarumsiting er, at tað samstundis verður løgd neyv tíðarætlan fyri avtøku av øllum studningi. Avtøka av øllum studningi og frígering bónda til at smíða sær sína egnu og garðsins framtíð eru neyðug, um tað aftur skal verða hugaligt at vera bóndi.

# C. Uppskot til løgtingslóg um landsjørð

Uppskot
til
løgtingslóg um landsjørð

1. kapittul
Øki lógarinnar

§ 1. Lógin fevnir um alla landsjørð.

2. stk. Landsjørð er í hesi lóg at skilja sum búnaðarjørð, sum 1. januar 1997 lá undir fyrisiting Føroya Jarðarráðs og jørð, sum seinni eftir reglunum í hesi lóg verður skrásett sum landsjørð.

2. kapittul
Jarðarfyrsitingin

§ 2. Fyrisitingin av landsjørðini liggur hjá Føroya Landsstýri.

2. stk. Til at fremja endamálið við lógini setir landsstýrið eitt búnaðarráð við 5 limum. Ráðslimirnir skulu umboða tann sakkunnleika, sum hevur týdning fyri útinnanina av starvinum.

3. stk. Landsstýrið skal í hvørjum føri, tá avgerð verður tikin eftir hesi lóg, frammanundan hava fingið ummæli frá Búnaðarráðnum.

4. stk. Ráðslimirnir verða tilnevndir fyri 3 ár í senn og kunnu verða valdir tvær reisur. Fer ráðslimur frá í starvstíðini, tilnevnir landsstýrið nýggjan lim í hansara stað fyri restina av starvstíðini. Eingin ráðslimur má vera í starvi hjá landsfyrisitingini.

5. stk. Búnaðarráðið ger sjálvt eina starvsskipan, sum skal góðkennast av landsstýrinum.

6. stk. Landbúnaðarfyrisiting landsstýrisins er skrivstova Búnaðarráðsins soleiðis, sum fyriskipað í starvsskipanini.

7. stk. Landskassin ber útreiðslurnar av virksemi búnaðarráðsins.

§ 3. Landsstýrið skal hava eina skráseting av allari almennu búnaðarjørðini. Henda skráseting skal til eina og hvørja tíð kunna nýtast sum grundarlag fyri støðutakan til sølu av gørðum til privata ogn. Umframt stødd á festinum í markatali og í fermetrum skal skrásetingin lýsa støðuna viðvíkjandi inntøkumøguleikum, og hvussu hesir skiftast millum seyðahald, neytahald og aðrar inntøkumøguleikar, m.a. av teimum lunnindum, sum hoyra til festið. Eisini skal skrásetingin lýsa, hvørji øki eru velt, og hvørji óvelt øki eru egnað og liggja høgliga til at velta, umframt støddina av hesum. Endaliga skal skrásetingin lýsa, hvussu festið er útgjørt við bygningum og amboðum, og hvussu nógvari skuld, ið festið heftir fyri, og um festarin býr á festinum. Í viðmerking til skrásetingina fyri hvørt festi sær verður sett hvørjar ábøtur, festarin kundi hugsað sær á festið. Skrásetingin skal haldast við líka, eisini tá talan er um seldar garðar, sum grundarlag fyri meting um treytir fyri landsjørð í privatari ogn verða hildnar.

2. stk. Búnaðarráðið hevur vanliga eftirlitið við, at lógin verður hildin, og leggur árliga almenna frágreiðing fram um gongdina at fremja endamál lógarinnar, herundir hvørjar broytingar ella ábøtur, tað eftir ráðsins tykki er rætt at gera.

3. kapittul
Festijørðin.

§ 4. Festijørðin er landsjørð, sum ikki er latin til ognar.

2. stk. Út frá teimum upplýsingum, sum liggja í skrásetingini eftir § 3, 1. stk., skal búnaðarráðið meta, hvørjir garðar eru egnaðir at vera grundarlag undir einum vinnuligum rakstri. Samstundis skal skrásetingin vísa, hvørjir garðar eiga at verða lagdir niður sum sjálvstøðug brúk.

3. stk. Eru garðar, sum ikki eru mettir at lúka treytirnar eftir 2. stk., skal metast, um møguleiki er at bøta um hetta við at leggja jørð afturat, og um jørð er tøk til hetta.

4. stk. Tá funnið er fram til teir garðar, sum kunnu halda fram sum sjálvstøðug brúk, skal búnaðarráðið seta hesar í virði við grundarlag í tí, sum er ásett frammanfyri í hesi grein.

5. stk. Festarar, sum eru, tá henda lóg kemur í gildi, varðveita rættindi síni sambært

festibrævinum.

§ 5. Verður festi leyst, annaðhvørt tí festari doyr ella leggur frá sær, meðan hann er á lívi, ger landsstýrið av, hvat verða skal av festinum.

2. stk. Er garðurin skrásettur at vera egnaður sum sjálvstøðug landbúnaðarogn, sum umrøtt í § 4, 2. stk., skal hann latast til ognar eftir teimum reglum og treytum, sum tilskilaðar eru í § 6.

3. stk. Er festið ikki skrásett, sum tilskilað í 2. stk., ger landsstýrið av, um jørðin skal leggjast afturat øðrum verandi festi, latast til ognar ella festast burtur sjálvstøðugt av nýggjum.

4. stk. Jørð, sum er nevnd í 3. stk., kann bert verða latin til ognar, um hon verður løgd saman við aðrari landsjørð, sum er ognarjørð, ella aðrari ognarjørð. Verður jørðin løgd saman við aðrari ognarjørð, skal hetta verða treytað av, at samlaði eigindómurin verður skrásettur sum landsjørð.

5. stk. Verður jørð, sum nevnd er í 3. stk., fest burtur av nýggjum, skal festiavtalan vera tíðaravmarkað.

4. kapittul
Hvør kann eiga landsjørð.

§ 6. Eigari av jørð, ið kemur undir hesa lóg, kann bert tann verða, sum

1. er 18 ár,

2. seinastu 10 árini hevur verið skrásettur í føroyska fólkayvirlitinum í ikki minni enn 5 ár,

3. innan 6 mánaðir eftir at vera vorðin eigari fær sær fastan bústað á garðinum, soleiðis sum tilskilað í § 15,

4. sjálvur rekur garðin,

5. lýkur tey førleikakrøv, sum ásett eru í 2. stk.,

6. ikki frammanundan eigur landsjørð, uttan so, at samanlegging við góðkenning landsstýrisins kann fara fram.

2. stk. Tann, ið vil ogna sær landsjørð, skal prógva, at hann í minsta lagi hevur arbeitt í vinnuligum jarðarbrúki í tvey ár og hevur verkliga ella ástøðiliga útbúgving sum búfrøðingur, urtagarðsmaður ella aðra útbúgving, sum gevur førleika at røkta jørð, húsdýr ella landslag.

§ 7. Hóast ásetingarnar í § 6 kunnu hesi gerast eigarar av landsjørð eftir hesi lóg:

1. Hjúnafelagi, sum tekur við óskiftum búgvi, sum fær jørðina í sín lut við skifti av felagsbúgvi ella sum arv,

2. lívsarvingur.

2. stk. Rætturin til at gerast eigari eftir 1. stk. er treytaður av, at fyrri eigarin hevur átt jørðina í minsta lagi í 3 ár, og at nýggi eigarin er 18 ár og innan eitt ár eftir at vera vorðin eigari tekur sær bústað á garðinum.

§ 8. Eigari kann lata garð sín til hjúnafelaga ella lívsarving undir somu treytum, sum settar eru í § 7.

§ 9. Í øðrum førum enn teimum, sum nevnd eru í §§ 6, 7 og 8, krevst loyvi landsstýrisins til at ogna sær landsjørð.

5. kapittul
Søla av almennu jørðini.

§ 10. Landsstýrið hevur heimild at selja jørð undir teimum treytum, sum tilskilaðar eru í § 5. Sølupeningur, sum fer upp um skuld hjá ognini, fer í landskassan.

§ 11. Tá garður, sum lýkur treytirnar í § 5, 2. stk., er festileysur, skulu lívsarvingar festarans hava framíhjárætt at keypa. Eru fleiri lívsarvingar um boðið, hava teir framíhjárætt í hesi raðfylgju:

1. elsta barn ella lívsarvingar tess,

2. yngri barn ella lívsarvingar tess.

Lívsarvingur, sum á henda hátt keypir, skal lúka treytirnar í § 6.

2. stk. Er eingin lívsarvingur, sum lýkur treytirnar í § 6, áhugaður fyri at keypa, skal garðurin lýsast til sølu alment.

3. stk. Verður garður festileysur, tí festarin doyr, hevur eftirsitandi hjúnarfelagi framíhjárætt at keypa framman fyri lívsarvingar.

4. stk. Festari av garði, sum lýkur treytirnar í § 5, 2. stk., kann keypa garðin, um hann ynskir tað.

5. stk. Verður garðurin seldur festara ella lívsarvingi, ásetir landsstýrið søluprísin eftir teirri í § 4, 4. stk., ásettu virðismeting.

6. stk. Heftir garðurin fyri skuld til Búnaðargrunnin, kann søluprísurin eftir 5. stk. ikki verða settur lægri enn henda skuld.

7. stk. Vil festarin ella lívsarvingurin ikki geva

tann prís, sum soleiðis verður ásettur, skulu landsstýrið og Búnaðargrunnurin við samráðingum finna fram til, hvat tað mesta er, sum ein framíhjárættindishavari vil geva. Síðani skal garðurin lýsast til sølu alment við hesi upphædd sum lægsta boð. Er einki hægri boð, verður garðurin seldur hesum framíhjárættindishavaranum fyri hesa upphædd. Tað, sum Búnaðargrunnurin ikki fær fulnað fyri, verður avskrivað.

§ 12. Ger landsstýrið av at selja jørð, sum er umrødd í § 5, 3. stk., skal jørðin bjóðast til sølu alment. Keyparin skal lúka treytirnar í § 6, men skal frammanundan hava so mikið av jørð, sum tað keypta kann leggjast saman við, at samlaði eigindómurin lýkur treytirnar í § 5, 2. stk. Tann samlaði eigindómurin skal skrásetast sum landsjørð og síðani fylgja treytunum í hesi lóg.

§ 13. Tá landsstýrið selir jørð sum ta, ið er umfatað av § 4, 4. stk., skal tinglýsast á ognini, at hon er landsjørð og er undirløgd treytunum í hesi lóg.

2. stk. Verður onnur jørð seld, skal í sølutreytunum verða tryggjað, at endamálið við søluni samsvarar hesi lóg, og skulu neyðugu ásetingarnar tinglýsast á ognini.

## 6. kapittul

## Landbúnaðarskylda og bústaðarskylda.

§ 14. Tann, ið situr við ella eigur landsjørð sambært reglunum í hesi lóg, hevur skyldu at reka landbúnað á ognini soleiðis, at teir framleiðslumøguleikar, sum garðurin hevur, verða troyttir við miðvísum og ítøkiligum ætlanum soleiðis, at arbeiðið ber við sær virðisøking samstundis, sum náttúrutilfeingið verður røkt og hildið viðlíka.

2. stk. Í aðrar mátar hevur landbúnaðarskyldan við sær, at allur fenaður á garðinum verður væl røktur, og at røktin altíð er í samsvar við tær lógir og reglur, sum galdandi eru fyri djórahald og djóravernd.

3. stk. Ásetingar í náttúru- og umhvørvisverndarlógum skulu virðast í sambandi við alt virksemi á garðinum, m.a. velting og taðing.

§ 15. Tann, sum situr við ella eigur landsjørð, skal búgva á garðinum, um so er, at sethús hoyra til. Hoyra sethús ikki til garðin, skal eigarin búgva í markatalsbygdini.

2. stk. Landsstýrið kann loyva, at bóndi í ávíst tíðarskeið er frá garðinum treytað av, at annar, sum hevur neyðuga førleikan til búnaðarvinnu og kann uppfylla bústaðarskylduna, rekur garðin sambært skrivligum sáttmála, sum Búnaðarráðið skal góðkenna. Sáttmálin skal tilskila, hvat henda skal, tá tíðarskeiðið er úti.

§ 16. Heldur tann, ið situr við landsjørð, ikki skyldurnar, ið liggja á landsjørð, ger Búnaðarráðið frágreiðing til landsstýrið um brotið. Landsstýrið kann geva eigaranum frest, sum ikki skal vera styttri enn 6 mánaðir, at lúka skyldurnar.

2. stk. Verða boð eftir 1. stk. ikki fylgd innan ásettu frest, kann landsstýrið, um talan er um ognargarð, lata garðin selja á uppboði eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri tvingsilsuppboð. Er talan um festigarð, setir landsstýrið festaran frá. Sama er, um festarin ikki heldur lániskyldur mótvegis Búnaðargrunninum, sí tó § 29.

## 7. kapittul

## Hvat ognin fevnir um.

§ 17. Til ognina hoyra allir bygningar, allar maskinur, øll amboð, og øll innstøða, sum koma undir løgtingslóg um tinglýsing § 37.

2. stk. Til ognina hoyrir ikki rætturin til ráevni í undirgrundini.

3. stk. Landsstýrið kann, tá tað selir, gera av, at tílíkt, sum ikki hevur landbúnaðarligan týdning, ikki skal fylgja við søluni. Tá so er, skulu tílík øki býtast frá sum sjálvstøðug ogn hjá landinum.

## 8. kapittul

## Ræðisavmarkingar.

§ 18. Garður á landsjørð skal vera ein samlað eind, sum ikki kann skiftast sundur ella leggjast saman við aðrari landsjørð uttan loyvi landsstýrisins eftir greiniligum viðmæli frá Búnaðarráðnum.

2. stk. Landsstýrið kann loyva frábýti av jørð til samanløgu við aðra landsjørð, um landsjørðin á tann hátt kann rekast betur í vinnuligum landbúnaði.

Landsstýrið kann somuleiðis loyva sundurbýti av garði í tvær sjálvstøðugar eindir, um báðar eindirnar kunnu verða riknar sum vinnuligt

jarðarbrúk við betri úrsliti enn samlaði garðurin.

3. stk. Landsstýrið kann loyva frábýti av jørð til almenna nýtslu, um garðurin fær í makaskifti frá tí almenna landbúnaðarjørð, ið eftir meting Búnaðarráðsins er fullgott endurgjald. Í aðra máta má lendi, sum tað almenna krevur burtur av landsjørð, ognartakast samsvarandi ognartøkuheimild.

9. kapittul
Búnaðargrunnurin.

§ 19. Stovnaður verður lánigrunnur, nevndur Búnaðargrunnurin, við tí endamáli at veita lán til landbúnaðin.

2. stk. Sum stovnsfæ yvirtekur grunnurin allar ognir hjá jarðargrunninum, sum er stovnaður við heimild í lóg nr. 174 om Jordbrugets Fremme. Peningur á festikonti hoyrir eisini til stovnsfæ grunsins. Prestajørðin og keyptar jarðarognir verða tó ikki yvirtiknar av grunninum, men vera partar av landsjørðini.

3. stk. Búnaðargrunnurin yvirtekur eisini fíggjarligu skyldur jarðargrunsins.

§ 20. Fyri Búnaðargrunninum situr stýri, sum er formaður og 4 limir, sum landsstýrið tilnevnir fyri 3 ár í senn. Stýrislimirnir kunnu verða tilnevndir tvær reisur. Fer stýrislimur frá, velur landsstýrið nýggjan lim í hansara stað fyri restina av starvstíðini.

2. stk. Eingin av stýrislimunum má vera í starvi hjá landsfyrisitingini ella vera limur í Búnaðarráðnum.

3. stk. Landsstýrið ásetir við kunngerð eftir tilmæli frá stýrinum greiniligar reglur um umskipanina, fyrisiting og virksemi grunsins.

4. stk. Stýrið setir stjóra.

5. stk. Stýrið er hægsti myndugleiki grunnsins og hevur ábyrgd av virki grunsins.

§ 21. Eingin stýrislimur má luttaka í viðgerðini av máli, sum beinleiðis nemur við virksemi, har hann hevur áhugamál, ella sum hann er bundin av.

2. stk. Stýrislimir hava tagnarskyldu mótvegis øllum, ið ikki varða av, um tað, sum teir í starvinum fáa kunnleika um.

§ 22. Grunnurin kann veita lán til

1. keyp av landsjørð og jørð at leggja saman við landsjørð,

2. nýdyrking,

3. gerð av bygningum, sum hava týdning fyri garðin,

4. bygging av sethúsum á garðinum,

5. keyp av maskinum og amboðum,

6. rakstur av garði.

2. stk. Lán kann eisini veitast til bygningar á aðrari ogn treytað av, at hon verður løgd saman við garðsognini, ella at tað við tinglýstum servitutti verður tryggjað, at ognin hoyrir til garðin.

3. stk. Lán úr Búnaðargrunninum skulu vera tryggjað við veðrætti í føstu ognini, og grunnurin kann treyta sær, at ognin ikki er ella verður sett í veð fyri aðra skuld.

4. stk. Hóast ásetingarnar í 3. stk., kann lán veitast til maskinur og amboð ímóti veð í teimum.

§ 23. Lántakari skal lúka treytirnar í hesi lóg fyri at eiga landsjørð.

2. stk. Lán úr Búnaðargrunninum kann bert veitast til garðar, sum lúka treytirnar í § 5, 2. stk. Hetta er ikki galdandi fyri lán sambært § 22, 1. stk., nr. 1.

3. stk. Lán kann eisini veitast til aðrar garðar, sum vildu verið góðkendir sambært 2. stk., treytað av at lántakarin gongur undir treytirnar í hesi lóg.

4. stk. Stýrið kann lata lániumsóknir til ummælis hjá Búnaðarráðnum.

§ 24. Stýrið tekur í hvørjum einstøkum føri støðu til hæddina á láninum soleiðis, at tað ikki má vera hægri, enn ráðiligt og neyðugt er eftir eini metan av møguleikanum hjá garðinum at bera seg og lívføri hansara.

§ 25. Lánitíðin verður ásett av stýrinum í hvørjum einstøkum føri og má ikki vera longri enn 40 ár. Lán til maskinur og amboð mugu tó ikki vera longri enn 10 ár.

§ 26. Rentan av lánum úr Búnaðargrunninum verður ásett í reglugerðini fyri grunnin. Tó skal rentan av lánum til keyp av gørðum frá landsstýrinum vera 3% p.a.

§ 27. Stovnaður verður tiltaksgrunnur at standa ímóti tapum av útlánum og til trygging av viðurskiftum grunsins við skuldarar annars.

§ 28. Roknskaparár grunsins er fíggjarárið.

Grunnurin gevur frá sær roknskap, sum er grannskoðaður av løggildum grannskoðara.

§ 29. Hevur festi skuld til Búnaðargrunnin, sum festarin ikki megnar at gjalda, hevur grunnurin heimild at gera avtalu við festaran og landsstýrið um eitt lægri lánsgjald í eitt avmarkað tíðarskeið, tó so at skuldin ikki veksur.

§ 30. Grunnurin skal ikki lata skatt ella gjøld til tað almenna.

§ 31. Í seinasta lagi 5 ár eftir at lógin hevur fingið gildi, leggur landsstýrið fram lógaruppskot um at skipa grunnin sum banka.

10. kapittul
Gildiskomuásetingar.

§ 32. Henda lóg kemur í gildi, tá tað við kungerð verður ásett av landsstýrinum.
2. stk. Samstundis fara úr gildi Lov nr. 174 frá 24.05.1937 um Jordbrugets Fremme við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 59 frá 09.06.1988 um landsjørð við seinni broytingum.

§ 33. Tá lógin kemur í gildi, fer sitandi jarðarráð frá. Nýtt Búnaðarráð og stýri fyri Búnaðargrunnin verður tilnevnt eftir reglunum í hesi lóg.

# D. Heildarviðmerkingar

Endamálið við hesi lóg er at geva føroyskum landbúnaði betri karmar at virka undir, soleiðis at fólk í framtíðar vinnuligum jarðarbrúki í Føroyum hava umstøður at liva og virka í jarðarbrúki upp á markn-aðarbúskaparligar treytir og framleiða tær vørur og tænastur, ið føroyska veðurlagið, føroyska lendið og føroyski kunnleikin og arbeiðsmegin kann gera kappingarførar, og sum samstundis lúka altjóða krøv um umhvørvis- og náttúrurøkt við fyriliti við røkt og umstøðum hjá kríatúrum.

Lógin viðger bert almennu búnaðarjørðina.

Núgaldandi lóggáva um tað, sum hetta uppskotið viðger eru tær báðar lógirnar: Lov om Jordbrugets Fremme frá 1937 og løgtingslóg um landsjørð frá 1988. Hesar lógir verða tiknar av og allar tær ásetingar í hesum lógum, sum framvegis skulu galda, eru við í hesum uppskoti.

Høvuðsinnihaldið í lógaruppskotinum er:

1) Verandi festiskipan verður tikin av, tó so, at verandi festarar varðveita síni rættindi sambært festibrævinum. Verður jørð fest burtur av nýggjum, verður hetta fyri avmarkað tíðarskeið.
2) Garðar, sum eru mettir nóg stórir, sum grundarlag undir vinnuligum rakstri, skulu seljast, tá teir eru leysir. Tann, sum eftir galdandi lóg hevur framíhjárætt at festa, skal eisini hava framíhjárætt at keypa. Verandi festari kann eisini keypa tílíkan garð.
3) Garðar, sum eru ov smáir, sum grundarlag undir vinnuligum rakstri, skulu seljast, um teir við samanlegging við aðra jørð kunnu gerast nóg stórir. Ber ikki til at selja, skulu teir latast í festi, men tílík festiavtala skal vera tíðaravmarkað.
4) Øll núverandi almenna búnaðarjørðin verður nevnd landsjørð, sjálvt um hon er vorðin ognarjørð.
5) Treytir eru ásettar fyri at kunna eiga landsjørð. Hesar treytir snúgva seg m.a. um førleika, tilknýti til Føroyar, bústaðarskyldu, og at tað ikki ber til at eiga fleiri garðar.
6) Fyrisitingin av jørðini , sum nú liggur hjá jarðarráðnum, verður løgd undir landsstýrið, tó so, at eitt Búnaðarráð, tilnevnt eftir sakkunnleika, verður ráðgevandi stovnur og skal virka fyri, at endamálið við lógini verður nátt.
7) Jarðargrunnurin, sum hevur sína heimild í Lov om Jordbrugets fremme, verður umskipaður til at vera ein sjálvstøðugur lánistovnur burturav og fær navnið Búnaðargrunnurin. Við hesum er greiður skilnaður gjørdur ímillum fyrisiting av jørðini og

grunnin. Búnaðargrunnurin fær egið stýri og egna fyrisiting og kann í viðgerð síni biðja um ummæli frá Búnaðarráðnum.

Sambært kunngerð nr. 37 frá 26.10.1956 um yvirtøku av jarðargrunninum og kongsjørðini,kann grunnnurin ikki verða lagdur niður uttan eftir semju ímillum landsstýrið og donsku stjórnina. Grunnurin verður reelt ikki niðurlagdur, men skipanin verður broytt, navnið verður broytt, og fyrisitingin verður broytt. Endamálið verður eisini nakað broytt. Uppskotið er tí gjørt við tí fyrivarni, at semja fæst við donsku stjórnina, og víst verður til viðmerkingarnar til gildiskomuásetingarnar hesum viðvíkjandi.

8) Reglur verða ásettar, sum gera tað møguligt at loysa tað vandamálið, sum er, at garðar hava ov stóra skuld til at kunna renta og avdraga hesa.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til einstøku lógargreinirnar.

# E. Útreiðslur av lógini

Jarðarráðið hevur sum er egna skrivstovu og eigur egin skrivstovuhús. Útreiðslurnar til rakstur av ráðnum verða bornar av jarðargrunninum.

Við tað, at fyrisitingin verður løgd til landsstýrið, og við tað, at jarðargrunnurin verður tikin av, og Búnaðargrunnurin stovnsettur sum lánistovnur burturav og ikki longur skal vera fyrisitin av jarðarráðnum, má landskassin bera hesar útreiðslur.

Út frá ársroknskapunum hjá Føroya Jarðargrunni fyri fíggjarárið 1996 eru fyrisitingarútreiðslurnar umleið 1.5 milj. kr., og útreiðslurnar til ráðið sjálvt umleið kr. 550.000.

Í byrjanini má roknast við ávísum útreiðslum til ta skráseting, kortlegging og meting, sum skal fara fram sambært lógaruppskotinum. Hetta arbeiðið er mett at taka 3 ár og kostnaðurin er mettur til kr. 400.000,- um árið.

Væntandi verða inntøkur við sølu av gørðunum. Tað ber tó ikki til, fyrr enn samanberiliga skrásetingin er framd, at siga, hvussu stórar hesar inntøkur verða, og nær tær koma.

# F. Viðmerkingar til einstøku greinirnar

Ad § 1:
Lógin fevnir um alla almennu búnaðarjørðina, sum eftir galdandi lóg ber heitið landsjørð. Hetta er galdandi bæði fyri festijørð og jørð, sum landsstýrið hevur selt eftir reglunum í hesi lóg. Landsjørð er eisini óðalsjørð, sum eftir reglunum í § 5 verður løgd saman við landsjørð.

Ad § 2.
Meðan jørðin í dag verður fyrisitin av Føroya Jarðarráð, verður hon eftir uppskotinum fyrisitin av landsstýrinum, og vil hetta í veruleikanum siga landsstýrismanninum, sum situr fyri búnaðarmálum. Hildið verður tó, at tað er neyðugt, bæði fyri at tryggja at endamálið við lógini verður framt, og at landsstýrismaðurin ella hansara fyrisiting hevur røttu ráðgevingina, at hava eitt búnaðarráð. Hetta búnaðarráð skal tó ikki umboða áhugabólkar, men einans sakkunnleika. Hugsað verður m.a. um búnaðarviðurskifti, vinnu, fíggjarviðurskifti, løgfrøði og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri útinnanina av starvinum.

Jarðarráðið hevur í dag sína egnu fyrisiting, og ætlanin er at varðveita hesa fyrisiting. Hetta verður mett neyðugt serliga fyrstu tíðina, meðan lógin fer at virka. Hetta verður landbúnaðarfyrisiting landsstýrisins og kann vera ein partur av t.d. Vinnumálastýrinum. Henda búnaðarfyrisiting skal samstundis vera skrivstovan hjá Búnaðarráðnum.

Útreiðslurnar av jarðarráðnum og fyrisiting ráðsins vera í dag bornar av jarðargrunninum. Fyrisitingarútreiðslurnar verða við hesi lóg útreiðslur hjá landskassanum. Tá Búnaðargrunnurin verður lánistovnur burtur av, og Búnaðarráðið so at siga einki hevur við grunnin at gera, er tað rætt, at landskassin eisini ber útreiðslurnar til ráðið sjálvt.

Ad § 3.
Landsjørðin er í dag skrásett. Ætlanin við fyriskipanini í hesi grein er, at skrásetingin skal gerast nógv neyvari, soleiðis at hon eisini vísir, hvørjar inntøkumøguleikar eitt festi hevur, og kann brúkast sum grundarlag undir eini virðismeting. Tann virðismetingin, sum liggur í uppbýtinum í merkur, er í dag ikki eftirfarandi, merkurnar eru sum kunnugt sera ójavnar.

Ad § 4.
Eftir galdandi lóg um landsjørð skal jarðarrráðið, tá eitt festi er leyst, meta, um hetta er egnað at halda fram sum eitt sjálvstøðugt brúk, ella um tað skal leggjast saman við øðrum. Eftir hesum lógaruppskotinum

er ætlanin, at samstundis, sum virðismeting fer fram, skal eisini takast støða til, hvørjir garðar eru nóg stórir og hava nóg góðar møguleikar til at halda fram sum sjálvstøðug vinnulig brúk. Tað, sum her er hugsað um, er, at garðurin við einum góðum rakstri skal geva nóg nógv av sær til, at tann, sum rekur hann, skal kunna liva av honum sum einasta livibreyð. Hetta eru garðar, sum eftir galdandi lóg, í hvussu so er, eiga at halda fram sum sjálvstøðug festi, og hetta eru teir garðar, sum fyrst verður hugsað um í hesum uppskoti, tá talan er um sølu. Við áseting av sølupeningi fyri garðarnar er neyðugt, at hesin byggir á samanberiligt virðisgrundarlag. Fyri at náa hesum er neyðugt at virðismeta í minsta lagi 30 lívførar garðar, áðrenn nakað verður selt. Ráðið eigur í hesum arbeiði at ráðføra seg við festararnar.

Tað, sum annars verður sagt í hesi grein, er, at tey, sum sita við festi, tá lógin kemur í gildi, varðveita síni rættindi sambært festibrævinum.

Ad § 5.
Sum nú er, ger jarðarráðið, tá eitt festi er leyst, av, hvussu vera skal við hesum festi. Henda avgerð liggur eftir hesum uppskoti hjá landsstýrinum. Men greinin ásetir reglur, sum gangast skal eftir. Fyrst og fremst verður miðað ímóti, at øll jørðin gerst ognarjørð, men tað eru bert teir garðarnir, sum eru nóg stórir til sjálvstøðugt vinnuligt brúk, sum uttan víðari kunnu og skulu seljast.

Fyri tey smærru festini vísir greinin á ymsar møguleikar, fyrst og fremst at fáa samanlegging framda. Her kann bæði vera talan um at leggja saman við verandi festi við tí fyri eyga, at tá hetta samanlagda festi verður leyst, skal garðurin seljast. Eisini kann talan vera um at selja tílíka jørð til ein, sum frammanundan eigur so mikið av óðalsjørð, at ein samanlegging gevur eitt nóg stórt brúk. Men treytin fyri hesum er, at óðalsjørðin kemur undir somu reglur og treytir, sum eru galdandi fyri landsjørðina, og samanlagda ognin verður skrásett sum slík.

Ad § 6.
Sum nú er, eru ávísar treytir til tann, sum skal festa jørð. Ætlanin er, at eisini tílíkar treytir skulu vera fyri at ogna sær og eiga landsjørð. Talan er um myndugleika, ávíst tilknýti til Føroyar, bústaðarskyldu, rakstrarskyldu og fakligan førleika.

Afturat hesum kemur, at ein forðing er sett fyri, at sami persónur kann eiga fleiri garðar. Hetta ikki einans, tá jørðin verður seld fyrstu ferð, tvs tá tað almenna selir, men eisini tá talan er um seinni avhendingar. Tað er heldur ikki einans, tá eigaraskifti fer fram, at nýggi eigarin skal lúka hesar treytir, hann skal eisini framhaldandi lúka tær.

Ad § 7.

Ætlanin við hesi grein og § 8 er at skapa møguleika fyri at gera tað lættari hjá eftirsitandi hjúnafelaga at halda fram við garðsrakstrinum ella sum lið í skifti av felagsbúgvi við hjúnaskilnað at kunna taka garðin í sín lut. Eisini skal tað kunna lata seg gera hjá hjúnafelaga ella lívsarvingi at taka við garðinum sum arvaluti.

Ad § 8.
Eftir hesi grein skal eigari, meðan hann er á lívi, kunna lata garðin til hjúnafelaga ella lívsarving. Hetta eru tey somu, sum kundu yvirtikið garðin eftir § 7.

Ad § 9.
Í hesi grein verður strikað undir, at undantøkini í §§ 7 og 8 eru úttømandi. Meðan tað sostatt ikki krevst loyvi frá nøkrum myndugleika til at eiga ella ogna sær garð, um treytirnar í §§ 6, 7 og 8 eru loknar, so ber hetta ikki til í øðrum førum. Tað verður tó hildið rætt, at landsstýrið skal loyva persóni at gerast ognari av landsjørð, sjálvt um ikki allar treytir í § 6 eru uppfyltar. Hetta kann til dømis gerast neyðugt, um eingin egnaður keypari er, tá garður er til sølu.

Ad § 10.
Tá tað her verður sagt, at landsstýrið hevur heimild at selja, so merkir hetta ikki hin vegin, at landsstýrið altíð frítt kann velja.

Tá talan er um teir garðarnar, sum eru mettir nóg stórir, skal seljast.

Er talan um smærri brúk, skal eftir tilráðing frá Búnaðarráðnum og út frá skrásetingini metast í hvørjum einstøkum føri, hvat besta loysnin er.

Sum nú er, tá selt verður av landsjørð, fer sølupeningurin eftir Lov om Jordbrugets Fremme í jarðargrunnin. Men tá ætlanin er, at Búnaðargrunnurin einans skal vera ein lánistovnur, verður mett, at tann sølupeningur, sum fer upp um veðskuld, skal fara í landskassan.

Ad § 11.
Her er talan um teir størru garðarnar, sum skulu seljast, tá teir eru festileysir. Tað verður hildið rímuligt og rætt, at garðar kunnu vera verandi í ættini, so vítt tað er gjørligt. Eisini verður hildið rætt at raðfesta framíhjárættin.

Fyri at lógin sum skjótast skal fáa ávirkan, er tað ynskiligt, at umskipanin til ognargarðar ikki bara bíðar, til garðarnir vera festileysir. Tí verður ásett, at um festari situr við garði, har tað er greitt, at hann skal seljast, tá hann verður festileysur, skal hann hava møguleika at keypa beinan vegin. Men við tað, at tað frammanundan er ásett, at festarin varðveitir síni rættindi sambært festibrævinum, ber ikki til at

krevja, at hann keypir.

Søluprísurin kann sum høvuðsregla ikki vera lægri enn tann veðskuld, sum garðurin heftir fyri. Men í summum førum kunnu lánini vera so stór, at sjálvt ein vælrikin garður ikki klárar at renta og avdraga hesi. Tí verður skotið upp tann mannagongd, at er nakar, sum hevur framíhjárætt at keypa, men sum ikki vil geva ein prís, sum er í minsta lagi veðskuldin, skulu hesin sum keypari, landsstýrið/jarðarfyrisitingin sum eigari og veðsetari og Búnaðargrunnurin sum lánveitari og veðhavari samráða seg til ein prís, sum tann við framíhjárættindum kann keypa fyri, um ikki hægri boð fæst við almennari sølu.

Ad § 12.
Tá talan er um hesa jørð, er eingin sum vegna ættarband hevur framíhjárætt. Fyri at finna keyparar, sum eiga nakað at leggja saman við, er neyðugt at bjóða jørðina út. Tað verður tá keyparin, sum ger av, hvat hann heldur jørðina vera verda. Men hinvegin, so má landsstýrið kunna áseta ein minstaprís.

Ad § 13.
Her er sostatt talan um ein servitutt. Tá talan er um teir størru garðarnar, er hetta fyriskipað í 1. stk. Men eisini fyri teir smærru garðarnar er galdandi, at servituttur um landsjørð skal lýsast, men av tí, at talan er um samanlegging við óðalsjørð, vera fleiri sølutreytir, so hetta má tá loysast samstundis.

Ad § 14.
Tað er rættuliga avgerandi, at landsjørðin verður nýtt sum búnaðarjørð. Men í staðin fyri at áseta eina framleiðsluskyldu, sum er sera torfør at definera, verður her áløgd ein landbúnaðarskylda.

Til landbúnaðarskylduna hoyrir góð røkt sum m.a. er:
Innangarðs
- at bøur verður røktur, og grøðin fingin til høldar
- at bøur, sum verður nýttur til beiti, ikki verður upptraðkaður av ov nógvum kríatúrum
- at veitir verða hildnar reinar
- at skaði, sum kann standast av amboðum, verður afturbøttur
- at bøurin verður taðaður og hildin viðlíka, so hann ikki fer í forna.

Uttangarðs:
- at skipanin í haganum er hóskilig
- at bit og traðk í haganum ikki verður so stórt, at tað hevur við sær slit og moldrok
- at hagin verður skorin upp fyri at halda hann turran

- at ferðsla við amboðum og akførum ikki skaðar hagan og órógvar fenað og heiðafugl.

Landbúnaðarskyldan hevur sostatt eisini við sær, at eigarin skal virða m.a. náttúru-, umhvørvis- og djóraverndarlóggávu. Brot móti hesum lógum kunnu sostatt føra til tær avleiðingar, sum eru umrøddar í § 16.

Ad § 15.

Megingrundgevingin fyri at krevja bústaðarskyldu er, at jørð og fenaður verða betur røkt, um bóndin býr á sjálvum garðinum. Men soleiðis sum føroyska bústaðarmynstrið er, har øll búgva í størri og smærri bygdum, kann tað vera torført at halda fast við, at bóndin skal búgva á sjálvum garðinum. Trupulleikin verður ikki minni av tí, at nógvir garðar hava bø í bygdini, meðan hagin liggur langt burtur, stundum reiðiliga óhøgliga. Roknast má tó við, at so hvørt lógin fæst at virka, fer hetta at broytast. Men tað má so undir øllum umstøðum krevjast, at bóndin hevur sín bústað í markatalsbygdini.

Hoyra sethús til garðin, skal bóndin búgva har. Í reglunum fyri Búnaðargrunnin í hesi lóg er ásett, at grunnurin kann veita lán til sethús, um hesi verða partur av garðinum. Tað verður mett ynskiligt, at sethús hoyra til garðin.

Ad § 16.

Hetta hevur samanhang við tað, at eigari av landsjørð alla tíðina skal lúka treytirnar, sum eru ásettar í lógini. Ger hann ikki tað, kann landsstýrið áleggja honum at fáa viðurskiftini í rættlag. Eftirlíkar hann ikki, hevur hann mist rættin til at sita við landsjørð. Henda áseting er ikki einans galdandi fyri eigarar, men eisini fyri festarar.

Tá talan er um ognargarð, er tað at halda lánitreytirnar eitt mál ímillum lánistovnin og eigaran við tað, at hesin er bæði persónligur skuldari og veðskuldari. Tað er tá lángevarin, Búnaðargrunnurin, sum tekur tey neyðugu stigini. Øðrvísi er, tá talan er um festi, tí tá er tað landsstýrið, sum er eigari av ognini og veðsetari. Tí er ásett, at landsstýrið kann seta festara frá, um hann ikki innan givna frest hevur fingið skil á lánieftirstøðum. Í tíðini, meðan fyrireikingar til sølu av gørðunum fer fram, kann avtala gerast um eina lagaligari skipan og verður her víst til § 29 og viðmerking til hesa.

Ad § 17.

Hetta er ein avmarking av ognarrættinum. Men hon verður mett rímulig við tað, at jørðin verður keypt fyri tað, sum hon er verd sum landbúnaðarjørð og fyri rakstur av garðinum og einki annað. Fevnir festið t.d. um vatn ella á, sum verða søkt í fragdarfiskiskapi, eigur keyparin at vísa á, hvussu hann vil gagnnýta henda møguleika til inntøku, og

soleiðis at tað kann koma almenninginum yvirhøvur til góða. Treytir um hetta verða at tinglýsa við keypið. Ger keyparin ikki tað, fylgja slíkar áir og slík vøtn ikki við keypinum, og tað almenna má so aðrar vegir tryggja almenninginum atgongdina.

Ad § 18.
Endamálið við hesi grein er at tryggja, at garðar ikki við sølu burtur av ella við sundurbýti verða virðisminkaðir sum landbúnaðarjørð ella minkaðir, so møguleikin fyri vinnuligum rakstri verður skerdur.

Ad § 19.
Jarðargrunnurin, sum er, hevur sína heimild í § 8 í Lov om Jordbrugets fremme. Tá henda lóg fær gildi, fellur heimildin burtur, og ein nýggj skipan má gerast. Tað greiðasta vildi verið at umskipað grunnin til ein banka, men tá tað hevur týdning at fáa lógina at virka sum skjótast, og fyrireiking til stovnan av einum banka tekur tíð, verður Búnaðargrunnurin fyribils skipaður sum ein sjálvsognarstovnur við egnari leiðslu. Sambært § 31 skal landsstýrið í seinasta lagi 5 ár eftir, at lógin er komin í gildi, leggja fram uppskot um at skipa grunnin sum ein banka.

Við yvirtøkuna av jarðargrunninum og kongsjørðini fekk føroyska lóggávu- og umsitingarvaldið ikki fult málsræði við tað, at jarðargrunnurin ikki kann verða tikin av uttan í semju við donsku stjórnina, sí kunngerð nr. 37 frá 26.10.1956 um yvirtøku av jarðargrunninum og kongsjørðini. Hesum má greiða fáast á, áðrenn lógin verður sett í gildi.

Skipanin við festikonti fellur burtur soleiðis, at tann peningur, sum stendur á hesum konti heilt greitt verður ogn grunsins og ikki ogn hjá festinum. Við sølu av lívføru gørðunum fer landbúnaðinum at tørva ein sterkan búnaðargrunn. Ognin hjá jarðargrunninum var við árslok 1996 umleið 160 milj. kr., tá festikonti eru taldar við. Tøkur peningur var umleið 48 milj. kr. Rentuinntøkurnar vóru í 1996 umleið 7,5 milj. kr.

Fíggjarligu skyldur jarðargrunsins vóru sambært roknskapinum við árslok 1996 umleið 3,3 milj. kr. Hesar skyldur eru so nógv minkaðar, at tað er sannlíkt, at ongar tílíkar skyldur eru, tá lógin kemur í gildi.

Ad § 20.
Eftir galdandi lóg fyrisitur jarðarráðið bæði almennu jørðina og jarðargrunnin. Hetta hevur víst seg at vera óheppið, og eitt av endamálunum við hesi lóg er at gera greiðan skilnað ímillum jarðarfyrisiting og fígging. Við hesum er grunnurin umframt at vera loystur frá jarðarfyrisitingini eisini loystur frá fyrisiting landsstýrisins. Tí er eisini ásett, at stýrislimirnir hvørki kunnu starvast hjá landsfyrisitingini ella

vera limir í Búnaðarráðnum.

Sjálvt um lógin einans tilskilar, at stýrið setir stjóra, so er eyðvitað, at við so nógvum lánum og so stórum upphæddum er neyðugt, at grunnurin hevur skrivstovuhald og starvsfólk. Víst verður á, at skrivstovubygningurin hjá jarðarráðnum verður ogn hjá Búnaðargrunninum.

Eftir uppskotinum verða neyvu reglurnar um fyrisiting og virksemi Búnaðargrunsins ásettar við landsstýriskunngerð. Men tær ásetingar, sum eru við í lógini, skulu vera lógarbundnar.

Í reglugerðini skal eisini ásetast, hvussu umskipanin skal fara fram.

Ad § 21. Her skuldi viðmerking verið óneyðug.

Ad § 22.
Lánini, nevnd í hesi grein, eru yvirhøvur tey somu, sum jarðargrunnurin fekk heimild til við lógini frá 1937. Við øðrum orðum er ætlanin, at stovnurin einans kann veita lán til garðsvinnu.

Verandi lán til onnur endamál vera ikki søgd upp, men verða avgreidd sambært upprunaligu lánstreytunum.

Ad § 23.
Høvuðsreglan er, at tað bert eru eigarar av landsjørð, sum kunnu fáa lán úr Búnaðargrunninum. Tó er møguligt í serstøkum føri at veita festara av lívførum garði lán, um landsstýrið sum eigari gevur loyvi til lántøku og veðseting av ognini.

Jarðargrunnurin sum er, hevur heimild at veita lán til annan vinnuligan landbúnað enn landsjørð. Hesin møguleiki er framvegis til staðar, um talan er um lívføran garð, og um eigarin gongur undir somu treytir, sum eru galdandi fyri landsjørð.

Ad § 24.
Stýrið fær sjálvstøðuga ábyrgd at meta um, hvat garðurin kann bera.

Ad § 25.
Av tí at landbúnaðinum tørvar langfrestað lán, hevur landsstýrið mett rætt, bert at avmarka lánitíðina fyri vanligu lánini til 40 ár og fyri maskinur og amboð til 10 ár.

Ad § 26.
Vanliga verður útlánsrentan sett eftir rentuni á innlánskapitalinum saman við rakstrarútreiðslum lánistovnsins. Fíggjarliga grundarlagið hjá grunninum er veittur studningur og sølupeningur fyri jørð. Tí hevur grunnurin ongar rentuútreiðslur. Roknast má tí við, at útlánsrentan hjá grunninum kann vera lægri enn rentan hjá vanligu peningastovn-

unum. Landsstýrið vil tó ikki við lóg binda grunnin til ávísa rentu, uttan tá tað snýr seg um sølu fyrstu ferð.

Ad § 27.
Grunninum verður álagt at stovna ein tiltaksgrunn.

Ad § 28.
Viðmerking óneyðug.

Ad § 29.
Fyri at trupulleikarnir av fíggjarliga niðurundirkomnum festum ikki skulu vera afturvendandi, meðan søla av landsjørðini og einstøku gørðunum verður fyrireikað, skal Búnaðargrunnurin kunna gera avtalu við festaran og landsstýrið, sum er eigari, um tíðaravmarkaða gjaldskipan, sum festarin kann klára, tó so at lánið ikki veksur í hesum tíðarskeiði.

Ad § 30.
Tá yvirgangstíðin kann fara at vera trupul, er ætlanin at styrkja grunnin við at sleppa honum undan skatti og øðrum gjøldum til tað almenna.

Ad § 31.
Víst verður til viðmerkingarnar til § 19.

Ad § 32.
Av tí, at ymsar fyrireikingar eru neyðugar, áðrenn lógin verður sett í gildi, er neyðugt, at landsstýrið fær eitt skotbrá til hetta. Hetta vil siga, at lógin verður staðfest og kunngjørd, men kemur ikki í gildi, fyrr enn við eini landsstýriskunngerð.

Umskipan av jarðarfyrisitingini skal fyrireikast, og somuleiðis skal Búnaðargrunnurin fyrireikast. Egnaðir limir til Búnaðarráð og stýrið fyri Búnaðargrunnin skulu finnast.

Aftur at hesum kemur, at semja má fáast við donsku stjórnina um umskipanina av jarðargrunninum.

Alt hetta má vera greitt, so lógin kann byrja at virka beinanvegin, hon kemur í gildi.

Ad § 33.
Búnaðarráðið og stýrið fyri Búnaðargrunnin eiga at vera tilnevnd beint eftir, at lógin er sett í gildi.

# VII. STUTT UM LANDBÚNAÐIN Í ØÐRUM LONDUM

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

# VIII. HEIMILDIR UM LANDBÚNAÐAR-VIÐURSKIFTI

Sum greitt frá í Kapittul I – Um arbeiði nevndarinnar – hevur nevndin ikki megnað at gjørt arbeiðið liðugt, sum upprunaliga ætlað. Herundir heldur ikki at skriva henda part.

# IX. SKJØL

Skjal 1. Kort av høgunum í Føroyum.
Skjal 2. Býti av høgunum eftir stødd, og í kongs- og ognarjørð.
Skjal 3. Støddarbýti av festum.
Skjal 4. Yvirlit um uttanbíggjajørðina (matrikulsstovan 1995)
Skjal 5. Seyðaskipanin í Føroyum (1995)
Skjal 6. Hagtøl um landbúnaðarframleiðslu, -nýtslu og útflutning (Gunnar Bjarnason, cand. agro 1995).
Skjal 7. Hagfrøðiligt yvirlit yvir rakstrar- fíggjaríløgu og statuskonti 1938 – 1960.
Skjal 8. Yvirlit yvir roknskapirnar hjá Føroya Jarðarráð 1960/61 – 1995.
Skjal 9. Yvirlit yvir fíggjarligu viðurskifti Vakstrarhúsgrunsins.
Skjal 10. Innflutningur av ymiskum landbúnaðarvørum í 1995.
Skjal 11. Ymisk skjøl at lýsa fíggjarviðurskiftini hjá einstøku bóndunum.
Skjal 12. Landbúnaðarstuðuls- og tollskipanir í ES.
Skjal 13. Den fremtidige landbrugspolitik i EU.
Skjal 14. Lov om Hegn og Markfred.
Skjal 15. Lov om Haugers Styrelse og Drift m.m.
Skjal 16. Lov for Færøerne om Grandestævne m.m.
Skjal 17. Lov for Færøerne om Landvæsenskommissioner.
Skjal 18. Lov for Færøerne om benyttelse af indsøer og vandløb.
Skjal 19. Grein hjá H. Olavusi Danielsen, i Landinspektøren. Udskiftningen på Færøerne.
Skjal 20. Tær mest vanligu plantusjúkurnar hjá okkum.
Skjal 21. Skriv frá Felagnum Føroysk Ross.
Skjal 22. Skriv frá Føroya Sílaveiðifelag.

Skjal 14

L. nr. 171 af 18.05.1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við Ll. nr. 30 af 17.03.1951.

Kapitel 1.
Hegn

§ 1. I Indmark kan Nabo af Nabo kræve Hegn for Heste og Kvæg.

§ 2. Imellem Indmark og Udmark kan Udmarkens Ejer kræve Hegn for Heste, Kvæg og Faar. Hegnspligten paahviler Indmarken.

Ved Vedtægt paa Grandestævne kan det (selv om Udmarkens Ejer ikke kræver Hegn) bestemmes, at Hegn mellem Indmark og Udmark skal være fælles for flere eller alle Indmarkslodder i Bygden.

Stemmeberettigede ved Afstemning over Forslag til saadan Vedtægt er Ejerne af de paagældende Indmarkslodder. Er Forslag til saadan Vedtægt fremsat, men ikke endeligt vedtaget paa Grandestævne, kan enhver stemmeberettiget, som har stemt for Forslaget, føre Sagen videre til Behandling efter §§ 45-50. Ved Sagens Afgørelse vil det i Særdeleshed være at tilstræbe, at Hegnsforholdet ordnes paa den for alle Indmarksejerne hensigtsmæssigste og billigste Maade.

§ 3. Imellem Udmark og Udmark kan Nabo kræve Hegn af Nabo, saafremt han godtgør, at Hegnet for begge Ejendomme vil være af overvejende Nytte i Forhold til Bekostningen, eller at den bestaaende Tilstand medfører en uforholdsmæssig Ulempe for hans Ejendom. Om Hegnet skal frede for Kvæg og Heste eller tillige for Faar, afgøres i Tilfælde af Tvist af Hegnssynsmændene.

§ 4. Hegnspligt indbefatter saavel at opføre Hegn som at bringe bestaaende Hegn i lovlig Stand og at vedligeholde det.

Hegnspligt bortfalder, hvor Naturforhold gør det overvejende vanskeligt at opføre eller vedligeholde Hegn, eller Bekostningen vil være uforholdsmæssig mod Nytten, samt hvor Ejendomme i Indmarken ligger saaledes i Forhold til

L. nr. 171 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um girðingar og friðing av lendi, sum seinast broytt við Ll. nr. 30 frá 17.03.1951.

1. Kapittul
Girðing

§ 1. Innangarðs kann granni krevja av granna girðing fyri ross og neyt.

§ 2. Ímillum innangarðs og uttangarðs kann uttangarðseigari krevja girðing fyri ross, neyt og seyð. Garðskyldan liggur á innangarðsjørðini.

Við viðtøku á grannastevnu kann (sjálvt um uttangarðseigari ikki krevur stik) ásetast, at stik millum innangarðs og uttangarðs skal vera felags fyri fleiri ella allar innangarðspartar í bygdini.

Atkvøðurætt við atkvøðugreiðslu til tílíka viðtøku hava eigararnir av avvarðandi innangarðspørtum. Er uppskot til tílíka viðtøku sett fram, men ikki endaliga samtykt á grannastevnu, kann hvør við atkvøðurætti, sum hevur atkvøtt fyri uppskotinum, skjóta málið fram til viðgerðar eftir §§ 45-50. Við úrskurðinum í málinum verður serstakliga miðað ímóti at girðingarviðurskiftini verða skipað á best hóskandi og bíligasta hátt fyri allar innangarðseigararnar.

§ 3. Ímillum uttangarðs og uttangarðs kann granni krevja girðing av granna, um so er, at hann prógvar, at girðingin verður til munandi gagns fyri báðar partar sammett við kostnaðin, ella at verandi støða hevur við sær ov stóran bága fyri ogn hansara. Um girðingin skal verja fyri neytum og rossum ella eisini fyri seyði, gera garðaskoðararnir av, um ósemja er um tað.

§ 4. Garðaskylda fevnir um bæði at stika og at seta verandi girðing í lógligan stand og halda hana.

Garðaskyldan dettur burtur, har ið náttúruviðurskiftini gera tað munandi trupult at stika ella halda girðing, ella kostnaðurin verður ov stórur sammett við gagnið, og eisini har ið partar innangarðs liggja soleiðis hvør sær, at girð-

hverandre, at Hegnet vil faa en uforholdsmæssig Længde i Forhold til Loddernes Størrelse.

§ 5. Om en Strækning efter denne Lov skal anses som Indmark eller som Udmark, afgøres af den Myndighed, som i det foreliggende Tilfælde har at afgøre den Sag, for hvilken Spørgsmaalet har Betydning.

§ 6. Ejendomme, som adskilles ved Vej, har ingen gensidig Hegnspligt, medmindre der haves Adgang til ved Anbringelse af Led over Vejen (jfr. § 15) at faa Ejendommene fredede mod hinanden ved Opførelse af eet Hegn. Dog er den, som i dette Tilfælde vil hegne langs Vejen for sin Ejendom, ikke pligtig at deltage med Naboen i fælles Hegn eller Led.

De foranstaaende Regler finder ikke Anvendelse paa Ejendomme, som adskilles ved Driftevej for Kvæg (geil). I dette Tilfælde kan enhver Ejer af Ejendom, som støder op til Vejen eller ligger saa nær ved den, at han udsættes for at lide Skade ved Mangel af Hegn, kræve Hegn mod Vejen. Hegnpligten paahviler alle disse Ejere samt de Ejere, som benytter Vejen som Driftevej.

§ 7. Naar Nabo kan kræve Hegn af Nabo, skal de sammenstødende Ejendomme tage hver sin Halvdel deraf. Dog skal den, der ikke selv forlanger Hegn eller Forandring af bestaaende Hegn, og som godtgør, at denne Bestemmelse vilde uforholdsmæssig betynge ham, nyde saadan Formindskelse i sin Hegnspligt, som findes billig. Hvor Hegnspligten ved retsgyldig Overenskomst eller Afgørelse er ordnet paa anden Maade end i denne og foregaaende Paragraf bestemt, har det derved sit Forblivende.

§ 8. I alle Tilfælde, hvor efter denne Lov Deling af Hegn eller Afstemning skal foregaa efter Skattemarker, bliver den umatrikulerede Del af Indmarken (derunder ogsaa Lejetrøer, for saa vidt fornødent til Hegns Deling) at taksere efter Regler, som fastsættes af Ministeren for Landbrug og Fiskeri; Omkostningerne herved udredes med Halvdelen af Amtsrepartitionsfonden og Halvdelen af vedkommende Kommune.

§ 9. Pligten til at deltage i fælles Hegn bestemmes for Udmark efter gammelt Marktal, for Indmark efter Skattemarker. Naar Hegn om

ingin verður órímiliga long sammett við støddina á pørtunum.

§ 5. Um eitt strekki eftir hesi lóg skal roknast sum innangarðs ella uttangarðs, ger tann myndugleiki av, sum í tí verandi føri eigur at gera málið av, har ið ivamálið hevur týdning.

§ 6. Jarðir, sum vegur er ímillum, hava onga felags garðaskyldu, uttan so at høvi er til við at gera lið um vegin (sbr. § 15) at kunna friða jarðirnar ímóti hvørjari aðrari við at stika. Tó hevur tann, sum í hesum føri vil stika framvið vegnum við ogn síni, ikki skyldu at vera saman við grannanum um felags girðing ella lið.

Reglurnar omanfyri verða ikki at nýta á jarðum, sum neytageil er ímillum. Í hesum føri kann hvør eigari av jørð, sum markar til vegin ella liggur so nær honum, at hann er í vanda fyri skaða við ongari girðing, krevja girðing framvið vegnum. Garðaskyldu hava allir hesir eigararnir og eisini teir eigarar, sum nýta vegin sum geil.

§ 7. Tá ið granni kann krevja girðing av granna, skulu jarðirnar, ið bera saman, taka upp á seg hvør sína helvt av hesari. Tó skal tann, sum ikki sjálvur krevur girðing ella broyting av verandi girðing, og sum sannar, at henda avgerð hevði nervað hann ov mikið, eiga tílíka avskarving í garðaskyldu síni, sum tykist rímulig. Har ið garðaskyldan við rættargildum sáttmála ella avgerð er skipað á annan hátt, enn í hesi ella undanstandandi grein er ásett, verður tað við tí verandi.

§ 8. Í øllum førum, har ið eftir hesi lóg býti av girðing ella atkvøðugreiðsla skal fara fram eftir skattamørkum, verður tann ómatrikuleraði parturin innangarðs (uppi í hesum eisini leigutræðir, um so er neyðugt til býtis av girðing) at virðismeta eftir reglum, sum „Ministeriet for Landbrug og Fiskeri“ ásetir; Kostnaðin av hesum rinda „Amtsrepartitionsfonden“ og avvarðandi kommuna við hvør síni helvt.

§ 9. Skyldan at vera við í felags girðing verður gjørd av fyri uttangarðsjørð eftir gomlum markatali, fyri innangarðsjørð eftir skattamørk-

Indmark flyttes, skal det dog ikke paahvile Lodsejer at vedligeholde længere Hegn i Forhold til hans tidligere Andel i Indmarken, end denne Andel nogen Sinde har haft at vedligeholde. Saa længe Lodsejerne ikke har fordelt Hegnsbyrden imellem sig, er de een for alle og alle for een ansvarlige for Opførelse og Vedligeholdelse af det dem paahvilende Hegn. Ved Deling af fælles Hegn for Indmark, som gør tidligere fælles eller særskilt Hegn overflødigt, vil der være at tage tilbørligt Hensyn til, om de, hvem Pligten til at holde det tidligere Hegn paahvilede, kan siges at tage Del i Opførelsen af det nye Hegn, saasom ved at Sten eller andet Materiale fra det gamle Hegn benyttes i det nye, eller ved at Ejeren af det gamle Hegn har overført sin Hegnspligt til andre, f.Eks. som en Del af Vederlaget for tidligere Udmarksjord, der lægges inden for det nye Hegn.

Den, som har opført nyt Hegn, kan fordre det synet af Hegnssynsmændene og kræve Afgørelse af, om en Del af det fremtidig bør vedligeholdes af Ejere af indenfor liggende Hegn, som ved hans Hegn bliver overflødigt.

For Hegn langs med Driftevej for Kvæg (geilargarður) fordeles Hegnspligten efter frit Skøn paa de i § 6, sidste Punktum, nævnte Ejere.

Ejer af Udmark, hvorpaa der hviler Græsningsret, kan, naar Hegn mod anden Udmark maa antages alene eller delvis at være nødvendiggjort ved Græsningsretten, kræve, at de græsningsberettigede i tilsvarende Forhold (helt eller for en Del) skal overtage den ham paahvilende Hegnspligt, medmindre andet er bestemt eller maa antages forudsat ved Rettighedens Stiftelse. Afgørelsen træffes i Tvisttilfælde af Hegnssynsmændene; antages Hegnspligten at burde fordeles, sker Fordelingen efter frit Skøn.

Enhver deri interesseret kan kræve Kendelse af Hegnssynsmændene om, hvorvidt, og i bekræftende Fald hvorledes, fælles Hegn bør underkastes ny Deling under Hensyn til forandrede Forhold. Saadan ny Deling kan dog kun kræves med mindst 10 Aars Mellemrum.

§ 10. Ved Deling af Hegn bør enhver saa vidt muligt faa sin Del i eet sammenhængende Stykke. Den større Byrde, som Beskaffenheden af nogen Strækning maatte medføre, udjævnes ved tilsvarende Afkortning i Længde. Bliver

um. Tá ið girðing um innangarðsjørð verður flutt, skal tað ikki liggja á luteigaranum at halda longri girðing sammett við part hansara innangarðs frammanundan, enn tað ið hesin parturin nakran tíð hevur átt at hildið. So leingi sum luteigararnir ikki hava býtt garðaskyldina sína millum, hava teir ein fyri allar og allir fyri ein skyldu at seta upp og halda girðingina, ið á teimum liggur. Við býti av felags girðing um innangarðsjørð, sum ger áður felags ella serstaka girðing óneyðuga, verður at hava sámuligt fyrilit við, um teir, sum áður høvdu skyldu at halda girðingina, kunnu sigast at taka lut í at seta upp ta nýggju girðingina, eitt nú við at grót og annað tilfar verður nýtt í tí nýggju, ella við at eigarin av tí gomlu girðingini hevur flutt garðaskyldu sína til aðrar, til dømis sum ein part av viðurgjaldinum fyri áður uttangarðsjørð, ið verður løgd inn innanfyri ta nýggju girðingina.

Tann, sum hevur sett upp nýggja girðing, kann krevja hana sýnaða av garðaskoðarunum og krevja avgerð um, hvørt ein partur av tí framyvir eigur at verða hildin av eigarum av innanfyri standandi girðing, sum av hansara girðing verður óneyðug.

Fyri girðing fram við neytageil (geilargarði) verður garðaskyldan býtt eftir meting millum teir í § 6, síðsta punktum, nevndu eigarar.

Eigari av uttangarðs, har ið rættur til bit er tengdur at, kann, tá ið girðing ímóti aðrari uttangarðsjørð kann ætlast einans ella fyri ein part at vera neyðug fyri rættin til bit, krevja, at teir, ið eiga rætt til bit, í samsvarandi lutfalli (fult ella fyri ein part) skulu taka við garðaskylduni, ið á honum liggur, uttan so at annað er ásett ella kann ætlast at vera ein fyritreyt, tá ið rættindini vórðu stovnsett. Í trætumáli taka garðaskoðararnir avgerð; verður hildið, at garðaskyldan eigur at býtast, verður býtt eftir fríari meting.

Allir, ið eru partar í hesum, kunnu krevja úrskurð frá garðaskoðarunum um, hvørt, og um so verður hvussu, felags girðing eigur at býtast av nýggjum við atliti til broyttar umstøður. Tílíkt nýtt býti kann tó bert krevjast við í minsta lagi 10 ára millumbili.

§ 10. Við býti av girðing eigur hvør so nær sum gjørligt at fáa sín part í einum strekki. Tann størra byrðan, sum okkurt strekki kann verða háttað av, verður javnað við samsvarandi stytting í longd. Semjast teir við garðaskyldu

hegnspligtige ikke enige om Delingen, afgøres den paa den i §§ 45-50 angivne Maade. Naar Delingen er foregaaet, bestemmes det, i fornødent Fald ved Lodtrækning, hvilket eller hvilke Stykker enhver skal overtage. Ingen Strækning maa være kortere end 6 Meter; de, hvem mindre Stykker maatte tilkomme, lægges i passende Fællig, saaledes at de over for Trediemand een for alle og alle for een bliver ansvarlige for Hegnsstrækningens Opførelse og Vedligeholdelse. De, der har Hegnsstrækninger i Fortsættelse af hinanden, kan indbyrdes indgaa Overenskomst om fælles Hegnshold, saaledes at de over for Trediemand bliver ansvarlige som nys angivet. De enkelte Hegnsstrækninger skal af Hegnssynsmændene (§ 44) mærkes med indhugget, paamalet eller paa anden Maade varigt anbragt Nummer. Synsmændene skal i deres Protokol (§ 44) indføre Fortegnelse over Delingen, hvor ogsaa senere ændringer bliver at anmærke. Omkostningerne ved Deling og Mærkning m.m. fordeles paa samtlige Deltagere i Hegnet i samme Forhold som Hegnspligten.

ikki um býtið, verður tað gjørt av upp á tann í §§ 45-50 ásetta hátt. Tá ið býtið er framt, verður gjørt av, um neyðugt við lutakasti, hvønn ella hvørjar partar hvør skal taka við. Einki strekki kann vera styttri enn 6 metrar; teir, ið kunnu verða fyri at fáa styttri partar, verða lagdir í hóskandi fela, soleiðis at teir fyri triða manni ein fyri allar og allir fyri ein hava skyldu at seta upp og halda girðingarstrekkið. Teir, ið eiga girðingarstrekkið í framhaldi frá hvørjum øðrum, kunnu sínámillum gera semju um felags hald av girðing, soleiðis at teir fyri triðamanni hava skyldu sum beint nú tilskilað. Tey einstøku girðingarstrekkini skulu av garðaskoðarunum (§ 44) merkjast við høgdum, málaðum ella á annan hátt varandi ásettum nummari. Garðaskoðararnir skulu í gerðabók sína (§ 44) bóka skrá um býtið, har ið eisini seinni broytingar verða at viðmerkja. Kostnaðurin av býti og merking v.m. verður býtt millum allar luttakararnar í girðingini í sama lutfalli sum garðaskyldan.

§ 11. Kommer hegnspligtige ikke overens om Tiden, inden hvilken Hegn skal være fuldført, bestemmes den af Hegnssynsmændene.

§ 11. Semjast teir við garðaskyldu ikki um tíðina, nær ið girðingin skal vera liðug, áseta garðaskoðararnir hana.

§ 12. Om Hegn er lovligt, bestemmes i Tilfælde af Tvist af Hegnssynsmændene under Hensyn til, om Hegnet skal frede for Heste, Kvæg og Gæs eller tillige for Faar.

§ 12. Er trætumál um, hvørt girðing er lóglig, gera garðaskoðararnir av við atliti til, um girðingin skal verja fyri rossum, neytum og gásum ella eisini fyri seyði.

§ 13. Det er forbudt at benytte Pigtraad til Hegn paa saadan Maade, at Mennesker eller Dyr lettelig er udsat for at lide Skade.

Overtrædelse af disse Bestemmelser straffes med Bøder.

§ 13. Tað er bannað at nýta píkatráð sum girðing á tílíkan hátt, at fólk ella fæ lættliga verða fyri at koma til skaða.

Brot á hesar reglur verða sektað.

§ 14. Hegn sættes i Grænseskellet. Intet Hegn maa lægges længere ind paa Naboens end paa egen Grund og ikke over en halv Meter. Nabo kan ikke modsætte sig, at det hele Hegn eller Dele deraf lægges paa hans Grund, naar det er uomgængelig fornødent, dog mod Erstatning. Elv, Klippe eller andet, der freder for samme Slags Husdyr, hvorfor Hegn skal frede, anses som lovligt Hegn.

§ 14. Girðing skal setast á markinum. Eingin girðing skal setast longri inni á grannanum enn á egnari grund og ikki meira enn hálvan metur. Granni kann ikki seta seg upp ímóti, at øll girðingin ella partar av henni verða sett á hansara grund, tá ið ikki slepst undan tí, tó fyri endurgjald. Á, klettum ella annað, ið verjir fyri somu sløgum av húsdýrum, sum girðing skal verja fyri, verður mett sum lóglig girðing.

§ 15.1) Naar der i Hegn findes Led, som er fælles for Naboer, indgaar det i Fordelingen af Hegnsbyrden, og der tages derved Hensyn til

§ 15.1) Tá ið á girðing er lið, sum er felags fyri grannar, telur tað við í býtinum av garðaskylduni, og tað verður við hesum lagt upp fyri

den større Bekostning ved Leddets Opførelse og Vedligeholdelse efter Forskrifterne i § 10. Skønnes Led ikke at kunne indgaa i Fordelingen, holdes det i Fællesskab. Led paa almindelig befaret Vej skal være saaledes indrettet, at det med Lethed kan aabnes og lukkes.

Paa offentlig Vej maa intet Led opsættes, medmindre vedkommende kommunale Myndighed tillader det; denne Myndighed foreskriver i saa Fald tillige Leddets Bredde og øvrige Indretning. Lignende Forskrift kan ogsaa af den kommunale Myndighed gives for Led, som allerede forefindes paa offentlig Vej, hvorhos den kommunale Myndighed skal kunne forlange overflødige Laager over Køreveje nedlagt, dog med Ret for vedkommende berettigede til Paaklage til Lagtinget, inden 3 Maaneder efter, at de bevislig har modtaget Underretning om Afgørelsen. For saa vidt der ved saadant Paabud paaføres hegnspligtige Udgifter, kan disse kræves refunderet overensstemmende med de i Lov Nr. 69 af 7. Maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse indeholdte Regler. I Tilfælde, hvor det efter Kendelse af Hegnssynsmændene eller højere Instans er paakrævet til Fremme for Landbruget, at oprette Hegn over offentlig Kørevej, er vedkommende kommunale Forstanderskab pligtig til at oprette og vedligeholde de for den offentlige Trafik fornødne Laager. Over Trafikveje skal Rørrister altid anvendes. Overtrædelse af Bestemmelsen i dette Stykkes første Punktum eller af de af den paagældende Myndighed givne nærmere Forskrifter straffes med Bøder.

Ethvert Led i Hegn om Indmarken skal være forsynet med forsvarligt Lukke og, bortset fra Led, der er bestemt til at passseres af Køretøjer, indrettes saaledes, at det, hver Gang det aabnes, falder tilbage af sig selv, og at det, for saa vidt det findes i Hegn mod haugen, aabnes ud imod denne.

§ 16. Hegn i Indmark eller mellem Indmark og Udmark skal holdes i lovlig Stand til enhver Tid, hvori Jorden ikke efter de gældende Bestemmelser (derunder ogsaa Bestemmelse, som træffes for enkelt Vaar eller Høst i Henhold til Haugelovens § 35, 2det Stykke) skal ligge aaben for Græsning af den Slags Husdyr, for hvilke det skulde hegne. Hegn mellem Udmark og Udmark skal holdes i lovlig Stand i den Tid, der for ethvert enkelt Tilfælde bestemmes af Hegnssynsmændene, enten ved Hegnets Opførelse eller senere, om Tvist opstaar om Tiden.

meirkostnaðinum av at seta upp og halda liðið eftir forskriftunum í § 10. Metist liði ikki at kunna telja við í býtinum, verður tað hildið í felag. Lið á vanliga nýttari gøtu skal vera soleiðis háttað, at tað lættliga kann latast upp og aftur. Á almennum vegi kann einki lið setast upp, uttan so at avvarðandi kommunali myndugleiki loyvir tað; hesin myndugleiki skipar í tí føri eisini fyri breiddini á liðinum og uppsetingini annars. Tann kommunali myndugleikin kann eisini gera líknandi fyriskipan fyri lið, sum longu eru á almennum vegi, haruppií skal tann kommunali myndugleikin kunna krevja óneyðugar smogur um koyrivegir tiknar burtur, tó við rætti hjá avvarðandi, ið hava rættindi at kæra til løgtingið innan 3 mánaðir eftir, at teir próvfast hava fingið boð um avgerðina. Um tílík boð hava við sær útreiðslur fyri teir, ið hava garðaskyldu, kunnu hesar krevjast endurgoldnar eftir reglunum í „Lov Nr. 69 af 7. Maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse“. Í tí føri, har ið tað eftir úrskurði hjá garðaskoðarunum ella hægri myndugleika er neyðugt til frama fyri landbúnaðin at seta girðing tvørtur um almennan koyriveg, hevur avvarðandi kommunustýri skyldu at seta upp og halda tey fyri ta almennu ferðsluna neyðugu portur. Tvørtur um ferðsluvegir skulu altíð nýtast rulluportur. Brot á regluna í fyrsta punktum í hesum stykki ella tær av avvarðandi myndugleika ásettu neyvari fyriskipanum verða sektað.

Hvørt lið á girðing um innangarðsjørð skal hava fullgóða loku og, undantikið lið, ið er ætlað akførum at fara um, verða gjørd soleiðis, at tað, hvørja ferð tað verður latið upp, letur seg sjávlt aftur, og at tað, um tað er í girðing ímóti haga, letur upp ímóti hesum.

§ 16. Girðing innangarðs ella ímillum innangarðs og uttangarðs skal haldast í lógligum standi alla ta tíð, tá ið lendið ikki eftir teimum galdandi reglunum (uppi í hesum eisini avgerð, sum verður tikin fyri einstakt vár ella heyst sambært hagalógini § 35, 2na stykki) skal liggja opið fyri biti hjá húsdýrum av tí slagi, sum tað skuldi verið girt fyri. Girðing millum uttangarðs og uttangarðs skal haldast í lógligum standi ta tíð, sum garðaskoðararnir í hvørjum einstøkum føri gera av, annaðhvørt tá ið girðingin verður sett upp ella seinni, um ósemja tekur seg upp um tíðina.

over et Hegns Tilstand eller Beskaffenhed (uden for det i § 18 omhandlede Tilfælde) eller ønsker nyt Hegn rejst eller et ældre Hegn ombyttet med en anden Art af Hegn, uden herom at have kunnet opnaa mindelig Overenskomst med vedkommende, har desangaaende at indgive en skriftlig Begæring til Formanden for Distriktets Synsmænd. Denne har derpaa uopholdelig at beramme en Aastedsforretning og at forsyne Begæringen med Paategning om Tiden til Forretningens Afholdelse samt med en Indkaldelse til de paagældende om at overvære samme. Begæringen med disse Paategninger bliver derpaa ved Foranstaltning af den, som har begæret Synet, paa den for Stævninger foreskrevne Maade eller ved tvende uberygtede Personer at forkynde for den anden Part, saaledes at denne faar mindst 2 Gange 24 Timers Varsel. Er flere end 5 Personer Parter i Sagen, kan Formanden tillade, at Forkyndelsen sker ved Opslag i Bygden. Den, som lovlig er varslet til at møde ved Forretningen, men udebliver uden at anmelde gyldigt Forfald, maa tilskrive sig selv, at Sagen afgøres uden noget Hensyn til det, som han maatte have kunnet fremføre.

standin, ein girðing er í ella slagið, hon er av (umframt tað í § 18 nevnda føri) ella vil hava nýggja girðing setta upp ella at eldri girðing verður skift um við eitt annað slag av girðing, uttan at hava fingið friðarsátt við avvarðandi, eigur tí viðvíkjandi at senda skrivliga áheitan til formannin hjá garðaskoðarunum í økinum. Hesin eigur síðan beinan vegin at áseta eina ástaðarviðgerð og at geva áheitanini átekning um, nær ið viðgerðin verður og eisini við fundarboðum til teir avvarðandi at vera hjástaddir. Áheitanin við hesum átekningum skal síðan við atgerð hansara, sum hevur biðið um skoðanina, eftir tí fyri stevningar fyrisetta hátti ella av tveimum persónum við góðum orði á sær boðast hinum partinum, soleiðis at hesin fær í minsta lagi 2 reisur 24 tíma varning. Eru fleiri enn 5 persónar partar í málinum, kann formaðurin loyva, at boðanin fer fram við uppslagi í bygdini. Tann, sum lógliga er boðaður at møta til viðgerðina, men uttan at fráboða lógligt forfall, ikki kemur, kann kasta sær sjálvum fyri, at málið verður gjørt av uttan mun til tað, sum hann møguliga kundi havt ført fram.

§ 46. Forretningen foretages af Distriktets tre Synsmænd i Forening. Ligger Hegnet i Skellet mellem to Distrikter, udføres den af Formanden i hvert Distrikt i Forening med den af begge Distrikters Synsmænd, som Formændene ved Lodtrækning dertil udtager. Ved Forretningen skal Synsmændene lade sig det være magtpaaliggende at fremstille Forholdene klart for de paagældende og søge tilvejebragt Forlig mellem dem, naar det lader sig gøre. Opnaas Forlig, indføres dette i Protokollen og underskrives af de vedkommende. Kan Forlig ikke opnaas, optages Sagen til Kendelse, som afsiges snarest muligt, senest inden Forløbet af 3 Dage, og tilføres Protokollen med en Begrundelse af Kendelsen samt underskrives af Synsmændene.

Kendelsen afsiges efter Stemmeflerhed; er alle tre Synsmænd af forskellig Mening, bliver Formandens (eller, naar to Formænd deltager, den ældste Formands) Stemme den afgørende.

Ved Slutningen af hvert Møde underskrives Protokollen af Synsmændene.

§ 46. Viðgerðin verður framd av teimum trimum garðaskoðarunum í felag í økinum. Stendur girðingin á markinum millum 2 øki, verður hon framd av formanninum í hvørjum øki saman við tí av skoðarunum í báðum økjunum, sum formenninir velja við lutakasti til tess. Í viðgerðini skulu skoðararnir leggja sær nær, at tað er umráðandi at leggja viðurskiftini klárt fram fyri tey avvarðandi og royna at fáa semju teirra millum, tá ið tað er gjørligt. Fæst semja, verður hetta ført í gerðabókina, og tey avvarðandi skriva undir. Fæst eingin semja, verður málið tikið upp til úrskurðar, sum verður gjørdur sum skjótast, í seinasta lagi innan 3 dagar eru lidnir, og verður førdur í gerðabókina við grundgeving fyri úrskurðinum og undirskrivað av skoðarunum.

Úrskurðurin verður gjørdur við atkvøðumeiriluta; hava allir tríggir skoðararnir ymiska meining, verður formansins atkvøða (ella, um tveir formenn eru við, tann hjá tí eldra formanninum) tann avgerandi.

Tá ið hvør fundur er komin at enda, undirskriva allir skoðararnir gerðabókina.

§ 47. Hvad enten Sagen afgøres ved Forlig eller

§ 47. Hvørt málið verður gjørt av við semju ella

Kendelse, maa den trufne Afgørelse i hvert af de nedenfor nævnte Tilfælde indeholde Oplysning om de for sammes Vedkommende fremhævede Punkter:

1. Naar nyt Hegn skal rejses:

Om Hegnets Højde og øvrige Beskaffenhed, samt af hvem og inden Udløbet af hvilken Frist det foreskrevne Arbejde skal udføres, og hvorledes der bliver at forholde med Hegnets fremtidige Vedligeholdelse;

2. Naar et ældre Hegn skal forandres eller ombyttes med et nyt:

Om de under Nr. 1 ommeldte Punkter, samt hvorledes der skal forholdes med det ældre Hegns Forandring eller Borttagelse, hvem der skal iværksætte det herhenhørende Arbejde, og hvorvidt der herfor skal gives nogen Godtgørelse, og i bekræftende Fald af hvem Godtgørelsen skal ydes, samt dens Størrelse og Betalingstid;

3. Naar et brøstfældigt Hegn skal udbedres:

Hvorledes, af hvem og inden Udløbet af hvilken Frist det foreskrevne Arbejde skal udføres.

úrskurði, skal tann tikna avgerðin í hvørjum av teimum niðanfyri nevndu førum innihalda upplýsing um tær hennara viðvíkjandi tilskilaðu greiningum:

1. Tá ið nýggj girðing skal setast:

Um hæddina á girðingini og slagnum annars, og eisini av hvørjum og áðrenn hvørja freist tað fyrisetta arbeiði skal gerast, og hvussu skal skipast fyri við at halda girðingina í framtíðini;

2. Tá ið eldri girðing skal broytast ella skiftast um við eina nýggja:

Um tær í Nr. 1 fyrrnevndu greiningar, og eisini hvussu berast skal at við broyting ella burturtøku av tí gomlu girðingini, hvør ið skal seta í verk arbeiðið hesum viðvíkjandi, og hvørt tað fyri hetta skal latast nøkur samsýning, og um so er, hvør ið skal rinda samsýningina, og eisini hædd hennara og gjaldtíðina;

3. Tá ið ein skrivilig girðing skal umvælast:

Hvussu, av hvørjum og innan hvørja freist tað fyrisetta arbeiðið skal gerast.

§ 48. Synsmændene har i Kendelsen at træffe Bestemmelse om Udredelsen af Forretningens Omkostninger, som i Almindelighed vil være at paalægge den, som Kendelsen gaar imod. Afgøres Sagen ved Forlig, skal dette indeholde Bestemmelse om, hvorledes Omkostningerne bliver at udrede.

§ 48. Skoðararnir skulu í úrskurðinum gera av um rindanina av viðgerðarkostnaðinum, sum vanliga eigur at leggjast á tann, sum úrskurðurin gongur ímóti. Verður málið gjørt av við semju, skal hon innihalda avgerð um, hvussu kostnaðurin skal rindast.

§ 49. Enhver af Parterne staar det frit for inden 3 Uger efter Kendelsens Forkyndelse at indbringe den for Landvæsenskommissionen, ligesom den ved Kendelse af Landvæsenskommissionen trufne Afgørelse, for saa vidt Sagen ikke indskrænker sig til Anke over Vedligeholdelsesmangler, igen vil kunne indbringes for Overlandvæsenskommissionen. Med Hensyn til Sagernes Indankning for og Behandling ved Landvæsenskommissionen og Overlandsvæsenskommissionen bliver at forholde efter Reglerne i Loven om Landvæsenskommissioner.

§ 49. Tað stendur til hvønn av pørtunum innan 3 vikur eftir, at úrskurðurin er kunngjørdur, at leggja hann fyri landbúnaðarstevnuna, eins og tann við úrskurði hjá landbúnaðarstevnuni tikna avgerðin, um so er, at málið ikki einans fevnir um kæru um skortandi hald, uppaftur eigur at kunna leggjast fyri yvirlandbúnaðarstevnuna. Viðvíkjandi tí, at skjóta málini til og viðgerðina í landbúnaðarstevnuni og yvirlandbúnaðarstevnuni, verður at halda seg eftir reglunum í lógini um landbúnaðarstevnur.

§ 50. Naar der for Hegnssynsmændene af rette vedkommende føres Klage over, at den, som det efter Forlig eller Kendelse i Henhold til de foregaaende Regler paahviler at udføre noget Hegnsarbejde, ikke har efterkommet sin Forpligtelse i denne Henseende ved Udløbet af den dertil indrømmede Frist, afgør Hegnssynsmændene uden

§ 50. Tá ið tað av rætta avvarðandi til garðaskoðararnar verður kært um, at tann, sum eftir semju ella úrskurði sambært teimum undanstandandi reglunum eigur at gera eitt girðingararbeiði, ikki hevur gjørt skyldu sína hesum viðvíkjandi, tá ið játtaða freistin til tess er um at verða runnin, gera garðaskoðararnir av uttan

Appel, om Klagen er begrundet. Med Hensyn til Parternes Indkaldelse til denne Forretning, hvem der skal afholde den, hvorledes Afgørelsen træffes, samt med Hensyn til Betalingen for den, forholdes efter de ovenstaaende Forskrifter. Findes Klagen begrundet, foranstalter Formanden for Synsmændene det manglende Arbejde udført for vedkommendes Regning. For at møde ved Arbejdets Aflevering til den paagældende Part tilkommer der ham Betaling efter § 44. Udgifterne ved disse Forretninger udredes af den af Parterne, hvem Afgørelsen er gaaet imod.

De udgifter, som synsmændene har haft ved at udføre manglende arbejde og for at fuldføre selve forretningen, jfr. § 2, kan disse straks få betalt af vedkommende forstanderskab efter specificeret regning.

I Mangel af Betaling paa Anfordring af de til Arbejdets Udførelse medgaaende Omkostninger kan disse inddrives ved Udpantning.

Samtlige øvrige Udgifter, som flyder af Anvendelsen af denne Lovs 1ste og 6te Kapitel, saasom Betaling for udførte Arbejder, Erstatninger eller Omkostninger ved Sagernes Behandling o.s.v., kan ogsaa inddrives ved Udpantning.

kærurætt, um hald er í kæruni. Viðvíkjandi tí, at kalla partarnar saman til hesa viðgerð, hvør ið skal fremja hana, hvussu avgerðin verður tikin, og eisini um gjaldið fyri hana, verður farið fram eftir undanstandandi forskriftum. Er hald í kæruni, setir formaðurin hjá garðaskoðarunum í verk, at tað skortandi arbeiðið verður gjørt fyri kostnað tess avvarðandi. Fyri at møta, tá ið arbeiðið verður avhendað tí avvarðandi parti, eigur hann gjald eftir § 44. útreiðslurnar av hesum viðgerðum rindar tann av pørtunum, sum avgerðin hevur gingið ímóti.

Tær útreiðslur, ið garðaskoðararnir hava havt av at gera skortandi arbeiði og av at gera sjálva viðgerðina lidna, sbr. § 2, kunnu hesir fáa goldnar beinanvegin av avvarðandi bygdaráði eftir greiddari rokning.

Um ikki verður goldið, tá ið kravt verður fyri útreiðslur, ið hava staðist av at greiða arbeiðið úr hondum, kunnu hesar krevjast inn við panting.

Allar aðrar útreiðslur, ið standast av nýtslu av 1sta og 6ta kapitli í hesi lóg, eitt nú gjald fyri gjørd arbeiði, endurgjøld ella kostnað av at viðgera málini o.s.fr., kunnu eisini krevjast inn við panting.

## Kapitel 7.
## Behandling af Sager om Ansvar for Husdyr og af Straffesager.
## Lovens Ikrafttræden.

§ 51. Naar Skøn i Henhold til § 25 eller § 33 er forlangt hos Formanden for Synsmændene, har denne snarest muligt at tilkalde en af Distriktets andre Synsmænd og Ejeren af det Dyr, som har foraarsaget Skaden, samt den skadelidte og derefter at afholde Skønsforretningen. Er nogen Synsmand forhindret i at deltage i Forretningen, forholdes der som angivet i § 44, 2det Stykke.

§ 52.4) Straffesager, som anlægges efter denne Lov, behandles som Politisager, men paatales - uden for de i § 13 og § 22 omhandlede Tilfælde - kun, naar nogen forurettet begærer det. Søgsmaal til Erstatning efter §§ 20, 21, 33 og 38 behandles i den borgerlige Retsplejes Former, men den forurettede kan, naar offentlig Sag anlægges i Anledning af det paagældende Forhold, kræve Erstatningsspørgsmaalet paakendt under den offentlige Sag under de sædvanlige for Erstat-

## 7. kapittul.
## Viðgerð av málum um ábyrgd av húsdýrum og revsimálum.
## Gildisseting lógarinnar.

§ 51. Tá ið meting sambært § 25 ella § 33 er kravd hjá formanninum hjá garðaskoðarunum, skal hesin sum skjótast boðsenda einum av hinum skoðarunum í økinum og eigaranum av tí dýri, sum hevur gjørt skaðan, og eisini honum, sum hevur verið fyri skaða, og síðan at taka metingaravgerðina. Berst nøkrum skoðara frá at vera við í viðgerðini, verður farið fram sum ásett í § 44, 2rum stykki.

§ 52.4) Revsimál, sum verða tikin upp eftir hesi lóg, verða viðgjørd sum løgreglumál, men lógsøkt - uttan viðvíkjandi teimum í § 13 og § 22 nevndu førum - einans, tá ið nakar, ið hevur verið fyri órætti, biður um tað. Sakarmál um endurgjald eftir §§ 20, 21, 33 og 38 verða viðgjørd eftir háttum í tí borgarligu rættargangslógini, men tann, ið hevur verið fyri órætti, kann, tá ið alment sakarmál verður tikið upp vegna avvarðandi viðurskifti, krevja

ningskravs Inddragelse under offentlig Straffesag gældende Betingelser.

endurgjaldsspurningin dømdan undir tí almenna sakarmálinum eftir teimum vanligu fyri innheinting av endurgjaldskravi í almennum revsimáli galdandi treytum.

§ 53.5) Bøder efter denne Lov saavel som Udbyttet af Konfiskation efter §§ 26 og 27 tilfalder Hjælpekassen for det Sogn, i hvilket Forseelsen eller Ufreden er foregaaet.

§ 53.5) Sektir eftir hesi lóg eins væl og úrslitið av upptøku eftir §§ 26 og 27 ognast hjálpikassanum í tí sókn, har ið misbrotið ella ófriðurin eru farin fram í.

§ 54. Ved „Haugeloven“ forstaas i denne Lov „Lov for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m. af 18. Maj 1937“; ved „Grandestævneloven“ forstaas „Lov for Færøerne om Grandestævne m.m. af 18. Maj 1937“; ved „Loven om Landvæsenskommissioner“ forstaas „Lov for Færøerne om Landvæsenskommissioner af 31. Marts 1926“.

§ 54. Við „Haugeloven“ skilst í hesi lóg „Lov for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m. af 18. Maj 1937“; við „Grandestævneloven“ skilst „Lov for Færøerne om Grandestævne m.m. af 18. Maj 1937“; við „Loven om Landvæsenskommissioner“ skilst „Lov for Færøerne om Landvæsenskommissioner af 31. Marts 1926“.

§ 55. Denne Lov træder i Kraft den 1. Juli 1938, fra hvilken Tid Norske Lovs 3-12-16 til 23, 6-20-4, § 9 i Lov af 19. Januar 1863 om Afhændelse af de Fæstegaarden Husegaard ved Thorshavn tilhørende Trøer, Lov for Færøerne Nr. 49 af 13. Februar 1922, og hvad der ellers strider mod denne Lov, ophæves.

§ 55. Henda lóg fær gildi tann 1. juli 1938, frá somu tíð fara úr gildi „Norske Lovs 3-12-16 til 23, 6-20-4“, § 9 í „Lov af 19. Januar 1863 om Afhændelse af Fæstegaarden Husegaard ved Thorshavn tilhørende Trøer“, „Lov for Færøerne Nr. 49 af 13. februar 1922“, og hvat ið annars stríðir ímóti hesi lóg.

1) Broytt við Ll. nr. 25 frá 31.03.1949
2) Broytt við Ll. nr. 30 frá 17.03.1951
3) Broytt við L. nr. 242 frá 07.06.1963
4) 2. pkt. avtikið við Lb. nr. 555 frá 01.11.1984 om rettens pleje, sum sett í?gildi við L. nr. 92 frá 23.02.1988 § 688
5) Sektin fer nú í ríkiskassan sbr. L. nr. 186 frá 07.06.1958

1) Broytt við Ll. nr. 25 frá 31.03.1949
2) Broytt við Ll. nr. 30 frá 17.03.1951
3) Broytt við L. nr. 242 frá 07.06.1963
4) 2. pkt. avtikið við Ll. nr. 555 frá 01.11.1984 om rettens pleje, sum sett í gildi við L. nr. 92 frá 23.02.1988 § 688
5) Sektin fer nú í ríkiskassan sbr. L. nr. 186 frá 07.06.1958

Skjal 15

L. nr. 172 af 18.05.1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m., sum seinast broytt við Ll. nr. 82 fr 19.06.1990.

FØRSTE AFSNIT
STYRELSEN

Kapitel 1.
Haugestævne.

§ 1. I Fælleshauge er den øverste Myndighed hos Haugestævnet.

Ved „Fælleshauge“ forstaas i denne Lov Hauge, som er i Sameje mellem 2 eller flere Ejere. For Jord i offentligt Eje er Brugeren bemyndiget til at optræde paa Ejerens Vegne, medmindre der i enkelte Tilfælde af vedkommende Myndighed er truffet anden Bestemmelse.

§ 2. Haugestævnet sammenkaldes med mindst 8 Dages Varsel (jfr. dog §§ 4, 20, 22 og 25); det skal sammentræde, naar Bestyrelsen finder det nødvendigt, saavel som naar Haugens Røgtere eller en Fjerdedel af Ejerne eller saa mange, som ejer en Fjerdedel af Haugens Marketal, forlanger det. Sammenkaldelsen paahviler Bestyrelsen, om saadan er til, og ellers den Ejer eller Haugerøgter, som ønsker Stævnet sammenkaldt. Saafremt det holdes samtidig med Grandestævne, er Sysselmanden pligtig at lede Forhandlingerne paa Haugestævnet, og Dagen for dettes Afholdelse berammes da efter Bestemmelsen i Grandestævnelovens § 5, sidste Stykke. Ellers ledes Forhandlingerne af en Ordstyrer, valgt blandt og af de tilstedeværende Ejere med Stemmeflerhed; falder Stemmerne ved Valget lige, gør Lodtrækning Udslaget. Om Forhandlingen og Afstemningen gælder Reglerne i Grandestævnelovens §§ 7 a, 8-11 og 13.

§ 3. Haugestævnet kan træffe Afgørelse i ethvert Haugens Drift og Udøvelsen af de fælles Rettigheder vedrørende Anliggende, som ikke ved Lovgivningen er henvist til anden Afgørelse.

L. nr. 172 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um hagastýri og røkt v.m. sum seinast broytt við Ll. nr. 82 frá 19.06.1990.

Umseting av danska lógatekstinum

Umsetingin hevur ikki lógagildi, tí hon er ikki samtykt av løgtinginum og staðfest av løgmanni.

FYRSTI PARTUR.
STÝRIÐ.

1. Kapittul.
Hagastevna.

§ 1. Í felagshaga hevur hagastevnan evsta myndugleika.

Við „felagshaga“ er at skilja í hesi lóg hagi, sum er samogn (feli) hjá 2 ella fleiri eigarum. Fyri almenna jørð hevur brúkarin myndugleika at virka eigarans vegna, uttan so at tað í einstøkum føri er tikin onnur avgerð av avvarðandi myndugleika.

§ 2. Hagastevnan verður kallað saman við í minsta lagi 8 daga varningi (sbr. tó §§ 4, 20, 22 og 25); hon skal koma saman, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, eins væl og tá ið røktingarmenninir ella ein fjórðingur av eigarunum ella so mangir, sum eiga ein fjórðing av markatalinum í haganum, krevja tað. Tað liggur á stýrinum at kalla saman, um tílíkt er til, og annars á eigara ella røktingarmanni, sum ynskir stevnuna kallaða saman. Um hon verður hildin um somu tíð sum grannastevna, er sýslumaðurin skyldugur at standa fyri samráðingunum á hagastevnuni, og dagurin, tá ið hon skal haldast, verður tá ásettur eftir regluni í grannastevnulógini § 5, síðsta stykki. Aðramáta stendur fyri samráðingunum ein fundarstjóri, valdur millum og av teimum hjáverandi eigarunum við atkvøðumeiriluta; standa atkvøðurnar á jøvnum, ger lutakast munin. Fyri samráðingini og atkvøðugreiðsluni galda reglurnar í grannastevnulógini §§ 7a, 8 - 11 og 13.

§ 3. Hagastevnan kann taka avgerð viðvíkjandi røkt av haganum og nýtslu av felagsrættindum í málum, sum ikki í lóggávuni er víst til aðra avgerð.

Det kan fastsætte Regler for Ejernes Færdsel i Haugen, jfr. Hegnslovens § 41.

## Kapitel 2.
## Bestyrelse.

§ 4. Ejes Fælleshauge af mere end fem Ejere, skal den have en Bestyrelse, bestaaende af tre eller fem Medlemmer efter Haugestævnets Bestemmelse. Haugestævnet vælger Bestyrelsen; henholdsvis to og tre Medlemmer vælges med Stemmeflerhed efter Marketal, medens henholdsvis et Medlem og to Medlemmer vælges med Stemmeflerhed efter de stemmendes Antal. Stævnet skal sammenkaldes med mindst 14 Dages Varsel. Ordentligt Valg afholdes hvert andet Aar i Tidsrummet fra 15. Oktober til Udgangen af December. Tjenestetiden regnes fra 1. Januar. Enhver Ejer, som bor i den Bygd, hvortil Haugen hører, og enhver Bruger af Jord i offentligt Eje er pligtig at modtage Valg; det samme gælder Opsidder for Ejer, som bor uden for Bygden. Vedkommende Hauges Røgtere kan, selv om de ikke er Ejere, vælges til Medlemmer af Bestyrelsen. Den, der har fyldt 60 Aar, er fritaget; ligesaa kan den, der har været Medlem i fire Aar, undslaa sig for at modtage Valg i de næste fire Aar; men disse Fritagelser gælder dog kun, naar nogen anden er pligtig at modtage Valg.

Bestyrelsens Medlemmer er hvert for sig ansvarlige for, at Haugestævnet i betimelig Tid sammenkaldes til Valg af Bestyrelse, og at Valgets Udfald inden 14 Dage meldes til Sysselmanden, som fører Fortegnelse over de modtagne Anmeldelser. Er ingen Bestyrelse til, paahviler de nævnte Pligter den største i Bygden boende Lodsejer eller Bruger af Jord i offentligt Eje.

§ 5. Bestyrelsen skal vælge en Formand og en Næstformand. Den skal varetage Haugens regelmæssige Drift og drage Omsorg for, at denne foregaar saaledes, at Ejernes Tarv i alle Maader iagttages. For at Bestyrelsen kan tage gyldig Beslutning, kræves, at over Halvdelen af dens Medlemmer stemmer for Beslutningen. Bestyrelsen tager Bestemmelse om Tillæg og Slagt af Faar. Den sørger for, at Afgrøftning og alt andet nødvendigt Arbejde i Haugen udføres i rette Tid og paa nyttigste og sparsommeligste Maade. Den paaser, at enhver paagældende efterkommer sin Pligt, og kan paa den forsømmeliges Be-

Reglur kunnu setast fyri hagagongd hjá eigarunum, sbr. § 41 í garðalógini.

## 2. Kapittul
## Stýri.

§ 4. Eru fleiri enn fimm eigarar um ein felagshaga, skal hann hava eitt stýri, samansett av trimum ella fimm limum, sum hagastevnan ger av. Hagastevnan velur stýrið; ávikavist verða tveir og tríggir limir valdir við atkvøðumeiriluta eftir markatali, meðan ávikavist ein limur og tveir limir verða valdir við atkvøðumeiriluta eftir talinum á teimum við atkvøðurætti. Stevnan skal kallast saman við í minsta lagi 14 daga varningi.

Regluligt val skal haldast annaðhvørt ár í tíðarskeiðnum frá 15. oktober til endan á desember. Tænastutíðin tekur við frá 1. januar. Hvør eigari, ið býr í bygdini, sum hagin liggur til, og hvør brúkari av almennari jørð er skyldigur at taka við vali; tað sama er galdandi fyri uppsitara fyri eigara, sum er avbygdamaður. Røktingarmenn í avvarðandi haga kunnu, hóast teir ikki eru eigarar, veljast í hagastýrið.

Tann, sum hevur fylt 60 ár, er undantikin; somuleiðis kann tann, sum hevur verið limur í fýra ár, bera seg undan at taka við vali tey næstu fýra árini; men hesar undantøkur galda tó bert, tá ið onkur annar er skyldigur at taka við vali.

Stýrislimirnir standa hvør sær til svars fyri, at hagastevnan í tímiligari tíð verður kallað saman til stýrisval, og at valúrslitið innan 14 dagar verður boðað sýslumanninum, sum førir lista yvir tær móttiknu fráboðanirnar. Er einki stýri, liggja tær nevndu treytirnar á tí størsta í bygdini búsitandi luteigara ella brúkara av almennari jørð.

§ 5. Stýrið velur formann og næstformann. Tað skal varða um regluliga røkt av haganum og syrgja fyri, at hendan fer fram soleiðis, at ansa verður í øllum føri eftir tørvi eigaranna. Fyri at stýrið kann gera bindandi samtykt, krevst, at meiri enn helvtin av limunum atkvøða fyri samtyktini. Stýrið ger av um uppslepping og tøku av seyði. Tað syrgir fyri, at skorið verður upp og at alt annað neyðugt arbeiði í haganum verður gjørt í tøkum tíma og á gagnligasta og sparsamasta hátt. Tað ansar eftir, at hvør avvarðandi ger sína skyldu, og kann fyri kostnað hjá tí vansketna lata bønarfólk gera arbeiðið.

kostning lade Arbejdet udføre ved lejede Folk.

I alle disse Tilfælde skal den overlægge Sagen med Haugens Røgtere. Den fører Tilsyn med, at disse overholder deres Pligter.

§ 6. I Forhold til Trediemand (derunder ogsaa enkelt Ejer, der vil gøre en ham tilkommende Ret gældende mod Fælliget, eller omvendt) kan Bestyrelsen i alle Anliggender, der vedrører Haugen som et Fællig, optræde paa dettes Vegne. Den kan saaledes i deslige Anliggender sagsøge og sagsøges paa Fælligets Vegne og i det hele repræsentere Fælliget for Retten saavel som for Forligs-, Udskiftnings-, Landvæsens- og Overlandvæsenskommissionen. Er ingen Bestyrelse valgt og anmeldt til Sysselmanden, staar det den, som vil søge Fælliget, frit for at søge, hvem han vil, af Haugens Ejere paa Fælligets Vegne.

§ 7. I Forhold til Haugens Ejere er Bestyrelsen at anse som Fuldmægtig. Ligesom Bestyrelsen derfor har at rette sig efter de Forskrifter for Driften, som Haugestævnet vedtager, saaledes har den at sammenkalde Haugestævnet, naar vigtigere Anliggender forefalder, og skal altid gøre det, naar der er Spørgsmaal om Søgsmaal af eller imod Fælliget.

§ 8. Bestyrelsen skal føre Regnskab over sin Forvaltning af Haugens Pengemidler og gøre Rede og Rigtighed derfor. Herfor er hvert enkelt Medlem af Bestyrelsen ansvarligt. Regnskabet skal aflægges for hvert Kalenderaar, senest inden 1. Februar i det følgende Aar, og skal forelægges paa Haugestævne inden 14 Dage derefter.

For Jord i offentligt Eje er Bestyrelsen pligtig til paa Forespørgsel at give alle Oplysninger om Haugen, der begæres af vedkommende offentlige Myndighed.

Kapitel 3.
Haugerøgtere.

§ 9. For hver Hauge skal der være mindst 1 Haugerøgter. For Fælleshaugefastsætter Haugestævnet Haugerøgternes Antal og Løn og vælger dem; Valget foretages med Stemmeflerhed af Ejere og Brugere efter Marketal. Har Haugestævnet ikke truffet disse Bestemmelser, paahviler det Bestyrelsen at træffe dem.

§ 10. Haugerøgterne skal forestaa Faarenes

Í øllum førum skal tað ráðleggja við røktingarmenninar um málið. Tað hevur eftirlit við, at hesir gera skyldur sínar.

§ 6. Í móti triðjamanni (herundir eisini einstøkum eigara, ið vil føra fram ein sær tilskilaðan rætt móti felanum, ella øvugt) kann stýrið í øllum málum, sum viðvíkja haganum sum fela, standa fram tess vegna. Tað kann soleiðis í tílíkum málum stevna og verða stevnt felans vegna og yvirhøvur umboða felan fyri rættinum eins væl og fyri sáttar-, útskiftingar-, landbúnaðar- og yvirlandbúnaðarstevnini. Er einki stýri valt og fráboðað sýslumanninum, stendur tað til tann, sum vil stevna felan, frítt at stevna, hvønn hann vil, av hagaeigarunum felans vegna.

§ 7. Yvir fyri hagaeigarunum er stýrið at rokna sum fulltrúi. Eins og stýrið tí eigur at rætta seg eftir fyriskipanum um røktina, sum hagastevnan samtykkir, soleiðis eigur tað at kalla hagastevnuna saman, tá ið týdningarmiklari mál koma fyri, og skal altíð gera tað, tá ið tað velst um rættarmál fyri ella í móti felanum.

§ 8. Stýrið skal føra roknskap fyri fyrisiting sína av peninginum hjá haganum og halda skil og rættleika í hesum. Fyri hesum stendur hvør einstakur stýrislimur til svars. Roknskapurin skal leggjast fram fyri hvørt álmanakkaár, í seinasta lagi innan 1. februar árið eftir, og skal leggjast fram á hagastevnu innan 14 dagar eftir tí.

Fyri almennajørð hevur stýrið skyldu, tá ið spurt verður, at greiða frá øllum um hagan, sum avvarðandi almenni myndugleiki krevur.

3. Kapittul.
Røktingarmenn.

§ 9. Fyri hvønn haga skal í minsta lagi vera ein røktingarmaður. Fyri felagshaga ger hagastevnan av røktingarmannatal og løn teirra og velur teir; valið fer fram við atkvøðumeiriluta av eigarum og brúkarum eftir markatali. Hevur hagastevnan ikki tikið hesar avgerðir, liggur tað á stýrinum at taka tær.

§ 10. Røktingarmenninir skulu standa fyri

Røgt, Fjeldgangene og Mærkningen samt alt andet Arbejde i Haugen. De har at paase, at Bestemmelserne om Haugens Besætning og Bestemmelserne om Fred i Haugen (jfr. Hegnslovens §§ 20-22, 26-29, 31, 41-43) overholdes, og at omvendt Haugens Besætning ikke trænger ind paa fremmed Ejendom, saaledes at deraf kan opstaa Tab eller Ansvar for Haugens Ejere. De tager Bestemmelse om Tillæg og Slagt, naar Ejer eller Bestyrelse ikke har gjort dette.

seyðarøktini, fjallgonguni og markingini og eisini øllum øðrum arbeiði í haganum. Teir eiga at ansa eftir, at avgerðirnar um skipanina í haganum og avgerðirnar um frið í haganum (sbr. §§ 20-22, 26-29, 31, 41-43 í garðalógini) verða hildar, og øvugt at skipanin í haganum ikki gongur inn á fremmanda ogn, soleiðis at hagaeigararnir verða fyri missi og ábyrgd av hesum. Teir gera av um uppslepping og tøku, tá ið eigari ella stýrið ikki hava gjørt hetta.

§ 11. Haugerøgterne er i deres Tjeneste Ejerne ansvarlige og skal rette sig efter de Forskrifter, som gives dem af Haugestævnet eller Haugens Bestyrelse. De skal paa den enkelte Ejers eller Brugers Forlangende meddele ham Forklaring om de dem betroede Faars Antal og Tilstand samt Røgt i Haugen m.m.

§ 11. Røktingarmenninir standa í tænastu síni eigarunum til svars og skulu rætta seg eftir teimum forskriftum sum hagastevnan ella hagastýrið gevur teimum. Teir skulu, tá ið tann einstaki eigarin ella brúkarin krevur tað, greiða honum frá tali og standi á seyðinum, ið honum er litið upp í hendur, og eisini røktini í haganum v.m.

§ 12. Haugerøgter skal i Regelen opsige sin Tjeneste inden den 1. September, men han kan dog ikke fratræde sit Hverv, førend Fjeldgang efter Avlsvæddere er endt, medmindre han forlader Bygden eller Omstændighederne gør ham det umuligt at vedblive sin Tjeneste.

§ 12. Røktingarmaður skal vanliga siga upp tænastu sína innan tann 1. september, men hann kann tó ikki fara úr starvi sínum, fyrr enn fjallgongan eftir brundseyði er gingin, uttan so at hann fer at bygdini ella umstøðurnar gerast honum ómøguligar at halda fram í tænastu síni.

## ANDET AFSNIT.
## BESÆTNINGEN.

### Kapitel 4.
### Faar.
### *A. Faarenes Mærkning.*

§ 13. I enhver Hauge skal bruges et bestemt Mærke for alle til Haugen hørende Faar eller, om fornødent, flere Mærker for forskellige Flokke af Faarene i Haugen, jfr. § 20, Punkt 3 b. Samme Mærke maa ikke bruges i to Hauger paa samme Ø.

§ 14. Sager, som angaar Mærkers Forandring, skal først forhandles ved Grandestævne. Sysselmanden har derefter at forebringe dem for Amtmanden til Afgørelse.

§ 15. Ingen anden end Haugens Røgtere maa befatte sig med paa egen Haand at mærke Faar.

§ 16. Moderfaar, som ikke hører til Haugen,

## ANNAR PARTUR.
## SKIPANIN.

### 4. Kapittul.
### Seyður.
### *A. Seyðamarkingin.*

§ 13. Í hvørjum haga skal nýtast eitt ávíst mark til allan seyðin í haganum ella, um neyðugt, fleiri mark til ymisk seyðafylgir í haganum, sbr. § 20, punkt 3b. Sama mark kann ikki nýtast í tveimum høgum á somu oyggj.

§ 14. Mál, sum viðvíkja markabroytingum, skulu fyrst viðgerast á grannastevnu. Sýslumaðurin skal síðan leggja tey fram fyri amtmannin til avgerðar.

§ 15. Eingin annar enn røktingarmenn hagans kunnu av sínum eintingum fáast við at marka seyð.

§ 16. Ærseyður, sum ikki hoyrir til hagan, men

men ved Fjeldgang er kommet imellem dens Faar, skal ved Fjeldgangen betegnes med et Baand (sløður, helsi), naar det ikke med Sikkerhed vides, at dets Lam har faaet ret Mærke.

*B. Avlsvæddere.*

§ 17. Avlsvæddere skal af Haugerøgterne udvælges blandt de bedste, som findes i Haugen. Der udtages dertil 1 Vædderlam for hver 33 eller 1 ældre Vædder for hver 40 Moderfaar i Haugen. Tillægges færre, skal Haugerøgterne snarest muligt anmelde det for Sysselmanden, som undersøger, om nogen bærer Ansvar derfor.

*C. Ejendomsforholdet med Hensyn til Faarebesætningen.*

§ 18. I Fælleshauge skal, naar ikke andet er vedtaget i Henhold til § 20, hele Faarebesætningen være i Sameje (felag) mellem alle Ejere i Forhold til deres Marketal. Besætningens Størrelse fastsættes af Haugestævnet. Faarene skal følge Jorden ved al Overdragelse og Arv; de kan ikke ved Udlæg skilles fra Jorden.

§ 19. Selv om Besætningen er i Sameje, kan Haugestævnet dog tillade Haugerøgter at holde et vist Antal Faar i Haugen som Vederlag for hans Arbejde, ligesom Haugens Bestyrelse kan tillade, at enkelte Faar midlertidig græsser i Haugen for et af Bestyrelsen fastsat Vederlag, der tilfalder Haugen.

§ 20. Særeje (kenning) til Faarebesætningen eller til Dele af den er kun tilladt under følgende Betingelser:

1. Vedtægt derom skal være oprettet paa Haugestævne, sammenkaldt med mindst 3 Maaneders Varsel. Til gyldig Beslutning kræves, at den er vedtaget af saa mange stemmeberettigede, som tilsammen udgør mindst:

a) to Trediedele af samtlige stemmeberettigedes Antal og

b) Halvdelen af hele Haugens Marketal.

2. Vedtægten skal indeholde Bestemmelse om, hvor stor Besætning der sættes for hele Haugen, og om der skal være Særeje for hele Besætningen eller kun for en Del af den, og da hvilken.

3. Vedtægten skal endvidere indeholde Bestemmelse om:

a) at Røgten skal besørges af Haugerøgtere,

á fjalli er komin upp í gonguna, skal á rættini frámerkjast við sløðuri, tá ið ikki vissa er fyri, at lamb hennara er markað rætt.

*B. Brundseyður.*

§ 17. Røktingarmenninir skulu gera brundseyðir upp av teimum bestu, sum eru í haganum. Til hetta verða gjørd upp 1 veðurlamb fyri hvørjar 33 ella 1 veðrur fyri hvørjar 40 ærseyðir í haganum. Verða færri slept upp, skulu røktingarmenninir sum skjótast boða sýslumanninum frá, sum kannar, um nakar ber ábyrgd av hesum.

*C. Eigaraviðurskifti viðvíkjandi áseyðinum.*

§ 18. Í felagshaga skal, tá ið ikki annað er samtykt sambært § 20, allur áseyðurin vera feli hjá øllum eigarum eftir markatali teirra. Áseyðatalið ger hagastevnan av. Seyðurin fylgir jørðini í hvørji avhending og arvi; hann kann ikki við úttøku skiljast frá jørðini.

§ 19. Sjálvt um áseyðurin er feli, kann hagastýrið tó loyva røktingarmanni at hava eitt ávíst tal av seyði í haganum sum viðurgjald fyri arbeiði hansara, eins og hagastýrið kann loyva, at einstakir seyðir í tíðarbili ganga í haganum fyri eitt av stýrinum ásett viðurgjald, ið legst til hagan.

§ 20. Kenning í seyðaskipanini ella pørtum av henni er bert loyvd við fylgjandi treytum:

1. Viðtøka um hetta skal vera samtykt á hagastevnu, sum er kallað saman við í minsta lagi 3 mánaða varningi. Fyri at samtyktin fær gildi krevst, at hon er samtykt av so mongum við atkvøðurætti, ið tilsamans eru í minsta lagi:

a) tveir triðingar av øllum við atkvøðurætti og

b) helvtini av øllum markatalinum í haganum.

2. Í viðtøkuni skal vera skilað til, hvussu stór skipanin skal vera í øllum haganum, og um øll skipanin skal vera kenning ella bert ein partur av henni, og hvør.

3. Í viðtøkuni skal harafturat vera skilað til:

a) at røktin verður umsitin av røktingarmonnum, valdir á hagastevnuni ella av stýrinum, sbr. § 9;

b) at seyður hjá hvørjum eigara sær - um-

valgt af Haugestævnet eller Bestyrelsen, jfr. § 9;
b) at de enhver Ejer særlig tilhørende Faar - foruden det for Haugen bestemte Mærke (§ 13) - skal have Særmærker, der skal godkendes af Sysselmanden, førend de bruges;
c) at Avlsvæddere skal udtages forlods og godtgøres Ejeren af vedkommende efter Vurdering.

§ 21. Haugens Røgtere skal straks angive for Sysselmanden alt imod § 20 stridende Særeje i Faarebesætningen.

§ 22. Særeje kan igen ophæves ved Vedtægt, oprettet paa Haugestævne, sammenkaldt med mindst 3 Maaneders Varsel. Til gyldig Beslutning kræves, at den er vedtaget af saa mange stemmeberettigede, som tilsammen udgør mindst:
a) Halvdelen af samtlige stemmeberettigedes Antal og
b) en Trediedel af hele Haugens Marketal.

§ 23. Naar Særejet ophører, skal de Ejere, som ikke har fuld Besætning, købe af dem, som har Faar tilovers, indtil alle har Faar i Forhold til deres Marketal. De Faar, som saaledes sælges og købes af Haugens Ejere indbyrdes, betales med fuld Værdi. Tvistes Parterne om Værdien, fastsættes den ved lovligt Skøn.

§ 24.1) Skøde eller andet Overdragelsesdokument vedrørende Jord i Hauge, hvor Særeje gælder, skal angive, hvor mange Særejefaar der følger med Jorden. Undlades det, skal der ved Tinglæsningen gives Dokumentet Retsanmærkning.
Ved Fæsteforandring eller Overdragelse af Tjenestejord i Hauge, hvor Særeje gælder, skal, naar den fratrædende Besidder ejer Odelsjord i samme Hauge, hans hele Faarebesætning fordeles lige paa al hans Jord efter Marketal.

Kapitel 5.
Heste.

§ 25. Antallet af Haugens Besætning af Heste fastsættes af Haugens Ejer eller, om det er Fælleshauge, af Haugestævne, sammenkaldt med mindst 1 Maaneds Varsel. Beslutter Haugens

framt tað ávísa hagamarkið (§13) - skal hava frámerki, sum sýslumaðurin skal góðkenna, áðrenn tað verður nýtt;
c) at brundseyðir skulu frammanundan takast úr og samsýnast eigaranum eftir meting.

§ 21. Røktingarmenninir skulu beinanvegin boða sýslumanninum frá allari kenning í seyðaskipanini, sum gongur í móti § 20.

§ 22. Kenning kann sigast úr gildi við viðtøku, samtykt á hagastevnu, kallað saman við í minsta lagi 3 mánaða varningi. Fyri at samtyktin fær gildi krevst, at hon er samtykt av so mongum við atkvøðurætti, ið tilsamans í minsta lagi eru:
a) helvtin av talinum á øllum við atkvøðurætti og
b) einum triðingi av øllum markatalinum í haganum.

§ 23. Tá ið kenning dettur burtur, skulu teir eigarar, sum ikki hava fulla skipan, keypa frá teimum, sum hava seyð til avlops, til allir hava seyð sambært markatali teirra. Tann seyður, ið soleiðis verður seldur og keyptur av hagaeigarum sína millum, verður goldin við fullum virði. Eru partarnir ósamdir um virðið, verður tað ásett við lógligari meting.

§ 24. 1) Skeyti ella annað avhendingarskjal viðvíkjandi hagajørð, har ið kenning er, skal skila til, hvussu nógvur kenningarseyður fylgir við jørðini. Um so ikki er, skal tað við tinglesingini tilskilast skjalinum rættarummæli.
Við festiskifti ella avhending av tænastujørð í haga, har ið kenning, er skal, tá ið fráfarandi brúkari eigur ogn í sama haga, øll seyðaskipan hansara býtast líka til alla jørð hansara eftir markatali.

5. Kapittul.
Ross.

§ 25. Rossaskipanina í haganum ger hagaeigarin av ella, um tað er felagshagi, hagastevnan, kallað saman við í minsta lagi 1. mánaðar varningi. Ger hagaeigarin (hagastevnan) av, at skipanin

Ejer (Haugestævnet), at Besætningen skal være større end 1 Hest for hver Mark Jord, skal Beslutningen snarest muligt meldes til Sysselmanden. Denne sørger for, at Bekendtgørelse derom sker i de nærmestliggende Bygder ved Opslag eller paa anden brugelig Maade. Uanset den af Haugens Ejer (Haugestævnet) ifølge første Punktum tagne Bestemmelse kan Ejerne af Bygdens Hauger i Forening ved Vedtægt paa Grandestævne bestemme, at der i Bygdens Hauger skal kunne holdes indtil 1 Hest for hverk Mark Jord.

Føl under 1 Aar medregnes ikke i fornævnte Henseende.

skal vera størri enn 1 ross upp á mørkina, skal avgerðin sum skjótast boðast sýslumanninum. Hesin sær til at kunngera hetta í næstu bygdunum við uppslagi ella á annan nýtiligan hátt. Hóast ta av hagaeigaranum (hagastevnuni) sambært fyrsta punktum tiknu avgerð kunnu hagaeigararnir í bygdini í felag við grannastevnuviðtøku gera av, at tað í bygdarhøgunum skal kunna frælsast upp til 1 ross á mørkina.

Fyl undir 1 ár telja ikki við í undannevnda føri.

§ 26. Lodsejer i Fælleshauge kan udleje sin Ret til Hestehold. De enkelte Lodsejere kan selv afgøre, om Besætningen skal være i Særeje eller i Sameje mellem nogle eller alle Lodsejere.

§ 26. Luteigari í felagshaga kann leiga út rætt sín til rossahald. Teir einstøku luteigararnir kunnu sjálvir gera av, um skipanin skal vera kenning ella feli hjá nøkrum ella øllum luteigarunum.

§ 27. Sysselmanden skal hvert Aar ved Grandestævne i hver Bygd affordre Bygdemændene Oplysning om, hvor mange Heste der holdes i Bygden, og i hvilke Hauger de holdes, og derom gøre Tilførsel i Politiprotokollen. Enhver, der holder Hest i nogen Hauge i Bygden, skal da, saafremt nogen Lodsejer i saadan Hauge kræver det, opgive, med hvilken Ret han holder Hesten.

§ 27. Sýslumaðurin skal hvørt ár á grannastevnu krevja frágreiðing frá bygdarmonnunum um, hvussu mong ross eru í bygdini, og í hvørjum høgum tey hava frælsi, og skriva um hetta í løgreglugerðabókina. Hvør tann, sum hevur ross í nøkrum haga í bygdini, skal tá, um nakar luteigari í tílíkum haga krevur tað, greiða frá, við hvørjum rætti hann hevur ross.

## Kapitel 6.
## Gæs.

§ 28. Bestemmelse om, hvorvidt det skal være tilladt at holde Gæs i Haugen (derunder om Antal, Betaling m.v.), tages af Haugens Ejer (i Fælleshauge Haugestævnet).

## 6. Kapittul.
## Gæs.

§ 28. Viðtøku um, hvørt loyvt skal vera at hava gæs í haganum (við í tí tal, gjald v. m.), ger hagaeigarin av (í felagshaga hagastevnan).

# TREDIE AFSNIT.
# FORSKELLIGE BESTEMMELSER OM HAUGENS DRIFT.

## Kapitel 7.

§ 29. I Fælleshauge tilkommer Udøvelsen af Retten til Faarehold, Hestehold og Gaasehold i haugen saavel som af alle andre til Haugen knyttede Rettigheder, om hvilke ikke andet i Lovgivningen er bestemt, enhver Ejer i Forhold til hans Marketal.

I samme Forhold fordeles Indtægt og Udgift ved al fælles Brug af Haugen eller dertil knyttede Rettigheder saavel som alt derved forefaldende Arbejde.

# TRIÐI PARTUR
# YMISKAR REGLUR UM HAGARØKTINA.

## 7. Kapittul.

§ 29. Í felagshaga eigur hvør eigari samsvarandi markatali sínum nýtslurættin til seyðahald, rossahald og gásahald í haganum eins og øll til hagan liggjandi rættindi, sum ikki annað í lóggávuni er ásett um.

Samsvarandi hesum verður inntøka og útreiðsla býtt av allari felagsnýtslu av haganum ella til hendan liggjandi rættindi eins væl og alt arbeiði, ið kemur fyri av hesum.

§ 30. Hvert 10de Aar skal der ved Sysselmandens Foranstaltning paa Grandestævne vælges Mænd til at befare ethvert Markeskel for Bygdens Hauger. De vælges af og blandt Haugernes Ejere og Brugere, for hver Hauge med Stemmeflerhed efter Marketal. Foretages intet Valg, udnævnes de af Sysselmanden.

Mændene skal snarest muligt derefter ved Samgang befare Haugernes Markeskel. Tiden for Forretningen bestemmes i Tilfælde af Uenighed af den ældste af Mændene. Efter Befaringen skal de hver især underrette de paagældende Haugers Ejere (i Fælleshauge Bestyrelsen, om saadan er til) om Udfaldet af Befaringen; skulde der under denne vise sig Tvivl om, hvor rette Markeskel er, maa Mændene ikke træffe nogen Afgørelse herom.

Udgiften ved Markeskels Afsætning og Vedligeholdelse fordeles lige mellem de tilgrænsende Hauger.

§ 30. 10unda hvørt ár skal sýslumaður skipa fyri á grannastevnu at velja menn at ganga um mark í bygdarhøgunum. Teir verða valdir av hagaeigarunum og brúkarunum teirra millum fyri hvønn haga við atkvøðumeiriluta eftir markatali. Verður einki val, tilnevnir sýslumaðurin teir.

Menninir skulu síðan sum skjótast ganga um hagamarkini í samgongu. Er ósemja um tað, ger tann elsti av monnunum av, nær í samgongan skal vera. Eftir marknagonguna skulu teir hvør sær siga teimum avvarðandi hagaeigarunum (í felagshaga stýrinum, um tílíkt er til) frá úrslitinum av marknagonguni; skuldi við hesum nakar ivi komið fram, hvar ið rætta markið er, kunnu menninir ikki taka avgerð um hetta.

Útreiðslan av at seta mark og viðlíkahald skal býtast líka millum hagarnar við sama markaskili.

§ 31. Haugerøgterne skal med Aftensvarsel foretage Tilsigelse til de vedkommende til alt Arbejde i Haugen, medmindre anderledes er bestemt af Haugestævnet; med samme Varsel skal de give Samgangsbud til de paagældende Grander, medmindre anderledes er vedtaget mellem disse og Haugens Ejere.

§ 31. Røktingarmenninir skulu við kvøldvarningi gera teimum avvarðandi boð til alt arbeiði í haganum, uttan so at hagastevnan hevur gjørt øðrvísi av; við sama varningi skulu teir gera avvarðandi grannum samgonguboð, uttan so at øðrvísi er samtykt teirra og hagaeigaranna millum.

§ 32.2) (avtikin)

§ 32.2) (avtikin)

§ 33.2) (avtikin)

§ 33.2) (avtikin)

## FJERDE AFSNIT.
## HAUGENS GRÆSNINGSRET FOR FAAR PAA INDMARK.

### Kapitel 8.

§ 34. Græsningsretten for Faar paa Bø eller anden Indmark tilkommer i Tiden fra den 25. Oktober til den 14. Maj overliggende Hauges Ejer, medmindre anderledes lovligt er fastsat.

I de Bygder, hvor Indmarken er matrikuleret i Henhold til Bekendtgørelse Nr. 198 af 15. Juli 1931, er hver Ejer, som har Særeje (kenning) og har Vintergræsningsret paa Indmarken, berettiget til at forbeholde sig denne paa sin Indmark udelukkende for egne Faar mod at give Afkald paa anden Græsningsret paa Indmark og mod i fornævnte Tidsrum at holde sin Indmark forsvarlig indhegnet.

## FJÓRÐI PARTUR.
## RÆTTURIN TIL BIT HJÁ HAGASEYÐI INNANGARÐS.

### 8. Kapittul.

§ 34. Rættin til bit hjá seyði á bøi ella aðrari innangarðsjørð eigur í tíðini frá 25. oktober til 14. mai eigarin av omanfyri liggjandi haga, uttan so at annað lógligt er fyrisett.

Í teimum bygdum, har ið innangarðsjørðin er matrikulerað sambært kunngerð nr. 198 frá 15. juli 1931, hevur hvør eigari, sum hevur kenning og eigur rætt til vetrarbit á bønum, heimild at tilskila sær hendan á sínum bøi einans fyri egnum seyði ímóti at siga frá sær annan rætt til bit á bøi og ímóti í omanfyri nevnda tíðarskeiði at halda bø sín væl og virðiliga innstikaðan.

Enhver Ejer eller Bruger af Indmark skal være berettiget til i den Tid, hvor Indmarken ligger aaben for Faaregræsning, at indhegne og frede for Faar Arealer, der er tilsaaet med kunstigt Græs, i to følgende Aar efter Tilsaaningen. Der kan dog kun indhegnes indtil 1/4 af paagældende Ejers eller Brugers Indmark. Haugestyret skal i hvert enkelt Tilfælde have Meddelelse om saadan Indhegning.

Hvør bøeigari ella brúkari skal hava heimild til í tíðini, sum bøurin liggur opin fyri seyðabiti, at stika inn og friða lendi, sum er sátt við grasfræi, í tvey fylgjandi ár eftir sáingina. Tó kann bert upp til 1/4 av bønum hjá avvarðandi eigara ella brúkara stikast inn. Hagastýrið skal í hvørjum einstøkum føri fáa boð um tílíkt stik.

§ 35. Anses Forandring i Græsningstiden ønskelig eller nødvendig, bliver Sagen i Mangel af mindelig Forening at afgøre ved Landvæsenskommissionen.

Forlængelse af Græsningstiden om Vaaren kan ske med Samtykke af saa mange, som ejer eller bruger to Trediedele af den paagældende Indmark (beregnet efter Skattemarker), ligesom Forkortelse af Tiden baade om Vaaren og om Høsten kan foretages, naar saa mange samtykker, som ejer eller bruger to Trediedele af den eller de græsningsberettigede Hauger (beregnet efter Marketal). Saadan Afvigelse gælder dog kun for den enkelte Vaar eller Høst og ikke for længere Tid end 2 Uger.

Bestemmelserne i denne Paragraf finder ikke Anvendelse med Hensyn til Jord, der er indhegnet i Henhold til Regerne i § 34, 2det og 3die Stykke.

§ 35. Verður broyting av bittíðini ynskjandi ella neyðug, verður málið, um ikki loyst í sátt og semju, at gera av á landbúnaðarstevnuni.

Framleinging av bittíðini um várið kann fara fram við játtan frá so mongum, sum eiga ella brúka tveir triðingar av avvarðandi bøi (roknað eftir skattamerkum) eins og stytting av tíðini bæði um várið og um heystið kann fara fram, tá ið so mangir játta, sum eiga ella brúka tveir triðingar av honum ella av høgunum við bitrætti (roknað eftir markatali). Tílík frávik galda tó bert tað eina várið ella heystið og ikki longri tíð enn 2 vikur.

Reglurnar í hesi grein verða ikki at nýta viðvíkjandi jørð, ið er stikað inn sambært reglunum í § 34, 2. og 3. stykki.

§ 36.3) Græsningsretten paa opdyrkede Trøer kan saavel af Ejeren som af Haugeejeren forlanges endeligt afløst, f.s.v. saadan Afløsning ikke forhindrer Vintergræsning paa de ikke-vinterfredede Arealer. Desuden kan Afløsaning paa samme Maade kræves, naar det paagældende Areal agtes benyttet til Træplantning eller Anlæg af Have eller Fisketørringsplads eller lignende med Græsning uforeneligt Brug. Afløsningen sker mod fuld Erstatning i Penge af Græsningsrettens Værdi.

